Í eykatingsetuni í mars 1943 samtykti tingið við 16 atkvøðum móti ongari at broyta grein 5 í lógini viðvikjandi valdgerðarrøttinum, soleiðis at dýrtíðarviðbótin til arbeiðsløni skuldi muna eitt oyra fyri hvørt prístalsstigið oman fyri prístalið 100, men tá ið prístallið og harav løntallið kom, skuldi dýrtíðarviðbótin ikki minnka við einum oyra fyri prístalsstigið longur enn niður til prístalið 250. Prístalsstigið niðanfyri 250 skuldi í løntallinum bert muna 0,85 oyra, og tá ið prístalið var komið niður aftur til 100, skuldi dýrtíðarviðbótaminnkingin steðga.

Hin 10. apríl 1943 varð feldur ein valdgerðardómur í sáttmálatrætu millum Havnar arbeiðsmannafelag og Havnar arbeiðsgevarafelag. Hesin dómur var ikki arbeiðsmonnum til vildar. Teir hovdu serliga yuskt hægri yvirtíðarløn og prístalsstigið at muna sambart tingsins samtykt, ið varð sett í gildi frá 1. apríl 1943. Teir hildu fram, at tá tingið hevði samtykt, hvussu prístalsstigið skuldi muna í louhækking og -lækking, var valdgerðarrætturin bundin at rætta seg eftir tí uttan mun til, annaðhvørt tað var ásett ella ikki ásett, hvørt ið broytingin av nevndi grein 5 skuldi koma í gildi. Teir skiftu tað soleiðis, at tá ið valdgerðarlógin var í gildi, kom tann viðtikna broytingin samstundis harvið eisini at vera í gildi frá degnum, ið broytingin var lýst

gyldug. Teir hildu tí, at valdgerðarrætturin var eitt brot av valdgerðarlógini, og at teir harvið eisini vóru loystir frá verkfalls- og verkbandslógini og soleiðis fritt staddir viðvíkjandi teimum stigum, teir hildu vera beinast at taka fyri at vinna sømdir í kravi sínum um, at prístalsstigið skuldi muna, soleiðis sum tingið í samtykt síni óivað hevði ætlað, við tað at prísstøðgingarlógin segði, at lønjavningar skuldu fara fram tann 1. apríl sambart prístalið.

Arbeiðararnir støðgaðu so arbeiði sínum og heittu á tingið um at koma saman fyri at rætta tað ranga, sum teir hildu vera í valdgerðardómlnum. Landsnevndin kom saman og avgjørdi at ganga arbeiðsmonnunum til vildar og stevna tingmonnunum til eykatingsetu til viðgerðar av arbeiðsósemjuni, men bað Havnar arbeiðsmannafelag um at steðga verkfallinum. Arbeiðararnir gjørdu nevndini til vildar og aftur varð farið til arbeiðis.

Nevndin, ið hevur haft hetta mál til viðgerðar og haft tingingar við umboðsmenn fyri arbeiðaranna og arbeiðsgevaranna felog, umboðsmenn fyri bretska hervaldið og príseftiransingarráðið, skal úttala, at tað avgjørt var tingsins ætlan við viðtøkuni av broytingini av grein 5 í lógini viðvíkjandi valdgerðarrættinum, at valdgerðarrætturin í sínum viðgerðum av arbeiðstrætum, sum møguliga koma av fyristandandi lønjavningum, skuldi vera bundin at áseta, at prístalið skuldi muna soleiðis, sum lógarbroytingin segði. Tá ið tað í valdgerðardóminum er sagt frá, at menn ivast í, um viðtøka tingsins viðvíkjandi, hvussu prístalsstigið skal muna, er gyldug, tessvegna at hin vanliga tingskipanin ikki varð fylgd, heldur nevndin fram, at allar tingsins samtyktir, sum eru viðtiknar av einum „kvalificeraðum" meirluta, eru gyldugar. Tingskipanin er fyri tinglimirnar, og tá ið ein „kvalificeraður" meirluti samtykkir eitt mál á ein sambart tingskipanina óregluligan hátt uttan mótmæli frá nøkrum tinglimi, hevur sami meirluti í síni atkvøðugreiðslu fyri málinum óbeinleiðis samtykt at falla frá viðgerðarreglunum í tingskipanini.

Ein meirluti P. M. Dam, J. P. Davidsen, L. Zachariasen, P. Petersen og A. Sørensen heldur, at tá ið hitt almenna hevur í kvittanum at steðga øllum prís- og lønvøkstri, er tað samfelagsins skylda at gera tað soleiðis, at prísir og lønir verunliga eru samsvarandi. Tað kann ikki sigast, at arbeiðsmannalønirnar hava verið samsvarandi við prísirnar, av tí at arbeiðsmannalønin bert er vaksin 86 % í mun til prísvøksturin. Meirlutin heldur tí, tað er beint, at skipað verður so, at lønvøksturin verður eins stórur og prísvøksturin og heldur tí fast við, at prístalsstigið skal muna eitt oyra í lønvøkstrinum. Tá ið tað er ein verunleiki, at arbeiðsmenninir líka inntil prístalið 150 bert hava fingið ein lønvøkstur, sum fyri vaksnar menn hevur liglið 15 % undir prísvøkstrinum, heldur meirlutin tað vera rætt, at løuminkanin, tá ið prísfallið kemur, bert skal vera 0,85 fyri hvørt prístalsstigið niðanfyri 250.

Sum áður er ásannað av tinginum, kann grundløn arbeiðaranna ikki sigast at vera rímliga høg, og heldur meirlutin tað vera beint at tryggja arbeiðaranum móti, at hin samlaða arbeiðslønin aftur skal koma niður til grundlønina og setur tí uppskot fram um, at lønfallið skal steðga við prístalið 100.

Meirlutin heldur principielt fram, at tað er beint, at tær lágu grundlønirnar fáa procentliga meiri dýrtíðarviðbót enn tær hægri, men er komin ásamt um ikki í hesum viðfangi við dýrtíðarviðbótini at broyta tað higartil vanliga brúkta løningarlag, men lata dýrtíðarviðbótina standa í mun til grundlønina nakað eins fyri allar vaksnar, hálvvaksnar og kvinnuligar arbeiðarar.

Meirlutin er eisini samdur um í hesum bili at skipa so fyri, at tað skal standa til arbeiðarar sum ein rættur, ið teir kunnu krevja og fáa, tá ið talan er um, hvørja dýrtíðarviðbót teir skulu hava, og ikki sum eitt avgerð uttan mun til, hvat ið arbeiðarin sjálvur yuskir, og at tað skal vera

møguligt hjá felløgum undir serligum viðurskiftum at gera serstakar sáttmálar við arbeiðsgevarar.

Meirilutin ynskir at halda fram, at teir ikki á nakran hátt hava tikið støðu fyri einum avgjørdum løningarprincippi, men at teirra støða er tikin av praktiskum grundum, sambart viðurskiftini, soleiðis sum tey nú liggja fyri.

Minnilutin A. Samuelsen og J. Rasmussen seta eingki uppskot fram, men vísa á, at Sambandsmenn ikki greiddu atkvøðu fyri „Ændringer i Midlertidige Bestemmelser for Færøerne Nr. 68 af 15. December 1941 om Afgørelse af Uoverensstemmelser i Arbejdsforhold". Annars heldur sami minniluti fram, at málið er ikki partamál, og at tinglimirnir í sambandsflokkinum tessvegna eru frír viðvíkjandi, hvørja støðu teir taka til málið. Teir vilja grunda støðu teirra í tingsalinum.

Uppskot

frá meirilutanum P. M. Dam, J. P. Davidsen, L. Zachariasen, P. Petersen og A. Sørensen:

Midlertidige Bestemmelser for Færøerne om Pristalstillæg til Arbejdsløn.

§ 1.

I alle Arbejdsforhold, hvori Arbejdsløn i Henhold til Sædvane, Overenskomst eller Voldgiftsafgørelse hidtil er beregnet som en bestemt Grundløn pr. Time med Tillæg efter Pristallet, skal dette Tillæg fra nærværende Bestemmelsers Ikrafttræden at regne udgøre een Øre pr. Pristalspoint over 100, medmindre andet frivilligt aftales.

Dersom Pristalstillægget i Henhold til Sædvane, Overenskomst eller Voldgiftsafgørelse nu er fastsat til et mindre Beløb end 0,85 Øre pr. Pristalspoint, skal Tillægget fra samme Tidspunkt som foran bestemt forhøjes med 100/85, saaledes at Timetillægget forhøjes til det nærmeste hele Ørebeløb.

Foranstaaende Regler finder ogsaa Anvendelse i Tilfælde, hvor der ikke hidtil har bestaaet en Lønordning mellem Arbejdsgivere og Arbejderorganisationer, saaledes at Lønnen i disse Tilfælde, medmindre andet frivilligt aftales, skal fastsættes til en bestemt Grundløn pr. Time med Pristalstillæg efter Reglerne i 1ste og 2det Stykke.

§ 2.

Den i § 1 fastsatte Beregning af Pristalstillægget finder Anvendelse, saalænge Pristallet er over 250.

Naar Pristallet er 250, udgør Pristalstillægget 150 Øre pr. Time eller det forholdsmæssigt lavere Beløb, som følger af Bestemmelserne i § 1, Stk. 2.

Naar Pristallet falder under 250, skal Pristalstillægget nedsættes fra 150 Øre med 0,85 Øre pr. Pristalspoint eller med det lavere Beløb, der i Henhold til Sædvane, Overenskomst eller Voldgiftsafgørelse nu maatte være gældende for andre end voksne, mandlige Arbejdere.

Pristalsreduktionen ophører ved Pristal 100.

§ 3.

Nærværende Bestemmelser træder i Kraft straks.

Samtidig ophæves Kundgørelse Nr. 3 af 1. April 1943.

Reglerne i Kundgørelse Nr. 6 af 23. Marts 1943 om Priser og Arbejdslønninger m. m. forbliver uændret i Kraft.

Uppskot meirlutans samtykt 16—0.

Álit II:

Felagið fyri handils- og skrivstovufólk í Havn hevur í rití av 13/4 1948 vent sær til løgtingið við spurninginum, um prissteðgingarlógin av 15/3 1943 umfatar tey fólk, ið arbeiða á skrivstovu og í krambúð, og um so er, á hvønn hátt hon virkar.

Felagið vísir á, at fastlønt, ið standa uttan fyri arbeiðsmannafeløgini, eru tey, ið mest kenna sviðan av teimum høgu vøruprísunum, tí tað er bert í fáum førum, at kantórlønir og krambælønir eru hækkaðar samsvarandi pristalinum.

Felagið heldur, at um lønsteðgingarlógin eisini røkkur hesi menniskju, má tingið ikki eina syrgja fyri, at lønirnar hækka samsvarandi pristalinum, men eisini á ein ella annan hátt skipa fyri grundlønunum, soleiðis at arbeiðsgevararnir ikki kunna hava fríar hendur at leggja tær eftir egnum tykki.

Nevndin hevur haft hetta mál til viðgerðar, og heldur fram, at viðvíkjandi lønvakstrarspurninginum er at siga, at hann eigur at verða avgjørdur annaðhvørt í frínum vilja av pørtunum ella, um tað ikki er gjørligt, av valdgerðarrættinum.

Viðvíkjandi spurninginum, hvussu langt prissteðgingarlógin røkkur, loyvir nevndin sær at vísa felagnum til niðanfyri standandi ummæli frá Føroya amti:

„Hr. Udvalgsformanden har til Amtet afgivet den hoslagt tilbagefølgende Skrivelse af 13. April 1948 fra Felag fyri Handils- og Skrivstovufólk og har anmodet Amtet om en Udtalelse over Skrivelsen.

Amtet gaar ud fra, at Udvalget i hvert Fald paa nærværende Tidspunkt kun ønsker Amtets Udtalelse med Hensyn til Foreningens 2. Spørgsmaal, nemlig:

1. om Bestemmelserne i Kundgørelse Nr. 6 af 23. Marts 1943 om Priser, Arbejdslønninger m. v. omfatter Personer, der arbejder paa Kontor og i Butik, og i bekræftende Fald

2. paa hvilken Maade Lovbestemmelserne virker.

Disse Spørgsmaal kan Amtet besvare saaledes:

1. Kundgørelsen omfatter ifølge dens § 5 „Arbejdere og Funktionærer" og for at tydeliggøre, hvad Lovgiverens Mening har været med Ordet „Funktionærer" er der tilføjet en Henvisning til Lov Nr. 168 af 15. April 1938, den saakaldte „Funktionærlov". Meningen har været, at Kundgørelsen af 23. Marts 1943 skal omfatte samme Funktionærer som „Funktionærloven", og denne sidste Lovs § 1 definerer udtrykkelig Begrebet Funktionær, nemlig saaledes:

„Ved Privatfunktionærer forstaas i denne Lov følgende i private Erhvervsvirksomheder inden for Handel, Kontorvirksomhed, Industri, Haandværk, Landbrug, Skov- og Havebrug, Beværternæring, Forlystelsesetablissementer, Transportvirksomhed og Jordarbejde beskæftigede Personer:

a) ved Køb og Salg eller ved Kontorarbejde eller Ingerarbejde beskæftigede Handels- eller Kontormedhjælpere.

b) Personer, hvis Arbejde i den paagældende Stilling er af over-

vejende handelsmæssig eller kontormæssig Art eller udelukkende eller for største Delens Vedkommende bestaar i paa Arbejdsgiverens Vegne at lede eller føre Tilsyn med Udførelsen af andres Arbejde."

Foreningens første Spørgsmaal maa herefter besvares bekræftende.

2. Efter Amtets Formening maa Kundgørelsen herefter forsaavidt angaar Funktionærer medføre, at det er tilladt Arbejdsgiverne at regulere Lønningerne til deres Funktionærer med det yderligere Dyrtidstillæg efter Pristal 269, som Funktionæren har Krav paa efter Sædvane, udtrykkelig Overenskomst eller tidligere Voldgiftsafgørelse, medens al anden Lønforhøjelse pr. 1. April 1943 eller senere, saalænge Kundgørelsen er i Kraft, er forbudt. I de formentlig ret talrige Tilfælde, hvor Funktionærer ikke har noget direkte Krav paa Dyrtidstillæg efter Pristallet, for Eksempel hvor deres Lønning er fastsat til en samlet maanedlig Sum uden at være opdelt i Grundløn og Dyrtidstillæg, vil det efter Amtets Opfattelse være naturligt og i Overensstemmelse med Kundgørelsens Forudsætninger, at Principalerne pr. 1. April 1943 regulerer Lønningerne med et passende Tillæg svarende til Pristalsstigningerne siden sidste Regulering. Det maa dog fremhæves, at selve Kundgørelsen efter sit Indhold ikke paalægger Principalerne nogen *Pligt* til at betale højere Lønninger pr. 1. April 1943, men kun uanset det principielle og ubetingede Lønstop tillader en (sidste) Lønregulering pr. 1. April for at bringe Lønningerne paa Højde med eller i passende Forhold til Prisniveauet pr. 15. Marts 1943 (Pristallet pr. 1. April 1943)."

Uppskot

Eitt eintak av álitinum verður sent umsøkjaranum.

Samtykt 18—0.

Álit C:

Føroya arbeiðsgevarafelag hevur sent løgtinginum skriv av 17. april 1943, hareftir tað ger tinginum kunnugt, at felagið hevur sett fram endurgjaldskrav fyri tap av ólógligum verkfalli.

Felagið heldur, at tingið má vera samt við teir í, at arbeiðsgevarafelagslimirnir hava krav uppá endurgjald, men vísir á, at ymsir arbeiðarir hava borið fram ta hugsan, at endurgjaldakravið eigur at verða reist móti løgtinginum, ið tað heldur hevur orsakað verkfallið við lógini nr. 8 av 1938.

Felagið heldur, at løgtingið eigur at hugsa um málið, og tað vil hava at vita, um løgtingið kennir seg endurgjaldsskyldugt, ella í øðrum falli, um løgtingið heldur, at endurgjaldsrættarmállið eigur at fara fram ímóti løgtinginum ella Havnar arbeiðsmannafelagi.

Nevndin, ið hevur haft málið til viðgerðar, heldur, at ikki kann vera talan um, at Havnar arbeiðsgevarafelag eigur nakað endurgjaldskrav móti løgtinginum. Viðvikjandi rættarmálspurningunum ræður nevndin einmælt at svara, at felagið ger beinast í at leggja sak hvørki ímóti tinginum ella Havnar arbeiðsmannafelag.

Uppskot:

Tingið viðgongur ikki nakra skyldu at rinda Havnar arbeiðsgevarafelag verkfallsendurgjald.

Viðvíkjandi um Havnar arbeiðsgevarafelag skal leggja endurgjaldssak móti løgtinginum ella Havnar arbeiðsmannafelag, heldur tingið, at felagið ger beinast ikki at leggja sak.

Samtykt 21—0.

---

2. Dýrtíðarviðbót til tænastumenn o. a.

Álit:

Amtmaðurin hevur við brævi, dagsett 14. apríl í ár, lagt fyri tingið uppskot til lóg um dýrtíðarviðbót til tænastumenn o. fl. fyri fíggjarárið 1943/44 og uppskot til lóg um dýrtíðarviðbót fyri fíggjarárið 1943/44 til ellis- og avlamisrentunjótarar, sinnissjúk í heimarøkt og einkjubørn.

Av tí at prístalið er hækkað, verður meirútreiðslan fyri fíggjarárið 1943/44 roknað til 392.000 kr., harav ríkiskassin rindar 155.000 kr. og amtsgrunnurin 237.000 kr.

Í fíggjarætlanini, ið tingið samtykti í vanligu tingsetuni, er roknað 510.000 kr. til dýrtíðarviðbót, men útreiðslur tingsins verða ca. 150.000 kr. størri.

Nevndin vísir til bræv amtmannsins og setir fram hetta

Uppskot:

I. Tingið samtykkir óbroytt uppskot amtmannsins til Midlertidige Bestemmelser for Færøerne om Dyrtidstillæg til Tjenestemænd m. fl. for Finansaaret 1943/44.

II. Tingið samtykkir óbroytt uppskot amtmannsins til Midlertidige Bestemmelser for Færøerne om Dyrtidstillæg for Finansaaret 1943/44 til Alders- og Invaliderentenydere, Personer i kontrolleret Familiepleje samt Enkebørn.

Samtykt 21—0.

---

3. Skipakeyp.

Álit frá nevndini (undantikið R. Rasmussen):

P. M. Dam, løgtingsmaður, legði hin 17/4 1943 soljóðandi rit á tingborð:

„Hin stóri skipamissurin, vit hava verið fyri, síðan heimsbardagin brann á, hevur ikki bert volt okkum sorg og harm við, at eitt stórt tal av okkara bestu valamonnum er farið, men hann hevur elvt okkara landi hitt tungasta fíggjarhøgg, ið tað hevur verið fyri í seinasta mannamiuni.

Einki endurgjald gevst fyri mannalívið. Tann sorg og tann tregi, ið deyðin ber við sær, hevur ongan linna uttan tíðina og tað, ið samfelagið kann veita teim syrgjandi fyri at halda neyðina burtur.

Men tíbetur er tað so, at amboð, ið farst, kann endurnýggjast, um áræði og evnini eru til steðis.

Tað liggur tí fyri ein part — ein stóran part — á fólkinum sjálvum, um tann fíggjarligi skaði, ið hendur er okkum av vanlukkunum á sjónum, kann bøtast.

Allar góðar kreftur skylda fosturlandinum og fólkinum at leggja orkuna á at veita til vega tey arbeiðstól, sum tørvur er á hjá okkara fólki, og sum ikki bert kann geva viðurgjald aftur fyri missin, men sum kann stimbra okkara fólk at ganga víðari og gerast fíggjarliga og mentunarliga stimbrari og sterkari.

Roynt hevur verið á ymiskan hátt at fáa til vega før í staðin fyri tey, ið farin eru, men hetta hevur verið tvørligt fyri ikki at siga ómøguligt. Øll før, ið annars kundu vera fal at fáa, hava stríðsmaktirnar, ið vit liva ímillum, brúkt ella lagt hondina á fyri at hava til reiðar til brúks.

Hetta fall øllum monnum, ið framfúsir og virkishugaðir eru, svárt og tungt. Tí harvið kendist tað, eins og læst varð fyri øllum framtaksmøguleikum hjá okkara sjóvinnufólki. Tað komu tí sum eini gleðiboð, tá tað frættist frá Jens av Reyni stjóra, at royudirnar at fáa veiðufør ikki longur vóru so myrkar, men at tað stóð til Føroyingar, um teir kundu fáa nýtilig nýmótans veiðufør. Hann hevði fingið at vita frá stjórnarmonnum og virkisharrum í Bretlandi, at Føroyingar kundu fáa, ið hvussu var bygt 10 nýggjar motortrolarar. Treytirnar vóru tó, at tikið mátti verða við tilboðnum áðrenn 1. mai ella seinast í fyrstu viku av mai.

Hesi boð hava sett røring í og skapt vónir millum fiskifólk okkara. Vil tað verða ein stór vanlukka fyri landið, um nøkur av hesum førunum gleppa Føroyum av hondum. Hetta má landið byrgja fyri.

Tá tað liggur so illa fyri, at tað er ivasamt, um allir hesir trolarir verða umbiðnir av einstakum monnum ella felløgum, og tað sum sagt av sonnum kann sigast at vera ein landasak, at vit fáa hesi før, loyvi og mær við heaum at bera í uppskot, at tingið samtykkir at umbiðja teir trolarar, ið ikki áðrenn 1. mai verða umbiðnir av veiðumonnum og vinnufeløgum.

Eg havi hugsað mær, at vit fingu peningin til hetta stóra mál soleiðis til vega:

Frá vinnulánsgrunninum	800.000 kr.
Frá valutagrunninum	500.000 kr.
Frá vørutryggingargrunninum.....	300.000 kr.
Frá tryggingarsambandinum	1.000.000 kr.
tilsamans	2.600.000 kr.

Hin árestandi peningurin verður fingin til vega við einum bundnum láni soleiðis at hvør maður við ársinntøku 25.000 kr. og haryvir í 1942 skal vera skyldugur at lána tinginum 20 % av inntøku sínu til køyp av veiðiførum. Tó skal tað vera so, at teir menn, ið reka fiskivinnu og sjálvir keypa før, kunnu verða undantiknir hesari skyldu.

Tá málið hastar, loyvi eg mær at biðja tað háttvirda løgting um at viðgera tað og taka støðu í hesi tingsetu."

Málið kom til viðgerðar sama dag og varð beint í undirritaðu nevnd.

Nevndin hevur haft samráðingar við Jens av Reyni, stjóra, ið hevur greitt nevndini frá viðvíkjandi, hvussu málið liggur:

Føroyingar, ið hava strongt harðliga á Bretar at fáa annaðhvørt brúkt ella nýbygd skip í staðin fyri tey, ið farin eru, hava nú fingið tilboð um at fáá 10 nýggjar modernaðar trætrolarar við nakað tað sama veiðievni, sum teir vanligu trolarar, vit hava her á landi. Teir kosta um 23.000 Stpd. men útgjørdir til fiskiskip heldur hann at teir koma upp ímóti 600.000 kr.

Sambart rakstraractlan fyri ein fiskitúr hjá einum av hesum trolarum vil ein fiskitúrur uppá 6.000 Stpd. geva manningini um 40.000 kr. í hýru og skipinum sjálvum einar 60.000 kr. í yvirskuti.

Harra Jens av Reyni upplýsti, at treytirnar fyri at fáa hesi før, vóru, at kjálirnir skuldu vera lagdir innan 31/5, tað vil siga, at vit máttu hava tikið við tilboðnum innan 1/5 ella longst seinast í fyrstu viku í mai. Peningurin skal rindast í 6 stigum, soleiðis sum arbeiðið fer fram. Tann síðsti sættingurin skal verða goldin við móttøkuna av skipunum.

Nevndin hevur eisini haft samráðingar við trolarakønar menn og skal loyva sær at taka uppaftur ummæli frá Esmar Fugløy, skipara:

„Førini eru góð. Støðd og máskina hóskandi. Aðrir menn hava brúkt sama slag av skipum og halda tey vera góð. Liggur ikki so nógv á annaðhvørt skipini eru av træ ella av jarni, men tað er einki verri, at tey eru av træ. Elkskip hava dupult so langa livitíð sum jarnskip. Træskipini eru betri enn jarnskipini til fluttning av ferskfiski, tá træ er ringur varmaleiðart. Hetta hevur stóran týðning her í okkara heita golfstreymi og um summarið, tá ið sólin skínur. Motorskip eru betri enn dampskip av tí at tey kunna vera nógv longri í sjónum, og so statt halda til fjærri leiðir og kortini fáa góðar stundir at fiska.

Alt mátti gerast fyri at vit kunna fáa hesi skip, við teimum vildu vit verið førir í allari sjóvinnu at kappast við onnur lond."

Skipari Mortan Johannesen var eisini samdur við harra Fugløy í at støddin var góð, skipini vóru ikki ov stór í hvussu var, kortini dámdi honum betri jarnskip. Hann vildi tó halda, at træskip, sterkt bygd, vóru væl nýtilig, í hvussu er tey fyrstu árini, men hann undirstrikaði, at um Føroyingar gjørdu av at taka hesi skip, — og tað ráddi hann til — máttu teir ansa eftir, at tey verubliga vóru sterkt bygd.

Nevndin samtykti at geva Kr. Djurhuus, ið er formaður í tryggingarsambandinum at spyrja, um tryggingarsambandið var sinnað til at læna tinginum

frá Sjóvátryggingini	kr.	500.000
„ Krígsstryggingini	„	1.000.000
„ Vørutryggingini	„	300.000
Tilsamans		1.800.000

Sum svar uppá henda fyrispurning heyur nevndin fingið soljóðandi bræv:

„Gennem Lagtingsmand K. Djurhuus har Udvalget forespurgt Tryggingarsambandið „Føroyar", Krigsforsikringen for Fiskerskibe paa Færøerne og Varekrigsforsikringen, hvorvidt disse Institutter maatte være villige til at udlaane i alt ca. 2 Millioner Kroner til Lagtinget til Brug ved Indkøb af Trawlere i England.

Sagen har i Dag været til Behandling i Bestyrelserne for ovennævnte Forsikringer. Bestyrelserne vedtog at udtale, at man under Hensyn til Nødvendigheden af, at Forsikringernes Midler til enhver Tid maa være anbragt paa absolut likvid Maade af forsikringsmæssige Grunde ikke mener at kunne yde det omhandlede Laan."

Nevndin er samd um, at tað er av allra størsta týdningi fyri land okkara at fáa tey neyðturviligu skip til brúks, men hevur býtt seg í 3 minnilutar viðvíkjandi peninginum til keyp av skipunum.

Ein minniluti (P. M. Dam og L. Zachariasen) heldur fram:

Tingið eigur at gera tað, ið gerast kann, fyri at tryggja Føroyum hesar trolarar.

Tá ið tryggingarsambandið Føroyar hevur yvir 3 milliónur í tøkum peningi, sum fyri størsta partin er komin av sjóvinnuni, er tað rímiligt, at Tryggingarsambandið lænir ein stóran part — upp til helmingin — av hesum peningi til tingið til keyp av teimum skipum, ið standa okkum í boði, ið annars vilja gleppa okkum av hondum.

Tað má eisini haldast vera beint, at vinnulánsgrunnspeningurin verður brúktur til keyp av nútímans veiðiførum.

Viðvíkjandi kursjavningargrunninum er at siga, at hann er settur til tryggjan av peninginum ímóti kurstapi, og má so statt altíð vera tøkur, men tað má tó ætlast ikki at vera ov vágið at læna tinginum henda pening til sama endamál, bert tryggjað verður, at hann verður afturgoldin sum allraskjótast.

Málið, ið er til viðgerðar, er so týdningarmikið, at peningurin má tryggjast. Og tá ið tað er talan um sjóvinnuna, er tað rætt og rímiligt, at teir og tær, ið hava vunnið tær stóru inntøkurnar, styðja málið. Sjóvinnan er grundarlagið fyri hesum inntøkum. Tað er tí beint, tá ið skotið verður uppá, at hesar inntøkur skulu verða bundnar at styðja hetta mál.

Minniluti (Kr. Djurhuus og Jens Kr. Olsen) heldur fram, at flokkur teirra heldur tað vera skeivt at nýta Tryggingarsambandsins pening til keyp av skipunum, men skjóta uppá, at vinnulánsgrunnurin lænir 800.000 kr. og tingið lænir 700.000 kr. úr Færø Amts Sparekasse til trolarakeyp.

Minniluti (R. Rasmussen) vil viðvíkjandi peningaspurninginum siga støðu sína í tingsalinum.

Uppskot

frá minnilutanum (P. M. Dam og L. Zachariasen):

1. Midlertidige Bestemmelser for Færøerne om Oprettelse af en „Lánsgrunnur fyri Føroya sjóvinnu".

§ 1.

Der oprettes en „Lánsgrunnur fyri Føroya sjóvinnu" med det Formaal gennem Udlaan til Enkeltpersoner, Selskaber eller Sammenslutninger at muliggøre Anskaffelsen af Fiskefartøjer til Færøerne.

§ 2.

Laanefonden bestyres af Lagtingets Landsnævn, der fastsætter alle nærmere Regler om Fondens Virksomhed og om Udlaansvilkaar.

§ 3.

Fondens Midler tilvejebringes paa følgende Maade:

1. De Vinnulívsgrunnurin Føroya løgtings tilhørende Midler overføres til Fonden.
2. Ved Laan, nemlig
   a. et Laan paa 500000 Kr. fra Kursreguleringsfonden, jfr. § 4.,
   b. Laan fra Tryggingarsambandið „Føroyar" og dettes Underafdelinger samt fra „Varekrigsforsikringen", jfr. § 5,
   c. Laan fra Skatteydere, jfr. § 6.

For de af Laanefonden optagne Laan hæfter Amtsfonden.

§ 4.

Det i § 8 Nr. 2 a omhandlede Laan fra Kursreguleringsfonden forrentes med 3 % p. a. og tilbagebetales senest 1. November 1943.

§ 5.

De i § 3 Nr. 2 b omhandlede Laan fra Forsikringsselskaberne forrentes med 3 % p. a. og tilbagebetales med 20 % p. a., dog senest ved Selskabernes Likvidation. Hurtigere Tilbagebetaling kan bestemmes af Amtmanden, forsaavidt et eller flere af Selskabernes Likviditet kræver dette.

Selskaberne er pligtige til at udlaane til Laanefonden op til Halvdelen af deres likvide Midler pr. 31. December 1942 med Fradrag af Forpligtelser pr. samme Dato.

§ 6.

Enhver Skatteyder, som for Skatteaaret 1948 er ansat til personlig Skat til Amtskommunen til en skattepligtig Indkomst af 25.000 Kr. eller derover, skal udover den ham efter de nugældende Regler paalignede Skat ndrede et Tillæg paa 50 % af Skatten, hvilket Beløb forfalder til Betaling den 1. Juli 1948 og inddrives efter Reglerne for personlig Skat til Amtskommunen.

De i Henhold til foranstaaende betalte Beløb udgør Laan fra Skatteydere til Laanefonden (Amtsfonden), og der meddeles Skatteyderne en særlig Kvittering fra Oppebørselskontoret for Laanene. Laanene forrentes med 3 % p. a. og tilbagebetales den 1. Juli 1948.

§ 7.

Nærværende Bestemmelser træder i Kraft straks.

2. Tingið áleggur landsnevndini tingsins vegna innan 1. mai 1948 at umbiðja teir óumbidnu trolararuar, ið sambart upplýsingar frá Jens av Reyni, stjóra, av Bretum eru bodnir Føroyingum at fáa bygdar í Brettlandi.

3. Peningurin til trolarakeypið verður læntur úr „Lánsgrunni fyri Føroya Sjóvinnu".

Frá minnilutanum (Kr. Djurhuus og Jens Chr. Olsen):

1. Álagt verður landsnevndini tingsins vegna í Færø Amts Sparekasse at læna 700.000 kr. til útlán til keyp av veiðiførum (trolarum).

2. Tingið heldur tað vera beint, at vinnulánsgrunnurin lænir upp til 800.000 kr. til tað undir 1. nevnda endamál.

Álit frá R. Rasmussen:

Minnilutarnir Dam og Zachariasen og Djurhuus og Olsen hava báðir givið álit í hesum máli uttan at nevnt eitt orð um møguleikan fyri at fáa bygt skip her á landi. Eg má vísa til málið um skipagerð á tingi 1940 (sí løgtingstíðindi 1940, síðu 83) og halda fram, at tað er umráðandi hjá okkum Føroyingum at fáa nakað virki her á landi. Um vit nú lata tingið keypa allar hesar trolarar ger tað, at tað almenna ikki fer at hava eitt oyra til hjálpar fyri skipabygging her heima. Ein má eisini minnast til, at sjálvt bygglarbeiðið (arbeiðslønin) er ein so munagóður partur av einum nýggjum skipi, at tað ræður um at halda honda part her heima á landi. So statt kann eg bert vera við til at seta fram hetta

Uppskot:

1. Við peninginum í vinnulánsgrunninum og um neyðugt við at taka lán í Færø Amts Sparekasse upp til 700.000 kr. styðjar tingið við lánum ella tilskot upp til 150.000 kr. pr. trolara teir sum vilja keypa sær trolarar, soleiðis at í minsta lagi 3 ella 4 av hesum bátum koma til landið.
2. Tingið áleggur landsnevndini at seta seg í samband við bretsku stjórnina fyri at fáa tilfar til landið til skipabygging, soleiðis at arbeiðið á okkara egnu skipasmiðjum beinanvegin kann byrja.
3. Um tað ikki av einstøkum monnum verða umbidnir í minsta lagi 3 trolarar, verður álagt landsnevndini tingsins vegna at umbiða ein ella tveir trolarar, soleiðis at hetta amboð kann verða roynt til fullnar.

Uppskot til avgerðar (frá Kr. Djurhuus og J. Chr. Olsen):

1. Landsnævnet bemyndiges til paa Lagtingets Vegne at muliggøre Anskaffelse af nye Fiskefartøjer til Færøerne ved at udlaane til Køb af saadanne
dele de Vinnulívsgrunnur Føroya Løgtings tilhørende Midler ca. 800.000 Kr.,

dels et Beløb af 700.000 Kr., som Landsnævnet bemyndiges til paa Lagtingets Vegne og med Hæftelse for Amtsfonden at laane euten i et herværende Pengeinstitut eller ved offentligt Udbud.

Landsnævnet bemyndiges til at fastsætte Vilkaarene for Udlaanene og alle nærmere Enkeltheder.

2. Landsnævnet bemyndiges til om fornødent at sende en Mand til England for at ordne Enkelthederne vedrørende Levering af de af Direktør Jens av Reyni omtalte Trawlfartøjer.

Uppskotið frá Dam og Zachariasen fall 7—0.

Uppskotið frá Rasmussen pt. 1 fall 7—0, pt. 2 samtykt 20—0 og pt. 3 samtykt 13—0.

Uppskot til avgerðar frá Djurhuus og Olsen samtykt 20—0.

---

4. Kolagrefstur í Rangabotni.

Álit:

11. Maj 1942 blev der indgaaet en Overenskomst mellem Arbeiðsmannafelagið Fylkings Kulafdeling, Arbeiðsmanna Kolavirki, Trangisvaag, og P/f Føroya Kol, Tveraa, hvorefter Føroya Kol bortlejede til Arbeiðsmanna Kolavirki Retten til at benytte Selskabets Mineanlæg m. m.

Landsnævnet tiltraadte Overenskomsten og gav Tilsagn om forskellige Tilskud og Laan til Støtte for Driften. Repræsentanter for Arbeiðsmanna Kolavirki's Driftsraad har anmodet om Forhandling med Landsnevndin, og efter de stedfundne Forhandlinger skal Landsnevndin med Undtagelse af Poul Petersen fremsætte nedennævnte Forslag til Overenskomst, idet Poul Petersen forbeholder sig sin Stilling og forbeholder sig at fremsætte særligt Forslag.

Forslag

til Overenskomst mellem Lagtingets Landsnævn, P/f Føroya Kol og Driftsraadet for Arbeiðsmanna Kolavirki.

Under Forudsætning af Tiltrædelse fra Arbejderforeningen „Fylking", Tveraa, indgaas følgende

Overenskomst,

1.

Driften af Kulminen i Rangabotn overtages og forestaas fra 1. Maj 1943 at regne af et af Landsnævnet udpeget Driftsraad. Minevirksomheden drives fortsat under Navnet „Arbeiðsmanna Kolavirki".

Som første Driftsraad er udpeget J. H. Henriksen, P. K. Bech og J. Olsen, alle af Frodebø Sogn. Driftsraadets Pligter og Beføjelser fastsættes i en af Landsnævnet udarbejdet Instruks. Honorar til Driftsraadets Medlemmer fastsættes til 50 Kr. pr. Maaned og afholdes af Driften.

2.

Ved Siden af Driftsraadet ansætter Landsnævnet en Forretningsfører og en Arbejdsformand i Minen paa de for Tiden gældende Lønvilkaar. Som første Forretningsfører og Arbejdsformand er udpeget Peter Bærentsen og A. Wiberg.

3.

Driftsraadet sørger for størst mulig Produktion af Kul og er forpligtet til at sælge Kullene ab Drelnæs til en af Landsnævnet fastsat Pris, som indtil videre er 101 Kr. for Storkul, 84 Kr. for Nøddekul og 51 Kr. for grov Afharpning, alt pr. ton.

Køb af Kul fra Drelnæs skal mod kontant Betaling staa aaben for enhver, saaledes at Driftsraadet ikke maa indgaa Aftaler om Eneaftagere paa enkelte Pladser. Anvisninger fra Brændselsnævnet om Leveringer skal følges.

4.

Driftsraadet opretter Overenskomst med „Fylking" vedrørende Arbejdsforhold og Lønninger ved Minearbejdet og andre Arbejder i Forbindelse med Kulproduktionen, saaledes at der for Timelønsarbejde betales den i Tveraa gældende almindelige Timeløn og for Akkordarbejde i Overensstemmelse med de hidtidige Akkordsatser med Pristillæg efter Pristallet.

5.

Som Leje af Anlægget betales 3 Kr. pr. ton solgt Kul til A/S Føroya Kols Dispositionsfond, jfr. Overenskomst af 11. Maj 1942.

6.

Til Forbedring af Hovedgangen og Bygning af ny Hovedgang stiller Landsnævnet straks et Beløb af 40.000 Kr. til Raadighed for Driftsraadet.

7.

Landsnævnet er indforstaaet med, at Arbejdslønninger, andre nødvendige Driftsudgifter herunder Licensafgift og Afgift til Jordeejerne, samt Afgiften til Føroya Kol afholdes forlods af Salgsindtægterne. Hvad der herefter bliver tilovers, afbetales paa de Beløb, Lagtinget tidligere og nu i Henhold til Punkt 6 har stillet til Raadighed til Indkøb af Værktøj, Props, Karbid og til Nyanlæg.

Hvad der under Driften indtil Udgangen af April 1943 er eller bliver sat til Side til Dækning af Værktøjs- eller Materialforbrug, skal snarest efter 1. Maj 1943 betales til Landsnævnet.

8.

„Fylking" fritages for ethvert Ansvar overfor A/S Føroya Kol for Anlæggenes Forringelse i den Tid, Kulminen har været udlejet til denne

Forening, og Lagtinget overtager dette Ansvar. Lagtinget har ligeledes overfor A/S Føroya Kol Ansvaret for Betaling af den i Punkt 5 nævnte Leje.

9.

Tilsyn med Driften og Kulminen føres paa det offentliges Vegne af Ingeniør H. Ejrnæs, der ligeledes bistaar Driftsraadet i alle Spørgsmaal af teknisk Art.

10.

Driftsraadet afgiver for hver Maaned til Landsnævnet en Regnskabsoversigt samt Rapport over Arbejdet og Produktionen, herunder Lagerbeholdninger af Kul og Materialer.

11.

Nærværende Overeuskomst kan opsiges af hver af Parterne med en Maaneds Varsel til Ophør ved Udgangen af en Maaned.

Álit frá Poul Petersen:

Í eykatingsetuni í mars 1948 var mál frammi um prísirnar á føroyskum koli. Tingið samtykti at áleggja príseftiransingarráðnum at kanna eftir, hvussu mikið hvørt liðið fyri seg av kolaframleiðsluni kostaði og geva landsnevndini frágreiðslu.

Hetta mál tykist ikki enn at vera greitt av príseftiransingarráðnum.

Í her fyriliggjandi máli er tinginum upplýst, hvussu mikið kolaframleiðslan innanfyri eitt ár hevur kostað tí almeuna, deils sum lán og deils sum studning. Eftir hesum upplýsingum hevur hesin kostnaður ligið um kr. 20,00 per selt ton í sama tíðarskeiði. Hartil eru tørvandi umsitingar av grevstrinum byrjaðar. Tað er tí fatuligt, at tann núverandi leiðslan av grevstrinum ikki sær seg føran fyri at halda áfram, sum viðurskiftini eru, men setur fram ynski um, at tingið átekur sær ábyrgdina fyri rakstrinum og teirri umsitingarskyldu, sum higartil hevur áliglð „Fylking" sum leigari.

Eg eri ikki í iva um, at roynt hevur verið at skipa fyri sum best, og eg vil heldur ikki siggja burtur frá týdninginum av at halda hesa kolaframleiðslu gangandi, so leingi stongt er fyri innfluttningi av koli, men tað má haldast, at tað er nakað hættisligt beinavegin at áleggja tinginum at átaka alla ábyrgdina, uttan at tað frammauundan er kannað, hvussu mikið tingið hervið kemur at átaka sær. Ein uppgerð eigur tí fyrst at fara fram sambart galdandi sáttmála „Fylking" og „Føroya kol" ímillum.

Næst skuldi verið roynt, um ikki onkur annar kundi átikið sær kolaframleiðsluna á tí framkomna grundarlag móti at tingið ájáttaði ein fastan studning per selt ton fyri eitt ár ísenn, ein slík skipan kundi ivaleyst fingið viðmæli frá Føroya kol og verandi driftsráði.

Uppskot.

Landsnevndini verður álagt at fáa í lag eina skipan við Føroya kol um kolaframleiðsluna í Rangabotni fyri eitt ár.

Poul Petersens uppskot fall 6—0.
Uppskot frá nevndini undantikið Poul Petersen samtykt 13—0.

Ístaðinfyri Jacob E. Jacobsen varð Jacob Mouritsen valdur til fastan lim av priseftiransingarráðum og Andor Eirikstoft til tiltaksmann og H. P. Klein til tiltaksmann í vørunevndini og J. F. Øregaard til lim av brióstsjúkrahúsnevndini.

Tingsetan endaði 20. aprll og fundirnir vóru 9.

A.R. Mowbray & Co. Limited, Thetford.

Byrjar á síðu 9

Byrjar á síðu 9

Byrjar á síðu 9

Byrjar á síðu 9

Byrjar á síðu 9

Byrjar á síðu 9

Byrjar á síðu 9

Byrjar á síðu 9

Byrjar á síðu 9

ÁR 1943, týsdagin 7. september, varð Føroya Løgting sett. Amtmaðurin hevði eftir áheitan av flokksformonnunum upploystur tingið, og nýval hevði verið 24. august. Elsti tingmaður Jóannes Paturssøn, Kirkjubø, gekk til formannssessin og tók við fundarstýrinum. Hann lýsti, at tingið var sett.

Valbrøvini vórðu ransakaði, og vórðu hesir góðkendir sum tingmenn:

J. F. Kjølbro, Klakksvík, fl.
Robert Joensen, Klakksvík, fl.
Poul Petersen, Tórshavn, fl.
Rasmus Rasmussen, Fuglafirði, sj.
Andreas Samuelsen, Fuglafirði, sb.
Johan Poulsen, Strendir, sb.
Ole Jacob Jensen, Tórshavn, fl.
Hans Iversen, Kvívík, sb.
Anthonius Sørensen, Húsavík, fl.
Joen Peter Davidsen, Sand, jm.
Paulf Dahl, Tórshavn, fl.
P. M. Dam, Tvøroyri, jm.
J. H. Danbjørg, Porkeri, jm.
K. Djurhuus, Tvøroyri, sb.

Hesi eykatingevni vórðu góðkend sum tingmenn:

Andreas Djurhuus, Vági, sb.
J. Fr. Øregaard, Norðagøtu, jm.
O. F. Joensen, Klakksvík, sb.
J. P. Henriksen, Tórshavn, jm.
Jens Chr. Olsen, Toftir, sb.

Viðkomandi nevnd mældi til, at avgerðin av valinum í Vágum varð goymd til seinari fund og somuleiðis við skrivi frá A. Samuelsen um fríløku fyri Poul Niclasen, ið vegna krígsviðurskifti ikki kann koma til Føroya úr Danmark. Hetta varð samtykt.

Hesir vórðu harnæst góðkendir sum tingmenn:

Jóannes Paturssøn, Kirkjubø, fl.
Thorstein Petersen, Tórshavn, fl.
Poul Niclasen, Tórshavn, sb.
Rikard Long, Tórshavn, sj.

Til formann varð valdur Thorstein Petersen og til næstformann Kr. Djurhuus.

Til tingskrivarar vórðu valdir Johan Poulsen og Poul Petersen.

Amtmaðurin helt soljóðandi røðu:

»Begivenhederne i Danmark den 29. August 1943 og i Tiden derefter gør det naturligt for mig at fremkomme med en Udtalelse til Færøernes Lagting straks ved dettes Sammentræden.

Om hvad der faktisk er sket i Danmark, ved jeg intet mere end Tingets Medlemmer.

Det, vi alle kender, fylder mig paa een Gang med Stolthed og med dyb Bekymring.

Det er godt og stolt at vide, at det danske Folk ikke lod sig paavirke eller bøje af Nazismen, hvadenten denne brugte Fløjlshandsken eller Jernnæven, men som een Mand rejste sig til aaben Modstand, da Tiden var inde. Det danske Folks bevidste og frivillige Valg af aaben Modstand har højnet dets Anseelse blandt Verdens frie Nationer og har fremmet Samhørigheden i Norden.

Med den største Sorg er Budskabet modtaget om mange gode danske Mænds Død, og med den største Bekymring maa vi alle tænke paa de Trængsler og de Ulykker, det danske Folk nu skal igennem. Tankerne gaar bestandig til vor store, gamle Konge. Ogsaa disse Byrder blev lagt paa hans Skuldre. Vi ved, han vil bære dem, rank og dansk som altid, og vi beder til, at hans Kræfter maa vare til den Dag, da Fjenden er drevet ud af Landet, og Danmark igen er frit.

Endnu ved ingen bestemt, hvorledes Styrelsen af Danmarks Anliggender vil blive ordnet.

For Færøernes Vedkommende kan jeg sige, at det, der hidtil er sket, ikke kan medføre nogen Ændring i Amtmandens Stilling eller Opgaver. Jeg vil stadig udøve mit Embede, som Kongen har betroet mig, og jeg vil fortsat sammen med Lagtinget søge at løse de Opgaver, som Tiden byder. Lagtinget ved, at jeg siden 9. April 1940 har været uden nogen Forbindelse med den danske Regering, og det medfører derfor ingen praktisk Ændring, at en dansk Regering ikke længere eksisterer. Jeg vil udøve mit Embede under Ansvar overfor Kongen og overfor den danske Regering, som paany vil komme, naar Danmark er befriet. Det er en Selvfølge, at jeg fortsat, og om muligt i højere Grad end hidtil, vil søge Samarbejde og Kontakt med de britiske Myndigheder, uden hvis stadige og forstaaende Hjælp og Støtte det vilde være umuligt at bringe Færøerne frelst gennem Krigens Vanskeligheder.

Saalænge Krigen varer, vil jeg som hidtil holde mig i nøjeste Kontakt med den danske Gesandt i London og med den frie danske Bevægelse, som jeg allerede længe har været tilsluttet.

I disse for Danmarks Rige saa skæbnetunge Tider opfordrer jeg Færøernes nyvalgte Lagting til et værdigt, forstaaende Samarbejde til Gavn for Land og Folk og i Troskab mod vor Konge«.

8. september. Framhald av granskan av valbrøvum.
Formaðurin framlegði

Allt:

Nevndin hevur kannað málið um valið í Vágum og hevur verið í telefonsamband við valstýrið á Slættanesi, sum upplýsir:

»Kl. gott 8 hyggja teir seg um, og tá er eingin veljari á valstaðnum, og teir enda valið og byrja so at telja stemmir upp.

Kl. 8[15] koma Elias Jacobsen og kona hansara inn á gáttina í vallokalinum, og teir siga tá, at tað var ov seint at velja; hon kom onganlíð longur, men maðurin kom inn um, tók sær valseðil, stemmaði, og tá funnu hinir seg í hesum.

Nevndin má her viðmerkja, at hann var limur av valstýrinum, men hevði ikki møtt upp og soleiðis ikki greitt sítt starv sum limur.

Tá Elias Jacobsen á henda hátt hevði stemmað, sendi valstýrið eitt smádrong til konuna, Anna Poulina Jacobsen, og segði henni frá, at hon kundi stemma, og segði hon, at »hon kom ikki útaftur«.

Nevndin má so stutt halda, at tað kann sigast at vera óregluligt, at hann slapp at stemma, men hann var tó limur av valstýrinum. Konan er bert lógliga avvísl. Tó skal líka viðmerkjast, at klagan, sum fyriliggur, ikki hevur nakra eginhandiga undirskrift.

Uppskot

frá valnevndini:

Valbrøvini fyri Samuel Ellefsen og Johs. Slettenæs verða góðkend.

Alit:

Tinglið góðtekur, at løgtingsmaður Poul Niclasen undir teim núverandi viðurskiftum verður fríkin sum løgtingsmaður, og at næsti maður, Tr. Samuelsen, verður løgtingsmaður í hansara stað.

Loyvi varð givið at taka málið til viðgerðar beinan vegin.

Uppskot nevndarinnar viðvíkjandi Vágum varð samtykt 14—0.

Uppskot nevndarinnar viðvíkjandi Poul Niclasen og Trygvi Samuelsen varð samtykt 23—0.

Hareftir vórðu góðkendir sum tingmenn:

Samuel Ellefsen, Miðvág, ffl.
Johs. Slettenæs, Sandavág, ffl.

Formaðurin framlegði soljóðandi skriv frá fólkaflokkinum og sjálvstýrisflokkinum:

Á fundi á Løgtingi 7. september 1943 setti danski statsins umboðsmaður harri Hilbert fram eina kunngerð til tingið og legði aftarat, at hansara orð skuldu verða kunngjørd bæði í Føroyum og uttanfyri Føroyar.

Í kunngerðini verður m. a. sagt:

»For Færøernes Vedkommende kan jeg sige, at det, der hidtil er sket, ikke kan medføre nogen Ændring i Amtmandens Stilling eller Opgaver. Jeg vil stadig udøve mit Embede, som Kongen har betroet mig, og jeg vil fortsat sammen med Lagtinget søge at løse de Opgaver, som Tiden byder. Lagtinget ved, at jeg siden 9. April 1940 har været uden nogen Forbindelse med den danske Regering, og det medfører

derfor ingen praktisk Ændring, at en dansk Regering ikke længere eksisterer. Jeg vil udøve mit Embede under Ansvar overfor Kongen og overfor den danske Regering, som paany vil komme, naar Danmark er befriet. Det er en Selvfølge, at jeg fortsat, og om muligt i højere Grad end hidtil vil søge Samarbejde og Kontakt med de britiske Myndigheder, uden hvis stadige og forstaaende Hjælp og Støtte det vilde være umuligt at bringe Færøerne frelst gennem Krigens Vanskeligheder.

Saalænge Krigen varer, vil jeg som hidtil holde mig i nøjeste Kontakt med den danske Gesandt i London og med den frie danske Bevægelse, som jeg allerede længe har været tilsluttet.«

Vit undirskrivaðu tingmenn gera kunnugt, at hesi orð eru kunngjørd uttan samráðing frammanundan við tingið og uttan at tingið hevur tikið støðu til teirra. Tey standa tí sum eitt persónligt áttalítsi.

Hetta fyrivarni verður at kunngera breisku rikisstjórnini gjøgnum less konsul í Føroyum.

Fastar nevndir.

Kirkjunevndin:
S. Ellefsen, Robert Joensen, Johan Poulsen, J. Fr. Øregaard, Pauli Dahl.

Kommunala nevndin:
Poul Petersen, A. Sørensen, A. Djurhuus.

Figgjarnevndin:
Thorstein Petersen, J. F. Kjølbro, J. Paturssson, R. Long, Johan Poulsen, Kr. Djurhuus, P. M. Dam.

Ymsamálanevndin:
Thorstein Petersen, R. Rasmussen, O. F. Joensen.

Nevndin viðv. teimum av Landsnevndini og Amtmanninum greiddu málum:
Ole J. Jensen, R. Rasmussen, Jens Chr. Olsen.

Aðrar nevndir.

Skúlanevndin:
R. Long, P. Dahl, Johan Poulsen, J. H. Danbjørg, O. F. Joensen.

Smirilsnevndin:
J. F. Kjølbro, A. Sørensen, Kr. Djurhuus, J. P. Davidsen, R. Rasmussen.

Stjórnarskipanarnevndin:
J. Paturssson, Thorstein Petersen, P. Petersen, R. Long, A. Samuelsen, Kr. Djurhuus, P. M. Dam.

Sociala nevndin:
Poul Petersen, A. Sørensen, Johan Poulsen, J. H. Danbjørg, Robert Joensen.

Bróstsjúkrahúsnevndin:
Poul Petersen, R. Long, Trygve Samuelsen, J. P. Henriksen, O. F. Joensen.

Havna- og vegnevndin:
P. Petersen, J. F. Kjølbro, Samuel Ellefsen, R. Rasmussen, Johan Poulsen, A. Samuelsen, J. P. Davidsen.

Fiskivinnunevndin:
J. F. Kjølbro, O. J. Jensen, Jens Chr. Olsen, P. M. Dam, Kr. Djurhuus.

Telefonnevndin:
S. Ellefsen, A. Sørensen, O. F. Joensen, J. Fr. Øregaard, H. Iversen.

Búnaðarnevndin:
J. Patursson, P. Pelersen, Kr. Djurhuus, J. P. Davidsen, H. Iversen.

Nevndin viðv. lóg um rúsdrekka:
R. Long, Johs. Slettenæs, A. Samuelsen, J. P. Henriksen, Johan Poulsen.

Verunevndin:
O. J. Jensen, J. F. Kjølbro, S. Ellefsen, Johs. Slettenæs, A. Samuelsen, H. Iversen, J. P. Davidsen.

Pristalsnevndin:
Thorstein Pelersen, Robert Joensen, Kr. Djurhuus, J. P. Henriksen, A. Djurhuus.

Nevndin viðv. frítiðarlógini:
R. Rasmussen, Robert Joensen, O. F. Joensen, J. H. Danbjørg, Johs. Slettenæs.

Stórhvalanevndin:
R. Rasmussen, Pauli Dahl, Jens Chr. Olsen.

Fossamálanevndin:
R. Rasmussen, O. J. Jensen, Hans Iversen, Johan Poulsen, J. Fr. Øregaard.

Frávikjau av tiðarfreistum.

20. november samtykti tingið við 14—0 at frávikja teimum í tingskipanini §§ 17 og 18 áselta tiðarfreistum.

Øll mál, har einki er nevnt niðanfyri um framløgu, vórðu framløgd 7. september.

I. FÍGGJARLIG VIÐURSKIFTI

1. Roknskapir og fíggjarstandur Løgtingsins.

Sí skjal nr. 1 og 3.

Ákil:

Roknskapur og fíggjarstandur løgtingsins er lagdur fyri tingið í ár eins og á hvørjum ári. Vanligt er ikki at taka hetta til serliga viðgerð; men nevndin heldur tað vera neyðugt at eftirkanna og geva eitt klárari yvirlit yvir fíggjarstandin.

Í 1940 samlykti tingið soljóðandi uppskot: Av avlopinum av rakstrinum fyri amtsgrunnin fyri 1941 verða 25 % at nýta til eykarindan av obligatiónsskuld tingsins, 25 % at leggja í socialgrunn tingsins og 25 % at leggja í vinnulánsgrunn tingsins.

Í 1941 varð gjørd henda viðmerking til fíggjarætlanina fyri amtsgrunnin: Av avlopinum verða 25 % at nýta til eykaavgjald av skuld, 25 % at leggja í socialgrunn tingsins og 25 % at leggja í vinnulánsgrunn løgtingsins

Í 1942 varð eingin viðmerking gjørd til fíggjarætlanina.

Nevndin hevur tingið hetta kannað á gjaldstovuni og skal greiða frá, hvussu støðan er fyri árini 1941 og 1942:

Tann eini fjórðingurin av avlopinum í hesum báðum árum er:

1941:	1/4 av kr.	1.240.527,63	kr.	310.131,91
1942:	1/4 av kr.	2.353.181,56	kr.	588.295,39
		tilsamans	kr.	898.427,30

Tað er í hesum árum lagt í sociala grunnin og vinnulánsgrunnin 750.000 kr. til hvønn, so hetta er ikki beint. Tað er óivað gjørt einnus eftir ælli og skuldi verið *900.000 krónur*, av tí at tílíkar burturavleggingar eiga at verða gjørdar til heil tøl.

Sum ávíst var í 1940 og 1941 samtykt, at 25 % skuldu fara til eykarindan av løgtingsins skuld.

Í 1941 varð lagt av til hetta endamál 250.000 kr. samstundis sum sama peningahædd varð løgd til hinar grunnarnar. Í hesum árinum var komið til útreiðslu kr. 161.749,90 sum eykarindan av skuld, soleiðis at tað verunliga ikki átti at verið lagt sama peningahædd til hetta endamál sum til hinar grunnarnar.

Í 1942 varð skuld goldin fyri stóran pening, og samstundis kundi ein siga, at nú var ikki nógv skuld eftir at gjalda, tað varð tá gjørt soleiðis, at tær 250.000 kr. vórðu tiknar aftur til inntøku í roknskapin, soleiðis at peningur til tílíkt endamál varð lagdur av á serliga konto.

Um tingið ikki beinleiðis hevur skuld at gjalda í løtuni, so er tað óivað rætt at hava ein grunn, tí tingið hevur við styrkjáttan og ábyrgd fyri lán stóran pening at standa til svars fyri í komandi tíðum.

Tey lán, sum í hesum báðum ártum eru goldin, eru hesi:

1941:	»Smiril«s lán úr ríkiskassaonum	kr.	161.749,90
1942:	Tvey lán úr kreditforeining	»	172.588,76
	Tvey lán frá universitetskvesturinum	»	73.381,13
	Færø Amts Sparekasse	»	34.650,00
	A/S Føroya Banki	»	55.000,00
	Havnalán fyri Miðvág	»	58.000,00
	Havnalán fyri Skopun	»	63.000,00
	Tilsamans	kr.	618.369,79

Fjórðingurin av rakstraavloopinum fyri hesi bæði árini er sum omanfyri ávíst kr. 898.427,30, lað vit siga, at tokur peningur eigur at vera til

avgjaldan av skuld..... kr. 280.057,51

Tann síðsta fjórðingin er eingin tingsamtykt gjørd um, soleiðis at hann stendur løkur, og hann verður sjálvandi sama peningamøgd sum hinir fjórðingarnir, uttan lað, at burturavlegging er gjørd til heil tøl. Um henda fjórðingin heldur nevndin tað vera beint at gera nakrar reglur, serliga viðvíkjandi, hvussu hann skal standa í fíggjarstandinum. Uppskot verður tí sett fram um, at annar tríðingurin stendur í fíggjarstandinum sum løkt avlop, uttan at nakað serligt verður ásett; á tann hátt kann hesin peningur nýtast, um tað av óhappi skuldi verið so, at fíggjarætlanin ikki skuldi svarað rokning.

Hinir báðir tríðingarnir, skal nevndin mæla til, verða flutti til ein serligan grunn: *Løgtingsins tiltaksgrunn*, sum serligar av tinginum ásettar reglur verða setlar fyri.

Tá hetta verður gjørt, verður fíggjarstanduriu fyri amtsgrunnin 31. desember 1942 at verða soleiðis broytt:

Í roknskapinum stendur:

Vinnulánsgrunnurin	kr.	750.000,00
Socialgrunnurin	»	750.000,00
Ogn pr. 1. januar 1942	»	918.458,02
Avlop	»	1.146.561,67
	kr.	3.565.019,69

Hetta verður broytt til:

Vinnulánsgrunnurin	kr.	900.000,00
Socialgrunnurin	—	900.000,00
Ábyrgdargrunnurin	—	300.000,00
Løgtingsins tiltaksgrunnur	—	600.000,00
Rakstraavlop 1941 og 1942	—	275.339,40
Ogn pr. 1. januar 1941	—	589.680,29
	kr.	3.565.019,69

Orsokin til at nevndin mælir til, at ogn tingsins frá 1. januar 1941 eftir fíggjarstandinum skal verða standandi óhroytt er tann, at hetta ikki er eins og hinar peninganøgdirnar sparaspardur peningur, men er mótvirðið fyri tingsins føstu ognir, skip og parlabrøv.

Um nýtslu av teimum her nevndu grunnum skal nevndin viðmerkja:

Vinnulánsgrunnurin hevur serligu stjórn, so her er eingin orsøk til at gera nokað við í hesi tingsetnni. Ein meiriluti (R. Long, J. F. Kjølbro, J. Patursson og Th. Petersen) heldur tað vera heinast, at ein tílíkur grunnur verður stjórnaður saman við einum føroyskum landsbanka og vil í bankamálinum seta fram uppskot sansvarandi.

Socialgrunnurin eigur óivað ikki at verða til nýtslu í hesum tíðum, men vil vera ein frálíkur stuðul til at loysa spurningin um til fullnar at seta fólkatrygging á stovn her í Føroyum. Reglugerð eigur tí at bíða til eina seinri tingsetu.

Ábyrgdargrunnurin eigur at verða nýttur til ta skuld, sum tingið hevur nú og síðani til at gjalda skuld, sum tingið í komandi tíðum óivað verður at fáa. Eisini má her havast í huga, at tað kunna koma ár, tá trupult verður hjá tinginum at útvega allan lann pening, sum nú er játtaður til havnabygging o. a., og her kann ein tílíkur grunnur vera tøkur.

Løgtingsins tiltaksgrunn mælir nevndin til sum fyrsta endamál at hava at stimbra tingið fíggjarliga úleflir, soleiðis at fíggjarsamlyktir tingsins altíð vilja verða tiknar sum fullt álítandi. Tann stimbur, sum ein munagóður grunnur gevur, verður eisini at lætta um vegin hjá tinginum fyri at taka lán, tá ófriðartíðin er at enda, og soleiðis seta á stovn ella styðja stovnan av stórverkum okkara landi til besta í komandi tíðum. Stórmál sum útbyggjan av fossamegini o. t. kann ikki verða gjørt við tí peningi, eitt samfelag kann fáa sær tøkan, har mangu lán nýtast, og betri okkara samfelag er stimbrað, lættari verður hjá tinginum at gera sína skyldu, tá málini verða ein veruleiki.

Nú undir ófriðartíðini er tað nógv, sum steðgur er komin í, men sum vil koma aftur um aftur, tá friðartíð kemur. Nógv av okkara ungfólki hevur ikki havt høvi til at fara út og síggja onnur viðurskifti, og tungt verður hjá teimum at gera hetta seinni uttan at fáa studning. Almenn tiltøk hava ligið á lánu, og nógv verður tað, sum vil mangu fara undir, tá ófriðartíðin er av; her kann takast upp t. d. at fáa betri kor fyri okkara mentunarstarv, at fáa til vegar nýtt løglingshús o. s. fr. Tað er ógjørligt hjá tinginum at seta serstakar grunnar til øll endamál, sum søkt verður um, tað eigur tí at verða ásett, at tingið kann játta úr hesum tiltaksgrunni pening til líkt tiltøk, sum hava ligið á lánu vegna hardagan, men kunna setast í verk seinri. Til hettar eigur tó ikki meira enn í mesta lagi 10 pct. av tí peningi, sum tingið hevur lagt í grunnin, at verða til nýtslu í alt.

Fyrr hevur verið havt á máli á tingi at stimbra teir menn ella tey feløg her á landi, sum vísa dirvi og nøra um okkara fiskiflota. Hesin spurningur er slórur og tungur at loysa, og her kann tað verða talan um at styðja nú ella í framtíðini, og so at styðja við lánu, við beinleiðis studningi ella við skattaavslátti. Stuðul við lánu hevur tingið lagt grundarlagið til við at stovna Løglingsins vinnulánsgrunn, og meinar

nevndin, at tað ikki kann gerast meira við hetta nú í løtuni. Stuðul við beinleiðis studningi er einki gjørt fyri enn, og her liggur tað soleiðis, at ein grunnur sum løgtingsins tiltaksgrunnur kann gera tað møguligt hjá tinginum at taka henda táttin upp, tá ófriðartíðin er av, soleiðis at tað munar nakað til at endurnýggja okkara fiskiflota. Tað kann eisini tá hugsast, at vinnulánsgrunnurin fyri ein minni part kundi verið broyttur soleiðis, at hann eisini kundi givið smærri studningar, men hetta má tingið til sína tíð taka til viðgerðar.

Ein meirilutí (J. F. Kjølbro, R. Long, J. Paturssøn og Th. Petersen) heldur, at tað, sum nú kann gerast, er at styðja leir menn, sum í hesum tíðum taka tøk fyri at fáa nørl um okkara fiskiflota við nýggjum skipum, nýggjum motorum ella umbygging av skipum, til meira tíðarhóskandi fiskiháttar. Hesir menn hava frammannndan givið inntøku sína upp til tingið og goldið skatt av inntøkuni; tað er í beint, at tað almenna styðjar hesar menn ella hesi feløg við at afturgjalda parí av tí skatti, sum er goldin til tingið. Meirilutin setur uppskot um, at hetta skal skipast úr tiltaksgrunninum eftir nærri ásettum reglum og kann viðmerkja, at tað einans verður ein heilt lítil partur av peningunum hjá grunninum, sum her kann ætlast at koma til nýtslu.

Ein minnilutí (Kr. Djurhuus og Johan M. Fr. Poulsen) heldur eisini, tað er beint at styðja leir menn ella tey feløg, sum í hesum tíðum gera nakað fyri at nøra um fiskiflotan og skapa annað virki her á landi. Minnilutin heldur tó, at tað er beinast, at studulin frá tí almenna verður givin sum ein studningur úr tiltaksgrunninum og setur fram uppskot samsvarandi.

Ein minnilutí (P. M. Dam) vísir á sína støðu í málinum »Rætturin til arbeiði«.

Uppskot

frá allari nevndini:

A. Rakstraravlop av lingsins rokuskapi verður, til annað er samlykt, at nýta soleiðis:

Til vinnulánsgrunnin	ein fjórðing,
- socialgrunnin	ein fjórðing,
- ábyrgdargrunnin	ein fjórðing,
- løgtingsins tiltaksgrunn	ein settapart,
- tøkt rakstraravlop	ein tólvtapart.

B. Fíggjarstandur fyri amtsgrunnin tann 31. desember 1942 verður samsvarandi hesum broyttur soleiðis, at hesin peningur verður at leggja í grunnar:

Til vinnulánsgrunnin aftrat . . .	kr. 150.000,00
- socialgrunnin aftrat	- 150.000,00
- ábyrgdargrunnin	- 300.000,00
- løgtingsins tiltaksgrunn . . .	- 600.000,00

C. Ábyrgdargrunnurin má einans nýtast eftir tingsamtykt til at gjalda skuld, tingið nú hevur ella í framtíðini fær.

D. 1. Løgtingsins tiltaksgrunnur hevur til endamáls at slimbra tingið fíggjarliga.

D. 2. Løgtingið kann úr grunninum lata studningur til endamál, sum vegna bardagatíð hava verið skotin út, og sejnni verða sett í verk, tó ikki upp um ein tíggjundapart tilsamans av tí peningi, sum tingið hevur fluttur til henda grunn.

Frá meirilutanum (Kjølbro, Long, J. Paturssøn og Th. Pelersen):

D. 3. Úr grunninum verður at gjalda peningur sum sømdarpeningur til fólk ella felog her á landi sum afturgoldin løgtingsskattur eftir fylgjandi reglugerð:

a. Tá maður ella felag fer undir at gera eitt av hesum verkum:

1) at byggja nýtt skip,
2) at umbyggja skip til tíðarhóskandi fiskiskap,
3) at seta nýggjan motor í skip sítt,
4) at gera sær nýmótans fryslihús,
5) at stovna fiskaðarverk á landi,

kann hann siga frá til landsnevndina, at ynskt verður at fáa løgtingsskatt afturgoldnan fyri ítreiðslur, hann nú átekur sær. Ilenda rættin hevur hann fyri tey undir 1 til 3 nevndu verk, og landsnevndin avger, um arbeiði eftir gr. 4 og 5 falla inn undir tílík landsgagnlig mál, sum eiga henda studning uppiborna. Landsnevndarinnar avgerð kann verða lagd fyri tingið.

b. Tá arbeiðið er gjørt, verður roknskapur at leggja fyri landsnevndina, saman við upplýsingum um, hvat umsøkjarin hevur goldið í løgtingsskatt tey trý seinastu skattárini og eftir hvørjum skattastigi.

c. Tá hesir upplýsingar eru eftirkannaðir, ávísir landsnevndin, um hon finnur alt at vera grejtt, helvtina av tí løgtingsskatti, sum hesin borgari hevur latið fyri lann pening, sum tað nýggja virki hevur kostað, roknað eftir hansara miðalskattastigi fyri tey trý seinastu árini, til útgjalding úr løgtingsins tiltaksgrunni.

Frá minnilutanum (Kr. Djurhuus og J. M. Fr. Poulsen):

D. 3. Úr grunninum verður goldin studningur til fólk ella felog her á landi, ið hava latið gjørt eitt av hesum verkum:

1) byggt nýtt skip,
2) umbyggt skip til tíðarhóskandi fiskiskap,
3) sett nýggjan motor í skip sítt,
4) gjørt sær nýmótans fryslihús,
5) stovnað fiskaðarverk her á landi.

Grunnurin verður stjórnaður av stýrinum fyri vinnulánsgrunnin og haraftrat einum manni valdum av Færøernes Rederiforening og einum manni valdum av Føroya Fiskimannafelag og Suðuroyar Fiskimannafelag.

Hetta stýrið avger støddina av tí studningi, ið latast skal í hvørjum einstøkum føri, men skal nummars fara eftir virði av tí nýggja arbeiði og samfelagslign nyttu av verkinum, ið studningur søkist til.

Broytingaruppskot

frá Th. Petersen o. fl.:

Úr grunninum verður eisini at lata studning til menn ella felløg her á landi, sum í ár ella komandi ár prógva, at teir eru farnir undir:

1) at byggja skip,
2) at umbyggja skip til fiðarhóskandi fiskiskap,
3) at sela nýggjan motor í skip sítt,
4) at gera sær nýmólans frystihús,
5) at stovna fiskaðarverk her á landi,

tá landsnevndin hevur góðtikið kostnaðarætlan og skynir á, at nóg mikil peningur við studninginum er tilsteðar til at fáa arbeiðið á mál, tó ikki uppum 10 pct. av kostnaðinum.

Landsnevndin eigur heimild til at ávísa peningin, tá ið treytirnar eru loknar.

Broytingaruppskot

frá Th. Petersen og R. Long til uppskot frá minnilutanum (Kr. Djurhuus og Joh. M. Fr. Poulsen) ad D. 3:

Í næstseinasta petti verður sett í staðin fyri »einum manni valdum av Føroya Fiskimannafelag« og út »einum manni valdum av báðum Fiskimannafeløgunum og Skipara og Navigatørfelagnum.«

Broytingaruppskotið frá Th. Petersen o. fl. fall 12—0 og broytingaruppskotið frá Th. Petersen og R. Long fall 11—0.

Uppskotið frá allari nevndini pt. A—D 2 samtykt við 25 atkv.

Uppskot meirilutans D 3 fall 12—0. Uppskot minnilutans D 3 samtykt 15—0.

2. Fíggjarætlan fyri amtsgrunnin 1944.

Sí skjal nr. 2.

Álit:

A. 1. viðg. $^{17}/_{9}$. Frl. $^{22}/_{11}$.

Fíggjarnevndin hevur viðgjørt málið og tey av løglingsskrivstovuni fyriløgdu uppskot til fíggjarsamtykt fyri hesar báðar grunnar. Nevndin er samd um, at beinast er at leggja hesar grunnar saman í ein, og vísir til serligt álit hesum viðvíkjandi.

Nevndin vísir til uppskot til fíggjarsamtykt, sum er viðlagt hesum áliti, og skal um tey ymisku tølini gera hesar viðmerkingar:

§ 1. Inntøkur.

ad b: *Skatturin* er settur til 2,5 mill., í staðin fyri 2,1 mill. í uppskotinum, og vísir nevndin her til viðmerkingarnar í álitinum í løgtingsmáli 1—6 (Løglingsskattur 1944).

ad c. *Tollur* er lækkaður frá 1,1 mill. til 1 mill. av tí at nevndin heldur tað kanska verða nakað høgt at seta 1,1 mill.

ad f. *Vinningsbýti* sett upp frá 6.000 kr. til 13.000 kr., hvat nevndin hevur fingið upplýst, tað vil geva.

ad j. Henda greinin er í rokuskapinum 1942 uppført við 21.731,53 kr. sum drigið frá útreiðslunum. Nevndin heldur tað vera beinari, at tað verður uppført sum inntøka og hevur samráðst við gjaldstovuna um hetta. Undir hesi grein verður eisini bókað útreiðslur av innkrevjan av løgtingsskatti.

ad k. *Rentur* vóru í uppskotinum settar til 10.000 kr. útreiðslur, men gjaldstovan sigur frá at hetta komandi ár verður ein inntøkupostur, tí mesta av skuldini er goldin, og tingið fær rentur av 350.000 kr., sum eru lænt landsbandlinum. Greinin er sett til at geva 2.500 kr., men má ætlast at geva væl meira.

ad l. *Ymist* varð ikki sett til nakran pening í uppskotinum, men er nú sett til 5.000 kr., nakað tað sama, sum tað gav í 1942. Hinar greinirnar undir inntøkur — óbroyttar eftir uppskotinum.

Útreiðslur. § 2. Løgting og løgtingsstovnar.

ad e. *Priskontrolráðið* hevur higartil haft sínar útreiðslur bókaðar undir *kreppufyriskipanum*. Eftir samráðing við gjaldstovuna verða hesar útreiðslur settar til 20.000 kr.

ad g. *Prentan o. t.* var í uppskotinum sett til 10.000 kr., men nevndin mælir til at hækka tað til 20.000 kr. vegna tingsins samtykt um uppskrivan og útgevan av munnligum orðaskifti á tingi.

Hinar greinirnar undir § 2 óbroyttar eftir uppskotinum.

§ 3. Sjúkrahús, læknar o. t.

Greinirnar óbroyttar eftir uppskotinum.

§. 4. Skúla- og mentunarmál.

ad a. 1. *Læraralønir* vórðu settar til 145.000 kr., men nevndin mælir til at broyta tær til 150.000 kr.

ad a. 2. *Dýrtíðarviðbót og eykaløn sambart barnatal* er í uppskotinum eins og í roknskapinum tingsins fyri árini 1942 og 1943 bókað undir: Dýrtíðartillegg til ellisrentunjótarar o. a. Hetta heldur nevndin vera púra skeivt og hevur frá gjaldslovuni fingið hetta sundurbýtt og verður 265.000 kr. av hesum at seta undir dýrtíðarviðbót til lærarar.

ad c. 3. *Studningur til læraraskúlanæmingar* varð í uppskotinum settur til 2.000 kr., men er rættað til 1.000 kr., sum er tað fasta árliga gjaldið, tingið hevur samtykt.

ad c. 4. *Studningur til bygdanæmingar í realskúlum og á studentaskeiðinum* hevur nevndin mælt til at hækka frá 8.000 kr. til 10.000 kr.

ad c. 7. Til *lesandi í Danmørk* hevur tað í tey seinastu árini verðið ásett 2.500 kr., sum hava verið goldnar til ríkiskassan fyri at viga upp ímóti tí studningi, sum ríkiskassin hevur goldið í Danmark, og sum vil ikki hava nærri greiði á. Nevndin mælir til, at hesar 2.500 kr. framvegis verða goldnar, men at hesin studningur verður settur til falt 5.000 kr. til lesandi í Danmørk og í Íslandi, soleiðis at landsnevndin kann játta peningastudning til teir Føroyingar, sum vegna lestur búgva á tí kamari, sum tingið í ár hevur fingið sær á studentaherberginum í Reykjavík.

ad c. 8. *Studn. til handverkarar og jarðabrúkarar at læra og handilsskúlanæmingar* var í uppskotinum sett til 3.000 kr. Nevndin mælir til at hækka henda studning til 10.000 kr., soleiðis at landsnevndin kann veita peningajáttan ikki einans til skúlanæmingar, men eisini til handverkarar og jarðabrúkarar, sum fara út at ferðast fyri at fáa sær kunnleika og til lærlingar, sum eru í læru burtur frá sínu heimbygd.

ad e. *Realskúlin* er í uppskotinum settur til 5.000 kr. Eftir upplýsingum frá skúlanevndini verður hetta hækkað til 10.000 kr.

ad h. *Nýggir skúlar.* Skúlanevndin hevur samtykt at mæla tinginum til at taka undir við at geva studning til byggjan av skúlum og hevur mett tann pening, sum má nýtast í 1944 til 80.000 kr.

ad k. Til *útgrefstur* varð í fjør veitt Føroya Forngripafelag ein eykastudningur uppá 1.000 kr.. Nevndin mælir til, at tað til hetta endamál og til uppskrivan av staðarnøvnum o. l. verða settar 5.000 kr. (sí annars álit í tingmáli nr. XIII-10).

ad 1. *Ymiskir studningar og sømdarsamsýningar.* Hesar greinir eru tiknar óbroyttar frá uppskotinum til amtsgrunnin og øk. grunnin utlan 1) Sømdarsamsýning til Sverre Paturssøn varð ikki viðtikin, men nevndin setir uppskot um, at hér verður sett til tað sama sum í fjor 600 kr. og 2) Samsýning til frk. Bærentsen, vanliga 200 kr., mælir nevndin til at broyta til 500 kr.

ad m. *Ymist.* Uppskot var um at setu 1.000 kr. Nevndin mælir til at hækka tað til 10.000 kr., ársakað av útreiðslum, sum skúlanevndin mælir tinginum til at átaka sær vegna lýsi til skúlabørn.

Hinar greinirnar undir § 4 óbroyttar eftir uppskotinum.

§ 5. *Landbúnaðurin.*

ad e. Uppdyrkingararbeiði var í uppskotinum sett til 75.000 kr. eins og í fjør. Nevndin mælir til at broyta tað til 125.000 kr., soleiðis at tær 75.000 kr. verða útbýttar eftir somu reglum sum í fjør, meðan tær 50.000 kr. skulu nýtast til eykauppdyrkingarstudning og útreiðslur vegna útskiftingararbeiði.

Hinar greinirnar undir § 5 óbroyttar eftir uppskotinum.

§ 6. *Samferðslumál.*

ad a. *Havnir, brýr og lendingar.* Eftir fyrrverandi játtanum skulu til størri havnir nýtast um 340.000 kr. og til lendingar um 250.000 kr. Nevndin mælir til, at hetta verður broytt til 400.000 kr. og 300.000 kr. fyri at geva rúm fyri nøkrum nýjáttanum í ár.

Hinar greinirnar undir § 6 óbroyttar eftir uppskotinum.

§ 7. *Socialmál.*

ad b. *Einkjabørn* varð í uppskotinum sett til 28.000 kr. Eftir frágreiðing frá gjaldstovuni er ikki talan um meiri útreiðslur enn hægst 14.000 kr.

ad c. *Dýrtíðarviðbót til ellisrentunjótarar, einkjabørn o. t.* Hetta varð í uppskotinum sett til 600.000 kr. Sum ávíst frammanundan, sí § 4 a 2, eru 265.000 kr. flutar til læraraløgnir. Eftir upplýsing frá gjaldstovuni kann her ællast at koma til nýtslu:

1) Ellisrentunjótarar	290.000 kr.
2) Einkjabørn	45.000 —
3) Avlamisrentunjótarar	35.000 —
4) Sjúklingar undir heimaansan . .	5.000 —
	375.000 kr.

Tað kann viðmerkjast, at tær 600.000 kr. í uppskotinum soleiðis hava verið 40.000 kr. ov lítið.

Hinar greinirnar undir § 7 óbroyttar eftir uppskotinum.

§ 8. *Lógreglumál o. a.*

Allar peningahæddirnar óbroyttar eftir uppskotinum.

§ 9. *Ymist.*

ad b. *Skaðabøtur, kreppufyriskipanir o. t.* er mett til 80.000 kr.

Í uppskotinum vóru hesar greinir

1) Kreppufyriskip., (prískontrol, spreingikn. o. t.) . .	50.000 kr.
2) Skaðabøtur	50.000 —
3) Kolagrefstur	50.000 —

Nevndin skal viðmerkja, at eftir upplýsingum frá gjaldslovuni ern tær flestu útreiðslur til kolagrefstur bókaðar undir kreppufyriskipanir; síðan er prískontrolráðið likið út og fört undir § 2 e, og bæði útreiðslurnar til spreingiknøttar og skaðabøtur kunnu væntast at liggja væl lægri komandi ár. Nevndin heldur tí, at 80.000 kr. skuldu verið ivaleyst ætlað.

ad c. *Óvanligar útreiðslur* eru í uppskotinum settur til 10.000 kr. Tað skal viðmerkjast, at tingsins gjald til vrakaraeftirlitsmenninar er bókað undir hesi grein og verður við hesum uppskoti henda útgjaldan endurnýggjað.

Hinar greinirnar undir § 9 óbroyttar eftir uppskotinum.

§ 10. *Eftirløn.*

Her mælir nevndin til at leggja til eftirlønargrunn løgtingsins 25.000 kr.; síðan er tað útreiðslurnar til eftirløn til frk. Berg og M. Johannesen óbroyttar og aftrat kemur lønn nýggja eftirløn til Daniel Hoydal 3.850 kr.

§ 11. *Kirkjugrannurin.*

Tann vanliga lógfesti studningurin er 20.000 kr., men vegna eykagjald til ferðaútreiðslur prestanna og lánið til frúboðarar mælir nevndin til, at givið verður ein eykastudningur fyri 1944 uppá 5.000 kr.

FIGGJARSAMTYKT

fyri amtsgrunnin (og økonomiska grunnin) 1944.

§ 1. Inntøkur:

a.	Jarðaskattur	9.000,—
b.	Løgtingsskattur	2.500.000,—
c.	Tollur	1.000.000,—
d.	Skipagjald	4.000,—
e.	Handilsloyvir	1.000,—
f.	Vinningsbýti	13.000,—
g.	Stuttleikaskattur	30.000,—
h.	Álíknað kommununum	70.000,—
i.	Inntøka av grindaveiðu	500,—
j.	Rentur av løgtingsskatti o. a.	15.000,—
k.	Rentur	2.500,—
l.	Ymist	5.000,—
		3.650.000,—

Útreiðstur:

§ 2. Løgting og Løgtingsstovnar:

a.	Tingmannaløn	65.000,—	
b.	Løgtingsskrivstovan	32.000,—	
c.	Líkningarráðið	26.000,—	
d.	Løgtingsverkfrøðingurin	30.000,	
e.	Prískontrolráðið	20.000,—	
f.	Løgtingshúsið	7.000,—	
g.	Prentan o. a.	20.000,—	
			200.000,—

§ 3. Sjúkrahús, læknar o. t.:

a.	Sjúkrahúsini	375.400,—	
b.	Bróstsjúkrahúsið	117.500,—	
c.	Hvíldarheimið »Naina«	8.000,—	
d.	Farsóttir	5.000,—	
e.	Ljósmøður	7.500,—	
f.	Læknar	5.000,—	
g.	Karantenuútreiðslur	1.000,—	
h.	Lasarettir og eykalæknl	20.000,—	
i.	Sjúkrahjálp o. a.	8.000,—	
			547.400,—

§ 4. Skúla- og mentunarmál:

a.	1. Læraraløntir	150.000,—	
	2. Dýrtíðarviðbót	265.000,—	
			415.000,—
		Af flytur	1.162.400,—

	Flutt			1.162.400,—
b. Løgtingsins studentaskeið			34.000,—	
c. Stundingur til næmingar:				
1. Til skúlabørn	1.400,—			
2. Ferðaútreiðslur	600,—			
3. Læruraskúlanæmingar	1.000,—			
4. Bygdanæmingar í realskúla og á studentaskeiðinum	10.000,—			
5. Læraranámskeið	500,—			
6. Lærdaskúlalestur	8.000,—			
7. Lesandi í Danmark og Íslandi	5.000,—			
8. Handverks-, jarðabrúks- og handilsskúlanæmingar	10.000,—			
			36.500,—	
d. 1. Amtsbókasavnið	9.060,—			
2. Bókasavnið Tvøroyri	1.000,—			
3. Skjalasavnið	3.875,—			
			13.935,—	
e. Realskúlin			10.000,—	
f. Føroya fólkaháskúli			6.000,—	
g. Fimleikargrunnur Føroya			50.000,—	
h. Nýggir skúlar			80.000,—	
i. Eftirlønargrunnur lærara			2.000,—	
j. Barnaheimið			3.000,—	
k. Útgrefstur, uppskrivan av staðarnøvnum o. t.			5.000,—	
l. Ymiskir studningar og heiðurslønir (sbr. lista)			11.000,—	
m. Ymist			10.000,—	
				261.435,—

§ 5. Landbúnaðurin:

a. Jarðagrunnurin			10.000,—	
b. Búnaðarnevndir			2.500,—	
c. Frøroya Búnaðarfelag			600,—	
d. Landbrúksráðið til húsdjóraalan			5.000,—	
e. Uppdyrkingar- og útskiftingararbeiði			125.000,—	
f. Djóralæknin			2.575,—	
g. Annað			1.000,—	
				146.675,—

§ 6. Samferðslumál:

a. Havnir, brýr og lendingar:				
1. Størri havnir	400.000,—			
2. Brýr og lendingar	300.000,—			
			700.000,—	
b. Vegir			450.000,—	
c. Vegagrunnurin			10.000,—	
d. Smiril			110.000,—	
				1.270.000,—
		At flyta		2.840.510,—

Flutt . . . 2.840.510,—

§ 7. Socialmál:

a.	Socialhjálp	100.000,—	
b.	Einkjubørn	14.000,—	
c.	Dýrtíðarviðbót til ellisrentunjótarir, einkjubørn o. t.	375.000,—	
d.	Til grannin fyri óarbeiðsførar fiskim. .	10.000,—	
			499.000,—

§ 8. Lógreglumál o. a.

a.	Dóms- og lógreglumál	15.000,—	
b.	Valum viðvíkjandi	2.000,—	
c.	Ferðaútreiðslur sýslumanna	3.500,—	
			20.500,—

§ 9. Ymist.

a.	Landsnevndin til ymis yrkismál . . .	20.000,—	
b.	Skaðabøtur, kreppufyriskipanir o. t. . .	80.000,—	
c.	Óvanligar útreiðslur	10.000,—	
			110.000,—

§ 10. Eftirløn:

Til eftirlønargrunn løgtingsins		25.000,—	
Eftirløn frk. Berg	2.000,—		
» M. Johannesen . . .	1.140,—		
» Dan. Hoydal	3.850,—		
		6.990,—	
			31.990,—

§ 11. Kirkjugrunnurin:

a.	Vanligur studningur . . .	20.000,—	
b.	Eykastudning fyri 1944 . .	5.000,—	
			25.000,—
	Munur		123.000,—
			3.650.000,—

Yvirlit yvir § 4, t: Ymiskir studningar og sømdarpeningar.

1.	Kvæðaavskrivan (amtsgr. I,6)	kr.	1.000,—
2.	Skúlabókagrunnurin (3 st. av 5, øk. B. 3)	»	500,—
3.	Varðin (øk. C, 2)	»	1.000,—
4.	Føroya kvæði (7 st. av 9) (øk. C. 5)	»	1.000,—
5.	Til mentunnargrunn (øk. C. 7)	»	500,—
6.	Barnablað (J. Berg) (øk. C. 8)	»	400,—
7.	Frálaksfeløgini (øk. D. 4)	»	500,—
8.	Felagið »Røde Kors« (øk. D. 6)	»	500,—
	At flyta . . .		5.400,—

	Flutt . . .		5.400,—
9.	Ítróttarsamband Føroya (øk. D. 9)	kr.	500,—
10.	Føroya Ferðamannafelag (øk. D. 10)	»	300,—
11.	Føroya Forungripafelag (øk. C. 3)	»	600,—
12.	Træplanting (øk. D. 7)	»	2.000,—
13.	Sondarpeningur J. H. O. Djurhuus (øk. C. 1) . .	»	500,—
14.	» A. Degn (amtsg. I, 7)	»	600,—
15.	» Sv. Paturssøn (amt. I,9)	»	600,—
16.	Samsýning frk. Bærentsen (øk. D, 3)	»	500,—
		kr.	11.000,—

Broytingaruppskot

frá nevndini:

Av tí, at løglingið hevur samtykt, at eykastuðningur til kirkjugrunnin fyri 1944 verður settur til 15.000 kr., setur nevndin fram soljóðandi

uppskot:

Fíggjarsamtykt fyri amtsgrunnin (og økonomiska grunnin) 1944 verður broytt soleiðis:

§ 11. Kirkjugrunnurin:

a.	Vanligur stuðningur	20.000,—	
b.	Eykastuðning fyri 1944	15.000,—	
			35.000,—
	Munur		113.000,—

2. viðg. 24. nov. 3. viðg. 26. nov.

Broytingaruppskotið samtykt 17—0. Nevndaruppskotið so broytt samtykt 21—0.

Álit:

B. Frl. 9. nov.

Í tingsetuni 1939 (sí tingtíðindi 1939 s. 7) var frammi á tingi uppskot um samanløgu av tingsins grunnum til ein grunn, nevndan »Færøernes Læglingsfond«. Uppskotið varð ikki samtykt.

Nevndin hevur umhugsað hetta mál, serstakliga viðvíkjandi amtsgrunninum og økonomiska grunninum, tí tað er nú so, at rokuskapurin er vorðin nakað fløktur, av tí at játtanir av sama slagi verða samtyktar stundum úr amtsgrunninum og stundum úr økonomiska grunninum, t. d. stuðningar til lendingar.

Meðan nevndin er samd um, at tað ikki er orsøk til at leggja saman allar grunnar, ið tingið hevur ræði yvir, er hon samd um, at **økonomiski grunnurin eigur at verða lagdur til amtsgrunnin.**

Samstundis mælir nevndin til, at rokuskapurin fyri nevnda grunn verður hildin eftir meira føstum reglum, so sama útreiðsla á hvørjum ári kann verða funnin undir somu grein og sama merki á rokuskapinum. Hetta vil lætta um bókførsluna og verða meira greitt hjá teim, sum vilja fán sær yvirlit yvir tingsins rokuskap.

Nevndin hevur samráðst við gjaldslovnna um henda spurning og er hon á einum máli um, at hetta tiltuk er beint. Eistni hevur nevndin frá gjaldslovnni fingið váttan fyri, at tann nýggja skipan av rokuskapinum í føstum greinum er væl nýtandi.

Av tí at økonomiski grunnurin er nevndur í ymiskum lógum, heldur nevndin tað vera beint, at her umtalaða broytan verður samtykt við lóg, so eingin misfatan verður.

Uppskot

til

I. *Midlertidige Bestemmelser*

om Ophævelse af Lagtingets økonomiske Fond.

§ 1.

Fra 1. Januar 1944 ophæves Lagtingets økonomiske Fond, og dens Midler overføres til Færø Amts Repartitionsfond.

§ 2.

Alle Indtægter, der i Medfør af gældende Lovregler er tilfaldet Lagtingets økonomiske Fond, tilfalder fremtidig Færø Amts Repartitionsfond, der ligeledes overtager Udredelsen af de Bevillinger og Forpligtelser, som paahviler økonomisk Fond.

II. *Bráðfengis reglur um avtøku av Løgtingsins økonomiska grunni.*

Grein 1.

Frá 1. januar 1944 verður løgtingsins økonomiski grunnur avtikin, og tess grunnar flutlir til løgtingsins amtsgrunn.

Grein 2.

Allar inntøkur, sum sambært galdandi lógarreglur eru goldnar til løgtingsins økonomiska grunn, skulu í framtíðini ognast løgtingsins amtsgrunni, sum samstundis tekur við ábyrgdini fyri útgjaldan av teimum játtanum og byrðum sum hvila á økonomiska grunninum.

17. nov. 2. viðg. 26. nov. 3. viðg. Samtykt 19—0.

3. Amtsfátækragrunnurin.

Álit:

Løglingsskrivstovan hevur lagt fyri tingið uppskot til fíggjarsamtykt fyri Fátækragrunn løglingsins fyri 1944.

Hareftir eru inntøkurnar ætlaðar til 13.000 kr. og fastar útreiðslur til 3.000 kr. Eftir skuldu so verið 10.000 kr. at býta millum kommunur, sum hava haft størri útreiðslur til fátækrahjálp o. l.

Eftir teim upplýsingum, ið liggja fyri, og sum viðurskiftini eru, mælir nevndin til eiuki at býta út úr grunninum fyri 1944, so grunnurin kann vaksa við teim nevndu 10.000 kr., og hesin peningur verða goymdur til ringari tíðir.

Uppskot:

Fyri 1944 verður eingin studningur játtaður úr »Fátækragrunni Løglingsins«.

4. nov. samtykt 17—0.

---

4. Amtsfondsálikningin.

29. okt. frl. álit og uppskot sí skjal nr. 8. 2. viðg. 1. nov. 3. viðg. 4. nov. Samtykt 19—0.

---

5. Løgtingsskattur 1944.

1. viðg. 17. sept. Frl. 19. nov.

Álit:

Løgtingsskrivstovan hevur í brævi 31. juli í ár peikað á, at reglurnar um beinleiðis skatt til løgtingið eru ásettar í lóg nr. 202 av 15. mai 1939.

Við serstakar árligar kunngerðir er hesin løgtingsskattur nógv hækkaður fyri 1941, 1942 og 1943. Fyri hesi 3 ár er skatturin úlskrivaður eftir somu reglum, tó við teirri broyting fyri 1943, at eingin skattaborgari við uppgerð av skattaskyldugari innløku fyri skattaárið 1943

(inntøkan í 1942) viðvíkjandi rindaðum persónligum skatti til kommununa og løgtingið má frádraga størri peningabædd enn, hvat tílíkur skattur eftir teim fyri skattaárið 1943 galdandi reglum og líkningarprocentum vildi verið av hini skattaskyldugu inntøku uttan frádrag av persónligum skatti, sbr. kunngerð nr. 47 av 17. december 1942. Líkuandi reglur vórðu samtyktar fyri kommununskatti, sbr. kunngerð nr. 46 av 17. december 1942.

Við kunngerð nr. 45 av 17. desember 1942 varð landsnevndin heimilað at sela í gildi reglur um eykaløgtingsskatt, um hon hell tað neyðugt, men hesar reglur vórðu ikki settar í gildi.

Løgtingsskrivsstovan hevur lagt fyri tingið spurningin um, hvussu løgtingsskatturin fyri 1944 verður at útskriva.

Í skrivi 4. september 1943 greiðir Líkningarráð Føroya frá, hvussu serreglurnar um frádrátt av goldnum skatti hava ávirkað skattametingina í 1943, og siga teir her, at tað eftir teirra ætlan hevur givið í løgtingsskatti 140.000,— til 150.000,— krónur meira enn eftir teim gomlu frádráttarreglum. Ráðið viðmerkir, at hesar reglur hava verið ógviliga torførar at arbeiða við, bæði hjá sóknarstýrum og líkningarráði, og at tær hava haft ógviliga órættvísa ávirkan á álíkningina í einstøkum førum.

Líkningarráðið leggur aftrat, at ráðið á fundi tann 27. august 1943 einmælt samtykti at mæla frá, at løgtingið í komandi tingsetu endurnýggjar hesar lógir, við tilskilan, at um løgting og kommunur ikki fáa nóg mikið av peningi við vanliga skattaálíkning, so heldur at álíkna $^1/_2$ ár, $^1/_4$ ár ella 1 ella 2 mánaðar aftrat, tí tá verður tað rættvíst og rakar øll og ikki bert nøkur einstøk, ið frammanundan eru rakt við ringari vinnu.

Líkningarráðið heldur síðani fram í sínum skrivi:

»Fyri at vísa á, hvussu hesar reglur hava roynst, verður her víst á eitt dømi frá skattametingini í 1943:

Urtøka uttan frádrátt av goldnum skatti . .		kr. 73.000,—
Goldin skattur í 1942		kr. 68.000,—
Eftir gomlum reglum er skattaleggjandi inntøka . .		kr. 5.000,—
og gevur hetta í løgtingsskatti .	kr. 132,—	
og í kommununskatti um . . .	kr. 400,—	
Eftir teimum nýggju reglum verður		
løgtingsskatturin í hesum føri um	kr. 8.500,—	
og kommuskatturin um	kr. 5.700,—	

tað vil siga kr. 14.200,— í skatt av einari verunligari inntøku uppá kr. 5.000,—.«

Meirilutin (Kjølbro, Long, Paturssen og Th. Petersen) má halda, at tað kann ikki vera beint, at skatturin, sum verunliga er ein útreiðsla, ikki kann lakast frá, áðrenn skattaleggjandi inntøka verður fastløgd; tað er eisini beint, um Líkningarráðið frambeldur, at tað kann ikki verða rættvíst at taka meira frá tí, sum av umstøðunum frammanundan er raktur við at hava fingið so væl minni í inntøku, enn hann hevði árið frammanundan.

Meirilutin vil tí ikki sela fram uppskot um at leingja lógirnar nr. 46 og 47 av 17. desember 1942 fyri skattaárið 1944.

Ein minniluti (Djurhuus og Poulsen) úttalar, at tá hesar reglur um frádrátt vórðu settar í gildi í fjør, heldur minnilutin tað ikki bera til at broyta tær í ár, men mælir til, at hesar frádráttarreglur verða endurnýggjaðar fyri 1944.

Løgtingsskatturin fyri árið 1944 er í uppskotinum til fíggjarætlan til tingið mettur til at vilja geva, við óbroyttum reglum, 2,1 millión kr. Nevndin hevur frá gjaldstovuni fingið ymiskar upplýsingar um skattin tey trý seinastu árini, og skal framseta hesar viðmerkingar:

1941:

Skatturin gav falt	kr.	1.189.912,23
7. skattaborgarar við inntøku yvir 100.000 kr. lótu 42 pct.	—	493.147,50

1942:

Skatturin gav falt	—	3.188.399,43
19 skattaborgarar við inntøku yvir 100.000 kr. lótu 50½ pct.	—	1.612.027,50
45 skattaborgarar høvdu millum 50.000 og 100.000 í inntøku og lótu 28 pct.	—	889.735,00
Allir undir 50.000 21½ pct.	—	686.636,93

1943:

Skatturin gav falt	—	2.631.163,79
24 skattaborgarir yvir 100.000 kr. í inntøku lótu 45 pct.	—	1.173.936,00
Um ein ættar sambært 1942 vildu teir millum 50.000 og 100.000 latið 34 pct.	—	889.735,00
Allir undir 50.000 kr. vildu tá latið 21 pct. av skattinum, ella	—	567.492,79

Nevndin hevur kannað lista yvir teir borgarar, sum hava haft inntøkur uppá meira enn 100.000 kr. í hesum trimum árum, og má úttala, at tað kann væl vera, at ein ella tveir koma undir hesa inntøku í ár, men eins væl er hugsandi, at ein ella fleiri koma aftrat. Tað er vert at ansa eftir, at talið á teimum, sum hava inntøkur yvir 100.000 kr. er vaksandi; 1941—7, 1942—19 og 1943—24; tað er óivað soleiðis, at líkningarráðsins virki her hevur havt stóran týdning.

Inntøkurnar millum 50.000,— og 100.000,— vilja altíð liggja væl fastari enn tær hægru, soleiðis at ein har kann rokna við nakað tað sama sum árinum frammanundan.

Av teimum ávístu tølum sæst, at gott og væl 20 % av skattinum kemur frá fólki, sum hevur undir 50.000,— kr. í inntøku. Hesin partur kann ein vænta fer at liggja enn fastari enn árið frammanundan, tí dýrtíðviðbót og lønir eins og prístal er nógv hægri í 1943 enn í 1942, og má hava sín ávirkan á inntøkurnar.

Hildið verður tí, at ein uttan iva kann rokna við, at somu reglur sum 1943 vilja geva fyri 1944 ein skatt um 2,6 milliónir.

Meirilutin (Djurhuus, Kjølbro, Paturssøn, Th. Petersen og Poulsen) heldur fram, at dýrtíðin er vorðin meira nervandi í teimum seinastu árum, og fyri teir, sum hava undir 4.000 kr. í inntøku má tað

verunliga sigast, at har lítil ella eingin skattaevna er. Meirihlutin skal tí skjóta upp, at reglurnar verða eitt sindur broyttar, soleiðis at skatturin hjá hesum borgarum minkar.

Ein meirihluti (Kjølbro, Long, Paturssøn, Petersen) heldur tað samstundis vera beint, at eitt sindur verður lagt aftrat teim størri skattunum, soleiðis at tað í hvussu er gevur løglinginum í mun meira enn tær gomlu reglurnar.

Ein minniluti (P. M. Dam) skal flyta fram:

Sambært fíggjarætlaninna fyri amtsgrunnin saman við økonomiska grunninum er tingsins inntøka fyri 1944 ætlað til 3.650.000 kr., meðan útreiðslurnar eru mettar at verða 3.527.000 kr. Tað er so sinti bert talan um eitt yvirskot uppá 123.000 kr. Hetta yvirskot kann lætt verða burturi og kanska meira aftrat, um inntøkumøguleikarnir skeiklast.

Tað er javnaðarmanna hugsan, at í hesum døgum má tingið leggja allar árar út fyri at fáa so nógvar inntøkur, at eitt stórt avlop verður at leggja í teir ymsu grunnar, ið tingið hevur sett á stovn. Henda uppgávu kann ikki sambart ávísta fíggjarstand tingsings verða loyst, uttan so verður, at tingið veitir sær nýggjar inntøkur. Hvaðna minni kann verða talan um hjá tinginum at álaka sær nýggjar uppgávur, sum til dømis at fara undir ta hart átroðkandi skúlabygging, bøtan av tí socialu forsorgini, umskipan av jarðabrúkinum o. s. fr.

Hesar uppgávur kunnu als ikki verða skotnar til viks, men mega verða tiknar upp beinan vegin og fremjast skundisliga.

Javnaðarflokkurin heldur tí ikki, at tingið í ár kann sleppa undan at fáa sær meiri inntøkur og skjýtur uppá sama skipan, sum varð samtykt í fjør viðvíkjandi at økja skattin við 10 pct. av skattinum av øllum inntøkum yvir 5000 kr. og 25 pct. av skattinum av inntøkupartinum, ið liggur oman fyri 50.000 kr., men sum ongatíð varð sett í gildi. Tó eigur greinin, ið viðgjørdi, hvussu ley 25 pct. skuldu verða nýtt, at ganga úl, og grein 5 vera at grein 4.

Kríggið hevur borið dýrtíð við sær. Henda dýrtíð hevur serliga hart rakt fiskimenn, arbeiðsmenn og aðrar, sum sita við lágum lønum og ikki hava fingið fult viðurgjald fyri dýrtíðina. Tað má ásannast, at vera ilt hjá hesum fólkum at rinda skatt eftir sama skattastigum, ið vóru galdandi undan dýrtíðini. Tað má tí haldast at vera beint viðvíkjandi øllum lágum inntøkum annaðhvørt at lækka skattaprocentini ella áðrenn skattað verður at leita fram friðartíðarinntøkuna, ið svarar tí inntøkuna, ið viðkomandi hevur nú, og skatta eftir henni. Tað er bildið fram, at øll eiga at bera nakað av teim trupulleikum, ið dýrtíðin førir við sær, eisini tá ið talan er um skatt. Tað er nakað í hesum, og er tað tí kanska einki at siga til, at gjørt verður sum t. d. í Íslandi, at skatturin, ið er settur eftir friðartíðarinntøkuni, verður hækkaður sambart prístalið.

Javnaðarflokkurin kann ikki, soleiðis sum skotið er uppá, ganga við til at geva einstøkum stórum skattaborgarum nakað aftur av tí skatti, teir áður hava goldið, sjálvt um tesin peningur er ætlaður sum viðurgjald fyri gjørdar ábøtur í vinnulívinum. Flesum viðvíkjandi skal takast øðrvísi stórløkið til, og hava javnaðarmenn serstakt uppskot um ikki bert smáar ábøtur, men um grundbøtan og endurreisan av øllum vinnulívinum á sjógvi og landi.

Har aftur ímóti mæla javnaðarmenn til at dýrtíðarviðgera allar skattainntøkur, sum liggja niðan fyri 6.000 kr. (húshaldsbudgettið), soleiðis at tær, áðrenn tær verða skattaðar, verða faldaðar við 100 og deildar við prístalinum. Tann til ta soleiðis funnu skattainntøku svarandi skattur verður umvent dýrtíðarviðgjørdur, t. v. s. faldaður við prístalinum og deildur við 100. Tann soleiðis funni skattur er tann endaligi skattur, ið skal verða goldin til tingið.

Minnilutin skjýtur uppá at broyta skattalógina soleiðis fyri 1944, at skattastigini verða umgjørd samsvarandi við hesa dýrtíðarviðgerð.

Í fjør varð hildið fram: »Framtíðin liggur dald. Eingin veit við vissu, ið hvussu verður. Men rætt nú tykist útlitið ikki at vera hitt ljósasta. Skipini eru fækkað. Vinningurin viðvíkjandi fiskasølunni er heldur í minkan enn í vøkstri, og so eru tekin fyri, at í framtíðini verður tað ikki lættligt at fáa fisk til avreiðingar í Bretlandi. Ein kann so statt kvíða fyri inntøkuminkan. Hendir hetta í stórum mun, verða bæði løgting og kommunur fyri einum skaki, ið tey ikki orka at standa fyri, um ikki lingmenn vera fyrivarnir og gera tær neyðugu fyriskipanir. Tað er ein lívssak fyri landið, at vart verður ímóti einum ovknøppum inntøkubresti hjá tinginum eins og kommunum.

Bara tað, at teir, ið bera hin stóra skattin, kunna koma so fyri, at teir vinna ikki stórt meiri enn skattin frá seinasta ári, og harvið verða beinleiðis skattafrítir, kann næstan kollvella kommununa og lingsins fíggjarætlan fyri árið.

Fyri at verja kommunur og ting ímóti einum tílíkum bakbresti er neyðugt at broyta skattafrádráttarreglurnar t. d. soleiðis eingin skal hava loyvi til størri skattafrádrátt enn eina peningahædd, ið svarar til skattin, ið ávarandi vildi fingið av skattainntøkuni utlan skattafrádrátt (kommunuskattinum viðvíkjandi roknað eftir seinastu álíkningarprocentum).

Hetta var øll nevndin í fjør samd um.

Í ár liggja viðurskiftini soleiðis, at tað av sonnum eru grundir fyri at undirstrika tað neyðturviliga í at endurnýggja skipanina, sum gjørd varð í fjør fyri at verja hitt almenna húsarhaldið ímóti fylgjunum av eini ovbráðari inntøkuskiftan.

Javnaðarflokkurin mælir tí til og setur fram uppskot um at endurnýggja: »Midlertidige Bestemmelser for Færoerne om Indkomstskat til Amtskommunen for Skatteaaret 1943 Nr. 47«.

Allar inntøkur upp til 2.600 kr. vilja við at verða dýrtíðarviðgjørdar koma niður um tað núverandi skattamarkið 1.000 kr.

Dýrtíðarviðgerð av teim fyrstu 6000 kr. av skattainntøkunum vil so statt flyta skattamarkið frá kr. 1.000 uppí kr. 2.600 og sleppa einum hópi (um 3.000) av skattaborgarum, ið nú gjalda skatt til tingið, undan hesum skatti.

At hesir 3.000 skattaborgarir sleppa frá løgtingsskattinum, týðir sambært gjaldstovunnar ætl eina minnkun av lingsins inntøkum uppá um 6.000 kr.

Øll dýrtíðarviðgerðin av teim fyrstu 6.000 kr. av skattainntøkunum vil koma at snúgva seg um eina inntøkuminnkan fyri tingið uppá kr. 225.000.

Men aftur á hin bógvin vilja tær nýggju skattareglurnar, ið skotið verður uppá, ætlandi koma at geva tinginum:

10 % hækkan av øllum skatti av skattainntøkum yvir kr. 5.000	kr.	193.000
25 % av skattinum av skattainntøkunum yvir kr. 50.000	kr.	250.000
Tilsamans	kr.	443.000
÷ frammanfyri ávísin inntøkuminnkun ..	kr.	225.000
Meirinntøkan verður so slatt	kr.	218.000

Sambært galdandi skattalóg og eftirfylgjandi uppskot verður munurin millum núverandi skatt og skattin, ið skotin verður uppá, hesin:

Inntøkan	Skattur sambart galdandi lóg	Skattur sambart uppskotini				Lætti	Økjan
		Skattastigini	10 pct. (§ 5)	25 pct. (§ 6)	Tilsamans		
Av 1.000	kr. 7	kr. 0,00			kr. 0,00	kr. 7,00	
— 2.000	— 27	— 0,00			— 0,00	— 27,00	
— 2.600	— 45	— 18,10			— 18,10	— 26,90	
— 3.000	— 57	— 25,50			— 25,50	— 31,50	
— 4.000	— 92	— 44,00			— 44,00	— 48,00	
— 5.000	— 132	— 65,00			— 65,00	— 67,00	
— 6.000	— 177	— 93,50	kr. 9,35		— 102,85	— 74,15	
— 7.000	— 242	— 158,50	— 15,85		— 174,35	— 67,65	
— 8.000	— 322	— 238,50	— 23,85		— 262,35	— 59,65	
— 10.000	— 502	— 418,50	— 41,85		— 460,35	— 41,65	
— 15.000	— 1.002	— 918,50	— 91,85		— 1.010,35		kr. 8,35
— 20.000	— 1.677	— 1.593,50	— 159,35		— 1.752,85		— 75,85
— 30.000	— 3.327	— 3.243,50	— 324,35		— 3.567,85		— 240,85
— 40.000	— 5.527	— 5.443,50	— 544,35		— 5.987,85		— 460,85
— 50.000	— 8.327	— 8.243,50	— 824,35		— 9.067,85		— 740,85
— 75.000	— 16.827	— 16.743,50	— 1.674,35	kr. 2.125,00	— 20.542,85		— 3.715,85
— 100.000	— 26.327	— 26.243,50	— 2.624,35	— 4.500,00	— 33.367,85		— 7.040,85
— 200.000	— 66.327	— 66.243,50	— 6.624,35	— 14.500,00	— 87.367,85		— 21.040,85
— 400.000	— 148.327	— 148.243,50	— 14.824,35	— 35.000,00	— 198.067,85		— 49.740,85

Uppskot:

I. Midlertidige Bestemmelser for Færøerne om Indkomstskat til Amtskommunen for 1944.

A. Øll nevndin undantikið P. M. Dam:

§ 1.

For Skatteaaret 1944 udskrives Indkomstskat til Amtskommunen efter de Regler, som indeholdes i Lov Nr. 202 af 15. Maj 1939, saaledes som denne er ændret ved Kundgørelse Nr. 62 af 15. December 1941, dog efter følgende Skala:

Udgør Skatteindtægten 1.000 Kr., svares et Beløb af 5 Kr.

Er Indtægten over				Kr.		Kr.		Kr.			
1.000	men	ikke	over	2.000	svares	5	af	1.000	og	$1^1/_2$	pct. af Resten
2.000	-	-	-	3.000	-	20	-	2.000	-	$2^1/_2$	- - -
3.000	-	-	-	4.000	-	45	-	3.000	-	3	- - -
4.000	-	-	-	5.000	-	75	-	4.000	-	4	- - -
5.000	-	-	-	6.000	-	115	-	5.000	-	$4^1/_2$	- - -
6.000	-	-	-	7.000	-	160	-	6.000	-	$6^1/_2$	- - -
7.000	-	-	-	8.000	-	225	-	7.000	-	8	- - -
8.000	-	-	-	10.000	-	305	-	8.000	-	9	- - -
10.000	-	-	-	15.000	-	485	-	10.000	-	10	- - -
15.000	-	-	-	20.000	-	985	-	15.000	-	$13^1/_2$	- - -
20.000	-	-	-	30.000	-	1.660	-	20.000	-	$16^1/_2$	- - -
30.000	-	-	-	40.000	-	3.310	-	30.000	-	22	- - -
40.000	-	-	-	50.000	-	5.510	-	40.000	-	28	- - -

B. Frá meirilutanum (Kjølbro, R. Long, J. Paturssoon og T. Petersen):

50.000	men	ikke	over	75.000	svares	8.310	af	50.000	og	35	pct. af Rest
75.000	-	-	-	100.000	-	17.060	-	75.000	-	39	- - -
100.000	-	-	-	200.000	-	26.810	-	100.000	-	41	- - -
200.000	-	-	-	400.000	-	67.810	-	200.000	-	43	- - -
400.000	og	derover				153.810	-	400.000	-	46	- - -

C. Frá minnilutanum (K. Djurhuus og J. Poulsen):

50.000	men	ikke	over	75.000	svares	8.310	af	50.000	og	34	pct. af Rest
75.000	-	-	-	100.000	-	16.810	-	75.000	-	38	- - -
100.000	-	-	-	200.000	-	26.310	-	100.000	-	40	- - -
200.000	-	-	-	400.000	-	66.310	-	200.000	-	41	- - -
400.000	og	derover				148.310	-	400.000	-	45	- - -

D. Frá minnilutanum (P. M. Dam, K. Djurhuus og J. Poulsen):

§ 2.

Ved Opgørelsen af den skattepligtige Indkomst for Skatteaaret 1944 (normalt Indtægten i Aaret 1943) maa ingen Skatteyder for betalte personlige Skatter til Sognekommunen (og Thorshavn Kommune) samt Amtskommunen fradrage et større Beløb end, hvad saadanne

Skatter efter de for Skatteaaret 1944 gældende Regler og Ligningsprocenter (for den kommunale Skats Vedkommende Ligningsprocenterne for 1943) vilde udgøre af den skattepligtige Indkomst uden Fradrag af personlige Skatter.

E. Frá minnilutanum (Kr. Djurhuus og J. Poulsen):

§ 3.

For Skatteaaret 1944 kan der ved Beregning af den skattepligtige Indkomst fradrages indtil 10% af de Beløb, som vedkommende Skatteyder i Regnskabsaaret maatte have anvendt til:

1) Bygning af nyt Fartøj.
2) Ombygning af Fartøj til tidssvarende Fiskeridrift.
3) Anskaffelse og Installation af ny Motor i Fiskerskib.
4) Opførelse af moderne Fryselhuse.
5) Anlæg af Industrivirksomhed paa Landjorden, dog saaledes, at der højst kan fradrages 25% af Skatteindtægten.

F. *Øll nevndin.*

Disse Bestemmelser træder i Kraft straks.

H. Frá minnilutanum (P. M. Dam):

Midlertidige Bestemmelser for Færøerne om Indkomstskat til Amtskommunen for Skatteaaret 1944.

§ 1.

For Skatteaaret 1944 udskrives Indkomstskat til Amtskommunen efter de i Lov for Færøerne Nr. 202 af 15. Maj 1939 indeholdte Regler med nedennævnte Undtagelser.

§ 2.

Ingen Skatteyder maa ved Opgørelsen af den skattepligtige Indkomst for Skatteaaret 1944 (normalt Indtægten i Aaret 1943) for betalte personlige Skatter til Sognekommunen (og Thorshavn Kommune) samt Amtskommunen fradrage et større Beløb end, hvad saadanne Skatter efter de for Skatteaaret 1944 gældende Regler og Ligningsprocenter (for den kommunale Skats Vedkommende Ligningsprocenterne for 1943) vilde udgøre af den skattepligtige Indkomst uden Fradrag af personlige Skatter.

§ 3.

I § 1, Stk. 4, i Lov Nr. 202 af 15. Maj 1939 indskydes efter »Fradrage« følgende: »og Barnefradrag efter nedennævnte Regler« og til § 1, Stk. 4, føjes: »For hvert Barn (det er Æglebarn, Barn udenfor Ægteskab for Moderens Vedkommende, Stifbarn, Adoptivbarn og Plejebarn, for hvis Pleje der ikke ydes vedvarende Vederlag), som ved

Begyndelsen af Kalenderaaret er under 15 Aar, og som ikke har Midler til at bekoste sit eget Underhold, gives et skattefrit Fradrag for hvert Barn, forsaavidt Indkomsten er under 3.000 Kr. paa 200 Kr.

3.000	Kr.,	men	under	4.000	Kr.,	paa	150	Kr.
4.000	-	-	-	5.000	-	-	100	-
5.000	-	-	-	6.000	-	-	50	-

§ 4.

Bestemmelserne i Lov Nr. 202 af 15. Maj 1939 § 2, Stk. 1, affattes saaledes:

Den i § 1 omhandlede Skat erlægges efter følgende Skala:

Udgør Skatteindtægten 2.600 Kr. svares 18 Kr. 10 Øre.

Er Indtægten over:		Kr.		Kr.		Kr.		
2.600	Kr. m. ikke o.	4.000	sv.	18,10	af	2.600	og	18½ ‰ af Resl
4.000	- - - -	5.000	-	44,00	-	4.000	-	21 - - -
5.000	- - - -	6.000	-	65,00	-	5.000	-	27½ - - -
6.000	- - - -	7.000	-	93,50	-	6.000	-	6½ % - -
7.000	- - - -	8.000	-	158,50	-	7.000	-	8 - - -
8.000	- - - -	10.000	-	238,50	-	8.000	-	9 -
10.000	- - -	15.000	-	418,50	-	10.000	-	10 - - -
15.000	- - - -	20.000	-	918,50	-	15.000	-	13½ - - -
20.000	- - - -	30.000	-	1.593,50	-	20.000	-	16½ - - -
30.000	- - - -	40.000	-	3.243,50	-	30.000	-	22 - - -
40.000	- - - -	50.000	-	5.443,50	-	40.000	-	28 - - -
50.000	- - - -	75.000	-	8.243,50	-	50.000	-	31 - - -
75.000	- - - -	100.000	-	16.743,50	-	75.000	-	38 - - -
100.000	- - - -	200.000	-	26.243,50	-	100.000	-	40 - - -
200.000	- - - -	400.000	-	66.243,50	-	200.000	-	41 - - -
400.000	- og derover		-	148.243,50	-	400.000	-	45 - - -

§ 5.

Det hver enkelt Skatteyder efter Reglerne i § 4 paalignede Skattebeløb forhøjes med 10 %, dog at saadan Forhøjelse ikke finder Sted med Hensyn til Skatteindtægter paa 5.000 Kr. og derunder.

§ 6.

Udover den i §§ 4 og 5 nævnte Indkomstskat erlægges for Skatteaaret 1944 en overordentlig Indkomstskat til Amtskommunen af enhver Skatteyder, hvis skattepligtige Indkomst, jfr. Lov Nr. 202 af 15. Maj 1939 § 1, Stk. 4, som ændret ved nærværende Bestemmelsers § 3, udgør 50.000 Kr. eller derover.

Den overordentlige Indkomstskat udgør 25 pct. af den almindelige Indkomstskats Grundbeløb (uden de 10 pct. Tillæg), naar heri først er fradraget Grundbeløbet for en skattepligtig Indkomst paa 50.000 Kr., d. v. s. 8.243 Kr. 50 Øre.

§ 7.

Overordentlig Indkomstskat udredet i Henhold til § 6 kan ikke bringes til Fradrag ved Beregning af den skattepligtige Indkomst ved senere Skatteansættelser.

Skatten paalignes, udredes og inddrives efter samme Regler som anden personlig Skat til Amtskommunen.

§ 8.

Provenuet af den i § 6 omhandlede overordentlige Indkomstskat indgaar i Færø Amts Repartitionsfond. Hvis Overskudet for denne Fond for 1944 bortset fra den heromhandlede Skat andrager over en Million Kr., træffer Landsnævnet nærmere Bestemmelser om Anvendelsen af Provenuet af den overordentlige Indkomstskat til Fremme af Erhvervslivet ved Henlæggelse til Vinnulánsgrunn Løglingsins eller paa anden Maade.

§ 9.

I Lov Nr. 202 af 15. Maj 1939, § 3. ændres »500« til »2.600«.

§ 10.

Nærværende Bestemmelser træder i Kraft straks.

III. *Midlertidige Bestemmelser om Ændring i Lov for Færøerne Nr. 76 af 12. Marts 1923 om den kommunale Beskatning.*

A. Frá minnilutanum (P. M. Dam, Kr. Djurhuus og J. Poulsen):

§ 1.

For Skatteaaret 1944 paalignes Kommuneskat efter de herom gældende Regler, dog saaledes, at ingen Skatteyder ved Opgørelsen af den skattepligtige Indkomst for Skatteaaret 1944 (normalt Indtægten i Aaret 1943) for betalte personlige Skatter til Kommunen samt Amtskommunen maa fradrage et større Beløb end, hvad saadanne Skatter efter de for Skatteaaret 1944 gældende Regler og Ligningsprocenter (for den kommunale Skats Vedkommende Ligningsprocenterne for 1943) vilde udgøre af den skattepligtige Indkomst uden Fradrag af personlige Skatter.

B. Frá minnilutanum (Kr. Djurhuus og J. Poulsen):

§ 2.

For Skatteaaret 1944 kan der ved Beregning af den skattepligtige Indkomst fradrages indtil 10 % af de Beløb, som vedkommende Skatteyder i Regnskabsaaret maatte have anvendt til:

1) Bygning af nyt Fartøj.
2) Ombygning af Fartøjer til tidssvarende Fiskeridrift.
3) Anskaffelse og Installation af ny Motor i Fiskerskib.
4) Opførelse af moderne Fryschuse.
5) Anlæg af Industrivirksomhed paa Landjorden, dog saaledes, at der højst kan fradrages 25 % af Skatteindtægten.

C. Frá minniluttanum (Dam, Djurhuus og J. Poulsen):

§ 3.

Disse Bestemmelser træder i Kraft straks.

Frl. 25. nov. *Broytingaruppskot*

frá R. Long:

Sum skattafríar verða frádragnar fyri hvørt barnið 300 kr. av inntøkum undir 2000 kr., 250 kr. fyri inntøkur frá 2000—3000 kr., 200 kr. fyri inntøkur frá 3000—4000 kr. og 150 kr. fyri inntøkur frá 4000—5000 kr. og 100 kr. fyri inntøkur frá 5000—6000 kr.

Uppskot:

frá Kr. Djurhuus og Johan Poulsen:

Vi foreslaar en lignende Ordning som vedtaget i Fjor med Hensyn til overordentlig Indkomstskat til Amtskommunen og fremsætter vedlagte

Forslag
til
Midlertidige Bestemmelser for Færøerne
om overordentlig Indkomstskat til Amtskommunen for 1944.

I Overensstemmelse med Vedtagelse af Færøernes Lagting stadfæster og udfærdiger undertegnede Amtmand over Færøerne herved følgende:

§ 1.

Det hver enkelt Skatteyder efter Reglerne om Indkomstskat til Amtskommunen paalignede Skattebeløb forhøjes med 10 %, jfr. § 2, Stk. 2 i Lov Nr. 202 af 15. Maj 1939, dog at saadan Forhøjelse ikke finder Sted med Hensyn til Skatteindtægter paa 5.000 Kr. og derunder.

§ 2.

Udover den i § 1 nævnte Indkomstskat erlægges for Skatteaaret 1944 en overordentlig Indkomstskat til Amtskommunen af enhver Skatteyder, hvis skattepligtige Indkomst, jfr. Lov Nr. 202 af 15. Maj 1939, § 1, Stk. 4, som ændret ved Kundgørelse Nr. ..... og nærværende Bestemmelsers § 1 overstiger 50.000 Kr.

Den overordentlige Indkomstskat udgør 25 pct. af den almindelige Indkomstskats Grundbeløb (uden de 10 pct. Tillæg), naar heri først er fradraget Grundbeløbet for en skattepligtig Indkomst paa 50.000 Kr. d. v. s. 8310 Kr.

§ 3.

Overordentlig Indkomstskat udredet i Henhold til § 2 kan ikke bringes til Fradrag ved Beregning af den skattepligtige Indkomst ved senere Skatteansættelser.

Skatten paalignes, udredes og inddrives efter samme Regler som anden personlig Skat til Amtskommunen.

§ 4.

Provenuet af den overordentlige Indkomstskat, der af Oppebørselskontoret ved Udgangen af hvert Kvartal indbetales paa en særlig Bankkonto, skal fra det Tidspunkt og efter Regler, som Lagtinget eller Landsnævnet bestemmer, anvendes til Fremme af færøsk Erhvervsliv. Enhver Skatteyder, som dokumenterer at have betalt overordentlig Indkomstskat, har naar Anvendelsen af Skattens Provenu paabegyndes og indtil 2 Aar efter, Ret til at faa udbetalt et Beløb svarende til Halvdelen af den af ham betalte overordentlige Indkomstskat, forsaavidt han samtidig dokumenterer, at han i det paagældende Kalenderaar har anvendt mindst samme Beløb til Forbedringer af egne Erhvervsmidler vedrørende Fiskerierhverv (Fartøjer, Anlæg, Maskiner el. lign.) eller Nyanskaffelser vedrørende Fiskerierhverv.

Foranstaaende Bestemmelser om Anvendelse af den overordentlige Indkomstskats Provenu kan kun ændres ved Lov.

§ 5.

Disse Bestemmelser sættes i Kraft med Gyldighed fra 1. Januar 1944 forsaavidt Landsnævnet efter Tilendebringelsen af Ligningen for Aaret 1944 anser dette for nødvendigt for at tilvejebringe de nødvendige Indtægter for Amtskommunen til Dækning af bevilgede Udgifter og af Hensyn til Amtskommunens Konsolidering. Om Bestemmelsernes Ikrafttræden udsteder Amtmanden en Kundgørelse i Overensstemmelse med Landsnævnets Beslutning.

2. viðg. 25. nov. og 2. dec. Lógaruppskot Dams § 4 fall 5—0. Uppskot frá allari nevndini undantikið Dam, § 1, 2. petti samtykt 20—0, frá meirilutanum fall 12—0, frá minnilutanum hildið samtykt. Uppskot R. Longs viðv. barnafrádrátti samtykt 19—0, Dams uppskot § 3 harvið burturdottið. Uppskotið frá Dam, Djurhuus og Poulsen viðv. skattafrádrátti burturdottið 13—0. Uppskot frá Djurhuus og Poulsen § 3 fall 0—0. Uppskot frá Dam § 5 fall 5—0, §§ 6—8 fall 5—0.

Uppskotið frá Djurhaus og Poulsen um cykaløgtingsskatt samtykt 19—0. Uppskotið frá Dam, Djurhuus og Poulsen um broytan av kommunalu skattalógini §§ 1 og 3 samtykt 14—0. § 2 hildin burturdottin.

3. viðg. 3. dec. Uppskotini sum samtykt við 2. viðg. samtykt við 22—0.

6. Uppkrevjan av amtsfondsálíkningini.

Álit:

Frl. 24. sept.

Tann amtsfondsskattur, sum løgtingið álíknar kommunum, verður eftir gomlum praksis bókaður kommunum til skuldar við helftini 1. juni og helftini 1. december tað fylgjandi ár aftaná, at tingið hevur samtykt álíkningina.

Lóg av 12. mars 1923 um kommunala skattaálíknan ásetir berl, at tann álíknaði amtsfondsskattur verður goldin av kommununum á sama hátt, sum hinar útreiðslur, kommununar hava.

Nevndin hevur ta áskoðan, at tann núgaldandi skipan við at bóka amtsfondsskattin til skuldar 1. juni og 1. december tað ár, hann er álíknaður fyri, ikki er líðarhóskandi og eisini førir við sær eina óneyðuga tarnan viðvíkjandi gjalding av skattinum.

Nevndin heldur tí, at kommununar eiga at hava skyldu at gjalda skattin nakað fyrr, tað árið hann er álíknaður fyri og skjýtur upp, at amtsfondsskatturin verður bókaður kommununum til skuldar 1. apríl og 1. oktober.

Uppskot:

Tann skattur, sum løgtingið álíknar uppá kommununar, verður í framtíðini bókaður kommununum til skuldar við helftini 1. apríl og helftini 1. oktober tað ár, skatturin er álíknaður fyri.

2. viðg. 5. okt. Samtykt 16—0.

---

7. Figgjareykasamtyktir 1943.

Álit:

Frl. 4. dec.

Løgtingsskrivstovan ger hesar viðmerkingar til fíggjarsamtyktina fyri amtsgrunnin 1943:

Viðmerkingar til inntøkurnar:

Løgtingsskatturin gevur	kr.	2.631.163,79
varð ætlaður til	-	2.100.000,—
meiriinntøka	kr.	531.163,79

Tollinntøkan kann ætlast at verða	kr.	1.100.000,—
varð ætlað at verða		900.000,—
meiriinntøka	kr.	200.000,—

Stuttleikaskattur kann ætlast at verða	kr.	40.000,—
varð ætlaður til	-	20.000,—
meiriinntøka	kr.	20.000,—

Viðmerkingar til útreiðslurnar:

Nakrir postar verða størri enn ætlaðir, t. d. útreiðslur til tingið og skrivstovuna, orsakað av eykatingsetuni, meiriútreiðsla 25.000 kr. Meiriútreiðslur kunnu ætlast til: Líkningarráðið 10.000 kr., fongsilsrúm 10.000 kr., sjúkrahúsini meiri enn 100.000 kr., læraralønir 20.000 kr., løgtingsverkfrøðingurin og skrivstova hansara 20.000 kr., sinnissjúkradeildin í Klakksvík (viðkan) 25.000 kr., hitaverkið á bróstsjúkrahúsinum 50.000 kr., brenninevndin 7.000 kr.

Landsnevndin hevur samtykt undir væntaðum góðkennan av tingiunum hesar útreiðslur: til Realskúlan 6.657,42 kr., Sands havn 9.120 kr., dýrtíðarviðbót (eyka) til bókasavnið og skjulasavnið 1000 kr. og lending í Tjørnuvík $^3/_4$ av 2.000 kr. Tingið hevur góðkent samtyktir landsnevndarinnar yvirhøvur.

Einstakir postar í fíggjarætlanini fyri amtsgrunnin fyri 1943 verða lægri enn ætlað, t. d. Lásarettir og eykalækni, ætlað 20.000 kr. verða ca. 10.000 kr., rentur 15.000 kr. verður yvirskot, skaðabøtur 100.000 kr. verða ca. 10.000 kr.

Fíggjarnevndin skal mæla til hesar eykafíggjarsamtyktir:

1. Lending á Øyri. Arbeiðið kostaði 354 kr. meiri enn játtað, og hetta hevur kommunan goldið.

2. Vegurin til lending við Toftir, Hósvík, er umaftur ætlaður, tí hann var ovlágt settur og má gerast annarleiðis enn fyrst hugsað.

3. Landsnevndin mælir til at játta rest av tilfari til tað arbeiði, sum er gjørt viðvíkjandi bátabrúgv í Hósvík 1250 kr.

4. Í Kvívíkar havn verður áldýpað. Løgtingsverkfrøðingurin mælir til at nýta grótið til slættan í strøndini ístaðinfyri at føra tað til sjógvs. Hetta vil kosta ca. 1.500 kr.

5. Hovs kommuna hevur gjørt 56 m veg eftir ávísan av verkfrøðinum, men eingin studningur er játtaður til hetta.

6. Lendingsarbeiðið, sum varð gjørt í summar í Hesti, kostaði 6.000 kr. meira enn játtað varð.

7. Húsið til starvsfólk á Drouning Alexandrines Hospital.

Hertil varð játtað á fíggjareykasamtykt 1942	40.000,— kr.
og á fíggjarsamtykt 1943	30.000,— -
	70.000,— kr.

Í 1942 varð keypt og goldið av amtsgrunninum — tilfar	27.146,35 kr.
Í 1943 er goldið	38.000,— -
	65.146,35 kr.

Húsið er liðugt, men eftir er at rinda:

Hitaverk o. a.	9.800,— kr.
aðrar rokningar (rest Cl. Dalsgarð o. m.)	5.000,— -
	14.800,— kr.

Húsið kemur í alt at kosta 80.000 kr. Neyðugt verður at játta 10.000 kr. aftrat.

Uppskot:

Úr amtsgrunninum fyri 1943 verður játtað:

1.	Lendibrúgv á Oyri, $^3/_4$ av 472 kr.	354,— kr.
2.	Hósvík: veg til lending við Toftir .... kr. 3.040,—	
	játtað fyrr ..... - 1.900,—	
	gamal prísur = kr. 1.140,—	
	$^3/_4$ av hesum ætlað	2.100,— kr.
3.	Bátabrúgv Garðsenda í Hósvík til tilfar	1.250,— -
4.	Kvívík viðv. útdýpingararbeiði upp til	1.500,— -
5.	56 m veg Hovi, $^3/_4$ av 1260 kr.	945,— -
6.	Lending Hesti, $^3/_4$ av 6.000 kr.	4.500,— -
7.	Húsið til starvsfólk á Drouning Alexandrines Hospital, eykastuðningur	10.000,— -
		20.649,— kr.

2. viðg. 7. dec. og 3. viðg. 8. dec. Samtykt 22—0.

8. Hækkan av løgtingsskatti.

Frl. 6. dec., loyvi givið 13—0.

Greint uppskot til avgerðar

frá P. M. Dam o. fl.:

Tann fíggjarættan, ið gjørd er í ár, er so lepur, at hon illa røkkur til tær, meðan hon varð gjørd, uppáskotnu útreiðslur.

Síðan henda ættan var gjørd, hevur lingið gingið við til so stórar játtanir, at fíggjarættanin røkkur minni enn so til og verður so statt talan um eina stóra skerjan av okkara fíggjarstandi.

Vit skulu vísa á:

Um vegirnir lingið hevur játtað studning til at gera tidnar, verða gjørdir til rætta tíð, verða at lróta um	kr.	660.000,—
Til Vágs ravmagnsverk er játtaður studningur	kr.	250.000,—
Til dansk flottarfólk	kr.	100.000,—
- búnaðarskúla	kr.	20.000,—
- útvarp	kr.	30.000,—
- útsendingar (skotið uppá)	kr.	50.000,—
- keyp av jørð	kr.	20.000,—
Sum uppfskoyti til ellisrentufólk, einkjubørn, avlamisfólk í minstalagi (skotið uppá)	kr.	150.000,—
Til rakstur av stórhvalaveiðu, í minsta lagi	kr.	150.000,—
	kr.	1.430.000,—

Í seinastu tingsetu varð samtykt at hækka løgtingsskattin á allar inntøkur yvir 5.000 kr. við 10 % og skattin av inntøkum yvir 50.000 kr. við 25 %.

Men henda samtykt var gjørd soleiðis, at tað skuldi standa landsnevndini til avgerðar, um lógin skuldi setast í gildi.

Hetta uppskot varð mett til, um tað varð sett í gildi, at geva um ½ millión og var fyrst og fremst ættað til at rinda útreiðslurnar við 10 ára havnagerðini, ið er mett at koma at kosta kr. 3.400.000. Ein partur av inntøkuni við teim 25 % hækkan av stórinntøkuskattinum skuldu nýtast til vinnulívið.

Tað má haldast at vera heill átroðkandi neyðugt at økju um lingsins inntøkur, og verður tí skotið uppá at álagt verður landsnevndini beinanvegin at seta nevndu samtyktu lógaruppskot í gildi.

Uppskot:

Tað verður álagt landsnevndini beinanvegin, hon er vald, at seta í gildi tey í seinastu tingsetu samtyktu lógaruppskot viðv. 10 % hækkan av skattinum av inntøkum yvir 5.000 kr. og 25 % hækkan av skattinum á skattainntøkum yvir 50.000 kr.

2. viðg. 8. dec. fall 6—0.

II. SKÚLAMÁL

1. Fluttningsútreiðslur lærara.

1. viðg. 11. sept. Frl. 8. nov.

Álit.

Lærari Meinhard Johansen, Svínoy, hevur í mai mánaða í ár søkt landsnevndina um studning til útreiðslur av flytan úr Hovi til Svínoyar. Fluttningsútreiðslurnar hava verið 420 kr., og hann skilar til, at sambart lóg fáa danskir lærarar studning, lá ið teir flyta. Landsnevndin ræður ikki yvir peningi til tillíkan studning og hevur lagt málið fyri tingið. Tann lógarásetingin, sum harra M. Johansen meinar við, man vera § 30, stk. 1 í »Lov Nr. 169 af 28. April 1931 om Lønninger m. m.«, sum ljóðar: »Forflyttes en fastansat Lærer efter Ansøgning til andet Opholdssted, kan der tilstaas ham Godtgørelse af Befordringsudgifter for egen Person, Husstand og Bohave, dog at der af Udgifterne til Bohavets Flytning fradrages $^1/_5$.«

Føroya Lærarafelag hevur viðmælt umsóknina og biðið um, at tann danska lógin verður sett í gildi her soleiðis, at lærarir, sum hava heitt á Føroya lærarafelag hesum viðvíkjandi, og sum hava haft stórar fluttningsútreiðslur, kunnu njóta gott av lógini.

Løgtingsskrivstovan vísir á, at tað eru kommununnur, ið gjalda henda studning gjøgnum skúlagrunnin. Sambart hetta átti Svínoyar kommuna at veitt studningin.

Nevndin kann ikki mæla til, at tingið í øllum føri tekur sær uppá at veita lærarum studning til fluttningsútreiðslur, men at hetta undir vanligum viðurskiftum má vera eitt kommunalt mál. Í hesi dýrtíð er kanska nakað øðrvísi, serliga við tað, at her er tala um ólagaligan fluttning millum pláss, ið eru fjarløgd hvørjum øðrum, og nevndin mælir tí tinginum til, um neyðugt, at veita studning í tí vón, at Svínoyar kommúna letur ein part.

Uppskot:

Tingið sendir Svínoyar kommunu umsóknina og ger hana kunnuga við, hvussu skipað er besum viðvíkjandi í donskum skúla. Tingið sær seg ikki fært fyri at seta donsku lógina í gildi her, men verður givin landsnevndini heimild til undir hesum serligu viðurskiftum at veita hóskandi part av útreiðslunum.

Umsøkjarin og Føroya lærarafelag verða gjørd kunnug við samtyktina.

Uppskot

frá minnilutanum (J. H. Danbjørg):

Tingið sær seg ikki fört fyri at seta donsku lógina í gildi her, men verður givin landsnevndini heimild til undir hesum sertigu viðurskiftum at veita hóskandi part av útreiðslunum.

Umsøkjarin og Føroya lærarafelag verða gjørd kunnug við samtyktina.

2. viðg. 15. nov. 3. viðg. 19. nov. Minnilutauppskot fall 8—0. Meirilutauppskot samtykt 18—0.

---

2. Nýggir skúlar.

1. viðg. 9. sept. Frl. 16. nov.

Álit.

Løgtingið hevur í ár fingið ymsar umsóknir um studning til kommunur, sum ætla sær at fara undir at byggja nýggjan skúla. Nevndin er samd um at úttala, at tað er gleðiligt, at kommunurnar eru hugaðar at veita skúlaskapinum góð og nýmótans líkindir, so skúlakeðslan kann fara fram í nóg stórum og nóg ljósum slovum og undir hugnaligum viðurskiftum. Fimleiki og kroppsvenjan hevur eisini so stóran týdning, at tá ið nýggir skúlar verða bygdir, má verða hugsað um at útvega teimum góð líkindir, og tað er tí gleðiligt, at í øllum leim stóru av teim fyriliggjandi skúlabyggingaætlanum er skotið upp at byggja fimleikarhøll, eins og tær allar hava baðstovu og w. c. Av tí at fimleikarhøllin í eini bygd má vænlast ikki bert at verða nýtt til skúlabarnakensla í fimleika, men eisini til vaksna mannu ítrótt, heldur nevndin, eins og framhildið varð í minnitalsuppskoti í fjør, at studningur til fimleikarhøllir eigur at verða givin í samband við øllum ítróttarmálinum, og tí eigur at verða latin úr fimleikargrunninum. Til fimleikargrunnin veitti tingið í fjør til útbýtan 50.000 kr., og fíggjarnevndin hevur skotið upp at veita sama pening í ár til hetta endamál. Umsóknir um studning til fimleikarhøllir eiga tí at verða beindar til fimleikargrunnin, og tann ætlaði kostnaður til fimleikarhøll, sum er ætlað sum partur av einari skúlanýbygging, eigur at vera frádrigin tí samlaða kostnaði, áðrenn studningur verður tilbýttur.

Tey flestu av málum um nýggjar skúlar vóru til viðgerðar á tingi í fjør, og vísir nevndin til tað, sum tá varð framført (sí løgtingstíðindi 1942, bls. 27—31). Sum har sagt frá, hevur tað higartil verið staturin, ið veitt hevur studning til nýggjar skúlar, og ikki Løgtingið, men sum viðurskiftini nú leingi hava verið, heldur nevndin, at beint er at styðja kommununum, tá ið tær hava hug at bøta um skúlaviðurskiftini, so mikið meiri sum fleiri av hesum byggingum hava verið ætlaðar gjøgnum langa tíð og eisini hava verið viðgjørdar á tingi, sum

til summar av teimum bevur givið viðmæli til statin um studning. Á summum av teim plássum, sum her søkja, er tann gamli skúlin avsagdur til brúks ella eigur at verða avtikin. Tó er her at viðmerkja, at kommununnar mugu veru varnar at fara undir arbeiði, sum kann sela tær í stóra skuld, sum frambildið í álitinum í fjør. Ein skúli, ið verður bygdur beint nú, kann av tí at kostnaðurin fer at vera nógvar ferðir størri enn í friðartíð, koma at verða ein ræðuligur kleppur á kommununi seinni, tá ið eitthvørt neyðsynt verk kann koma at liggja fyri. Tí má tingið taka ta støðu, at studningur til framúr stórar og dýrar skúlar, kann ikki beint verða veittur eftir sama sjónarmiðum, sum í friðartíð, tí tá kundu teir kanska verið gjørdir fyri ein lítlan part av tí, teir fara at kosta nú. Sjálvsagt skilir nevndin væl, at tað kortini kann vera beint hjá einari kommunu at fara undir tílík arbeiðir beint nú, serliga har sum inntøkurnar yvirhøvur eru heldur stórar samstundis sum ein partur av íbúgvarnnum er arbeiðsleysur, tí tá vil eitt tílíkt arbeiði lætta um ta byrðu, sum dýrtíðin er fyri ein stóran part av okkara fólki, men hetta má skipast innan fyri sóknarmark, og kommunur, sum seta á arbeiðir av hesi orsøk, kunna ikki væntа, at studningurin til teirra verður fullur so stórur sum har, sum arbeiðið verður hildið innan fyri meira avmarkaðan pening, annars hevði ikki verið beint athorið yvir fyri teimum sum heild, sum lata inntøkur til tingið.

Tær ymsu inntøkur má nevndin tí taka til viðgerðar á tann hátt, at tær, sum verða viðgjørdar eftir sama sjónarmiðum, verða umrøddar fyri seg.

1. *Skúli á Trøllanesi.* Hetta umsókn var á tingi í 1942, og kostnaðarætlanin var tá 10.000 kr. Nú verður upplýst, at arbeiðið er liðugt og skúlin er bygdur, men hann er eitt sindur størri, enn ætlað var av fystan tíð, fyri at koma ámóti tey krav, sum amtslækni og skúlastjórn hava sett; hann er tí nakað dýrari og kostar o. u. 15.000 kr. Sóknarstýrið sigur frá, at peningurin er útvegaður við at kommunan í 1942—43 hevur áltknað 4.000 kr. og tikið eitt lán í Norðoyar Sparikassa uppá 6.000 kr. Teimum fvænta altso 5.000 kr.

Nevndin má halda, at tað er beint, at tingið styðjar hesa kommunu í bemuara arbeiði fyri at fáa skúlabørnunum góð kor. Eisini heldur nevndin tað vera vert at føra fram, at væl eigur at verða tikið undir hesa umsókn frá einum brimplássi, ið ikki sum so nógv kyrruplass fær nakran lut í teim nógvu játtanum, ið tingið veitir til yntisk mál aðrastaðni í Føroyum.

Skúlastjórnin hevur havt tekningarnar til umhugsunar, men nevndin heldur tað vera beint, at skúlahúsini verða sýnað og góðtikin, og roknskapur fyri byggingina verður innsendur til skúlastjórnina, áðrenn studningur verður útgoldin. Nevndin mælir til at veita í studningi 20 % av tí verunliga kostnaði — tó ikki upp um 3.000 kr.

2. *Tilbygging til skúlan í Klakksvík.* Hetta mál var eisini til viðgerðar í seinastu tingsetu. Tá var kostnaðurin mettur til 42.000 kr. til sjálva byggingina, men eftir tí teknin og kostnaðurætlan, ið er lagd fyri tingið í ár, er kostnaðurin mettur til 43.800 kr. til sjálva byggingina og 2.500 kr. til búnytur. Nevndin kann ikki mæla til, at innbúgv verður roknað uppí tann pening, sum studningur verður latin eftir, og verður hann tí at frádraga. Byggingin er farin fram, og nevndin heldur ikki, at kostnaðurin er óhóskandi til ta nýtslu, kommununa fer av húsinum; her eru tvær góðar tíðarhóskandi skúlastovur og trý rúm í kjallaranum, sum kunna verða nýtt til loftverndarskýlir og seinni til aðra nýtslu.

Nevndin mælir til, at veitt verður í studningi 20 % av tí verunliga kostnaði, tá ið byggningurin er sýnaður og góðtikin og rokenskapur fyri byggingina er innkomin til skúlastjórnina, tó soleiðis, at studningurin ikki fer upp um 20 % av kostnaðarætlanini ella 8.700 kr.

3. *Skúli millum Lopra og Akrar.*
4. *Skúli og lærarahús í Funningsfirði.*
5. *Umbyggjan av skúlanum í Funningi.*

Hesi mál hava ikki verið á tingi fyrr enn í ár. Tó er málið um skúla millum Lopra og Akrar 13 ára gamalt, so leingi er lað síðan, fyrstu ferð varð skotið upp at byggja henda skúla, men atfinningar hava altíð verið gjørdar so at tí og so at tí, og hetta kom í drag. Í 1939 var málið komið so langt, at teknin og kostnaðarætlan varð góðtikin av kenslumálaráðdeildini og skúlastjórnini, men so var alt steðgað vegna ófriðartíðini. Í 1939 varð skúlin meltur at kosta 12.000 kr., og eingin nýggj kostnaðarætlan fyriliggur, men nevndin hevur spurt sær fyri hjá byggimeistarum og fingið upplýst, at hetta arbeiði kann verða mett til einar 36.000 kr. í dag. Skúlaviðurskiftini har suðuri eru út av lagi ring, og skúlastjórn, sóknarstýri og lærarin eru á einum máli um, at henda bygging er neyðug; sóknarstýrið sigur seg ikki at hava góð ráð, men vil fara undir arbeiðið skjótast gjørligt og væntar sær studning.

Oyndarfjarðar sóknarstýri hevur fann 28. september í ár sent umsókn inn um studning til eina skúlastovu og lærarahús í Funningsfirði. Sóknarstýrið viðmerkir, at leingi hevur verið trongd til eina tílíkan bygning, og at sóknin er samd um, at hetta arbeiði má verða gjørt so skjótt sum gjørligt, og væntar sær mannagóðan studning. Tekningar og kostnaðarætlan skulu koma frá byggimeistara Tórgarð, Tórshavn, sum hevur sagt nevndini frá, at byggikostnaðurin kann ætlast at koma upp í 35.000 kr.

Sóknarstýrið í Funningi hevur við skrivi av 1. september vent sær til tingið við umsókn um at fáa studning til umvølan av skúlahúsinum har. Takið lekur nú so illa, at nakað má gerast, men av tí at skúlahúsini standa so lágt, vil sóknarstýrið ikki gjarna fara undir eina umvøling, uttan at bøtt verður uppá skúlan yvirhøvur. Tí ætla teir at lyfta skúlahúsini upp, stoypa upp á veggirnar, soleiðis at skúlahúsini verða væl betri enn tey eru og nýtandi eina góða tíð út í framtíðina. Ítróttarumsjónarmaðurin og skútaumsjónarmaður S. P. úr Konoy hava í sumaar kannað viðurskiftini og sigast teir at vera samdir við sóknarstýrið um, at tørvur er á at gera hetta. H. C. W. Tórgarð byggimeistari hevur kannað málið og sigur nevndini frá, at hetta kann væntast at fara at kosta o. u. 20.000 kr.

Um hesar trýggjar umsóknir kann verða sagt, at tær koma frá lítlum kommunum, sum ikki kunna ætlast at standa serliga vel í tí, tí har hevur dýrtíðin verið nervandi, uttan at fast arbeiði hevur verið har um leið. Tó má nevndin halda fram, at ógjørligt er at fara upp um ein studning uppá 20 % av tí verunliga kostnaðinum. Tað vil siga, at hesar trýggjar kommunur, um tær fara undir hesa bygging nú, koma sjálvar at útvega ávíkavíst 28.800 kr., 28.000 kr. og 16.000 kr., og hetta má nevndin halda vera eitt ógvuliga tungt tak hjá hesum kommunum.

Ikki er alt klárt við teknin og kostnaðarætlan í hesum málum, so nevndin kann ikki mæla tinginum til at veita endaliga studningsváttan, men mælir til, at málini verða givin Landsnevndini upp í hendur, soleiðis at sóknarstýrini kunna umhugsa, hvussu tey kunna útvega tann neyðturviliga pening; síðan verða málini løgd fyri skúla-

stjórnini til at góðtaka teknings og kostnaðarætlan, og endaliga fær Landsnevndin heimild til at veita ein studning frá tinginum uppá 20 % av tí kostnaðarætlan, sum er góðtikin.

6. *Nýggjur skúli í Vági.*

Hetta mál var fyrstu ferð á tingi í 1936, og varð tá samtykt at taka ábyrgd fyri einum láni uppá 50.000 kr., men hetta kom ikki í lag tá. Málið var so aftur á tingi í fjør, og varð tað upplýst, at skúlin nú ætlast at kosta o. u. 430.000 kr., og at kommunan í 1942 bevði álíknað 50.000 kr. til hetta endamál.

Løgtingsins tilsagn í 1936 um at taka ábyrgd fyri einum láni uppá 50.000 kr. varð freytað av at kommunan fyri 83.000 kr. kundi láa skúlan bygdan eftir teim teknings og teirri kostnaðarætlan, sum tá lá fyri. Í 1942 varð biðið um, at Løgtingið mátti hækka sína ábyrgd fyri lánið til skúlan til 100.000 kr., men hetta er ikki komið í lag. Sóknarstýrið hevur í ár biðið tingið taka hetta mál til viðgerðar aftur í ár, um so er, at tingið í ár tekur umsóknir frá øðrum kommunum til viðgerðar.

Nú liggja fyri teknings og frágreiðingar frá S. J. Hofgaard byggimeistara á Tvøroyri. Skúlin ætlast nú at verða stoyptur í betong, eisini skilarúm og gólv. Av fyrstan tíð varð skúlin ætlaður at vera í 2 hæddum, men nú er ætlanin at hækka kjallaran, so har kunna fáast 5 stórar skúlastovur, sum ikki vera gjørdar lidnar nú, men kunna verða løkar seinni. Annars skulu í skúlanum vera 10 skúlastovur til fólkaskúlan og realskútan, lærarastova, fimleikahøll, baðstova, búðstaðir til fyrstalæraran og til eina lærarinnu umfraint miðstøðhitaverk. Kostnaðurin verður aftur í ár metur at verða 430.000 kr.

Nevndin má halda, at hetta verk er eitt av teimum, sum kommunurnar fyri ein part fara undir fyri at bøta um arbeiðsloysi, men sjálvandi eisini við teirri hugsan, at tað kann vera beint at fáa bygt nakað vel ávegis, nú inntøkurnar hjá kommununi eru stórar. Kostnaðurin av hesum skúla verður tí, við tað hann skal verða bygdur í dýrastu tíð, so ógviliga stórur, at nevndin má mæla til, at studningur verður latin av avmarkaðum byggikostnaði, nevniliga 430.000 kr. Frá hesum peningi eiga at verða drignar 60.000 kr., sum ætlaður kostnaður av fimleikarhøllini, og av teim eftirverandi 370.000 kr. mælir nevndin til at veita ein studning uppá 20 %, ella 74.000 kr., soleiðis at í 1944 verða latnar 20.000 kr. og síðan 18.000 kr. árliga í 3 ár.

7. *Nýggjur skúli í Vestmanna.*

Hetta mál var til viðgerðar á tingi í fjør, men er nógv eldri enn so. Í 1936 varð skúlin í Vestmanna dømdur at vera ónýtandi, og álagt varð sóknarstýrinum at fáa nýggjan skúla bygdan innan 1940. Í 1939 var málið til viðmæli til studning frá statinum. Nú liggja nýggjar teknings fyri eftir Eyolv á Heygum byggimeistara í Vestmanna og viðfylgjandi frágreiðing. Skúlin er ætlaður at vera í tveimum hæddum við høgum kjallara, allur bygdur av betong. Har verða 5 stórar skúlastovur, handavinnustova, sløydstova, skúlakøkur, fysikkstova, teknistova og fyrilestrarhøll, lærarastova, skrivstova og bókasavn, fimleikarhøll, baðstova og w. c. umfraint miðstøðuhitaverk.

Kostnaðurin verður ætlaður til 200.000—300.000 kr. Til skúlabyggingina vórðu í 1942 álíknaðar 50.000 kr. og í ár 40.000 kr. tilsamans 90.000 kr. Teir hava slættað og grivið út fyri allari grundini, og hevur tað kostað o. u. 11.000 kr., og nú verður farið undir at laða grundina. Við vænta teir at kunna fáa úr Fitja-pakkhúsinum, sum teir kunna fáa til keyps. Vestmanna Arbeiðismannafelag søkir eisini tingið um studning til skúlan, og vísa teir serliga á, at henda bygging vil hava stóran týdning til at bøta um arbeiðisloysi.

Nevndin má í hesum máli vísa til, at Vestmanna kommuna er ein av teimum, sum er eina ringast rakt av óhappi av bardagaatvoldum, eingin onnur hevur mist so nógv skip, og tí er tað rímligt, at her er stór trongd til at seta arbeiðir í verk. Nevndin skilur, at hetta og so tey vánaligu viðurskiftir, sum skúlaskapurin hevur havt í Vestmanna, hevur gjørt, at sóknarstýrið hættar sær undir at fara undir hetta verk beint nú, meðan alt er so ovurhonds dýrt, og nevndin heldur hetta vera beint, serliga við tað at tað hevur vist seg gjørligt hjá sóknini at taka eitt so munagott tak, sum teir hava gjørt við at álíkua ein stóran part av byggikostnaðinum uppá 2 ár.

Nevndin mælir til, at veittur verður ein studningur uppá 20 pct. av einum byggikostnaði av 250.000 kr. = 50.000 kr. fyri fimleikarhøllina, t. v. s. 40.000 kr. sum undir teim trongu viðurskiftum á staðnum eigu at verða veittar við 20.000 kr. í 1944 og 20.000 kr. í 1945.

8. *Nýggir skúlar í Nes sókn.*

Í fjør var umsókn á tingi um studning til umbygging og økjan av skúlanum á Toftum og til nýggjan skúla á Glyvrum. Kostnaðurin varð tá ætlaður til einar 50.000 kr. á Toftum og nakað væl meiri á Glyvrum. Á báðum plássum eru skúlaviðurskiftini so vánalig, at tørvur er á at byggja. Í ár liggja fyri teknningar gjørdar av Niels P. Hansen byggimeistara á Glyvrum og kostnaðurætlan gjørd av J. Stephansson byggimeistara í Tórshavn. Eftir henni verður kostnaðurin av Tofta skúla 150.000 kr. og av Glyvrar skúla 175.000 kr. Í báðum skúlunum skulu vera fimleikarhøll, baðstova, w. c., sloydstova og á Toftum 3 skúlastovur, á Glyvrum 2 skúlastovur. Hesar skúlaætlanir eru bæði frá skúladigum og heilsuligum sjónarmiðum sera dámligar og prýðligar, og tað má vónast, at tað fer at eydnast kommununi at fáa skúlarnar bygdar, ikki bert verða teir eitt prýði fyri bygdirnar, men eisini eitt fyridømi fyri nútímans skúlar í miðalstórum bygdum. Men orsakað av dýrtíðini er kostnaðurin stórur, so hetta verður eitt tungt tak fyri kommununa, sum hevur tveir aðrar gamlar skúlar, sum óivað mugu verða umbygdir í nærari framtíð, umfram at kommunan ætlar sær undir stóra havnabygging. Nevndin mælir til at veita sama studning sum til hinar skúlarnar, altso 20 pct., á tann hátt at til Glyvrar skúla verður at draga frá kostnaðarætlanini 50.000 kr. fyri fimleikarhøllina, meðan einki verður at draga kostnaðarætlanini fyri Tofta skúla, við tað at her verður tann gamli skúlin tikin uppí og umbygdur til fimleikarhøll. Studningurin verður altso til Glyvrar skúla 20 pct. av 125.000 kr. ella 25.000 kr., at veita í 3 ár við 8.400 kr. í 1944 og 8.300 kr. í 1945 og 1946, og til Tofta skúla 20 pct. av 150.000 kr. ella 30.000 kr. at veita við 10.000 kr. árliga tey somu 3 árini.

9. Nýggjur skúli í Sørvági.

Tann 13. september í ár hevur Sørvágs sóknarstýri skrivað tinginum, at teir við seinnastu álíkning hava líknað 30.000 kr. til nýggjan skúla. Teir ætla at líkna eins nógv í ár og vilja nú fáa tilvegar tekning og kostnaðarætlan og senda tí umsókn til tingið um studning.

Málið er ov lítið upplýst, so tingið kann ikki taka støðu til tess, í ár, men nevndin heldur, tað eigur at verða tikið uppaftur næsta ár, um tá eru komnar tekningar og kostnaðarætlan.

Nevndin setir fram hetta

uppskot:

Løgtingið veitir í studning til *skúla á Trøllanesi* 20 pct. av tí, skúlin vernnliga hevur kostað, tá ið roknskapur fyri byggingina er góðtikin av skúlastjórnini, tó ikki upp um 3.000 kr.

Til *Klakksvíkar kommunu* verður veittur ein studningur til seinastu tilbygging til skúlan uppá 20 pct. av tí vernnliga kostnaðinum, tá ið skúlastjórnin hevur góðtikið roknskapin fyri byggingina, tó ikki upp um 8.700 kr. at gjalda við helvtini í 1944 og helvtini í 1945.

Til *skúla millum Lopra og Akrar, til skúla í Funningsfirði og til umbyggjan av skúlanum í Funningi* verður veittur í studning ein fimtingur av kostnaðarætlanini, tá ið hon eins og tekningarnar til skúlarnar eru góðtiknar av skúlastjórnini.

Til *nýggjan skúla í Vági* verða veittar í studningi 74.000 kr., at gjalda við 20.000 kr. í 1944, og síðan 18.000 kr. árliga í 3 ár.

Til *nýggjan skúla í Vestmanna* verða veittar í studningi 40.000 kr., at gjalda við 20.000 kr. í 1944 og 20.000 kr. í 1945.

Til *nýggjar skúlar á Toftum og á Glyvrum* verða veittar í studningi, til Tofta skúla 30.000 kr., at gjalda við 10.000 kr. árliga 1944—46, og til Glyvra skúla 25.000 kr., at gjalda við 8.400 kr. í 1944 og 8.300 kr. árliga í 1945 og 1946.

Til hesar 9 skúlar tilsamans ein studningur uppá 198.900 kr., at gjalda í 1944 uppí 83.950 kr., í 1945 60.650 kr., í 1946 36.300 kr., í 1947 18.000 kr.

Stjórnin fyri fimleikagrunnin verður mint á, á hvørjum ári at nýta eitt hóskandi part av peninginum til studning til fimleikarhøllir.

2. viðg. 20. nov. 3. viðg. 23. nov. Samtykt 25—0.

3. Summarfrítíð í skúlunum.

1. viðg. 11. sept. Frl. 29. nov.

Álit.

(J. Poulsen og Danbjørg óheftir).

Føroya Læararafelag hevur í 1938 søkt tingið um at fáa summarfrítíðina í fólkaskúlanum broytta, soleiðis at hon verður í øllum skúlum frá 15. juli til 15. september, tilsamans 2 mánaðir, meðan hon nú er frá 28. juni til 15. september, og umfram er í teim flestu skúlum frí 4 ella færri dagar um vikuna frá 15. juni til 28. juli.

Tingið hevur seg ikki tá kunna broyta frítíðina, tí henda skipan hevði tá ikki verið í gildi meiri enn 7 ár. Læararafelagið bað eisini um, at tað tímatalið, sum ein lærari er skyldugur at kenna í skúlanum, má verða sett til 36, meðan hann nú er skyldugur at kenna umfram 36 tímar í vanligum lærugreinum eisini í fimleika, svimjing og handaverki, tó ikki út um 42 tímar. Henda umsókn varð heldur ikki játtað.

Í 1941 hevur Læararafelagið aftur søkt tingið um at broyta summarfrítíðina sum áður nevnt, umfram at eingin lærari skal verða kravdur at kenna í skúlanum meira enn 36 tímar um vikuna og í mánaðunum november til februar, báðum uppfroknaðum, 30 tímar. Skúlastjórnin hevur ikki kunnað viðmælt hesari seinastu broyting og hevur víst á, at fyri at hon kann koma í lag, verður neyðugt at sela fleiri læararar í pláss. Málið varð ikki fyri á tingi í 1941, men kom fyri í 1942, og varð tá samtykt at biðja skúlastjórnina fáa greiðliga upplýst, hvussu summarfrítíðarskipanin er við teir ymsu skúlar í Føroynum nú, við tað at loyvt er, tá ið skúlastjórnin játtar, at halda skúla í einari sókn fleiri dagar enn 2 tær seks vikurnar fyri 28. juli. Eisini varð samtykt at fáa upplýst hvussu nógvar tímar um vikuna læararnir í teim ymsu skúlunum kenna út um teir skyldugu 36 tímar, í teimum uppfroknað fimleiki, svimjing og handaverk.

Hesar upplýsingar eru nú lagdar fyri tingið, og er summarfrítíðini viðvíkjandi soleiðis vorðið, at av 61 skúlum hava teir flestu, nevniliga 42, ta skipan, at umfram summarfrítíðina frá 28. juli til 15. september verður tær 6 vikurnar frá 15. juni til 28. juli skúli bert hildið 2 dagar um vikuna, í 1 skúla 3 dagar um vikuna, í 3 skúlum 4 dagar, í 1 skúla 5 dagar, meðan í 14 skúlum er tann gamla frítíðarskipan við summarfrítíð frá 28. juli til 15. september uppafturtikin. Viðvíkjandi tímatalinum um vikuna verður tað í teim flestu skúlum givið upp at vera 36, meðan 10 skúlar geva upp, at í teimum verður kent út um teir skyldugu 36 tímar, 1 ella 2 tímar um vikuna, í einum einstaknum skúla 4 tímar um vikuna í fimleika, svimjing (bert um summarið) ella handaverki. Umfram í hesum 10 skúlum verður í teim skyldugu 36 tímum kent í fimleika í 17 skúlum, í svimjing í 18, í handaverki í 17 og í sloyd í 3 skúlum. Tilsamans verður kent

í 22	skúlum	í fimleika
í 18	-	í svimjing
í 22	-	í handaverki
í 3	-	í sloyd.

Teir skúlar, ið hava kenslu út um teir skyldugu 36 tímar, eru allir smáir skúlar við einum ella tveimum lærarum. Teir eru:

1) Á Oyrareingi og í Sundinum,
2) í Leynum og á Válinum,
3) á Húsum,
4) í Elduvík og í Funningsfirði,
5) í Søldarfirði,
6) á Eiði,
7) á Slættanesi,
8) í Porkeri,
9) í Hvalba og í Nesinum,
10) í Hovi.

Av lí at í tveimum av hesum skúlum er serlig handaverkslærarinna, verða tað av øllum lærarunum í fólkaskúlanum 6, sum um summarið kenna 1—2—3 tímar um vikuna í fimleika og svimjing út um skúlatíðina, og 4 lærarinnur, sum kenna 1—2 tímar út um skúlatíðina alt árið í handaverki, meðan meginfjøldin av lærarunum ikki kenna út um teir skyldugu 36 tímar.

Í fyrstuni, tá ið kvøldskúlaskipanin varð sett í gildi, varð so væl undirtikið í nógvum bygdum, at lærararnir, eisini í smábygdum, vóru bundnir av kvøldskúla 2—3 tímar hvønn yrkadag. Hetta man ivaleyst ikki vera so longur allastaðni, og nevndin mælir til, at áðrenn tikin verður avgerð um broytan av læraranna skylduga tímatali, verður kannað eftir, hvussu mangar tímar um vikuna teir ymsu lærarar nú eru bundnir av kvøldskúlakenslu, og at skúlastjórnin verður biðin um at seta hesa eftirkannan í verk, so hetta kann vera greitt til næstu tingsetu, um tann millumtinganevndin, sum sett er í ár til at seta upp stevnumið fyri føroyskum skúla, tá er liðug við starv sítt.

Summarfrítíðini viðvíkjandi fyriliggur henda frágreiðing um, hvussu skipað var í Íslandi 1940. Har er virkistíðin hjá lærarum í keypstøðum $9^1/_2$ mánaðir (summarfrítíð frá 15. juni til 31. september). Í leimum flestu føstu skúlunum á øðrum plássum er virkistíðin 8 mánaðir (á flestu plássum 4 mánaðar summarfrítíð frá 1. juni til 30. september); kortini er virkistíðin 9 mánaðir í leim størstu skúlunum (3 mánaða summarfrítíð frá 1. juni til 31. august). Grundløn læraranna er roknað eftir einari virkistíð uppá 6 mánaðir, og lønin bækkar eftir sum virkistíðin leingist.

Nevndin er samd um, at summarfrítíðin eigur at vera eins í skúlum okkara so vítt møguligt og vil mæla til, at hon ið hvussu er ikki verður styttri enn 8 vikur, sum skotið upp av Lærarafelaginum. Tó vil nevndin ikki í ár seta fram uppskot um endaliga at áseta eina nýggja fasta summarfrítíðarskipan, men mælir til at málið verður viðgjørt í frammanundan nevndu millumtinganevnd, og royni verður at útvega upplýsingar, um hvussu nú er skipað hesum viðvíkjandi í Íslandi, og hvussu læraraløninar har eru.

Uppskot:

Millumtinganevndin, sum sett er til at seta upp stevnumið fyri skúlakensluni, verður biðin um at viðgera

1) málið um summarfríttíðina,
2) málið um tað skylduga kenslufímatalið.

Skúlastjórnin verður biðin um at kanna eftir, hvussu mangar tímar um vikuna kvøldskúli verður hildin í teim ymsu bygdum og í hvørjum lærugreinum, eins og kanna eftir summarfríttíðar- og lærarálønarviðurskiftum í Íslandi.

2. viðg. 30. nov. Fall 12—0. (Ju atkvøddu: Johan Poulsen, Robert Joensen, Rasmus Rasmussen, Richard Long, Andreas Djurhuus, Kr. Djurhuus, Trygve Samuelsen, O. F. Joensen, A. Samuelsen, J. Chr. Olsen, Hans Iversen, Pauli Dahl. Hinir burturstaddur.)

---

4. Hækkan av læraralønum.

Álit.

1. viðg. 9. sept. Frl. 3. dec.

Føroya Lærarafelag søkir aftur í ár um hækkan av læraralønunum. Felagið skrivar, at teir í fjør sendu tinginum eitt uppskot til nýggja løningarlóg fyri lærarar, sum miðaði fmóti, at føroyskir lærarar áttu at verða løntir eftir sama máti sum lærarar í okkara grannalondum, eins og aðrir tænastumenn og summir lærarar verða løntir. Løgtingið kundi tá ikki ganga við til eina slíka lønskipan.

Teir skriva:

»Vit loyva okkum kortini aftur í ár at koma fram fyri tað heiðraða løgting við hesum sama lønkravi og vóna, at hetta nýggja tingið man hava ta áskoðan, at føroyskir lærarar eru eins nógv verdir og aðrir tænastumenn og at teir soleiðis eiga at hava somu lønreglur sum hinir.«

Tingið samtykti í fjør eina bráðfangis skipan til vegna dýrtíðina at bøta um lønkorini, serliga hjá teimum ringast stoddu tænastumonnunum, men Løgtingsnevndin var ikki samd um at fremja tað uppskotið, sum Lærarafelagið hevði sett fram. Tingmenn vóru samdir um, at tað var ikki gjørligt at bøta um lønviðurskiftini bert fyri lærarar, men at ein lønarbót mátti eisini vera fyri aðrar tænastumenn, ellisrentunjólarar og aðrar.

Tann dýrtíðarviðbótin, sum varð hækkað til 1. april 1942, var roknað út frá prístalinum 187 og skuldi vera í gildi til 1. april 1943. 1. oktober 1942 hækkaði prístalið til 213, og varð tí samtykt, at dýrtíðarviðbótin fyri allar tænastumenn skuldi verða hækkað frá 1. oktober 1942, samsvarandi prístalshækkanini, soleiðis at tænastumenninir, sum í dýrtíðarviðbót høvdu bafl $18^1/_2$ »parlar«, skuldi fáa 5 »parlar« aftrat ella tilsamans $23^1/_2$ »parlar«.

Eftir teim tá galdandi reglum fingu ógiftir tænastumenn undir 40 ár $^1/_3$ av teirri løn, sum giftir tænastumenn fingu, og ógiftir yvir

40 ár $^2/_3$. Í fjor samtykti tingið, at eisini teir ógiftu tænastumenn undir 40 ár skuldu fáa $^2/_3$ av tí, giftir tænastumenn fáa. Harnæst varð samtykt at veita giftum tænastumonnum í eykadýrtíðarviðbót fyri árið 1943 100 kr. fyri hvørt barnið. Á henda hátt varð veitt ein dýrtíðarviðbót til teir lægst løntu og til teirra, ið hava børn undir 15 ár.

1. april 1943 hækkaði prístalið til 269, og hækkaði av tí dýrtíðarviðbótin til $34^1/_2$ partar.

Útreiðslurnar til læraralønir í fólkaskúlanum eru 1943/44 hesar:

Grundløn	206.100 kr.
Aldursviðbót	127.000 —
Vanlig áljavningarviðbót	75.000 —
Dýrtíðarviðbót (amtsgrunn.)	278.000 —
	686.100 kr.
÷ 3 pct. eftirlønarfrádrátt	10.500 —
	675.600 kr.

Av hesum letur ríkiskassin 301.700 kr. og amtsgrunnurin 381.050 kr. Tórshavnar kommuna letur 3.350 kr.

Umframt eru útreiðslur til ferðalærarar o. a. 50.000 kr. Av teimum letur løgtingið 40.000 kr. og ríkiskassin 10.000 kr.

Útreiðslur løgtingsins til dýrtíðarviðbót til lærarar, ellisrentunjótarar og onnur eru nú meiri en $^1/_2$ millión kr. um árið.

Her verður sett eitt yvirlit yvir læraraløninar í fólkaskúlanum, soleiðis sum tær eru nú við allari viðbót og utan eftirlønarfrádrátt:

Grundløn og aldursviðbót	Løn nú ógiftir	Tal	Løn nú giftir	Tal
1400 kr.	3280,67 kr.	6	4221,00 kr.	—
1700 -	3788,12 -	2	4832,00 -	5
2000 -	4312,16 -	2	5468,00 -	1
2300 -	4612,16 -	1	5768,00 -	6
2600 -	4912,16 -	6	6068,00 -	5
2900 -	5212,16 -	9	6368,00 -	7
1600 -	3688,12 -	3	4732,00 -	2
1900 -	4212,16 -	3	5368,00 -	—
2200 -	4512,16 -	-	5668,00 -	1
2500 -	4812,16 -	2	5968,00 -	1
2800 -	5112,16 -	1	6268,00 -	5
3100 -	5436,16 -	3	6604,00 -	27

Ein ársløn sum tann fyri ein ógiftan lærara á lægsta lønarstigi, 3280,67 kr. kundi verið hildin at verið nógv ov lág, sum aðrar lønir eru nú, men til hennara má leggjast húsaleiguviðurgjaldið, sum var 150 kr. fyri lærarar á øðrum lønarstigi og 300 kr. á fyrsta, men sum í ár verður hækkað til 300 kr. fyri ógiftar lærarar og 450 kr. fyri giftar, og umframt er eftirlønarvirðið, sum verður roknað til 12 %; av teimum letur lærarin sjálvur 3 %, lønarvirðið skal tí hækkast við 9 %, og tað rætta virðið av løninni uppá 3280 kr. er altso nú 3866 kr.

Hvussu lærararnir eru løntir í okkara grannalondum nú, er ikki gott at fáa upplýst uttan úr Íslandi, og har eru teir løntir eftir heilt øðrum sjónarmiðum enn her; hvussu lærararnir nú eru løntir í Danmark, sum Lærarafelagið helst man hava hugsað um, kann ikki upplýsast beint nú. Nevndin kann ikki mæla til at farn at hækka grundløninar hjá lærarum ella øðrum fæmastumonnum nú, tí tað er ómøguligt at vita, hvussu lønir yvirhøvur koma at liggja aftaná kríggið. Eitt annað er, at ójavni er, og ein almenn rannsókn eigur at verða gjørd viðvíkjandi øllum hesum viðurskiftum. Í ár mælir nevndin til at samtykkja, at dýrtíðarviðbótin, sum samtykt var pr. 1. apríl í ár skal vera tann sama til 1. aprí 1944, og at eins og í fjør verður veitt ein dýrtíðarviðbót uppá 100 kr. fyri hvørt barnið undir 15 ár. Umfram er húsaleiguviðurgjaldið hækkað til 300 kr. til ógiftar lærarar og 450 kr. til giftar.

Uppskot

til

Midlertidige Bestemmelser for Færøerne

om Børnetillæg til Tjenestemænd m. fl.

§ 1.

For Tiden 1. Oktober 1943 til 30. September 1944 tillægges der de Tjenestemænd m. fl., som pr. 1. Januar 1944 har Ret til fuldt Reguleringstillæg (Lov Nr. 98 af 31. Marts 1931 § 91, Stk. 1), et ekstraordinært Dyrtidstillæg paa 100 Kr. for hvert Barn, som de den 1. Januar 1944 har Forsørgelsespligt overfor, og som ikke er fyldt 15 Aar den 1. Januar 1944.

Tillægget udbetales samlet pr. 1. Februar 1944 efter paagældendes Begæring paa Blanketter, der foreskrives af Amtet.

§ 2.

Nærværende Bestemmelse træder i Kraft straks.

2. viðg. 4. dec. 3. viðg. 7. dec. Samtykt 18—0.

---

5. Hækkan av húsaleiguviðurgjaldi lærara.

Álit.

1. viðg. 9. sept. Frl. 5. nov.

Í brævi dagssett 20. aug. 1943 førir Føroya Lærarafelag fram, at ein partur av læraraløninni er frí hús ella viðurgjald fyri húsaleigu, og at hetta er selt til 150—250 kr. um árið. Hetta, sigur felagið, hevur

altíð verið lítið, og nú ber rættuliga av. Felagið søkir tí um at fáa hetta broytt, so at húsaleiguviðurgjaldið verður sett so høgt, sum leigan verunligu er.

Líkuumdi umsókn hevur verið til viðgerðar á tingi 1941, sí løgtingstíðindi 1941, bls. 21. Tá varð upplýst, at bert $^1/_4$ av øllum lærarum búðu í leigaðum húsum, og at kommununurnar í flestu førum rinda húsaviðurgjald, sum at kalla svarar til la verunligu húsaleiguna, so tað bert var í summum størri bygdum, at nakar munur var á viðurgjaldinum og leiguni. Nógvar kommunur rinda hægri húsaleiguviðurgjald enn ásett, í Lambabø t. d. 480,— kr. árliga í 3 ár frá 1. aprfl 1942 at rokna, og í Fróðbiar sóknar kommunu 480 kr. fyri giftar lærarar og 350,— kr. fyri ógiftar.

Skúlastjórnin eigur heimild, um tað er neyðugt, at ásetta húsaviðurgjaldið hægri enn tær ásettu 150 kr. fyri ógiftar lærarar og 250 kr. fyri giftar, tá ið klagað verður til hennara, og Føroya Læararafelag varð gjørt kunnugt við hetta og biðið um at heita beinleiðis á skúlastjórnina fyri teir limir, sum vendu sær til felagið hesum viðvíkjandi.

Skúlastjórnin upplýsir, at tveir lærarar hava vent sær til hennara síðan 1941 um at fáa hækkað húsleiguviðurgjaldið, og báðir hava fingið hækkað tað til la verunligu leiguna.

Nevndin er samd um at útlata, at har, sum frí hús er ein partur av læraralønini, eigur húsaleiguviðurgjaldið at vera so stórt, at læararnir ongar útreiðslur fáa av at leiga sær hús, men av tí at leiguviðurskiftini eru so ymisk, heldur nevndin tað ikki vera beint at seta viðurgjaldið til ein ávísan pening, eisini má ein eftiransan vera við tí, at ikki verða leigað órímiliga dýr hús.

Nevndin hevur samrátt við skúlastjórnina, sum sigur frá, at hennara tilsagn í skrívi, dagsett 17. sept. 1942, er at skilja á tann hátt, at lærarar, sum ikki fáa frí hús, kunnu rokna við húsaleiguviðurgjaldi eins stórum og tað verunliga leigugjaldið fyri eitt eftir viðurskiftunum á staðnum hóskandi hús, og at lærarar, ið búgva í egnum húsi, kunna rokna við húsaleiguviðurgjaldi út frá sama sjónarmiði.

Nevndin setir fram hetta

Uppskot:

Føroya læararafelag verður gjørt kunnugt við la avgerð skúlastjórnin hevur tikið í hesum máli, og um tað vísir seg, at húsaleiguviðurgjaldið hjá onkrum lærara ikki er nóg mikið til at útvega honum frí hús, at teir so gjøgnum felagið venda sær til skúlastjórnina hesum viðvíkjandi.

Skúlastjórnin verður biðin um at fáa í lag, at húsaleiguviðurgjaldið, sum er ein eftirløbargevandi partur av læraralønini, hereftirdags verður roknað fyri 450 kr. fyri giftar lærarar og 300 kr. fyri ógiftar.

2. viðg. 8. nov. Samtykt 15—0.

6. Ítróttalærarin og embætið í Mykinesi.

Álit.

1. viðg. 9. sept. Frl. 30. nov.

Sóknarstýrið í Mykinesi hevur í bræv dgs. 20. aug. 1943 skrivað tinginum, at skúlanevnd og sóknarstýri har vesturí á einum ljóði hava samtykt at biðja Løgtingið fáa í lag eina aðra skipan enn nú viðvíkjandi læraraplássi teirra. Ítróttarumsjónarmaðurin, Poul E. Petersen, sum eisini er lærari í Mykinesi, hevur nú í tvey ár við loyvi frá Løgtingi og skúlastjóru vegna umsjónarstarv verið burturstaddur úr oynni og búsettur í Vestmanna, og ymiskir vikarar hava verið í læraraplássinum í Mykinesi.

Teir biðja um, annaðhvørt at ítróttarumsjónarmaðurin verður loystur frá sínum lærarastarvi har og nýggjur lærari settur, ella at hann kemur aftur í plássið.

Ítróttarumsjónarmálið hevur verið fyri á Løgtingi síðan 1936 og verður her sett eitt yvirlit yvir broytingar ár undan ári:

Løgtingstíðindi 1936, síða 24:

Skúlastjórnin mælir til at seta ein mann at hava umsjón við og geva leiðbeining viðvíkjandi ítróttarkensluni í føroyskum bygdaskúlum. Samstundis skal hann eftirhyggja skúlastovur. Lønin skuldi vera 2.400 kr. árliga umframt aldurstillegg 300 kr. hvørt 3. ár inntil 3.900 kr. og 5 kr. í dagpengar fyri hvønn ferðadag inntil 1.000 kr. árliga og og ferðaútreiðslur upp til 500 kr. Amtsgrunnurin og ríkiskassin skuldu rinda helftina av grundlønini, 1.200 kr. hvør, og helftina av útreiðslunum til dagpengar og ferðaútreiðslur (inntil 750 kr. hvør). Aldursviðbót og dýrtíðarviðbót skuldi ríkiskassin rinda. Skúlastjórnin heldur fram, at sjálvt um settur verður skúlastarvsráðgevari (Amtsskolekonsulent) í Føroyum, eigur eisini at verða settur ítróttarumsjónarmaður.

Fyri ikki at gera nakað endaliga av, mælti nevndin til eina bráðfeingis skipan, hareftir ein fólkaskúlalærari varð settur sum ítróttarumsjónarmaður. Sum viðbót til lønina mælir nevndin til at játta:

Fast honorar.....	600 kr.
Dagpeningur og ferðaútreiðslur upp í.....	700 kr.
Løn til vikar 1. aprfl til 30. juli	500 kr.
	1.800 kr.

Av hesum skuldi amtsgrunnurin rinda helft og ríkiskassin helft.

Løgtingstíðindi 1937, síðu 26:

Komið var bræv frá ríkistýrinum, at játtaðar vóru 900 kr., og samtykt lingið at biðja skúlastjórnina seta ein fólkaskúlalærara sum ítróttarleiðbeinara.

Løgtingstíðindi 1938, síðu 21:

Ítróttarumsjónarmaður Poul E. Petersen hevur sent bræv um lønviðurskifti sínt. Málið varð goymt til næsta ár.

Løgtingstíðindi 1939, síðu 22.

Nevndin úttalar, at tað var ikki gott, at ítróttarumsjónarmaðurin eisini hevði annað fast læraraembætti, serstakliga á einum plássi, sum Mykinesi, tí hann kundi bert av og á og bert um summarið vitja skúlarnar. Nevndin heldur, at tað var beinast, at hefði var eitt serstakt embætti, men heldur, at plássið sum ítróttarumsjónarmaður við fólkaskúlarnar kann ikki taka alla tíð hjá einum manni, og at hesin maður so kundi eisini verið eftirlitsmaður við ítróttarkensluna í læraraskúlanum.

Skúlastjórnin var biðin at gera uppskot til næsta ár.

Løgtingstíðindi 1940, síðu 21:

Her verður sagt, at tey viðurskifti, sum komu 9. apríl 1940, fordu við sær, at neyvan var gjørligt at fáa størri ríkisstuðning enn 900 kr. Nevndin hevur, at ikki var gjørligt at fáa í lag nýggja lønskipan, og at málið í mátti sleðga, inntil kriggið var liðugt.

Løgtingstíðindi 1941, síðu 24:

Eftir uppskoti frá skúlastjórnini varð samtykt, at ítróttarumsjónarmaður Poul E. Petersen, sum er lærari í Mykinesi, í 2 ár verður frítikin fyri sítt læraravirki har, soleiðis at settur verður ein vikarur í læraraplássið í Mykinesi við vanligari vikargrundløn 1.600 kr. Løntu hjá ítróttariuspektørinum verður:

Vanlig læraraløn umfram húsaleiguviðurgjald 250 kr. um árið umfram virkisgjald (honorar) 600 kr. og 6 kr.dagpening hvønn ferðadag og ferðaútreiðslur upp til 1.400 kr. árliga, til onnur endilig skipan kann fáast í lag, skal amtsgrunnurin rinda meirútreiðslurnar, sum verða:

Vikarløn 1.600 kr. frádrignar táverandi vikarstuðning 500 kr.	1.100 kr.
Hækkan av dagpeningi og ferðaútreiðslum	700 kr.
Húsaleiguviðurgjald	250 kr.
	2.050 kr.

Henda skipan er galdandi frá 1. oktober 1941 til 1. oktober 1943.

Løgtingstíðindi 1942, síðu 32:

Samtykt varð, at húsaleiguviðurgjaldið verður hækkað við dýrtíðarviðbót frá 1. apríl 1942 við 250 kr. 2. mars 1943 hevur landsnevndin

samlykt, at dagpeningurin hjá fróttarumsjónarmanninum verður hækkaður til 10 kr. um dagin, fyribils fyri 1943, og at tær 1.400 kr., sum vóru hægstamark fyri dagpening og ferðaútreiðslur, verða hækkaðar til 2.400 kr.

Skúlastjórnin hevur aftur í ár viðgjørt málið og samlykt at mæla finginum til, frá 1. januar 1944 at loysa Poul E. Petersen, fróttarumsjónarmanni, endiliga frá læraraplássinum í Mykinesi og sela hann bráðfengis í 2 ár sum fróttarumsjónarmann í Føroyum við árligari virkisløn 5.400 kr. umframt viðbót sum til statsins virkisløni, sum í løtuni er 50 %. Útyvir hetta verður at veita honum skrivstovuhaldsgjald 500 kr. árliga, og til ferðaútreiðslur 2.400 kr. árliga. Útreiðslurnar verða at býta á henda hátt: Staturin hefil av grundvirkisløninni eftir 2.700 kr., Løgtingið rest. Skúlastjórnin vil, samtíðis sum fróttarumsjónarmaðurin er settur í embæti, áleggja honum í framtíðini at leggja meiri arbeiði í umsjónina við skúlarnar uttan kortini at vanrøkja umsjónina við ta fríu fróttina. Umframt skal fróttarumsjónarmaðurin hava skyldu á hvørjum ári at hava fróttarskeið fyri lærarar upp í fýra vikur.

Nevndin hevur fingið lagdar fyri sær ársfrágreiðingar fróttarumsjónarmannsins fyri árini 1941 og 1942. Nevndin heldur, at við tað at fróttarumsjónarmaðurin upprunnliga er settur sum umsjónarmaður við fimleika og fróttarkenslu í skúlunum, hevur tann parturin av starvi hansara hesi tvey árini verið lítil, men samtíðis má nevndin viðganga, at hann lítur viðvíkjandi, at vekja ansin út um landið fyri fróttlivi og fremja kappingarhug og fróttarsamvirki bygdanna millum serliga gjøgnum uppbyggjan av »Fróttasamband Føroya«, hevur greitt úr hondum eitt gott og týdningarmikið verk.

Av tí at hetta grundleggjandi starv til at fremja vaksna manna fróttlivi nú man vera komið nakað væl á leið, má umsjónarmaðurin hereftir kunna veita skúlunum ein størri part av arbeiði sínum. Nevndin má hulda, at fróttarfeløgini tá ið tey stimbrast og samarbeiða leirra millum økist, verða før fyri tann stóra parlin sjálv at gjalda útreiðslurnar til sítt samskipanarliga starv, so tann almenni stuðningur, sum eigur at verða veittur fimleika og fróttlivi í so stóran mun sum møguligt, kann verða nýttur til at búgva landið út við fróttarvøllum, svimjihyljum og fimleikarhøllum, so fólkið kann menniast bæði kroppsliga av fróttlívi og andaliga av at sela sær sum endamál gjøgnum stevnufast arbeiði, at vilja standa mát við aðrar tjóðir.

Um fróttarumsjónarmaðurin skal kunna røkja umsjónina við skúlafróttlivi og samstundis vera fróttarfeløgunum til hjálpar til at fáa samskipan leirra í fasta legu, kann hann ikki eisini vera lærari í Mykinesi, og nevndin mælir tí til, at hann verður loystur úr sínum plássi og Mykines fær sín egna lærara.

Ítróttarumsjónarmaðurin hevur í ár fingið hesa løn:

Grundløn sum lærari	1600 kr.
Aldursviðbót	1500 —
Bráðfangis viðbót	168 —
Útjavningar viðbót	3336 —
Læraraløn tils.	6604 kr.
÷ Eftirlønarfrádrátt	100 —
	6504 kr.
Húsaleiguviðurgjald	500 —
Virkisløn sum umsjónarmaður	600 —
Virkisløn fyri námskeið	400 —
Skrivstovuhald	100 —
	8104 kr.

Umfram hevur hann fyri framleigu av lærarahúsunum í Mykinesi havt eina inntøku uppá 330 kr. Í ferðapeningi og dagpeningi hevur hann fingið 2400 kr.

Nevndin mælir til at taka eftir uppskotinum frá skúlastjórnini, loysa Poul E. Petersen frá læraraplássinum í Mykinesi og seta hann bráðfangis í 2 ár sum virkisløntan ítróttarumsjónarmann. Tað er nevndini kunnugt, at tó at námskeið í ítróttarkensla hava farið fram á hvørjum ári frá 1936 til 1943, hava ikki meiri enn 8 lærarar hesi árini tikið prógv sum ítróttarlærarar, nevniliga 3 í 1936, 1 í 1938, 2 í 1939, 1 í 1940 og 1 í 1943, og má nevndin biðja skúlastjórnina leggja ítróttarumsjónarmanninum eina við at leggja stóran dent á at búgva lærarnar til ítróttarkensla bæði á námskeiði og við at leggja teimum lag á, tá ið hann vitjar skúlarnar.

Uppskot:

Poul E. Petersen umsjónarmaður verður loystur frá sínum lærarastarvi í Mykinesi, og nýggjur lærari settur har, løntur eftir lægra lønarstigi. Poul E. Petersen verður bráðfangis í 2 ár settur sum ítróttarumsjónarmaður í Føroynum við einari virkisløn 5400 kr. árliga umfram viðbót sum til statsins virkisløntir, í løtuni 50 pct. Umfram verður at veita honum skrivstovuhaldsgjald 300 kr. árliga og til ferðaútreiðslur 2400 kr. árliga. Staturin vil gjalda helvtina av grundlønini ella 2700 kr., Løgtingið skal gjalda restina. Skúlastjórnin verður biðin áleggja umsjónarmanninum í framtíðini at leggja meiri arbeiði í umsjónina við skúlarnar, uttan tó at vanrøkja umsjónina við ta frítu ítróttina. Umsjónarmaðurin hevur skyldu, á hvørjum ári, tá ið skúlastjórnin krevur tað, at halda námskeið fyri lærarar í ítrótt uttan framíhjá virkisløn.

2. viðg. 1. dec. 3. viðg. 3. dec. Samtykt 17—0.

7. Realskúlin (skúlagjaldið).

Álit:

1. viðg. 13. sept. Frl. 10. nov.

Nevndin fyri Færøernes Mellem- og Realskole hevur 13. mars 1943 sent løgtinginum umsókn um, í ár at veita skúlagrunninum ein studning uppá 3000 kr. í hvørjum ársfjórðingi og um at gjalda undirbalansan fyri 1942, tá ið roknskapurin fyri árið var avgreiddur. Í umsóknini verður víst til, at orsakað av tí stóru hækkan av læraralønum, hækkan av reinhaldskostnaðinum, teim høgu kolaprísum og stórum útreiðslum til endurnýggjan (t. d. av skúlans septikbrunnum), má verða roknað við einum undirbalansa fyri 1943 uppá um 11000 kr. Seinni hevur løgtingsskrivstovan fingið avskrift av roknskapinum fyri 1942, sum vísir eina undirbalansa uppá 3657,42 kr.

Landsnevndin hevur 23. mars í ár samtykt at gjalda úr amtsgrunninum henda undirbalansa og umframt gjalda skúlagrunninum a conto fyri árið 1943 3.000 kr.

Síðan hevur málið verið lagt fyri yvirlærara Lützen og fyri skúlastjórnina. Løgtingsskrivstovan hevur skotið upp at hækka skúlagjaldið, sum nú er 150 kr. árliga fyri børn úr Tórshavn og 100 kr. árliga fyri børn av bygd umframt 5 kr. árliga í hitagjaldi og 5 kr. árliga í reinheildsgjaldi. Skrivstovan skjýtur upp at hækka skúlagjaldið við eini helvt, og við tað at gjaldið í 1942 var tilsamans rúmar 13000 kr., kann verða roknað við á henda hátt at vinna eina meiriinnløku uppá o. u. 6000 kr. Skrivstovan vísir á, at í Tórshavn eins og aðrar staðir er í løtuni fólk yvirhøvur peningaliga væl statt, og foreldur, ið ikki hava góð ráð, kunna fáa lut í teim føstu studningum, sum skúlin ræður yvir, umframt at løgtingið letur studning til næmingar av bygd, eins og Tórshavnar kommuna letur studning til børn haðani.

Yvirlærarin hevur (5. sept. 1943) sent inn bræv frá nevnd skúlans, sum mótmælir at hækka skúlagjaldið og aftur biður um studning uppá 3000 kr. í hvørjum ársfjórðingi í ár. Skúlastjórnin vil heldur ikki mæla til at hækka skúlagjaldið.

Nevndin hevur kannað næmingatal og studningsviðurskiftir skúlans og hevur fingið upplýst, at skúlin í ár hevur 137 næmingar, av teimum 23 av bygd. Av fríplássum eru frá Løgtinginum 20 til uttanbýggja næmingar, 12 frá skúlanum til innan- og uttanbýggja næmingar, og Tórshavnar kommuna hevur veitt 2480 kr. til heil og hálv frípláss til næmingar úr Havn.

Nevndin kann ikki mæla til at hækka skúlagjaldið, tí sjálvt um ein hækkan við eini helvt kanska ikki hevði verið forðandi fyri summi foreldur, sum viðurskiftini eru nú í lotuni, eru óivað onnur, sum tað er ov høgt fyri, men sum royna at útvega hetta høga gjaldið, meðan børn teirra eru í teim lægru flokkunum, har vanliga eingi frípláss verða givin, uttan til næmingar av bygd, í vón um, at tey skulu fáa frípláss í teim seinnu flokkunum.

Nevndin hevur hildið, at við tað at skúlin mest verður soktur av Havnarbørnum, og Havnar kommuna umframt hevur stóran vinning av at tingið heldur henda skúla í Havnini, var tað rímligt, at kommuna tók ein parf av undirbalansanum uppá seg, og hevur skrivað

Havnar býráði um hetta. Havnar býráð hevur svarað aftur, at tað heldur ikki, at tað er rætt undir teim núverandi viðurskiftum at hækka teir studningar, sum kommunan letur til tann hægra skúlaskapin í Havn. Hesir studningar eru, sigur býráðið, næmingastudningur 3600 kr., beinleiðis studningur til studenta- og preliminerskeiðið 1000 kr. og beinleiðis studningur til realskúla 150 kr. tilsamans 4750 kr. Av teim 3600 kr. eru eftir sum framman undan er upplýst 2480 kr. studningur til realskúlan, og kommunan fær o. u. 800 kr. í skatti av skúlanum, so tann verunligu studul, ið kommunan veitir skúlanum, er 1630 kr.

Umframt vísir býráðið til, at Havnarborgarar lata ein meginpart av skattinum til Løgtingið, soleiðis í 1940 129.719 kr., í 1941 573.786 kr., í 1942 1.056.717 kr. og í 1943 1.186.713 kr.

Undir hesum viðurskiftum mælir nevndin tinginum til at gjalda tann verunliga undirbalansa, sum verður í ár, á tann hátt, at goldið verður skútagrunninum straks 6000 kr., meðan tann undirbalansi, sum síðan kann koma at vera í hesum ári, verður goldin, tá ið roknskapurin fyri árið er avgreiddur. Viðurskiftini í hægra skúlaskapinum viðvíkjandi hava broytt seg nógv leys seinnu árini, umfram studentaskeiðið eru komnir aftrat realskúlar á Tvøroyri, í Klakksvík og í Vági, og umsóknir hava verið á tingi og ætlanir hava verið gjørdar ymsastaðni um at sela millumskúlar ella realskúlar á stovn, sum tingið kann væntla studningur verður søktur til í nærari framtíð. Nevndin skjýtur í upp, at sett verður ein millumtinganevnd til í samvirki við skúlastjórnini at kanna skúlaviðurskiftini og gera uppskot til stevnumið bæði fólkaskúlanum og hægra skúlaskapinum viðvíkjandi. Henda nevnd førir samráðingar við skúlafyristøðumenn, skúlanumsjónarmenn og formannin fyri Føroya Læararfelag.

Uppskot:

1. Úr amtsgrunninum verða at veita skúlagrunninum (Færøernes Mellem- og Realskole) 6000 kr. til at gjalda undirbalansa fyri árið 1943. Um undirbalansin verður størri, verður nóg mikil eykapeningur at veita úr amtsgrunninum, tá ið roknskapurin fyri árið 1943 er avgreiddur.

2. Sett verður ein millumtinganevnd til í samvirki við skúlastjórnini at kanna skúlaviðurskiftini og gera uppskot til stevnumið bæði fólkaskúlanum og hægra skúlaskapinum viðvíkjandi. Til hesa nevnd velur tingið 4 limir og skúlastjórnin 3.

2. viðg. 16. nov. 3. viðg. 19. nov. Pkt. 1 samtykt 22—0. Pkt. 2 18—0.

8. Uttanlandaferðir lærara.

Alit:

1. viðg. 13. sept. Frl. 8. nov.

Lærarafelagið vendir sær til tingið í brævi 20. august 1943 og greiðir frá, at í friðartíðum kunnu lærarar fara á statsins lærarahásku í Danmørk; men tað hevði eisini havt stóran týðning, um lærarar kundu farið til onnur lond at fingið sær kunnleika.

Felagið biður løgtingið seta ein peningagrunn á stovn, harav studningur kann verða veittur til tílíkar uttanlandaferðir.

Nevndin skal úttala, at í hesum tíðum má tað haldast at vera ógjørligt ella ógvuliga trupult hjá lærarum at fara til onnur lond at læra. Annað er, at tá friðartíðir koma aftur, vil tað vera beint, at Føroyingar fara út at læra í øðrum londum, og at hetta verður gjørt meira enn higartil hevur verið vanligt, tí tað vil vera av týðningi ikki bert fyri lærarar og studentar, men eisini fyri handverkarar, jarðabrúkarar, sjómenn, handilsmenn og aðrar.

Tað er mangt, sum hevur ligið á lánt nú undir ófriðartíðini, og nevndin heldur tað vera beint at unthugsa, hvussu best kann bøtast um tann steðg, sum hesar óvanligu tíðir hava gjørt í upplæran av øllum stættum her á landi. Nevndin meinar tó ikki, at tað er gjørligt í dag at seta einstakar grunnar á stovn, soleiðis at hvør grunnurin hevur sítt endamát, tí hetta kann einans gerast, tá ið ein kann døma um, hvussu nógvir vilja ynskja studning í teimum ymisku størvum, og tað kann eingin vita í dag, tað ber framtíðin í sær.

Tingið er tó undir ófriðartíðini vorðið væl stimbrað, og fíggjarnevndin hevur tí mælt tinginum til at seta á stovn ein grunn undir navninum »løgtingsins tiltaksgrunnur«. Soleiðis sum ásett í nevndarálíti um hetta grunn er eitt av teimum málum, hann skal styðja eisini — fyri ein fíggjundapart av tí peningi, sum er lagdur í grunnin — at geva studning til ferðir, sum kunna gerast, tá bardagin er at enda, men sum nú mugu steðga. Hesin grunnur er so væl stimbraður longu nú, at nevndin kann vísa lærarafelagnum til at søkja úr hesum grunni, tá tíðin kemur, har ferðir kunna verða gjørdar.

Nevndin setir tí uppskot um, at lærarafelagið fær eitt eintak av hesum álíti, við ávísan til tað, sum her er flutt fram.

Uppskot:

Eitt eintak av álitinum, vísandi til tað, ið her er flutt fram, verður sent Føroya lærarafelag.

2. viðg. 15. nov. og 17. nov. Nevndaruppskotið samtykt 18—0.

9. Fimleikarhøll í Tórshavn.

Álit:

Frl. 24. sept.

Fíggjarnevndin hevur fingið umsókn frá Ítróttasamband Føroya, Í. S. F., dagsett 14. september 1913, um studning til eina fimleikarhøll við Føroya fólkaháskúla. Málið er ikki komið inn í rættan tíð, men nevndin hevur samtykt at biðja tingið taka tað til viðgerðar í hesi setu.

Umsóknin sigur frá, at ætlanin er at byggja eina fimleikarhøll við Føroya fólkaháskúla, at ein almenn peningainnsavnan hevur givið til úrslit gott 10.000 krónur, men at teking og kostnaðarætlan vísir, at ein tílík høll kemur at kosta einar 86.000 krónur, og tí biðja teir um studning til hetta endamál.

Fíggjarnevndin hevur viðgjørt málið og er á einum máli um, at tey viðurskifti, sum fimleikur hevur í Tórshavn, ikki eru góð, og at tað er beint, at tað almenna tekur lut í arbeiðinum fyri at skapa betri líkindir fyri fimleiki og ítrótti í sínu heild í høvuðsstaðnum. Nevndin kann tó ikki verða samd við umsøkjararnar um, at tað kann verða beint við almennum studningi at avgera spurningin fyri ein einstakan av teimum skúlum, sum nú eru í Tórshavn.

Vit hava í Tórshavn hesar skúlar:

1) Realskúlan,
2) Læraraskúlan,
3) Kommunuskúlan,
4) Føroya fólkaháskúla,
5) Studentaskúlan fyri utlan
6) Lærdaskúlalesnaðin og
7) privatar skúlar og skúlaskeið.

Haraftrat kemur, at Havnar fimleikarfelag higartil hevur haft til húsa í tí einasta fimleikarhøli, sum er bygd til realskúlan. Tá tað almenna skal verða við í arbeiðinum fyri at hjálpa fimleikinum til betri kor, so er tað neyðugt, at flestir av hesum skúlum og skeiðum virka saman, soleiðis at tað kann verða bygd ein rúmlig og prýðilig høll, sum kann hýsa øllum hesum skúlum, og haraftrat kann geva møguleika fyri, at framsýning kann fara fram, við góðum plássi til áskoðarar fyri at nøra um ansin fyri fimleiki. Tað eigur í sama viðfangi at verða umhugsað at fáa ein góðan innanhýsis svimjingarhyl, og pláss til allan lunn ítrótt, sum kann fara fram vetratíð, fólkinum til bata.

Fíggjarnevndin heitir tí á Ítróttasambandið, Tórshavnar býráð, og stýrið fyri øllum teimum nevndu skúlum og skúlaskeiðum, sum vilja taka lut í hesum arbeiði, um at seta eina nevnd til at fáa til vegar teknings og kostnaðarætlan til eina tílíkan byggning, og til at samráðast um, hvar besta plássið er til at seta hetta á stovn. Eisini verða teir bidnir at umhugsa, hvussu peningurin kann skaffast til vegar, og skal fíggjarnevndin siga frá, at allir tingflokkar vilja umhugsa við stórari vælvild, hvussu nógv tingið kann taka lut í kostnaðinum til eitt tílíkt tiltak. Nevndin verður biðin um at geva frágreiðing til tingið til komandi tingsetu.

Uppskot:

1. Avskrift av álitinum verður send umsøkjarunum.

2. Løgtingsskrivstovuni verður álagt at setu seg í samband við teir í álitinum nevndu stovnar fyri at fyrireika, at ein nevnd verður sett skjótast gjørligt til at viðgera spurningin um eina fimleikarhøll við svimjihyli o. ø. fyri allan skálaskapin her í Tórshavn.

2. viðg. 9. okt. Samtykt 18—0.

---

10. Studentaherbergið í Reykjavík.

Uppskot:

Frl. 6. okt. (Kr. Djurhuus og J. Poulsen óheftir).

Fyri mongum árum síðani varð úr Føroyum veittur peningur (5.000 ísl. kr.) fyri at vissu føroyskum studentum eitt rúm á studentagarðinum í Reykjavík. Hitt føroyska studentafelagið savnaði peningin sunnan. Løgtingið veitti 800 kr. (Sjúgg løgtingstíðindi 1928 s. 31.)

Nú kunna vit fáa eitt rúm aftrat móti at rinda 10.000 kr. Tað er av stórum týdningi, serstakliga sum viðurskiftini ern í hesu tíð, at fáa eitt tílíkt holi aftrat.

Tí verður sett fram hetta

Uppskot:

Úr amtsgrunninum verða veittar 10.000 ísl. kr. til herbergið í studentagarðinum í Reykjavík.

2. viðg. 6. okt. 3. viðg. 9. okt. Samtykt 18—0.

---

11. Námskeið fyri lærarar.

Álit:

Frl. 21. oktober.

Føroya lærarafelag søkir um at fáa í lag eitt námskeið fyri lærarar, sum hava tikið prógv í læraraskúlanum her, áðrenn lærutíðin varð sett til 4 ár, so at teir í ymsum lærugreinum, skotið verður uppá enskt mál, fornnorrønt mál, matematikk og fysikk, kunnu koma at standa javnbjóðis teim nýggju lærarunum. Sum nú er, eru lærarir í okkara fólkaskúla við 4 ymiskum prógvum:

1. Prógv frá donskum læraraskúla við 4 ára skúlatíð,
2. prógv frá donskum læraraskúla við 5 ára skúlatíð,
3. prógv frá Føroya læraraskúla við 3 ára skúlatíð og
4. prógv frá Føroya læraraskúla við 4 ára skúlatíð.

Lærararnir við prógvi 3 kenna á sær, at teir í tí kunnleika, teir hava fingið í læraraskúlanum, standa ikki mát við hinar, og so við og við sum fleiri lærarir koma við longri lærutíð, verða hesir verri og verri staddir í kappingini, tá ið teir søkja pláss.

Lærarafelagið skýtur upp, at eitt ársskeið verður sett á stovn, annaðhvørt í samband við læraraskúlan ella studentaskúlan, og at luftakararnir fáa munagóðan studning til innivist og kost. Felagið metir kostnaðin til læraralønir og keslubøll til o. u. 5.000 kr. fyri eitt ár og vísir á, at næmingarnir á statsins læraraháskúla í Keypmannahavn fyri kriggið fingu vanliga 60 kr. um mánaðin í studningi umframt ferðaútreiðslur goldnar, men at hetta er ov lítið nú.

Við málinum fylgir eitt bræv frá læraraskúlastjóra Chr. Lützen og studentaskúlastjóra Th. Nygaard, har teir siga, at málið hevur verið teim fyrilagt, og teir halda, at kostnaðin av keslurúmi og lærarum til skeiðið fer at kunna vera o. u. 5.000 kr. í eitt ár men, at einki rúm, sum nú er, er løkt í realskúlanum her.

Nevndin mælir til at fyrireika, at tílíkt námskeið kann verða sett á stovn, men á tann hátt, at ein partur av lærunni fer fram skrivliga, soleiðis, at næmingarnir fáa uppgávur settar fyri, sum teir arbeiða heima og síðan senda lærarum til rættingar, og lærararnir senda teimum tær aftur við vegleiðandi viðmerkingum. Áðrenn næmingarnir kunnu fara undir hetta skrivliga arbeiði, mugu teir hava fingið nakran kunnleika til lærugreinirnar, og hetta gerst best við einum fyrireikandi námskeiði, t. d. uppá 4 vikur. Tá ið tað skrivliga arbeiðið hevur farið fram í nóg langa tíð, kann verða hildið aftur eitt námskeið uppá 2—3 mánaðir, og endað verður við prógvi í einum ella fleiri av teim nevndu lærugreinunum.

Áðrenn farið verður undir at seta hetta skeið á stovn, eigur at verða kannað eftir, hvussu mangir luftakarar kunnu ætlast at koma at vera.

Nevndin setir fram hetta

Uppskot:

1. Føroya Læararfelag verður biðið at kanna eftir, hvussu mangir lærarar við 3 ára læratíð kunnu ætlast at vilja luttaka í einum skeiði sum frummannadan frásagt. Um talið verður ov stórt, verða meningarnir at býla í hóskandi flokkar, soleiðis at teir elstu fáa rætt til fyrsta skeið, um fleiri verða.
2. Landsnevndini verður givið upp í hendur at taka avgerð viðvíkjandi fyrireikandi náuskeiði summarið 1944, tá læararfelagið hevur fingið til vega tær nevndu upplýsingar, og at samtykkja reglur fyri skeiðið eftir ummæli frá skúlastjórunni, læraraskúlastjóra Chr. Lützen og studentaskúlastjóra Th. Nygaard.
3. Málið verður í sínu heild at leggja fyri tingið í vanligu tingsetuni 1944.

2. viðg. 25. okt. 3. viðg. 28. okt. Samtykt 19—0.

---

12. Skúlaskipan í smábygdum.

Álit:

3. des. Frl. 28. okt. 1. viðg. 29. okt. Loyvi givið 16—0.

Í sumum smábygdum er tað soleiðis, at bygdin hevur ikki egnan lærarara, men lærarin í eini størri grannabygd kemur eina stutta tíð av hvørjum mánaði hagar at halda skúla, ella tað kann vera soleiðis, at bygdin hevur ein ferðalærara í felag við onkra fjartliggjandi bygd. Skúlastjórnin hevur eisini fingið umsókn um at seta skúla á stovu á plássum, har ikki eru meiri enn 2—4 skúlaskyldug børn. Stjórnin heldur, at miðað má verða móti at fáa hvønndagsskúla fyri so nógvum børnum sum møguligt, og tá ið heilt smá pláss eru ikki langa leið frá einum størri, har hvønndagsskúlagangur er, um so ikki børnini í tí minni bygdini kundu gingið til skúlan í tí størri bygdini, ið hvussu er um summarið. Eisini kundi tað hugsast at verið ein betri skipan enn nú, um børn frá heilt smáum avleiðis liggjandi plássum kundu fingið skúlagang í einari størri bygd við hvønndagsskúlagangi á tann hátt, at foreldrini fingu studning til teirra vistarhald har. Skúlastjórnin hevur lagt hetta mál fyri tingið, og víst til, at peningur til slíkan studning kanska kundi fingist í nakran mun, um eitthvørt av teimum ferðalærarapláss um, har barnatalið er serliga lítið, verður avtikið.

Málið er komið so seint inn á ting, at nevndin hevur ikki kunnað fingið til vegar tær neyðturvuligu upplýsingar til, til fullnar at greiða tað. Innan endalig avgerð verður tikin mugu verða útvegaðar upplýsingar um, hvussu nógv pláss eru, har talið á skúlaskyldugum

børnum er undir t. d. 10, hvussu nógv eru nú á hvørjum av hesum plássum og hvussu kann ætlast at verða tey fyrstu árini, um tað kann ætlast at verða vaksandi ella minnkandi.

Nevndin setir tí fram hetta

Uppskot:

Skúlastjórnin verður biðin at útvega upplýsingar um, hvussu er við talinum á skúlaskyldugum børnum á heilt smáum plássum í ár, og um talið er vaksandi ella minnkandi, og leggja hesar upplýsingar fyri tu nevnd, sum í ár er sett til at leggja stevnumið fyri framtíðar skúlaskap.

Broytingaruppskot

frá nevndini:

Sum annað punkt verður sett:

»Um skúlastjórnin mælir til longu í 1944 at seta nýggjan ferðalærara ella veita studning til børn í onkrari smábygd til skúlagang í einari fjarstaddari bygd, fær landsnevndin heimild til at veita neyðturviligan pening.«

2. viðg. 4. des. 3. viðg. 7. des. Samtykt 19—0 uppskotið og broytingaruppskotið.

---

13. Fimleikarhøll á Tvøroyri og skúlahús í Skopun.

Frl. 29. nov.

Álit:

Nýggjur skúli og lærarahús í Skopun.

Skopunar kommustýri sendi fyri nøkrum árum síðan umsókn til tingið um studning til nýggjan skúla, men varð tá svarað, at tingið kundi ikki veita studning til slíkt mál. Nú vendir kommunustýrið sær aftur til tingið og sigur frá, at teir eru farnir undir at byggja nýggjan skúla og lærarahús, og at byggingin er um at vera liðug. Teir hava

fyri tað arbeiðið, ið liðugt er, útgoldið 20.000 kr. og ætla, at tað, ið eftir er, fer at kosta o. u. 5.000 kr. Teir søkja nú um studning í sama mun sum aðrar kommunur hava fingið.

Nevndin mælir til, at veittur verður sami studningur sum aðrar kommunur hava fingið veittar í ár undir somu viðurskiftum, 20 pct. av teim verunligu útreiðslum, tá ið arbeiðið er sýnað og góðtikið, upp í 5000 kr.

Fimleikarhøll og svimjihylur til skúlan á Tvøroyri.

Tvøroyrar søknarstýri hevur fyri fleiri árum síðan biðið Løgtingið um viðmæli til statsstudning til fimleikarhøll við skúlan har, benda umsókn er send ríkisstýrinum, men einki svar er komið aftur vegna kríggsumstøðurnar. Nú hevur søknarstýrið av nýggjum heilt á tingið, hesa ferð um beinleiðis studning frá tinginum. Við umsóknini fylgir tekning eftir S. J. Hofgaard byggimeistara á Tvøroyri umfram frágreiðing og kostnaðarætlan. Ætlanin er norðan fyri leikvøll skúlans at byggja fimleikarhøll og innbygdan svimjihyl (15,5 m × 15,5 m × 2,95 m), umfram fæst í tí parti, sum verður bygdur fastur í skúlan, sum hann nú stendur, lærarastova og sloydstova. Av tí at ikki er avgjørt, av hvørjum tilfari bygt skal verða, er kostnaðarætlanin ógviliga leys, hon skjýtur uppá ein kostnað av 69502 kr. fyri svimjihylin og 116584 kr. fyri fimleikarhøllina, tilsamans 186085 kr. Hetta er ógviliga stórur peningur, og sjálvt um trongdin til fimleikahøll til Tvøroyrar skúla er ógviliga stór, má nevndin halda, at tær útreiðslur, sum kommunan kemur undir til hesa annars frálíka góðu og sera prýðiligu høll, verða væl so tungar, um byggingin skal fara fram nú í hesi ógvuliga dýru tíð. Nevndin kann sum nevnt í øðrum tílíkum málum ikki mæla til at veita studning til fimleikarhøll og svimjihyl beinleiðis frá Løgtinginum, men gevur umsóknini gott viðmæli til fimleikargrunnin.

Uppskot:

1. Til Skopmar kommunu verður veittur ein studningur til nýggjan skúla og lærarahús, sum Landsnevndin ávísir, tá ið arbeiðið er liðugt, sýnað og góðtikið av skúlastjórnini, 20 pct. av teim verunligu útreiðslunum, tó ikki upp um 5000 kr.

2. Umsókn frá Froðbiar søknarstýri um studning til fimleikarhøll og svimjihyl til skúlan á Tvøroyri verður víst til fimleikargrunnin.

2. viðg. 30. nov. 3. viðg. 2. des. Samtykt 18—0.

14. Stavingarhátturin.

Alit:

Frl. 6. desember.

Tað er vorðið tingmonnum kunnugt, at ein lesibók er farin til prentingar frá skúlabókanevndini, og tvey ørk eru prentaði, har tað er gjørt ein broyting í stavingarháttinum, soleiðis at »ei« verður broytt til »o« framan fyri -ng og -nk, og at »tygum« verður broytt til »tyðum«. Tað er eisini kunnugt, *at* ikki allir limir av skúlabókanevndini vita um hetta tiltak, og *at* góðkennan av bókini av skúlastjórnini, shr. reglugerð fyri skúlabókagrunnin gr. 5 er framkomin eftir kladduni við tí gamla skrivingarhátti — uttan broyting.

Undirritaðu tingmenn heita tí á skúlastjórnina at ansa eftir, at eingin broyting verður gjørd í stavibáttinum á føroyskum máli, uttan so at málið er gjølla umhugsað, og spurninguin um at endurprenta stavingarbøkur og aðrar skúlabøkur samsvarandi. Vit halda, tað er neyðugt, at tey tvey ørkini verða prentaði umaftur við vanligum stavingarhátti.

Uppskot:

Tingið heitir á skúlastjórnina um at taka til viðgerðar at sleðga prentingini av eini lesibók við broyttum stavingarhátti og at ansa eftir, at eingin broyting kemur, uttan at málið er gjølla kannað.

2. viðg. 6. des. Samtykt 16—0.

III. KIRKJUMAL.

1. Figgjarætlan fyri kirkjugrunnin.

1. viðg. 17. sept. Sí skjal nr. 2. (Uppskot frá løgtingsskrivstovuni).

Álit (frl. 12. nov.):

Løgtingsskrivstovan hevur lagt fyri tingið uppskot til figgjarsamtykt fyri kirkjugrunn løgtingsins fyri ár 1944.

Nevndin skal mæla til at góðkenna uppskotið við hesum broytingum:

1. Samsvarandi figgjarnevndarsamtykt fær grunnurin sum eykastudning úr amtsgrunninum kr. 5.000.
2. Útreiðslurnar verða samsvarandi uppskoti í málinum um prestatluttning hækkaðar frá kr. 2.400 til 3.700 kr.

At viðmerkja er, at grunnurin, um veraldarbardagin ikki endar, áðrenn 1944 er úti, skal útlána til trúboðarar um 10.000 kr. fyri árið 1944 av peningi, grunnurin eigur.

Uppskot

til figgjarsamtykt fyri kirkjugrunn løgtingsins fyri árið 1944:

Inntøkur:

1. Endurgjald fyri liggjunda	kr.	7.800,00
2. Av innflutningsgjaldi	»	20.000,00
3. Eykastudningur úr amtsgrunninum	»	5.000,00
4. Stórhvalagjald	»	0,00
	kr.	32.800,00

Útreiðslur:

A. Vanligar nauvølingar	kr.	10.000,00
B. Kirkjugarðar	»	5.000,00
C. Prestafluttningar	»	3.700,00
D. Ymist	»	1.000,00
E. Forskotsrindan til Trúboðarar (Lán til Indremission i Danmark)	»	10.800,00
F. Munur	»	2.300,00
	kr.	32.800,00

2. viðg. 16. nov. 3. viðg. 19. nov.

Broytingaruppskot

frá Robert Joensen o. fl.

Undir: *Inntøkur,* pkt. 3 *eykastuðningur úr amtsgrunninum* verður í staðin fyri kr. 5.000,00 sett kr. 15.000,00. Samstundis broytist balansan til kr. 42.800,00 og munur undir útreiðslur til 12.300,00 kr.

Broytingaruppskotið samtykt 18—0 og nevndaruppskotið so broytt 19—0.

---

2. Prestafluttningur.

Álit:

11. sept. beint í kirkjunevndina, sum frl. 11. nov.

Í fjør samtykti tingið, at til ferðaútreiðslur prestanna í 1942/43 skuldu játtast 4500 kr. (tær vanligu 1200 kr. frá statinum, 2400 kr. úr kirkjugrunninum + 900 kr. úr amtsgrunninum, og skuldu tær býtast millum preslagjøldini, soleiðis sum tingtíðindi 1942, bls. 57 vísir.

Tann 8. mars 1943 sigur landsnevndin frá, at hon hevur viðtikið, at sami peningur verður at gjalda fyri ferðaútreiðslur prestanna í 1943/44, tó soleiðis, at málið skal leggjast fyri tingið.

Av tí at N. J. Rasmussen, prestur, hevur mótmælt býtingini av prestafluttningsútreiðslunum verður málið aftur viðgjørt í landsnevndini, og samtykt varð fyri restina av 1943/44 at gjalda preslafluttning samsvarandi tí, ið goldið var fyri 1941/42. Hetta var gjørt frá 1. juli 1943.

Í skrivi 6. september 1943 mælir amtið til, at tað fyri fíggjarárið 1942/43 verður játtað 170 kr. aftrat úr amtsgrunninum til N. J.

Rasmussen. Hetta er lánn peningur, hann hevur fingið ov lítið til at gjalda sín flutning við.

Nevndin hevur kannað hetta mál eftir teimum skjølum, ið hoyra til málið, harímillum eitt yvirlit yvir lær verunligu ferðaútreiðslur hjá prestunum, og skal við tí sum grundarlag mæla tinginum til at samtykkja eftirkomandi uppskot til býtan av peningi til prestaflutning fyri 1943/44.

Nevndin heldur tó ikki, at tað er grund til at gjalda N. J. Rasmussen eftirgjald fyri 1942/43 av tí, at tað eisini ern aðrir prestar, ið ikki hava fingið fult gjald fyri sínar útreiðslur árini frammanundan.

Uppskot:

Aftral tí vanliga peningi til ferðaútreiðslur prestanna 1200 kr. frá statinum veitir kirkjugrunnurin tær vanligu 2400 kr. + 1300 kr. sum eykapening vegna dýrtíðina, tilsamans 4900 kr., sum verða at býta soleiðis:

Norðoya eystara prestagjald	.....	340 kr.
— vestara —	.....	575 -
Fuglafjarðar —	.....	950 -
Nes —	.....	700 -
Suðurstreymoyar —	.....	550 -
Vágar —	.....	575 -
Sandoyar —	.....	510 -
Suðuroyar norðara —	.....	300 -
— syðra —	.....	400 -
		4900 kr.

2. viðg. 16. nov. og 3. viðg. 19. nov. Samtykt 18—0.

---

3. Nýtsla av kirkjum.

Álit:

(Frl. 2. okt.)

Málið um broytan av reglum um nýtslu av kirkjum var til viðgerðar á tingi seinasta ár. Tá varð samtykt at goyma málið til í ár.

Kirkjunevndin hevur havt samráð við formannin fyri samfundsráðnum, E. Thulesen, presti, ið hevur lagt málið inn á ting.

Hann biður um, at einki verður gjørt við málið fyri fyrst.

Uppskot:

1. Málið verður steðgað fyri fyrst.
2. Eitt eintak av álitinum verður sent umsøkjaranum.

2. viðg. 11. okt. Samtykt 16—0.

---

4. Forskotsrindan til trúboðarar.

Álit:

Frl. 21. okt.

E. Thulesen, prestur, hevur vegna »Samfundsraadet« sett fram áheilan og spyr, um tað er gjørligt, at trúboðararnir hjá »Indre Missions« kunnu fáa goldið úr kirkjugrunninum alla sína løn ca. 10.000 kr. árliga. Hann skrivar, at tá tingið í 1940 samtykti at leggja ál $^2/_3$ av lønini og ikki alla lønina, má tað haldast, at tað var ikki, tí tingið var óvillugt ella bar ótta fyri ikki at fáa peningin aftur, men tí tingið ikki tá hevði so nógvan pening at ráða yvir. Men hetta má nú haldast at vera broytt.

Tað, ið privat verður innsavnað til trúboðararnar, skuldi so verðið sum dýrtíðarviðbót.

Løgtingið samtykki í eykatingsetuni, sum byrjaði í apríl 1940, at goldið verður til trúboðararnar Alfred Petersen, E. Eliasen og J. Simonsen 200 kr. um mánaðan til hvønn frá 1. apríl til 31. december 1940. Hesar 200 kr. svaraðu nakað til $^2/_3$ av lønini (sí løgtingstíðindi eykatingsetan apríl 1940, síðu 31). Sagt verður í álitinum:

». . . Udvalget mener, at Lagtinget bør yde sin Bistand i denne Sag. Da Lagtinget imidlertid i saa overordentlig Grad har Brug for alle de Midler, som staar til Tingets Disposition, til Støtte for saadanne Formaal, som Tinget til enhver Tid er forpligtet til at tage sig af, vil det ikke være muligt for nærværende Tid fuldtud at imødekomme Andragendet. Udvalget stiller nedenfor Forslag om, at der udbetales Missionærerne ca. $^2/_3$ af deres maanedlige Lønning eller 200 Kr. maanedlig til hver enkelt af disse . . .

Udvalget ønsker at udtale, at man finder det rimeligt, at Borgere, som har særligt Kendskab til og særlig Sympati for »Indre Missions« Arbejde heroppe, henvender sig til Laglinget som sket i den

forhaandenværende vanskelige Situation. Man mener imidlerlid, at Kirkefolket med »Indre Missions Samfundsraad« i Spidsen ad privat Vej bør søge opnaael, at der fremtidig haves i alt Fald nogen Midler til at hæde paa Missionærernes vanskelige økonomiske Stilling, saa længe disse er uden Forbindelse med Missionens Hovedbestyrelse.« ...

Í vanligu tingsetuni 1940 (sí løgtingstíðindi 1940, síðu 182) varð samtykt, at henda útgjaldan av 200 kr. um mánaðan til hvønn av trúboðarunum skuldi standa við, soleingi krúggið er. Peningurin verður goldin úr kirkjugrunninum og bókaður sum lán til »Indre Mission« í Danmark. Kirkjugrunnurin hevur á henda hátt inntil 1. januar 1943 goldið kr. 20.844,10.

Ein meirilutí í nevndini (P. M. Dam, Kr. Djurhuus, R. Long og Johan Poulsen) heldur tað vera beint at játta hesa umsókn. Tað er í brævinum frá Thulesen presti biðið um, at samtyktin fær aftur-virkandi megi longst gjørligt. Meirilutin heldur ikki, hetta kann gerast longur enn til 1. aprí 1943, og setur fram uppskot samsvarandi. Av tí, at umsókninn einans sigur, at lønin er um 10.000 kr., heldur meirilutin tað er beinast, at tann veruliga lønin verður kannað av landsnevndini, áðrenn peningurin verður ávístur.

Ein minnilutí (Thorstein Petersen) vísir til tað, sum varð framhildið í 1940, at kirkjufólkið við heimamissiónini á odda eigir at taka lut í arbeiðinum fyri at fáa hesa løn til vegar. Tað kann verða beint, at tingsins fíggjarligu viðurskifti eru betri í ár enn í 1940, men tingið hevur nógv at nýta pening til, og kirkjugrunnurin hevur stórar útreiðslur í besi tíð, har allar umvolingar eru sera dýrar. Eisini kann tað sigast við fullt so góðum rætti, at fólkið innanfyri heimamissiónina hevur betri ráð í dag enn í 1940 til at lata peningur til hesar lønir. Tað má her verða havt í huga, at tað, ið her er talan um, er ikki beinleiðis studningur, men lán, sum heimamissiónin í Danmark skal gjalda aftur, og tað skuldi tí verðið lættari at fáa til vegar.

Minnilutin skal baraflurat úttala, at tað eftir hansara hugsan einans við at styrkja samfelagsskipan innanfyri tílíkt arbeiði, ið her er talan um, at limirnir eru við til at bera byrðirnar, sum hesar ringu tíðir hava skapt, og tað er tó bert 3000 kr. árliga til trúggjar trúboðarar. Minnilutin kann tí ikki vera við til at broyta samtyktina av 1940.

Nevndarlimirnir Kjølbro og Paturssøn ynskja ikki at taka serliga støðu í málinum.

Uppskot:

1. Frá meirilutanum (P. M. Dam, Kr. Djurhuus, R. Long, J. Poulsen):

> Trúboðararnir Alfred Petersen, C. Eliasen og Johan Simonsen fáa frá 1. apríl 1943 fulla løn goldnað eftir leim í tingsetuni 1940 áseltu reglum. Peningurin verður lafin sum lán til »Indre Mission« í Danmark úr kirkjugrunninum.
> Landsnevndin fær upp í hendur at ávísa peningin, tá tað er prógvað, hvussu stór lønin er.

2. Frá minnilutanum (Thorstein Petersen):

Eintak av álitinum verður sent umsøkjarunum.

2. viðg. 25. okt. 3. viðg. 28. okt. og 4. nov. Uppskot meirilutans samtykt 13—0 (ja atkvóðu: Johan Poulsen, P. M. Dam, Andreas Djurhuus, Kr. Djurhuus, Trygve Samuelsen, O. F. Joensen, A. Samuelsen, J. Chr. Olsen, Hans Iversen, J. P. Henriksen, J. H. Dambjørg, Jacob Fr. Øregaard, J. P. Davidsen, burturstaddir vóru J. Patursson og R. Long, hinir atkvóðu ikki).

---

5. Prestagarðurin í Sandagerði.

Álit (19. okt.):

Frl. 11. Sept. 1. viðg. 16. Sept.

Í skrivi 7. september 1943 vendir J. Dahl, próstur, sær til meinigheitsráðið í Havn við ábeitan um at, skipað verður soleiðis fyri, at hann og konan kunna fáa loyvi at búgva í prestagarðinum í Sandagerði, soleingi tey liva. Prósturin skjýtur upp, at tey møguligt kundu flugið húsini og havan til keyps við teim heytum, at tey av teinum sum friðaði hús verða hildin í sama standi, sum tey eru, og ikki falla av.

Meinigheitsráðið hevur í bræví 7. juni 1943 sent málið til løgtingið. Ráðið heldur tað verða beinast, at Forngripafelagið fær Sandagerði í varðveitslu, tó soleiðis at prósturin og kona hansara hava rætt at búgva har so leingi tey liva.

Í áðurnevnda skrivi frá próstinum er víst á tað søguliga virði, ið prestahúsini í Sandagerði hava. Nevndin sannar henda týðning og mælir til, at málið um at varðveita tey sum ein forngrip, verður tikið upp aftur seinri.

Nevndin hevur umhugsað málið og gevur sítt besta viðmæli til, at prósturin og kona hansara fáa loyvi til at búgva í prestahúsinum í Sandagerði, so leingi tey liva.

Uppskot:

Tingið gevur sítt viðmæli til, at J. Dahl, próstur, og kona hansara fáa loyvi at búgva í prestahúsinum í Sandagerði so leingi tey liva.

2. viðg. 22. okt. Samtykt 17—0.

---

6. Kirkjugarður í Fuglafirði.

Álit:

Í brævi dagsett 4. september í ár, hevur søknarstýrið í Fuglafirði vent sær til tingið við umsókn um studning til umvølan av kirkjugarðinum í Fuglafirði. Greitt verður frá í umsóknini, at summari endin av kirkjugarðinum fór av veðri seinasta heyst, og varð uppaflurgjørdur; samstundis varð valt um kirkjugarðin. Hetta kostaði talt 2.400 kr. Eisini verður hildið fram í umsóknini, at ein á hevur matað undan vestaru síðu á garðinum, og at tað er vandi fyri, at garðurin kann detta niður. At umvæla hetta verður mett til 2000 kr.

Kirkjunevndin hevur umhugsað málið og heldur, at her er talan um arbeiði, sum søknarstýrið eigur at gera, tí søknarstýrið hevur skyldu at halda kirkjugarðin viðlíka.

Uppskot:

1. Tingið kann ikki veita umsøkta studning.
2. Eintak av álitinum verður sent søknarstýrinum í Fuglafirði.

16. okt. samtykt 13—0.

---

7. Kirkjugarður á Hellunum.

16. oktober samtykt 17—0: At veita 1224 kr. 48 øyr.

---

8. Kirkjugarður í Skálavík.

26. okt. samtykt 15—0:

Tá kirkjugarðurin í Skálavík er líðugur, sýnaður og góðkendur, veitir tingið Skálavíkar kommunu vanligan studning úr kirkjugrunninum.

---

9. Kirkjugarður í Húsavík.

Álit:

Sóknarstýrið fyri Húsavíkar kommunu hevur í brævi, dagsett hin 6. september í ár, sent umsókn til tingið um studning til økjan av tí gamla kirkjugarðinum.

Málið er einki fyrireikað og kann tí ikki viðgerast til fullnar av tinginum í ár. Løglingsskrivstovan verður umbiðin at fáa til vegar frá sóknarstýrinum í Húsavík hesar upplýsingar:

1. Um stykkið, ið nýlast skal til grefstur, er tøkt,
2. váttan frá embætislækna um, at stykkið er hóskandi til grefstur,
3. fáa til vegar uppskot og kostnaðarætlan yvir ta tilætlaðu víðkanina,
4. frágreiðing, um garðurin skal gerast av gróti ella stoypast.

Uppskot:

1. Tá tær í álitinum nevndu upplýsingar eru fingnar til vegar, verður landsnevndin heimiluð at veita vanligan studning til kirkjugarð í Húsavík.
2. Eitt einlak av álitinum verður sent Húsavíkar sóknarstýri.

16. okt. samtykt 17—0.

---

10. Kirkjugarður í Vági.

9. nov. samtykt 22—0.

Tá kirkjugarðurin í Vági er sýndur og góðkendur, veitir tingið Vágs kommunu studning úr kirkjugrunninum $^{3}/_{10}$ av 70 m á 32 kr. pr. m = 672 kr.

IV. TELEFONMÁL

1. Frágreiðing frá telefonnevndini.

1. viðg. 15. sept. Sí skjal nr. 5.

Álit (15. nov.):

Við kannan av útskrift úr gerðabók telefonnevndarinnar sæst, at millumtinganevndin hevur haft 4 fundir.

Av málum, sum hava verið til viðgerðar, kann nevnast:

Kæra frá Aksel Sivertsen, Gjógv, um at telefonstøðin við Gjógv ikki skal hava borið boð eftir Aksel Sivertsens páp, sum tann dagin var á útróðri. Nevndin helt, at boð eiga at verða send, sjálvt um støðin er vitandi um, at maðurin er burturstaddur. Boðini skuldu vera at biðja Aksel Sivertsens páp ella hann sjálvan koma við skipi at sigla. Av tí, at boðini ikki vórðu borin fram, kom hvørgin teirra við skipinum. So slatt krevur harra Sivertsen endurgjald. Nevndin hevur ikki hildið seg kunna tikið avgerð um endurgjald, helst tí at nevndin var vitandi um, at harra Sivertsen hevði stevnt telefonverkinum eftir viðurgjaldi.

Samtykt varð av nevndini, at allir telefonreparatørar, sum hava honorar sum ein part av løninni og teir, sum eru fastløntir, eru skyldugir at hava telefon heima, uttan at gjalda telefonfelagagjald.

Í 1942 viðtók millumtinganevndin, góðkent av tinginum sama ár, at seta ein bókahaldara við telefonverkið. Plássið varð lýst. Tann 18. mars 1943 setti nevndin harra Johs. Samuelsen sum bókahaldara við verkið.

Kæra frá støðini á Norðskála móti støðini í Streymnesi, at hon voldar trupulleikar fyri samlalugongunni, og kæra frá støðini á Oyru um, at støðin á Norðskála eisini voldar tílíkar trupulleikar.

Nevndin viðtók, at um støðirnar ikki halda galdandi reglur, verður málið upptikið til viðgerðar um at flyta støðirnar.

Umsókn frá fleiri fólkum um at fáa telefon. Stjórin greiddi frá, at líkindir til at fáa telefon eru ring vegna trot av tilfari.

Nevndin hevur samtykt, at vistarhaldspeningurin verður roknaður út frá 3 kr. pr. nátt, og hækkaður og lækkaður eftir líknandi reglum, sum eru galdandi fyri limir av millumtinganevndum f. v. nú siga 7 kr. pr. nátt fyri fastar reparatørar og fyri leysar reparatørar roknað út frá 2 kr. pr. nátt.

Nevndin hevur samtykt at senda konar menn út at kanna viðurskiftini á støðunum og hjá telefonfelagum og umvøla tey brek, sum eru.

Nevndin hevur kannað frágreiðsluna um raksturin av verkinum og beldur, at tað, sum har er framført um verksins peningaligu viðurskiftir, ikki gevur tingmonnunum nóg greitt yvirlit yvir støðuna.

Staddir á skrivstovu telefonverksins hava limir av telefonnevndini biðið um eitt yvirlit yvir støðuna hjá teimum ymiskn bygdum. Av teim bóknum og rokuskapum, sum vórðu fyrivíst, sást, at rokuskaparførslan var langt í afturhond.

Nevndin má tí halda tað vera heint at áleggja millumtinganevndini at ansa eftir, at rokuskaparførslan ikki er í afturhond, at støðirnar ikki hava óregluligar eftirstøður, og at tað fyri tingið verður lagt eitt greitt yvirlit yvir, hvat tilfar verkið hevur í hondum, og hvat tað er, sum tríst er uppá, hvat arbeiðsløn verður útgoldin til og til hvørji virkir, og síðan eitt fíggjarætlan, sum greitt vísir, hvussu støðan kann væntast at verða at ári.

Uppskot:

1) Tingið góðkennir tær avgerðir, sum líknar eru av millumtinganevndini.

2) Tingið áleggur millumtinganevndini at greiða tey í álitinum nevndu mál til komandi vanligu tingsetu.

3) Tingið kjósar eina 3-mannanevnd til millum tingseturnar í felag við verkstjóranum at taka avgerð í øllum málum telefonverkinum viðvíkjandi.

2. viðg. 19. nov. og 20. nov. 3. viðg. 23. nov. samtykt 24—0.

2. Útvarp.

Frl. 14. sept. 1. viðg. 24. sept.

Álit (26. nov.):

Føroya Javnaðarflokkur hevur í riti 13. sept. 1943 lagt mál á ting um at fáa Føroyum eitt útvarp.

Nevndin er á einum máli um, at tingið eigur at fara undir bæði peningaliga og á annan hátt at reika fyri, so brátt løgir verða fyri at fáa ley neyðturvuligu tól, at sela á stovn eina útvarpsstøð, sum ið hvassu er, kann røkka kring allar Føroyar.

Ein tíllík útvarpsstøð kann hava hin stórsta mentunarliga og samvinnuliga týdning fyri Føroyar. Hon vil vera hin dagligi boðberin frá oyggj til oyggj og skapa fa nýtani nú saknaðu kensla manna millum, at vit eru og eiga at vera sum ein stór familja í sama húsi við skyldu at verja garð saman.

Hitt sundurlyndið, sum nú kemur so nógv fram manna millum, har menn kenna seg skildan burturúr við frámerkinum av teirri og teirri oyggj og tí og tí bygd, og sum hevur verið samvinnuni og samtakshugannum oyggja og bygda millum so nógv at meini, vil so við og við verða brýnt og troðkað burtur av útvarpsstøðarinnar dagligu talu fyri oyggjanna fólkgvarnu, og skapað verður ein tjóðareind.

Føroyingar eru eitt ungt fólk, sum stendur í bardaga fyri sínum eyðkennum og tjóðardýrgripum, og vil tað tí verða hitt besta meðal til sigur í hesum bardaga at geva tjóðarinnar vinnumonnum høvi til gjøgnum eitt tíllíkt útvarp dagliga at bera fram og lýsa tey mál, sum tað ræður um hjá fólkinum at hava skil á og árvakið at standa vakt um og frenja av heitum huga og øllum alvi. Hetta er serliga áleikandi, tí oyggjar okkara liggja spjaddar við ringari og dýrari samferðslu.

Hjá teimum, sum sita á tingi og hava tikið sær ábyrgdina fyri landsins politisku skipan, eins og hjá teimum, sum eru politiskt áhugað og fegin vilja fylgja við og hava høvi til at meta tingnúmnastarvið, vil tað koma væl við at hava høvi til at nýta útvarpið sum boðberara, tá ið týðningarmiklir spurningar eru undir orðaskifti á tingi.

Ikki minsta týðning vil útvarpið hava fyri okkara mál, ið nú stendur í vanda fyri at verða skeplað av lagi av tí sterku útlendsku málsligu ávirkan, ið Føroya fólk stendur fyri. Teir, ið koma at tala í útvarpinum, vilja sjálvandi kenna tað sum skyldu sína at nýta eitt vakurt, fyndugt og mergjað mál.

Viðvíkjandi sjálvum tí dagligu praktiska arbeiðinum á sjógvi og landi vil útvarpið uftral tí at vera upplýsandi viðvíkjandi sjálvum arbeiðinum eisini hava stóran týðning sum veðurboðari her hjá okkum, har veðurlagið er so leypandi.

Nevndin kann mæla til, at tingið longu nú skipar fyri, at peningur verður fingin til vega til eina útvarpsstøð. Skolið verður uppá, at tingið árliga av sínum inntøkum til hetta endamál játtar 30.000 kr. Hesin peningur verður at goyma tøkur, til tess farið verður undir at seta útvarpsstøðina á stovn. Nevndin skjýtur uppá, at telefonnevndin

saman við telefonstjóranum fær í hendi at kanna eftir, hvussu sterk umrødda útvarpsstøð krevur at vera og líkindini fyri nødir áleikandi kríggi at fáa tað til støðina neyðturviliga tilfar, greiðir og tól.

Uppskot:

1. Løgtingið játlar úr løgtingsins tiltaksgrunni 30.000 kr., tá verða at leggja av í »tlio føroyska útvarpsgrunpin«.
2. Grunnsins endamál er at seta á stovn eina útvarpsstøð í Føroyum.

2. viðg. 27. nov. 3. viðg. 2. dec. Samtykt 20—0.

---

3. Tráðleys telefon.

Fl. 14. sept. 1. viðg. 24. sept.

Álit (19. nov.):

Javnaðarflokkurin hevur lagt málið inn á ting í ár.

Málini: Tráðleys telefon til útheimin og radiosamband; Tórshavn—Suðuroy vóru til viðgerðar á tingi í 1937 og 1938 (sí løgtingstíðindi í 1937 s. 41 og 1938 s. 37).

Í 1938 samtykti tingið at geva telefonnevndini upp í hendur at avrika, at eitt radiotelefonsamband Tvøroyri—Havn verður sett á stovn, soleiðis at henda radiotelefoniu verður sett í samband við la vanligu telefonina.

Tann neyðturviligi peningur verður at rinda úr telefonverksins kassa. Í álitinum verður sagt, at telefonverkið eigur 2 sterkar maskinsendarar til tílíkt radiosamband, eftir er at fáa ein móttakara av besta slagi og byggja neyðturviliga stoð í Suðuroy. Tá radiosambandið varð komið í lag, kunnu telefonfelagar í Suðuroy tala við telefonfelagar norðanfjørðs.

Millumtinganevndin hevði málið til viðgerðar 25. februar 1939, og av tí, at tað var nevndini kunnugt, at »Erhvervskommissionen« í apríl—mai ætlaði at seta fram uppskot viðvíkjandi hesum máli, hevur nevndin tað vera heinast at steðga við málinum, tí álit var komið frá »Erhvervskommissionen«.

»Erhvervskommissionen« samtykti álit og uppskot í mai 1939. Harí verður upplýst, at tað vil kosta at seta á stovn tráðleysa telefon millum Føroyar og København 200.000 kr. Ruksturin vil kosta:

Renlur og avdrátt	kr. 18.000,00
rakstrarútreiðslur	» 12.000,00
	kr. 30.000,00

At seta á stovn radiotelefonsamband Tórshavn—Suðuroy varð ætlað at kosta 130.000,00 kr. Raksturin varð ætlaður:

Renta og avdráttur.....	kr. 12.000,00
rekstrarútreiðslur	» 20.000,00
	kr. 32.000,00

»Erhvervskommissionen« setti fram uppskot um, at ríkiskassin ber útreiðslurnar við at seta verkini á stovn. Raksturin skuldi vera hjá telefonverkinum.

Uppskotini frá »Erhvervskommissionen« vórðu løgd fyri tingið í 1939, og samtykti tingið uppskotini (sí løgtingstíðindi 1939 s. 237 og og skj. nr. 13 s. 38) einmælt við 21 atkvøðum.

Veraldarbardagin hevur steðgað málunum.

Nevndin mælir til, at tingið samtykkir, at millumtingatelefonnevndin nú aftur tekur til viðgerðar spurningin um radiotelefonsamband við Suðuroyna. Hetta er av størsta týdningi at fáa í lag sum skjótast.

Uppskot:

Telefonnevndini verður givið upp í hendur so skjótt sum gjørligt at fáa sett á stovn radiotelefonsamband millum Suðuroy og Tórshavn at seta í samband við hina vanligu telefonina.

Útreiðslur við gerð og rakstur ber telefonverkið.

2. viðg. 20. nov. 3. viðg. 23. nov. Samtykt 25—0.

V. SJÚKRAHUS, LÆKNAR o. t.

1. Bróstsjúkrahúsið.

1. viðg. 11. sept. Sí skjal nr. 4 (Frágreiðing).

Álit (4. dec.):

Nevndin hevur til viðgerðar málið: Bróstsjúkrahúsið í Hoydølum.

Málinum er viðlagt:

1) Grannskoðaður roknskapur fyri 1942.
2) Útskrift av gerðabókini hjá millumtinganevndini.
3) Fíggjarætlan fyri 1943.
4) Bræv dagsett 16. febr. 1943 frá sjúkrasystur Henrikke Næsaa um eftirløn.
5) Bræv dagsett 21. sept. 1943 frá Anton Kragesteu um leigu av 15000 m² av jørð frá bróstsjúkrahúsinum.
6) Bræv dagsett 18. nov. í ár frá økonomu Z. Jensen um permissión 1 ár frá 1. januar 1944.

Uppskot verður sett fram um at góðkenna roknskapin fyri 1942 og tær samtyklir, sum millumtinganevndin hevur viðtikið.

Roknskapurin fyri 1942 vísir ball 109.605,80 kr. og í samsvarandi løgtingssamtykt av 30. sep. 1941 verður at rinda av amtsgrunninum. Hallið fyri 1942 er 45075 kr. 70 oyr. størri enn hallið árið frammanundan.

Útreiðslurnar til kostarhald hava verið:

	1941	1942
pr. sjúklingadag.....	319 oyr.	497 oyr
- kostdag.....	250 -	403 -

Fyri 1942 var meðaltalið fyri sjúklingar 51,44.

Millumtinganevndin hevur 22. januar samtykt:

1. At taka við tilboð frá Charles Manritzen, Leith, av eini Sunnerling 20-quart Mixing Machine (mali og eltimaskinu) fyri 102 lstr. plus farmagjald.

2. Dýrtíðarviðbót til yvirlæknan og maskinpassaran verður at gjalda samsvarandi landsnevndarinnar viðløku í hesum máli fyri løgtingsins tænastumenn.
3. Viðtikið, at dýrtíðarviðbót til sjúkrasystrar verður at gjalda samsvarandi ta dýrtíðarviðbót, sum sjúkrasystrar fáa á øðrum føroyskum sjúkrahúsum.
4. Økonoman fær dýrtíðarviðbót samsvarandi dýrtíðarviðbót til avdeilingssjúkrasystrarnar.

19. mars samtykti nevndin:

1. At seta Nikal Thomsen, portør við Dronning Alexandrines Hospital til maskinpassara.
2. At økonoma fær somu løn sum sjúkrasystrar, og at spurningurin um anciennitet verður at samráðast við hana um.
3. Loyvi varð givið Thorstein Petersen, stjóra, her, at leggja veg yvir stykkið hjá sjúkrahúsinum frá Hoyvíksvegnum omanfyri portrið vestureftir, tó so, at fólk hava atgongd at ganga eftir vegnum.

Á fundi 24. september varð samtykt at gera verkstaðin størri og betri enn núverandi og fáa í betri lag húsrúm til maskinpassaran.

Økonoma Z. Jensen søkir sum nevnt um permission. Hon hevur verið á bróstsjúkrahúsinum í 13 ár, og nevndin viðmælir, at hon fær orlov frá 1. januar, um tað er gjørligt til ta tíð at fáa nakran í hennara stað.

Anton Kragesten søkir um at leiga 15.000 kvadratmetrar til høsnagarð o. a. í 15 ár. Nevndin kann ikki viðmæla at leiga so stórt øki, men um 5.000 kvadratmetrar, treytað av at hann hegnar forsvarligt, og at bróstsjúkrahúsið fær fyrsta rætt at keypa egg, ið hann selir. Leigumálið verður fyri 5 ár, og hegnað skal verða innan 1 ár, aftaná at leigusemjan er undirskrivað. Leigan skal vera 25 kr. árliga. Millumlinganevndin verður heimilað at gera leigusemju og áseta jarðaslykkið.

Nýggja hitaverkið á gomlu deild er liðugt og virkar væl. Ymiskar umvølingar, nevndar í álitinum í fjør eru liðnar, og stovurnar á gomlu deild verða nú málaðar.

Nevndin varð gjørd kunnug við, at viðurskiftini á bróstsjúkrahúsinum vóru ikki góð, kostinum og sjúkrarøktini viðvíkjandi. Nevndin hevur kannað hesi viðurskifti og hevur ta fatan, at um ymsar broytingar verða gjørdar í kostinum, verður eingin grund til klagu hesum viðvíkjandi. Eftir upplýsingum frá sjúkrahússtjóranum er keypt í 1943 til bróstsjúkrahúsið meiri kjøt og mjólk enn til dansk og íslendsk bróstsjúkrahús, og sjúklingarnir yvirhøvur siga, at teir hava fingið nóg nógvan mat.

Tað er nú í kríggstíðini ikki lætt at útvega so ymiskað mat sum annars, og kosturin kann tí hava fallið summum sjúklingum at vera ov nógv upp í saman. Serliga hava teir saknað viðskera. Døgurðamatinum lata teir yvirhøvur væl at. Nevndin mælir til, at ikki verður spart at keypa nóg nógv av viðskera, og at bústjóran fær frían hendur eftir samráð við inspektørin at keypa til viðskera og annað til dagligan kost eftir reglum, sum stjórin áseti. Tað, sum keypast kann í stórum, eigur at verða keypt í felag við hospitalið.

Sjúklingarnir klagaðu um, at teir ikki sluppu til Havnar, at ljósið varð sløkt kl. 8.30, og at tað var torført at fáa pakkar til sín.

Hesum seinasta viðvíkjandi varð upplýst, at yvirlækniu hevði boðið sær at taka pakkar við til teirra, og lað sama sjúkrasystrar og geutur. Nevndin mælir til, at hospitalsbilurin hvønn dag, tá ið hann koyrir til bróstsjúkrahúsið, lekur teir pakkar við, sum eru til sjúklingarnar á posthúsinum ella á avgreiðsluni hjá ferðabátunum. Havnargongdini viðvíkjandi upplýsti yvirlækniu, at forboðið, sum annars svarar til reglur á flest øllum bróstsjúkrahúsum, má krejast yvirbildið, tí smittandi sjúklingar hava ikki eina ferð, men fleiri ferðir verið í dansi í Havn, tó at havt varð at teimum fyrstu ferð. Sløkkilfðin her á bróstsjúkrahúsinum er $^1/_2$ tíma selnri enn á hospitalinum í Havn.

Nevndin heil yvir fyri sjúklingunum fram, at tær reglur fyri dagligan ordan, sum yvirlækniu setir, mugu haldast. Bróstsjúkan, sum kann binda sjúklingar í áravís til eitt sjúkrahús, kann ikki annað enn gera nógvar sjúklingar troyttar og taka mótið frá teimum. Her ræður nógv um, at læknl, sjúkrasystrar og onnur, ið ganga um teir, í sínum dagliga arbeiði vísa teimum samkenslu og blíðskap, men eisini hjá sjúklingum ikki at gerast órímiligir. Hetta hevur nevndin hildið fram bæði yvir fyri sjúkrasystrum og sjúklingum, og hevur ta vón, at lað stríð, sum verið hevur, fer at javna seg.

Uppskot:

1. Grannskoðaði roknskapurin fyri 1942 verður góðkendur og hallið verður at rinda úr amtsgrunninum.
2. Tær samtyktir, millumtinganevndin hevur viðlikið, verða góðkendar.
3. Økonoma frk. Z. Jensen fær permissión í 1 ár frá nýárum at rokna, treylað av, at onnur økonoma fæst í hennara stað ta tíðina.
4. Millumtinganevndin verður heimilað at leiga Anton Kragesteen eitt jarðastykki, samsvarandi tí, ið er nevnt í álitinum.
5. Sjúkrahússtjóri Edw. Milens verður eisini settur sum sjúkrahússtjóri fyri bróstsjúkrahúsið.
6. Sjúkrahúsinspektørur Johs. Nolsøe verður settur sum sjúkrahúsinspektørur fyri bróstsjúkrahúsið við løn 100 kr. um mánaðan frá 1. januar 1944.
7. Innkeyp av kosti, serstakliga viðskera, verður gjørt av bústjóruni og inspektørinum í samráð við stjóran, og tá talan er um størri innkeyp saman við Dronning Alexandrines Hospitali, alt eftir nærri ávísan av sjúkrahússtjóranum.
8. Sjúkrasystir frk. Henrikka Næsaa kemur inn undir eftirlønarskipan bróstsjúkrahúsins frá 1. januar 1944 at rokna.
9. Millumtinganevndin eftir samráð við sjúkrahússtjóran verður heimilað at lata gera neyðturviligar umvølingar.
10. *Figgjarætlan fyri 1944:*

Inntøkur:

A. Sjúklingagjøld	kr.	20.000,00
B. Ríkisstuðningur	-	56.000,00
C. Urtagarðnr og húsdjór	-	3.000,00
D. Løgtingsstuðningur	-	117.500,00
	kr.	196.500,00

Utreiðslur:

1.	Løn	kr.	34.000,00
2.	Matvørur	-	93.500,00
3.	Brenni og ljós	-	30.000,00
4.	Urlagarðnr og húsdjór	-	2.000,00
5.	Medicin o. t.	-	6.500,00
6.	Viðlíkahald av húsum	-	7.000,00
7.	Inventar	-	9.000,00
8.	Røntgenfilmur	-	3.000,00
9.	Tváttur og reingeran		6.000,00
10.	Trygging	-	1.300,00
11.	Skrivstovuhald	-	1.500,00
12.	Fluttningskostnaður	-	1.500,00
13.	Ymist	-	1.200,00
		kr.	196.500,00

Broytingaruppskot:

Punkt 5: Spurningurin um at sela stjóra fyri Sanatoriið verður útsettur.

2. viðg. 7. dec., 3. viðg. 7. dec. Pt. 1—4 samtykt 25—0, broytingaruppskotið til pt. 5 samtykt 16—0, pt. 6—10 samtykt 17—0.

---

2. Handkeypsútsølur.

Álit (28. september.):

Fyri tinginum liggur umsókn frá Mikladals sóknar kommunu um at fáa góðkent, at tað verður gjørd ein handkeypsútsøla har í bygdini av medikamentum. Sóknarstýrið greiðir frá, at tað fyrr hevur verið uppá tal, men tá fekst eingin til at taka hetta uppá seg, meðan hurri Joen H. Henriksen, keypmaður, nú er til reiðar at taka við hesum starvi.

Umsóknin hevur verið løgd fyri amtslæknan, fylkislæknan í Klakksvík og apotekaran, sum allir hava givið leirra besta viðmæli. Amtið hevur síðan lagt málið fyri tingið.

Nevndin er á einum máli um, at tað er beint og neyðugt, at ein tílík handkeypsútsøla verður sett á stovn, og setur fram uppskot

samsvarandi hesum. Spurningurin um hvør maður fær hetta upp í hendi hevur tingið einki beinleiðis við at gera, men nevndin skal viðmerkja, at hon er samsinnt í, at umsøkjarin verður settur. —

Harnæst er lagt fyri tingið umsókn frá Arne Winthereig, Skopun, um at fáa góðkent, at hann kann standa fyri handkeypsútsøluni í hesi bygd. Har hevur í longri tíð verið tilík útsøla, so her er bert talan um at seta mann í manns stað. Hetta hevur nevndin tingið váttað í skrívi, dagsett 23. september 1943, frá amtinnu.

Nevndin skal so staðt einki uppskot seta fram til tingsamtykt, men bert viðmerkja, at nevndin er samsinnt í, at hesin maður verður settur, tá ummæli er komið frá lækna, apotekara og søknarstýrinum.

Uppskot:

Løgtingið gevur sítt viðmæli til, at sett verður á stovn ein handkeypsútsøla av medikamentum í Mikladali.

2. viðg. 5. okt. Samtykt 17—0.

---

3. Ferðaútreiðslur embætislækna.

Álit (24. sept.):

1. viðg. 11. sept.

Í kunngerð nr. 1, 3. januar 1941, er støddin av endurgjaldinum fyri ferðaútreiðslur, sum embætislæknarnir fáa, tá bílur ella bátur ikki verða nýttir, ella serstøk semja ikki er gjørd, sett fyri tíðarskeiðið 1. aprí 1941 til 31. mars 1944 til 25 oyr. pr. km., tó minst 2 kr. pr. ferð.

Spurningurin um støddina av endurgjaldinum fyri tíðarskeiðið 1. aprí 1944 til 31. mars 1947 er lagdur fyri tingið. Amtslæknin úttalar, at sum prísviðurskiftini eru í Føroyum, vil tað vera hóskandi at seta 50 oyr. pr. km., minnst 4 kr. pr. ferð. Formaðurin fyri læknafelagnum er samdur við amtslæknan.

Fíggjarnevndin kann viðmæla uppskot amtslæknans.

Uppskot:

Tingið viðmælir, at ferðaendurgjaldið til embætislæknar fyri tær í álitinum umtalaðu ferðir verður sett fyri tíðarskeiðið 1. aprí 1944

til 31. mars 1947 til 50 oyr. fyri hvønn byrjaðan kon, tó minnst 4 kr. fyri hvørja ferð.

2. viðg. 5. okt. Samtykt 17—0.

---

4. Lýsi til skúlabørn.

Álit (3. nov.):

1. viðg. 11. sept.

Á landsnevndarfundi 3. mars í ár varð sett fram uppskot um at kanna, um tørvur er á, at skúlabørn regluliga fáa lýsi, og um so er, um hetta skal vera tvungið, og hvor ið gjalda skal útreiðslurnar. Málið hevur verið lagt fyri skúlastjórnina, sum hevur viljað biðað við at úttala seg, til løgtingið hevur fingið málið fyrilagt.

Málið hevur verið lagt fyri amtslæknan, sum vísir á tann týðning, sum lýsi í sínari nøgd av A og D vitaminum hevur. Tað lýsið, ið givið verður, má helst vera kanhað viðvikjandi innihaldi av hesum vitaminum; hetta verður gjørt við vitametri, men einki sovorðið apparat er her og hevur ikki kunnað fingist higar undir kríguum.

Amtslæknin vísir til, at í Danmark hevur undir kríguum verið soleiðis fyriskipað, at kort verða útbýtt til at fáa lýsi fyri, og lýsið verður goldið av sjúkrakøssunum og statinum. Staturin letur okkurt um 3 milliónir kr. til hetta endamál. Eftir sum frásagt er í radiolíðindum, hevur verið brúkt 60 pct. av tí lýsi, sum kundi roknast við, um øll børn frá teim minstu til 14 ára gomul skuldu fingið sín part.

Amtslæknin heldur tó, at umfram eigur eisini at verða gingið eina aðra leið og minna fólk á at eta gagnligan mat í staðin fyri ógagnligan. Her má vísast á spik, sum á allan háll er miast líka gagnligt sum lýsi, á livur, bæði av fiski, hvalum og øðrum djórum, á mjólk, síld og ferskt hvalatvøst. Fólki, ið fær nóg mikið av spiki (40—50 g), av mjólk (3/4 litur), livur ella síld, nýtist einki lýsi. Heldur ikki eru tað bert skúlabørnnm, sum tørvar lýsi ella hini her nevndu vitaminríku føðievnir, men enn meira teimum heilt smáu børnunum og barnakonum. Hann minnir á, at brendar tenn og eingilsk sjúka eru millum annað fylgjur av vitamintroti, og mælir til, at løgtingið letur prenta og útgeva professara Tovernds tveir fyrilestrar í tannrøkt, sum hann viðleggur í føroyskari umseting.

Skúlanevndin hevur kannað málið og biðið P. Dahl, amtslækna, lagt tað fyri læknafelagið, sum sigur seg at vera av somu áskoðan, sum amtslæknin.

Nevndin mælir til

1. at tingið letur prenta í 10.000 einløkum og útbýta frammanundan nevnda bókling eftir G. Toverud, professara, og útreiðslurnar verða goldnar úr amtsgrunninum.
2. Fyri komandi vetur letur tingið tann neyðturviliga pening til lýsi, ikki bert til skúlaborn, men øll børn undir 14 ár, tá ið foreldrini yuskja tað, og til barnakonur, Heilt verður á trolaraeigarar at útvega nóg nógvar lunnur av lýsi og lata ein royndarlut av tí vitaminkanna í Onglandi. Amtslæknin verður biðin um saman við læknunum at skipa fyri útbýtingini gjøgnum sóknarstýrini og skúlarnar. Kommununnar endurgjalda tinginum útreiðslurnar til at senda lýsið úr Tórshavn til plássið.

Tingsins útreiðslur verða at bóka amtsgrunninum til skuldar undir grein 4 (skúla- og mentunarmál) m. Ymisl.

2. viðg. 6. nov., 3. viðg. 9. nov., samtykt 22—0.

---

5. Tannlæknaskipanin.

Frl. 9. sept. 1. viðg. 11. sept.

Áitt (12. nov.):

D. Danielsen, lærari, Sørvági, hevur við skrivi av 4. september 1943 vent sær til tingið við áheitan um, at ein betri tannlæknaskipan verður gjørd. Umsøkjarin heldur fram, at annaðhvørt mugu fleiri tannlæknar verða settir úti um bygdirnar, ella má ein skipan fáast í lag, soleiðis at teir tannlæknar, sum nú eru, ferðast út um bygdirnar, og at tingið (lað almenna) gevur studning til tílíkar ferðir. Síðani flytur umsøkjarin fram, at tannlæknaviðurskiftini eru ógvuliga aftarlaga í Føroyum, og at hetta er skeivt, tí ein góð tannlæknaskipan hevur eins nógv at týða og ein góð læknaskipan, ikki bert móti tí pínslu, sum ringar tenn geva, men eisini fyri heilsustøðuna í landinum yvirhøvur.

Nevndin hevur vent sær til tannlækna Kaaber, og hevur hann í skrivi av 27. oktober 1943 sagt frá, at nógv er eftir at gera áðrenn tannlæknaskipanin her í Føroynum kann sigast at vera tíðarhóskandi. Hann ásannar eisini, at sum støðan er í dag, er ikki hugsingur um at fáa fleiri tannlæknar til landið, soleiðis at ringt er við at gera; men heldur hann, at lað átti at verið umhugsað, hvussu nýskipanin skal verða løgd til rættis, tá ófriðartíðin einaferð er av. Hann vísir á, at fleiri sjúkrakassar enn ikki hava reglur, soleiðis at kassin gevur tilskot til viðgerð av tonnum, og heldur at hetta átti at fingist í lag hjá øllum sjúkrakøssum. Hann nevnir, at t. d. Vestmanna, Eiði, Sandur, Sørvágur o. fl. bygdir ikki hava tílíka skipan í teirra sjúkrakøssum.

Undir samráðing við tannlækna Kaaber segði hann frá, at hann regluliga ferðaðist til Klakksvíkar, Tvøroyri og til Vágs og segði frá, at hann eisini ætlaði at gera eina ferð vestur í Vágar. I bræviunum tekur hann uppaftur, at hann ætlar at gera eina ferð vestur í Vágar, og um tað verður gjørligt, eisini til Vestmanna og til Eiðis. Eftir samráðingum kann nevndin útlata, at tað er ikki neyðugt at geva nakran studning frá tí almenna til hesar ferðir. Nevndin heldur tó, at tað er beint, at tannlæknin á síni ferð í Vágum fær loyvi frá tinginum at nýta tey høli, tingið hevur latið innrættað til Lazarettir har vesturí, á síni læknaferð til hesa oyggj.

Nevndin heldur ikki, tað er gjørligt at fastleggja nakað um, hvussu tannlæknaskipanin kann verða tøgd til rættis í komandi tíðum, men má ásanna, at tað er beint, sum umsøkjarin heldur fram í sínum skrivi, at tað almenna eigur at hava í huga at fáa eina betri tannlæknaskipan her á landi.

Nevndin setur fram soljóðandi

Uppskot:

Svarað verður umsøkjaranum, at tannlækni Kaaber hevur sagt tinginum frá, at hann ætlar skjótast tilber at gera eina ferð vestur í Vágar fyri at røkja lenn.

2. viðg. 16. nov., samtykt 21—0.

---

6. Reglur fyri sinnissjúk.

Frl. 2. okt. 1. viðg. 9. okt.

Alit (20. nov.):

Við skrivi 1. 28. september 1943 hevur amtið lagt fyri tingið hesi uppskot við viðmerkingum.

1. Reglur um at sela í verk »Lov Nr. 122 af 15. Marts 1939« (Uppskot I),
2. reglur um »Bidragsparlæggelse for Særforsorgspatienter paa Færøerne« (uppskot II),
3. reglur viðvíkjandi »Anbringelse af Sindsyge i England« (uppskot III).

Landslæknin hevur havt málið til ummælis. Hann mælir til, at hesi nevndu uppskot verða samtykt í tí skili, tey eru, tó við smærri broytingum í uppskoti III, at í staðin fyri »Overlægen paa Dronning

Alexandrines Hospital« verður sett »Overlægen ved Sindsygeafdelingen ved Klaksvig Sygehus«.

Amtmaðurin tekur við hesum.

Landslæknin mælir harnæst til, at tað verður læknin, ið vendir sær til yvirlæknan á Dronning Alexandrines Hospital, tá talan er um at fáa sinnissjúkan sjúkling á sjúkrahús. Amtmaðurin hevur einki móti hesum at siga.

Sociala nevndin, sum hevur havt hetta mál til umhugsunar, mælir tinginum til at samtykkja nevndu reglur við umstaláðu broytingum.

Uppskot:

Tingið samtykkir tey framløgdu uppskot til

I) »Midlertidige Bestemmelser for Færøerne om Gennemførelse af Lov Nr. 122 af 15. Marts 1939 om Statstilskud til Særforsorg for Personer, bosat paa Færøerne« tó við hesi broyting:
1) § 1, 2. punktum verður broytt til: »Saafremt vedkommende Læge skønner, at Indlæggelse bør finde Sted, retter han efter forudgaaende Aftale med Kommunalbestyrelsen Henvendelse til Overlægen for Dronning Alexandrines Hospital i Thorshavn.«
2) § 4, fyrsta punktum verður hetta »Nærværende Bestemmelse træder i Kraft den 1. Januar 1944.«

II) »Bekendtgørelse om Bidragspaalæggelse for Særforsorgspatienter paa Færøerne,« tó við hesi broyting:
§ 5, 1. punktum verður hetta: »Nærværende Bestemmelse træder i Kraft den 1. Januar 1944.«

III) »Midlertidige Bestemmelser for Færøerne om Tillæg til Lov Nr. 122 af 15. Marts 1939 om Statstilskud til Særforsorg for Personer, bosat paa Færøerne«, tó við hesi broyting:
Orðini: »Overlægen paa Dronning Alexandrines Hospital« verða broytt til »Overlægen for Sindsygeafdelingen ved Klaksvig Sygehus«.

2. viðg. 22. nov., 3. viðg. 26. nov., samtykt 22—0.

VI. FISKIVINNA o. t.

1. Endurnýggjan av skipaflotanum.

Frl. 8. sept. 1. viðg. 11. sept.

Álit (27. nov. Dam óheftur):

Í fjør samtykti tingið, orsakað av skrivi frá amtinum, at viðmæla, at samráðingar fóru fram við bretska ríkisstýrið um at royna allar møguleikar til at fáa heim til Føroya so nógv hóskandi fiskifør, sum tað á nakran hátt letur seg gera.

Tíverri er einki komið av skafli í hesum máli.

Viðlagt í málinum liggur skriv frá bretska konsulinum av 23. januar 1943 og skriv frá Færø Amt av 1. februar 1943.

5. september 1943 hevur Føroya skipara- og navigatørfelag við skrivi heitt á tingið um at fáa til vegar fiskifør. Líknandi ábeitan er komin frá Klakksvíkar útiróðrarfelag við skrivi dagfest 20. september 1943, og í skrivi av 5. oktober 1943 biður Fólkaflokkurin tingið um at royna at skaffa før til landið annaðhvørt til teigu ella til keyps.

Nevndin hevur við stórum áhuga kannað hetta mál og havt samrøðu við bretska konsulin hesum viðvíkjandi og sent honum hetta bræv, sum vit tó ikki hava fingið svar uppá:

»Sambart samrøðu á skrívstovu tygara, hósdag 14. oktober í ár, viðvíkjandi fyribyrgjan av vinnuloysi føroyskra sjómanna, skulu vit loyva okkum at halda fram, at nevndin ynskir,

1. *at* tað verður hildið stórliga átroðkandi, at Føroyingar fáa til keyps ella leigu nakrar góðar trolarar og nakað av góðum fiskibátum, ca. 20 tons ella størri, ella
2. *at* trolarar verða stationeraðir í Føroyum og drivnir við føroyskari manning, bæði yvirmenn og undirmenn, ella um hetta ikki ber til, so
3. *at* føroysk manning, bæði yvirmenn og undirmenn, fáa hóvi til at dríva nakrar trolarar út frá Onglandi,
4. *at* samráðingar viðvíkjandi fiskivinnu kunna koma í lag millum Føroyingar og Bretar, ið starvast við fiskivinnu, og halda vit tað vera hentast, um slíkar samráðingar fara fram í Føroyum.«

Eisini hevur nevndin hugsað um, at tað kundi verið ein møguleiki at fingið motorar og før úr Svøríki og hava tí sent hetta fjarrit til danskn sendimannastovuna í Stockholm:

»Føroya løgting biður royna fáa ta skipan í lag at fiskiskip kunnu byggjast og motorar smíðast í Svøríki til Føroyar móti rindan í pundum og avgreiðast skjótast skipini og motorarnir kunnu fara frá Svøríki.«

Tann 12. oktober 1943 kom hetta skriv frá Færø Amt til Løglingsskrivstovuna:

»Amtet har under Dags Dato tilskrevet H. B. M. Consul, Thorshavn, saaledes:

»Referring to our conversation about the building of fishing vessels in Sweden the Lagting committee on this subject has asked me to send the following cable to the Danish Legation in Stockholm:

»The Faroe Lagting requests you to make arrangements for construction in Sweden of fishing vessels and engines for Faroes against payment in Sterling delivery as soon as vessels and engines can be shipped from Sweden.«

I understand that the committee wants to find out whether Swedish shipyards and factories are prepared at the present moment to enter into contracts about the construction of fishing vessels and engines for Faroese buyers to be ready for delivery not later than at the end of the war. The Faroes have lost many ships during the war and it is only natural that interest is taken in the acquisition of new ships at the earliest date. Details about how the payments should be effected would come from Sweden, but it must be expected that good security and some payment in advance will be demanded already while the ships are building.

I am looking forward to hear from you if there are any objections to the cable and, if not, whether we can proceed to make the necessary arrangements regarding payments and security in case the Swedish firms agree to make contracts about the ships.

I ask you, Sir, to accept the assurance of my highest esteem and consideration.«

Hvilket herved meddeles til videre Bekendtgørelse for Lagtingets Fiskeriudvalg, idet tilføjes, at den britiske Konsul har ønsket Sagen forelagt som nu sket, forinden det omhandlede Telegram afsendes.«

Nevndin hevur eisini hugsað um at fingið Føroyingar til Brettlands fyri at kanna møguleikan fyri at fáa skip haðani; men av tí, at tað liggur mál inni á tingi um at senda menn til Brettlands í øðrum ørindum, heldur nevndin at tað er best, at hesir menn eisini koma at hava hetta mál um hendur. Nevndin er samd um, at Landsnevndin

eigur at halda áfram at virka við hesum fyri landið so lýðningarmikla máli og leggja allan dent á skjótast gjørligt at fáa útvegað okkum fleiri før. Eisini halda vit, at fiskimannafeløgini eiga at fáa at vita, hvat tað fer fram hesum viðvíkjandi, so at tey til eina og hvørja tíð kunna geva málinum ummæli.

Vísandi til tað, sum her er ført fram, setur nevndin hetta

Uppskot:

1. Tingið áleggur landsnevndini at fremja hetta mál á besta hátt.
2. Álit verður sent fiskivinnufeløgunum, og verða tey biðin um at senda ummæli teirra til landsnevndina.

2. viðg. 29. nov., samtykt 20—0.

---

2. Broytan av fiskivinnulógini.

Frl. 14. sept. 1. viðg. 16. sept.

Álit (9. okt.):

C. Eliasen, Tvøroyri, søkir í brævi 11. september 1943 til løgtingið um, at lóg nr. 36, 24. november 1942 um fiskivinnu við skovlaváð verður broytt antin soleiðis, at loyvi verður givið at fiska við snurruváð inni á firðunum í tíðarskeiðinum 1. juli til 31. oktober, ella at undantak kann gerast frá lógini til í ár at fiska inni á firðunum frá 20. september til 15. november og næsta ár frá 1. august til 31. oktober.

Umsøkjarin heldur fram, at tann broytan av fiskivinnulógini, ið tingið samtykti í fjør, ger tað ógjørligt fyri Suðuroyingar við smáum førum at nýta trol ella snurruváð.

Nevndin hevur umhugsað málið og er greið yvir tann týdning, tað kann hava fyri teir útróðrarmenn, ið nýta snurruváð við smáum førum, at teir fáa loyvi til at nýta henda veiðuhátt í einum avmarkaðum tíðarskeiði á firðunum, og er samd um at mæla tinginum til at broyta fiskivinnulógina, so loyviligt verður at veiða við snurruváð í firðunum í tíðarskeiðinum 1. juli til 31. oktober. Annars skal nevndin viðmerkja, at sambæri fiskivinnulógina 14. august 1893 kunnu eftir nærri ásettum reglum gerast serligar viðtøkur fyri veiðu á firðunum, víkum og sundum, har ikki streymasjógvur er, um, hvørji amboð ið kunnu brúkast, og er nevndin kunnug við, at tílíkar viðtøkur eru settar í gildi ymsa- staðni í Føroyum.

Nevndin setir fram hetta

Uppskot

til

Ændring i midlertidige Bestemmelser for Færøerne

Nr. 36 af 24. November 1942

angaaende Forbud mod Fiskeri med Bundslæbevaad.

§ 4 affattes saaledes:

I Tidsrummet fra 1. November til 30. Juni er det forbudt at fiske med Snurrevaad indenfor den overfor i § 1 nævnte Linie.

2. viðg. 25. okt. 3. viðg. 28. okt. Fall 10—0 (ja atkvóðu: Joh. Poulsen, P. M. Dam, J. F. Kjølbro, Andreas Djurhuus, Kr. Djurhuus, Trygve Samuelsen, A. Samuelsen, J. Chr. Olsen, Jacob Fr. Øregaard, Thorstein Petersen, — burtur H. Iversen, O. J. Jensen og J. P. Davidsen.

---

3. Hvalaveiða.

Frl. 14. sept. 1. viðg. 16. sept.

Álit (27. nov.):

Havnar Framburðsfelag hevur í skrivi av 13. september í ár heitt á Føroya Løgting og hiðið tingið samráðast við hvalaveiðufeløgini um at fáa hvalaveiðu komandi ár, vísandi á tann týðning tvøstið hevur til matnað.

Ein 3-mannanevnd hevur havt málið í hendi, og nevndin er á einum máli um, at tað má royna at fáa hvalaveiðuna uppaftur tikna.

Í teimum trimum fyrstu kríggsárunum eru um 10.000 grindahvalir dripnir í Føroyum, meðan talið í ár bert er um 600. Tá ið hvalatvøst er so góður og virðismikil matur sum nakað annað kjøt, eigur at verða gjørt tað, sum gerast kann fyri at útvega henda mat. Eisini kann tað ætlast, at tað verður meira torført at útvega kjølmat til døgurðamat, sum kríggið líður.

Umfram tvøst, lýsi og guano vil stórhvalaveiða eisini geva nakað av arbeiði, bæði á bátunum og á landi.

Nevndin hevur havt fundir við hvalaveiðufeløgini og við Captain Mc. Dermoth um málið. Tað kann ætlast, at tað ikki verða nakrir trupulleikar frá tí hersetandi maktini útyvir teir trupulleikar og vandar

sum kunnu verða av spreingiknøttum o. l., hert bátarnir halda seg innanfyri ley mark, sum verða ásett. Skriv er sent til tað hersetandi maktina um loyvi til hvalaveiðu fyri komandi ár. (Skjal nr. 1).

Undir viðgerðini hevur nevndin havt tvey uppskot at hugsa um:

1. Veiða við 4 bátum frá teimum háðum støðunum, sum eru.
2. Veiða við tveimum bátum og hvalirnir uppskornir á teimum 6 sleipustøðunum, sum eru, og kanska á øðrum lendingum, hvar góð spøl eru.

Ad 1. Hvalaveiðufeløgini halda seg ikki verða før fyri at veiða hval, sum tíðirnar eru, serstakliga tí tað er ringt at útvega kol, oljuprísirnir eru ov lágir, og tað kann ikki tala seg gera at seta tvøstprísirnar ov høgar. Eisini eru teir flestu hvalabátarnir nú útgjørdir at føra feskan fisk. Nevndin hevur saman við mannum frá hvalaveiðufeløgunum sett upp eitt figgjarligt yvirlit yvir útreiðslur og inntøkur fyri báðar hvalastøðirnar við tveimum bátum á hvørjari. (Skjal nr. 2). Roknað verður við einum prísi av 50 oyru fyri kg. av tvøsti. Eftir hesum verður eitt undirskot uppá 150.000 krónur á rakstrinum, og so er ikki viðroknað tann leiga, sum skal verða goldin, um løgtingið tekur við rakstrinum av bátum og støðum.

Tað er møguligt, at tíðirnar skjótt kunnu broytast so at hvalastøðirnar sjálvar kunnu taka upp aftur veiðuna, men sum nú er má serliga hugsast um tann biligasta veiðuhátt.

Ad 2. Hesin vegur, at lata 2 bátar veiða í $^1/_2$ ár og føra hvalirnar til tær 6 sleipustøðirnar og kanska aðrastaðni, tykist nevndini væl betri fatandi. Nevndin hevur sent skriv út til sleipustøðirnar (skjal nr. 3) og spurt um treytir og munuliga liogið játtandi svar frá einari. Nevndin hevur eisini sett upp eitt figgjarligt yvirlit yvir hendan veiðuhátt, og tykist tað, sum hann kann bera seg væl betri og geva um 30 pund av tvøsti uppá fólki, t. e. døgverðsmatur 60 ferðar um árið. (Skjal nr. 4). Við 6 støðum, hvar tað bert nýtist at arbeiða 8 limar uppá hvønn hvalin, verður skjótari arbeiðið. Nevndin hugsar sær, at søknarstýrini (í Havn býráðið) á teimum plássum, hvar sleipustøðirnar eru, best kann taka sær av uppskeran og partabýlan í eins stórar partar til øll í teimum søknum, sum koma at fáa tvøst frá tí støðini. Útreiðslurnar verða áfkraðar søknunum eftir fólkatali, meðan tvøstið av teimum keypandi verður goldið kontant við 40—50 oyru fyri kg., alt eftir góðskuni. Spikið verður sett til smeltingar ella beint burtur og saltað til smeltingarseinni. Tað tvøst, sum ikki verður upplikið, eigur søknarstýrið at salta og geyma til sølu seinni. Skrokkarnir verða sleipaðir út á streymasjógv beinan vegin, teir eru uppskornir, ella um tað er og ligl seldir til hvalatøðvirki.

Nevndin setir fram soljóðandi uppskot til samtyktar:

1. Løgtingið setir eina 4 manna-nevnd at fyrireka stórhvalaveiðu í 1944. Nevndin eigur heimild at tingast við hvalaveiðufeløgini og við leir persónar og ley feløg, sum tað er neyðugt fyri at koma á mál.

2. Landsnevndin eigur heimild til at ráða yvir tí neyðturviliga peningi málinum til frama. Landsnevndin kann gera av, um hvalaavgift skal latast.

2. viðg. 29. nov., 3. viðg. 2. des., samtykt 16—0.

---

4. Royndarkamar fyri kumpassir.

Frl. 21. okt. 1. viðg. 22. okt.

Álit (19. nov.):

Í tingsetuni 1942 samtykti tingið (sí løgtingstíðindi 1942, síðu 84—86), at tað skuldi setast á stovn eitt royndarkamar fyri kumpassir í Føroyum. Málið um eitt tílíkt royndarkamar hevur verið til viðgerðar á tingi í fleiri ár, fyrsta ferð í 1923, men ikki fyrr enn bardagatíðin gjørdi tað ógongt at fara til Danmarkar fyri at fáa certifikat uppá kumpassir, hevur tað verið avgjørt, at nú skuldi hetta fáast í lag.

Samtyktin í 1942 varð givin upp í hendi á amtinum til at setta í verk. Tað er síðan farið eitt longri brævuskifti frammi millum amtið, fútan, skipasýnið og lærara á skipanaskúlanum Hans Sundstein, sum er ætlaður at verða fyrisløðanaður fyri hesum royndarkamari.

Í mai mánaði 1943 var málið komið so langt, at alt var klárt til at setta hetta á stovn; allir upplýsingar sum kundu fáast vóru framkomnir, og Hans Sundstein hevði álíkið sær at standa fyri arbeiðinum. Royndarkamarið var ætlað at hava í eini stovu, sum máti gerast í kjallaranum hjá Sundstein, og útreiðslurnar vóru uppgjørdar soleiðis:

Stovnandi útreiðslur	2500 kr.
Húsaleiga (tvey ár ókeypis), síðan	500 —
Ljós, hitti, reingering o. l.	200 —
Løn til fyrisløðumannin	900 —

Inntøkurnar av avgift fyri at fáa certifikat uppá kumpassir varð ætlað til at geva um 250—300 kr. árliga.

So er steðgur í málinum frá 29. mai 1943 til 6. oktober 1943, og verður málið nú lagt fyri valuta-miðstøðina fyri at fáa játtað timbur til hesa nýlsu. Valuta-miðstøðin svarar aftur tann 11. oktober 1943 soleiðis:

»Efter at foranstaaende Sag har været fremlagt i Valuta-Centralens Møde den 8. ds., skal man herved meddele, at der ikke for Tiden er nogen Mulighed for at bevilge Træ til Formaal som det omhandlede.«

Tað timbur sum málið talar um er hetta:

46 stk. brettir 11' — $1^1/_4 \times 4$"
195 - panel 8' — $^3/_4 \times 4$"
40 - - 11' — $^3/_4 \times 4$"
75 fót leglarir — 2×4"
fótpanel, geriktir og tvær hurðar við karmi.

Málið er síðani við umlsins skrivi av 19. oktober 1943 lagt fyri tingið av nýggjum, við hesum viðmerkingi:

»Forelægges paany Færøernes Lagting. Efter det foreliggende maa Sagen formentlig stilles i Bero indtil videre.«

Nevndin, sum hevur fingið hetta mál til viðgerðar, hevur býtt seg í ein minniluta og ein meirilutа.

Minnilutin (Kr. Djurhuus og Jens Chr. Olsen) sela fram teirra hugsan í einum minnilutaáliti.

Meirilutin (P. M. Dam, O. J. Jensen og J. F. Kjølbro) er ikki samdur við amtið um, at einki meira skal gerast við málið. Tað má áttalast, at okkara sjóvinna, soleiðis sum hon fer fram í dag, er ógvuliga vandafull. Á vetranátt at sigla fram við strendurnar í Íslandi, Bretlandi og Føroyum, hvar flest allir vitar eru sløktir, er einki tespiligt lív. Tað einasta, sum sjómaðurin hevur at líta á, er greiðirnar umborð, og har fyrst og fremst kumpassin. Tað er okkara skylda at gera alt, sum gerast kann, fyri at fáa hesar greiðir so álítandi sum gjørligt, og eitt royndarkamar má her verða eitt tað fyrsta stigið. Hetta er samtykt av Føroya Løgtingi; hetta er ásannað av kønum monnum, og alt er lagt til rættis soleiðis, at virki kann byrja, so kann Føroya Løgting ikki lata hetta steðga av trot uppá við.

Meirilutin má áttala, at vit so væl fata, at støðan kann liggja soleiðis fyri, at mest gjørligt má gerast fyri at vísa sparsemi uppá timbur, men tá hevur Føroya fólk og Føroya løgting rætt til at fáa greiðar reglur fyri, hvørji sjóuarmið her skulu verða avgerandi. Tað at støðan skal verða soleiðis, at eitt arbeiði fyri at trygglja okkara sjómannalív, má steðgast og verða ógjørt, fyri at spara nakrar fáar kubikfætur av timbri, tað ber ikki til. Tað ræður um serliga viðvíkjandi vørubýti og fyrireikingum móti vørutroti, ið hevur fólksins athuga meiri enn nakað annað, at tað ið verður gjørt, verður lagt soleiðis til rættis, at fólk fatar tað og kann ásanna, at royndt verður at fáa tað frægast møguligu burtur úr fyri fólkið. Tað hevði tí kanska ikki verið burtur av leið at tikið til umhugsanir hjá valutamiðstøðini at skipa sítt arbeiði soleiðis, at fólk kunnu hava høvi at kenna grundirnar til serliga tær ymsu avgerðir, ið ikki eru brúkskravinum til vildar. Fyri at hetta virki skuldi verið landinum til bata, og fyri at tað kundi givið tað besta úrsliti; er tað neyðugt, at fyriskipanirnar eru greiðar fyri øllum sum ávara, soleiðis at kunnleikin skapar samvirki.

Meðan nevndin hevur havt málið til viðgerðar, er støðan broytt soleiðis, at valutamiðstøðin er gingin við til, at royndarkamarið kann fáa tann neyðturvuliga við.

Meirilutin skal lí seta fram uppskot til tingið um, at tað verður álagt landsnevndini at ansa eftir, at tingsins samtykt frá í fjør verður sett í gildi.

Uppskot:

Løgtingið ásannar, at tess samtykt í 1942 um stovnan av einum royndarkamari fyri kumpassir eigur at verða sett í gildi, og landsnevndin verður heimilað til tingsins vegna at gera tað sum tørvast, fyri at hetta kann setast í verk.

Mindretalsbetænkning:

Mindretallet: K. Djurhuus og Jens C. Olsen skal udtale:

Som det fremgaar af Udvalgsbetænkningen har Spørgsmaalet om Oprettelse af et Prøvekammer for Kompasser tildels heroet paa Fremskaffelse af fornødent Tømmer til Indretning af et saadant Prøvekammer. Dette Spørgsmaal har været forelagt Valutacentralen, der i Møde den 8. Oktober 1943 har udtalt, at der ikke for Tiden er nogen Mulighed for at bevilge Træ til Formaal som det omhandlede.

Sagen er derefter forelagt Lagtinget og henvist til Udvalg.

Mindretallet er af den Formening, at det i givet Tilfælde vil være af stor Betydning, at der findes et Prøvekammer som anført, og vilde Mindretallet derfor anse det for naturligt, om Udvalget havde søgt Forhandling med Valutacentralen om Bevilling paa det fornødne Tømmer.

Da der imidlertid er affattet Udvalgsbetænkning, uden at en Forhandling som anført er søgt opnaaet, har Mindretallet herefter henvendt sig til Valutacentralen med Henstilling om at faa Bevilling paa det fornødne Tømmer, og er Henstillingen D. D. imødekommet.

Prøvekammeret skulde herefter kunne indrettes og aabne sin Virksomhed, og maa Sagen saaledes anses for bragt i Orden.

Forslag:

Mindretallet K. Djurhuus og J. C. Olsen henviser til foranstaaende.

2. viðg. 20. nov. og 23. nov. Minnilutauppskot fall 8—0. Meirilutauppskot samtykt 21—0.

5. Kæra um fisk, landaður í Bretlandi.

Álit (12. nov.):

Bretski konsulin hevur við brævi, dagfest 13. september í ár, sent løgtingsformanninum eitt skriv, dagfest 30. august í ár, frá Ministry of Food, Fish Division, London, til hansara, hvi klagað verður yvir góðskuna av fiski, sum er landaður av føroyskum skipum í Aberdeen. Fram verður hildið, at ov lítil ísur verður nýttur, at skipini verða yvirlasloð fyri at fáa meira vinning av túrinum, um allur fiskurin verður seldur, at harav fylgir, at túrurin verður ov langur, tí skipini bíða ov leingi fyri at fáa so fulla last, sum tey kunnu taka, og at eisini ov nógv skip koma inn í senn, og at arbeiðstrupulleikar í Aberdeen kunnu gera tað trupult at fáa skipini útlossað.

Málið hevur verið til viðgerðar í fiskivinnunevndini, og hevur nevndin haft samráðingar við bretska konsulin um spurningin.

Nevndin er greið yvir tann stóru týdning, tað hevur, at tann fiskur, sum landaður verður av føroyskum skipum í Bretlandi, er so góður, sum hann yvirhøvur kann verða.

Føroyingar vóru í viðgerð av salt- og klipfiski komnir langt á leið í strembanini at framleiða ta bestu marknavørumi. Henda støða í kappingini við onnur lond er vunnin við, at fiskimenn eins og øll, ið skipaðu fyri og tóku lut í viðgerðini av fiskinum ásannaðu, at hitt besta úrslitið bert kundi vinnast við, at øll fika frá tí fiskurin varð veiddur, til hann varð seldur, gjørdu sína skyldu og góva fiskinum ta viðgerð, ið vísundaliga og praktisk lørvaði fyri at fáa hitt besta úrslitið, bæði viðvíkjandi góðsku og prísi.

Tá ið nú vinnulív Føroyinganna knappliga varð lagt yvir á ein annan bógv, og at kalla allir veiðu- og útgerðarmenn fóru at fáast við ferskfisk, hendi tað, ið eyðsýnt mátti henda, at fiskurin at byrja við ikki kom at fáa ta viðgerð, ið var neyðug fyri at kunna uppfylla tað strangasta krav viðvíkjandi at fáa ta hægstu vørugóðsku og harvið tað besta peningaliga úrslitið.

Løglingið eins og allir ábyrgdarmenn fyri okkara ferskfiskaveiðu, fullkomiliga eru greiðir yvir brekið í okkara ferskfiskaviðgerð. Hónst tað av sonnum kann sigast, at okkara veiðu- og fyristøðumenn sjóvinnuni viðvíkjandi eru vorðnir nógv duguligari í viðgerðini av ferskum fiski enn fyri nøkrum fáum árum síðani, er nógv eftir hjá teimum at læra og skipa fyri, so tað eisini av sonnum kann sigast, at Føroyingar standa millum teir fremstu í vitan og viðgerð fyri at fáa framleitt ta bestu ferskfiskavørn. Tað má tessverri ásannast, at tað er tørvur á at fáa greitt okkara veiðumonnum týdningin av, at tað verður gjørt, ið gerast kann, fyri at verja fiskin móti rotkyknunum. Allir fiskimenn eru soleiðis ikki greiðir yvir, at tað ræður um at ansa eftir, at fiskurin ikki verður blakaður ella traðkaður, tá ein tílík viðferð spreingir hindirnar í fiskinum og brýtur mótstøðuna í honum móti rotkyknunum.

Hesum viðvíkjandi eins og viðvíkjandi týdninginum av,

at halda lastina, fiskaíløt og fiskahús fullkomiliga rein og frí fyri øllum rotkykni,

at lastin og øll rúm, ið fiskur verður goymdur í, verða hildin fullkomiliga løtt og frí fyri allan loftdrátt,

at fiskurin verður byrgdur inni í einum fullkomiliga samanrunnum ísbjálva, og at fiskurin kemur í henda bjálva skjótast gjørligt, helst innan hann linkar aftur aftaná ta fyrstu stirðningina,

at øll herðing verður løgd á at hava ís og goymsluhús tøk,

at ísurin verður gjørdur av rotkykunfrían vatni, og

at fiskur, ið verður fluttur innanoyggja, helst má koma í ís við tað sama, hetta ræður serliga um í summarlíðini,

má frá almenuari síðu verða skipað so fyri, at fiskimenn eins og øll tey, ið hava ábyrgd fyri viðgerðini av fiskinum, ikki bert fáa ta neyðturvuligu vitan, men eisini skulu hava skyldu til at viðgera fiskin soleiðis, at tað av sonnum kann sigast, at tað bæði vísindaliga og praktisk er gjørt tað, ið gerast kann, fyri at framleiða hin besta fiskin. Skotið verður tí uppá, at tað verður álagt landsnevndini at fáa til vega eina skrivliga frágreiðing um, hvussu fiskur skal verða viðgjørdur, og hvorji krøv hin besta feskfiskaviðgerðin setur til flutning á sjógvi og landi, fishús, tíðarhóskandi før ið skjótast kunna flyta fiskin til marknaðin, við áheitan um, at allir veiðumenn eins og útgerðarmenn royna at uppfylla øll hesi krøv til ta bestu viðgerðina, líka frá fiskurin verður veiddur, til hann verður seldur í útheimum.

Uppskot:

1) Givið verður landsnevndini í hendi at fáa til vega eina frágreiðing um, hvussu hin besta feskfiskaviðgerðin eigur at fara fram, frá tí fiskurin verður veiddur, til hann verður seldur.
2) Henda frágreiðing verður send øllum fiskivinnufeløgum og útgerðarmonnum og givin bløðunum til kunngerar og ummælis við áheitan um at eggja øllum pørtum at fylgja henni og einki eira fyri at fremja strembanina hjá Føroyum til skjótast mogulligt av sonnum at vinna sær sessin millum teir fremstu í kappingini um at framleiða tann besta feskfiskin.
3) Eintak av álitinum verður sent bretska konsulinum.

2. viðg. 17. nov. Samtykt 21—0.

VII. LANDBÚNAÐURIN

1. Útskiftingarlógin.

1. viðg. 15. sept.

Álit (6. dec.):

Lóg fyri Føroyar nr. 147 av 27. mars 1939 »om Udskiftning« fór úr gildi 1. apríl 1942 (smbr. lógarinnar gr. 86). Við bráðfengisreglum nr. 51 av 13. dec. 1941 varð lógin endurnýggjað til 1. apríl 1942 og síðani við bráðfengisreglum nr. 53 av 19. desember 1942 longd til 1. apríl 1944.

Málið liggur nú aftur fyri tinginum.

Búnaðarnevndin, sum hevur hetta mál til umhugsunar, mælir tinginum til at endurnýggja lógina. Tá ætlandi útskiftingarformaður verður settur, og lógin soleiðis kemur til nýtslu til fullnar, heldur nevndin tað verða beint at leingja hana fyri eitt longri tíðarskeið í senn, tí mangar bygdir hava umsókn inni um útskiftoing. Nevndin mælir tí til at endurnýggja hana fyribils fyri 2 ár til 1. apríl 1946.

Umfram hetta hevur nevndin havt til umhugsunar at rúmka um fyri útskiftingini. Nevndin hevur hildið tað verið rætt at mæla til at minka um markatalið sambært grein 6, 2. stk, og grein 79.

Eisini hevur nevndin sambært niðanfyri hildið tað verið rætt at víðka útskiftingarumráðið samb. kapitul 3, soleiðis, at heimild kommunanna sambært grein 22 eisini skal umfata tey hagalendi, sum koma inn undir útskiftingarumráðið til dyrkilendi hjá ognarleysum í bygdini.

Henda tilmælan er atvold av, at uppskot er fraumi um, at korl- og plánlegging skal fara fram av undirlunga teirra útskiftu bygdanna samstundis við sjálva útskiftingina.

Tá tann í tingmáli nr. VII 2/1943 tilmældi útskiftingarformaður ivaleyst verður settur, verður tað neyðugt longu nú at skipa tey fíggjarligu viðurskiftini.

Tað er rætt og rimiligt, um tingið átekur sær allar ella munandi part av útreiðslunum sambært gr. 59.

Tað verður lagt aftrat, at sakkonur maður altíð eigur at vera við til hagabýti, um eigari krevur tað.

Forslag

til

A. *Midlertidige Bestemmelser for Færøerne*

om Ændring i Lov for Færøerne

Nr. 147 af 27. Marts 1939 om Udskiftning.

I Lov for Færøerne Nr. 147 af 27. Marts 1939 om Udskiftning foretages følgende Ændringer:

1. I Lovens § 6, 2. Stk., ændres »en Trediedel« til »en Fjerdedel«.

2. Lovens § 22, første Punktum, affattes saaledes:

   »Den kommunale Styrelse kan, naar Almenvellet kræver det, fordre, at et af den angivet Areal af Udskiftningsomraadet, dog højst to Hundrededele af det dyrkede Omraade og højst fire Hundrededele af det udyrkede Omraade, skal afstaas til Kommunen.«

3. I Lovens § 79 ændres »en Trediedel« til »en Fjerdedel«, »Halvdelen« til »Fjerdedelen« samt »Fjerdedelen« til »Ottendedelen«.

4. I Lovens § 86, 1. Stk, ændres Aarstallet »1942« til »1946« og Aarstallet »1941« til »1945«.

   Nærværende Bestemmelser træder i Kraft straks.

B. De Udgifter, der paaføres Statskassen i Henhold til Udskiftningsloven, saaledes som denne er ændret ved foranstaaende Bestemmelser, overtages af Amtsfonden.

2. viðg. 7. dec. 3. viðg. 7. dec. Samtykt 24—0.

---

2. Útskiftingarformaður.

1. viðg. 15. sept.

Álit (7. dec.):

Í skrívi, d. 15. mars 1943, hevur Føroya Búnaðarfelag sent inn til tingið áheitan um at seta útskiftingarformann og samstundis at veita pening, so útskiftingararbeiði kunnu fara fram beinanvegin.

Felagið skilar til, at lað fær høvi til at ummæla teir, ið søkja formannsstarvið.

Hetta skriv hevur verið til ummælis hjá m. a. Búnaðarráðnum, sum lekur undir við hesum, men hevur tó meint at steðga við málinum.

Tað verður lagt aftrat, at umsóknir eru ikkomnar um at fáa útskifting setta í verk skjótast gjørligt.

Føroya Javnaðarflokkur hevur eisini í skrivi d. 13. september 1943 heitt á tingið um,

at útskiftingarformaður verður settur,
at peningur verður veittur, so útskiftingararbeiði kunnu fara fram straks, og
at fost skipan verður gjørd fyri útskifting av øllum Føroyum, so at arbeiðið um so og so nógv ár kann verða liðugt frá hondini.

Hin føroyski Fólkaflokkurin (radikalt sjálvstýri) bar uppá mál í 1911 at skipa so fyri til hesi endamáls fremu, at ungir menn fingu tørvandi lærdóm í útskiftingarstarvinum, so teir kundu verða hjálparmenn útskiftingarformannsins. Á henda hátt kundi útskifting farið fram í fleiri bygdum í senn og setti flokkurin fram uppskot um at veita tørvandi studning til slík skeið. Tað hevur verið hildið, at slík skeið ikki tørvaðu ræt langa tíð. Hetta vildi eisini framt ta ætlan, sum fram er sett at fáa kort- og plánfagt alt dyrkilendi í Føroyum.

Amtið hevur í skrivi d. 17. september 1943 borið fram spurningin um reglugerð sambart nevndu lóg.

Nevndin er samd um, at útskifting er ein aðalátátur í landbúnaðinum, ikki bert innangarðs, men eisini í ein vissan mun uttangarðs.

Tað sum ræður um er at fáa skipa seg so, at útskiftingin kann fara fara fram skjótast gjørligt, tí nógvar bygdir hava umsókn inni.

Sum ávís frammanundan, so er tað ein vegur, sum hevur nevndarinnar áhugu, at fáa givið ungum monnum tørvandi lærdóm fyri so at kunna átaka sær at vera hjálparmenn útskiftingarformannsins, soleiðis at útskifting møguligt kann fara fram í fleiri bygdum í senn undir leiðslu formannsins. Hesin vegur hevur víst seg vael nýtiligan í Noreg og tað kann leggjast til, at útskifting á henda hátt kann gerast vael bíligari.

Í øðrum máli er frammi uppskot um, at alt dyrkilendi Føroya skal plán- og kortleggjast, soleiðis at innlegg kunnu fara fram við betri skili. Tað er vert at umhugsa, um ikki kortlegging av teim til bygdirnar liggjandi undirhaga kann fara fram samstundis við innangarðsútskiftingina.

Nevndin er tí samd um at mæla tinginum til at fáa í lag eina skipan sum omanfyri greint.

Fíggjarnevndin hevur á fíggjarætlan amtsgrunnsins skotið upp at játta pening til hesi endamáls fremu.

Eftir verður at skipa hesi skeið og annars leggja til rætts útskiftingararbeiði. Hetta beldur nevndin best kann fáast í lag í samarbeiði millum útskiftingarformannin og landsnevndina í eini reglugerð. Hetta er ein royndi, sum nevndin mælir til at samtykkja.

Tað verður skilað til, at við tí tilætlaða skeiði, alsmæningarnir fáa teirra bókligu mentan og handslegni undir sjálvum útskiftingarstarvinum.

Tað verður álagt landsnevndini til komandi ting at geva frágreiðslu.

Í útskiftingarlógini gr. 5 er lað ásett, at »Ministeren for Landbrug og Fiskeri« setur útskiftingarformann, aftaná at ministerið hevur góðtikið grannastevnuviðløkuna um útskifting av eini bygd, gr. 8. Hetta er nevndin sambd um má skipast av amtmanninum, ráðharrans vegna, og hevur nevndin havt samráð við amtmannin um hetta, og sigur hann, at hann sjálvsagt vil samráðast við landsnevndina, og ætlandi rætta seg eftir landsnevndarinnar viðmæli.

Uppskot:

1. Eftir viðmæli frá landsnevndini setur amtmaðurin ein útskiftingarformann (menn) og ásetur løn hansara (teirra), tá grannastevnusamtykt um útskifting av einari bygd er góðkend.
2. Útreiðslurnar til hesi endamáls frama verða at veita úr amtsgrannunum.

2. og 3. viðg. 7. dec. Samtykt 22—0.

---

3. Reglur um portur.

Álit (29. september.):

Føroya bónaðarfelag biður um at fáa samtykt lóg, hareftir rist skal vera einasta lógliga grind á samferðsluvegum, har gæs ikki eru í høgunum.

Løgtingsverkfrøðingurin gevur soljóðandi ummæli í málinum:

„Vedr. Riste til Erstatning for Porte.

I Anledning af det til Lagtinget fremsatte Forslag om ved Lov at panbyde Indførelse af Riste i Vejbanen i Stedet for Lauger, Led eller Porte, hvor Veje passerer Haugeskel, skal jeg bemærke følgende:

Jeg er bekendt med, at man paa Island anvender Riste som Spærre for klovbærende Dyr, og da de engelske Myndigheder paabegyndte Vejforbedringer paa Vaagø, henstillede jeg til den daværende Øverstbefalende for Ingeniørtropperne at søge nærmere Oplysninger fra Island. Jeg har erfaret, at man forsøgte sig med Riste paa Vaagø, men senere har opgivet dem, uvist af hvilken Grund.

Spørgsmaalet har ogsaa været drøftet i Vejstyret, hvor Hr. M. Jacobsen var megel interesseret i at faa prøvet Ristene. Det er meddelt

mig, at der er anbragt en Rist ved Sanatoriet, men jeg kan intet oplyse, om hvorledes den virker. Hr. Landbrugskonsulent H. J. Jacobsen har givet Anvisning paa Nedlæggelse af en Rist ved Gøte, som dog endnu ikke er udført.

Det forekommer mig, at Sagen har stor Betydning for Fremtiden. Aabning og Lukning af Vejporte er til stor Gene for Biltrafikken og vil blive det i stigende Grad. Jeg vil derfor foreslaa, at man søger nærmere Oplysninger om Konstruktionen af Ristene i det islandske Vejdirektorat. Man vil derefter — efter Optælling af Antallet af Porte — kunne danne sig et Begreb om, hvad det vil koste at erstatte Portene med Riste, og om det vil være muligt at lægge en Finansplan for Foranstaltningen, der antagelig maa fordeles over en Aarrække.

Det vil næppe være muligt at skaffe de fornødne svære Rør, saalænge Krigen varer.«

Nevndin peikar á lóg nr. 171 av 18. mai 1937 um »Hegn- og Markfred«, § 15, ið ásetur:

»Paa offentlig Vej maa intet Led oprettes, medmindre vedkommende kommunale Myndighed tillader det; denne Myndighed foreskriver i saa Fald Leddets Bredde og øvrige Indretning.«

Nevndin mælir til at fáa nærri upplýsingar frá vegastjórn Íslands og at gera umsøkjaran og kommununurnar kunnugar við hesar upplýsingar.

Uppskot:

Løglingsskrivstovan fær til vegar nærri upplýsingar frá vegastjórn Íslands og ger umsøkjaran og kommununurnar kunnugar við hesar upplýsingar, tá tær koma fram.

2. viðg. 13. okt. Samtykt 19—0.

---

4. Bræv frá Føroya Búnaðarfelag.

Álit (29. okt.):

Føroya Búnaðarfelag biður um at fáa sum fasta skipan, at tingmál, sum viðvíkja landbúnaðinum, verða send felagnum til ummælis, áðrenn tey verða endiliga viðgjørd á tingi.

Umsóknin hevur verið send landbrúksráðnum til ummælis, og svarar ráðið, at tað heldur tað vera mest hóskandi skipan, at búnaðarmál verða send ráðnum til ummælis, og ráðið vil so fáa neyðturvilig ummælir frá Føroya Búnaðarfelag.

Nevndin heldur, at tað er óneyðugt at seta fram serstakt uppskot um hesi viðurskifti viðvíkjandi fyrireikan av løgtingsmálum og mælir til, at málið verður beint til løglingsskrivstovuna.

Uppskot:

Málið verður beint til Løgtingsskrivstovuna.

2. viðg. 2. nov. og 4. nov. Samtykt 22—0.

---

5. Landbrúksskúli.

Álit A (19. nov.):

Nevndin hevur fingið til viðgerðar umsókn frá Anton Kruse, Eiði, um at setu landbrúkshásskúla á stovu »uppi í Líð« undir Slættaratindi.

Umsøkjarin ætlar henda skúla at verða ein samvirkandi búnaðar- og fólkaháskúla. Landbúnaðaryrkið skal tó eina verða innangarðsbrúk.

Sum tað sæst av hjáløgdum skjølum, hevur hetta mál fyrr verið bæði hjá landsnevndini og landbúnaðarráðinum, men tá tað er upplýst, at hagaeigararnir í hesum haga einmæli hava sýlt fyri at lata hetta umsøkta strekkið »uppi í Líð« frá sær, er harvið byrgt fyri, at slikt verk sum umsøkta kann setast á stovn har.

Umsøkjarin A. Kruse hevur ógvuliga góð viðmæli frá teim plássum, bann hevur verið á í Danmørk og lært, bæði viðvíkjandi fdni og dugnøskapi, men vegna at umsókn hansara er bundin til eitt jarðaøki, sum ikki kann fáast, fær nevndin eingki avrikað hesum máli til frama.

Tað er nevndini kunnugt, at løglingið fyrr hevur tikið sær ábyrgd fyri láni til A. Kruse til at sela í gongd eitt stórtøkt høsnarhald. Hettar er ein av teimum smærra búnaðarvinnugreinum, sum tað hevði havt munogóðan týðning at komið til fullroynd um, hvussu henda alifuglarøkt á mest lønandi hátt kundi breitst víðari út um landsbygdirnar. Nevndin vil so slatt mæla A. Kruse til at geva seg heilt í holt við hetta mál, og senda lingiðum eina frágreiðing um hetta hansara starv. Síðani vil lingið taka til umhugsunar at veita hesum máli ein hóskandi studning og sýna málinum alla vælvild, um tað lítst væl á ta eftirvæntandi frágreiðing.

Uppskot:

Eilt einlak av hesum áliti verður sent umsøkjaranum.

Álit B:

Nevndin hevur fingið hetta mál til viðgerðar:

Til Føroya løgting.

Undirskrivaði Føroya javnaðarflokkur loyvir sær hervið at biðja tað heiðraða løgting um at taka hesi mál til viðgerðar:

. . . . . .

7. Búnaðarskúli settur á stovn.

. . . . . .

Á Føroya løgtingi, 13. september 1943.

Føroya javnaðarflokkur,

P. M. Dam,
fmð.

/ J. H. Danbjørg.

Tað er eingin frágreiðing givin um, hvussu ein búnaðarskúli skal skipast, og einki áseett um, hvat mangir kennarar skulu vera, hvørjar kenslugreinir har skulu vera lærdar, hvat teingi hvørt skúlaskeiðið skal vera, hvat lønir kennararnir og hvat studning næmingarnir skulu hava. Kostnaður á húsabyggingum og av teirri árligu umsiting o. a. m. er heldur ikki nevnt. Tað man tí ikki vera tilættað at seta nakran slíkan skúla á fót í næstuni. Undir teim viðurskiftum, sum nú eru her á landi, vil tað heldur ikki vera gjørligt beint nú at reisa ein sovorðnan skúla vegna ymisk trot.

Haraftnrímóli má nevndin halda tað vera beint, at tingið í ár leggur nakað av peningi niður til at hava at taka til, tá búnaðarskúlin einaferð skal setast í verk, og vil nevndin skjótn til, at tað av amtsgrunninum verða lagdar í ár 20.000 kr. í ein búnaðarskúla byggigrunn.

Hevur tað verið tørvur á, at reisa Føroynum ein búnaðarskúla fyri ungar menn, hevur ikki verið minni tørvur á at sett á stovn ein búnaðarhúsarhaldsskúla fyri gentur.

Tað eru í ár, sjá »Forslag og Betænkninger afgivne af den færøske Landbokommission 1911, bls. 282 o. f.«, 68 ár síðani løgtingið fyrstu ferð fór at starvast tyri føroyskum búnaðarskúla (»mønstergård«), og 43 ár síðan uppskot kom í tingið, sjá sama stað bls. 284, um at stovna húsarhaldsskúla saman við búnaðarskúla. Tó hesi bæði mál ferð eftir ferð hava verið á løgtingi, viðhvørt hjá kgl. danske Landhusholdningsselskab, hjá danskettari búnaðarnevnd, hjá donskum búnaðarráðgevarum, hjá »Selskabet for Norges Vel«, hjá Búnaðarfelag Íslands og í ríkisdegnum er hvørgin hesin skúlin komin í lag enn.

Tað er ikki til at meta, hvat Føroyar hava mist við alla hesa longu tíð at verið búnaðarskúlaleysar og húsarhaldsskúlaleysar.

Tá frihandilin kom í lag í 1856 var Føroyafólk sum heild skuldleyst, og nógvir Føroyingar áttu væl av peningum roknað eftir táliðarviðurskiftum. Fólkið dugdi vel at húsast, dugdi væl at fara um tað, tað bevói millum hendi. Tað var tiltikið fyri sparsemi og fyri at vera ærukært og árvakið nærlagt til alla vinnu á sjógv og landi og til inniverk. Føringafelags stevnuskrá í 1889, at fáu Føroyingar at vera sjálvbjargnar, var í av gomlum føroyskum bergi brotin.

Um hetta mundið 1880—1890 til 1900 stóð tað tilkomna fólkið í Føroyum enn á hesum omanfyri nevnda holla grundarlagi.

h)	Kjaluestanga, Kollafirði (D. J. Hansen o. fl.) $^3/_4$ av 500		375,00 —
i)	Lending Hoyvík		1.000,00 —
j)	- Hvítanes, $^3/_4$ av 500		375,00 —
k)	Uppgongdin Koltur, $^3/_4$ av 1.400		1.050,00 —
l)	Bátadráttur Nólsoy (Dan. M. Danielsen o. fl.) til tilfar upp til		800,00 —
m)	Slættanes lending, $^3/_4$ av 1.300		975,00 —
n)	Sf. Dímun, Kleivin, $^3/_4$ av 2.000		1.500,00 —
o)	Kleivin Vágseiði, $^3/_4$ av 2.000		1.500,00 —
p)	Norðoyri, bøtan lending, $^3/_4$ av 5.000		3.750,00 —
q)	Froðbingar spæl (Carl Djurhuus o. fl.), $^3/_4$ av 1.000		750,00 —

Nevndin mælir til hesar 2 óra játtanir:

r)	Neshamri: Beinkan og bækkan og brimgarður, $^3/_4$ av 12.400 = 9.300	1944:	4.650,00 kr.
s)	Viðareiði: Bøtan av helluni, $^3/_4$ av 15.000 = 11.250	1944:	5.625,00 —
t)	Funningsfirði bryggja, $^3/_4$ av 20.000 = 15.000	1944:	7.500,00 —
u)	Elduvík (Gjógvin), $^3/_4$ av 15.000 = 11.250	1944:	5.625,00 —
v)	Hest, $^3/_4$ av 28.000 = 21.000	1944:	10.500,00
x)	Hósvík (bátabrúgvin), $^3/_4$ av 8.500 = 6.375	1944:	3.187,50
y)	Kaldbak $^3/_4$ av 9.000 = 7.750	1944:	3.875,00 —
aa)	Brúgv Miklaá Porkeri, $^3/_4$ av 9.800 = 7.350	1944:	3.675,00 —
ab)	Selatræð bøtan lendibrúgv, $^3/_4$ av 15.000 = 11.250	1944:	5.625,00 —
ac)	Til Kirkjubø kommunu til bøtan av lendiviðurskiftunum		10.000,00 —
			89.675,00 kr.

3) Svarað verður hinum umsøkjarunum, at málini verða nærri at granska av verkfrøðinginum og at taka til viðgerðar næsta ár.

Broytingaruppskot

frá P. M. Dam o. fl.:

Sum øllum kunnigt eru vegir, sum ein stórur partur -- fyri ikki at siga øll oyggin — nýtir. Hesir vegir nevnast við einum fremmaudum navni trafikvegir.

Aðrir vegir verða nýttir at kalla einans av einstøkum bygdum ella bygdaløgum. Hesir vegir hava bara týdning fyri tey fólkini, sum búgva á viðkomandi staði.

Tað er rætt og rimligt, at viðkomandi kommuna heldur teir seinri umtalaðu vegir viðlíka, meðan tað ikki kann sigast at vera beint, at ein lítil kommuna skal halda meginpartin av einum trafikvegi viðlíka bara tí, at hon er komin at liggja so fyri, at tann størsti og mest nýtti parturin av vegunum liggur innanfyri hennara søknarmark.

Vit halda tað tí vera beint at rýma frá tí gamla áseluinginum um, at ein kommuna skal hava einarætt til at gera trafikvegir, ið ganga gjøgnum hennara lendi og harvið skyldu at hava vegin í góðum standi. Tað rætta má vera, at trafikvegir, ið verunliga øll eiga lut í, verða gjørdir av íbúgvarum í teim næstliggjandi bygdum eftir arbeiðsevnunum í hvørjari av viðkomandi bygdum, og at tær einstøku bygdirnar sambært hervið hava skyldu at taka lut í viðlíkahaldinum eftir førimuni og í mun til teirra stødd í heildini. Kortini meina vit, at umhoðið fyri ta samlaðu heildina, løgtingið, eigur at faka ein ávísan lut av útreiðslunum til viðlíkahald uppá seg. Vit halda, at helvtin av viðlíkahaldsútreiðslunum verða hóskandi fyri tingið at rinda.

Uppskot:

1) Trafikvegir eru teir vegir, ið binda bygdir saman.
2) Úr amtsgrunninum verður goldið helftin av útreiðslunum til viðlíkahald av hesum vegum.
3) Viðvíkjandi gerð og viðlíkahald av nýggjum vegum verður søknarmarkabýlingin avtikin, og vegastrekkini verða býtt leim einstaku kommununum sambart arbeiðsevnini og trongdini í viðkomandi kommununum.
4) Løgtingsverkfrøðingurin verður biðin um til næstu tingsetu at koma fram við inntøkuuppskoti til rindan av løgtingsins vegaútreiðslum og gera uppskot til viðlíkahaldsreglugerð.

2. viðg. 30. nov. 3. viðg. 3. dec. Broytingaruppskotið fall 8—0. Nevndaruppskotið samtykt 22—0.

3. Viðlíkahald í Skálavíkar kommunu.

Álit (29. nov.):

Vegstýrið samtykti í fjør at nýta úr amtsgrunninum upp til 5000 kr. til umvølan av vegi í Skálavík fyri kommununnar rokning.

Ífjør legði kommununstýrið inn á ting mótmæli móti samtyktini, sum vegstýrið hevði gjørt. Málið kom ikki til viðgerðar, tí tað kom ovseint inn á ting, og bert 8 atkvóðu fyri at taka tað til viðgerðar.

Fár hevur kommununstýrið í bræví 1. september átalað, at pengar eru rindaðir gjøgnum vegmannin til umvølingararbeiði fyri kommununnar rokning, og teir flest at tí, ið gjørt er fyri peningin. Kommununstýrið noktar at afturrinda tær nevndu 5000 kr., men átalar, at um teir verða frítiknir at rinda peningin aftur, vilja teir taka aftur við viðlíkahaldinum og fáa vegin í brúkuligan stand.

Málið er sent verkfrøðinginum til ummælis, og ætlanin var, at verkfrøðingurin og løgtingsskrivstovustjórin skuldu fara til Skálavíkar at granska málið og samráðast við kommununstýrið og vegmannin. Men stundir hava ikki verið til less undir tingsetuni.

So statt skal nevndin seta fram hetta

Uppskot:

Landsnevndin verður heimilað at samráðast við kommununstýrið og verkfrøðingin og avgreiða málið.

2. viðg. 30. nov. 3. viðg. 3. dec. Samtykt 19-0.

---

4. Vinstrukoyrsla í Vágum.

Frl. 26. okt. 1. viðg. 29. okt.

Alit (3. nov.):

Við skrivi 22. oktober 1943 hevur amtið lagt fyri tingið spurningin um at endurnýggja »Midlertidige Bestemmelser Nr. 56 af 21. December 1942 om Venstrekørsel paa Vaagø« til 31. december 1945. Landfútin og sýslumaðurin í Vágunum hava givið málinum viðmæli.

Havna- og veganevndin, sum hevur haft málið til umhugsunar, heldur seg til at mæla tinginum til at samtykkja ta tilskilaðu endurnýggjanina og setur fram soljóðandi

Uppskot

til

Midlertidige Bestemmelser

om Venstrekørsel paa Vågøy.

I Paragraf 2 i Kundgørelse Nr. 56 af 21. December 1942 om Venstrekørsel paa Vaagø ændres »1943« til »1945«.

Broytingaruppskot

frá Kr. Djurhuus o. fl.:

Í uppskoti nevndariinnar verður »1945« broytt til »1944«.

2. viðg. 6. nov. 3. viðg. 9. nov. Broytingaruppskotið samtykt 13—0. Nevndaruppskotið so broytt 16—0.

IX. HAVNIR o. a.

1. Umbøtan av bryggjuni í Miðvági.

1. viðg. 11. sept.

Álit (29. nov.):

Løgtingsverkfrøðingurin greiðir frá, í brævi av 6. mai í ár, at træbryggjan í Miðvági er fyri ein stóran part rotin, og at tað ikki er forsvarligt at steðga við umvøling, til brettska herdeildin er liðug við at brúka bryggjuna. Teir have longt bryggjuna inn eftir um 40 m, og hvílir hesin partur á stálrørum og stálbjálkum.

Spurningurin var fyri á tingi í 1937 (sí løgtingst. 1937 s. 156). Har^sæst at V. B. V.'s verkfrøðingur bevur úttalað, at umvølan fyre ella seinri má verða framd, og hann hevur gjørt uppskot og kostnaðarætlan um 40.000 kr. Í 1939 (sí tingtíð. 1939 s. 145) er talan um umvølan fyri 50.000 kr., og málið varð sent til ríkisstýrið samau við øðrum havnamálum og við umsókn um ríkisstuðning.

Í 1940 er spurningurin nevndur saman við øðrum havnamálmálum (ymisk havnamál), sí tingt. 1940 s. 107. Í 1941 er málið gloppið burturúr (tingt. 1941 s. 116), og tá ið tingið í fjør samtykti stuðningur til nógv havnamál, varð eingin stuðningur játtaður til hernevnda endamál.

Løgtingsverkfrøðingurin er forharmaður um, at hetta mál ikki varð tikið við í 10-áraætlanini, og mælir til, at málið nú aftur verður tikið til viðgerðar. Eitt uppskot er at finna í Føroyum, og hevur verkfrøðingurin við samtykt frá landsnevndini latið kavara rannsaka bryggjuna.

Útreiðslurnar, sum undan veraldarbardaganum vórðu mettar til 50.000 kr., vilja nú verða 150.000 kr.

Nevndin skal úttala:

Hetta mál hevur sína serstøðu, tí sambart § 2 í lóg 29. apríl 1914 um havnir hevur tingið ábyrgd fyri umsiting havnanna. Harumfram hevur verið skotið til, at henda havn ikki var tílaleys, tá ið kommunan tók hana. Tað kann ikki vænlast, at Miðvágur verður førur fyri at rinda eina so stóra umsiting, metta til 150.000 kr.

Her kann tingið neyvan koma uttanum at veita stuðning, og

mælir nevndin til at játta fyri 1944 kr. 30.000 og annars heimila landsnevndina at samráðast við sóknarstýrið um lántøku, tá verkfrøðingurin hevur gjørt nærri tekning og uppdrátt.

Uppskot:

1. Játtað verður í 1944 til umbøtan av bryggjuni í Miðvági 30.000 kr.
2. Landsnevndin verður heimilað at samráðast við kommunustýrið og at geva loyvi og taka ábyrgd fyri neyðturvuligum láni til nevnda endamál.

2. viðg. 30. nov. 3. viðg. 3. des. Samtykt 25—0.

---

2. Leingjan av bryggjuni í Vestmanna.

1. viðg. 18. sept.

Álit (29. nov.):

Havnastýrið fyri Vestmanna havn søkir um studning til leingjan av bryggjuni í Vestmanna. Bryggjan er 60 m., so bert eitt skip kann verða fermt ella avfermt ísenn. Er tað eitt farmaskip uppá 200 tons, kann einki annað far leggja til samstundis.

Havnakassin hevur kunna goldið allar rakstrarútreiðslur og harumframt betalt stóran part av skuld sínu. Á nýárum átti havnakassin løkan pening 11.000 kr., og skuldin var lækkað til 25.000 kr. Kommunustýrið gevur umsóknini sítt besta viðmæli.

Nevndin hevur haft samráð við umboðsmenn fyri havnina, og verkfrøðingurin hevur so gjørt uppskot og kostnaðarætlan, sum havnastýrið góðkennir. Hareftir verður bryggjan longd 10 m vestureftir, og haðani verður gjørd bryggja 40 m., sum verður í ein vinkul uppá 135° við gomlu bryggjuna. Dýpdin verður við nýggju bryggjuna 8 m við miðalvatn ella veruliga 9 m, tí sandur verður at beina burtur. Frá endanum av nýggju bryggjuni verður bygt eitt strekki móti landi, har eitt fiskiskip kann liggja. Longdin av nýggju bryggjuni verður soleiðis 10 plus 40 plus 20 = 70 m. Allir bryggjukantar eru ællaðir gjørdir av betonblokkum, men kunna eisini verða gjørdir av jarnbetonsøkkjukøssum, um tilfar verður at fáa. Kostnaðurin verður við núverandi prísum 530.000 kr.

Nevndin skal áttala, at tingið hevur fyrr fikið ta sløðu ikki at veita studning til víðkan av lein stóru havnunum, ið gjørdar vórðu við ríkisstudningi, og hildið hevur verið, at tær av rakstrinum sjálvar mega kunna rinda rentur og avdrátt av nýggjum lánum til víðkan.

Klakksvíkar kommuna hevur inni umsókn um studning til víðkan av havnini har, og eisini Vágur og Tvøroyri hava víðkanir í umbúna.

Tingið er sjálvsagt ikki bundið av nevndu ásetningum, men málið liggur í ár so, at tingið fyri 1944 má ætlast at hava úlreiðslur um 1 mill. kr. til vegir, havnir og lendingar eftir eldri samtyktum, og fíggjarnevndin hevur samtykt, at hægst kann verða nýtt 200.000 kr. til uýggjar umsóknir. Harav ganga 50.000 kr. til vegir, 30.000 kr. til uppískoyti til 10-ára ætlanina viðvíkjandi havnum, 30.000 kr. til Miðvágs havn og 90.000 kr. til smærri lendingar o. t.

So stutt er tað ikki gjørligt hjá nevndini at seta fram uppskot um studning til víðkan av Vestmanna havn.

Uppskot:

Eintak av álitinum verður sent Vestmanna kommunu.

2. viðg. 30. nov. 3. viðg. 3. dec. Samtykt 17—0.

---

3. Endurnýggjan av havnastudningum.

1. viðg. 23. sept.

A. Álit (29. nov.):

Tingið samtykti í fjor (sí løgtingst. 1942 s. 134) at veita studning kr. 3.418.250 í 10 ár til 16 ymiskar havnir.

Løgtingsverkfroðingurin hevur 4. sept. givið hesa frágreiðing í málinum:

„*1. Hvannasund, Kajanlæg, Overslag: Kr. 116.000*

Beliggenheden af den nye Havn er fastlagt, og der er foretaget Dybdemaalinger. I en Afstand af 40 m fra Land har man en Vanddybde paa 5,50 m (godt 17 Fod).

Arbejdet ventes paabegyndt til Foraaret.

2. Fuglefjord Kommune, Kajanlæg, Overslag: Kr. 475.000.

Der blev i Foraaret 1943 foretaget Dybdemaalinger paa forskellige Steder øst for S. P. Petersens Anlægsbro. Efter Forstanderska-

hets Ønske er Kajens Beliggenhed fastsat til Pladsen »Kirkjuryggi«, hvor Bundforholdene ikke er gode, idet Klippen sine Steder er dækket af indtil 4,5 m løse Aflejringer. Det maa forventes, at Byggeprisen i den Anledning vil blive forøget med mindst 50 %. Et fuldstændigt Projekt kan ikke udarbejdes, da der kræves Prøveramning med Beton- eller Træpæle. Det er foreløbigt paatænkt at bygge de første 20 m af Adgangsmolen. En 80 m lang Adgangsvej er under Bygning.

3. *Lervig Kommune, Dækmole og Baadehavn, Overslag: Kr. 390.000.*

Der er her foretaget Opmaaling og Bundundersøgelser samt skitseret en Dækmole for en Baadehavn. Bygninger af denne vil efter en foreløbig Beregning koste ca. Kr. 150.000, men saafremt Arbejdet udstrækkes over en Aarrække, vil der være Mulighed for at bringe Prisen ned.

Da Forstanderskabet ønskede at paabegynde Arbejdet i dette Aar, er der projekteret ca. 80 m Adgangsvej og den Del af Dækmolen, som skal forløbe paa lavt Vand. Molen opføres af Sten i Cementmørtel med Bølgeskærm og 4 m bred Kørebane med Vigepladser. Arbejdet paabegyndes 1. August.

4. *Gøte Kommune, Kajanlæg i Nordre Gøte, Overslag: Kr. 390.000.*

Det projekterede Anlæg bestaar af en 34 m lang Adgangsmole med 4 m bred Kørebane og Bølgeskærm, en Anlægskaj af Længde 30 m og Bredde 12 m for Enden af Molen og en Havneplads med Facade paa 32 m.

Projektet fra 1937 er fulgt, idet dog hele Anlægget er flyttet ca. 16 m mod Øst. Forstanderskabet besluttede at bygge Havnepladsen og 15 m af Molen i Aar for en forventet Udgift af ca. 100.000 Kr. Af de saaledes planlagte Arbejder, der paabegyndtes i første Halvdel af Juni Maaned, er der i Øjeblikket udført ca. 60 %. Arbejderne ventes afsluttet i Løbet af ca. 2 Maaneder.

5. *Nes Kommune, Baadeoptræk i Lamhauge, Overslag: Kr. 20.000.*

Baadeoptrækket i Lamhauge paabegyndtes i Begyndelsen i Juni Maaned. Der er nu udført henimod $^2/_3$ af Arbejdet, som ventes afsluttet i Oktober Maaned. En mindre Del af Arbejdet, nemlig Paastøbning af en Kant langs Platean'et nord for Optrækket maa dog vente til Foraaret.

6. *Nes Kommune, Anlægskaj ved Tofte Gjor, Overslag: Kr. 65.000.*

Det paa Grundlag af Dybdemaalinger og Bundundersøgelser projekterede Anlæg bestaar af en Anlægskaj med 22 m lang Facade, der ligger 6 m foran Enden af den gamle Bro, samt Havneplads indenfor Kajen. Foran Kajen bliver Vanddybden ca. 4,5.

Arbejder, hvoraf der i Øjeblikket er udført henimod $^{2}/_{3}$, paabegyndtes i Juli Maaned og ventes afsluttet om ca. 2 Maaneder.

7. Nes Kommune, Havneanlæg i Runavik, Overslag: Kr. 250.000.

Vandarealet ved Runavik er opmaalt, og der er skitseret forskellige Anlæg, som er blevet drøftet med Forstanderskabet, Beboere i Omraadet og Landsnævnet. Beboernes Ønsker gaar i Retning af et meget større Anlæg end forudsat i Bevillingen.

Et Forslag er under Udarbejdelse, der gaar ud paa at paabegynde et Anlæg, der i første Omgang — og nogenlunde inden for Bevillingens Rammer — vil skaffe Anlægsplads for mindre Skibe, og hvortil der senere kan føjes en Trafikkaj paa 7 m Vand.

8. Sjov Kommune, Kajanlæg, Overslag: Kr. 275.000.

Der er efter Anmodning fra Landsnævnet foretaget Dybdemaalinger saavel ved Strendur (Heyggstød) som ved Sjov.

Projekter er under Udarbejdelse.

9. Ejde Kommune, Dækmole, Overslag: Kr. 570.000.

Der er foretaget Opmaalinger og Bundundersøgelser og skitseret en Dækmole, der skal beskytte det vestlige Landingssted samt danne Indfatning for Baadehavn. Den største Del af Dækmolen vil komme til at ligge paa Vanddybder af indtil 6 m og skal antagelig bygges enten af Jernbetonkister eller svære Betonblokke. Det er derfor meget tvivlsomt, om Arbejdet kan udføres under de nuværende Forhold.

Dækmolen har Tilslutning til Land ved en Dækmur, der fører over et laviliggende Klippeplateau og støder til en slejl Kystbrink. Det blev besluttet at bygge denne Dækmur, som er 41 m lang og koster ca. 35.000 Kr. Arbejdet blev paabegyndt 1. Juli og ventes afsluttet i Løbet af et Par Maaneder. I Øjeblikket er der udført knapt $^{2}/_{3}$ af det planlagte Arbejde.

10. Thorshavn Kommune. Fundament for Dækmole. Tilskud 1 Mill. Kr.

Der er foreløbig planlagt Udførelse af undersøisk Fundament for en ca. 225 m lang Mole fra Gulaklett mod Øst. Der er udført forberedende Arbejder, der hovedsagelig bestaar i Aabning af et Stenbrud og Planering for en Transporthane til Udskibning af Sten til Molens Underbygning. Endvidere er der indkøbt Værktøj og Redskaber. Man underhandler om Køb af en Kompressor. Til Dato er der anvendt ca. 18.000 Kr.

11. Sandevaag Kommune, Anlægskaj, Overslag: Kr. 43.000.

Bevillingen er givet til en Betonmur, der skal danne Indfatning for en ca. 400 m² Havneplads. Paa Murens Forside bliver der en

Vanddybde af godt 4 m, og man faar her en god Anlægskaj med 22 m for større Fiskekuttere. Indenfor Muren opfyldes med Sten fra Uddybningen af Baadehavn, hvortil der er bevilget Tilskud for Tiden 1940/43.

Den omtalte Mur er færdigstøbt i disse Dage.

12. Sand Kommune, Udvidelse af Baadehavn. Overslag: Kr. 92.000, forhøjet til 101.120 Kr.

Af den projekterede Udvidelse af Baadehavn er der udført en Dækmur af Beton, og Udsprængningen af Baadebassinet er i god Gang.

13. Kvalbø Kommune, Kajanlæg: Býargarð, Nes og Sandvig, Overslag: 95.000 Kr.

Anlæggene ved Býargarð og Nes er stillet i Bero til næste Aar.

Kajanlægget i Sandvig paabegyndtes omkring 1. Juli, og der er nu udført ca. $^2/_3$ af Arbejdet, som ventes færdigt omkring 1. Oktober.

Kajanlægget bestaar af en Udvidelse og Forlængelse af den gamle Kaj. Den nye Kaj bliver ialt 40 m lang og 6 m bred. Vanddybden paa Forkanten bliver knapt 4 m.

14. Porkere Kommune, Kajanlæg, Overslag: 112.000 Kr.

Der er foretaget Opmaalinger i Bugten ved Porkere, og Projekt til Udvidelse af det eksisterende Kajanlæg er under Udarbejdelse.

15. Sumbø Kommune, Dækmole ved Vikarbyrgi, Overslag: 32.000 Kr.

Der er nu skilseret en Dækmole ved Vikarbyrgi, men Arbejdstegning er endnu ikke udarbejdet.

Arbejdet maa vente til Forsommeren.

16. Sumbø Kommune, Havneværker i Sumbø, Overslag: 300.000 Kr.

Terræn og Vandareal omkring »Pollen« er opmaalt.

Projekt til Havneværker er under Udarbejdelse.

En Dækmur til Beskyttelse af en Baadeplads er under Udarbejdelse.»

Nevndin vísir á frágreiðing verkfrøðingsins og mælir til, at tingið samtykkir, at leir studningar, sum vórðu samtyktir í fjør, skulu standa við makt.

Uppskot:

Teir studningar, sum tingið játtaði í fjor til ymisk havnamál, standa við makl.

2. viðg. 30. nov. 3. viðg. 3. dec. Samtykt 22—0.

B. Áltt (29. nov.):

Fuglafjarðar kommuna fekk í seinasta vanligu tingsetu játtað $^3/_4$ av 475.000 kr. hægst 356.250 kr. til bryggjubygging. Í umsókn 4. sept. í ár siga teir, at verkfrøðingurin nú hevur gjørt kostnaðarmetan, hareftir bryggjan við núverandi prísum kemur at kosta 700.000 kr. Kommunan søkir tí um at fáa studningin samsvarandi hækkaðan.

Løglingsverkfrøðingurin skrívar 14. sept.:

»Paa Grundlag af de i Foraaret 1943 foretagne Opmaalinger og Bundundersøgelser blev der skitseret to Anlæg, nemlig

1. Kajmur med Havneplads »úti á høvdanum«. Paa dette Sted findes der ren Klippebund. Det skitserede Anlæg bestod af en Kajindfatning paa 7 m Vand i en Afstand af ca. 20 m fra Kysten. Kajens Facade var fastsat til 40 m. Der fremkom saaledes en Havneplads paa mindst 800 m². Besejlingsforholdene er gode paa dette Sted. Afstanden fra S. P. Petersens Træbro er ca. 520 m.
2. Kajanlæg ved »Kyrkjuryggin«. Paa dette Sted er Bundforholdene ikke gode, idet Klippebunden i en Afstand af 10 m fra Land begynder at blive overlejret af løse Lag, antagelig stammende fra et gammelt Jordskred. 30 m fra Land gik Boret ned i en Dybde af 4,45 under Bunden, før det stødte paa fast Bund (Klippe eller Sten). Udefter har det løse Lag antagelig samme Tykkelse, selvom der kun er konstateret Tykkelser fra 3,35 til 4,10. Fra 30 m Punktet og indefter er Tykkelserne aftagende. Efter Forstanderskabets Ønske skitseredes for dette Sted en Adgangsmole af Længde 38 m med en Vinkelfløj med 7 m Vand paa Forkanten. Vinkelfløjens Længde blev fastsat til 40 m og dens Bredde til 12 m. Afstanden fra S. P. Petersens Træbro er ca. 200 m.

De to Forslag blev drøftet med Forstanderskabet under et Møde i Fuglefjord den 4. Juni 1943, hvor det blev meddelt, at Projekt 1 kunde bygges indenfor Bevillingen paa 175.000 Kr., medens Projekt 2 antagelig vilde koste 700.000 Kr. Vanskelighederne ved Projekt 2 blev udtrykkelig fremhævet, i Særdeleshed den bløde Bund. Overslaget maatte blive ganske skønsmæssigt, og Ingeniørkontoret kunde ikke paa kort Tid og med den forhaandenværende Mangel paa Hjælpemidler, f. Eks. Rambukke, projektere et forsvarligt Anlæg.

Forstanderskabet fastholdt imidlertid, at Kajen maatte ligge ved »Kyrkjuryggi«, og at den maatte bygges som en Vinkelkaj. Det blev anført, at Kajen burde ligge saa naer Byen som muligt, at Pladsen ved »Kyrkjuryggi« er det mest neutrale Sted paa Fjorden med Hensyn til Rendeso, og at Kajen burde bygges som Vinkelkaj (smlgn. Tveraa og Vaag) for at give Læ for mindre Baade.

Sagen blev forelagt Landsnævnet den 8. Juni. Causet de fra Ingeniørkontorets Side fremsatte Indvendinger blev der givet Forstanderskabet Tilladelse til at paabegynde Bygning af Kajen ved »Kyrkjuryggi«.«

Løgtingsskrivstovan hevur 23. juni skrivað til kommunustýrið:

»Fyri ordans skuld váttar løgtingsskrivstovan, at 8. h. m. hevði landsnevndin fund saman við mannum frá kommunstýrinum í Englafirði. Verkfrøðingurin var á fundi, og upplýsti, at havnin, sum var ætlað at kosta 475.000 kr., nú eftir nærri rannsókn mátti verða ætlað at kosta um 700.000 kr.

Samtykt varð, at landsnevndin kundi ikki geva lyfti um størri studning, enn játtað er, men at kommunustýrið kundi byrja at gera teir fyrstu 25 m. ætlaðir at kosta 100.000 kr., tó at kommunan má vera greið um, at hon er skyldug at gera arbeiðið liðugt, so har verður ein fullfíggjað havn samsvarandi uppskotið frá verkfrøðinginum.«

30. sept. hevur nevndin haft samráð við kommunustýrið, og verkfrøðingurin framlegði har 2 uppskot til bryggju við Kirkjurygg, annað ætlað at kosta 820.000 kr. og hitt 1.200.000 kr. Umboðsmenninir frá kommununi áttaðu at enda, at teir kunnu halda seg til uppskotið til 820.000 kr.

Lorvíkar kommuna sigur frá í brævi 25. sept., at bringarðurin har var ætlaður til 390.000 kr., men at verkfrøðingurin í juni áttaði, at kostnaðurin kom at verða meiri enn 500.000 kr. Kommunan søkir tí um eykastudning. Verkfrøðingurin sigur, at kostnaðurin verður størri enn ætlað, um bygt verður so langt út, sum kommunustýrið ynskir, men at hetta er longri enn roknað við, tá uppskotið í 1942 varð samtykt. Verkfrøðingurin hevur detailprojekterað veg til plássið, og eitt strekki av bringarðinum. Hetta arbeiðið er enn ikki liðugt.

Nes kommuna greiðir frá í brævi 29. sept., at játtað er til bryggju í Runavík 250.000 kr. Arbeiðið verður nú byrjað og gjørt sum lið í eini størri ætlan. Av tí at ansóknir eru komnar frá øðrum kommunum um eykastudningar, aftrat teim í fjør játtaðu studningum í 10-ára ætlanini, biður kommunustýrið um at fáa havnaverk í Runavík í sínni heild granskað og at fáa játtað $^3/_4$ av øllum úlreiðslum til tilfíkt verk.

Nevndin mælir til, at verkfrøðingurin granskar spurningin.

Til *havn á Sandi* varð í fjør játtaður studningur. Kommunustýrið søkir um studning til at gera pláss uppi á landi at sela bátar. Hetta var ikki likið við í projektinum. Teir siga tað vera biligast at gera arbeiðið nú, meðan úlspreingingin av havnabrunnunum er í arbeiði. Tað er roknað at kosta 14.000 kr. Umsóknin er ikki skrivað fyrrenn 29. sept. Har er talan um tvinni arbeiðir, ein drátt og ein vegstubba og harnæst eitt bátastøði.

Stýrið fyri Hvalbøar kommunu sigur frá í brævi 15. sept., at útreiðslurnar til *brimgarð í Sandvík* vilja verða nógv størri enn játtaði studningurin. Útreiðslurnar heldur kommunustýrið verða 100.000 kr., og roknað varð c. 65.000 kr. Tilfarið og formannsløn 40.000 kr. og arbeiðsløn 60—65.000 kr. Timalønin er 170 øyr. Í uppskotinum í fjør varð roknað við 149 øyr. Kommunustýrið biður um hjálp til rindan av útreiðslunum. Telegram kom 29. sept. frá kavarannum, at teim løyvaði 25 tons av cementi, sum kommunustýrið noktar at keypa, og at vandi er fyri, at alt verður oyðilagt, um arbeiðið steðgar. Verkfrøðingurin hevur 5. oktober sent hesa frágreiðing:

»Den 3. ds. konfererede jeg i Tverna med Medlem af Forstanderskabet i Kvalbø, Hr. Lærer M. Joensen om Forholdene ved ovennævnte Arbejde, hvorunder ogsaa Spørgsmaalet om Indkøb af yderligere 25 tons Cement til Fuldførelse af Anlægget.

Hr. Joensen oplyste, at der ved hans Afrejse fra Sandvig Dagen før manglede ca. $^1/_3$ af Dækket i selve Kajen samt den lave Bølgeskærm paa Kajens østlige Kant, endvidere Overfladebeton paa Havnepladsen vest for Kajen og Regulering af Overfladebeton paa en lidt højere liggende »Plan«. Disse Arbejder maa betragtes som nødvendige til Bevarelse af allerede udført Arbejde. Efter det oplyste kan man regne, at der til de nævnte Arbejder vil medgaa 10—12 tons Cement, hvilket Kvantum jeg paalagde Hr. Joensen at foranstalte indkøbt.

Der foreligger utvivlsomt en betydelig Overskridelse af Overslaget, der lød paa 66.000 Kr. En væsentlig Del af Overskridelsen skyldes, at der er udført mere Arbejde, end vist paa Tegningen, i hvert Fald følgende:

1. Kajens Overside er lagt ca. 1,85 m over Middelvande i Stedet for 1,40, saaledes som vist paa Tegningen.
2. Havnepladsen er forsynet med Indfatningsmur mod Søen og mod Baadeoptrækket og antagelig forhøjet, medens Tegningen kun angiver »Regulering« af denne Plads, d. v. s. Bortsprængning af høje Partier og Udfyldning med Sten og Cement af lave Partier.
3. Fremstilling af en »Plan« mellem Havnepladsen og Nøsterne.

De nævnte Ændringer, der er foretaget uden Samtykke herfra, er højst sandsynligt ikke helt uden Begrundelse. Det skal dog bemærkes, at den betydelige Forhøjelse af Kajmuren synes noget upaakrævet, da Kajen kun er beregnet for mindre Fartøjer. Forhøjelsen af Kajen har da aabenbart ogsaa straks fremkaldt Kravet om Fremstilling af Anlægsplads foran Havnepladsen til Brug for Maskinbaade, som kun ved Højvande kan benytte Kajen.

Naar Kajanlæget i nær Fremtid bliver endelig synet, vil der blive foretaget en nøjere Opmaaling og Bedømmelse af de foretagne Ekstrnarbejder.

Forstanderskabet er anmodet om at fremkomme med specificeret Regnskab snarest muligt efter Arbejdets Fuldførelse. En Gennemgang af dette vil antagelig kunne give yderligere Oplysning vedrørende Overskridelsen af Overslaget.

En særlig Bevilling til Merindkøb af Cement eller til Dækning af forøgede Anlægsudgifter maa formentlig vente til Anlægget er endelig synet og Regnskabet gennemgaaet.

Der foretages Indstilling om en større a Conto Udbetaling.«

Spurningurin um, hvussu hetta mál verður at greiða, má steðga, til verkfrøðingurin hevur sýnað arbeiðið, tá tað er liðugt, og rokuskapur verður innsendur.

Í 1942 samtykti tingið at veita studning til ymiskar havnagerðir — 16 í tali, barímillum frammanundan nevndu.

Tað var ein ásetningur fyri játtaninar, at tingið rindaði $^3/_4$ av kostnaðinum, men ongantíð uppum tær í samtyktini fyri hvørja kommunu sær tilætlaðu peningahæddir.

Í teim flestu førum lógu hvørki tekningar ella uppdráttir fyri tinginum, so peningahæddirnar vórðu settar eftir ætlanum løglingsverkfrøðingsins.

Tað er ikki gjørligt enn at siga, hvussu hesar játtanir koma at røkka, men tingið er sjálvandi interesserað í, at hesar stórfingnu havnagerðir koma at verða væl nýtiligar sum táttur í landsins uppbygging.

Nevndin meinar tí ikki í løtuni at duga at ætla til, um og hvussu mikið í hvørjum einstakum føri vil tørva í eykastudningi og mælir til at viðgera málið, tá tekningar og uppdráttir liggja fyri tinginum.

Tað skal viðmerkjast, at eftir løglingsfóindi var Fuglafjarðar havn í 1939 roknað av løglingsverkfrøðinginum H. Foosdal at kosta 190.000 kr., men í brævi til Fuglafjarðar arbeiðsmannafelag 29. des. 1939 skrivar Foosdal um 200.000 kr. Tað kann tí tykjast at vera komin misskiljing í grundarlagið. Hetta kann nærri greiðast, tá verkfrøðingurin Foosdal kemur heimaflur, og spurningurin um av hesi orsøk at hækka studningin til Fuglafjarðar havn verður tá tikin upp.

Til hesi endamáls frama mælir nevndin tinginum til at leggja kr. 30.000 av árliga sum uppískoyti til 10 áraætlanina.

Viðvíkjandi Sands havn hevur figgjarnevndin samtykt at mæla til at játta 5.000 kr. til dráttin, og hetta uppskot setir tí nevndin fram; tó mælir J. P. Davidsen til at játta 14.000 kr. til drátt og hátastøði.

Uppskot:

Øll nevndin;

1) 30.000 kr. verða árliga lagdar av sum uppískoyti til 10-áro ætlanina fyri havnabygging.

2) Avskrift av álitinum verður send umsokjandi kommunum.

3) *Frá nevndini* (undantikið J. P. Davidsen og R. Rasmussen):

Av teim undir 1 nevndu peningum verða játtaðar upp til 5.000 kr. til báladrátt og vegslubba við Sands havn.

4) *Frá J. P. Davidsen og R. Rasmussen:*

Av teim undir 1 nevndu peningum verða játtaðar upp til 14.000 kr. til báladrátt og vegslubba og bátastøði.

2. viðg. 30. nov. 3. viðg. 3. dec. Uppskot frá nevndini samtykt 21—0, pt. 4 14—0, pt. 3 soleiðis burturdottið.

---

4. Eftirlit við havnum.

Allt (29. sept.):

Løgtingsverkfrøðingurin hevur sent soljóðandi frágreiðing av 2. september:

„*1. Klaksvig Havn.*

Der er foretaget Reparationer af Brolægning, og en Lukning af den ved Bombeangrebet i 1941 frembragte Aabning er paatænkt.

2. Vestmanhavn Havn.

Tilstanden er som ved sidste Indberetning.

Havnebestyrelsen har fremsat Ønske om Projektering af en Forlængelse af Kajen med 60 m mod Vest.

3. Kvivig Dækmole.

Dækmolen er i god Stand. Træværket paa Indersiden af Molen er ret defekt.

Uddybning af Bassinet er paabegyndt og fremmet saaledes, at $^2/_3$ af Arbejdet kan betragtes som udført.

4. *Midvaag Havn.*

Anlægskajen paa Molens Inderside er i meget daarlig Stand. Det maa betragtes som nødvendigt at foretage en Ombygning snarest muligt.

5. *Sørvaag Havn.*

Kajen er overfladisk beskadiget af den senere Tids særlige Trafik.

6. *Skopen Havn.*

Tilstanden er som ved sidste Indberetning.

7. *Hove Havn.*

Tilstanden er som ved sidste Indberetning.

8. *Trangisvaag Havn.*

Havnen er i god Stand. Der kommer stadig ubetydelige Sætninger i Brolægningen.

9. *Vaag Havn.*

Havnen er i god Stand.«

Viðvíkjandi Vestmanna havn skrivaði verkfrøðingurin fjør:

»Friholdeværket er stærkt beskadiget og slidt af Marinefartøjer. Reparation kan ikke foretages foreløbig, da nødvendige Materialer ikke kan skaffes.«

Viðvíkjandi Skopun havn varð í fjør upplýst:

»Bolværket trænger til Fornyelse paa forskellige Steder. Hejsebroen over den inderste Dam er svag. Der er intet foretaget for at udbedre disse Fejl siden sidste Aar, ligesom der heller ikke er foretaget nogen Uddybning.«

Um Hovi havn skrivaði verkfrøðingurin í fjør:

»Havnen er i forsvarlig Stand. Det paatænkes at opføre en Dæmning nordefter ved Bassinets østre Ende. Den i Fjor bevilgede Uddybning m. v. er ikke udført.«

Nevndin setur fram hetta

Uppskot:

Havnastýrini verða gjørd kunnug við tey brek, sum verkfrøðingurin hevur ávísl, og álagt verður teimum so vítt gjørligt at bøla um brekini.

Broytingaruppskot (21. okt.)

frá A. Samuelsen o. fl.:

Aftarat nevndaruppskotinum verður sett aflaná punktum:

Eru brekini ikki bøtt 1. september 1944 skal avvarandi kommunustýri skrivliga gera løgtinginum kunnigt, hví umbølingin er ógjørd.

2. viðg. 13. okt. 3. viðg. 22. okt. og 29. okt. Broytingaruppskotið fall 11—0. Nevndaruppskot samtykt 17—0.

---

5. Eykahavuainntøkur.

1. viðg. 23. sept.

A. Álit (3. dec):

Reiðarir á Tvøroyri greiða frá, at Trongisvág havn krevur 10 oyru pr. lstrl., ið skip selja fisk fyri, umframt stóran pening, skipini annars betala til havnina. Teir siga, at hetta er stór byrða fyri fiskivinnuna, bæði fyri reiðarar og fiskimenn, sum í seinastu atløgn koma at bera sín part. Teir halda tað vera órættvíst at krevja hesi gjøld, tí fiskaprísirnir í Bretlandi hava verið lækkandi, og gjaldið verður kravt, sjálvt um túrurin hevur givið undirskot. Teir halda tað vera óneyðugt fyri raksturin av havnini at hava hetta gjald og søkja um at fáa tað strikað.

Teir søkja eisini um at fáa strikað tær reglur í havnareglugerðunum um, at vørugjald verður at greiða av ferskfiski, sum er keyptur í Íslandi, bert skip kemur inn á heimstaðshavn á veg til Bretlands.

Stýrið fyri Froðbiar kommunu, sum hevur havt málið til ummælis, hevur samtykt at beina málið í havnanevndina, ið úttalar, at hon ikki kann mæla til at broyta reglurnar, og sóknarstýrið gevur havnanevndini viðhald.

Rokskapurin fyri Trongisvág havn	
fyri 1942 byrjar við beholdningi	kr. 34.035,37
og endar við beholdningi	kr. 27.821,37
	kr. 6.214,00

Tá er 16 goldið avdráttur uppá lán ca. 2.000 kr. burtursæð frá ísvirkislánunum kr. 3.700 til Skarnkai (lending) og 1.400 kr. til veg í Øravík til lending. Av inntøkunt eru ikki inngingnar 3.000 kr. frá ísvirkinum. Tað er tí verunliga ikki rakstrarundirskot fyri 1942. Í tí árinum var einki gjald pr. lstrl.

Eftir bráfengis ásetingum nr. 60, 23 december 1942 kann kommunustýrið har vanligu inntøkurnar svikja til havnakassan, ársakað av veraldarbardaganum, við góðkennan av amtmanninum eftir ummæli landsnevndarinnar í inntil 2 ár samtykkja, at hvørt skip skal rinda til havnakassan hægst 10 oyr. pr. sterlingpund, ið skipið sedur ferskfisk fyri. Hetta gjald verður at greiða bert fyri fyrstu 4 laudingar hjá skipum í einum ári.

15. november 1941 kom í gildi regla um, at vørugjald fyri ísfisk verður at gjalda, tá skip kemur í heimstaðshavn við ísfiski, sjálvt um fiskurin ikki verður uppskipaður.

Nevndin undantikið J. P. Davidsen mælir til, at reglan um vørugjald av ísfiski fyri skip, ið kemur til heimstaðshavn, sjálvt um fiskurin ikki verður uppskipaður, verður strikað av tí, at hon førir til inkonsekvent úrslit, harvið at skip ikki skal betala, tá tað fer til aðra havn enn heimstaðshavnina, eins og tað hevur vist seg trupult hjá havnastýrum at praktisera regluna, og á nøkrum plássum verður hon ikki nýtt.

Minnilutin (J. P. Davidsen) mælir til at broyta reglina so, at gjaldið verður at rinda, sjálvt um skipið fer til aðra havn í Føroyum ella ikki fer inn í Føroyum.

Fyri fylgjandi havnir er ásett gjald 10 oyr. pr. lstrl. seldan fisk í Klakksvík, Fuglafjørð, Trongisvág og Vág, men ikki fyri Miðvág, Sørvág, Vestmanna og Tórshavn. Kongshavn søkir um 5 oyr. pr. lstrl.

Øll nevndin er samd um at mæla til at broyta reglurnar um, at gjaldið bert er fyri fisk, seldan til Bretlands, so tær undfala fisk seldan eisini til onnur lond.

Meirilutin (Kjølbro, Poul Petersen, R. Rasmussen og S. Ellefsen) úttalar: Heruntalaða eykagjald er lagt á fiskivinnunni, meiri enn 1.000 kr. árliga pr. skip, har lógin er sett í gildi. Bæði reiðarar og fiskimenn betala hetta. Fiskimenn bera sín part, tí reiðarin hevur rætt at draga frá gjaldið við uppgerð við fiskimannin. Gjaldið verður eisini goldið, tá túrurin gevur undirskot.

Meirilutin skal mæla til at broyta lógina so, at gjaldið beri verður kravt fyri 1 ár ikki fyri 2 ár. Tá ein havn hevur fingið hesar inntøkur 1 ár, skal spurningurin verða tikin upp aftur til umhugsunar, um tað er neyðugt at krevja fyri 1 ár aftral.

Minnilutin (J. P. Davidsen, A. Samuelsen og J. Poulsen) vilja ikki broyta lógina; tó vil J. P. Davidsen mæla til, at ásett verður, at allar havnir, sum hava havnareglugerð, skulu uppkrevja gjaldið.

Uppskot:

1. 1) *Frá allari nevndini undantikið Davidsen:*

Tingið góðkennir, at í havnareglugerðunum verður við gildi frá 1. januar 1944 at strika hesum viðmerkingum viðvíkjandi vørugjaldið fyri fisk: »Afgiften skal erlægges, naar Skib anløber Hjemsteds Havn med Isfisk, selvom Omlastning ikke finder Sted.«

2) *Frá minnilutanum (J. P. Davidsen):*

Midlertidige Bestemmelser for Færøerne om Fiskeafgift.

Ethvert Skib, som ikke i Forvejen ifølge gældende Lovgivning har betalt Vareafgift paa Færøerne af Fiskelast, skal til Hjemstedets Havnekasse betale 25 Øre pr. 100 kg.

II. *Ændring i midlertidige Bestemmelser for Færøerne om ekstraordinære Havneindtægter.*

1. *Øll nevndin:*

Med Gyldighed fra 1. Januar 1944 ændres i § 1 Ordene »som Fartøjet maatte have solgt Ferskfisk for i Storbritannien« til »som Fartøjet maatte have solgt Ferskfisk eller Sild for i Storbritannien eller andet Land udenfor Færøerne. Sælges Fangsten i anden Møntenhed end Sterling, omregnes den til Sterlingpund.«

2. *Fra meirilutanum (Kjølbro, Ellefsen, P. Petersen og R. Rasmussen:*

Den i Kundgørelse Nr. 60 af 23. December 1942 omhandlede Afgift kan ikke opkræves for mere end 1 Aar, beregnet fra det Tidspunkt, Afgiften er indført og højst for 4 Ture for vedkommende Farløj, medmindre den kommunale Bestyrelse indstiller, at Afgiften yderligere bliver at opkræve eet Aar, og Amt og Landsnevndin godkender Beslutningen under Hensyn til Havneindlægternes Svigten og Nødvendigheden af de omhandlede ekstraordinære Indlægter til Havnens Drift.

3. *Frá minnilutanum (J. P. Davidsen):*

a) Ændring í midlertidige Bestemmelser for Færøerne om ekstraordinære Havneindtægter.
Den i midlertidige Bestemmelser for Færøerne om ekstraordinære Havneindtægter omhandlede Afgift skal for 1944 svares til alle Havnekasser paa Færøerne.

b) Spørgsmaalet om Fornyelse af Afgiften for 1945 forelægges Tingel i dels ordinære Samling i 1944.

2. viðg. 4. dec. og 3. viðg. 7. dec. Uppskot I 1 samtykt 20—0, I 2 fall 5—0, II 1 samtykt 25—0, II 2 samtykt 13—0, II 3 fall 5—0.

B. Álit (Poulsen og A. Samuelsen við fyrivarni):

Útgerðarmaður Jacob Haraldsen, Fuglafirði, hevur í brævi 9. oktober vent sær til tingið og greitt frá, at amtmaðurin við kunngerð 22. sept. hevur sett lóg nr. 60, 23. dec. 1942 í gildi fyri Fuglafjarðar havn frá 1. januar 1943 at rokna, hareftir 10 oyr. pr. pd. strl. seldan ísfisk verða løgd á skipini í Fuglafirði til havnina. Henda útløga, sigur hann, má verða tikin við til uppgerð av hvørjum túri til avrokning av manningini. Allir túrar hjá hansara skipum eru uppgjørdir, uttan at henda útreiðsla er tikin við.

Hann kann tí ikki góðvilliga ganga við til at rinda 10 oyr. pr. pd. strl. frammanundan tí degi, lýsingin er framkomin. Hann biður løgtingið taka sær av málinum og fáa tað í rættlag.

Amtmaðurin úttalar, at hann hevur sett reglurnar í gildi fyri Fuglafjarðar havn samsvarandi samtykt Landsnevndarinnar, uten at tað annars er rætturin, ið má avgera, um tað er lógligt, at reglurnar eru settar í gildi frá 1. januar 1943.

S. P. Petersens Eftf. hevur í brævi til amtmannin 26. okt. flutt fram, at Fuglafjørður hevur onga kommunala bryggju ella annað virki, at útreiðslurnar hjá havnini tí eru smáar, og at inntøkurnar undan heimsbardaganum vóru 1.200 kr. til 2.500 kr. árliga. Seinnsta ár fullu tær tó til 300 kr. Um ætlanin við lógini tí er at vissa havnini vanligar inntøkur, kann bert talan vera um 2.000 kr. Tað er tí órímiligt at leggja 10 oyr. pr. lstrl., ið gevur 13.000 kr. fyri eitt ár. Skipini hava nú lítla ella onga vinning. Teir hava avroknað við fiskimennirnar og mæla tí til, at lógin ikki verður nýtt til meir enn at vissa havnini vanligar inntøkur.

Teir peika eisini á, at lógin bert er galdandi fyri skip, sum selja fisk til Bretlands, men ikki fyri skip, sum selja til onnur lond. Skip hava sett veiðu í Íslandi við góðari vinning.

Nevndin skal upplýsa, at amtmaðurin hevur sett lógina í gildi fyri Trongisvág havn 3. mars frá 1. mars at rokna, fyri Vág havn 18. mai frá 1. januar at rokna, fyri Klakksvíkur havn 1. juni frá 1. januar at rokna og fyri Fuglafjarðar havn 22. september frá 1. januar at rokna, alt eftir samtykt av kommunustýrunum og landsnevndini.

Miðvág hevur ikki yuskt reglurnar settar í gildi, og Sørvág, Vestmanna og Tórshavnar hevu hava ikki sett nakað yuski fram um at fáa reglurnar í gildi har.

Amtmaðurin úttalar, at tað mugu vera dómstólarnir, ið gera av, um reglurnar lógliga eru settar í gildi fyri Fuglafjørð 22. septemb. í ár frá 1. januar í ár at rokna.

Nevndin heldur tað sama, men úttalar, at tað má haldast nógv ov seint at seta lógina í gildi við virkan frá næstan 9 mánaðum frammanundan, og beinari hevði verið at krevja gjaldið frá 1. januar 1944, hvat nevndin mælir havnastýrinum at gera.

Uppskot:

Eintak av álitinum verður sent umsøkjarunum og kommunustýrinum.

Samtykt 18—0.

---

6. Kríggsskaði - Klakksvíkar havn.

Frl. 11. sept.

Álit (29. nov.):

Stýrið fyri Klakksvíkar kommunu søkir um størri studning til bøtan av kríggsskaða, jø bryggjan fekk næstseinasta heysf.

Málið hevur fyrr verið á tingi. Í 1941 (sí tingtíðindi, síðu 119) samtykti tingið at geva kommununi loyvi at taka lán 10.000 kr. til bráðfengis umvølan av skaðanum. Verkfroðingurin hevði mett, at ein líkk bráðfengis umvølan vildi kosta 10.000 kr. Landsnevndin varð heimlað um neyðugt at taka ábyrgd fyri lánunum.

Í 1942 varð upplýst, at útreiðslurnar koma at verða størri enn 10.000 kr. Tingið samtykti tá (sí tingtíðindi síðu 135) at játta studning 10.000 kr. av tí, sum varð játtað til skaðabøtur og at geva loyvi til lán inntil 10.000 kr.

Í umsóknini 6. september í ár sigur sóknarstýrið, at tað vil seinri senda nærri frágreiðing. 1. oktober hevur logtingsskrivstovan biðið stýrið senda líkka frágreiðing. 13. oktober svarar stýrið, at útreiðslurnar koma at verða um 50.000 kr., og teir vóna munagóðan studning.

Nevndin mælir til at fáa til vegar nærri frágreiðing frá logtingsverkfroðinginum, tá arbeiðið er liðugt og sýnað av honum, og tingið ella landsnevndin av skaðabótajáttanini kann tá taka spurningin upp um møguliga hækkan av studninginum.

Uppskot:

Eintak av álitinum verður sent kommunustýrinum í Klakksvík.

2. viðg. 30. nov. 3. viðg. 2. dec. Samtykt 18—0.

---

7. Havnatakstir í Fuglafirði.

Frl. 13. sept.

Álit (19. okt.):

Fuglafjarðar kommuna søkir um at fáa havnatakstirnar broyttar, so at havnagjaldið verður hækkað frá 5 oyru til 15 oyru pr. ton, og at gjaldið fyri vetralegu verður hækkað av skipum yvir 15 tons frá 12 kr. til 100 kr., og av motorbátum undir 15 tons frá 5 kr. til 25 kr.

Nevndin heldur, at tað er beint at hækka hesi gjøld, av tí at tey eru lægri enn í fleiri øðrum havnum, og tí Fuglafjarðar havnakassa tørvar størri inntøkur, nú kommunan er byrjað at byggja eina bryggju, hartil kommunan skal rinda nógvan pening.

Tó at havnagjaldið t. d. í Vestmanna ikki er meir enn 10 oyru pr. ton, skal nevndin mæla til at hækka gjaldið í Fuglafirði til 15 oyru pr. ton, sum kommunustýrið ynskir. Her kann nevnast, at gjaldið í Klakksvík er 15 oyru pr. ton.

Viðvíkjandi gjaldi fyri vetralegu er at siga, at í Klakksvík eigur havnin skipsfestini, hvat ikki er í Fuglafirði. Í Klakksvík verður goldið fyri skip, sum hava vetralegu har, 300 kr. um árið og harumframt 50 oyru pr. ton og fyri motorbátar 80 kr. fyri vetralegu og harumframt 5 kr. um árið, tá bátarin liggur við festi, ið havnin eigur, og annars 10 kr. um árið.

Í t. d. Vestmanna verður goldið fyri vetralegu 12 kr. um árið fyri bátar og 48 kr. fyri skip.

Nevndin heldur, at tað verður ov nógv at hækka hetta gjald frá 12 kr. til 100 kr. og fyri bátar frá 5 til 25 kr., og skal mæla til, at

gjaldið verður hækkað fyri skip til 48 kr. og fyri bátar til 12 kr. um árið.

Uppskot:

Tingið mælir til, at í kunngerð um havnareglugerð fyri Fuglafjørð verður broytt

1) í § 2, fyrsta petti »5« til »15«,
2) í § 2, fjórða petti »12« til »48« og »5« til »12«.

2. viðg. 22. okt. 3. viðg. 26. okt. Samtykt 16—0.

10. Ymisk lógmál.

1. Lóg um rúsdrekka.

1. viðgerð 15. sept.

Álit (4. dec.):

Havnar Framburðsfelag hevur í riti av 11. september 1943 biðið tingið tikið upp spurningin um einkarsølu við rúsdrekka.

Sambart galdandi reglur skal lógin um rúsdrekka koma til viðgerðar í ár.

Avhaldsfeløgini hava sent mótmæli til tingið móti einkarsølu við rúsdrekka.

Nevndin, ið hevur haft málið til viðgerðar, hevur býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Rikard Long, Johs. Slettenæs og J. P. Henriksen) heldur fram, at sum rúsdrekkaviðurskiftini liggja fyri, er tað hart átroðkandi, at lógin verður broytt, so rúsdrekkingin verður minkað manna millum. Núgaldandi rúsdrekkalóg var at byrja við til stóran bata. Men nú, tá ið fólkið er vant við skrivliga bílegging, er rúsdrekkanýtslan vorðin so út av lagi stór og skaðilig, at okkara land og fólk ikki tolir hetta óskil longur.

Meirilutin heldur, at beinleiðis bann móti rúsdrekkanýtslu ikki ber til, tá ið smoghandil alla staðni, har rúsdrekkabann er royndt, hevur vístseg at farið fram í stórum. Hin frægasta skipan, ið meirilutin dugur at finna viðvíkjandi minkan av rúsdrekkamongdini, er einkarsøla við øllum rúsdrekka. Við eini tilíkari fer landið í hendi hin størsta møguleika til eftirans og fyribyrgjan av øllum misbrúki av rúsdrekkanum. Bara tað, at sølan kemur at liggja á einum stað, vil hjálpa til at verða greiður yvir, um maður hevur fingið rúsdrekka á óregluligan hátt. Kann maður ikki fáa av einkarsølunni váttað, at rúsdrekka, hann hevur notið, er keypt frá, er avgjørt, at hann hevur fingið rúsdrekka óregluliga. Við strangari skamtan og strangari reglugerð fyri søluna av rúsdrekka kann einkarsølan minka rúsdrekkingina hjá teim einstøku eins og samtøkum og drikkiløgum munandi.

Meirilutin meinar tó, at sum liðirnar eru og Føroyar eru hersettar, er ikki ráðiligt í ár at taka einkarsølu við rúsdrekka.

Minnilutin (A. Samuelsen og Johan Poulsen) flytur fram:

Sambandspartiets Medlemmer af Udvalget kan ikke slutte sig til Flertallets Betragtninger vedrørende Etablering af Handel med Spiritus her paa Øerne, selv om denne Handel monopoliseres Lagtinget. Den nugældende Lovgivning paa dette Omraade har i sin Tid udryddet al Handel med Spiritus paa vore Øer og denne Ordning er godkendt ved Folkeafstemning omtrent enstemmig. Dette vil til enhver Tid tjene Færøerne til Ære. Og det bør heller ikke glemmes, at de i sin Tid værende Bevillingshavere bøjede sig for den trufne Ordning uden at prøve deres Ret ved Domstolene til Trods for, at der fratoges dem en livsvarig Bevillingsret uden Erstatning.

Hvis den nuværende Lovgivning skulde afløses ved, at man indførte en ny Lovgivning, som gik andre Veje, kunde Mindretallet tænke sig at overveje, om man ikke burde gaa over til Forbudslovgivning. Men da hele Udvalget, som en midlertidig Foranstaltning, kan gaa ind paa i den gældende Lov at indføre Ændringer, som maa anses for Forbedringer, gaar Mindretallet uden Betænkning med dertil.

Øll nevndin er samd um fyribils at broyta galdandi lóg soleiðis, at tað verður torførari hjá fólki, serliga ungfólki, at fáa rúsdrekka. Skotið verður uppá, at eingin undir 20 ár skal fáa loyvi til at keypa rúsdrekka, og at einstakur ikki skal kunna keypa meiri enn 10 litir um fjórðingsárið og haraftrat 10 litir av vini um árið. Rætturin til keyp av øli verður óbroyttur.

Til brúdleyps, umboðingur (repræsentatión) o. t. krevst sjálvandi meiri enn nevnda skamtan, og setur tí nevndin fram uppskot um at heimila amtið eftir ummæli og tilráðing frá sóknarstýrinum (í Havn býráðnum) at gera undantak frá lógini í vissum føri.

Uppskot

til

Midlertidige Bestemmelser for Færøerne

om Ændringer i Lov for Færøerne Nr. 115 af 4. April 1928

om Forbud mod at drive Erhverv med berusende Drikke m. m.,

som ændret ved Lov af 27. Marts 1934.

§ 1.

I § 2, fjerde og sidste Stykke, ændres »18 Aar« til »20 Aar«.

§ 2.

Som nyt Stykke føjes til § 2:

Ingen Person maa bortset fra Øl indforskrive større Kvanta berusende Drikke end højst 10 Liter i hvert Fjerdingaar samt yder-

ligere højst 10 Liter Vin for hvert Aar. Undtaget fra denne Regel er Indforskrivning af Altervin og Spiritus til Apotek og Sygehuse samt de autoriserede Forhandleres Indforskrivning af denatureret Sprit. Amtet kan dog i særlige Tilfælde efter Indstilling og Erklæring fra vedkommende Forstanderskaber (i Thorshavn Byrandet) give Dispensation fra disse Bestemmelser.

§ 3.

Disse Bestemmelser træder i Kraft 1. Januar 1944 og bliver at forelægge til Gennemsyn for Lagtinget i Samlingen for 1944.

Broytingaruppskot

frá nevndini:

Lógaruppskotið skal hava hetta innihald:

Midlertidige Bestemmelser for Færøerne

om Ændringer i Lov for Færøerne Nr. 115 af 4. April 1928

om Forbud mod at drive Erhverv med berusende Drikke m. m.,

jfr. Lov Nr. 98 af 27. Marts 1934.

I Lov Nr. 115 af 4. April 1928 om Forbud mod at drive Erhverv med berusende Drikke m. m., jfr. Lov Nr. 98 af 27. Marts 1934, foretages følgende Ændringer:

§ 1.

I Lovens § 2, 3die og 4de Stykke, ændres »18 Aar« til »20 Aar«.

§ 2.

Efter Lovens § 2 indføjes som ny § 2 a:

»Ingén maa indenfor hvert Kvartal indforskrive mere end 9 Liter Spirituosa (Sprit). Af samlevende Ægtefæller maa kun den ene indforskrive Spirituosa (Sprit). Amtet kan i særlige Tilfælde, normalt efter indhentet Erklæring fra Kommunalbestyrelsen, meddele Tilladelse til større Indførsel.

De i nærværende Paragraf fastsatte Begrænsninger i Adgangen til Indførsel gælder ikke for Indførsel af andre berusende Drikke end Spirituosa (Sprit) og heller ikke for Indførsel af Sprit til Apoteket, Sygehusene og Færøernes offentlige Vareforsyning.

De nærmere Regler om Gennemførelse og Kontrol med Overholdelsen af foranstaaende Bestemmelser fastsættes af Amtet.

§ 3.

Nærværende Bestemmelser træder i Kraft den 1. Januar 1944 og bliver at forelægge til Gennemsyn for Lagtinget i Samlingen 1944.

2. viðg. 6. dec. 3. viðg. 7. dec. Broytingaruppskotið samtykt 13—2.

---

2. Inntøkumark fyri sjúkrakassalimir.

1. viðg. 13. sept.

Álit (4. dec.):

Sambart løgtingssamtykt í seinasta vanligu tingsetu (løgtingstíðindi 1942, bls. 140) hevur løgtingsskrivstovustjórin við skrivi, t. 30. juli 1943 til amtið skotið uppá, at kunngerð nr. 59 av 22. december 1942 verður endurnýggjað fyri eitt ár frá 1. april 1944 til 31. mars 1945.

Centralforeningen af Sygekasser paa Færøerne og amtið hava givið málinum viðmæli.

Undirskrivaða nevnd, sum hevur haft málið til umhugsunar, mælir til, at nevnda kunngerð verður endurnýggjað fyri omanfyri nevnda tíðarskeið, og setur fram soljóðandi

Uppskot:

A. Bekendtgørelse for Færøerne til Vejledning om de Indtægts- og Formueforhold samt øvrige Omstændigheder, der som Regel betinger en Persons Optagelse eller Forbliven i en anerkendt Sygekasse som nydende Medlem med Ret til gennem denne at nyde Tilskud fra Staten.
For Tiden fra 1. April 1944 til 31. Marts 1945 skal være gældende de i Bekendtgørelse Nr. 10 af 14. Marts 1941 fastsatte Regler, dog med følgende Ændringer:

1.

Bekendtgørelsens Stk. 2 affattes saaledes:

Som ubemidlede i Anordningens Forstand vil saadanne Personer være at anse, hvis årlige Indtægt ikke overstiger nedennævnte Grænser:

a) I Tórshavn, Klaksvík, Froðbiar Sogn og Vágur 5.700 Kr.
b) Den øvrige Del af Færøerne . . . . . 5.000 —

2.

I Bekendtgørelsens Stk. 4 ændres »250 Kr.« til »350 Kr.«.

B. Málið verður tikið uppaftur til viðgerðar næsta ár.

Broytingaruppskot

frá Dam og Henriksen:

Í »Bekendtgørelsens Stk. 2« verður undir a sett »kr. 8840« í staðin fyri »kr. 5700« og í staðin fyri »kr. 5000« undir punkt b verður sett »kr. 7280«.

Broytingaruppskot

frá R. Rasmussen o. fl.:

§ 1.

affattes saaledes:

Som ubemidlede i Anordningens Forstand vil saadanne Personer være at anse, hvis aarlige Indtægt ikke overstiger Kr. 5700.

2. viðv. 6. dec. 3. viðg. 7. dec. Broytingaruppskot Dams fall 7—0. Broytingaruppskot Rasmussens samtykt 25—0. Nevndaruppskotlið so broytt 22—0.

---

3. Endurgjald til sjómenn fyri mist klæðir.

1. viðg. 13. sept.

Álit (20. nov. Djurhuus og Olsen óheftir):

Kunngerð nr. 49 av 10 nov. 1941 um broytan í »Bekendtgørelse Nr. 451 af 30 Nov. 1923« um endurgjald til sjómenn fyri ognarlutir, ið teir missu, tá ið skip gongur burtur, sum broytt við kunngerð nr.

18. av 11. juni 1913, fer úr gildi á nýggjári í ár. Nevndin hevur viðgjørt málið og er samsint at mæla til, at kunngerðin verður sett í gildi fyri árið 1944 við tí broyting, at skiparar eisini koma undir lógina, og at ymist endurgjald verður sett fyri skiparar, stýrimenn og maskinmeistarar, og almenna manning.

Nevndin setir fram hetta

Uppskot

til

kunngerð fyri Føroyar

um broytan í kunngerð nr. 451 av 30. november 1923

um endurgjald til sjómenn fyri ognarlutir, ið teir missa

við burturgingnum skipi.

§ 1.

Í § 1 gongur út »Skibsføreren dog undtaget«.

§ 2.

Í § 2 verður skrá um endurgjald broytt soleiðis:

		Í strandarsigling	Í Europasigling	Í sigling utanf. Europa
A.	Skiparar	1.000 kr.	1.500 kr.	1.800 kr.
B.	Stýrimenn og maskinmeistarar	900 kr.	1.200 kr.	1.400 kr.
C.	Hin manningin og annað undirgivið fólk	800 kr.	900 kr.	1.000 kr.

§ 3.

Kunngerðin kemur í gildi 1. januar 1944 og stendur í gildi til 31. desember 1944.

Forslag

til

Bekendtgørelse for Færøerne

om Ændring i Bekendtgørelse Nr. 451 af 30. November 1923

om Erstatning til Sømænd for Tab af Ejendele foraarsaget ved Forlis.

§ 1.

I § 1 udgaar »Skibsføreren dog undtaget.«

§ 2.

I § 2 ændres Fortegnelsen over Erstatning saaledes:

	I Kystfart	I europæisk Fart	Udenfor europæisk Fart
A. Skibsførere	1.000 Kr.	1.500 Kr.	1.800 Kr.
B. Styrmænd og Maskinmestre	900 Kr.	1.200 Kr.	1.400 Kr.
C. Det øvrige Skibsmandskab og andet underordnet Personale	800 kr.	900 Kr.	1.000 Kr.

§ 3.

Bestemmelsen træder i Kraft 1. Januar 1944 og er gældende indtil 31. December 1944.

Minnilutaálit

frá Djurhuus og J. C. Olsen:

Undertegnede *Mindretal:* K. Djurhuus og Jens Chr. Olsen skal udtale:

I Lagtingssamlingen 1941 vedtog Tinget Ændring i Bekendtgørelse Nr. 451 af 30. November 1923 om Erstatning for Tab af Ejendele foraarsaget ved Forlis (se Lagtingstidende 1941, Side 57).

Der blev derefter af Amtet i Overensstemmelse med Tingets Vedtagelse udstedt Bekendtgørelse Nr. 49 af 10. November 1941.

Denne Bekendtgørelse havde Gyldighed til 31. December 1942.

Spørgsmaalet om en Fornyelse af ovennævnte Lovbekendtgørelse er indbragt for Lagtinget og henvist til Udvalg.

Under Udvalgsbehandlingen er der fremsat Krav om, at nævnte Lovgivning ogsaa udvides til at omfatte Skibsførernes eventuelle Tab af Effekter ved Forlis, og har Udvalget derefter ladet udfærdige Betænkning med Forslag i Overensstemmelse hermed, uden at Sagen i Forvejen har været forelagt Rederiforeningen og Assurancen til Udtalelse.

Mindretallet kan ikke følge denne Fremgangsmaade og har derefter underhaanden søgt Oplysning hos Rederiforeningens Bestyrelse samt hos Færøernes gensidige Forsikringsforening, og er der fra begge Sider frarraadet at gennemføre en Lovændring som anført, bl. a. fordi dette synes at komme til at fravige almindelige skandinaviske Lovregler paa dette Omraade.

Mindretallet har derefter overvejet Sagen, og mener ikke, at man nu ved Krigens forventede snarlige Afslutning skal søge gennemført Lovregler, der paa et Omraade som Søfartens i Princippet formentlig skiller sig ud fra almindelige skandinaviske Regler. Mindretallet kan derfor ikke gaa med til Udvalgets Forslag, men skal blot indskrænke sig til at fremsætte Forslag om en Fornyelse af Bekendtgørelse Nr. 49 af 10. November 1941.

Forslag:

Bekendtgørelse for Færøerne Nr. 49 af 10 November 1941 om Ændring i Bekendtgørelse Nr. 451 af 30 November 1923 om Erstatning til danske Sømænd for Tab af Ejendele foraarsaget ved Forlis forlænges indtil Udgangen af Aaret 1944.

Broytingaruppskot

frá Dam o. fl.:

Sambært ynski Føroya fiskimannafelags og samsvarandi tað, ið vit halda vera rætt, loyva vit okkum hervið at seta fram ynski um, at lógin viðvíkjandi endurgjaldi fyri mist klæði hjá sjómonnum verður broytt soleiðis, at endurgjaldið verður hækkað eftir prístalinum.

Uppskot:

Grein 2 verður broytt soleiðis:

Á føroyskum máli:

Í § 2 verður skrá um endurgjald broytt soleiðis:

	Í strandarsigling	Í Europasigling	Í sigling uttanf. Europa
A. Skiparar	1.200 kr.	1.500 kr.	1.800 kr.
B. Stýrimenn og maskinm.	1.150 kr.	1.350 kr.	1.550 kr.
C. Hin manningin og annað undirgivið fólk	1.050 kr.	1.150 kr.	1.250 kr.

Á danskum máli:

I § 2 ændres Fortegnelsen over Erstatning saaledes:

	I Kystfart	I europæisk Fart	Udenfor europæisk Fart
A. Skibsførere	1.200 Kr.	1.500 Kr.	1.800 Kr.
B. Styrmænd og Maskinmestre	1.150 Kr.	1.350 Kr.	1.550 Kr.
C. Del øvrige Skibsmandskab og andet underordnet Personale	1.050 Kr.	1.150 Kr.	1.250 Kr.

2. viðg. 22. nov. 3. viðg. 3. dec. Meirilutauppskot § 1 samtykt 15—0. Broytingaruppskot Dams o. fl. til § 2 fall 9—0. Meirilutin §§ 2 og 3 samtykt 13—0. Lógin í sínu heild 23—0. Uppskot Djurhuus og J. C. Olsen harvið burturdoltið.

4. Elektrisk sterkstreymsvirkir.

Álit (21. okt.):

Elektricitetsnevndin hevur í skrívi av 3. mars 1943 sagt frá, at krígsumstøðurnar hava gjørt, at tað eru tveir installatørar í Tórshavn, sum ikki kunnu fáa sær tað prógv, sum lógin áselir fyri teirra virki. Hetta eru teir einastu installatørar, sum eru í Tórshavn, og eingin við prógvi kann útvegast í teirra stað, um ein vildi yuskt tað. Nevndin heldur tað vera beinast, at nakað verður gjørt við hetta mál og skjýtur upp at seta í gildi fyri Føroyar reglurnar í lóg nr. 151 av 7/5 1937 um tekniskar installatiónir.

Amtið kan ikki mælatil, at henda lóg verður sett í gildi, sum umstøðurnar eru, og hevur sent málið til landsnevndina, sum aftur hevur víst tað til tingið.

Løgtingsskrivstovan hevur síðani mælt til, at tað verður settein viðløka afrat grein 5 í kunngerð nr. 63 av 27. marts 1936, soleiðis at elektricitetsnevndin verður heimilað til at geva loyvi til, at hesar reglur kunnu verða frávíktar. Hetta er lagt fyri amtið og elektricitetsnevndina, sum bæði tilráða, at so verður gjørt. Elektricitetsnevndin signr tó frá, at hon einans vil nýta henda myndugleika viðvíkjandi hesum báðum mommum í Tórshavn og ikki viðvíkjandi øðrum.

Nevndin er samd um, at ein tílík broyting verður gjørd. Nevndin heldur tó, at tað væl kann henda, at aðrir her á landi, sum hava fingið sær fullan kunnleika, men ikki kunnu fáa sær prógv í hesum líðum, eisini søkja um líknandi loyvi. Tí heldur nevndin, at elektricitetsnevndin eftir gjølla kannan eigur at geva hetta loyvi til teir, sum eru undir tí skepni ikki at kunna fáa prógv, men annars hava kunnleika til virki teirra, soleiðis at broytingin ikki einans verður givin fyri teir tveir nevndu installatørarnar.

Uppskot:

Tingið samtykkir:

Midlertidige Bestemmelser for Færøerne

om elektriske Stærkstrømsanlæg.

Til § 5 i kgl. Anordning Nr. 63 af 27. Marts 1936, hvorved Lov Nr. 169 af 11. Maj 1935 om elektriske Stærkstrømsanlæg sættes i Kraft paa Færøerne, føjes som nyt Stykke:

»Det ved § 1 i Kundgørelse Nr. 31 af 28. Oktober 1940 oprettede Elektricitetsnævn kan dispensere fra de i nærværende Paragrafs 1. Stk. andet Punktum indeholdte Bestemmelser.«

Denne Bestemmelse træder i Kraft straks.

2. viðg. 26. okt. **3. viðg.** 29. okt. Samtykt 19—0.

5. Lóg um horvið fólk frá kríggsfarnum skipum.

1. viðg. 13. sept.

Álit (29. sept.):

Sorinskrivarin hevur við skrivi av 15. mars 1943 vent sær til amtið og hevur seinri viðmælt, at tann lógreglan, sum givin varð í Danmark 21. mai 1940 um, at ognir hjá einum saknaðum manni kundu takast til skiftis, eftir áseittum reglum, sjálvtum eingin vissu kundi fáast fyri, at maðurin var deyður, verður sett í gildi í Føroyum.

Løgtingsskrivstovan hevur lagt hesa frágreiðing við málið:

»Kunngerð av 11. september 1839 um viðgerð av ognum hjá horvnum fólki er sett í gildi fyri Føroyar við reskript av 11. november 1846 og áselir, at har, sum tað er víst, at horvin maður hevur livað aftaná hann, hvørs ognir verða at býta, verður arvur at sela til hansara, men í øðrum tilfellum verður ognin at býta millum tey, sum hava sagt frá sum arvingar, tá proklama til arvingaruar hevur verið lýst. Um viðkomandi seðori ger vart við seg, hevur hann rætt til at fáa arvin, um hann krevur tílíkan innan 15 ár, tó kann hann burt frá hvørjum av arvingunum fáa, hvat hin hevur fingið av tí parti, sum viðkomandi átti at hava fingið, um hann hevði verið til staðar. Viðvikjandi tí ogn, sum annars tilhoyrir nøkrum, sum ikki er at finna, verður verja at sela, um ikki maður ella kona situr eftir. Tá viðkomandi hevur verið burtur í 5 ár, kunnu lívsarvingarnir krevja rætt til rentur og nýtslu av ognunum, og aðrir arvingar, tá 10 ár eru farin. Fyri at fáa hesa nýtslu má rættarmál fara fram móti tí horvna.

Tá 20 ár eru farin, kunnu arvingarnir fáa dóm um, at ognirnar falla til tey. Um sersløk viðurskifti skapa til vissu nærkandi líkindi til, at maðurin er deyður t. d. skip er farið ella hevur verið saknað so leingi, at tryggingin verður goldin, kunnu arvingarnir beinan vegin taka upp rættarmál viðvíkjandi nýtslu av ognunum, og tá 3 ár eru liðin, taka upp mál um ognarrættin.

Í Danmark er komin bráðfengis lóg av 21. mai 1940 um horvið fólk frá kríggsfarnum skipum, hareftir viðgerð av búgvum sum oftast í tílíkum tilfellum fer fram sum í vanligum búgvum, og tað er ikki neyðugt at steðga su leingi sum eftir reglunum av 1839.

Sorinskrivarin hevur skrivað til amtmannin, at tað er álroðkandi at fáa tílíkar reglur, sum teir hava í Danmark, og at hesar kunna verða nýttar óbroyttar. Amtmaðurin hevur lagt spurningin fyri løgtingið, og løglingsskrivstovan viðleggur uppskot. Upplýst verður, at lóg nr. 129 av 15. apríl 1930 § 71 áseitir, at skip verður hildið farið, tá einki er frætt, tá trýggjar ferðir vanliga tíð fyri ferðina frá hav, ið seinast varð frætt frá skipinum, til tað plass skipið varð ætlað at fara, er farin, tó minnst 3 mánaðar.«

Nevndin hevur kannað málið og er á einum máli um, at her er neyðugt at gera nýggja reglugerð. Í hesum bardagatíðum hava vit Føroyingar mangan fingið sorgarboð um, at eitt og annað skipið ikki

spyrst aftur í aftur, og tað eru lung boð at fáa serliga hjá teimum, sum eftir sita. Tyngri verður tað, tá skipanirnar soleiðis, at einki kann avgerast beinnvegin um ognirnar hjá tí farna manninum, og tá tey eftirsitandi megu ganga rættarveg, ofta í áravís fyri at ognast teirra arvi. Sorinskrivarin sigur frá, at tað liggja heilt nógv búgv, sum vilja falla inn undir hesa reglu, og koma til viðgerðar beinnvegin henda lóg er komin í gildi.

Um grein 5 skulu vit gera hesar viðmerkingar: Kunngerðin frá 1839 sigur í grein 7 hesi orð: »Men erholder den efterladte Ægtefælle Skilsmisse . . .« Harav siggja vit, at støðan hjá einkjuni, sum situr eftir ein mann, sum er farin, uttan at vissa fæst um, hvar skipið fór, er lann, at hon verður likin fyri frammvegis at vera gift, og má ganga rættarteiðinu fyri at fáa skilna frá tí manni, sum kanska mong ár frammanundan er deyður. Her setur grein 5 inn ta nýggju reglu, at tá eitt ár er umliðið aftaná, at sorinskrivarin hevur ásannað, at skipið má tokast fyri at vera farið, tá kann hon giftast uppaftur, við øðrum orðum, tá fær hon støðnna sum einkja, uttan at hennni nýtist trupulleika av rættargongu. Lógin skal helst loysa allar spurningar, sum kunna koma at liggja fyri, og ásetur tí, at um maðurin kemur aftur í aftur, og konan ikki hevur gift sig uppaftur, so kunnu tey fáa prógv frá rættarmálaráðharranum um, at nú er teirra giftarmál aftur í lagi, uttan at teimum nýtist at giftast uppaftur.

Við hesum orðum skal nevndin seta uppskot um at tað framlagda uppskoti til nýggja lóg verður samtykt óbroytt.

Uppskot:

Løgtingið samtykkir óbroytt tað fyri tingið lagda uppskot til »Midlertidige Bestemmelser for Færøerne om borteblevne Personer fra krigsforliste Skibe«.

2. viðg. 19. okt. 3. viðg. 22. okt. Samtykt 15—0.

6. Stjórnarskipan Føroya.

1. viðg. 10. sept.

Alit (2. nov.):

Hin 7. sept. 1943 løgdu 12 løgtingsmenn hetta mál inn á ting:

A. «Hin føroyski fólkaflokkurin (radikalt sjálvstýri) í sámgongu við Frambúrðsfelag loyvir sær við hesum skrivi at biðja tað háttvirda ting taka til viðgerðar spurningin um stjórnarskipan Føroya lands.
Tann 9. apríl 1940 varð Danmark hersett av Týskinum og 13. apríl 1940 setti Bretland hermenn á land her í Føroyum. Við hesi kvelting frá øllum ríkisstovnum vórn danska kongsvald og ríkisstjórn ikki før fyri at røkja sínt higartil havdu rættindi yvir Føroyum.
Landið var tá stjórnarleyst, og soleiðis kundi tað ikki liggja. Vit settu frá Fólkaflokkinum tá fram uppskot um at skipa landið á sjálvavgerðarrættargrund, men hetta uppskot fall. Í staðin fyri sameintust hinir tingflokkarnir, 17 løgtingsmenn, um tað uppskot, sum tann 9. mai 1940 varð kunngjørt sum: »Bestemmelser om en midlertidig Styrelsesform paa Færøerne.«
Ábyrgdarspurningurin er ikki nevndur í hesi stýrisskipan, og er hetta eitt hitt størsta brekið. Nú hevur Føroya fólk livað í stív 3 ár undir hesum reglum, og eingin veit, hvussu leingi Føroyingar skulu noyðast at liva undir bráðfengis stýrisreglum, til friðarlíð verður og harvið møguleiki fyri, at framtíðarleiðin kann verða fastløgd.
Kunngeringin av 9. mai 1940 um stýrisskipan er heilt stutt, og tað varð undir viðgerðini á tingi framhildið, at hon kundi nýtast eina tíð og skotið varð uppá eitt hátvt ár. Tað varð als ikki umhugsað tá at gera reglur fyri landastýrinum í Føroyum fyri fleiri ár fram í tíðina. Hetta sæst eisini týðuliga av tí, at kunngeringin ikki mælir eitt orð um, hvussu leingi hon skal verða í gildi, hvussu hon skal broytast ella hvussu tað millumbilið, sum má fara fram, aftaná at Danmark hevur afturvunnið frælsi sítt, skal skipast. Hetta kemur sjónliga av, at stýrisskipanin er ætlað at falla úr gildi sama dag, sum samband aftur kom við Danmørk, soleiðis at tá tók danska stjórn og danski ríkisdagur við øllum starvi. Somuleiðis kann tað nevnast, at allar lær kunngeringar, sum undir navninum »Midlertidige Bestemmelser« eru komnar í gildi síðani 9. mai 1940, mogu roknast at fara úr gildi sama dag, sum samband verður aftur við danskn ríkisstjórn; hetta er eisini komið fram fyri rættinum í Tórshavn, sum í einum dómi sigur: »en midlertidig Foranstaltning, der i al Fald kun foreløbig gælder, saa længe Færøerne er besat af fremmed Militær.«
Tað, sum hendi í Danmark 29. august 1943, hevur her stóran týðning fyri okkara virki. Frá hesum degi er eingin stjórn í Danmark, kongsvaldið og ríkisdagur hava ongan megi longur, alt sum eitt Demokrati byggir á liggur í sori. Fyri okkum er tað

soleiðis, at stýrisskipanin av 9. mai 1940 ikki er nokk nú, tí nú er eingin táttur at knýta fast aftur í, sjálvt um samband kom við Danmark. Her má koma eitt millumbil, og reglur fyri hesum eru heilt neyðugur fyri okkum. Tann stýrisskipan, sum Føroya fólk í dag má hava, má skapa grundarlagið fyri eina tíð útyvir tann dag, tá samráðingar kunnu byrja við eitt frítt Danmark.

Løgtingsval stóð 24. august í ár. Við tí er Fólkaflokkurin (radikalt sjálvstýri), í samgongu við framburðsfelag, vorðin tingsins storsti flokkur. Eftir parlamentariskum reglum eigur tí hesin flokkur at átaka sær at royna at stíla fyri landastýrinum, og hesa ábyrgd lekur hann við. Fólkaflokkurin (og framburðsfelag) hevur lagt sína støðu fyri veljarunum og fingið 41.39 pct. av atkvøðunum fyri okkara støðu. Av tí at hetta ikki er fullur helmingur, vildi tað verið skeivt av okkum í einum demokratiskum samfelag at sett fram uppskot óbroytt eftir okkara stevnuskrá. Á annan hátt má tað viðmerkjast, at um okkara land skal stýrast eftir demokratiskum sjónarmiðum, so má stýrisskipanin av 9. mei 1940 broytast.

Vit 12 løgtingsmenn seta ikki fram uppskot sambart okkara stevnuskrá, tí hetta hevur ikki fingið meiriluta í fólkinum, men vit vísa á, at »Stevnuskrá Føroya javnaðarflokks«, soleiðis sum hon er kunngjørd fyri veljarunum í blað teirra nr. 28 fyri 10. juli 1943, hevur fingið 19,88 pct. av atkvøðum til valið. Samanlagt við fólkaflokks atkvøðurnar gevur hetta 61 pct., soleiðis at tað, sum — styðjað av fólkaflokkinum — byggir á hesa stevnuskrá, hevur fjøld av fólkinum aftanfyri seg. Í javnaðarmanna stevnuskrá stendur:

> »Stjórnarstøðan: Heimaræði.
> Løgtingið lóggávuvald.
> Landsnevndin er landsins stjórn, sett av tí (teim) stjórnandi tingbólkinum (-unum).
> Landsnevndin setur fram lógaruppskot. Kongur setur í gildi tær samtyktu lógir.
> Valrættaraldurin 21 ár.«

Veljararnir mugu hava fatað hetta soleiðis, at tað — sovítt gjørligt — skuldi setast á stovn heimanvegin. Vit vilja tí frá Fólkaflokkinum (radikalt sjálvstýri) og framburðsfelagnum seta fram uppskot, sum miðar eftir at seta á stovn tað stýrislag, sum fellur í tráð við javnaðarmanna stevnuskrá, og sum vit fyri okkara flokk vilja styðja, fyri á hendu hátt at finna fram til nakað, sum vissa kann verða fyri, at veljarafjøldin í Føroyum hevur yvirlit av Føroya løgtingsmonnum, tá fólkið tann 24. august 1943 valdi nýggjar menn á ting. Vit taka ikki spurningin um valrættaraldurin við í uppskotinum, tí tann spurningurin ikki beinleiðis hoyrir undir stjórnarreglurnar. Serligt uppskot um 21 ára valrættaraldurin vilja vit leggja fram seinri.

Til lógaruppskotið, sum er prentað seinast í hesum skrivi, skulu vit gera hesar viðmerkingar:

Føroya Løgting er tað nývalda umboð Føroya fólks, og frammanumdan valinum fekk fólkið at vita, at stjórnarreglurnar vildu koma til viðgerðar á tingi. Hetta løgting hevur soleiðis frá fólkinum

fingið heimild til at kunngera, eftir tingsins samtykt, tær stjórnarreglur, sum skulu galda fyri ta næstu framtíð. Tað má tí vera tingsins formaður, sum tingsins vegna undirskrivar og kunnger samtyktina. Her kann eisini ávísast, at tílík tilgongd hevur søguliga fyrimynd í Norðanlondum.

ad gr. 1. Tað grundarlagið, sum samfelagið skal byggja á, má taka við, har tilt eldra slepti. Stýrisskipanin av 9. mai 1940 hevði tað brek, at hon einki segði um, hvussu leingi »Midlertidige Bestemmelser« skuldu vera í gildi, og hvussu millumbilið til friðarlíð skuldi skipast. Hetta halda vit verða ógjørligt og skjóta tí upp, at tað beinleiðis verður sagt, at »Midlertidige Bestemmelser« frá tíðarskeiðinum 9. mai 1940 til september 1943, eins og komandi lógir, hava fulla lógarkrafl, til onnur lóg tekur við.

ad gr. 2. Henda reglan er tikin eftir javnaðarmanna stevnuskrá, sum sigur, *at* Løgtingið hevur lóggávuvald, og *at* kongur setur í gildi tær samtyktu lógir. Sum nú er, kunnu vit ikki leggja lógir fyri kong til váttan, og tá vit ikki halda, tað er beint, at løgtingið útnevnir nakran mann til bráðfengis at taka kongsins sess, hava vit skotið upp, at tað skal vera samlaða stjórnin, sum undirskrivar kongsins vegna. Hetta er tað sama, sum Íslendingar samtyktu á Alltingi náttina millum 9. og 10. apríl 1940.

ad gr. 3. Henda greinin er sambært javnaðarmanna stevnuskrá, at landsnevndin er landsins stjórn, og *ikki* skal veljast sum tingnevnd, men selast av tí ella teimum stjórnandi tingbólkum. Reglur um, hvussu skal farast fram, tá stjórn fer frá og nýggj tekur við, hava vit hildið verða neyðugar, og halda tað tá er beinast, at tingsins formannsskap tekur við.

ad gr. 4. Sambært tað demokraliska stýrislag, sum var í Føroyum til 9. apríl 1940, halda vit tað er beint og neyðugt, at stýrisskipanin krevur fíggjarlóg samtykta, tí hetta er eitt tann einasti táttur, sum uttanfyri valtíð førir beinleiðis út til fólkið í landinum.

ad gr. 5. Henda bráðfengis stjórnarskipan má halda fram, til aðrar reglur taka við, tí tað er ógjørligt — sjálvt um onkur vildi tað — at fara aftur til nakað, sum ikki er útbygt í fleiri ár.

ad gr. 6. Lógin kemur í gildi beinanvegin. Samstundis fer stýrisskipanin av 9. mai 1940 úr gildi.

Uppskot

til

lóg um bráðfengis stjórnarskipan Føroya lands.

Føroya løgting hevur samtykt og løglingsformaðurin kunngjer hesa lóg.

Gr. 1.

Allar lógir, kunngeringar o. s. fr., sum vóru í gildi t. 9. mai 1940, skulu framvegis verða í gildi, har umstøður eru til tess, til löglig samtykt avger annað.

Kunngeringar, sbr. stjórnarskipanina nr. 1 av 9. mai 1940, skulu verða í gildi, til onnur löglig samtykt verður kunngjørd. »Midlertidige Bestemmelser« í hesum tíðarskeiði verður hervið givið lógarkraft, til nýlt lógboð avger annað.

Gr. 2.

Soleingi henda bráðfengis stjórnarskipan verður í gildi, er lóggávuvaldið hjá Føroya Løglingi og kongsvaldinum í felag. Meðan umstøðurnar eru soleiðis, at lógir ikki kunnu verða lagdar fyri kong til ásanningar, verður landsins stjórn heimilað til at taka við øllum starvi kongsveldisins vegna.

Gr. 3.

Tann ella teir tingbólkar, sum taka við stjórnandi ábyrgd her á landi, sela eina landsnevnd, sum er landsins stjórn. Stjórnarlimirnir kunnu býta arbeiði sína millum ella hava nakað í felag, og verður uppskot um hetta at verða lagt fyri Føroya Løgting til samtyktar, og síðani kunngjørt. Landsnevndin tekur við øllum virki, sum eftir galdandi lóg er hjá ríkisstýrinum, undir fullari ábyrgd fyri Føroya Løgting.

Um stjórnin fær ein meiraluta á tingi móti sær, má hon fara frá. Um stjórnin fer frá, skal hon geva boð til tingsins formann og næstformann, sum samráðast við tingmenn um setan av nýggjari stjórn. Hin fráfarandi stjórnin heldur fram við dagliga yrki sínum, til nýggj stjórn tekur við.

Gr. 4.

Fíggjarlóg fyri landastýrið í Føroyum í sínni heild verður at samtykkja og kunngera, áðrenn almennir skattir kunnu krevjast goldnir.

Gr. 5.

Henda bráðfengis stjórnarskipan verður í gildi, til broytan er samtykt av Føroya Løglingi og kunngjørd á vanligan hátt.

So skjótt ófriðartíðin er av, tekur Føroya Løgting upp tingingar um framtíðar stjórnarform Føroya.

Gr. 6.

Henda lógin kemur í gildi beinanvegin. Samstundis fer stýrisskipanin nr. 1 av 9. mai 1940 úr gildi.«

Sama dag (7. sept.) bar danski stalsins umboðsmaður harra Hilbert eftirfylgjandi kunngerð upp á tingi:

B. »Begivenhederne i Danmark den 29. August 1943 og i Tiden derefter gør det naturligt for mig at fremkomme med en Udtalelse til Færøernes Lagting straks ved deres Sammentræden. Om hvad der faktisk er sket i Danmark, ved jeg intet mere end Tingets Medlemmer.
Det, vi alle kender, fylder mig paa een Gang med Stolthed og med dyb Bekymring.
Det er godt og stolt at vide, at det danske Folk ikke lod sig paavirke eller høje af Nazismen, hvadenten denne brugte Fløjlshandsken eller Jernnæven, men som een Mand rejste sig til aaben Modstand, da Tiden var inde. Det danske Folks bevidste og frivillige Valg af aaben Modstand har højnet dets Anseelse blandt Verdens frie Nationer og har fremmet Samhørigheden i Norden.
Med den største Sorg er Budskabet modtaget om mange gode danske Mænds Død, og med den største Bekymring maa vi alle tænke paa de Trængsler og de Ulykker, det danske Folk nu skal igennem. Tankerne gaar bestandig til vor store, gamle Konge. Ogsaa disse Byrder blev lagt paa hans Skuldre. Vi ved, han vil bære dem, rank og dansk som altid, og vi beder til, at hans Kræfter maa vare til den Dag, da Fjenden er drevet ud af Landet, og Danmark igen er frit.

— — —

Endnu ved ingen bestemt, hvorledes Styrelsen af Danmarks Anliggender vil blive ordnet.
For Færøernes Vedkommende kan jeg sige, at det, der hidtil er sket, ikke kan medføre nogen Ændring i Amtmandens Stilling eller Opgaver. Jeg vil stadig udøve mit Embede, som Kongen har betroet mig, og jeg vil fortsat sammen med Laglinget søge at løse de Opgaver, som Tiden byder. Laglinget ved, at jeg siden 9. April 1940 har været uden nogen Forbindelse med den danske Regering, og det medfører derfor ingen praktisk Ændring, at en dansk Regering ikke længere eksisterer. Jeg vil udøve mit Embede under Ansvar overfor Kongen og overfor den danske Regering, som paany vil komme, naar Danmark er befriet. Det er en Selvfølge, at jeg fortsat, og om muligt i højere Grad end hidtil, vil søge Samarbejde og Kontakt med de britiske Myndigheder, uden hvis stadige og forstaaende Hjælp og Støtte det vilde være umuligt at bringe Færøerne frelst gennem Krigens Vanskeligheder.
Saalænge Krigen varer, vil jeg som hidtil holde mig i nøjeste Kontakt med den danske Gesandt i London og med den frie danske Bevægelse, som jeg allerede længe har været tilsluttet.

— — —

I disse for Danmarks Rige saa skæbnetunge Tider opfordrer jeg Færøernes nyvalgte Lagting til et værdigt, forstaaende Samarbejde til Gavn for Land og Folk og i Troskab mod vor Konge.«

Sama dag (7. sept.) løgdu fyrrnevndu 12 løgtingsmenn hesa kunngerðing inn á ting:

C. »Á fundi á Løgtingi 7. september 1943 setti danski statsins umboðsmaður harri Hilbert fram eina kunngerð til tingið og legði aftura, at hansara orð skuldu verða kunngjørd bæði í Føroyum og utanfyri Føroyar.
Í kunngerðini verður m. a. sagt:

»For Færøernes Vedkommende kan jeg sige, at det, der hidtil er sket, ikke kan medføre nogen Ændring i Amtmandens Stilling eller Opgaver. Jeg vil stadig udøve mit Embede som Kongen har betroet mig, og jeg vil fortsat sammen med Lagtinget søge at løse de Opgaver, som Tiden byder. Lagtinget ved, at jeg siden 9. April 1940 har været uden nogen Forbindelse med den danske Regering, og det medfører derfor ingen praktisk Ændring, at en dansk Regering ikke længere eksisterer. Jeg vil udøve mit Embede under Ansvar overfor Kongen og overfor den danske Regering, som paany vil komme, naar Danmark er befriet. Det er en Selvfølge, at jeg fortsat, og om muligt i højere Grad end hidtil vil søge Samarbejde og Kontakt med de britiske Myndigheder, uden hvis stadige og forstaaende Hjælp og Støtte det vilde være umuligt at bringe Færøerne frelst gennem Krigens Vanskeligheder.
Saalænge Krigen varer, vil jeg som hidtil holde mig i nøjeste Kontakt med den danske Gesandt i London og med den frie danske Bevægelse, som jeg allerede længe har været tilsluttet.«

Vit undirskrivaðu tingmenn gera kunnugt, at hesi orð eru kunngjørd uttan samráðing frammanundan við tingið, og uttan at tingið hevur tikið støðu til teirra. Tey standa tí sum eitt persónligt úttalilsi.
Hetta fyrivarni verður at kunngera bretsku ríkisstjórnini gjøgnum less konsul í Føroyum.«

Tann 10. september fór málið í undirskrivaðu 7-mannanevnd.
Føroya javnaðarflokkur bar í september fram í nevndini eitt uppskot av nærum sama innihaldi sum tað uppskot, flokkurin setir endiliga fram (sí niðanfyri) við áheitan um at senda tað til amtmannin til ummælis.
Tann 25. september skrivaði nevndarformaðurin hetta bræv til harra Hilbert:

D. »Løglingsins nevnd viðvíkjandi stjórnarskipan Føroya hevur frá javnaðarflokkinum fingið innlagda uppskot sum eftir áheitan leirra verður sent tygum til viðmerkingar, og vónar nevndin at fáa svar tygara nakað skjótt.«

29. september fekk nevndarformaðurin soljóðandi svar frá harra Hilbert viðvíkjandi frammanundan ávista uppskoti javnaðarmanna:

E. »I Skrivelse af 25. September 1943 har Udvalget anmodet om Amtets Udtalelser over et af det socialdemokratiske Parti fremlagt Forslag til »Lov om en midlertidig Styrelsesordning for Færøerne.«

Idet Amtet vil beskæftige sig med de juridisk tekniske Bemærkninger til Forslaget senere i nærværende Skrivelse, skal man først bemærke følgende med Hensyn til den politiske, statsretlige Side af Sagen:

Principielt kan Amtet ikke se, at det i den foreliggende Situation er paakrævet at foretage nogen Ændring i den gældende Styrelsesordning, som har vist sig praktisk anvendelig i de forløbne Aar, og principielt vilde Amtet anse det for rigtigst, at Løsningen af de her omhandlede Spørgsmaal ventede, til Forbindelse med Rigets kompetente Myndigheder paany er etableret. Da der uanset dette foreligger Forslag vedrørende Styrelsesordningen m. v., skal Amtet ikke afvise Tanken om en Løsning paa det i Forslaget angivne Grundlag.

Forslaget bibeholder i Realiteten den i den gældende midlertidige Styrelsesordning trufne Ordning, hvorefter Love (Lovforskrifter) tilvejebringes ved et Samvirke mellem Laglinget som den folkevalgte Repræsentation for den færøske Befolkning og Amtmanden som Statsmaglens Repræsentant. At denne Ordning nu i Forslaget fastslaas med en anden Formulering, medfører ingen Ændring i den faktisk eksisterende Ordning med Hensyn til Loves Tilvejebringelse, og ingen Ændring i Færøernes statsretlige Stilling, og Amtet ser derfor ingen Grund til at modsætte sig Forslaget paa dette Punkt.

Paa 3 andre Punkter vilde Forslagets Gennemførelse medføre en Ændring i den nuværende Ordning, nemlig:

1. Lovsproget,
2. Landsnævnets Valg, og
3. Styrelsesordningens Gyldighedstid.

Spørgsmaalet om Lovsproget vedrører i og for sig ikke Spørgsmaalet om en Styrelsesordning for Færøerne, men kunde lige saa godt være søgt løst ved en særlig Lovbestemmelse. Amtet kan imidlertid ikke have noget at erindre imod, at Spørgsmaalet om Lovsproget søges løst sammen med Spørgsmaalet om en Ændring af Styrelsesordningen, og Amtet vil ikke modsætte sig

Forslagets Bestemmelser. Dette Standpunkt er i Overensstemmelse med undertegnede Amtmands politiske Erklæring af 29. Juli 1943, hvori jeg erklærede mig villig til »at forhandle om Løsning af andre Spørgsmaal, selvom de ikke kan betegnes som »særlig færøske«, idet jeg erkender Betydningen af, at saadanne Spørgsmaal løses i Overensstemmelse med Lagtingets, helst *hele* Lagtingets Ønsker.« Jeg tog i min nævnte Udtalelse et ubetinget Forbehold med Hensyn til selve Samhørighedsspørgsmaalet, men da Samhørigheden mellem Færøerne og det øvrige Kongerige ikke direkte berøres af Spørgsmaalet om Lovsproget og iøvrigt ikke angribes i det foreliggende Forslag, maa Amtet i Konsekvens af det givne Tilsagn yde sin Medvirken til Gennemførelse af dette Punkt i Forslaget.

Hvorledes Lagtinget vil vælge et *Landsnævn* til Bestyrelse af de under Lagtingets Raadighed henlagte Sager, er et Spørgsmaal, som alene Lagtinget maa afgøre, og da dette er uden nogen Betydning for Færøernes statsretlige Stilling indenfor det danske Monarki, finder Amtet ikke Anledning til at udtale nogen som helst Mening om, hvorvidt Forslaget paa dette Punkt er heldigt eller ej.

Det foreslaas i § 5, at Styrelsesordningen *»forbliver i Kraft til Ændring er vedtaget af Færøernes Lagting.«* Denne Bestemmelse er i absolut Modstrid med de Forslaget ledsagende Motiver til § 5, som Amtet helt og fuldt kan slutte sig til. Amtet kan henholde sig til Motivernes Udtalelse om, at hverken Lagtinget eller Statens Repræsentant har Hjemmel til paa dette Omraade at træffe Afgørelser for Tiden efter Krigen. Det er nødvendigt, at Amtet paa Statsmagtens Vegne sammen med Lagtinget træffer de fornødne Arrangementer for Færøernes Styrelse i den Tid, de kompetente Rigsmyndigheder, Kongen, Ministeriet og Rigsdagen, ikke selv kan træffe de fornødne Bestemmelser, men det maa være klart for enhver, at hverken Amtet eller Lagtinget, saalænge Rigsfællesskabet mellem Færøerne og Danmark opretholdes, kan træffe Afgørelser med Hensyn til Færøernes Styrelse efter det Tidspunkt, da det danske Riges kompetente Myndigheder selv kan træffe saadan Afgørelse. Det er for Amtet en Selvfølge, at Rigets kompetente Myndigheder til den Tid ikke blot vil iagttage Lagtingslovens Forskrifter, inden Afgørelse med Hensyn til Færøernes fremtidige Styrelse træffes, men som Følge af den faktisk stedfundne Udvikling vil lage videregaaende Hensyn til det færøske Lagtings og den færøske Befolknings Synspunkter. Dette medfører dog ikke, at Amtet nu kan medvirke til i Lovform at give Tilsagn om, at ingen Ændring af den nu foreslaaede Styrelsesordning skal kunne gennemføres uden Lagtingets Samtykke.

Efter Motiverne til Forslagets § 5 maa Amtet nærmest gaa ud fra, at Forslagets Formulering skyldes en Fejl fra Forslagsstillernes Side, og i hvert Fald er Amtet ikke i Stand til at stadfæste en saadan Bestemmelse.

— — —

Efter at herved de mere principielle Spørgsmaal er behandlet, skal Amtet iøvrigt bemærke følgende:

ad § 1: Da det ikke er Meningen paa ny at sætte de den 9. Maj 1940 gældende Love, Anordninger og Retsforskrifter i Kraft, forsaavidt de maatte være bortfaldet, ophævet eller ændrede, henstilles det at indføje i § 1, 1. Stk. efter Ordet »skal« »— forsaavidt de ikke ifølge deres Indhold eller ifølge lovlig Bestemmelse er bortfaldet, ophævet eller ændrede —«. Af samme Grund henstilles §ens 2det Stk. affattet saaledes: »Paa samme Maade skal Kundgørelser etc. ...«

ad § 2: Det henstilles, at »Færøernes Lagting og Kongemagten« ændres til »Kongemagten og Færøernes Lagting«, jfr. Grundlovens § 2.
Med Hensyn til Love, der vedrører Statskassens Midler, henstilles indføjet en Bestemmelse svarende til § 4 i Kundgørelse Nr. 1 af 9. Maj 1940. Selvom Amtet vel i Henhold til Forslaget kan hindre Gennemførelse af et af Lagtinget vedtaget Forslag, der vilde paaføre Statskassen Udgifter — Amtet er iøvrigt klar over, at Lagtinget aldrig vilde tænke paa at gennemføre en saadan Vedtagelse — saa kunde den Situation opstaa, at Amtet saa sig nødsaget til at nedsætte eller lade bortfalde Statsudgifter, som er hjemlet ved Lov, og en Beslutning i saa Henseende vilde Lagtinget formentlig ikke ønske at modsætte sig ved at kræve gældende Lov ændret ved en ny, af Lagtinget vedtaget Lov. Der paatænkes absolut ikke fra Amtets Side nogen Ændring i den hidtidige Praksis, hvoreffter Staten fortsat yder de den 9. April 1940 lovligt hjemlede Bevillinger, men Stillingen kan ændre sig, og derfor har Amtet ønsket at pege paa Spørgsmaalet.
Amtet har bemærket sig Motivernes Udtalelse om Administrationssprogel for Amtet (og dermed for Statsinstitutionerne) og for Lagtinget (og dermed for Lagtingsinstitutionerne).

ad § 4: Amtet har intet at erindre imod at offentliggøre Oplysninger om Statens Udgifter og Indtægter vedrørende Færøerne. Det vil, da Statens Regnskabsaar er Finansaaret (1. April—31. Marts) muligvis være det mest praktiske at offentliggøre et Finansaars Budget i Stedet for Kalenderaars; men herom kan der, hvis det foreliggende Forslag gennemføres, senere forhandles mellem Landsnævnet og Amtet.

ad § 5: I Henhold til det foran anførte henstilles Ordene »vedtaget af Færøernes Lagting og kundgjort paa lovlig Maade« ændret til »vedtaget paa lovlig Maade«.

— — —

Forslaget indeholder ingen Bestemmelse svarende til den nugældende Styrelsesordnings § 2, men Amtet gaar efter Motiverne til § 2 ud fra, at det er Forslagsstillernes Mening, at den hidtil

paa dette Omraade følgte Praksis fortsat skal anvendes, og Amtet er enigt i, at en positiv Bestemmelse i saa Henseende er overflødig. Det er en Selvfølge, at Amtet fortsat vil indhente Lagtingets eller Landsnævnets Udtalelse, inden administrative Forskrifter af den her omhandlede Art udfærdiges.«

Í oktober framlegði P. M. Dam í nevndini soljóðandi

F. *Javnaðarmanna uppskot*

til

Bráðfengis stjórnarskipan Føroya lands.

Formæli.

Samviuna og semja eru sterkastu og gávuríkastu lætlir tjóðanna millum

Hetta ásamnar allur hin demokratiski heimurin í dag og stundar eftir.

Hetta hava Norðurlanda tjóðirnar ásamnað, og tær ásanna lað nú meiri enn á nøkrum sinni.

Tær stunda eftir hesum.

Samvinna og semja er beinleiðis ein lívstreyt fyri tær — mest fyri tær smæstu.

Danatjóð verður tald millum heimsins mest mentaðu og frælsyntu tjóðir.

Ævi sína hevur hon barst fyri frælsi.

Hon berjist í dag sum ongantíð fyri lívinum sum tjóð, fyri frælsi og sjálvstøðu sini.

Danatjóð er framúr í øllum framstignum.

Hon er stigin eina longst í strembanini at veita øllum fhúgvarum sínum góð kor. Hennara sociala forsorg og menniskjaliga fatan er heimsgitin.

Danatjóð vil aldri halda í bondum aðra tjóð. Føroya tjóð kann tí ikki koma í samvinnu við høviskari, frælsari og meira mentaða tjóð enn hann.

Samvinna og semja Dana og Føroyinga millum kann av sonnum sigast at vera ein lívstreyt fyri Føroyingar sum tjóð og sjálvsløðuligur nationalur táttur í tí norðurlendska brøðrabandinum.

Træla hevur staðið um, hvat ið Føroya løgting, og hvat ið danski ríkisdagurin, danska stjórnin og kongur hava at siga yvir og í Føroyum.

Henda træta hevur verið viðskiftamálum Føroyinga og Dana til ógagns og liflan sóma.

At halda fram hesa trælu er okkum og Dønum til minkan.

Javnaðarmenn hava tí til máls at loysa hesa trælu við at fáa eina skipan í lag, ið gevur Føroyingum og Dønum fult frælsi til hvør í sær sjálvir at gera av, í hvussu stóran mun gingið skal vera í stjórnarligu og aðra samvinnu teirra millum.

Hetta halda javnaðarmenn kann verða gjørt við at geva Føroya løgtingi lóggávuvald saman við danska kongi.

Við hesum lóggávuvaldi sínum kann Føroya løgting til eina og hvørja tíð avgera hvønn tátt (lættir), Føroya skulu yvirtaka og átaka sær ta fullu stjórnarligu, peningaligu og siðmenningligu ábyrgd fyri.

Í løtuni er kanska ikki lætt at ætla, hvørjar nýggjar lættir í samfelagslívi okkara, okkum verður at sonnum gagni at yvirtaka. Hesum viðvíkjandi má hvør táttur takast til viðgerðar fyri seg og kannast út í æsir, fyri og ímóti, áðreen endalig støða verður tikin.

So statt má at byrja við verða bildið fram við øllum lógum, rættarforskriftum og fyriskipanum, ið eru í gildi.

Við lóg at fáa ein óskerdan ræll til hvør í sínum lagi ella í felag, har ið báðir partar eru samdir um tað at avgera, hvussu framtíðarleiðin skal verða er hitt fyrsta frælsis- og vinabrævið, ið eigur at verða skrivað Føroyinga og Dana millum.

Tá ið tað er gjørt, kenna vil okkum vísar í, at tær báðar frændatjóðirnar, Føroyingar og Danir, vilja vaksa og mennast sum tvær friskar og lívskrafligar greinir á tí norðurlendska trænum.

Uppskot:

§ 1.

Lógir, rættarforskriftir og fyriskipanir, ið vóru í gildi tann 9. mai 1940, skulu — um tær ikki sambært teirra innihald ella sambært lógligar samlyktir eru dottnar burtur, avliknar ella broyttar — framvegis verða í gildi, har ið umstøður eru til tess, til lóglig samlykt avger annað.

Á sama hátt skulu kunngerðir sambært stjórnarskipanina nr. 1 av 9. mai 1940 verða í gildi, til onnur lóglig samlykt verður kunngjørd.

§ 2.

Soleingi, sum benda bráðfengis stjórnarskipan verður í gildi, er lóggávuvaldið hjá kongsvaldinum og Føroya løgtingi í felag.

Meðan viðurskiftini eru soleiðis, at lógir ikki kunnu verða lagdar fyri kongin til staðfestingar og kunngerðar, situr Føroya amtmaður kongsins vegna við heimildini viðvíkjandi staðfestan og kunngerð.

Allar lógir verða at samtykkja av løglinginum á føroyskum og danskum máli og verða kunngjørdar á báðum málum.

Í kunngerðanini verða lógirnar at bera fram við undirskriftini hjá landsnevndarinnar forseta ella øðrum limi lands-

nevndarinnar, um lógin viðvíkjur máli, ið serliga liggur undir hansara virki, og við einari av kongi ella í kongsins stað av amtmannuinum undirskrivaðari staðfestingarátekning.

§ 3.

Løgtingið velur eina landsnevnd við vanligum atkvøðumeiriluta.

Undir ábyrgd fyri løgtinginum stjórnar landsnevndin teim málum, ið sambært galdandi lóg eru løgd ella sambært framtíðarligum lógum verða løgd undir tingsins ræði.

Tá ið løgtingið ikki situr, kann landsnevndin tingsins vegna í bráðskundsmálum samtykkja lógir.

Tílíkar lógir skulu í fyrstu tingsetu aftaná leggjast fyri tingið.

Landsnevndarlimirnir velja sína millum ein forseta og kunnu býla arbeiðið sína millum ella gera tað í felag. Uppskot um hetta verða at leggja fyri løgtingið til samtyktar. Samtykt verða tey so at kunngera av løgtinginum.

§ 4.

Frá 1. januar 1944 at rokna kann eingin heinleiðis skattur til løgtingið verða kravdur, áðrenn tað leypandi árs fíggjarætlan fyri landastýrið í Føroyum er samtykt og kunngjørd.

Í fíggjarætlanini verða settar tær av løgtinginum samtyktu jáltanir. Í sama fíggjarætlan verður greitt frá statsins útreiðslum og innløgum viðvíkjandi Føroyum.

§ 5.

Henda bráðfengis stjórnarskipan verður í gildi, til broytan er samtykt á lógligan hátt aftaná at samráðing millum danska ríkisstýrið og løgtingið er farin fram.

So skjótt ófriðartíðin er av, tekur Føroya løgting upp tingingar um framtíðar stjórnarlag Føroya.

§ 6.

Henda lóg kemur í gildi beinanvegin. Samstundis fer stýrisskipanin nr. 1 av 9. mai 1940 úr gildi.

Viðmerkingar.

ad § 1: Javnaðarflokkurin í Føroyum knæsetur ta demokratisku hugsjónina. Hann er móti óregluligum kollveltingum og atsóknum móti galdandi samfelagsskipan. Tær broytingar, ið flokkurin yniskir, vil hann vinna við einum meirluta av fólksins umboðsmonnum. Hann heldur fram, at hesin meirluti skal fylgja reglunni, at við lóg skal lóg broytast og land byggjast.
Javnaðarflokkurin heldur, at stýrisskipanin av 9. mai 1940 var gjørd og sett í gildi á regluligan og lógligan hátt.
Sambært hesa steðu kann nú undir ófriðatíðum eftir javnaðarmanna áskoðan ein nýggj stýrisskipan skapast

einans við samvirkan av teimum í stýrisskipanini av 9. mai 1940 settu lóggevandi kreftum.
Tær lógir, hvar eftir Føroyingar í dag skipa lív teirra, kunnu ikki verða avtiknar, uttan at nakað lóglag er greitt at seta ístaðin. Tað er tí neyðugt, at hin nýggja stýrisskipanin byrjar við at lata lógir, rættarforskriftir og fyriskipanir verða verandi í gildi, til tess ein lóglig samtykt annaðhvørt broytir ella avtekur ella setur heitt nýggja skipan ístaðin fyri ávíkjandi lóg ella rættarforskrift ella fyriskipan.
Tær galdandi lógir eiga bert at verða broyttar, aftaná krav um at fáa tær broyttar hevur verið til viðgerðar, og fólksins kosnu álitsmenn við at kanna og lýsa viðurskiftini, ið lógirnar hava við at gera, eru komnir til tað úrslit, at ein broytan er av sonnum landi og fólki at gagni.

ad § 2: Sí formæli.
Tað er ein sjálvfylgja, at tingið bert í teimum málum, sum tað tekur ta fullu stjórnarligu, peningaligu og siðmenniligu ábyrgdina fyri, kann lóggeva einsamalt saman við kongi.
Á sama hátt er tað eyðvitað, at í øllum føri, ið tingið ikki tekur hesa ábyrgd, men hvar ið harafturímóti danska stjórnin og ríkisdagur hevur alla ábyrgdina ella ein stóran ella ein minni lut av ábyrgdini, megu málini verða viðgjørd á vanligan hátt av Føroyingum og Dønum í felag.
Danir hava skapt »konstitutiónina« hjá tí danska kongsvaldinum. Henda »konstitutión« kann tí bert verða broytt av Dønum sjálvum. Tað er greitt, at vit Føroyingar einsamallir kunnu einki broyta danska kongi viðvíkjandi.
Tá ið stýrisskipanin sigur, at lóggávuvaldið er hjá kongsvaldinum og løgtinginum í felag, so er harvið avgjørt, at tað er tann *danski* kongurin — í teirri støðu, myndugleika og heimild, hann situr við — ið talan er um.
Tá ið vit áseta, at danski kongur skal undirskriva lógirnar, so hava vit harvið góðkent hansara »konstitutión«, rættarstøður og myndugleika, ið vit onga heimild hava at broyta. Men aftur á hin bógvin hevur kongurin og hann, ið handlar fyri hann, skyldu at hava sama lýdni og virðing fyri fólkaviljanum, tá ið talan er um at undirskriva og kunngera tær av løgtinginum samtyktu lógir, og kongurin hevur, tá ið hann tekur støðu til og undirskrívar lógirnar, ið tað danska ríkisstýrið leggur fyri hann.
Er tað ikki møguligt at koma í samband við kongin, og hann sjálvur tessvegna ikki kann koma til at undirskriva tær av løgtinginum samtyktu lógir, má embætið røkjast av hansara fulltrúa.
Hvør er hesin her á landi?
Tað er greitt, at vit Føroyingar ikki kunnu velja ella

seta tí av danska fólkinum sambært danska kongsskipan setta kongi ein fulltrúa.
Tað kann eingin ivi vera um, at tað er amtmaðurin, ið er fulltrúin. Amtmaðurin var, áðrenn 9. apríl 1940, lá ið samviunan við Danmark varð slitin, statsins og kongsins hægsti embætismaður, stjórnarligi og politiski umboðsmaður í Føroyum.
Hann var kongliga útnevndur.
Hann hevði skyldu at sita á tingi sum umboðsmaður fyri státin. Gjøgnum hann gingu øll politisk mál frá løgtinginum til ríkisstjórnina og frá ríkisstjórnini til løgtingið.
Hann sat dansku ríkisstjórnarinnar vegna við allari umsiting (administration), ið her á landi lá hjá ministeriinum.
Tá ið sambandið við Danmark var slitið, gav danski forsetisráðharrin harra Th. Stauning íggjøgnum danska útvarpið amtmanninum boð um danska statsins vegna at handla og taka støðu soleiðis, sum hann helt tað sjálvur vera frægast (sambært Konduite).
Sambært hesi danska statsministarans boð, sambært ta frammanfyri ávistu støðu amtmannsins, sambært hansara stillingsfullmakt og sambært ta støðu, bretska stjórnin hevur tikið og tleiri ferðir hevur gjørt Føroyingum kunnugt (ynskja Føroyar, soleingi tær eru bersettar av Bretum, umsitnar av løgtinginum og amtmanninum danska statsins vegna) er amtmaðurin fulltrúi fyri Danakong og Danastjórn.
Amtmaðurin situr so statt við fullmakt til nú bráðfengis, meðan samvinnan við Danmark er slitin, at taka støðu danska statsins, Dana stjórnar og Danakongs vegna.
Amtmannsins samtykt av eini bráðfengis stýrisskipan fyri Føroyar er so statt ein gyldug, og hon var samtykt av Danastjórn og Danakongi.
Tað er somuleiðis eyðsæð, at sum danska statsins umboð má amtmaðurin umsita tey mál, ið sambært galdandi lóg (sí § 1) eru lagd undir ministerium, so leingi hesar lógir ikki eru broyttar soleiðis, at tingið hevur yvirtikið ta stjórnarligu, peningaligu og siðmennligu ábyrgd av hesum málum.
Trætan um rættin hjá føroyskum máli hevur verið tann heitasta í føroyskum politikki.
Tað er neyðugt og beint at gera enda á hesari træta við í sjálvari stýrisskipanini at seta, at føroyskt mál skal eiga fullan rætt sum lógarmál. Harvið er so skrásett hann principiella stoða, at føroyskt mál skal eiga óskerðan rætt í øllum føri her á landi.
Amtmaðurin staðfestir kongsins vegna. Samhært okkara málsligu frælsisstøðu halda vit, at honum skal standa frítt at gera tað á kongsins móðurmáli eins væl og á føroyskum máli.
Somuleiðis halda vit, at tað eisini eigur at standa honum frítt at nýta sítt móðurmál til at seta saman tær kunngerðir og tey rit, ið liggja á honum at gera.

Harafturímóti er tað eyðsað, at allar kunngerðir og lýsingar, ið liggja á løgtinginum og landsnevndini at gera, skulu vera á føroyskum máli.
Tað tørvar at gera greitt, hvør ið skal undirskriva og kunngera lógirnar.
Vit halda tað vera rætt stjórnarleið, at landsnevndarforsetin ella ein annar av landsnevndarlimunum, ið hevur serliga við viðkomandi mál at gera, undirskrivar lógirnar, og at tær verða kunngjørdar við undirskrift av einum av teimum eins og við amtmannsins staðfestingaráskrift kongsins vegna.

ad § 3: Tá ið tingið velur landsnevndina við vanligum atkvøðumeirluta, verður hon sett av einsamallum flokki ella tveimum ella fleiri flokkum ella einum flokki, stýðjaðum av parti ella pørtum av øðrum flokkum, ið er (eru) fyri at taka stjórnarábyrgdina tingsins vegna. Fær landsnevndin ein meirluta fmóti sær, halda vit tað vera beinast, at hesin meirluti avger sjálvur, um ójavnin millum hana og meirlutan á tingi er so stórur, at hon ikki kann sita. Tað kann ikki bera til, at landsnevndin skal fara frá, bara tað hendir, at hon er ójøvn á máli við meirlutan um eitt týdningarlítið mál. Er ójavnin avgerandi stórur, kann meirlutin sambært stýrisskipanaruppskotið avsetta landsnevndina beinan vegin og velja nýggja landsnevnd.
Løgtingið hevur til einahvørja tíð fullræði at avgera, hvussu stjórnarskifti skal fara fram. Er tað tí ætlandi óneyðugt at seta nakað í stjórnarskipanina viðvíkjandi, hvussu stjórnast skal undir sjálvum landsnevndarskiftinum.
Sambært § 1 verða allar lógir, rættarforskriftir og fyriskipanir, ið vóru í gildi, tá ið henda stýrisskipan var samtykt, framvegis í gildi, til annað — sambært løgtingsins og kongsins lóggávuvald — verður samtykt. Tað er í samljóð við hetta, at landsnevndin tekur við at stjórna teim málum, ið sambært galdandi lógir eru løgd undir tingsins ræði.

ad § 4: Henda grein kundi kanska verið burturúrlatin, men fíggjarstandurin er so avgerandi í samfelaginum, at tað kortini er beinast at taka kravið um fíggjarskil hjá tí almenna uppí sjálva stýrisskipanina.
Løgtingið kann sjálvandi ikki samtykkja, hvat ið statturin skal lata til Føroyar. Men tað er heitt í fíggjarætlanini hjá tinginum at greiða frá statsins útreiðslum og innløgum í Føroyum.

ad § 5: Stýrisskipanin er bráðfeingis. Hon skal kortini verða í gildi, til hon lógliga kann broytast ella avtakast aftaná, at løgtingið og danska ríkisstjórnin hava havt samráðingar. Hesar samráðingar megu takast upp við tað sama, so brátt ófriðartíðin er av.
Meðan løgtingið saman við statsins umboðsmanni

kann avgera og samtykkja lógir, forskriftir og fyriskipanir viðvíkjandi stjórnanini av Føroyum undir núverandi eykaumstøðum, hevur hvørki løgtingið ella statsins umboðsmaðnr atstøður til at avgera viðvíkjandi tíðini aftaná kríggið. Løgtinglð kann bert bava ta náttúrligu og demokratisku støðu, at allar broytingar skulu fara regluliga og lógliga fram. Tað má tí verða goymt framtíðini og teimum, ið tá hava rætt at tala Føroya og Danmarkar vegna at avgera, hvussu tær í hesum millumbilinum gjørdu lógir kunnu broytast á lógligan háttur.

Viðv. fólkaflokksins uppskoti:

ad § 1: Okkum kennst tað at vera rættari at seta »rættarforskriftir og fyriskipanir« (Anordninger) heldur enn bara »kunngeranir«, tá ið »kunngeranir« í merking av lógarsamtyktum ella rættarforskriftum fyrst verður brúkt aftaná stýrisskipanina av 9. mai 1940.
Seinasta punktum í øðrum petti halda vit ikki kann koma við, tí tað fer ikki at bera til í teirri nýggju stýrisskipanini, ið er eins og ein bráðfengis grundlógartáttur fyri okkum Føroyingar at samtykkja nakað, ið kann benda at tí, at tey »Midlertidige Bestemmelser«, ið gjørd eru sambært stýrisskipanina av 9. mai 1940, ikki hava verið lógir. Eftir okkara hugsan hava sum frammanfyri bent til hesi »Bestemmelser« verið lógir. At orðið »Bestemmelser« er brúkt ístaðinfyri »Love«, er kanska komið av tí, at ein hevur borið á kenslu, at lógsmíðingin var heill bráðfengis og skuldi bert galda fyribils. Orðið lóg kundi og átti sjálvandi at verið brúkt. Í stýrisskipanini verður kortini talað um lógarforskriftir. Hesar lógarforskriftir hava av øllum eisini av dómarannn, verið virdar og brúktar sum lógir.

ad § 2: Okkum dámar betri »staðfestan« enn »ásamman«, hóast tað ikki kann sigast at vera so stórur munur á hesum orðum. Staðfestan hevur munin í fastleika og avgerðarkraft.
Vit halda sum sagt, at tað ikki ber til hjá Føroya løgtingi at velja fulltrúa fyri kong og donsku ríkisstjórn. Heldur ikki ber tað til hjá tinginum uttan danska kongs og donsku stjórnarinnar samtykt at avseta fulltrúan hjá státi, donsku ríkisstjórnini og Danmkongi í Føroynum og eftir egnum tykki at geva einumhvørjum øðrum manni ella stovna í hendi at umsita t. d. státsins játtanir og annað danska ministerisins arbeiði í Føroynum.

ad § 3: Til seinasta punktum í fyrsta petti: Kunna ikki — sum áður bent at — samtykkja, at galdandi lóg framvegis skal vera í gildi (samanber § 1), og samstundis avgera, at tað, sum hesar lógir viðvíkja, skal umsitast av øðrum enn tí, ið lógin førútsetur ella beinteiðis

sigur skal hava umsitingina í hondum. Tá ið hesar lógir, sum hildið fram, forútseta ella beinleiðis siga, at tað er amtmaðurin, sum ministeriisins og kongsins lógligi og sambært umstøðurnar rætti fullfrúi, sum í hesum døgum skal vera fyri ministeriið og kong í teimum málum her á landi, ið danska ríkisstjórnin hevur ábyrgd fyri, kann tingið ikki, so leingi Føroyar ikki á lógligan hátt heilt hava yvirtikið ávistu mál, ið eftir galdandi lóg eru hjá ríkisstýrinum, avgera umsitingina av hesum málum.

ad § 4: Tað kann eyðvitað hert leggjast haft á skattainnkrevjingina viðvíkjandi beinleiðis skatti til løgtingið. I hesum føri kann ikki vera talan um allan almennan skatt sum kommunuskatt, jarðaskatt, byggningsskatt o. s. fr. men bara um tingsins beinleiðis skatt.

ad § 5: Okkum fellur tað rættari at nýta »lógligan hátt« í staðin fyri »vanligan hátt«.
Tað kann kanska ikki sigast, at stjórnarskipanin ikki kann broytast, fyrr enn hon er samtykt av Føroya løgtingi, tá ið tingið ikki kann binda t. d. stálin til peninga ligar játtanir. Tað tykist heldur ikki at vera ætlanin í uppskotinum, at stjórnarskipanin skal røkka longur, enn til danastjórn og løgtingið kunna koma í samráðingar um framtiðarstjórnarlag Føroya, samanber næsta stykki í greinini.
Orðið »stjórnarlag« er betur enn »stjórnarform«.

G. Ein annar minniluti (Kr. Djurhuus og A. Samuelsen) ber fram soljóðandi nevndarálit:

Begivenhederne 9. April 1940, som medførte en pludselig Afbrydelse af Forbindelsen mellem Færøerne og det øvrige Rige, maatte nødvendigvis sætte sine Spor i vort Samfundsmaskineri og nødvendiggøre Drøftelser og Overvejelser i første Række for at finde en Form for midlertidigt Styre af vore Øer under de indtraadte ekstraordinære Forhold. Livet skulde jo leves videre.
Den nugældende midlertidige Styrelsesordning af 9. Maj 1940 er forberedt af de tre Partier, Socialdemokratiet, Selvstyrepartiet og Sambandspartiet i Samarbejde med Færø Amt og desuden under Medvirkning af Dommer Bonnevie. Lagtingets 4. Parti (Fólkaflokkurin) ønskede ikke at være med i disse Overvejelser, men indtog sit særlige Standpunkt.
Styrelsesordningen blev derfor ogsaa gennemført i Lagtinget af de ovennævnte 3 Partier imod det fjerde Parti.
Styrelsesloven af 9. Maj 1940 har nu været anvendt i over 3 vanskelige Krigsaar. Den har saaledes bestaaet sin Prøve.
Mindretallet mener, at Styrelsesloven, som har vist sig brugbar i den tilbagelagte overordentlig vanskelige Tid, ogsaa maa kunne bruges, indtil Verdenskrigen er afsluttet, og Genforeningen med det øvrige Rige har fundet Sted i Overensstemmelse med

Storbritanniens Løfte. Derefter kan der som forudsat fra alle Sider optages Forhandling med Danmark om Øernes fremtidige Styre. Sambandspartiet har allerede tidligere tilsagt sin Villighed til Forhandling om de Vilkaar, der bør være gældende for Samhørighedens Fortsættelse.
Da Verdenskrigen har bragt Europa i en saadan Situation, at saa meget kan siges at være i Støbeskeen, finder Mindretallet det ikke rigtigt af Færøernes Lagting at indlade sig paa en Reformering af færøske Styrelsesforhold udover det allernødvendigste før Krigstiden. Det allernødvendigste har vi i den gældende Ordning, og den fremtidige Ordning bør først fastlægges, naar de ventede Forhandlinger med Danmark kan føres under normale Forhold. —
Mindretallet kan derfor ikke være Medforslagsstiller til noget af de fra anden Side stillede Forslag.

Meirilutin í nevndini (R. Long, J. Paturssøn, P. Petersen og Th. Petersen) lekur hesa støðu í málinum:

Fyrst mugu vit vísa á okkara skriv til tingið av 7. septembir 1943, og tær viðmerkingar, sum har eru gjørdar.
Tá tingið kom saman í septembir í ár, varð tað fyrsta ferð aftaná at fólkið hevði haft høvi til at velja sær nýggjar menn inn á ting, síðan ófriðartíðin beinleiðis nerti við okkara oyggjar. Hetta varð ársakin til, at vit hildu tað vera beint at royna at vera við til at finna fram til eitt stýrislag, soleiðis sum ein kundi væntа, at flestir av veljarum hildu tað átti at verið. Tað sýnist ikki, at hetta vil føra til árslit, og tað er ikki beint, tí øll vilja vita, at ein meirilutí av fólkinum er ikki fyri tí stýrislag, sum hevur verið í gildi síðan 1940. Um hendan stýrisskipanin framvegis skal verða í gildi, so er tað meirilutin á tingi, sum hevur atvoll hesa støðu, og má standa til svars fyri henni.
Meirilutin heldur fram, at okkara flokks støða er óbroytt, sum vit hava sagt fólki frá undan valinum á bartalsmessu. Vit hava royndt at finnið eina støðu, sum ikki broytti okkara grundsjónarmið, og tó kundi falla saman við tu stevnuskrá, sum javnaðarmenn høvdu lovað fólki, at teir vildu arbeiða fyri, og tað er hetta arbeiði, sum vit hava samráðst um í nevndini.
Minnilutin (P. M. Dam) er í nevndarálíti sínum (G) komin við nógvum almennt politiskum viðmerkingum. Hetta liggur nakað uttanfyri tað vanliga í einum nevndaráliti, men mugu vit av hesu ársøk gera okkara viðmerkingar á sama hátt.
Í grein 2 sigur minnilutin (Dam), at her: „*situr* Føroya amtmaður kongsins vegna við heimildini vlðvíkjandi staðfestan og kunngerane« uttan at siga nakað um, hví hetta er so. Minnilutin minnist, hvussu ofta harra Hilbert segði tingmonnum frá í 1940, at hann hevði fullmakt, tó at hann á Ólavsøku 1943 avsannaði hetta við at siga frá, at hann hevði »ingen særlige Instruktioner«.
Sum »amtmaður« hevur hann ikki henda myndugleika; øll vita, at ein amtmaður í friðartíð hevði heitt annað virki, og hvørki var stjórn ella sat við kongsvaldi. Nakað annað er, at hesin maður *fekk* líknandi heimild *frá løgtingi* í 1940; hann tók móti

hesum frá løgtingi, og selti sítt navn undir kunngeringina, og ásannaði soleiðis, at hetta var nakað løgtingið gav honum.
Nú ger minnilutin nakrar viðmerkingar fyri at verja sína støðu, sum verunliga er at gera harra Hilbert til varakong í Føroyum. Hesar viðmerkingar eru púra misvísandi.
Minnilutin heldur fram, at Føroyingar kunnu ikki seta kongi ein fulltrúa; samstundis ásannar hann, at onkur skal vera í kongsins stað eftir hesum uppskoti, og so mælir hann tinginum til at samtykkja, at tað skal verða amtmaðurin; einhvør kann síggja, at minnilutin gongur beint móti sínum egnu orðum og setur uppskot um, at tingi skal seta kongi amtmannin til fulltrúa.
Síðani heldur minnilutin fram, at amtmaðurin hevur kongligt útnevnilsi, meu tað er tað so nógvir her á landi, sum hava; tað hevur enn ongantíð gjørt eitt mann til kong, at hann er útnevndur av kongi. Um minnilutin vildið hildið hesa leið við kongligum útnevnilsi, so mátti hann samla saman allar kongliga útnevndar menn í Føroyum, og biðið hesar menn, sum hava fingið teirra stuðv frá kongi, seta varakong.
Hetta vildi gjørt støðuna greiða, tí tá varð tað ein serligur statur á landi, sum fekk eitt ræði, sum í einum fólkarættsligum samfelag tilkemur øllum fólkinum.
Verunleikin er tann, at kann kongur ikki — vegna serligur umstøður — seta nakran fyri seg, so má fólksins umboð gera tað; eingin annar kann hava hesa heimild, og tað viðgongur minnilutin eisini, tá hann setur uppskot um, at tingið skal samtykkja, at tað skal verða amtmaðurin.
Minnilutauppskotið er av hesi orsøk eitt reint amtsuppskot, uttan nakað ræði fyri okkum Føroyingar. Tað vil eina meira framganga av teimum fylgjandi greinum.
Í grein 3 sigur minnilutin (Dams) uppskot, at landsnevndin *stjórnar* teimum málum, ið sambært galdandi lóg eru løgd ella sambært framtíðarligum lógum verða løgd undir tingsins ræði. Einhvør má ásanna, at hetta er nakað heilt annað enn stevnuskrá javnaðarmanna, sum segði, at: »Landsnevndin er *landsins stjórn.*« Sambart stevnuskráina skuldi tað verða ein føroysk stjórn, nú verður tað sambært hesum uppskoti, harra Hilbert sum stjórn, og so ein landsnevnd, sum — soleiðis sum tað stendur í harra Hilberts brævi — »*bestyrer* de under Lagtingets Raadighed henlagte Sager.« Eitt eitt av eini stjórn, og einki annað, tað var úrslitið av javnaðarmanna stevnuskrá í royndini. Tað stendur nú í minnilutans viðmerkingum: »Við hesum lóggávuvaldið sínum kann Føroya løgting til einn og hvørja tíð avgera, hvønn tátt (tæltir), Føroyar skulu yvirtaka og átaka sær la fullu stjórnarligu, peningaligu og siðmennilíga ábyrgd fyri.« Hetta ljóðar ógvuliga væl og stórt, men tað verður so evars pinkulitið, tá ein samstundis minnist til, at minnilutin ger harra Hilbert til varakong, og soleiðis minkar um hetta lóggávuvald. *Tann noktandi rættur (vetorætturin) stendur við* eftir minnilutauppskotinum, og hann avger alt. Annars kann her verða lagt aftrat, at tá sagt verður, at »Føroya løgting til einahvørja tíð (kann) avgera hvønn tátt (hvørjar tæltir) Føroyar skulu yvirtaka« av ríkismálum sum higartil hava verið undir donskum ræði, so er einki hald í slíkari talu. Slíkt hevur løgtingið onga heimild til undir tí stjórnarlagi, sum minnilutin

hevur í uppskoti. Haraftrat kann tað ikki vænlast, at Danir undir nøkrum viðurskiftum vilja samtykkja eina mannagongd, har ríkisvald teirra hvørji ferð løgtingið sigur til, skal lata eitt ríkismál frá sær og annað eftir, so við og við til tað kanska stendur eftir á berum.

Amtið sigur í sínum skrivi uppísaman, at hann hevur noktandi rætt (vetorætt). Tað verður sagt eina týðuligast um grein 5, sum amtið sigur seg: »ikke i Stand til at stadfæste.« Javnaðarmannauppskotið ljóðaði tá soleiðis, at stjórnarskipanin skuldi verða í gildi »til broytan *er samtykt av Føroya løgtingi* á lógligan hátt.« — So fingu javnaðarmenn harra Hilberts boð um, at her vildi hann nýta vetorættin, og beinanvegin broyttu teir hesa grein, soleiðis at tey einastu orðini í teirra uppskoti, sum kunnu geva Føroyingum eitt sindur av vissu fyri, at teir sjálvir skulda sleppa at leggja framtíðarleiðina, tá bardagin einaferð er av, vórðu strikaði, og hetta vegna harra Hilberts boð — ella hóttan — við sínum vetorætti. Hetta vísir okkum klárt, at ætlanin er tað, sum er skrivað í amtsins skrivi, at tað er stjórnarskipanin av 1940 umaftur einans nú við »en anden Formulering.«

Eftir heilu politisku støðu minnilutans kunnu vit ikki ganga við til eitt tílíkt uppskot. Vit eru fmóti, at tann stjórnarliga ábyrgdin ikki klárt og greitt skal vera hjá fólksins umboð; vit mugu krevja, at allir noktandi rættur (vetorættur) verður burturheindur, soleiðis at tað verunliga er Føroya løgting, sum hevur lóggávuvald her á landi; tá minnilutin ikki vil fylgja hesum, so hevur hann gingið móti síni stevnuskrá, og so kann tað ikki verða nakað felagsuppskot millum okkara flokkav.

Støða meirilutans má hereftir vera tann, at vit nú í uppskoti til tingið seta fram okkara ætlan, soleiðis at fyrsta uppskotið er:

1. *Broytingaruppskot til javnaðarmannauppskotið*, hvarvið vit leggja stjórnarræði hjá Føroya løgtingi, og tí umboði, sum løgtingið velur, og sum tá er landsins stjóra í øllum førum.

2. *Uppskot til stjórnarskipan* soleiðis sum meirilutin sambært okkara stevnuskrá meinar, at hon átti at verið gjørd undir teimum viðurskiftum, vit liva í í dag.

Um tað skuldi hent, at øll tey uppskot, sum fram verða sett á tingi falla, hvat ein kann bera ólta fyri, so má meirilutin gera hesar viðmerkingar til la støðu, sum verður úrslitið:

Stjórnarligt ræði má vera til fyri at eio flokkur á tingi kann taka við tí *stjórnarligu ábyrgdini.* Tað ber ikki til at skilja ræði og ábyrgdina frá hvørjum øðrum. Stjórnarskipan av 1940 leggur alt ræðið til ein mann — til amtmannin — og onga ábyrgd á hann, men leggur ábyrgdina á eina danska stjórn, sum ikki er til í dag, men einaferð aftaná at bardagin er lokin, skal skapast í tí danska ríkinum. Sjálvur sigur hann í kunngerð sínai 7. sept. 1913 B: »Jeg vil udøve mit Embede under Ansvar overfor Kongen og den danske Regering«, men nevnir ikki við einum orði, at hann ber nakra ábyrgd áraka Føroya løgtingi, hvat hann beldur ikki eftir uppskoti minnilutans ger.

Hetta er eitt brot uppá allan fólkarættsligan sið, og hetta kann ikki føra til annað enn stóran trupulleika fyri land og fólk. Vit fráleggja okkum alla ábyrgd fyri besum stýri, og teir sum ikki eru við til at broyta stjórnarreglurnar, soleiðis at ábyrgdin og ræði koma at fylgjast at, teir taka við sínu støðu ábyrgdina fyri allar teir trupulleikar, teir á ymiskan hátt føra inn yvir okkara land og fólk. Hetta verður at fata soleiðis, at tað ikki einans eru teir trupulleikar, sum í dag eru fyri vørutilfluttning, vørubýti o. t., men ikki minst fyri tað arbeiði fyri framtíðini, sum skuldi verði gjørt, men liggur á lánni vegna skeivar stjórnarreglur.

Til uppskotini skulu vit gera hesar *viðmerkingar:*

Broytingaruppskotið:

Petti A: Við at geva landsins stjóra heimild til at undirskriva kongsveldisins vegna, tekur Føroya løgting somu støðu, sum Íslands alting tók í 1940. Við hesum stigi verður samstundis avgjørt, at eingin noktandi rættur (vetorættur) meira er til, tí stjórnin hevur ábyrgd fyri tinginum, og tingið kann tí gera tað, at stjórnin má fara frá, um hon ikki setur tingsins samtykt í gildi. Við hesum uppskoti hava Føroyar fingið fullt fólkaræði (demokrati), so leingi bardagin heldur á.

Petti B: Landsnevndin eigur at verða landsins stjóra í øllum førum. Hetta er sambart okkara stevnuskrá, og sambart javnaðarmanna stevnuskrá. Henda greinin er soleiðis at fata, at landsnevndin fær allt tað ræði, sum higartil eftir lógarforskriftum hevur verið hjá einum stjórnarráði (ministerium).

Petti C: Tá Føroya løgting nú samtykkir stjórnarreglur, er tað neyðugt, at løgtingið og Føroya fólk verður við til at broyta hesar reglur. Javnaðarmannauppskotið um at broytan skal kunna fara fram, tá tað er »samtykt á lógligan hátt« merkir einans, at danski ríkisdagur og kongsvald kann gera nýggja lóg, tá løgtingið er hoyrt, og hindur ikki broytanina til at verða samsvarandi løgtingsins samtykt. Á sama hátt týður tað einki, at samráðingar skulu verða farnar fram, tí um hesar samráðingar verða úrslitaleysar, so stendur tað frítt fyri hjá Danum at broyta okkara viðurskiftir her á landi. Skal tað vissast Føroyingum at verða við til at leggja framtíðarleiðina, so má tað beinleiðis standa í samtyktini.

Uppskot til stjórnarskipan:

gr. 1: Er samsvarandi okkara uppskoti í september, sí viðmerkingarnar har.

gr. 2: Er samsvarandi okkara stevnuskrá frá 15. juni 1943. Henda grein byggir á tí grundarlag, at Føroyar nú eru

uttan stýri, og at avgerðarrætturin er fallin aftur til fólkið, sum so gjøgnum løglingið gevur all stjórnarræði til eina landsstjórn. Hetta er tann bráðfengis skipan, sum okkara flokkur heldur er neyðug, til ein fullfíggjað væl umhugsað stjórnarskipan er samtykt av Føroya løgtingi, av teirri bráðfengis stjórnini, og síðani av Føroya fólki.

gr. 3: Henda grein ásetur, samsvarandi okkara stevnuskrá, hvat virki landsins stjórn fyrst skal fara undir at fáa avgreitt.

gr. 4: Hetta samsvarar okkara stevnuskrá.

gr. 5: Tað eigur at verða fastlagt, at vit Føroyingar ikki nakrantíð mugu koma aftur til eina amtssløðn, men at tað nú má verða Føroya fólk, sum samtykkir eina hvørja broytan, sum trongd verður til í stjórnarreglunum. Henda rættin eiga vit sum fólk, og henda rættin eiga vit sum fólk, og henda rættin skuldu Føroyingar fyri langa tíðir síðani havt ásettan í lóggávuni.

gr. 6: Tað er skiligt, at lingingar verða at taka upp við Danmark skjótast til her um øll mál, sum standast av stjórnarumskipanini, um vegir til framtíðar samvirki, sum báðir partar kunna semjast um.

gr. 7: Tað, sum verður gjørt av lógum um stjórnarumskipanina í bardagatíð, kann væl teinkjast at verða ávirkað av teimum óvanligu tíðum, tað eigur tí at ásetast, at hetta skal verða eftirhugt, so skjótt friðartíð aftur er komin til heimin.

gr. 8: Henda grein er samsvarandi okkara uppskoti í september.

Tey val, sum hava verið á krossmessu og bartalsmessu, hava víst, at ein stórur partur av Føroya fólki ikki er samsint í, at stjórnarreglurnar frá 9. mai 1940 skulu standa við. Á sama hátt vil einhvør, sum livur her á landi, hava kent á sær, at fólkið ikki er samsint í teimum stovnum, sum hetta »amtsveldi« hevur skapt. Her kann nevnast: Vørumonopol, Valuta-miðstøðan, brennivínsvindin, príseftiransingin (soleiðis sum hon er skipað) o. s. fr.; alt hetta vil ein dagliga kenna misnøgd fyri hjá fólki víða hvar í Føroyum. Vit mugu frá okkara flokki siga fólki frá, at tað er okkum ógjørligt at fáa hetta broytt, tá ein meiriluti á tingi, við at stilla ymisk uppskot, so øll falla, verunliga ger tað sama sum teir sameindu seytjan gjørdu í 1940, at leggja alt ræði burtur frá okkum Føroyingum. Teir hava tí ábyrgdina fyri tí, sum hereftir fer fram, og fyri allar teir trupulleikar, sum hetta kann og vil føra til Føroya fólk.

Vit hava eisini í flokkinum samráðst um møguleikan fyri at gera eina broyting í tí gomlu stjórnarskipanini av 9. mai 1940, soleiðis at í hvussu er tann noktandi rætturin (veturrætturin)

fór burtur. Hetta vilja vit ikki gera uppskot um, tí tað verunliga er soleiðis, at allar greinirnar — uttan tann fyrsta — í hesum »Bestemmelsera eru so heilt á skeivari leið, at tað er ógjørligt at bøta upp á hetta.

Uppskot

frá minniluta í nevndini (P. M. Dam):

§ 1.

Lógir, rættarforskriftir og fyriskipanir, ið vóru í gildi tann 9. mai 1940, skulu — um tær ikki sambært teirra innihald ella sambært lógligar samtyktir eru dottnar burtur, avliknar ella broyttar — framvegis verða í gildi, har ið umstøður eru til less, til lóglig samtykt avger annað.

Á sama hátt skulu kunngeranir sambært stjórnarskipanina nr. 1 av 9. mai 1940 verða í gildi, til onnur lóglig samtykt verður kunngjord.

§ 2.

Soleingi, sum henda bráðfengis stjórnarskipan verður í gildi, er lóggávuvaldið hjá kongsvaldinum og Føroya løgtingi í felag.

Meðan viðurskiftini eru soleiðis, at lógir ikki kunnu verða lagdar fyri kongin til staðfeslingar og kunngerap, situr Foroya amtmaður kongsins vegna við heimildini viðvíkjandi staðfestan og kunngeran.

Allar lógir verða at samlykkja av løgtinginum á føroyskum og donskum máli og verða kunngjørdar á báðum málum.

Í kunngeranini verða lógirnar at bera fram við undirskriftini hjá landsnevndarinnar forseta ella øðrum limi landsnevndarinnar, um lógin viðvíkjur máli, ið serliga liggur undir hansara virki, og við einari av kongi ella í kongsins stað av amtmanninum undirskrivaðari staðfestingaráfekning.

§ 3.

Løgtingið velur eina landsnevnd við vanligum atkvøðumeirluta.

Undir ábyrgd fyri løgtinginum stjórnar landsnevndin teim málum, ið sambært galdandi lóg eru løgd ella sambært framtíðarlignum lógum verða løgd undir tingsins ræði.

Tá ið løgtingið ikki situr, kann landsnevndin tingsins vegna í bráðskundsmálum samtykkja lógir.

Tílíkar lógir skulu í fyrstu tingsetu uttaná leggjast fyri tingið.

Landsnevndarlimirnir velja sína millum ein forseta og kunna býta arbeiðið sína millum ella gera það í felag. Uppskot um hetta verða at leggja fyri løgtingið til samtyktar. Samtykt verða tey so at kunngera av løgtinginum.

§ 4.

Frá 1. januar 1944 at rokna kann eingin beinleiðis skattur til løgtingið verða kravdur, áðrenn tað leypandi árs fíggjarætlan fyri landastýrið í Føroyum er samtykt og kunngjord.

Í fíggjarætlanini verða settar fær av løgtinginum samtyktu játtanir. Í somu fíggjarætlan verður greitt frá státsins útreiðslum og innløgum viðvíkjandi Føroyum.

§ 5.

Henda bráðfengis stjórnarskipan verður í gildi, til broytan er samtykt á lógligan hátt aftaná at samráðing millum danska ríkisstýrið og løglingið er farin fram.

So skjótt ófriðartíðin er av, tekur Føroya løgting upp tingingar um framtíðar stjórnarlag Føroya.

§ 6.

Henda lóg kemur í gildi beinavegin. Samstundis fer stýrisskipanin nr. 1 av 9. mai 1940 úr gildi.

Uppskot

frá meirilutanum í nevndini (R. Long, J. Palursson, P. Petersen og Th. Petersen).

I.

Broytingaruppskot til Javnaðarmannauppskotið:

A. Grein 2 verður orðað soleiðis:

»Soleingi henda bráðfengis stjórnarskipan verður í gildi, er lóggávuvaldið hjá kongsvaldinum og Føroya løgtingi í felag. Meðan likindini eru slík, at lógir ikki kunnu verða lagdar fyri kong til staðfestingar og kunngeran, verður landsins stjórn heimilað at taka við øllum starvi kongsveldisins vegna.«

B. Grein 3, annað pátt, verður broytt til:

»Undir ábyrgd fyri løgtinginum er landsnevndin landsins stjórn.«

C. Grein 5 verður orðað soleiðis:

»Hendan bráðfengis stjórnarskipan verður í gildi, til broyting er samtykt av Føroya løgtingi og kunngjørd á lógligan hátt.

So skjótt ófriðartíðin er av, tekur Føroya løgting upp tingingar um framtíðar stjórnarlag Føroya.«

II.

Uppskot

til

Lóg um bráðfengis stjórnarskipan Føroya lands.

Føroya løgting hevur samtykt og løglingsformaðurin kunngerð hesa lóg:

gr. 1.

Allar lógir, rættarforskriftir og fyriskipanir, sum vóru í gildi fanu 9. mai 1940 — og sum enn eru í gildi — skulu framvegis verða í gildi, har líkindi eru til tess, til lóglig samtykt avger annað.

Kunngeringar, sbr. stjórnarskipan nr. 1 av 9. mai 1940 skulu verða í gildi, til onnur lóglig samtykt verður kunngjørd.

gr. 2.

Løgtingið letur eini landsstjórn upp í hendi bráðfengis all stjórnarræðið, undir fullari ábyrgd fyri linginum.

Løgtingið velur ein bráðfengis landsstjóra, sum eisini kann vera limur í landsstjórnini. Hann tekur við forsæti á landsstjórnarfundunum.

gr. 3.

Landsstjórnin fær um hendi:

a) at gera uppskot til fíggjarlóg fyri Føroyar,
b) at fyrireika landsins viðurskifti við útheimin,
c) at samráðast við allar menn, sum starvast í okkara stjórnarumdømi fyri at leggja fyri tingið uppskot til ta skipan, sum skal galda undir nýggja bráðfengis stýrislagnum.

gr. 4.

Løgtingið hevur sum tjóðting tað serliga starv fyrst og fremst at fyrireika og samtykkja uppskot til nýggja stjórnarskipan, sum við nýval skal leggjast fyri Føroya fólk.

gr. 5.

Á henda hátt verður fastløgd ein stýrisskipan, sum ikki kann broytast utan av Føroya Løgtingi og av Føroya fólki.

gr. 6.

Stjórnin fyrireikar, at tíknar verða upp tingingar við Danmark um viðurskiftini og øll tørvandi mál, so skjótt tað er gjørligt.

Stjórnin ber ábyrgd fyri, at Føroya fólk sum heild verður umboðað undir øllum tingingunum. Um neyðugt verða tingingarmenninir at velja við almennum vali.

gr. 7.

Tá friðartíð er komin, tekur landsstjórnin upp spurningin, um tørvur er at broyta stjórnarskipanina, og um so er, ger hon uppskot til broytingar, sum tá verða at leggja fyri Føroya Løgting og síðani fyri Føroya fólk bæði við nýval til tingið og við fólkaatkvøðu, fyri at framtíðar landsstýri endaliga kann verða fastlagt.

gr. 8.

Henda lóg kemur í gildi beinan vegin. Samstundis fer stýrisskipanin nr. 1 av 9. mai 1940 úr gildi.

Framhaldsdálk P. M. Dam (3. nov.):

Av tí at undirritaði minniluti fyrst nú, tá ið álitið í stjórnarskipanarmálinum er framlagt, hevur høvi til at síggja tað av meirlutanum givna álit, ið ongantíð hevur verið lisið upp ella skriviliga framlagt í nevndini, og tá ið hetta meirlutans álit er skrivað sum vanlig blaðgrein við rongum viðmerkingum til minnilutans aðalálit, loyvir minnilutin sær at framseta fylgjandi aftursvar og rættleiðing av meirlutans villum:

Á síðu 22 í meginálitinum heldur meirlutin fram, at atkvøðurnar við loglingsvalið í ár sýndu, at meirlutin í Føroyum var ímóti stýrisskipanini av 1940.

Hetta er rong áskoðan, tí eingin av teimum trimum flokkunum tók støðu ímóti hesi stýrisskipan undir krígsins. Men javnaðarflokkurin og sjálvstýrisflokkurin logdu fram teirra principiella støðu viðvíkjandi, hvussu teir hildu, at stýrisskipanin skal verða, tá ið viðurskiftini Danmarkar og Føroya imillum skulu leggjast í fasta legu. Javnaðarmenn hava líkið fasta principiella framtíðarstøðu og eru so sluttt altíð fúsir at gera tey stig móti hesi støðu, ið eru møgulig at gjøgnumfara. Tað verður gjørt í javnaðarmanna uppskotinum.

Á sama síðu verður av meirlutanum hildið fram, at fólkaflokkurin hevur sett fram uppskot samsvarandi javnaðarmanna stjórnarstøðu.

Hetta er skeivt. Javnaðarmenn hava t. d. ongatíð og ongastaðni hildið fram la »ulopisku« støðu, at Føroya fólk hara við eini tingavgerð, uttan statsins samtykki, skal taka sær rættin til at ávísa peningaútgjøld av statskassanum.

Viðari á sama síðu sigur sami meirluti, at minnilutin (Dam) ikki sigur nakað um, hví hann heldur, at Føroya amtmaður kongsins vegna situr við heimildini viðvíkjandi staðfestan og kunngerð.

Af hetta er blóðskeivt, kann ein og hvør vissa seg um við at lesa seinna helming á síðu 16 og fyrra helming á síðu 17, har minnilutin grundar sína áskoðan um amtmannsins støðu sum fulltrúi fyri Danakong og Danastjórn.

Henda støða er ásannað av frægastu lógfrøðingum landsins.

Forvitnisligt er á sama síðu at lesa meirlutans grundan av, hví hann heldur amtmannin ikki kunna sita við heimildini at handla kongsins vegna. Hann heldur fram, at øll vita, at ein amtmaður í friðartíð hvørki var stjórn ella sat við kongsvaldi.

Samsvarandi hesi fólkaflokksku áskoðan skuldi altso ein stýrimaður ikki, tá ið skiparanum barst frá, kunna líkið ábyrgd og handla sum skipari tessvegna, hann ikki hevði verið skipari umborð. Og ein fulltrúi í t. d. einum banka skuldi heldur ikki kunna verið í stjórans stað, tá ið stjórin er burturstaddur.

Á síðu 23 signr meirlutin, at minnilutin setur uppskot um, at fingið skal sela kongi amtmannin til fulltrúu og heldur fram, at hetta gongur beint ímóti minnilutans orðum um, at Føroyingar ikki kunna sela kongi ein fulltrúa.

Hetta er skeiv útleggjan av minnilutans uppskoti og viðmerkingum, ið bara ávisa, at amtmaðurin er kongsins fulltrúi, og at hansara samtykt sum tílíkur, meðan sambandið við Danmark er slitið, hevur sama rættsligu kraft sum hjá kongi.

Fullkomiliga burturvið fellur tað einum, tá ið meirlutin í næsta stykki á sama síðu reynir at leggja minnilutanum í munnin, at bara konglig útnevnan skal vera nóg mikið at gera mann til kong.

Tað, ið minnilutin hevur hildið fram, er, at amtmaðurin millum annað, ið ber prógv fyri, at hann er kongsins fulltrúi her á landi í dag, er kongliga útnevndur sum amtmaður og hægsti statsins embætismaður og polittiski umboðsmaður.

Óhatiligt fellur tað einum, at meirlutin skal eiga so framvaksin evni at fáa annað enn tað verunliga sagda burturúr minnilutans uppskoti, at hann ósmæðin kann fáa seg at siga, at minnilutans uppskot gevur Føroyingum einki ræði. Verunleikin er jú tann, at minnilutans uppskot gevur løgtinginum all ræði her á landi, har ið tað leggur lóggávuvaldið til løgtingið og kongin. Og í viðmerkingunum, ið ikki kunna skiljast frá sjálvum lógaruppskotinum, verður undirstrikað, at kongsins ella hansara fulltrúa støða til og lýdni móti fólkaviljanum, t. v. s. løgtingsins samtyktum, skal í odd og egg verða tað sama sum tilfellið er í Danmark, har tað enn ikki er hent, at kongur hevur sýtt at fremja ríkisdagsins og sjórnarinnar samtyktir.

Meirlutin sigur (síðn 23), at tað ræði, ið minnilutin gevur landsnevndini, er ikki samsvarandi við javnaðarmanna stevnuskrá, tá minnilutin ikki letur landsnevndina átaka sær alla stjórnan her á landi (eisini tað, sum staturin hevur ta siðmenniligu og peningaligu ábyrgd fyri).

Tað er hvørjum skilamanni fullkomiliga greitt, at landsnevndin eins og hildið fram í minnilutans uppskoti ikki kann røkka longur sum landsins stjórn enn í teimum málum, sum landið lógliga hevur átikið sær ta stjórnarligu, peningaligu og siðmenniligu ábyrgd fyri.

Tingið kann sambært minnilutans uppskot til eina og hvørja tíð við tóggávuvaldinum átaka sær hesa ábyrgd fyri eitt hvørt mál, sum staturin nú sambært tær lógir, sum eru galdandi, og sum eisini meirlutin hevur uppskot um, skulu verða galdandi, hevur ta peningaligu, siðmenniligu og stjórnarligu ábyrgd fyri.

Á síðn 24 roynir meirlutin at yppa akslar at og gera til einkis tingsins rætt í minnilutans uppskoti til at avgera, hvønn tátt (hvørjar tættir) Føroyar skulu yvirtaka av ríkismálum, sum higartil hava verið undir donskum ræði, og heldur at slíkt er ikki heimlað løgtinginum í minnilutans stjórnaruppskoti, og at tað aldri kann væntast, at Danir undir nøkrum viðurskiftum vilja samtykkja eina mannagongd, har ríkisvald leirra, hvørja ferð løgtingið sigur til, skal lata eitt ríkismál frá sær fyri og annað eftir.

So ræðuliga øvugt kunnu menn skriva!

Støðan er tann í dag, at ongar stjórnarligar broytingar kunnu benda uttan danska umboðsvaldisins (amtmannsins) samtykt, samanber bretsku stjórnarinnar boð um og váttan av hesum fleiri ferðir.

Bretska stjórnin hevur sagt amtmannin at verða fulltrúa danaveldisins. Eftir minnilutans áskoðan er hann tað eisini sum ávíst.

Tá ið danska umboðsvaldið Dana kongs og Dana stjórnar vegna er giogið við til, at Føroya løgting skal hava rætt til at yvirtaka hvønn tátt, ið tað yvskir, og sama umboðsvaldið hevur góðkent, at kongurin ella hansara fulltrúi ikki skal nýta sýtingarrættin yvirfyri løgtingsins samtyktum í teimum førum, sum sýtingarrætturin í tilsvarandi tilfellum ikki hevur verið nýttur yvirfyri danska ríkisdagsins samtyktum, so er tað skilaleys tala at halda fram, at Føroya løgting sambært minnilutans stjórnaruppskot ikki hevur rætt at leggja meira og meira undir sítt stjórnarvald.

Meirlutin tekur tað fram sum eitt veikleikstekin hjá minnilutanum, at hann hevur broytt ta upprunaligu orðanina av grein 5, har sagt var, at stjórnarskipanin skuldi verða í gildi, til broytan var samtykt av Føroya løgtingi á lógligan hátt, til at stjórnarskipanin skal

verða í gildi til broytan er samtykt á lógligan hátt uftaná at samráðing millum danska ríkisstýrið og løgtingið er farin fram. Hesa broytan illgitur meirlutin minnilutan fyri at hava gjort vegna amtmannsins boð ella hóttan.

Hetta minnir á orðalokini um, hvussu maðurin sjálvur er, ið altíð illgitur og manmmínkar annan.

Samleikin er, at hitt fyrra orðaljóðið eftir gjøllari umhugsan ikki kundi nýtast, tí tað ber ikki til yvir fyri statinum við lóg at siga, at allar lógir, ið t. d. binda statin at rinda pening til Føroyar, skulu verða í gildi, og so í sama lóg at gera statsins rætt at falla frá hesari peningarindan treytaðan av løgtingsins samtykt. Um løgtingið ikki vildi samtykt í statsins kravi at avtaka lóg, ið hindur hann til at rinda pening til Føroyar, skuldi hann so verið noyddur til ævigar tíðir at rinda henda pening?

Umskrivanin av *gr.* 5 tryggjar tað sama sum upprunaliga var ætlað, nevniliga, at stjórnarskipanin skal verða í gildi, til samráðingar eru farnar fram millum Danir og Føroyingar viðvíkjandi, um skipanin skal halda fram, ella broyting skal verða gjørd í henni.

Tað er av meirlutanum hildið fram, at tað er eingin munur millum minnilutans uppskot og stýrisskipanina av 1940.

Tað er ikki beint.

Fyri tað fyrsta gevur minnilutans uppskot føroyskum máli fullan rætt í øllum lívsins føri her á landi.

Harnæst er at siga, at meðan stýrisskipanin av 1940 var trýst í gildi av viðurskiftunum uttan flokkanna og Dana umboðsvaldsins principiellu støðutakan, so er minnilutans stjórnaruppskot ikki trýst ígjøgnum av teim verandi umstøðum og viðurskiftum, men er ein »principiel« støðutakan um ikki bert, hvussu stjórnarlagið er ynskt nú, men hvussu tað eigur at verða í komandi tíðum.

Tá ið meirlutin í álitti sínum reynir at skjóta alla ábyrgd frá sær tingstarvinum viðvíkjandi, um øll stjórnarskipanaruppskotini falla, kann tað bara vera tikið sum vanmaktartekin og reynd til at skjóta seg undan teirri ábyrgd, ið verunliga liggur á fólkaflokkinum sum størsta flokki tingsins.

Tað liggur á fólkaflokkinum, um hann við at greiða atkvøðu fyri minnilutans uppskoti vil veita Føroyingum fullan og óskerdan rætt at taka tað heimaræði, ið ein meirluti er sintur fyri.

Broytingaruppskot

frá Th. Petersen o. fl.:

Meirlutin í nevndini (R. Long, J. Patursson, P. Petersen og Th. Petersen) loyvir sær at seta fram broytingaruppskot til okkara uppskot II, av tí at hetlar av misgávum ikki er komið við í álitið.

Uppskot:

Í grein 2 verður sett sum nýtt fyrsta petti:

»Sum tjóðling hevur Føroya løgling alt stjórnarvaldið og lóggávuvaldið í hondum.«

Broytingaruppskot

frá A. Samuelsen og Kr. Djurhuus:

1) Løgtingið velur eina nevnd uppá 7 limir. Henda nevnd fær í uppdrag at savna saman og leggja til rættis øll tey mál, tingið hevur í huga at halda fram undir teimum tingingum, sum ællast fara fram millum stýrið í hinum parlinum av kongadømínum og løgtingið, tá kríggið er lokið, og Danmark aftur er frítt. — Nevndin skal hava heimild til gjøgnum Føroya amt at skaffa til vegis allar atkomiligar upplýsingar, sum nevndin heldur verða neyðugar til eina greiða viðgerð av avvarandi málum.

2) Løgtingsmál nr. X—7/1943 (Stjórnarskipan Føroya lands) verður beint til ta undir 1) umrøddu nevnd.

3) Nevndin hevur skyldu at geva tinginum frágreiðing um starv sítt, og skal henda frágreiðing eins og øll innkomin skjøl seinast ein mánað frammanundan teimum undir 1) nevndu tingingum vera avgreidd. Frágreiðingin skal stílast til løgtingið, men handast til løgtingsskrivstovona.

2. viðg. 5. nov. 3. viðg. 11. nov., 12. nov. Atkvøðugreiðslan gav hetta úrslit: Uppskot I frá meirilutanum (Broytingaruppskot til javnaðarmannauppskotið) varð samtykt við 12 atkv. (fólkaflokkinum) — 1 (A. Djurhuus). Uppskot frá minnilutanum (P. M. Dam) § 1 fall, bert 12 atkv. (fólkaflokkurin)—0. Uppskotið í sínu heild varð soleiðis burturdottið. Broytingaruppskotið frá Thorstein Petersen o. fl. til uppskot II fall, bert 12 atkv.—0. Uppskot II frá meirilutanum fall, bert 12 atkv. (fólkaflokkurin)—0. Uppskot frá minnilutanum (A. Samuelsen og Kr. Djurhuus) fall, bert 8 atkv. (sambandsflokkurin)—0.

17. nov. framlegði javnaðarflokkurin soljóðandi bræv:

Orsakuð av at viðgerðin av stjórnarskipanarmálinum fór soleiðis fram á tingi, at uppskotið hjá Føroya javnaðarflokki í málinum ikki kom óbroytt undir atkvøðugreiðslu, og tingið so statt ikki fekk høvi at taka støðu til uppskotið, loyvir undirskrivaði javnaðarflokkur á tingi sær hervið at biðja tað høga ting um at taka stjórnarskipanaruppskotið hjá javnaðarmonnum aftur til viðgerðar, so at tað kann koma til atkvøðugreiðslu samsvarandi tingskipanina.

Tað kann verða viðmerkt, at orðadráttur ikki nýtist at fara fram um uppskotið, um flokkarnir eru samdir um tað. Ein nýggj viðgerð av málinum vil tá ikki leingja um tingsetuna.

23. nov.: Loyvi at viðgera málið ikki givið. Ja atkvóðu: Johan Poulsen, P. M. Dam, Kr. Djurhuus, Trygve Samuelsen, A. Samuelsen, J. P. Henriksen, J. H. Daubjørg, Jacob Fr. Øregaard og J. P. Davidsen. Hinir atkvóðu ikki.

---

8. Fólkatryggingarlóg.

Frl. 14. sept. 1. viðg. 18. sept.

Álit (7. dec.):

Sambart løgtingssamtykt 1940 (tingmál nr. X—12/1940 bls. 135) varð landsnevndin biðin um at taka til umhugsunar spurningin um eina umskipan av okkara socialu viðurskiftum.

Enn liggur einki álit frá landsnevndini fyri tinginum.

Hin Føroyski Fólkaflokkurin og Føroya Javnaðarflokkur hava hvør sær tikið hetta mál uppaftur til tingsins umhugsan:

Hin fyrri skrivar soleiðis:

»Vit undirskrivaðu løgtingsmenn loyva okkum við hesum at heita á tingi um at taka til viðgerðar spurningin um at seta í gildi eina fullfíggjaða fólkatryggingarlóg her á landi.

Endamálið má vera, at allir tættir, so sum ellis- og avlamisrenta, einkjupeningur, sinnissjúkragjøld, sjúkra- og skaðatryggingar o. s. fr. koma undir eina skipan, umsitin av Løgtinginum.

Hetta tiltak er stórfingið og má tí kannast gjølla og skal miðja ímóti at tryggja tí einstaka og tann ella tey sum eiga hansara ella hennara uppihald, lívsins uppihald og hartil at gera raksturin av teirri higartil so spjaddu lóggávu væl einfaldati og bíligari.

Samstundis má tann styrkveiting, sum tingið hevur átikið sær undir hesi verandi dýrtíðini leggjast í eina fastari legu.

Her eiga vit ikki at gloyma tey, sum afturhaldin eru og sum tigandi bera teirra neyð. Tingið má her kenna sína skyldu móti hesum og skipa so fyri, at eingin í loyndum skal liða neyð, men sjálvt ella gjøgnum sóknarstýrini fær upplýsingar um viðurskifti teirra fátæku á hvørjum staði í landinum, tí tað er og má vera gjørligt.

Vit ivast ikki í, at allir tingmenn vilja gera teirra tit at fáa hetta tiltak skipað á besta hátt og ivast ikki í, at sóknarstýrini vilja gera sítt fyri at styrkveitingin kann verða nýtt eftir veruligari trongd.«

Hin seinni skrivar so:

»Undirskrivaði Føroya Javnaðarflokkur loyvir sær at biðja tað heiðraða løgting um at taka besi mál til viðgerðar í hesu tingselu:

. . . . . .

Fólkatrygging (umskipan av ellisrentu og allari øðrari socialari forsorg«.

Sociala nevndin hevur fingið hetta mál til umhugsunar.

Nevndin kann vísa til teir upplýsingar, sum fram eru fluttir í omanfyri nevnda máli (tingtíðindi 1940 bls. 130 ff.)

Tað framgongur av nevndu skrivum, at ætlanin er at fáa sett í gildi her á landi eina tvungna fólkatrygging, sum skal umfata alla sociala forsorg, tað vil siga at tann higartil so spjadda lóggáva skal skipast meira einfald og á einari hond.

Við eina slíka umskipan fær tað almenna betri umsjón við styrkveitingini og hartil verður raksturin av sociallóggávuni ætlandi bíligari.

Tann stóra umskipanin heldur nevndin liggur í, at henda tilætluða tvungna fólkatryggingin skal grundast á kommunistisk principp. Tann einstaki letur til raksturin eftir førimuni og fær av henni eftir tørvi, t. v. s. at hvør rindar eftir ogn og førimuni eitt er nú sum ein vissur partur cyka aftrat skattinum og fær tað tørvandi til lívsins uppihald á ellisárum, ella um arbeiðismegin verður skerd vegna sjúku ella óhappi, um uppihaldarin doyr ella á annan hátt ikki er førur fyri at røkja sína uppihaldsskyldu vegna sjúku ella óhapp.

Av hesum má frámgangga, at eisini vanlukkutryggingin kemur at umfatast av hesi lóggávu.

Tað verður eisini sipað til styrkveitingina yvirhøvur.

Hond í hond við hesum lívsins viðurskiftum fylgir eisini tann rættur, sum tryggjaður hevur verið hvørjum einstakum, sum ikki hevur verið førur at uppihalda sær t. v. s. rætturin til líví. Henda almenna styrkveitingin hevur havt við sær vissar skerjingar av rættinduni. Tí má tað ætlast, at eisini henda lóggáva umfatast av hesum máli.

Av bls. 193 í tingtíðindi 1940 framgongur, hvat tann sociala forsorgin kostar í tí almenna og eisini tí einstaka og tað framgongur eisini, hvussu henda lóggáva er skipað.

Nevndin má ásanna týðningin av eini gjøllari umskipan av hesum viðurskiftum, men sum longu flutt fram, so er henda lóggáva so ymist háttað, at ein umskipan neyvan kann tilevnast uttan í samarbeiði við teir, sum umsita hesa lóggávu.

Sum vit hava sæð, so eru summi umráðini í samlag millum ríkiskassa og løgting, summi eru meira ella minni privat við ríkis- ella tingstuðningi og s. v.

Tað má tí haldast neyðugt, at lógarumráðið og ivaleyst skipanin í sínu heild verður kannað í samarbeiði við teir avvarandi stovnarnar.

Tað er kanska ikki eftir tingsins vild einaferð enn at beina málið til eina nevnd til fyrireikingar, men nevndin í sínu heild er samd um, at hetta lógartilfar eigur gjølla viðferð.

Tað er eisini nevndini kunnugt, at landsnevndin hevur gjort tiltak til hesi endanáls fráma og hertil varð peningur játtaður í seinastu vanligu tingsetu, ætlandi vil arbeiðið ikki fara at verða so drúgt.

Tað skal skilast til, at tað er væl lættari at fara undir hetta lógarverk nú við tað at tingið fyri sín part hevur niðurfyri í sociala grunninum.

Nevndin mælir tí til, at hetta lógarverk verður gjørt av landsnevndini í samarbeiði við umboðsmanni fyri hvørn teirra, sum hvør í sínum lagi hevur umsitingina av verandi skipan, t. d. Centralforeningen af Sygekasser paa Færøerne, og Tryggingarsambandið Føroyar.

Vísandi til tað í álitinum framlutta setir nevndin fram hetta

Uppskot:

Álagt verður landsnevndini samsvarandi álitinum at gera uppskot til lóg um tvungna fólkatrygging at leggja fyri løgtingið í næstu tingsetu.

Framhaldsálit:

Nú ein tíma undan aðru viðgerð, ið varð ásett fyri einum tíma síðan at fara fram og til endaliga viðgerð og sløðutakan í kvøld tessvegna at ætlanin er at enda tingið í hesum sólarringi, havi eg í dagsskráini, ið skal viðgerast um ein tíma, funnið hetta álit.

Tað er eyðvitað at hetta av okkum javnaðarmonnum reista mál, ið hevur so ómetuliga stóran týdning at fáa greitt við skili, og sum er so víttfevnandi og stórtøki, at tað krevur gjøllastu og ídnastu viðgerð, ikki, í tí skili, sum tað nú liggur fyri aftaná einar tríggjar mánaða langa viðgerðartíð, hvarí tað onga nevndarviðgerð hevur fingið, er so lýst og evnað til av formanni nevndarinnar, at tað yvirhøvur er møguligt hjá minnilutanum (J. H. Danbjørg) at góðtaka tað uttan við øllum møguligum fyrivarni.

Sum í málinum um ellisrentu so í hesum máli: formaðurin hevur fullkomiliga brotið allan nevndar viðgerðarsið og hevur enntá ikki so frægt sum virt minnilutans rætt at ritið frá minnilutans flokki er eins fullfíggjað refereað og ritið frá nevndarformannsins flokki.

Minnilutin átalar hetta harðliga og í málsins navni verður krav, at hvørki nevndarformaðurin ella nakar annar tingmaður hereftir má hætta sær at fara so illa um lívsmál sum tað her umrødda, at tað ikki fær so frægt sum eina einastu viðgerð í nevndini, ið er sett til at viðgera og koma fram við positivum greiðum uppskoti um, hvussu málið best kann verða loyst.

Minnilutin hevur av eintingum, tá ið tað var greitt at nevndarformaðurin einki ætlaði at gera við málið í nevndini, arbeitt við málinum og hevur fingið frá hondini tær statistisku upplýsingar, ið talan er um í álitinum at fáa frá teim ymsu stovnum, ið nú hava við ta socialu forsorgina at gera.

Minnilutin hevur har aftrat gjørt sær greitt, hvussu høvuðslinjurnar í umrødda fólkatrygging eiga at verða og var tað minnilutans vón, at tað kortini skuldi eydnast at viðgera tær fingnu upplýsingar í felagsskapi við hinum nevndarlimunum at seta í uppskot ætlanina hjá flokkunum í hesum stóra máli.

Við tað at nú ikki eru stundir at bera fram eina gjølla frágreiðing um javnaðarflokksins støðu loyvir minnilutin sær hervið at vísa á flokksins skriv av 16. september í ár og fáa tað upptikið sum ein tátt í hesum áliti:

Skrivið ljóðar soleiðis:

Undirritaði Føroya javnaðarflokkur loyvir sær hervið at biðja tað heiðraða løgting um at taka til viðgerðar málið um: *Fólkatrygging.*

Soleiðis sum hin sociala forsorgin liggur pettað í ellisrentu, ellisheim, avlamisrentu, einkjubarnastuðning, barnaheim, socialhjálp eftir ætt, hjálp til sjúkar fiskimenn, studningur til fólk í heimaansan, læknu-, sjúkrakassu- og sjúkrahúsaskipan o. s. fr. er eftir okkara áskoðan ikki tað skil, fastleiki, yvirlit og tryggjan fyri nóg stórari rættvísari hjálp og forsorg fyri teim treingjandi til sleðis.

Javnaðarmenn hava sum kunnugt hildið fram sbr. tingtíðindi 1938, skjal nr. 28, at fáa alla hesa forsorg í eina felagsskipan, soleiðis at hjálpin verður veitt eftir trongdini og ikki í mun til gjaldið, hvør einstakur letur, og at útreiðslurnar verða bornar av øllum vinnandi íbúgvarum landsins ikki í mun til kostnaðin av hjálpini, tey fáa, men í mun til ráðini, tey hava at gjalda.

Hendu uppgáva — fólkaforsorg — kann loysast á tvinnandi hátt:

1) Annaðhvørt við at útreiðslurnar verða goldnar av samlaðum inntøkum landsins, ið viðvíkjandi tí beinleiðis skattinum koma inn sambært galdandi lóg eftir vaxandi skattastigum, t. v. s. hin, sum tjenar mest, kemur ikki bert at galda procentliga av øllum sínum inntøkum, men hægri procentir enn hin, ið lítil ráð hevur.
2) Ella við at øll vinnandi fólk rinda í ein felagsforsorgargrunn, hvar allar forsorgarútreiðslurnar fara úr.
Hugsað kann so verða um, annaðhvørt goldið skal verða í henda grunn við líka procentum frá øllum, ella goldið skal verða í hann eftir vaxandi procentum, sum inntøkurnar vaxa.

Soleiðis sum málið nú liggur fyri, hevur minnilutin ongan annan møguleika enn at beina tað í landsnevndina til viðgerðar og fyrireikingar til næstu løgtingssetu.

Uppskot:

Málið verður beint í landsnevndina til viðgerðar og fyrireikingar til næstu tingsetu.

2. viðg. 8. dec. Uppskot minnilutans samtykt 14—0.

9. Føroya vanlukkutrygging.

Frl. 14. sept. 1. viðg. 18. sept.

Álit (7. dec.):

Hin Føroyski Fólkaflokkurin (radikalt sjálvstýri) og Sjálvstýri hava í skrivi f. 14. september 1943 vent sær til tingið um at fáa endurgjøld frá Føroya vanlukkutrygging hækkaði undir dýrtíðini.

Tað er ein royndur lutur, at tey fólk, sum hava skulu teirra lívsuppihald ella stóran part av tí av endurgjøldum fyri skaðar eru ógviligu illa fyrikomin.

Tað skal leggjast til, at tingið í 1942 játtaði viðbót til slík gjøld, bæði til dagpengar og til sjálvi skaðaendurgjøldini. Til hetta endamál vórðu játtaðar kr. 50.000 (sbr. løgtingstíðindi 1942 bls. 138, tingmál nr. X — 2/1942).

Nevndin hevur tingið upplýst, at per 1. juli 1943 eru rindaðar um kr. 5.000 í dagpengaviðbót.

Viðbótin til skaðaendurgjøld eru játtaði úr socialrokningini saman við øðrum styrkveitingum, so tað hevur ikki verið gjørligt at fáa uppgávu yvir, hvat hetta hevur munað.

Sociala nevndin hevur havt samráðing við sorenskrivarin sum formann Vanlukkutryggingarráðsins, H. O. Hansen, stjóra Føroya Vanlukkutryggingar og Jens av Reyni stjóra Tryggingarsambandsins Føroya.

Teir eru samdir við nevndina um, at tey peningamark, sum eru grundarlag fyri metingina av endurgjøldunum — dagpeningi og skaðaendurgjøldum — eru ov lág, eisini í vanligum tíðum. Tey fólk sum koma so fyri, eru ikki ella ið hvussu er illa for fyri at hava nakað framtíðja og eru soleiðis vist til at liva av teirra peningaligu inntøku.

Sociala nevndin, sum hevur havt hetta mál til umhugsunar, heldur, at lógarbroyting átti at verið gjørd longu nú, serstakliga tá tað er ásannað, at nevndu peningagrundarløg eru ov lág eisini í friðartíð. Tað hevur verið hildið, at tey í Anordning for Færøerne om Forsikring mod Følger af Ulykkestilfælde av 29. mars 1939 áseltu peningamark verða hækkaði umanandi. Skotið hevur verið upp til tað dupulta.

Slík broytan kemur sjálvsagt at hava við sær umanandi premiuhækkan.

Tey føstu endurgjøldini eru eisini nógv ov lág og nevndin hevur tí mælt til at veita viðbót av socialu rokningini, ið hvussu er í sama mun sum í 1943.

Av tí at fólkatryggingarlóg er í umbúna, heldur nevndin seg ikki í løtuni kunna mæla til at seta fram lógarupskot, men mælir til at halda fram við tí skipan, ið varð samtykt í fjør.

Uppskot:

Landsnevndin verður heimilað av socialhjálparstudningunum at hjálpa teim, sum fáa ella hava tingið endurgjald frá Føroya vanlukku-

trygging, viðbót, sum, tá øll viðurskifti eru kannaði, útjavnar fyri komandi ár tann missjavna, sum er ársakuður av prishækkanini.

Framhaldsálit:

Hetta sum so mong onnur social mál hevur minnilutin (J. H. Danbjørg) ikki í nevndini havt høvi at taka støðu til við tað, at álitið og uppskotið ongantíð hevur verið framlagt í nevndini og ikki er vorðið minnilutanum kunnugt fyrr enn nú ein tíma áðrenn onnur og endiliga viðgerð skal fara fram í løglingshøllini.

Hetta er harmiligt, tí javnaðarflokkurin, sum í fólkatryggingarmálinum hevur krevt hetta sumen við øllum socialum málum heilt umskipað til frama fyri tey treingjandi, er soleiðis vorðin forðaður í at seta fram uppskot, ið svarar til flokksins støðu.

Minnilutin hevur so stall einki annað at velja enn at áleggja landsnevndini av tí sociala peninginum, ið henni er givið í hendi at koma leimum treingjandi til hjálpar í so stóran mun sum møguligt.

Uppskot:

Vísandi á tað í álitinum framhildna verður álagt landsnevndini at veita leim, ið hava verið fyri vanlukku óhappi mest møguliga hjálp.

2. viðg. 8. dec. Uppskot minnilutans samtykt 15—0.

---

10. Ellisrenta.

Frl. 14. sept. 1. viðg. 18. sept.

Álit (4. dec):

Hin Føroyski Fólkaflokkurin (Radikalt Sjálvstýri) og Sjálvstýrið v/ R. Long hevur í skrivi d. 14. september 1943 vent sær til tingið um at hækka tey innløkuinnurk, sum galdandi eru í reglunum um ellisrentur (lóg nr. 104 av 31. mars 1933, broytt við lóg nr. 92 av 31. mars 1938).

Løgtingsskrivstovan hevur sent málið til tingið við skrivi d. 17. september 1943, sum er soljóðandi:

»Galdandi lóg er:

Lóg fyri Føroyar um ellisrentu nr. 104 av 31. mars 1933, broytt við lóg nr. 92 av 31. mars 1938.

Ellisrentan er til hjún, har bæði eru fylt 60 ár 300 kr. árliga.

Rentan verður hækkað, tá steðgað verður við at krevja rentuna, til hitt elsta av hjúnunum er fyllt

65 ár til	350 kr. árliga
og um steðgað verður til 70 ár	400 kr. árliga.
Fyri einstøk og hjún, har bert annað er fyllt 60 ár	150 kr. árliga
hækkað, tá steðgað verður við krevjing til 65 ár	175 kr. árliga
hækkað, tá steðgað verður við krevjing til 70 ár	200 kr. árliga.

Rætturin til fulla ellisrentu er treytaður av, at inntøkurnar hjá einstøkum ikki eru yvir 100 kr. árliga, og hjá hjúnum ikki yvir 200 kr. Ríkiskassin rindar $^{9}/_{10}$ og kommunan rest. Tá serstakt er vegna sjúku o. t., kann verða veitt eitt persónligt tillegg, og í sjúkratilfellum kann verða veitt fritt hospital, medicin o. t. og lønað hjálp í heiminum.

Rætturin til at fáa fulla ellisrentu er treytaður av, at viðkomandi ikki hevur inntøku yvir 100 kr. árliga fyri einstøk og 200 kr. fyri hjún. Um inntøkan er hægri, verða 25 pct. av tí, sum kemur aftaná hin frádragsfrla pening fyri hvørt fylgjandi 200 kr., at frádraga rentuni, og av teimum næstu 300 kr. verður frádrigið 50 pct., meðan hægri inntøka øll verður frádrigin.

Útreiðslurnar til ellisrentu hava verið gott og væl 300.000 kr. árliga. Herav rindar ríkiskassin $^{9}/_{10}$ og kommunurnar $^{1}/_{10}$.

20. mars 1940 kom lóg fyri Føroyar um dýrtíðarviðbót til ellisrentu- og invalidurentufólk, 24 kr. fyri einstøk og 40 kr. fyri hjún fyri fíggjarárið 1940/41. Við kunngerð nr. 16, 31. mars 1941, varð dýrtíðarviðbótin fyri fíggjarárið 1941/42 hækkað til 56 kr. fyri einstøk og 96 kr. fyri hjún.

Við kunngerð nr. 19, 25. apríl 1942, varð dyrtíðarviðbótin fyri 1942/43 sett til 100 kr. fyri einstøk og 168 kr. fyri hjún.

Kunngerð nr. 49. av 17. december 1941 áseltir, at fyri hálvárið 1. oktober 1942 til 31. mars 1943 varð dýrtíðarviðbótin fyri einstøk hækkað frá 50 til 70 kr. og fyri hjún frá 84 til 120 kr.

Kunngerð nr. 11, 21. apríl 1943, ásetir, at dýrtíðarviðbótin verður 100 pct.s tillegg, tó minst 140 kr. fyri einstøk og 240 fyri hjún.

Útreiðslurnar til dýrtíðarviðbót, sum nú fullút verður rindað av amtsgrannunum, var í 1942/43 210.000 kr., og verður í hesum fíggjarári eu. 300.000 kr.

Í 1939 (sí løgtingstíðindi 1939, síðu 181) samtykti tingið soljóðandi uppskot viðvíkjandi ellisrentulógini:

1) I § 7 ændres det fradragsfri Beløb til henholdsvis 150 Kr. og 300 Kr., overensstemmende med Loven af 31. Marts 1933.

2) Ved Fastsættelsen af Aldersrente regnes fri Bolig ikke som Indtægt.

Í 1941 (sí løgtingstíðindi 1941, síðu 128) var spurningurin framuni um broytan av socialu lógum. Har varð framlagd frágreiðing frá løgtingsskrivstovuni av 9. september 1941, sum hervið verður viðlagd. Tingið samtykti tá at veita dýrtíðarviðbót til ellisrentu- og avlamisfólk,

og málið viðvíkjandi fólkatrygging varð beint í landsnevndina. Landsnevndin kom til tað úrslit, at ógjørligt var at gera nakað við hesa lóggávu undir veraldarhardagunum, burtursæð frá at veita dýrtíðarviðbót og socialhjálp til vána stødd fólk, harundir ellisrentufólk.«

Av frammanundan standandi sæst, at ellisrentufólk hava fingið munandi viðbotur undir dýrtíðini, men nevndin er á einum máli um, at hon í hvussu er í vissum førum ikki tryggjar lívsins uppihald.

Tí verri er tað so, at mong fólk í hesi tíð hava mist ellisreutuna, bert ársakað av príshækkanum á naturalinntøkum til egið uppihald. Hesi fólk eru mikið verri slædd og tí er tað fyrst og fremst neyðugt at hækka inntøkumarkini í sama mun sum príshækkanin.

Nevndin er á einum máli um ikki at broyta lógarinnar bókstav men ístaðin skjóta uppá, at øll inntøkumarkini verða at javna uppeftir eftir prístalinum. Útreiðslurnar til hesi endamáls frama verða at rinda av løglinginum.

Uppskot:

Inntøkumark fyri at fáa ellisrentu sambart lóg nr. 104 af 31. mars 1933, broytt við lóg nr. 92 av 31. mars 1938 verða at javna uppeftir sambart prístalið, frá 1. apríl 1944 at rokna.

Útreiðslurnar verða at rinda úr amtsgrunninum.

Framhaldsálit:

Minnilutin (J. H. Danbjørg) hevur frá nevndarinnar formanni fingið eitt av trimum nevndarlimum undirskrivað álit viðvíkjandi ellisrentuspurninginum.

Minnilutin kann ikki góðtaka hetta álit, hvørki hvat ið viðvíkjur referati, viðgerð ella innihaldi, og loyvir sær tí at flyta fram fylgjandi álit og uppskot:

Í 1942 legði Føroya javnaðarflokkur mál inn á ting, ið miðaði móti at hækka inntøkumarkið fyri ellisrentunjótarar, soleiðis at fólk skuldu hava rætt at fáa ellisrentu, sjálvt um teirra inntøka var væl hægri enn tann, ið lógin nú fyriskrivar sum hægsta mark fyri at fólk skulu fáa ellisrentu.

Tíverri kom einki úrslit úr hesum máli í 1942, og tí hevur javnaðarflokkurin aftur í ár sent skriv til tingið hesum máli viðvíkjandi.

Javnaðarflokkurin hevur í ár lagt inn á ting málið um *fólkatrygging*, sum sjálvandi umfatar ellisrentu (ellistrygging), men við tað, at fólkatryggingarmálið er eitt so stórt og vítt fevnandi mál, er tað ivasamt, um tað kann gerast heilt liðugt í so stuttari tíð sum í eini tingsetu. Tess vegna hevur javnaðarflokkurin heinan vegin, tá ið henda tingsetan byrjaði, sent tinginum soljóðandi skriv:

»Undirritaði Føroya javnaðarflokkur loyvir sær hervið at biðja tað heiðraða løgting um at taka til viðgerðar málið um:

Umskipan av ellisrentuni.

Javnaðarflokkurin hevur, sum mannum kunnugt, havl á tingi mál um umskipan av allari teirri socialu forsorgini. Hesin spurningur er eisini í ár aftur lagdur fram á ting í málinum um fólkatrygging. Men tá ið tað er óvist, um hetta stóra mál verður loyst út í æsir í ár, og viðurskiftini hjá ellisrentufólkinum liggja so illa fyri, at (eimum lørvar áðót beinan vegin, heita javnaðarmenn á tingið um í hesi tingsetu at skoyta uppí hjá ellisrentufólkinum, soleiðis at tey ikki bert fáa grundpeningin og dýrtíðarviðhótina, sum javnaðarmenn eins og kunnugt altíð hava bildið verið ovlitið, men at tey haraftrat fáa eitt uppískoyti-samsvarandi við javnaðarflokksins upprunaliga uppskot grundpeninginum viðvíkjandi.

Í lógini fyri ellisrentufólk eru settar ávísar reglur viðv. frádrátti. Hesar reglur hava borið við sær, at maður ella kona onga ellisrentu hava fingið, tó at fortjenastan ikki er vaksin meira upp um tann pening, ið áður heimilaði honum ellisrentu, enn svaraði til dýrtíðina.

Javnaðarmenn skjóta uppá, at frádráttareglurnar verða broyltar soleiðis, at ellisrentufólk skulu hava rætt at tjena ein væl størri frádráttarfrían pening enn nú.«

Í ár er eisini skriv frá Jóannes Paturssoni, frmð. f. Flkf. og R. Long, f. Sjálvstfl., ið miðar ímóti at hækka inntøkumarkið. Skrivið er soljóðandi:

»Vit undirskrivaðu løgtingsmenn loyva okkum at biðja tingið taka til viðgerðar spurningin um at hækka tey inntøkumark, sum galdandi er í reglunum um ellisrentu, um gjørligt sambært prístalið.

Vit vita, hvussu mong tey eru, sum at kalla hava mist leirra styrk einans vegna tess, at tey ymisku virði eru hækkaði vegna dýrtíðina, uttan at tey verunliga eru betri stødd peningaliga. Mong av hesum eru afturímóti nógv verri stødd.«

Løgtingsins sociala nevnd, sum hevur havt til viðgerðar fólkatryggingar- og ellisrentumálið eins og mong onnur mál hevur einans havt tríggjar fundir, harav tveir fundir hava verið samráðingar við utlantingsmann.

Tað er eyðsæð, at lítið kann skapast burtur úr tílíkum nevndarstarvi, serliga tá ið nevndarálit aldri verða framlagd í nevndini hvørki í útkasti ella reinskrivaðum lagi.

Nú ið tingsetan skal enda um fáar dagar fáa nevndarlimirnir eitt liðugt álit fyrilagt til undirskrivingar. Hetta nevndarálitið má roknast fyri eitt útkast, sum tørvar nýggja nevndarviðgerð og umskriving, men tað vísir seg ógjørligt at fáa nevndarinnar formann at kalla nevndina saman til fundar.

Minnilutin ætlaði á nevndarfundi at framsela uppskot um:

1. Inntøkumark fyri at fáa ellisrentu sambæri lóg nr. 104 av 31. mars 1933, broytt við lóg nr. 92 av 31. mars 1938 verða at hækka sambært prístalið.
2. Øllum ellisrentunjótarum verður givin ein dýrtíðarviðbót, ið svarar til ellisrentuna faldaða við prístalinum, tó soleiðis, at dýrtíðarviðbótin onganlíð verður minni enn eftir núgaldandi lóg.
3. Avlamisrenta verður hækkað og dýrtíðarviðgjørd somuleiðis sum ellisrentan.
4. Meirútreiðslurnar verða at rinda úr amtsgrunninum.

Sum frammanfyri ávíst kann minnilutin so stall ikki sela fram fullfíggjað uppskot, men mælir til hetta

Uppskot:

Tingið heimilar landsnevndini í samráð við amtmannin at samtykkja og seta í gildi broytan av reglunum um ellisrentu samsvarandi tí í hesum framhaldsáliti framførda við neyðtarvaligum broytingum.

Broytingaruppskot

frá Johan Poulsen o. fl.:

I staðin fyri uppskotið í álitinum verður sett:

Málið verður beint í landsnevndina. — Landsnevndin verður biðin um at kanna málið gjøllari, harímillum savna saman upplýsing um kostnaðin og samráðast við amtmannin. Eftir at hava givið málinum eina fullfíggjaða viðgerð heimilast landsnevndin til at taka avgerð í málinum.

2. viðg. 6. dec. 3. viðg. 7. dec. Broytingaruppskotið samtykt 25—0.

11. Frítíðarlógin.

Fri. 14. sept. 1. viðg. 16. sept.

Álit (30. nov. O. F. Joensen óheftur):

Í skrívi, dagfest 13. september 1943, hevur Havnar Framburðsfelag vent sær til tingið um at taka til kanningar lógina um frítíð við løn. Tað verður flutt fram, at lógin er ógreið og hartil røkkur hon ikki til øll tey, sum eiga frítíð við løn uppiborna.

Ein royndvarð gjørd av tinginum í 1941 at víðka lógina til at umfata øll arbeiðandi fólk. Henda viðtøka kom ikki í gildi einamest av teirri grund, at tørvandi merki ikki kundu útvegast og hartil, at postverkið bar seg undan umsitingini av lógini. Í fjør varð málið aftur viðgjørt á tingi, og varð tá samtykt við stórum meirluta at lata broyting av lógini um frítíð við løn steðga.

Undirritaða nevnd, sum hevur havt málið til umhugsunar, hevur havt samráðingar við formann og limir av Havnar arbeiðsmannafelag, Føroya arbeiðarafelag og Føroya arbeiðsgevarafelag. Amtsfulltrúi og sorinskrivari hava verið við til samráðing. Eisini hevur málið verið til ummælis hjá sorinskrivaranum.

Føroya arbeiðarafelag og Havnar arbeiðsmannafelag halda ikki at málið verður loyst til fullnar, uttan at teir arbeiðarar, ið ikki eru í føstum arbeiði, men tó hava arbeiði stóran part av árinum, eisini fáa rætt til frítíð við løn. Í skrivi, ið er viðlagt málinum, koma teir til tu áskoðan, at tað má kunna vera gjørligt at gjøgnumføra ta broyting, sum umtalast í amtsskrivi av 16. februar 1942, sambart F.A.J. 1937 nr. 145 og í løgtingstíðindi fyri 1942 á blaðsíðu 142, tó við hesum broytingum:

Í uppskotinum verður grein 2 fyrsta petti broytt soleiðis, at orðið »fast« verður strokið. Í sama grein øðrum petti, verður í fyrstu regla »fast« eisini strokið og í sama petti verður uppískoytt »end en Arbejdsdag«.

Í grein 6 og aðrastaðni, har orðið »fast« verður nýtt, verður tað allastaðni strokið.

Teir halda tað annars vera óneyðugt at áleggja postverkinum at innkrevja feriumerkibøkur, men at arbeiðarin sjálvur, tá hann hevur fingið tilsøgn um ferin, eigur at fara við bókini á postverkið. Eisini verður fert fram, at tað eigur at verða álagt arbeiðsmannafeløgnunum at ansa eftir, at tann, ið frítíð hevur, ikki áleknr sær løntandi arbeiði samb. lógina, og at tað eigur at verða álagt gjaldstovuni at stjórna feriumerkigrunnin.

Annars eru arbeiðsmannafelagsstjórnirnar á II áskoðan, at um lógin ikki kann selast í gildi orsakað av krígsviðurskiftunum, eigur galdandi lóg at vera í gildi við tí uppískoyti, at teir, sum ikki kunnu skjóta seg inn undir lógina, fáa eina feriuviðbót uppá 4 pct. av lønini, sum verður goldin saman við tí tjenta peninga.

Føroya arbeiðsgevarafelag hevur sett fram hetta uppskot til frílíðarlóg:

Bestemmelser for Færøerne

om Ferie med Løn og Feriegodtgørelse.

§ 1.

Ret til Ferie med Løn har enhver paa Færøerne paa Land, i privat eller offentlig Virksomhed beskæftiget Arbejder, Funktionær eller Medarbejder, Post- og Rutehaadsmandskøber hos den Arbejdsgiver, hvor han (hun) er ansat den 1. Maj, forudsat at han (hun) har været fast ansat eller fuldt beskæftiget — jfr. § 2, Stk. 4 — hos samme Arbejdsgiver i mindst de foregaaende 4 Maaneder.

§ 2.

Ferietiden skal falde indenfor Tidsrummet 1. Maj til 30. September efter Arbejdsgiverens nærmere Bestemmelse.

Ferietiden beregnes til en Hverdag pr. fuldt beskæftiget Maaned hos den paagældende Arbejdsgiver siden sidste Feries Begyndelse.

Er en Person berettiget til 12 Hverdages Ferie, skal Ferien gives sammenhængende fra Søndag til Søndag.

Ved fuldt beskæftiget Maaned forstaas mindst 20 Arbejdsdøgn á 8 Timer pr. Kalendermaaned.

§ 3.

Personer, som efter ovenstaaende ikke har Ret til Ferie med Løn, har efter 4 Maaneders fast Ansættelse eller fuld Beskæftigelse hos samme Arbejdsgiver Krav paa Feriegodtgørelse, hvilket Krav forfalder naar den paagældende fratræder sin Plads. Feriegodtgørelsen beregnes til saa manges Dages Løn, som den paagældende har været beskæftiget Maaneder hos vedkommende Arbejdsgiver siden sidste Feries Begyndelse.

§ 4.

Lønnen i Ferien og Feriegodtgørelsen beregnes nærmere saaledes: I Tilfælde hvor Kost og Logi udgør en Del af Lønnen, ydes Godtgørelse herfor, hvilken Godtgørelse i Mangel af mindelig Overenskomst fastsættes til 1 Kr. plus Dyrtidstillæg pr. Dag. Er den paagældende ikke lønnet med et bestemt ugentligt eller maanedlig kontant Vederlag, men helt eller delvis med Akkordløn, Timeløn, Procenter af Salg eller lignende, beregnes Lønnen i Ferietiden saaledes:

1. For Time- og akkordlønnede: 8 Timers Normaltid pr. Døgn beregnet efter gældende Lønskala ved Feriens Begyndelse.
2. Procenter af Salg eller lignende: Gennemsnitlig Indtægt i den Tid, den paagældende har været beskæftiget hos Arbejdsgiveren efter sidste 1. Maj.
3. Ugentligt, maanedligt eller aarligt Vederlag: Gennemsnitlig Indtægt pr. Dag, beregnet efter gældende Lønskala ved Feriens Begyndelse.

§ 5.

Tvistigheder mellem Arbejdsgiver og Arbejdere, Funktionærer eller Medhjælpere om Retten til Ferie, Lønnen under Ferie eller

Feriegodtgørelse afgøres endeligt af Sorenskriveren (Dommeren) som Voldgiftsmand.

§ 6.

Bestemmelserne kommer ikke til Anvendelse paa Statens Tjenestemænd eller andre, for hvem der ved særlig Lov er fastsat Ferieregler.

§ 7.

Enhver Aftale, hvorved der gives Afkald paa den efter nærværende Bestemmelser hjemlede Ret til Ferie med Løn eller Feriegodtgørelse, er ugyldig, og den Arbejdsgiver, der med en hos ham beskæftiget træffer en saadan Aftale, straffes med Bøder, der tilfalder Færø Amts Fattigkasse.

§ 8.

Nærværende Bestemmelser træder i Kraft .....«

Í sambend við tær samráðingar, ið fram eru farnar, og í sambend við hjálagda skriv frá arbeiðarunum hevur arbeiðsgevarafelagið sent nevndini hetta skriv:

»Under Henvisning til Arbejdsgiverforeningens Forhandling med det ærede Udvalg den 29. Oktober, den 15. og 17. November 1943 angaaende Ferieloven, skal vi tillade os at bekræfte følgende:

Arbejdsgiverforeningen maa frarade Indførelsen af Feriemærkesystemet. En Ordning med Feriemærker kan formentlig kun gennemføres i en Form, der holder sig nær til den i Danmark gældende Ordning og til det Forslag, der i 1942 blev overvejet af Lagtinget. Grunden til, at Arbejdsgiverforeningen maa frarade Gennemførelsen af dette Forslag er de samme, som sidste Aar bevirkede, at Tanken om en Feriemærkeordning paa Færøerne blev stillet i Bero, nemlig den kompliserede og dyre Administration og den vanskelige eller umulige Kontrol med, at Ordningen i Praksis virkelig bliver gennemført, jfr. Løgtingstíðindi 1942 Pagina 142—143.

Til det af Arbejderorganisationerne alternativt fremsatte Forslag om en Feriegodtgørelse paa 1 pCt. af Lønnen for alle ikke efter den nuværende Lov ferieberettigede Arbejdere skal Arbejdsgiverforeningen bemærke, at en saadan generel gennemført Lønforhøjelse dels vilde betyde, at den hidtil bag Ferieloven liggende Tanke fuldstændig opgives, dels vilde være klart i Strid med de Forsøg, der i Prisstoploven og andre Bestemmelser er gjort paa at stabilisere Pris- og Lønniveau paa Færøerne under de nuværende Forhold. Arbejdsgiverforeningen maa derfor protestere mod Gennemførelse af en saadan Ordning.

Arbejdsgiverforeningen maa mene, at det fra Foreningens Side fremlagde Udkast til en Ordning er det eneste af de drøftede Forslag, der dels i Overensstemmelse med Grundtanken i den danske Ferielov sikrer, at saadanne Arbejdere, der trænger til Ferie, virkelig faar Ferie, dels under de lokale Forhold er praktisk gennemførlig uden Etablering af en meget komplisere og dyr Administrationsordning. Foreningen skal derfor tilraade, at Udvalgets fortsatte Drøftelser tager sit Udgangspunkt i dette Forslag, i hvilket Foreningen selvfølgelig fuldt ud er villig til at overveje Ændringer og Tilføjelser, der maatte være hensigtsmæssige.«

Nevndin hevur kannað tað fyriliggjandi grundarlag og er samd um, at skipanin ikki kemur at royna sig eftir ætlanini, allan so, at hon

verður sett í verk í fullfíggjaðum skili. Hartil heldur nevndin, at tær broytingar og umvælingar, sum samtyktar vórðu av tinginum í 1941 (smb. løgtingstíðindi 1941, bls. 142, í máli X-13/1941) stórt sæð mega vera nýtiligar, bert at umsitingin av henni kann skipast á lagaligasta hátt.

Nevndin heldur tí, at tað er rættast, at amtið eftir tilmæli landsnevndarinnar, so sum samtykt í 1941, fær heimild at seta lógina í gildi við teim tá samtyktu broytingum við møguligum avvikum, smb. skriv frá arbeiðarum av 17. november 1943 og millumbilsreglum í gildi. Tey, sum hava rætt til fulla ferin eftir núgaldandi lóg, eiga at fáa fulla ferin í 1944.

Sorinskrivarin hevur í sínum ummæli av lógini givið virðismiklar vegleiðingar til fatan av galdandi reglum.

Arbeiðarafeløgini hava hildið fram og nevndin mælir til, at lógarumdømið verður avmarkað niðureftir, soleiðis at lógin bert kemur at umfata viðurskifti millum arbeiðandi og teir, sum vanliga róknast sum arbeiðsgevarar, soleiðis at einstakar arbeiðsløtir og dagar so sum tað er vant her á landi mann og mannímillum, skulda haldast uttan fyri lógarumdømið.

Vísandi á tað í álitinum framførda setur nevndin hetta

Uppskot:

A.

Løgtingið samtykkir, at Midlertidige Bestemmelser for Færøerne nr. 28 av 20. sept. 1940 om Ferie med Løn verður sett í gildi við teim broytingum og uppískoytum, sum samtyktar vóru í 1941 (smb. tingtíðindi X-13/1941 blaðs. 141—42) og hartil tær í álitinum framfluttu broytingar:

1. Har sum orðini »fast beskæftiget« eru nýtt, verður hetta broytt til »beskæftiget«.
2. Lógin verður avmarkað niðureftir, so at hon bert kemur at umfata viðurskifti millum arbeiðandi og teir, sum vanliga róknast sum arbeiðsgevarar.

B.

Landsnevndini verður álagt uttan tarn at útvega tey sambært lógaruppskotið tørvandi frítíðarmerki og bøkur og stíla fyri umsiting av lógini.

Tá hesir ásetlaingar eru fingnir til vega, verður uppskotið sum ávísl frammanundan at seta í gildi við teimum avvikum og møguligum millumbilsreglum, sum amtið eftir tilmæli landsnevndarinnar heldur vera tørvandi við tí uppískoyti, at tey, sum eftir galdandi reglum eiga frítíð við løn í 1944, eiga henda rætt óskerdan.

Broytingaruppskot

frá Robert Joensen o. fl.:

Uppskot nevndarinnar A) verður broytt so:

A. 1) Tingið samtykkir uppskot til »Ændring i midlertidige Bestemmelser for Færøerne Nr. 28 af 20. September 1940 om Ferie med Løn«, sum samtykt á tingi 24. november 1941, við hesum broytingum:

a) at orðini »fast beskæftiget«, har tey ern nýtt, verða broytt til »beskæftiget«, og

b) lógin verður at avmarka, so hon bert umfatar viðurskifti millum arbeiðandi og leir, sum vanliga roknast sum arbeiðsgevarar.

Uppskot

frá O. F. Joensen:

Lagtinget vedtager det af Føroya arbeiðsgevarafelag fremsatte i Betænkningen refererede Forslag med følgende Tilføjelser:

Til § 8 føjes efter Ordene »I Kraft«: »1. Januar 1944«.

Broytingaruppskot

frá O. F. Joensen:

I § 3 tilføjes efter Ordene »fratræder sin Plads« følgende:

»senest inden Kalenderaarets Udgang«.

2. viðg. 2. dec. 3. viðg. 4. dec. og 7. dec. O. F. Joensens uppskot fall 8—0 (Ja atkvóðu: J. Paturssøn, J. F. Kjølbro, Rasmus Rasmussen, O. F. Joensen, O. J. Jensen, Anth. Sørensen, Pauli Dahl, Samuel Ellefsen, burturi: A. Djurhuus og K. Djurhuus). Meirilutans uppskot fall 11—0 (Ja atkvóðu: Poul Petersen, P. M. Dam, J. Paturssøn, Robert Joensen, Rasmus Rasmussen, Richard Long, J. P. Henriksen, J. H. Danbjørg, Johs. Slæltanes, Jacob Fr. Øregaard, J. P. Davidsen, hinir atkv. ikki.)

12. Broytan av skattalógini.

Frl. 14. sept. 1. viðg. 16. sept.

Álit (15. okt.):

Froðbiar sóknarstýri hevur í skrivi, 13. september 1943, latið inn til tingið kærumál um, at arbeiðsgevarar ikki halda lóg nr. 36 av 16. februar 1939 um broytingar í lóg fyri Føroyar nr. 76, av 12. mars 1923 um tu kommunalu skattaleggingina.

Stýrið flytur fram, at arbeiðsgevarar ikki halda aftur lønir til rindan av skatti arbeiðsmanna, tó stýrið rættstundis hevur sent inn til teirra krøv um afturhaldan sambart omanfyrnevndu lóg.

Kommunala nevndin, sum hevur haft hetta mál til viðgerðar, má halda, at einki er at finnast at í lógini í so máta. Hon fyriskrivar í gr. 1, 2. petti niðast, at arbeiðsgevarin átekur sær ábyrgdina sjálvur, um hann ikki heldur aftur sum kravt, og sama gr., 4. petti fyriskrivar revsingarreglur, um hann ikki fylgir reglum lógarinnar.

Nevndin heldur tí, at hetta mál ikki kann fáa viðgerð av lóggávuni, heldur ikki sambart løgtingslógarinnar gr. 17, 1. petti, men sóknarstýrið má venda sær til rættin, sum ávíst er í lógini í hvørjum einstøkum føri.

Uppskot:

Eintak av álitinum verður sent umsøkjaranum.

Uppískoytisálit:

Síðani málið hevur verið til 2. viðgerð, er ummæli komið til nevndina frá fúta og amti.

Fútin greiðir frá teim sakarmálum, sum ivaleyst hava elvt kommununi til at krevja greiðari lógarreglur.

Amtið heldur sum nevndin, at lógarreglurnar eru greiðar og kunnu neyvan gerast greiðari við lógarbroyting, men skilar til at vissur ivi tykisl at vera um sjálva nýtsluna av lógarreglunum. Fyri at bøta um hetta hevur amtið evnað til uppskot til rundskriv til nýtslu hjá kommunum og arbeiðisgevarunum.

Nevndin vildi lagt miklan dent á, um amtið sendi út tað nevnda uppskot til rundskriv.

Uppskot:

Vísst verður á tað í álitinum og í uppískoytisálitinum framflutta.

2. viðg. 19. okt. 3. viðg. 27. nov. og 2. des. Samtykt 16—0.

13. Føroyskt sum rættargongdarmál.

Frl. 14. sept. 1. viðg. 25. sept.

Álit (16. nov.):

Tingið hevur eftir áheitan frá Fólkaflokkinum (radikalt sjálvstýri) og teimum mannum, sum eru í valfelag við hann, tikið til viðgerðar spurningin um at góðkenna føroyskt mál sum rættargongdarmál.

Meirilutin í nevndini (P. M. Dam, R. Long, J. Paturssoon, P. Petersen og Th. Petersen) skal úttala, at tað kann ikki vera nakar ivi í, at tað er heinl, at lóggávan gevur føroyskum máli fullan rætt sum rættargongdarmál. Í 1938 tá hetta mál var fyri á tingi (sí tingtíðindi 1938 skjal 22) setti meirilutin uppskot um at broyta rættargongdarlógina soleiðis, at hetta kom í gildi; uppskotið varð samlykt av tinginum, men er ikki verðið lóg. Meirilutin má úttala, at tað einans vil skaða okkum Føroyingum, at hesin spurningur ikki verður loystur til fullnar, soleiðis at politisk træla um hetta kann falla burtur. Meirilutin setur fram uppskot smb. hesi støðu.

Ein minniluti (Kr. Djurhuus og A. Samuelsen) má framhalda, at tað er teirra støða, at hesin spurningur ikki eigur at viðgerast undir teimum óvanligu tíðum, vit nú liva í. Minniluti setir einki uppskot í málinum.

Uppskot:

Midlertidige Bestemmelser for Færøerne

om Ændring i Retsplejeloven.

§ 1.

§ 149, Stk. 1 og 2 i Lov om Rettens Pleje af 11. April 1916 med senere Ændringer, jfr. Lov for Færøerne Nr. 174 af 11. Maj 1935 affattes saaledes:

»Retssproget er Dansk og Færøsk. Afhørelse af Personer, der ikke er det danske eller det færøske Sprog mægtige, foregaar ved Hjælp af en edsvoren Tolk eller en af Retten udnævnt Tolk. Dog kan Tilkaldelse af Tolk undlades, naar ingen af Parterne gør Fordring herpaa, og Retten tiltror sig fornødent Kendskab til det fremmede Sprog, undtagen i Straffesager ved Domsforhandling i Sager, der er underkastet Landsretsbehandling. Er Dommeren ikke det færøske Sprog mægtig, foranlediger han, naar det maatte være fornødent, tilkaldt en kyndig Person til at fungere som Oversætter.

Dokumenter, der er affattede i fremmede Sprog, skal ledsages af en Oversættelse, der, naar Retten eller Modparten forlanger det, skal bekræftes af en autoriseret Translatør eller en af Retten antagen Oversætter. Oversættelse kan dog frafaldes, naar begge Parter er enige derom, og Retten tiltror sig fornødent Kendskab til det fremmede Sprog. Er Dommeren ikke det færøske Skriftssprog mægtig, foranlediger han Dokumenter, affattede i det færøske Sprog, oversat, og saa-

fremt Oversættelsen ikke godkendes af Parterne, skal den bekræftes af en af Retten udmeldt kyndig Person. I Tilfælde af Anke eller Kære til Domstol uden for Færøerne skal Dokumenter, affattede i det færøske Sprog, ledsages af en Oversættelse, foretages af en dertil af Retten beskikket Person. Udgifterne ved de i dette Stykke omhandlede Oversættelser af færøske Dokumenter og de i forrige Stykke, sidste Punktum, omhandlede Tilkaldelser af Folk udredes af Amtsrepartitionsfonden.«

§ 2.

Disse Bestemmelser træder i Kraft straks.

2. viðg. 20. nov. 3. viðg. 23. nov. Samtykt 17—0.

---

14. Føroyskt sum lógmál.

Frl. 14. sept. 1. viðg. 25. sept.

Álit (6. dec.):

Fólkaflokkurin (radikalt sjálvstýri) og teir, sum eru í valfelag við hendu flokk, hava í bræví, dagsett 14. september 1943, biðið tingið um at taka uppaftur málið: Føroyskt sum lógarmál.

Málið hevur verið fyri í tingsetunum 1939 og 1942, sí tíðindi nr. XIV-12/1939, løgtingstíðindi bls. 215 og tingmál nr. X-8/1942, løgtingstíðindi bls. 148. Lógarmálið hevur higartil verið danskt, og allar lógir, fyriskipanir og umfaraskriv hava verið skrivað á donskum máli.

Somu tingmenn hava eisini heitt á tingið um at taka til viðgerðar málið um lýsingar á føroyskum máli, vísindi til tingmál XIII-9/1942, tingtíðindi bls. 209.

Meirilutin (P. M. Dam, J. Patursson, R. Long, P. Petersen og Th. Petersen) skal viðmerkja, at tá tingið nú sjálvt er farið undir at gera bráðfengis lógarreglur, vil tað einasta náttúrliga vera at nýta landsins mál, føroyskt. Tað finnst hvørki í donsku grundlógini ella í lóg um kunngering av lógum í Føroyum frá 1894 ásett nakað um, at lógarmálið er danskt. Bert í rættargongulógini gr. 149 er ásett, at rættarmálið er danskt, men hetta er av tinginum í hesi setu broytt til »danskt og føroyskt«. Meirilutin má tó halda, at tað er beinast fyri at eingin misskiljum skal verða, at samtyktin um lógarmálið verður sett í lógarform.

Nevndarlimurin P. M. Dam viðmerkir: Juvnaðarflokkurin hevur tu støðu, at føroyskt mál skrivliga eigur at verða nýtt í øllum føri her á landi, har ið løgting, landsnevnd og aðrir føroyskir stovnar hava tu fullu peningaligu og siðmennaligu ábyrgdina. Har, ið staturin situr við hesi ábyrgd og hevur umsitingina, liggur tað sjálvandi til statin at ráða fyri og avgera umsitingarmálið.

Viðvíkjandi lógarmálinum hava javnaðarmenn ta støðu, at tað eigur at vera danskt og føroyskt, sumanber løgtingstíðindi 1939, blaðsíðu 245, og javnaðarmannauppskotið í stjórnarskipanarmálinum.

Soleiðis sum rættarviðurskiftini liggja við lands- og hægstarætti í Danmark er tað avgjørt neyðugt, at lógarmálið er danskt og føroyskt.

Sambært hesa støðu tekur minnilutin uppaftur uppskot bjá sjálvstýrismonnum og javnaðarmonnum í 1939, einans eitt sindur broytt í sjálvum orðalagnum.

Meirilutin skal vísa á, at tað er nógva staðni her á landi, hvar tingið hevur ábyrgdina og letur pening til, uttan at hesir stovnar nýta føroyskt mál. Her kann nevnast at okkara sjúkrahússkipan higartil hevur fört gerðabókina á danskum máli. Meirilutin heldur, at tað er neyðugt at áseta við tingsamtykt, til kunngeringar fyri øllum ávarandi, at tílíkir stovnar sknlu nýta føroyskt mál, har sum tað ikki eru umstøður, sum gera hetta ógjørligt.

Minnilutin (K. Djurhuus og A. Samuelsen) setur einki uppskot fram í málinum.

Uppskot

frá *meirilutanum* (R. Long, J. Paturssoon, P. Petersen og Th. Petersen):

A. *Ráðfengis reglur*

um føroyskt sum lógarmál.

Gr. 1.

Allar lógarreglur, sum løgtingið samtykkir, verða hereftir at orða á danskum og føroyskum máli.

Gr. 2.

Við framløgu av uppskotum til lógir skal verða viðlagt tí føroysku lógartekstuni ein umseting til danskt mál. Tá ið lógin verður samtykt av løgtinginum, verður tann danska umsetingin samstundis viðløgd til góðkenningar.

Gr. 3.

Tá ið tær av løgtinginum samtyktu lógir verða kunngjørdar, verða bæði tann føroyski tekstnrin og tann danski at staðfesta og kunngera. Danska umsetingin verður upptikin í lógarsavnið saman við tí føroyska tekstinum.

Gr. 4.

Henda lóg kemur í gildi 1. januar 1944.

B. *Midlertidige Bestemmelser*

om færøsk som Lovsprog.

§ 1.

Alle Lovbestemmelser, der vedtages af Lagtinget, skal herefter formuleres paa det færøske Sprog.

§ 2.

Ved Fremlæggelse af Lovforslag skal der vedlægges den færøske Lovtekst en Oversættelse til det danske Sprog. Naar Loven bliver vedtaget af Lagtinget, vil den danske Oversættelse samtidig være at fremlægge til Godkendelse.

§ 3.

Naar de af Lagtinget vedtagne Love bliver kundgjort, vil baade den færøske og den danske Tekst være at stadfæste og kundgøre. Den danske Oversættelse optages i Lovsamlingen sammen med den færøske Tekst.

§ 4.

Denne Lov træder i Kraft den 1. Januar 1944.

Frá *minnilutanum* (P. M. Dam):

Øll lógaruppskot á tingi verða hereftir at samtykkja á føroyskum og danskum máli.

Frá *meirilutanum* (P. M. Dam, R. Long, J. Paturssen, P. Petersen og Th. Petersen):

Løgtingsskrivstovuni, landsnevndini, millumtinganevndum og øllum tingstovnum verður álagt at nýta føroyskt mál í øllum føri, har ið umstøðurnar ikki gera tað neyðugt at nýta annað mál.

2. og 3. viðg. 7. dec. Meirilutauppskot (R. Long o. fl.) fall 12—0. Minnilutauppskot (Dam) samtykt 15—0. Ja atkvóðu: Poul Petersen, P. M. Dam, Robert Joensen, Rasmus Rasmussen, Rikard Long, J. P. Henriksen, J. H. Dambjørg, O. J. Jensen, Johs. Slettanes, Anth. Sørensen, Pauli Dahl, Samuel Ellefsen, Jacob Fr. Øregaard, J. P. Davidsen og Thorstein Petersen. Hinir atkvóðu ikki. Meirilutauppskot (Dam, Long o. fl.) samtykt 17—0.

15. Ferðapassreglur.

Frl. 14. sept. 1. viðg. 25. sept.

Álit (4. dec.):

Til tingið er komin umsókn frá Fólkaflokkinum (radikalt sjálvstýri) og frá teimum, sum eru í valfelag við hendu flokk, um at taka uppaftur til viðgerðar málið viðvíkjandi broytan av ferðapassreglum. Víst verður til tingmál (nr. X-11/1942) tingtíðindi bls. 150.

Mælt verður til, at ferðapassini verða broytt soleiðis, at orðið »Danmark« verður broytt til »Føroyar« og tjóðarnavnið á fyrstu síðu verður broytt til »Føroyingur, Féroïen, Faroese, Färing«.

Tær galdandi reglur um ferðapass finnast í umfaraskrivi nr. 158 av 4. aprfl 1927.

Meirilutin (R. Long, J. Patursson, P. Petersen og Th. Petersen) viðmerkir:

Tey viðurskifti, sum kriggið hevur skapað, hava gjort tað, at Føroyar sum hersett av Bretlandi hava fingið eina heilt aðra stoðu, enn tær høvdu frammanundan hersetingini og hvarvið eisini Føroyingar búsitandi í Føroynum hava eina aðra stoðu, tá teir skulu ferðast í útheiminum. Tað er tí av stórsta týðningi, at Føroyingar hava eitt frámerki, og at tað verður vístá í passinum, at teir eru Føroyingar. Fyri at kunna avmarka, hvørjir ið eru Føroyingar vil tað verða náttúrligt at lata uppihaldsrættin verða avgerandi soleiðis at ikki bert teir, sum føddir eru í Føroynum, men eisini teir donsku teknar, sum hava uppihaldsrættin og forsyrgjararætt, hava heimild at fáa føroyskt ferðapass. Vit vilja tí skjóta upp, at løgtingið samtykkir kunngerð, um at broyta umfaraskrivið av 1. august 1922, so sum uppskot niðanfyri.

Minnilutin (P. M. Dam) heldur, at tá ið talan er um Føroying sum tann, ið passið skal hava, skal tað greitt vísa, at viðkomandi er Føroyingur og búgvandi í Føroynum. Samlað hesa stoðu setur minnilutin fram uppskot.

Nevndarlimirnir R. Long og P. Petersen vilja viðmerkja, at teir, um meirilutauppskotið ikki skuldi verðið samtykt, vilja styðja minnilutauppskotið.

Minnilutin (Kr. Djurhuus og A. Samuelsen) framsetir eitki uppskot.

Uppskot:

A. *Frá meirilutanum* (R. Long, J. Patursson, Poul Petersen og Th. Petersen):

Kunngering.

1. Danskir teknar, sum eru føldir í og búgva í Føroyum og danskir teknar, sum aftaná 9. apríl 1940 hava fingið tilhaldsrætt í Føroyum, hava heimild at fáa føroyskt ferðapass.
2. Løgtingið kostar prentan av føroyskum ferðapassi.
3. Í ferðapassinum verður orðið »Danmark« broytt til »Foroyar« og tjóðurnavnið á fyrstu síðu broytt til »Føroyingur, Færing, Féroien, Faroese, Färing« og viðmerking (danskur teknar, dansk Statsborger, sujet Danois, Danish citizen, Dänischer untertan).

Ferðapassið verður skrivað á føroyskum og harumfram á danskum, fransskum, enskum og á týskum.

Bekendtgørelse.

1. Danske Statsborgere, som er født paa og bosiddende paa Færøerne, og danske Statsborgere, som efter 9. April 1940 har faaet Opholdsret og Forsørgelsesret paa Færøerne har Ret til at faa færøsk Rejsepas.
2. Lagtinget bekoster Trykning af færøske Rejsepas.
3. I Rejsepasset skal Ordet »Danmark« forandres til »Føroyar« og Nationalitetsnavnet paa første Side forandret til »Føroyingur, Færing, Féroien, Faroese,, Färing«, og Bemærkning (danskur teknar, dansk Statsborger, sujet Danois, Danish citizen, Dänischer untertan).

Rejsepasset skal skrives paa færøsk og desuden paa dansk, fransk, engelsk og tysk.

B. *Frá minnilutanum (P. M. Dam):*

Kunngering.

1. Eftir áheitan verður ferðapassið broytt soleiðis:
2. Undir krúnuni á permuni verður sett »Føroyar«.
3. Á fyrstu síðu undir »Danmark« verður sett »Føroyar«.
4. a) Í staðin fyri »Nationalitet« á fyrstu síðu verður sett »Statsborgerret« (Nationalitet): dansk (Færing, Føroyingur, Feroien, Faroese, Färing).

Ella í staðin fyri § 4:

4. b) Í staðin fyri »Nationalitet« á fyrstu síðu verður sett »Statsborgerret.

5. Undir reglani við »Statsborgerret verður sett »Færing, Føroyingur, Feroien, Faroese, Färing.«

Bekendtgørelse.

1. Paa Begæring ændres Reglement for Rejsepas saaledes:
2. Under Kronen paa Omslaget sættes »Føroyar«.
3. Paa første Side under »Danmark« sættes »Føroyar«.
4. a) I Stedet for »Nationalitet« paa første Side sættes »Statsborgerret« (Nationalitet): dansk, (Færing, Føroyingur, Feroien, Faroese, Färing).

Ella í staðin fyri § 4:

4. b) I Stedet for »Nationalitet« paa første Side sættes: »Statsborgerret«.

5. Under Linjen med »Statsborgerret« sættes »Færing, Føroyingur, Feroien, Faroese, Färing«.

2. viðg. 6. dec. 3. viðg. 7. dec. Meirilutauppskotið fall 12—0. Minnilutauppskotið pt. 1, 2 og 3 samtykt 17—0. Pt. 4 a fall 9—0, 4 b og pt. 5 samtykt 14—0. Uppskotið so broytt samtykt 15—0.

---

16. Skipsregistarið.

Frl. 14. sept. 1. viðg. 25. sept.

Álit (4. dec.):

Hin føroyski Fólkaflokkurin (radikalt sjálvstýri) og teir menn sum standa í valfelagsskapi við henda flokk hava heitt á tingið um at taka upp til viðgerðar spurningin um at fáa broytt reglurnar fyri skiparegistarið, soleiðis at øll skip fáa føroyskt nationalitets- og registreringscertifikat.

Málið hevur verið til viðgerðar á tingi 1940 og 1942 (sí tingtíðindi hesi ár blaðsíður 147 og 151), og í 1940 var málið til ummælis hjá Føroya skiparn- og navigatørfelag, ið mælti til, at føroysk skip fáa øll skjøl, ið hoyra til skipini samsvarandi teirra flaggi. Tey uppskot, sum vórðu gjørd hesi bæði árini fullu við atkvøðugreiðslu.

Ein meirilutí í nevndini (R. Long, J. Paturssou, P. Petersen og Th. Petersen) skal fyrst vísa til lógina nr. 103 av 4. Maj 1927 gr. 32, har stendur: »Nationalitets- og Registrerings-Certifikat skal i Forbindelse med de efter § 30 paa Skibet anbragte Mærker i alle Tilfælde afgive tilstrækkeligt Bevis for dets Nationalitet, Identitet og Register-Tonnage.« Henda reglan vísir greiniliga, at skipið í sínum pappírum skal hava prógv fyri, hvar tað hoyrir heima; og nationalitets-certifikatið sigur eisini, hvat flagg tað skal føra.

Við kunngerð av 25. apríl 1940 áseltí amtið, at øll skip, sum hoyra heima í Føroyum skulu føra føroyskt flagg og hava flagg og heimstaðarnavn málað á skipasíðuni. Eftir henda dag hevur tað verið so, at flaggið hevur víst til Føroyar, meðan øll pappír innanborða hava sagt frá, at skipið *skal* føra danskt flagg, hvat ið tað slættis ikki hevur loyvi til. Hetta má vera skeivt, og lóggávuvaldið her á landi kann ikki framvegis sela okkara sjómenn fyri teimum trupulleikum, sum hetta kann føra við sær. Meirilutin setur uppskot samsvarandi hesum.

Ein minnilutí (Kr. Djurhuus og A. Samuelsen) setur einki uppskot fram í málinum.

Ein minnilutí (P. M. Dam) heldur, at soleiðis sum viðurskiftini liggja, kann spurningurin viðvíkjandi skiparegistrum best verða greiddur við at kunngerð verður gjørd um, at allir føroyskir skipaeigarar, ið yuskja tað, skulu hava rætt til á hvørt skipspappír at fáa áseltan ein á donskum, føroyskum og enskum máli prentaðan lepa (plakat) við hesum orðaljóði:

»Det bekræftes herved, at . . . . . mrk. . . . . .
er et færøsk Fartøj indregistreret paa Færøerne.
I Henhold til midlertidig Bestemmelse af 25. April 1940 skal Fartøjet føre færøsk Flag.

Skibsregistreringskontoret, Thorshavn den . . . . .

Tað verður hervið váttað, at . . . . . mrk. . . . . .
er eitt føroyskt far, innregistrerað í Føroynum.
Sambart fyribils lóg av 25. april 1940 skal farið bera føroyskt flagg.

Skiparegistreringarkantórið, Tórshavn, tann . . . . . .

(sign.) Niels Westerby.

This is to certify that . . . . . .
is a Faroese vessel registered in the Faroe Islands.
In accordance with the temporary order of April 25th 1940 the vessel shall carry the Faroese flag.

Ships Registrar's Office, Tórshavn, this . . . . . .

(sign.) Niels Westerby.«

Uppskot

frá meirilutanum:

A. *Midlertidige Bestemmelser for Færøerne*

om Forandring i Reglerne om Skibes Registrering.

§ 1.

Alle paa Færøerne hjemmehørende Skibe over 20 Reg. Tons forsynes med Nationalitets- og Registreringscertifikat, hvoraf det fremgaar, at Skibet er færøsk og pligtigt til at føre færøsk Flag.

§ 2.

De i Medfør af §§ 5, 10, 12 ff og 30 i Lovbekendtgørelse Nr. 103 af 4. Maj 1927 om danske Skibes Registrering (jfr. Anordning for Færøerne Nr. 220 af 16. September 1893) Skibsregistreringskontoret i København tillagde Beføjelser og Pligter forsaavidt angaar Færøerne indehaves indtil videre af Skibsregistret i Tórshavn, jfr. Midlertidige Bestemmelser Nr. 13 af 17. Juni 1940 § 11.

§ 3.

De til Skibes Registrering nødvendige Blanketter vil være at godkende af Lagtingets Landsnævn.

§ 4.

Disse Bestemmelser træder i Kraft den 1. Februar 1941.

B. Frá minnilutanum (P. M. Dam):

Amtmaðurin verður biðin um at kunngera, at allir føroyskir skipaeigarir, ið hava hug til tess, eiga rætt til, á hvørt skipspappír at fáa ásett ein á danskum, føroyskum og enskum máli prentaðan lepa við tí í álitinum skrivaða orðaljóði.

2. viðg. 6. dec. 3. viðg. 7. dec. Meirilutauppskotið fall 12—0. Minnilutauppskotið samtykt 14—0.

---

17. Olavsøkuting.

Frl. 14. sept. 1. viðg. 27. sept.

Álit (8. nov.):

Frá gamlari tíð komu Føroyingar saman á Ólavsøku, og tá varð Føroya løgting sett. Hetta varð broytt við lóg nr. 177 av 11. mai 1935, har tað varð ásett, at tingið skuldi koma saman fyrsta týsdag í oktober mánaða. Í 1939 varð hetta aftur broytt til fyrsta týsdag í september fyri betri at falla saman við viðgerð av málinum á danska ríkisdegi.

Fólkaflokkurin (radikalt sjálvstýri) tók í 1942 (sí tingtíðindi 1942, síðu 153) upp til viðgerðar spurningin um at fara aftur til Ólavsøkuting og so einans láta tingið vera saman 3 dagar til framløgu av málum, meðan viðgerðin annars varð goymd til fyrsta týsdag í oktober mánaða. Hetta uppskotið fall, og eitt uppskot frá meirilutanum um at fara aftur til regluna frá 1923 um Ólavsøkuting varð heldur ikki samtykt. Málið er nú av nýggjum lagt inn á ting.

Tað er nógv, sum talar fyri heystar- og vetratingi, serliga hava okkara sjómenn ring líkindir til at luttaka í arbeiðinum, tá tingarbeiðið fer fram á sumri. Á hin hátt kann tað sigast, at september mánaði er næstan eins óhøgligur fyri sjófólkið, tí teirra starv heldur á inn í oktober. Nú undir ófriðartíðum eru tað eisini nógvir av sjómonnunum, sum sigla allan veturin.

Meirilutin (Dam, R. Long, J. Paturssøn, P. Petersen og Th. Petersen) heldur tað vera beinast at fara aftur til Ólavsøkuting. Tað má tá verða tinglø sjálvt, sum, tá tað er komið saman, avger, um tað beinan vegin aftaná skal verða hildið fram við tingarbeiðinum, ella steðgur skal verða, til heystardagur er komin, og kann tingið tá serliga

ansa eftir, um eitt framhald av tingfundum kann valda sjómonnum og jarðamonnum trupulleikar fyri at taka lut í arbeiðinum. Meirilutin setur fram uppskot samsvarandi.

Minnilutin (Kr. Djurhuus og A. Samuelsen) skal viðmerkja fylgjandi:

Sambandspartiet har i sin Tid, Traditionen tro, fastholdt, at Lagtinget skal samles til ordinær Samling Olajdag eller den første Hverdag efter Olajdag, og Partiet har i sin Tid advaret imod at forlade denne Samlingsdag. Den færøske Befolkning har imidlertid i en med talrige Underskrifter forsynet Adresse henvendt sig til Lagtinget og krævet Lagtingssamlingen paabegyndt og afholdt senere paa Aaret. Sambandspartiet bøjede sig for det saaledes foreliggende Folkeønske. Naar man nu ønsker at vende tilbage til »Ólavsøkutingø, uden at det er dokumenteret, at det færøske Folk kræver denne Ændring, maa Sambandspartiet holde sig tilbage. Mindretallet bedømmer den færøske Folkestemning saaledes, at Befolkningen snarere ønsker Lagtingssamlingen skubbet længere ud paa Vinteren. Flertallet ønsker nu at gaa den modsatte Vej; men Mindretallet kan ikke følge Flertallet paa dette Punkt. Mindretallet stiller intet Forslag i Sagen.

Uppskot

frá meirilutanum (P. M. Dam, R. Long, J. Paturssón, P. Petersen og Th. Petersen):

Midlertidige Bestemmelser for Færøerne

om

Ændring i Lov for Færøerne af 28. Marts 1923 om Færøernes Lagting,

jfr. Bekendtgørelse Nr. 249 af 24. Juni 1939.

§ 16, to første Punktum formuleres saaledes:

»Lagtinget samles efter forud afholdt Gudstjeneste aarlig i Thorshavn paa St. Olavsdag (den 29. Juli), medmindre denne indtræffer paa en Søndag, i hvilket Tilfælde Tingets Aabning finder Sted den følgende Dag. Efter Lagtingets Indstilling kan Kongen for 2 Aar ad Gangen bestemme, at Tingets Aabning skal finde Sted paa et andet Tidspunkt end St. Olavsdag.

2. viðg. 10. nov. 3. viðg. 23. nov. Fall 12—0. (Ja atkvóða: P. Petersen, P. M. Dam, J. Paturssón, J. F. Kjølbro, Robert Joensen, Rasmus Rasmussen, J. P. Henriksen, J. H. Danbjørg, Johs. Slettenes, A. Sørensen, Samuel Ellefsen, Thorstein Petersen, burtur vóru: R. Long, A. Djurhuus og Paoli Dahl.

18. Navnaskifti.

Frl. 14. sept. 1. viðg. 1. okt.

Álit (16. nov.):

Spurningurin um broytan av navnaskiftisreglunum er komin til viðgerðar á tingi í ár eftir áheitan frá Fólkaflokkinum (radikalt sjálvstýri) og eimum monnum, sum eru í valfelag við henda flokk.

Málið var fyri á tingi 1942 (sí tingtíðindi 1942 síðu 152), men har fall uppskotið frá einum minniluta um at geva fútanum heimild at geva føroysk nøvn sum ættarnøvn uttan kongiliga váttan.

Tað var í 1942 frumhildið frá nevndini, at tað búðu so nógvir Føroyingar í Danmørk, at tað lætt kundi koma fløkja í, um teir tóku sær sama navn har, sum onkur vildi fáa sær herheima.

Meirilutin (P. M. Dam, R. Long, J. Paturssson, P. Petersen og Th. Petersen) má halda, tað er beint, at tað verður atgongd hjá fólki til at fáa sær nýtt ættarnavn og selir fram uppskot um hetta.

Minnilutin (Kr. Djurhuus og A. Samuelsen) vísir á viðmerkingar í tingmálinum 1942 og heldur, tað er beint, at steðga við hesum máli.

Uppskot:

Frá meirilutanum:

Midlertidige Bestemmelser for Færøerne

om Navneforandring.

De Juslitsministeriet tillagte Beføjelser vedrørende Lov Nr. 89 af 22. April 1904 § 2 udøves indtil videre af Landfogden.

2. viðg. 20. nov. 3. viðg. 23. nov. og 2. dec. Fall 12—0. (Ja atkvóðu: Poul Petersen, J. Paturssson, J. F. Kjølbro, Robert Joensen, Rasmus Rasmussen, Rikard Long, O. J. Jensen, Johs. Slættenes, A. Sørensen, Pauli Dahl, Samuel Ellefsen, Th. Petersen, burturstaddir: Dam og Danbjørg.

19. Valrættaraldurin.

Frl. 14. sept. 1. viðg. 16. sept.

Álit (1. okt.):

Meirilutin (Thorstein Petersen og R. Rasmussen) heldur fram:

Valrættaraldurin eigur at verða 21 ár og ikki 25 ár sum higartil; hetta hevur leingi verði eitt fólkaynski, og onganlíð hava vit fingið hetta betri prógvað enn við tað seinasta løgtingsval, har meira enn sjey tiggjundapartar av fólkinum góvu teirra atkvøðu til flokkar, sum á teirra stevnuskrá høvdu 21 ára valrættaldurin sum eitt av teimum nýggju liltøkum, teir vildu arbeiða fyri.

Fólkaflokkurin og sjálvstýrið hava á løgtingið í ár lagt hetta mál fram, og skulu vit vísa til tað, sum fyrr er farið fram í hesum máli, serliga í tingsetuni 1940 (tingtíðindi skjal nr. 39). Tað eigur at verða gjørt til lóg í Føroynum, at maður fær rættindini sum borgari fult út, tá hann hevur fylt 21 ár. Ungir menn sigla í hesum tíðum vandasjógv, og teir eru við til at bjarga nógv til landið. Longu um 15 ára aldurin byrja teir ofta at gjalda skatt til tað almenna, og í teimum 10 árum, til teir eru 25, kann tað verða heilt stórur peningur, teir hava lagt til góðar fyri tað almenna. Sum dømi kann nevnast, at maður í fleiri ár hevur verið trolaraskipari, og havt skatt í túsundtal krónum, men ikki havt tann borgarrættin at verða við til velja teir menn, sum skulu standa til svars fyri, at skatturin nú verður nýttur á besta hátt. Rættindi og skylda eiga altíð, har tað ber til, at fylgjast at; vit hava ber havt menn, sum í mong ár hava gjørt teirra skyldu yvirfyri samfelagnum, men samfelagið hevur ikki givið teimum teirra vælkentu rættindir; hetta ber ikki til longur, og jú fyrr tað verður greitt tess betri fyri land og fólk.

Tað eigur at verða gjørt soleiðis, at borgarin fær rættindini bæði í tí kommunala og í landaviðurskiftinum, tí eigur broytingin at umfata bæði val til sóknarstýrini og til løgtingið.

Av tí at einki enn er avgjørt um tað málið um broytan í stýrisskipanini, sum er til viðgerðar á tingi, verður uppskotið frá meirilutanum framsett í tvíuingum, svarandi til tað gomlu stýrisskipanina av 9. mai 1940 og tí nýggja uppskotinum.

Minnilutin (O. F. Joensen) heldur seg til støðu sína í tingsetuni 1942 og setur einki uppskot.

Uppskot:

1. *Midlertidige Bestemmelser for Færøerne*

om Valgretsalderen.

§ 1.

I Lov Nr. 124 af 28. Marts 1923 om Færøernes Lagting, jfr. Bekendtgørelse af 24. Juni 1939 forandres i § 2 Ordene »25 Aar« til »21 Aar«.

§ 2.

I Bekendtgørelse Nr. 200 af 17. Juli 1931 om kommunale Valg i Landkommunerne paa Færøerne forandres i § 2 og § 5 Ordene »25 Aar« til »21 Aar«, samt i samme Bekendtgørelse § 5 »25 aarige« til »21 aarige«.

§ 3.

I Lov Nr. 126 af 27. Maj 1908 om Byen Thorshavns kommunale Styrelse forandres i § 5 Ordene »25 Aar« til »21 Aar«.

§ 4.

Disse Bestemmelser træder i Kraft straks.

II. *Lóg um valrættaraldurin.*

§ 1.

Í lóg nr. 124, 28. mars 1923 um Føroya løgting, sbr. kunngerð 24. juni 1939, verða orðini »25 Aar« í § 2 broytt til »21 Aar«.

§ 2.

Í kunngerð nr. 200, 17. juli 1931 um kommunal val í bygdakommununum í Føroyum verða broytt í § 2 og § 5 orðini »25 Aar« til »21 Aar« og í sama kunngerð § 5 »25 aarige« til »21 aarige«.

§ 3.

Í lóg nr. 126, 27. mai 1908 um býin Tórshavnar kommunalu stjórn verða broytt í § 5 orðini »25 Aar« til »21 Aar«.

§ 4.

Hesar áseta nir koma í gildi straks.

Broytingaruppskot

frá Dam o. fl.:

§ 4 verður broytt til:

Á danskum máli:

»Disse Bestemmelser træder i Kraft ved første ordinære Valg henholdsvis til Færøernes Løgting, kommunale Valg i Landkommunerne paa Færøerne og til Byen Thorshavns kommunale Styrelse.«

Á føroyskum máli:

»Hesar ásetanir koma í gildi til fyrstu vanligu val atvikavist til Føroya løgting, kommunalu val í bygdakommununum í Føroyum og til býarins Tórshavnar kommunalu stjórn.«

2. viðg. 8. nov. 3. viðg. 2. dec. §§ 1—3 samtyktar 17—0, broytingaruppskotið til § 4 samtykt 13—0. Lógin í síni heild so broytt samtykt 16—0 (Ja atkvóðu: Poul Petersen, P. M. Dam, J. Patursson, J. F. Kjølbro, Robert Joensen, Rasmus Rasmussen, Rikard Long, J. P. Henriksen, J. H. Danbjørg, O. J. Jensen, Johs. Slættenes, A. Sørensen, Pauli Dahl, Samuel Ellefsen, Jacob Fr. Øregaard, J. P. Davidsen).

---

20. Rættargongureglur.

Frl. 15. sept. 1. viðg. 16. sept.

Álit (4. dec.):

Í brævi av 14. september í ár biður løgtingsformaðurin tingið umhugsa spurningin um broytan av teimum bráðfengis rættargongureglunum fyri Føroyar, av tí at kunngerð nr. 50 av 17. desember 1942 um appelrættin ikki longri er nýtandi. Hann førir fram, at mál liggja, har dómsmenn ikki eru nóg uttanvellaðir, og ein av teim juridisku dómarunum hevur sagt seg frá, og eingin er komin í hansara stað.

Málið varð beint í stjórnasskipanarnevndina. Ein nudirnevnd hevur tann 29. september 1943 havt samráðing við sorinskrivaran og annan juristin, sum eftir var í appelrættinum. Síðani hevur málið verið til ummælis hjá sakførarafelag Føroya, sorinskrivara, fúta og amtinum. Ummælini verða hjáløgd hesum álíti:

skjal A: Frágreiðing frá samráð tann 29. september 1943.
- B: Viðmerkingar frá tingmonnunum P. Petersen og Th. Petersen.
- C: Bræv frá sakførarafelag Føroya av 20. oktober 1943.
- D: Ummæli frá sorinskrivaranum av 10. november 1943.
- E: Ummæli frá fútanum av 11. november 1943.
- F: Bræv frá amtinum av 16. november 1943.

Tann 15. oktober 1943 skrivaði løgtingsskrivstovan bræv til amtið um at umhugsa málið fyri seinni samráðing, og tann 21. oktober 1943 skrivar amtið aftur til skrivstovuna, vísandi til hennara bræv, og verður her hildið fram, at amtið sama dag hevði biðið loftverndarfyrisløðumann, cand. jur. Poul Laursen um aftur at álaka sær virki sum dómsmaður í appelrættinum.

Nevndin er ikki vorðin samd um uppskot í málinum.

Ein minniluti (Kr. Djurhuus og A. Samuelsen) áttala, at teir halda, at tann skipan, sum kom í lag við kunngerð nr. 50 av 17. desember 1942 er í lagi, av tí at rætturin er í virki, og minniluti setur so statt einki uppskot fram í málinum.

Ein minniluti (P. M. Dam) setur ikki uppskot fram í málinum, men vil greiða frá støðu sínari í tingsalinum.

Meirilutin (R. Long, J. Paturssoon, P. Pelersen og Th. Petersen) skal um málið gera hesar viðmerkingar:

Um málið í sínu heild skal vísast til tey omanfyri nevndu skjøl, sum hava tikið til umrøðu allar teir spurningar, sum kunnu bugsast at vera neyðugir at gera broytingar í, sum málið nú liggur fyri.

Tá tað stendur í amtsins brævi (sí skjal F), at málið er komið fram eina mest, tí tann eini maðurin er farin úr rættinum, so er hetta ein av orsøkunum; men í skrivi til tingið um at taka málið til viðgerðar er frumført, at sakir liggja, tí teir menn, sum saumbart galdandi reglur skulu døma, ikki hava verið nóg uttanveltaðir, og hetta er ummælt fyrr í brævinum, og er verunliga eins nógv orsøkin til, at tingið varð biðið um at viðgera spurningin.

Meirilutin má minna á, at grundin til, at málið var til viðgerðar í tingsetuni 1942 var tann, at sakarmál tá lógu fyri, sum ikki kundu verða avgjørd, og sorinskrivarin hevði skrivað um at fáa at vita, hvat hann skuldi gera við hesar sakir. Atvoldin var tann, at dómsmennirnir vóru ikki nóg uttanveltaðir. Aftaná broytingina í 1942 kundu øll sakarmál førast fram til dóms í fyrstu syftu; men nú kom sama úrslit, at teir nýggju dómsmenninir við nýggja viðgerð av málinum heldur ikki vóru ov væl uttanveltaðir til at næsti dómur kundi falla. Hetta er sløðan enn, soleiðis at tingið má vita, at um eingin broyting verður gjørd, fara summar sakir, serliga tær politisku, at liggja og bíða, uttan at tann seinasti dómurin kann falla. Hetta heldur meirilutin er skeivt, tí samfelagið eigur at hava eina skipan, soleiðis at allar rættartrætur, hvussu tær ern skikkaðar, kunnu fáa endaliga viðgerð uttan óneyðugan sleðg.

Um so tann rættur, sum varð skipaður við kunngerð av 17. december 1942 nú verður aftur, so má meirilutin halda tað vera ógvuliga átroðkandi, at nakrar broytingur verða gjørdar.

Meirilutin setur fram uppskot um broytan av lógini og skal til tær ymisku greinirnar í uppskotinum gera hesar viðmerkingar:

ad gr. 1: Í fyrstu syftu vildi meirilutin hildið, tað var beint at broytt reglurnar soleiðis, at dómsmenn heilt vórðu undantiknir frá luttøku í borgarligum søkum við fyrstu viðgerð, soleiðis sum tað verunliga hevur vístseg at verða eftir skipanini av 1942, tá allir hava fráfallið dómsmenn. Um tingið ikki skuldi samtykt hetta uppskot, vil meirilutin stýðja, at greinin verður óbroytt sum frá 1942.

ad gr. 2: Uppskotið er óbroytt eftir grein 2 í kunngeringini frá 1942, við tí uppískoyti, at dómsmenn skulu veljast av nýggjum í hesi tingsetu, og síðani veljast fyri tvey ár, soleiðis at helmingurin fer frá á hvørjum ári. Hin gamla reglan sigur einki um hetta, so nú eru teir valdir á óasetta tíð, men vísandi til reglurnar um sjórættarlimir, heldur meirilutin tað verða beinast, at nýval fer fram.

ad gr. 3: Dómsmenninir fáa nú dagpening eftir sama reglum sum vóru galdandi fyri nevningar undan krígnum. Hetta heldur meirilutin vera skeivt, tí ofta eru tað fólk, sum illa hava róð til at loka tað undirskot, ið kann koma av hesum almenna starvi, og sum hava sín góða rætt uppiborinan til at fáa dýrtíðarviðbót eins og maður og kvinna fáa fyri annað arbeiði.

ad gr. 4: Sum ummælt í skjølunum virkar tað heldur lungt at hava so langan lista fyri dómsmenn sum fyri nevningamenn. Meirilutin mælir tí til, at ein serlig nevnd skal minka um hendan listan eftir nærri ásettum reglum.

ad gr. 5: Tað, sum hendan greinin í meirilutauppskotinum skilir seg frá grein 3 í kunngeringini frá 1942, er hetta:

1) orðini »saavidt muligt« eru sett inn um, at teir tveir menninir skulu vera juristar, hetta er gjørt av tí at tað neyvan er gjørligt at finna nóg nógvar juristar til 2 dómsmenn og 2 tiltaksmenn, og meirilutin hevur so hugsað sær til, at tað kunnu nýtast menn við nøkrum juridiskum kunnleika frá teirra dagliga starvi, s. l. d. sýslumenn.
2) Orðini »efter lodstilling fra Lagtingets Landsnævn« er sett inn um teir menn, sum amlið skal velja.
3) Regla er innsett um val av tiltaksmonnum; hartil er at siga, at tingið valdi tiltaksmenn í fjør, men tað má haldast, at verða beinast, at hetta hevur heimild í sjálvari lógarreglini.
4) Tingsins val av dómsmonnum er bundið til ein lista, sum ein serstøk nevnd hevur gjørt uppskot um; hetta er samsvarandi tí, sum fram er komið undir ummælinum í málinum.

ad gr. 6: Greinin er óbroytt tann sama sum kunngering frá 1942. Her skal viðmerkjast, at tað í 1942 er komin ein skrivifeilur inn í uppskotið, tá tað var lagt fyri tingið, og hesin skrivifeilur er ikki rættaður í kunngeringini; tað stendur »Paragraf 2« í staðin fyri »Paragraf 3«.

ad gr. 7: Fyri at valini kunnu fara fram, má tað ásetast, at kunngeringin kemur í gildi 1. januar 1944. Av tí at allar greinirnar í kunngeringini frá 1942 eru tiknar við í hesum uppskoti, má henda kunngering samstundis verða avtikin.

Uppskot:

Frá meirilutanum (R. Long, J. Paturssoon, P. Petersen og Th. Petersen).

Midlertidige Bestemmelser for Færøerne

om visse processuelle Forhold.

§ 1.

Principalt: Domsmænd medvirker ikke i

1) borgerlige Sager i første Instans ved første Paadømmelse, eller ved Genoptagelse efter Retsplejelovens §§ 373—376.

2) Straffesager, som fremmes til Dom uden Udfærdigelse af Anklageskrift i Medfør af Retsplejelovens § 925.

Subsidiært: Domsmænd medvirker ikke i

1) borgerlige Sager, der behandles efter Reglerne om Underelssager.
2) Straffesager, som fremmes til Dom uden Udfærdigelse af Anklageskrift i Medfør af Retsplejelovens § 925.

§ 2.

Antallet af Domsmænd til Deltagelse i Paadømmelse af borgerlige Sager udvides fra 16 til 20, saaledes at Reglerne i § 1 i Kundgørelse Nr. 13 af 17. Juni 1940 iøvrigt forbliver i Kraft. De 20 Domsmænd vælges paany af Færøernes Lagting i Samlingen 1943, og derefter udgaar hvert Aar 10, første Gang ved Lodtrækning; Genvalg kan finde Sted.

Ved Begyndelsen af hvert Kalenderaar opføres de 20 Domsmænd i Nummerorden paa en Liste, saaledes at Nummerordenen bestemmes ved en af Sorenskriveren (Dommeren) foranstaltet Lodtrækning.

I den enkelte Sags Behandling deltager Domsmændene efter Tur efter deres Nummer paa Listen. Det i § 6 omhandlede Kæremaalsudvalg afgør, om en Domsmand skal fritages for at medvirke i en Sag.

§ 3.

§ 1, 4. Stk. i Kundgørelse Nr. 13 af 17. Juni 1940 forandres til: »Der tilkommer Domsmændene Rejsegodtgørelse og Dagpenge efter samme Regler som gældende for Nævninge, med Dyrtidstillæg efter 1 Øre pr. Pristalspoint til Dagpengene. Udgifterne hertil afholdes af Statskassen.«

§ 4.

§ 2, 3. Stk. i Kundgørelse Nr. 13 af 17. Juni 1940 forandres til: »Domsmændene udtages blandt de paa en Domsmandsliste opførte Personer. Denne Liste tilvejebringes ved Foranstaltning af et Udvalg bestaaende af Amtmanden, Sorenskriveren, de to af Amtet udpegede Domsmænd i Instansen for fornyet Foretagelse af Retssager, og et af Sagførerforeningen valgt Medlem. Dette Udvalg udvælger blandt de paa Nævningelisten opførte Personer 60 Personer, hvorefter der ved Lodtrækning udtages 30, der danner Domsmandslisten i den Rækkefølge, de udtrækkes.«

§ 5.

Under fornyet Foretagelse i Medfør af Bestemmelserne i § 3 i Kundgørelse Nr. 13 af 17. Juni 1940 medvirker 4 Domsmænd, hvoraf 2, der saavidt muligt skal have bestaaet juridisk Embedseksamen, udpeges af Amtet, efter Indstilling fra Lagtingets Landsnævn. Ligeledes udpeges 2 Suppleanter til de to af Amtet udpegede Domsmænd og 4 Suppleanter til de af Lagtinget valgte Domsmænd.

Lagtinget eller Lagtingets Landsnævn vælger Domsmændene og Suppleanterne blandt Personer, opførte paa en Liste, hvorpaa et Udvalg bestaaende af Amtmanden, Sorenskriveren, de to af Amtet udpegede Domsmænd og et af Sagførerforeningen valgt Medlem bringer 40 Personer i Forslag.

Der kan tillægges de her omhandlede Domsmænd Honorar for deres Virksomhed. Honoraret afholdes af Statskassen.

§ 6.

Kæremaal forhandles for og afgøres af et Kæremaalsudvalg, bestaaende af Sorenskriveren (Dommeren) og de i § 5 først nævnte (juridiske) Domsmænd.

§ 7.

Nærværende Bestemmelser træder i Kraft den 1. Januar 1944, og samtidig ophæves Bestemmelserne Nr. 59 af 17. December 1942.

Broytingaruppskot

frá Th. Petersen:

Í uppskotinum grein 5 verður í staðin fyri orðini »udpeges af Amtet, efter Indstilling fra Lagtingets Landsnævn«, sett: »udpeges af Amtet, efter indhentet Udtalelse fra Lagtingets Landsnævn, og de 2 andre af Lagtinget eller Lagtingets Landsnævn.«

2. viðg. 4. febr. 3. viðg. 7. dec. Broytingaruppskotið hildið samtykt. § 1 principalt fall 12—0. § 1 subsidiært fall 12—0. (da afkvóð Fólkaflokkurin). Burtur: Henriksen og Iversen. Harvið hinar §§ burturdottnar.

---

21. Lærlingalógin.

Frl. 16. sept. 1. viðg. 23. sept.

Álit (9. nov. Djurhuus og J. Poulsen við fyrivarni):

Spurningurin um broyting av lærlingalógini er lagdur fyri tingið í hesi tingsetu. Tingmaðnr J. H. Dambjørg skrivar tann 31. desember 1942 til landsnevndina um at kanna eftir, hvørvitt tað man bera til at siðlaka, at lærlingalønin skal hækkast við vanligum prístalstilleggi, ella at veita studning frá tinginum, og heldur hann fram í skrivinum, at tann løn, sum lærlingar fáa, er so lítil av øllum lagi lág.

Henda áheitan frá Danbjørg hevur verið til ummælis hjá fútanum, sum viðmerkir: »Det synes betænkeligt og af praktiske Grunde — fan Lærlinge i hvert Fag, mange Fag og vidt forskellige Vilkaar — at søge ordnet en almindelig Fastsættelse af Lærlingelønningerne ved offentlig Foranstaltning, hvorfor den enkelte Lærling formentlig bør henvises til at søge Løntforhøjelse ved Forhandling med Læremesteren eller eventuelt ved Voldgiftsafgørelse«.

Havnar handverksmeistarafelag sigur í skrivi tann 2. august 1943, at spurningurin er avgjørdur við kunngerð nr. 10 av 21. april 1943 um prístalshækkan til arbeiðsløntir.

Tann 13. september 1943 skrivar P/f Tórshavnar Skipasmiðja til tingið, og vísir á ta vánaligu støðu, sum utlanbýggja lærlingar hava, tí tað er dýrt at gjalda fyri kost og vistarhald, og lærlingaløntin er ikki stór, so felagið heitir á tingið um at taka til viðgerðar at veita hesum monnum hjálp, annaðhvørt gjøgnum ein grunn ella á annan háti.

Sama dag tann 13. september 1943 legði javnaðarflokkurin fram á lingborðið eitt skriv, har teir biðja tingið taka til viðgerðar: »Økeypis vistarhald fyri avbygdanæmingar.«

Hesi mál hava verið til viðgerðar í figgjarnevndini, og hevur nevndin útvegað sær upplýsingar um løntirnar hjá lærlingum á Kjølbros virki í Klakksvík og á Tórshavnar Skipasmiðju. Hetta er soleiðis:

Vikuløntin	Gomul løn:	Tórsh. skipasm.:	Kjølbros virki:
1. árið.....	5.00	13.00	24.00
2. árið.....	6.00	15.60	28.80
3. árið.....	8.00	20.80	33.60
4. árið.....	12.00	31.20	38.40
5. árið.....	15.00	39.00	52.80

Tórshavnar skipasmiðja sigir í skrivi dagsett 26. oktober 1943 frá, at teirra løntir eru hækkaðar eftir prístalinum samb. sáttmála við Havnar meistarafelag, og at hetta eru lærlingaløntirnar, tí eru galdandi í Tórshavnar bý.

Nevndin er samd um, at tað beinasta hevði verið, um tað var gjørligt í øllum plássum, har utlanbýggja lærlingar fáu sær læru, at sett á stovn lærlingaheim, sum var í samvirki við teir skúlar, sum vóru á plássinum fyru lærlingar, og tey virki, sum álóku sær at taka móti ungum fólki í læru. Hetta er eitt stórt tiltak og kann ikki fáast skipað fullfíggjað í ófriðartíð, og spurningurin má óivað loysast saman við spurninginum um at gera betri kor fyri tekniskar skúlar her á lundi.

Tá tað sýnist ógjørligt at geva lærlingum ta fullu hjálp á hendan hátt hevur nevndin sumfykt at mæla tinginum til at hækka studningin, sum landsnevndin skal geva til næmingar frá 5.000 kr. til 10.000 kr., soleiðis at landsnevndin skal kunna geva illa stoddum bygdanæmingum ein munagóðan studning eftir umsókn, har sum størsta trongdin er.

Um sjálva lærlingaløntina skal nevndin fyrst vísa á tær upplýsingar, sum ommanfyri eru nevndar. Nevndin heldur, at tað vildi verið beinast, um virkir í hesum tíðum kundu sett løntina hjá lærlingum upp meira enn prístalið gevur lærlingum rætt til, eins og tað er gjørt hjá Kjølbros virki í Klakksvík. Tað er tað at siga, at prístalshækkanin munar so lítið, tá løntin er so lág, sum hon er hjá lærlingum, og tey virkir, sum hava lærlingar, hava í hesum tíðum so góðar inntøkur, at tað ikki vil nerva teirra virki, um teir fara eitt sindur longri upp við løntunum enn kravt.

Í teimum dømum, nevndin hevur tingið, er talan um 5-ára lærutíð. Til hetta má nevndin merkja, at tað í lógini er áselt, at hetta skal standa í lærlingasáttmálanum, og at eingin má hava lærutíð longri enn 4 ár, utlan so at stjórnin hevur ásannað, at tað kann setast til 5 ár, har sum læran í teimum greinum ger tað neyðugt. Nevndin má áttala, at tað eigur at vera efliransað av eftirlitsyvirvaldinum, at tað verður farið fram eftir lógarinnar reglu í hesum føri.

Um tað ikki skuldi koma betri lønkor fyri lærlingarnar á sjálvkravdan hátt, heldur tingið, at tað vildi verið beinast hjá landsnevndini at tikið spurningin upp um at broyta lógarreglurnar fyri lærlingar, men hetta máttí so farið fram aftaná, at samráðingar hava verið við tey avvarandi feløgini.

So statt setir nevndin fram hetta

Uppskot:

1. Tað verður heitt á handverksmeistarur at sela lærlingalønina munagott hægri enn prístalshækkanin gevur lærlingunum heimild til at fasthalda.

2. Landsnevndin fær uppí hendí at fáa frágreiðing frá avvarandi handverksmeistarafeløgum um lærlingalønina, og síðani føra samráðingar við hesi feløg um, hvat ið kann gerast fyri at geva lærlingunum livilig kor í hesi dýrtíð.

2. viðg. 16. nov. Samtykt 25—0.

---

22. Løgtingslógin.

Frl. 14. sept. 1. viðg. 1. okt.

Álit (20. nov.):

A. Økjan av talinum á eykatingmonnum.

Føroya javnaðarflokkur hevur í skrivi av 13. september í ár lagt inn á ting mál um at broyta løgtingslógina soleiðis, at eykatingmennirnir skulu vera so mangir í tali, at hvør flokkur verður umboðaður á tingi í mun til atkvøður sínar við løgtingsvalið.

B. Broytan av valtíðini.

Í riti av 24. august 1943 hevur Bíggjar valslýrið vent sær til tingið við áheitan um at fáa valtíðina broytta í teim smærru plássunum

soleiðis, at hon verður sett til kl. 10 til kl. 12 fyrra partin og kl. 6 til kl. 8 seinrapartin á degi. Umsøkjararnir haldu, at tað er óneyðugt at hava líka langa tíð til valið í teim smáu plássunum sum í teim stóru.

C. *Leingjan av freistini fyri avgreiðslu av tingmálum.*

Føroya javnaðarflokkur hevur riti av 13. september 1913 reist spurningin um at broyta tingskipanina soleiðis, at freistin fyri at fáa mál løgd á ting uttan atkvøði verður longd frá 8—14 dagar.

Meirilutin (R. Long, J. Palnursson, P. Petersen og Th. Petersen) heldur tað ikki vera beint at broyta regluna um, at eykatingmenniuir ikki skulu vera meira enn 5 í tali. Tað er hertil at siga, at tað ógvuliga sjáldan kann væntast at henda, at tað nýtist fleiri eykamenn fyri at allar atkvøðurnar við valið verða umboðaðar, og skuldi tað einaferð hent, soleiðis sum við seinasta val, hvar tað átti at verið 6 eykatingmenn, so vil betta neyvan nakramlið gera, at tað kemur ein meirilutí á tingi, sum ikki hevur meirilutan av atkvøðunum, og tað er tað ið umræður. Annars er meirilutin samsintur í, at ein flokkur eigur at fáa tingmenn samsvarandi teirra atkvøður við valið.

Spurningurin um at broyta grein 12, 2 pettí, sum ásetur at einans tann flokkur kann fáa eykamann, sum hevur fingið mann valdan í einum av valdømunum hevur eisini verið frammi í nevndini. Meirilutin skal vísa til hvat løgtingsnevndin í tingsetuni 1937 fordi fram (sí tingtíðindi skjal 4) og heldur ikki tað er komin nokur broyting í stoðuni hesum spurningi viðvíkjandi, soleiðis at tann broyting sum lá varð gjørd eigur at standa við. Tað er í einum øðrum tingmáli framhildið, at ein skipan sum tann nýgaldandi kann verða hóskandi fyri nýggjur flokkar, men ikki fyri gamlar politiskar flokkar; her má meirilutin halda tað verða tvørtnrímóti, tí ein nýggjur flokkur kann hava ein serstakan spurning hann vil fremja, og einans fáa hann fram við atkvøðum spjaddar um alt landið, men ein gamalur tingflokkur sum ongan valdømsvaldan mann far, um hann kann einans sigast at hevur mist álitið hjá fólkinum.

Umsóknina frá Bíggjar valstýri heldur meirilutin vera vel grundaða. Her skal meirilutin vísa á, at tann gamla skipanin í løgtingslógini av 28. mars 1923 setti valtíðina til kl. 10 f. p. til kl. 1 s. p. og síðani frá kl. 6 til kl. 8 s. p., men hetta varð broytt í 1939 soleiðis at valtíðin varð longd við trimm klokkutímum frá kl. 3 til kl. 6 s. p. Henda broyting er væl hóskandi fyri stórar kommunir, men meirilutin má geva umsøkjarunum ræt í, at hetta er heilt óneyðugt hjá smærri kommunum, tó soleiðis at valtíðin eigur at enda í sama klokkutíma, kl. 8 s. p. — Áðrenn tingið kann fara undir at gera lógbroyting í hesum spurningi, heldur meirilutin tað vera beinast at hoyra, hvat søknarstýrini og valstýrini í teimum smáu kommununum halda um málið. Tað er serliga eitt sindur ivasamt, hvar markið skal setast, og hetta vilja valstýrini best kunna døma um. Meirilutin setur tí uppskot um, at hesin spurningur verður sendur til ummælis til søknarstýrini í øllum kommununum sum hava undir 80 veljarar, og at málið eisini verður lagt fyri valnevndunum til ummælis.

Meirilutin heldur tað ikki verða beint at leingja um ta freist, sum er sett fyri at leggja mál inn á ting, tí ein tílík viðtøka kann eiu-

aus virka til at seinka um tingsins arbeiði, og um tað er eitt týdningarmikið mál, sum kemur ov seint, vil tað altíð sleppa til viðgerðar við atkvøðugreiðslu.

Ein minniluti (P. M. Dam, Kr. Djurhuus og A. Samuelsen) heldur at tað ikki er beint at stytta um tíðina, ið er sett veljarunum at velja í.

Viðvíkjandi økjan av eykatingmannatalinum heldur minnilutin, at tað er samsvarandi við sett demokrati, at leir ymsu flokkar verða umboðaðir á tingi í mun til tær atkvøður, ið teir fáa við løgtingsvalið. Soleiðis sum løgtingslógin nú er vorðin, kann tað henda, at summir flokkar kunna koma so fyri, at teir orsakað av, at talið á eykatingmonnunum er ov lítið, ikki kunnu fáa leir tingmenn leir sambart teirra veljaratal av røttum átti at fingið. Eisini kann atkvøðutalið falla so, at ein flokkur við øllum lógarinnar valrættindum kann fáa fleiri ferðir so nógvar atkvøður sum meðaltalið fyri valdømisvaldar ella sum undirskriftirnar, ið skulu til fyri at melda flokk, men tó ongan mann fáa valdan. Hetta heldur minnilutin ikki vera beint.

Viðvíkjandi leingjan av freistini fyri at fáa mál løgd á ting uttan atkvøðu heldur minnilutin (P. M. Dam og A. Samuelsen), at tað hevur týdning fyri tingflokkarnar at fáa góðar stundir at tala saman innanflokks um tey mál, teir ymsu tingmenn hava hug at reisa, men sum teir ikki hava haft stundir til at tala um við sínar parlamenn. Hesin minnilutin heldur tí, at tað so statt eru grundir til steðis fyri at leingja freistina fyri at fáa mál á ting uttan atkvøðugreiðslu, og skjýtur upp,

at leingja freistina fyri at fáa mál løgd á ting uttan atkvøðugreiðslu frá eini viku til 10 dagar.

Sambart frammanfyri framflatta skjýtur minnilutin (P. M. Dam, Kr. Djurhuus og A. Samuelsen) uppá,

at økja talið fyri eykatingmenn frá 5 upp í 10,

at tann flokkur ið, við at eiga sæti á tingi ella við teim ásettu 600 undirskriftum hevur fingið rætt til eykamann aftrat valdømisvaldum manni skal fáa eykamann uttan at hava fingið valdømisvaldan mann, bert hann hevur fingið 10 pct. av tí samlaða atkvøðutali við valið.

Uppskot:

Frá meirilutanum (R. Long, J. Patursson, P. Petersen og Th. Petersen):

1. Spurningurin um broytan av valtíðini í løgtingslógini fyri tær smærru kommununnar verður sendur til ummælis til søknarstýrini í øllum kommununum sum hava undir 80 veljaratal og til løgtingsvalnevndirnar.
2. Ummælini frá kommununum og valnevndunum verða at leggja fyri tingið í næsta vanligu setu.
3. Svarað verður Bíggjar valstýri, at tingið hevur sent spurningin til ummælis til allar smærri kommununr.

Frá minnilutanum (P. M. Dam og A. Samuelsen):

4. Í tingskipanini fyri Føroya Løgting, soleiðis sum hon er samtykt taan 16. september 1924, § 9, verða orðini »innan vikudagin aftanáa« broytt *til* »seinast tíggjundadagin aftanáa«.

Frá minnilutanum (P. M. Dam, Kr. Djurhuus og A. Samuelsen):

5. Tingið heldur tað ikki vera beint at stytta um tíðina, ið veljararnir nú hava at velja í.

6. *Midlertidige Bestemmelser*

vedrørende

Valg til Færøernes Lagting.

I Lov Nr. 124 af 28. Marts 1923 om Færøernes Lagting, saaledes som denne med de i Anordning Nr. 325 af 29. November 1930, Lov Nr. 177 af 17. Maj 1935 samt Lov Nr. 82 af 15. Marts 1939 indeholdte Ændringer er bekendtgjort af Statsministeriet ved Bekendtgørelse Nr. 249 af 24. Juni 1939, jfr. Kundgørelse Nr. 17 af 19. Maj 1943, foretages følgende Ændringer:

1. I § 1, 1ste Stk., 1ste Punktum, ændres »25« til »30«.
2. I § 1, 1ste Stk., sidste Punktum, ændres »5« til »10«.
3. I § 12, 1ste Stk., ændres »fem« til »ti«.
4. § 12, 2det Stk., affattes saaledes: »Kun de Partier, som er kundgjort i Overensstemmelse med § 4, 5te Stk., og som ved Valgene i Kredsene har opnaaet mindst eet Mandat eller ialt mindst 10 pct af de afgivne, gyldige Stemmer, kan faa noget Tillægsmandat, og Opgørelsen foretages alene paa Grundlag af de Stemmer, der er afgivet paa Kandidatlister, der slutter sig til disse Partier.«
5. I § 12, 5. Stk., sidste Punktum, ændres »5« til »10«.

Nærværende Bestemmelser træder i Kraft straks.

2. viðg. 29. nov. 3. viðg. 3. dec. Uppskot Dams og Samuelsens viðv. tingskipanini fall 11—0, uppskot Longs o. fl. fall 12—0. Uppskot Dams Djurhuuss og Samuelsens samtykt 13—0. Lógaruppskot samtykt 14—0.

---

23. Trygging.

Frl. 14. sept. 1. viðg. 8. okt.

Álit (4. dec. Dam, Djurhuus og Poulsen við fyrivarni):

Føroya javnaðarflokkur biður tingið taka til viðgerðar hetta mál: »Tiagsius yvirtaking av allari endurtrygging, ið nú annars verður gjørd í útheiminum«

Síðani er tað til tingið komin onnur skriv um tryggingarviðurskifti, sum nevndin hevur tikið til viðgerðar undir sama máli. Nevndin skal greiða frá málinum soleiðis:

A. *Avtøka av vørutryggingini*: Við skrivi av 30. okløber 1943 hevur »Varekrigsforsikringen« sagt frá, at tað eftir tí skipan, sum kom í gildi við kunngerð nr. 61 av 23. december 1942, einans eru tilmeldaðar 15 tryggingar av vørum móti kríggsvanda, og at 4 feløg hava tilmeldað vørur fyri 844.000 kr. av tilsamans tilmeldaðum 1.160.742 kr., soleiðis at vandin ikki, soleiðis sum tilætlað var, er javnaður út á nógvar ymiskar tryggingar. Tryggingargjaldið fyri hesar tilmeldaðu tryggingar er 23.714,84 kr., men er ikki innkravt. Nevndin fyri vørukríggstryggingini hevur samráðst um málið, og ein meirihluti er komin til tað úrslit, at tað tryggingarliga sæð ikki er rætt at halda fram við hesi trygging, og hevur nevndin í samtykt at mæla løgtinginum til at vørukríggstryggingin verður avlikin.
Síðan mælir nevndin til at tað valutagjaldið — 10 oyr. pr. sterlingpund — sum sbr. lógarinnar gr. 7 higartil er uppkravt, framvegis skal verða uppkravt, og mælir nevndin til, at avlopið av hesum peningi, uttanfyri at peningur er nýttur til gjaldan av skaða á húsabyggningum av kríggsávum, skal falla til eina tryggingargrunn.

B. *Gjaldan av kríggjskaða á hús,* mælir vørukríggstryggingarnevndin til skal fara av sterlinggjaldinum, í staðin fyri at útvegast við áliknan á húsabyggningar um all landið. Tann skaði, sum tilmeldaður, er kr. 412.700 og vildi hetta svarað til um 1 % á allar húsabyggningar, skuldi tað verið álíknað eftir lógini.

C. *Kríggstryggingum av skipum* hevur í brævi av 23. november 1942 skrivað til tingið um at fáa góðkent nakrar broytingar í samtyktum felagsins. Tær broytingar, sum her er talan um, eru hesar:

1. Tann gamla samtyktin skilur millum vandapart 1 og 2, men hetta heldur nevndin vera óneyðugt nú, og mælir til, at tað verður eins vandagjald fyri øll skip. Gjaldið skal soleiðis í framtíðini verða sett niður til eitt gjald fyri uppleggjan og eitt fyri sigling ella fiskiskap.
2. Hægsti vandin, sum felagið kundi tryggjað var setur til 200.000 kr. men hetta mælir nevndin til verður hækkað til 300.000 kr. og vísir til at felagsins uppspardi peningur nú felur tvær til trúggjar milliónir kr.
3. Hægstipeningur fyri farm ella veiðu hevur higartil verið settur til 40.000 kr. fyri kjølin, hetta mælir nevndin til, verður hækkað til 60.000 kr. við sama viðmerking sum undir 2.

Tryggingarsambandið Føroyar hevur við átekning á brævið frá kríggstryggini sagt frá, at teir góðtaka uppskotið og senda tað til tingið til besta viðmæli.

Nevndin hevur samráðst um hesi mál og skal einmælt ráða tinginum til at samtykkja hesa støðu:

ad A: Vørukríggstryggingin verður avtikin. Við tí lógarreglu, sum tekur av hesa trygging, verður ásett, at 10 øyr. fyri hvørt sterlingpundið framvegis verður at gjalda, soleiðis at peningurin fyribils verður settur í ein grunn, hvørs rokuskaparførsla skal liggja hjá tryggingarsambandinum, meðan landsnevndin tekur avgerð um, hvørjar átreiðslur hesin grunnur skal hava — sí niðanfyri — og hvør ábyrgd kann leggjast á henda pening. Nevndin setur fram lógaruppskot um hetta.

ad B: Kríggsskaðin uppá húsabyggningar er higartil greiddur á tann hátt, at eigarin hevur tikið lán í sparikassanum, soleiðis at tingið hevur ábyrgd fyri lánini, og tryggingin skal gjalda sparikassanum ásetta rentu. Nevndin er á einum máli við vørukríggstryggingarnevndina, at húsaskaðin fyribils eigur at verða útgoldin av tí grunni, sum er komin av sterlingsgjaldinum. Um fleiri skaðar koma, skjýtur nevndin upp, at landsnevndin skal hava heimild til at avgera, um peningurin framvegis skal verða latin úr sama grunni. Nevndin er av tí áskoðan, at tað er beint at kríggskaði á húsabyggningar endaliga verður goldin av hesum peningi, men heldur ikki, tað er beint nú at brota lógreglurnar, tí um ein so kann vóna og væntа, at skaðin ikki fer at vera so nógvur hereftir, so kann eingin siga nakað fyri vissi, og tí heldur nevndin, at peningurin sum nú verður útgoldin skal verða bókaður sum »lána« til kríggstryggina fyri húsabyggningar, uttan at nøkur renta verður roknað, og at spurningurin um la endaliga útreiðslurna verður tikin upp til avgerðar av tinginum, lá bardagin er av. Nevndin setur uppskot samsvarandi.

ad C: Nevndin er samsint við kríggstryggingina fyri føroysk skip um at tað er beint at broyta regluverkina soleiðis, at tryggingin kann taka størri part í hvørjari teknig. Eisini vil nevndin mæla tinginum til at samtykkja hina broytingina, sum skotið er uppá.

Tingsins yvirtøka av allari endurtrygging soleiðis sum Føroyar javnaðarflokkur hevur heitt á tingið um at fyrireika, hevur nevndin eisini samráðst um.

Fyrst skal her verða vísl til broytingina í reglugerð fyri kríggstryggingina soleiðis at henda trygging kann taka helvt meira enn higartil uppá hvørt skipið; hetta er eitt tiltak sum vil virka mangott á leiðini móti, at øll trygging verður teknað í Føroyum.

Síðani skal nevndin vísa til kunngerðina nr. 11. av 17. juni 1940 um tryggingaryrki, har tað í gr. 3 er ásett, at endurtrygging, ið ikki kann verða tryggjað í Føroyum, skal fara til bretskt felag. Um hesa viðtøku er at siga, at mál hava vísl, at hon ikki til fullnar hevur verið bildin. Fyri brunatrygging hevur tað verið soleiðis, at tað almenna felagið »Føroyar brunatrygging« hevur gjørt sáttmáli í 1940 uppá 5 ár, hareftir øll endurtrygging aftaná at felagið sjálvt einans hevur tikið 10.000 kr. av vandanum á hvørjum húsi, skal fara til Bretlands. Tað er upplýst fyri nevndini, at felagið ikki hevur gjort nakað fyri at fáa henda sáttmála broyttan samsvandi lógarregluni 1940, og

tað heldur nevndin ikki er beint. Sjálvt um tað kanska er beint, at brunatryggingin ikki eigur at taka meira part sjálv enn tær nevndu 10.000 kr., so áttí annar tryggingarstovnur her á landi, t. d. Tryggingarsambandið, Sjóvátryggingin og P/f Trygd at tikið teirra part í staðin fyri at hann nú fer av landinum. *Meirilutin* (P. M. Dam, J. F. Kjølbro, R. Long, J. Patursson og Th. Petersen) skjýtur til upp, at tað verður heitt á brunatryggingina um at samráðast við teirra endurtryggingarfelag í London, og siga frá, at lóg her á landi hevur álagt teimum at tryggja her, og at teir tí mugu biðja um at fáa endurtryggingarsáttmálan broyttan. *Minnilutin* (Kr. Djurhuus og Job. M. Fr. Poulsen) skal últala, at tann sáttmáli, sum fingin varð í 1940, var so góður, og tað er so stutt eftir av tíðini, hann er í gildi; teir kunnu tí ikki mæla til, at hann verður uppsagdur.

Eisini í øðrum førum er endurtrygging farin av landinum, sjálvt um tryggingarpeningur her ikki hevur fingið bjóðað fullan part samsvarandi teirra peningastyrki; nevndin skal skjóta upp, at tingið samtykkir at heita á tryggingarsambandið um ikki at endurtryggja í útheimlonum, utan so at tryggingin fyrst hevur verið boðin øllum teimum sum her hava loyvi at virka, tí soleiðis heldur nevndin, at henda grein rættvíst eigur at fatast.

Av tí, sum framhildið er, kann tað koma ein munagóður partur av endurtryggingini heim aftur til Føroya, men tað verður sjálvandi ikki alt. Tann spurningur, sum fyriliggur, er at lata tingið taka ábyrgdina fyri tí endurtrygging, sum ikki á annan hátt kann verða tryggjaður her í Føroyum. Tílíkt stig er ikki samsvarandi vanligum atburði í trygging, við tað at heilt stórar tryggingar eiga at verða partvís endurtryggjaðar uttanlanda. Tað átti tó, sum umstøðurnar nú eru, einans at verið talan um at endurtryggja aðrastaðni tær størstu tryggingarnar partvís, tí tann óný tti peningurin her í Føroyum, og serstakliga tann hjá Føroya løgtingi, eigur at kunna taka heilt munagóðan part av hesi endurtrygging.

Nevndin skal her vísa til tann pening, sum frammanundan er umrøddur, og sum kemur frá gjaldinum av sterlingpundunum, hesin peningur kundi hóskandi verið tann peningur, sum fyrst varð nýttur til at taka nakað av endurtrygging til tingið fyri, meðan tingsins ábyrgd stóð fyri tí, sum kundi fresta. Nevndin vil tí skjóta upp, at tað verður stovnað eitt endurtryggingarvirki av tinginum, soleiðis at landsnevndin er nevnd virkisins, og at landsnevndin setur stjóra til at taka sær av tí dagliga rakstrinum, meðan eitt tílíkt virki ikki nýlist at hava nakra serliga skrivstovu ella aðrar úlreiðslur. Roknskapurforslan kann verða greidd úr hondum annaðhvørt á løgtingsskrivstovuni, á gjaldstovnni ella hjá tryggingarsambandinum, men hetta má landsnevndin so samráðast um, tí tað er ikki neyðugt at avgera nakað av hesum í lógarregluni, meðan lógarregla má til fyri at stovna eitt tílíkt virki. Nevndin setur fram uppskot um tílíka lóg.

Frávik frá einkarrættinum hjá tryggingarsambandinum er ein spurningur, sum í nevndini er tikin upp til viðgerðar. Ein meirifull (Kr. Djurhuus, J. F. Kjølbro, R. Long, J. Patursson, Th. Petersen og Job. M. Fr. Poulsen) má halda fram, at tað einans kann styðja tankan um at hava mest gjørligt av tryggingarpeningimum í landinum, um tað verður gjørligt hjá einum føroyskum felag at tekna tryggingar, tó so at tílíkar nýtekningar, mugu tær endurtryggjast, skulu verða bjóðaðar øllum stovnum her á landi til endurtryggingar, áðrenn loyvt verður at endurtryggja uttanfyri Føroyar.

I tingsetuni 1942 setti meirilutin í nevndini uppskot fram um at steðgað skuldi verða við einkarrættinum til árið 1944 var útliðið; hetta uppskot fall. Meirilutin vil ikki taka hetta uppskot fram aftur, av tí at einkarrætturin nú hevur verið í gildi eina tíð, men vil gern uppskot um, at tað verður skoytt uppí lógarinnar gr. 4 ein viðløka tan, at nevndin fyri tryggingarsambandið, tá ið málið hevur verið til ummælis hjá landsnevndini, kann geva felag ella umboði, ið hoyrir heima í Føroyum, rætt til at nýtekna tryggingar, um nevndin heldur at hetta ikki fer at verða til skaða fyri at halda mest gjørligt av tryggingarpeniagi her heima í Føroyum.

Uppskot

frá allari nevdini:

A. *Midlertidige Bestemmelser for Færøerne om Ophævelse af Varekrigsforsikringen og Dannelsen af et Forsikringsfond.*

§ 1.

Den ved Bekendtgørelse om Krigsforsikring af Varer Nr. 61 af 23. December 1942 etablerede Varekrigsforsikring ophæves herved.

§ 2.

Den i Henhold til Bekendtgørelse Nr. 61 af 23. December 1942 § 7 jfr. Bekendtgørelse Nr. 9 af 16. Marts 1942 § 8, opkrævede Valutaafgift tillægges et Fond under Navnet »Forsikringsfondet«.

§ 3.

Ved Køb og Salg paa Færøerne af fremmed Valuta erlægges en Afgift paa 10 Øre for hvert Pund Sterling eller svarende til 10 Øre for hvert Pund Sterling efter samme Regler, som er gældende for Valutaafgift. Afgiften tilfalder det under Paragraf 2 nævnte Fond.

Afgiften opkræves af Bankerne som en Forsikringsafgift og overføres maanedlig til separat Konto under »Tryggingarsambandið Føroyar«.

Nærmere Regler om Afgiftens Beregning og Indbetaling til Varekrigsforsikringen fastsættes af Amtet efter indhentet Erklæring fra Lagtingets Landsnævn.

§ 4.

Forsikringsfondets Midler henlægges under Lagtingets Landsnævns Bestyrelse.

»Tryggingarsambandið Føroyar« fører Regnskab for Forsikringsfondets Midler. Regnskabet og Pengemidler skal holdes adskilt fra »Tryggingarsambandið Føroyar« og dets Underafdelinger, og Fondet svarer ikke Afgift til Forbundet. Regnskabsaaret er

Kalenderaaret, Regnskabet revideres af »Tryggingarsambandið Føroyarøs Revisorer og decideres af Lagtinget.

§ 5.

Som Bestyrelse for Forsikringsforbundet kan Lagtingets Landsnævn godkende Udbetalinger af Fondets Midler til Dækning af Krigsskade paa Bygninger. Beløbene opføres som rentefrit Laan til det i Henhold til Midlertidige Bestemmelser for Færøerne om Krigsforsikring af Bygninger Nr. 36 af 6. November 1940 oprettede gensidige Forsikringsforbund under »Tryggingarsambandið Føroyar«, løvrigt kan Bestyrelsen ikke disponere over eller paadrage Fondet Forpligtelser uden i Henhold til Lagtingets Beslutning.

§ 6.

Nærværende Bestemmelser træder i Kraft straks. Samtidig ophæves Amtets Bekendtgørelse Nr. 61 af 23. December 1942 om Krigsforsikring af Varer.

B. Løgtingið samtykkir hjálagda uppskot til: »Ændringer i de den 11. November 1940 af Færøernes Lagting vedtagne og den 22. November 1940 af Færø Amt stadfæstede Vedtægter for Krigsforsikringen for Fiskefartøjer paa Færøerne.«

C. *Midlertidige Bestemmelser for Færøerne*

om

Lagtingets Overtagen af Reassurance.

§ 1.

Færøernes Lagting er med Lagtingets Landsnævn som Bestyrelse berettiget til at drive Reassurance-Virksomhed paa Færøerne for Beløb, der ikke kan dækkes hos allerede her virkende Institutioner efter nedenstaaende Regler.

§ 2.

Færøernes Lagting hæfter for de af Virksomheden indgaaede Forpligtelser. Til speciel Sikkerhed for Forpligtelserne staar det af Lagtinget ved Vedtagelsen af midlertidige Bestemmelser oprettede Forsikringsfond.

§ 3.

Virksomheden har Hjemsted i Tórshavn. Bestyrelsen udarbejder og kundgør Vedtægter for Virksomheden. Der skal være selvstændigt Regnskab og Regnskabsaflæggelsen foranstaltes af Bestyrelsen gennem en af denne antaget Direktør. Regnskabet revideres af Lagtingets Revisor, decideres af Lagtinget, og Bestyrelsen foranstaltet Offentliggørelse af Regnskabet.

§ 4.

For Virksomheden gælder Reglerne i Lov Nr. 155 af 2. Maj 1934 om Skadesforsikringsvirksomhed i saa vidt Omfang, som efter Forholdene muligt.

§ 5.

Disse Bestemmelser træder i Kraft den 1. Januar 1944.

D. Løgtingið heitir á »Tryggingarsambandið Føroyar« um ikki at endurtryggja nakað í útheimiðum, uttan so at tryggingin fyrst hevur verið boðin øllum teimum, sum her í Føroyum hava loyvi til at virka.

Frá meirilutanum (P. M. Dam, J. F. Kjølbro, R. Long, J. Patursson og Th. Petersen):

E. Løgtingið heitir á »Føroya brunatryggingu« um at samráðast við teirra endurtryggingarfelag í London og sigu frá, at lóg her í Føroyum hevur álagt teimum at endurtryggja her, og at teir tí mugu fáa broytt teirra endurtryggingarsáttmála.

Frá allari nevndini undantikið P. M. Dam:

F. *Midlertidige Bestemmelser for Færøerne*

om Forandring i Kundgørelse Nr. 14 af 17. Juni 1940

om Forsikringsvirksomhed.

Til § 4 i Kundgørelse Nr. 14 af 17. Juni 1940 sættes som nyt tredie Stykke:

»Forbundets Bestyrelse kan, efter Indstilling fra Lagtingets Landsnævn, meddele paa Færøerne hjemmehørende Selskab eller Forsikringsagentur Ret til at nytegne alle Arter af Forsikring uanset Forbundets Enerret, paa Betingelse af, at enhver Reassurance af saadanne Nytegninger tilbydes herværende Institutioner, inden denne kan dækkes udenfor Færøerne.«

Disse Bestemmelser træder i Kraft den 1. Januar 1944.

Broytingaruppskot

frá Dam, Djurhuus og Poulsen:

I Stedet for Flertallets Forslag A, C, D, E og F sættes:

Midlertidige Bestemmelser for Færøerne

om forskellige Forsikringsforhold.

§ 1.

Den ved Kundgørelse Nr. 61 af 23. December 1942 oprettede Varekrigsforsikring ophæves herved. De i Kraft værende Forsikringer overtages af Tryggingarsambandið »Føroyar«, saaledes at Forsikringstagerne faar samme Retsstilling, som de vilde have faaet, hvis Varekrigsforsikringens Virksomhed var fortsat til Krigens Afslutning, jfr. fornævnte Kundgørelse § 13. Amtskommunen (Lagtinget) hæfter overfor Forsikringstagerne for Opfyldelsen af deres eventuelle Krav paa Erstatninger.

Forsaavidt Forsikringstagerne ønsker det, kan de i Kraft værende Forsikringer straks ophæves, og Forsikringstageren fritages i saa Fald, hvis ingen Skade er sket i Forsikringstiden, for at betale Præmie for den Tid, Forsikringen har været i Kraft.

Forsaavidt herefter nogen Varekrigsforsikring forbliver i Kraft, oppebærer Tryggingarsambandið »Føroyar« de i Kundgørelse Nr. 61 af 23. December 1942 fastsatte Præmier og betaler Erstatninger efter de i samme Kundgørelse indeholdte Regler, jfr. med Hensyn til Valutaafgifter § 2.

§ 2.

De i Henhold til § 7 i Kundgørelse Nr. 61 af 23. December 1942 opkrævede Valutaafgifter tilfalder Tryggingarsambandið »Føroyar«, og der opkræves indtil videre samme Valutaafgifter efter de i nævnte Kundgørelse § 7 indeholdte Regler, hvilke Afgifter ligeledes tilfalder Tryggingarsambandið »Føroyar«.

Disse Valutaafgifter hæfter for Tryggingarsambandis's eventuelle Varekrigsforsikringer, jfr. § 1, og skal derefter anvendes til Dækning af Krigsskade paa Bygninger, jfr. Kundgørelse Nr. 36 af 6. November 1940. Bestemmelserne i nævnte Kundgørelse om »Krigsforsikring af Bygninger paa Færøerne« forbliver i Kraft kun med den af foranstaaende følgende Ændring, at de i nærværende § omhandlede Valutaafgifter anvendes forlods til Dækning af indtrufne Skader.

Had der maatte blive tilovers af Valutaafgifterne, efter at »Varekrigsforsikringen« og »Krigsforsikringen af Bygninger paa Færøerne« er fuldt afviklede, tilfalder Tryggingarsambandið »Føroyar«s Reservefond.

§ 3.

De under Tryggingarsambandið »Føroyar« hørende Forsikringsafdelinger maa kun tegne Reassurance for de af dem overtagne Risici, forsaavidt dette af Afdelingens Bestyrelse efter Samraad med Tryggingarsambandið's Bestyrelse skønnes fornødent.

For at muliggøre det for Tryggingarsambandið's Afdelinger at beholde flest mulige Risici uden Reassurance bestemmes det herved, at de til enhver Tid i Lagtingets Vinnulívsgrunn værende Midler hæfter for Forbundets Forpligtelser efter de enkelte Afdelingers Midler og efter Forbundets Reservefond. For denne Garanti yder forbundet aarlig, første Gang ved Udgangen af Aaret 1944, en Afgift paa 2 % af Vinnulívsgrunnsins Kapital ved Aarets Begyndelse.

Hvis Tegning af Reassurance uanset foranstaaende skønnes fornøden, bliver saadan Reassurance at tegne i et paa Færøerne hjemmehørende Forsikringsselskab i det Omfang, dette skønnes forsvarligt, og ellers i et i de det øvrige Kongerige hjemmehørende Selskab eller i et britisk Selskab.

Herværende Selskaber og Agenturer kan uansel Bestemmelserne i § 2, Stk 2, i Kundgørelse Nr. 14 af 17. Juni 1940 overtage Reassurance for Tryggingarsambandið »Føroyar« og dettes Afdelinger, men iøvrigt forbliver nævnte Bestemmelser i Kraft, saaledes at Nytegning af Forsikringer paa Færøerne, bortset fra Reassurance for Tryggingarsambandið »Føroyar« og dettes Afdelinger kun gyldigt kan ske i Tryggingarsambandið »Føroyar« og dettes Afdelinger, jfr. dog § 4, Stk. 2, i Kundgørelse Nr. 14 af 17. Juni 1940.

Tryggingarsambandið »Føroyar« og dets Afdelinger er berettiget til at overtage Reassurance for de i andre herværende Forsikringsselskaber lovligt tegnede Forsikringer. Ønsker Tryggingarsambandið ikke at overtage saadan Reassurance, kan den tegnes i britisk Selskab.

§ 4.

Nærværende Bestemmelser træder i Kraft den 1. Januar 1944.

2. og 3. viðg. 8. dec. Nevndaruppskotið A §§ 1—2 fullu 12—0. §§ 3—6 harvið burturdottnar. Pl. C §§ 1—5 harvið burturdottnar. B samtykt 24—0. D 17—0. E 16—0. F fall 12—0. Broytingaruppskotið samtykt 13—0.

---

24. Bann móti útafturførslu av vørum.

Frl. 15. okt. 1. viðg. 16. okt.

Álit (1. nov.):

Amtið hevur tann 14. oktober tilskrivað tinginum soleiðis:

»Efter stedfundne Forhandlinger med den britiske Konsul maa Amtet anse det for nødvendigt, at der udfærdiges et ubetinget og klart Forbud mod, at Varer, som ved Eksport fra Storbritannien er bestemt til Færøerne, sendes andetsteds hen,

og at Overtrædelse af et saadant Forbud gøres strafbar. Der findes ganske vist i Forvejen Forskrifter, der forbyder Udførsel fra Færøerne af praktisk talt alle livsvigtige Varer, men disse Forskrifter er ikke tilstrækkelige, da de dels ikke dækker alle Eksportvarer fra Storbritannien, dels ved en fornylig truffen Retsafgørelse er fundet uanvendelige paa et Tilfælde, hvor Varerne ikke inden Videresendelsen havde været bragt i Land.

Som Forholdene er, er Færøerne henvist til at forskaffe sig en Række Varer ved Import fra Storbritannien, og det er i saavel herværende som britiske Myndigheders Interesse, at alle Varer, der eksporteres fra Storbritannien til Dækning af et færøsk Behov, virkelig kommer de færøske Forbrugere tilgode og ikke havner andetsteds. Uden de bedst mulige Garantier i saa Henseende maa det befrygtes, at der kan opstaa Vanskeligheder med at opnaa de fornødne Eksporttilladelser fra de britiske Myndigheder.

Amtet har af fornævnte Grunde udarbejdet vedlagte Udkast til »Midlertidige Bestemmelser vedrørende Handel med Udlandet« og skal til de enkelte Bestemmelser bemærke følgende:

Ad § 1: Hovedformaalet med Forbudet er, at enhver Vare som er udført fra Storbritannien til Dækning af Behovet paa Færøerne, virkelig skal komme Færøerne tilgode. Der er i Forslaget aabnet Adgang for Amtet til Dispensation, som kun vil kunne tænkes meddelt, forsaavidt de britiske Myndigheder er indforstaaet hermed.

Formuleringen og Indholdet af Paragrafen dækker ogsaa Varer fra andre Lande end Storbritannien, hvilket formentlig er rectt begrundet, selvom det er af mindre praktisk Betydning i hvert Fald for Tiden.

Ad § 2: Det er fundet naturligt at foreslaa Straf- og Konfiskationsbestemmelserne i Lov Nr. 288 af 2. September 1939 anvendt paa Overtrædelser af det heromhandlede Forbud, da Forbudet vel kunde udfærdiges administrativt af Amtet i Medfør af nævnte Lovbestemmelse og kun foreslaas udfærdiget som særskilt Lovbestemmelse for at undgaa enhver Tvivl. Man har dog for Hovedmandens Vedkommende foreslaaet Loven's Bødeminimum, 50 Kr., forhøjet til det dobbelte af Varens Værdi, da Forseelser af den heromhandlede Art som oftest vil skyldes et Ønske om økonomisk Gevinst og derfor, forsaavidt Bodestraf anvendes, bør kunne straffes med store Bøder.

Idet Amtet under Henvisning til foranstaaende anmoder om Lagtingets Vedtagelse af Forslaget, henstiller man, at Sagen gøres til Genstand for *hurtig Behandling*.

(sign.) Hilbert.«

Ein meiriluti (R. Long, J. Patursson, P. Petersen og Th. Petersen) viðmerkir:

Síðani 1940 hevur støðan hjá Føroyingum verið tann, at vit einans hava kunnað havt samferðsla við tvey lond, Bretland og Ísland. Tað hevur verið ein royna til at fáa samferðsla í lag við bandarikið fyri vestan hav, men henda royna, sum fekk nógvar trupulleikar at kenna, máttli steðga, og vit skulu ikki nærri koma inn uppá hetta mál, við viðgerðini av hesum lógaruppskoti.

Við Bretland hava vit mesta samhandilin. Føroyingar hava gjørt, og vilja gera, hvat teir kunna fyri at føra so nógv av vorum til Bretlands sum gjørligt, hetta eru vit ikki í iva um. Vit Føroyingar hava ikki altíð havt góð likindi fyri okkara útfluttningi; oftast hava vit verið noyddir at farið ta tongu leið til lond fyri sunnan við klipfiski, og einans havt ein evurs lítlan part av tí, sum kundi verið selt á marknaðum nærri okkara oyggjum, og til betri prísir; sjálvsagt vilja Føroyingar sum heild nú líkindi gevast, gera teirra skyldu við útfluttningi, fyri so eisini í komandi tíðum at kunna væntta at sleppa uppí part meira enn tað higartil er fallið í okkara lut.

At kalla allur okkara innfluttningur kemur úr Bretlandi, soleiðis er lagt til rættis fyri okkum. Vit fata fullt okkara skyldu at ansa eftir, at her ikki verður oyðslað við pokrum, og serstakliga at ikki nakað, sum er ætlað til okkara fer nakran annan veg. Tað, sum uppskotið sipar til, at fáa skipað betri fyri, eru vit samsintir í. Í hesum viðfangi mugu vit tó ikki gloyma, at vit hava eins stóra ella størri ábyrgd fyri okkara egna fólki her heima, soleiðis at tað ikki er saknur av varum, sum eru heilt neyðugar fyri at lívið kann livast. Her hevur tað higartil verið lagt so til rættis, at Føroyingar ikki hava havt nakað at sagt, hvørki við samráðingum ella við upplýsingum, og hetta halda vit vera skeivt.

Í 1911 kom ein nýggj skipan á hesum voruflutningi frá Bretlandi til Føroya, sí bretska konsulins skriv av 18. mars 1911 við tveinum fylgiskjølum. Her er grundarlagið lagt, og vit mugu halda, at tað er skeivt, at tað ikki áðrenn hetta varð lagt í fasta legu, var gjørt fyrireikingar til at Føoyingar og Bretar kundu hittast á máli, fyri at hesir báðar tjóðir kundu fáa í lag tað samvirki, sum er neyðugt fyri at skapa møguleikan fyri góða semju og góðan felagsskap í komandi tíðum. Boðini frá Bretlandi komu aftanó bræva skiftið við amtið, tað framgongur beinleiðis av skrivinum, og tað er óivað soleiðis, at her má vera skrivað nakað, sum ikki er komið heilt beint fyri, tí henda útsøgn í bræví konsulins kann ikki fatast á annan hátt, har stendur: »Jeg vil gerne mest indtrængende henstille, at De selv (amtmaðar Hilbert) indtræder som det andet Medlem af Udvalget, forsaavidt De er i Stand til at paalage Dem dette extra Arbejde. *Dette vil sikre en fuld og udtømmede Repræsentation for Færøerne i Udvalget.*" Her má ein og hvør Føroyingur siga, at hetta her ikki til; skulu okkara sjónarmið koma fram, so má tað best kunna koma frá einum Føroyingi, sum í sínum dagliga virki hevur vist, at hann kann halda samhandilin við fremmand lond uppi, og sum eisini hevur hildið í gongd tað virki, sum hevur fært Bretlandi vorur til handlið frá okkum.

Tað er eisini nógv skeivt komið fram í hesi tíð, sum er farin fram, síðani hesin sáttmáli kom í gildi. Vit kunnu nevna, at tað veruligga hava verið ikki so fáir dagar, hvar partur av fólki ikki hevur havt kolamolan til at kóka sær dogurða við; millum manna vil Bretland ofta fáa skyldina, tó at tann veruligga orsøkin óivað er at finna í tí, at vit ikki hava havt teir roftu menninar okkara vegna; á sama hátt minnist ein til summarið 1912, tá eplatrot var her í Føroyum, soleiðis at sjálvt sjúklingar máttu fáa kókaði ris í staðin fyri eplir, meðan

tað í útvarpinum frá Bretlandi hoyrdist um, at teir ikki kundu ela upp sínar egnu fruktir og tí bóðn fólk nýta eplir meira enn fyrr. Við sukri hevur tað verið soleiðis, at nakrir útróðrarmenn í Klakksvík ikki hava fingið nokur fá pund um mánaðin aftrat tí vanligu nøgdini, tó at ein veit, at teir í dagavís einans hava breyð, drekka og sukur til matna, og gera tað arbeiði, sum ein skuldi trúð, var mest umráðandi, nevniliga at fáa fisk fyri at senda hann til Bretlands.

Tað, at tað eiga at vera Føroyingar, valdir av teimum ymisku stættum her á landi, sum skuldu tikið betta arbeiði upp, er væl grundað í tí, sum aðrastaðni er lagdur stórur deatur á, at skapa fulla fatan og hurvið samvirki millum teir ráðandi og hvønn einstakan í samfelagnum. Rætta samvirki kemur ikki uttan rætta fatan, og hon kann ikki koma, tá Føroyingar eru útihýstir og ein útlendskur maður verður settur til at verða tann fullkøni í okkara viðurskiftum. Fyri tíðina, sum nú fer fram og fyri komandi tíðir, serliga fyri gott samvirki millum Bretar og Føroyingar, eigur tað skjótast gjørligt at verða so fyriskipað, at besar báðar tjóðir koma á tal, og hurvið finna hvønn annan.

Við Ísland hava vit Føroyingar havt nógv samvirki. Okkara útflattningar er at kalla einans fiskur, og av tí fiski, vit hava flutt út, hava vit keypt ein stóran part úr Íslandi. Vit hava eisini fingið aðrar vørur úr Íslandi og hava fingið boð um, at vit kunnu fáa uppaftur meira. Vit munnu ikki gloyma, at nógvir Føroyingar eru í Íslandi og hava gott arbeiði har. Um summarið eru fleiri hundrað manns haruppi og rógva út frá landi og hava tað stóra ræði, at teir kunnu fiska innanfyri sjómark. Alt tað, ið hesum mannum tørvar, fiskireiðskap, mat og annað, fáa teir frá Íslandi. Vit mugu heldur ikki gloyma, at hópurin av okkara skipum eisini fáa tað, teimum tørvar í Íslandi av proviantí, fiskireiðskapi, koli og øðrum. Stórar umvølingar eru eisini gjørdar uppá okkara skip í Íslandi. Nøkur skip hava fiskað sild á hvørjum summri í Íslandi, og hava selt fongin har fyri nógvar pengar; eisini hesi skip hava fingið proviant og annað úr Íslandi. Okkara trolarar fara javnan inn í Íslandi fyri at fáa kol og annað neyðturviligt. Vit mugu tí ásanna, at høvdu Íslendingar ikki verið so beinasamir móti okkara fiskimonnum, hevði mangan verið illa vorðið hjá okkum. Alt hetta ger, at eitt útflattningsforboð í Føroyum, ið bert má ætlast at vera eitt forboð móti at flyta nakað til Íslands, má verða væl umhugsað.

Tað eigur eisini at verða tingað um eina skipan soleiðis at okkara fiskifør kunnu fáa lógligan farm aftur úr Bretlandi til Íslands, tá teir hava flutt fisk og fara vegin aftur eftir nýggjum fiskifarmi.

Eisini móti Íslandi áttu vit at fyriskipað soleiðis, at tingingar um øll samvirkismál fóru fram, og síðani neyðturviligir sáttmálar fingust í lag.

Endurútflattningur úr Føroyum eignr ikki at fara fram fyri nakrar vørur. Okkara innflattningur er ikki størri enn so, at tað er neyðugt at hann verður her í landinum. Um ta sak, sum hevur verið orsøk til tað nú fyriliggjandi lógaruppskot er at siga, at tað sjálvsagt er skeivt, at eplir, sum frá Bretlandi eru ætlaði til Føroya, fara annan veg. Tað er óivað eisini skeivt, at nokur eplir verða keypt úr Bretlandi hesa árstíð, tá vit Føroyingar nýliga hava tikið upp eplir, og tí ikki nýtast fremmandan innflutning. Tað átti her at verið samráðing førd um, at eplaflattingurin til Føroya verður sundurbýttur í partar av árinum, sum tørvur er til tess. At seta eina árskvotu, og síðani lata innflattingin passa seg sjálvan, kann føra við sær, at eplir, sum eru flutt til landið spillast, og tað vinnur eingin parturin við.

Tað at gera eina tílíka lóg, eigur, eins og alt lóggávuverk, at verða væl umhugsað. Tá amtið tí skrivar, at málið má fáa skjótu viðgerð, mugu vit halda fram, at tað má ikki nerva málið, sum hevur so víttfevnandi týdning fyri okkara land. Eisini kann her sigast, at tað má ikki nerva málið, sum hevur so víttfevnandi týdning fyri okkara land. Eisini kann her sigast, at tað ikki kann vænteast, at nakað skip kemur úr Bretlandi í tí tíðarskeiði, sum eftir er av hesum árinum fyri at fara til Íslands, og tí skuldi tað verið góð tíð til umhugsunar. Eitt lógaruppskot eigur at fáa ta viðgerð, sum tað eftir lógini hevur uppiborið, við framløgu av átili, og síðani steðg millum aðru og triðju viðgerð, soleiðis, at hvør tingmaður kann taka grundaða stoðu til málið.

Við hesum viðmerkingum skulu vit um sjálvt lógaruppskotið framhalda:

Orðini „Handel med Udlandet" eru ov víttfevnandi, tað vildi verið beinari at kalla lógina »Reeksport af Varer«, tá tað er einasti táttur, hon viðger.

Til grein 1, soleiðis sum hon er orðað, er at siga, at hon umfatar fisk, sum er keyptur í Íslandi, fyri at verða fluttur til og seldur í Bretlandi, tá skjølini uppá lastina vísa eina í Føroyum sum móttakara, og hetta er ofta heat. Orðini: »hørtset fra Fisk og Fiskeprodukter« halda vit tí eigur at setast ino í fyrstu regla millum »Art« og »der«.

Loyvi til at flyta ótaftur av landinum átti at verið lagt til ein føroyskan stovn, sum skuldi varðveitt okkara viðurskifti við útheimin bæði við inn- og útflutningi. Soleingi ein tílíkur stovnur ikki er, meina vit, at her átti at staðið »Vatala-Centralen« í staðin fyri »Amtet«.

Til grein 2 er at viðmerkja, at minsta bótin í lógini av 1939 er sett til 50 kr., hvat tó kanska kann vera heldur lágt. Vit eru tó ikki samsintir í, at uppskotið ljóðar uppá, at bótin fyri høvuðsmannin í minnsta lagi skal vera tværreisur virðið av vørunum. Tað sýnist eisini at vera ein munur ímillum viðmerkingar og uppskot, tí viðmerkingar siga »bør *kunne* straffes med store Bøder«, hvat tó er púra beint, men uppskotið sigur »mindst *skal* fastsættes til«, hvat er ein regla sum vit halda vera ov tronga. Hetta um at ein bót skal setast eftir virðinum á vørunum, hava vit einaferð havt í prísansingarlógini, men tað varð tá broytt aftur, tí tað gav sorinskrivaranum trongar reglur til at finna tað rættvísasta úrslitið. Vit meina tí, at tað eigur at standa punktum aftaná »Bestemmelserne i Paragraf 1« og so hin helvtin av hesi grein verður orðað soleiðis: »Under skærpende Omstændigheder, særlig for Hovedmandens Vedkommende, bør Boden fastsættes til mindst det dobbelte af de pangældende Varers Værdi. Sagerne behandles som Politisager.«

Meirilutin vísir til hesar viðmerkingar, og skal vísa á, at tað í einum øðrum tingmáli vil koma uppskot fram um at seta eitt handilsráð fyri Føroyar til at taka sær av øllum tílíkum spurningum. Meirilutin setur tí ikki serstakt uppskot fram í hesum máli, men heldur at spurningurin í sínal heild eigur at viðgerast av einum føroyskum handilsráði.

Hele Udvalget synes enigt i, at der søges gennemført Lovbestemmelser, som i det store og hele svarer til det af Amtet forelagte Lovforslag. Den Uoverensstemmelse, som er tilstede, gælder ikke Lovforslagets Hovedformaal. Undertegnede Mindretal Kr. Djurhuus og

A. Samuelsen skal tillade sig at anbefale Forslaget til Vedtagelse med nedenstaaende Ændring i Paragraf 1.

Det har formentlig aldrig været Hensigten, at Ferskfisk købt i Island for færøsk Regning og for videre Eksport til Storbritannien skal være underkastet særlig Eksportkontrol fra færøsk Side endsige omfattes af Forbudet mod Eksport, selvom Ladningsdokumenterne formelt maatte lyde paa færøsk Modtager. Men for at afskære fra enhver Misforstaaelse stilles Ændringsforslaget under § 1.

Mindretallet finder det urigtigt under nærværende Sag at komme nærmere ind paa de Problemer, som Færøernes Samhandel med Udlandet specielt med Storbritannien maatte rejse. Saadanne Spørgsmaal kan let opstaa, og de vil altid være af den allerstørste Betydning og derfor have Krav paa at behandles som særlige Sager. Mindretallet skal i denne Forbindelse henvise til det af Kr. Djurhuus og Johan M. Fr. Poulsen i Lagtingets Budgetudvalg den 30. September 1943 fremsatte Forslag om Valg af en Forhandlingsdelegation.

Uppskot:

1. Amtmannsins uppskot til:

Midlertidige Bestemmelser vedrørende Handel med Udlandet.

§ 1.

Varer af enhver Art, der er indkøbt i Udlandet saaledes, at det overfor vedkommende Lands Myndigheder, paa Manifest eller Konossement ved Salgsaftalen eller paa anden Maade er angivet, at en Person, Firma, Selskab eller andre paa Færøerne er Køber eller Modtager, maa ikke under nogen Form afhændes til eller ifandbringes paa nogen Plads uden for Færøerne, medmindre Tilladelse hertil forud er meddelt af Amtet. Dette gælder, hvad enten Varerne har været bragt i Land paa Færøerne eller ej.

§ 2.

De i § 5 i Lov Nr. 288 af 2. September 1939 indeholdte Bestemmelser om Straf og Konfiskation finder Anvendelse ved Overtraedelse af Bestemmelserne i § 1, dog at Boder for Hovedmandens Vedkommende mindst skal fastsættes til det dobbelte af de paagældende Varers Værdi. Sagerne behandles som Politisager.

§ 3.

Disse Bestemmelser træder i Kraft straks.

2. Frá allari nevndini: Broytingaruppskot til amtmannsins uppskot:

Í grein 1 verður aftaná orðini »enhver Art« sett: »bortset fra Fisk og Fiskeprodukter.«

3. Frá meirilutanum (Kjølbro, J. Paturssen, P. Petersen og Th. Petersen:

a. Yvirskriftin verður broytt til: »Midlertidige Bestemmelser vedrørende Reeksport af Varer.«
b. Í grein 1 verður orðið »Amtet« broytt til »Valuta-Centralen«.
c. Í grein 2 verður aftanfá »Bemmelserne i Paragraf 1« sett punktum, og restin av greinini verður broytt til: »Under skærpende Omstændigheder, særlig for Hovedmandens Vedkommende, bør Bøden fastsættes til mindst det dobbelte af de paagældende Varers Værdi. Sagerne behandles som Politisager.

2. viðg. 3. nov. 3. viðg. 6. nov. Pt. 3 fall 10—0. Pt. 2 samtykt 22—0. Pt. 1 so broytt samtykt 22—0.

---

25. Broytan av lønsteðgingarlógini.

Frl. 15. okt. 1. viðg. 21. okt.

Álit (4. dec. Djurhuus við fyrivarni):

Við skrivi av 15. oktober 1943 hevur javnaðarflokkurin biðið tingið um at taka til viðgerðar broytan av lønsteðgingarlógini nr. 6 av 23. mars 1943, og serliga verður vísl til, at lógin ikki er greið nu lønviðurskiftini hjá lærlingum og skrivstovu- og handilsfólki.

Stýrini fyri Fuglafjarðar arbeiðismannafelag og handverkarafelag hava tann 23. november 1943 skrivað brev til tingsins formann um ein gerðarrættardóm, sum fallin er 12. oktober 1943. Málið liggur soleiðis fyri, at hitt fyrra felagið hevði ein lønsáttmála frá 31. januar 1940 og hitt seinna lønsáttmála frá 13. januar 1931, hareftir grundlønin var sett til 72 øyru í tíman, og henda sáttmála søgdu teir upp tann 22. november 1942; tingingar við arbeiðsgevarar gav einki úrslit, og tann 16. februar 1943 senda teir so boð eftir semingsmannininum; men vegna sjúku kann hann ikki koma fyrr enn 29. mars 1943, t. v. s. aftanfá at lógin um lønsteðg er komin í gildi. Málið kemur so til viðgerðar við gerðarrætti, sum tann 12. oktober 1943 sigur dóm, hvar teir vísa til, at eingin hækkan av grundlønini kann koma í gildi vegna lønsteðgingarlógina. Teir venda sær nú til tingið — av tí at teir hava hoyrt, at henda lóg er til viðgerðar — og biðja tingið veita sær hjálp til, at lógin gevur leimum rætt til at fáa málið kannað, tí teir hava sagt upp í góðari tíð, áðrenn lønsteðgur kom í gildi, og tí tað ikki er av teirra ávum, at betta ikki kom í lag.

Ein minniluti (J. P. Henriksen) heldur fram: Tá ið lógin um at steðga øllum løn og prísvøkstri varð gjord, vóru viðurskiftini vorðin so hættislig prísum viðvíkjandi, at tað var beint neyðugt, at hitt almenna við lóg legði loft á allar prísir og fekk fyriskipanir í lag, ið

niðaðu ímóti at skera burtur allan órættvísan ágóða í handli við neyðsynjarvørum.

Arbeiðarar, fiskimenn, tænastumenn og oll fólk við lágum avmarkaðnum innlokum fagnaðu óivað hesi royndl løglingsins at byrgja fyri »inflatión«. Og flestu menn eru framvegis samdir um, at gera tað, ið gerast kann, fyri at leggja prísirnar á fyrst og fremst neyðsynjarvorum so lágar, sum gjorligt. Tað má ásannast, at ein á leið fastliggjandi lønskipan er eitt lið í hesum arbeiði, men royndirnar av teirri í mars gjordu lønsteðgan hava sýnt, millum annað við valdgerðardómi, at tað band, ið var lagt á allan lønvekstur, hevur rubbað ov fast hjá summum, uttan at tað kann sigast at hava verið neyðugt fyri at halda ímóti dýrtíðini. Viðurskiftini eru nevniliga soleiðis, at tað eru til dømis tær hægstu lønirnar, ið avgera hæddina á vørupríssunum við tað, at hámarksprísurin verður settur sambært hesar lønir. Og sum kunnugt verður vanliga nýttur hámarksprísur eisini á teimum plássum, har ið lønirnar eru lágar. Á hesum plássum dregur so statt tann lága lønin ikki prísirnar niður, men tænir einans at økja um ágóðan hjá handilsmannunum. Tann høgi prísurin viknar um keypikraftina hjá tí minni menta, teimum við teimum lágu lønunum. Í hesum føri er tað heill neyðugt at broyta lógina soleiðis, at øllum teimum, ið sita við lønum, ið liggja niðanfyri tær lønir, ið svara til hámarksprísir, verður loyvt at fáa sínar lønir javnaðar uppeftir sambart dýrtíðina og vanligan lønøkingarsið undan lønsteðganini. Her verður hugsað serliga um lærlingar, skrivstovufólk, handilsfólk og fólk, ið sóla við rætti at fáa lønina økta í tann til arbeiðsárini í tænastuni og um tímanslønað, ið liggja niðanfyri hámarkslønina.

Sambart hesum viðmerkingum setur minnilutin fram uppskot.

Meirilutin (A. Djurhuus, Kr. Djurhuus, R. Joensen og Th. Petersen) skal viðmerkja, at grein 5 í kunngerðini nr. 6 av 23. mars 1943 hevur verið ætlað at rúma loyvi til at broyta lønina sambart tænastutíð og okjan av kunnleika hjá ungum fólki og lærlingum, eins og tann fast ásetta løtuhækkanin, sum ymisk fólk, t. d. tænastufólk sum lærarar, hava rætt til. Tað er meirilutanum kunnugt, at t. d. tað almenna hevur nýtt lógina á henda hátt, við tað, at tænastufólk hava fingið sína lógligu hækkan sambært tænastutíð. Meirilutin vil tó verða við til at mæla tinginum til, at lógin verður broytt soleiðis, at eingin misfatan kann koma av hesum.

Tær viðmerkingar, minnilutin setur fram um, at ein arbeiðari má koma upp á hámarkslønina fyri at hann kann siga seg at hava fingið fullt viðurlag fyri dýrtíðina, kann meirilutin ikki styðja. Dýrtíðarviðbótin, sum nú verður roknað til 1 oyra pr. stig, gevur arbeiðurunum la dýrtíðarsamsýning, sum fullt vigar upp móti dýrtíðini. Nakað annað er, tann serligi spurningurin, sum er komin inn á ling frá Faglaftrði. Í hesum má meirilutin halda, at tað er nógv, sum talar fyri, at ein lønsáttmáli, sum varð uppsagdur í november 1942, tað vil siga í mánaðar áðrenn lønsteðgingarlógin kom í gildi, átti at verið viðgjørdur í reduktetini, og ikki sýtur einans vísandi til, at nú var lønsteðgingarlógin komin í gildi. Skipanin um dýrtíðarviðbót eftir einum prístali kom í gildi í 1939, og arbeiðsmannafelagsins sáttmáli er av januar 1940, so hetta talar ímóti, at ein kann væntað nakað annað úrslit av einum týggjum gerðarrætti, men fyri handverkararnar var tað ein sáttmáli frá 1934, sum ásetti grundlønina, so har liggur spurningurin meira opin.

Soleiðis sum lønsteðgingarlógin er orðnð, má meirilutin halda tað vera beint, at gerðarrætturin er komin til tað úrslit, at tað ikki er

teinum loyvt at broyta grundlønina; men meirilutin heldur, at ein lógbroyting, sum gevur hesum felogum í Fuglafirði loyvi til at fáa teirra mál viðgjørt av óvyggjum fyri einum gerðarrætti, kann sigast at vera eitt rettvíst stig. Meirilutin setur uppskot samsvarandi.

Uppskot:

A. Frá minnilutanum (J. P. Hendriksen):

Midlertige Bestemmelser

om Ændring i Kundgørelse Nr. 6 af 23. Marts 1943

om Priser, Arbejdslønninger m. v.

I § 5 i Kundgørelse Nr. 6 af 23. Marts 1943 om Priser, Arbejdslønninger m. v. foretages følgende Ændringer:

1) Til §ens andet Stk. føjes som nyt Punktum:
»Det skal dog i Arbejdsforhold, hvor Lønnen efter Sædvane eller aftale stiger efter en vis Tids Beskæftigelse eller en vis Tids Uddannelse, være tilladt at forhøje Lønnen efter de hidtil fulgte Regler.«

2) §ens fredie Stykke affattes saaledes:
»Uanset fornævnte Bestemmelser kan der, hvor der ikke allerede ifølge Overenskomst eller Voldgiftsaftale findes en Lønordning mellem Arbejdsgiverne og Arbejderorganisationerne, der sikrer Arbejderne en Grundlon paa mindst 1 Krone pr. Time, ved Aftale eller Voldgiftsafgørelse træffes en (ny) Lønordning, forsaavidt denne ikke fastsætter Grundlønnen til mere end en 1 Krone pr. Time samt Dyrtidstillæg efter Pristallet.«

3) Til §en føjes som nyt fjerde Stykke:
»Lønordninger, som er truffet ved en i Tiden mellem 23. Marts 1943 og nærværende Bestemmelsers Ikrafttræden afsagt Voldgiftstilkendelse, og som fastsætter Grundlønnen til mindre end 1 Krone pr. Time, uanset Voldgiftsafgørelsens Indhold opsiges af hver af Parterne med 14 Dages Varsel til Ophør ved en Maaneds Ugang, saaledes at Sagen, hvis en ny Lønordning ikke opnaas ved Overenskomst, kan indbringes til fornyet Voldgiftsafgørelse.«

Nærværende Bestemmelser træder i Kraft straks.

B. Frá meirilutanum (A. Djurhuus, Kr. Djurhuus, R. Joensen og Th. Petersen):

Midlertidige Bestemmelser

om Ændring i Kundgørelse Nr 6. af 23. Marts 1943

om Priser, Arbejdslønninger m. v.

I § 5 i Kundgørelse Nr. 6 af 23. Marts 1943 om Priser, Arbejdslønninger m. v. foretages følgende Ændringer:

1) Til §ens andet Stk. føjes som nyt Punktum:
»Det skal dog i Arbejdsforhold, hvor Lønnen efter Sædvane eller Aftale stiger efter en vis Tids Beskæftigelse eller en vis Tids Uddannelse, være tilladt at forhøje Lønnen efter de hidtil fulgte Regler.«
2) Til §en føjes som nyt fjerde Stykke:
»Lønninger og/eller Overenskomster, der bevisligt var opsagt af en af Parterne inden Ikrafttræden af Kundgørelse Nr. 6 af 23. Marts 1943 om Priser, Arbejdslønninger m.v., og som ikke inden Ikrafttrædelsen var endelig afgjort ved en ny Overenskomst eller Voldgiftsafgørelse, kan af en af Parterne begæres oplaget til ny Forhandling og eventuel Voldgiftsafgørelse. Saafremt Sagen maatte være afgjort ved Voldgiftskendelse efter Kundgørelsens Ikrafttræden, og denne Kendelse er afsagt paa Formalitetsgrundlaget, at Kundgørelsen hindrede nogen Forhøjelse i Lønningerne, kan en af Parterne begære fornyet Behandling i Realiteten af Sagen. I de her nævnte Tilfælde kan der ske Forhøjelse i Grundlønnen, naar Voldgiftsretten skønner, at dette vilde have været Resultatet af en Behandling, saafremt den var afsluttet før Lovens Ikrafttræden.«

Nærværende Bestemmelser træder i Kraft straks.

2. viðg. 4. dec. og 6. dec. 3. viðg. 7. dec. Minnilutauppskotið fall 5—0. Meirlutauppskot samtykt 25—0.

---

26. Gjøld til pantifútar.

Frl. 4. nov. 1. viðg. 8. nov.

Álit (30. nov.):

Við bræví 2. november í ár hevur amtmaðurin sent tinginum uppskot til broytan av lóg nr. 85, 30. mars 1935 um innheintan av skatti og gjøldum, hareftir gjøldini til pantifútarnar verða hækkað.

Lógin av 30. mars 1935 ásetur, at úlpantan fyri skatt o. t. verður fyritikin av sorenskrivaranum, sýslumanninum ella pantifútanum, um tílíkur er settur. Í Tórshavn eru ein ella tveir pantifútar settir, og lon teirra ásett við samtykt góðkendari av dómsmálaráðnum og goldin av kommununi, sum eftirfmóti fær gjoldini.

Á bygd kann loglingið seta pantifútar, og teir fáa sum lon tey úlpantingargjøld, ið eru ásett í úlpantingarlógini, 30. mars 1894, § 14.

Hesi gjøld eru:

Fyri peningahædd inntil 20 kr.			kr. 0,50
— —	frá 20	- til 40 kr.	— 1,00
— —	- 40	- - 100 -	— 1,50
— —	- 100	- - 200 -	— 2,00
— —	- 200	- - 300 -	— 2,33
— —	- 300	- - 400 -	— 2,67
— —	- 400	- - 1000 -	— 3,33
— —	- 1000	- og haryvir	— 4,00

Pantafútin í Tórshavn hevur fasta lon 900 kr. um árið. Í pantigjaldi kom inn í 1942 o. u. 1500 kr. Harav fingu vitnini 560 kr., og tíðin, arbeiðið tók, var 47 dagar sjálv úlpantingin (3 úlpantingar í tímanum).

Pantifútar eru nú settir í Norðoyum, Eysturoy, Norðstreymoy og Suðuroy. Hvat teir fáa ella kunna fáa í pantagjøldum er ikki upplýst.

Eftir uppskotinum hjá amtmanninum verða gjøldini hækkað til tað dupulta. Pantifútin í Tórshavn verður lontur av kommununi, meðan pantifuti á bygd fær alt gjaldið, um hann avroknar kravið innan 6 mánaðar. Avroknar hann seinni enn 6 mánaðar, fær hann helvtina av gjaldinum.

Sorinskrivarin hevur havt málið til naumælis og sigur, at hann ikki kann viðmæla uppskotið, men heldur, at tað ikki er orsøk til bráðfengis at hækka nokur gjøld, men at tað er oll orsøk til at umhugsa eina almenna bráðfengis hækkan av øllum gjøldum og viðurgjøldum til hitt almenna ella teir, ið hava almenn størv ella umboð, tí tær flestu reglur um tílíkt eru nú foroldaðar vegna minkandi keypimegi, peugar nú hava.

Sorenskrivarin heldur tað vera skeivt, at ein pantifáti skal hava meiri løn fyri at úlpanta innan eina ásetta tíð. Um hann ikki fremur tey mál, hann fær í hendi, skjótast gjørligt, eigur hann at verða frítikin fyri umboðið og annar maður at verða settur í hansara stað.

23. februar í ár skrivaði amtmaðurin til landsnevnilina, at úlpantan fyri løglinsskatt ikki varð framd, sum hon átti at verða. Har vóru 3107 óavgreidd úlpantingarmál fyri kr. 174,621,33. Í Tórshavn var tá ein pantifáti. Í Suðurstreym pantar annars sorenskrivarin, og nóra staðni panta sýslumenninir, tó var pantifáti í Eysturoy og Norðstreymoy.

Amtið mælir í bræfinum til at seta fleiri pantifútar og at hækka gjøldini til tað dupulta. Pantifútarnir eiga tó ikki at fáa hesi gjøld, uttan at teir avrokna innan 6 mánaðar. Avrokna teir seinni eiga teir bert at fáa helvtina av gjøldunum. Málið eigur at verða lagt fyri lingið. Men amtmaðurin biður landsnevndina beinan vegin fyri at fáa framt tey restandi úlpantingarmál samtykkja, at settir verða pantifútar í øllum sýslum, og at pantifútarnir, inntil lingið hevur samtykt hækkan av gjøldunum, fáa eykaviðurlag av samu stødd sum galdandi úlpantingarviðurgjald, tá teir innan 6 mánaðir avgreiða úlpantingar.

Landsnevndin samtykti uppskot amtmannsins, tó so, at endurgjaldið verður goldið í øllum førum, har skattapeningurin verður goldin innan 6 mánaðir. Amtmaðurin hevur so sett hesa skipan í gildi.

Eftir upplýsingum frá gjaldstovuni vóru gott 3.000 útpantingar fyri løgtingsskatti kravdar fyri fyrsta hálvár 1942, og útpantingargjaldið vildi verið ca. 1 kr. sum meðaltal fyri hvørja útpanting, tað vil siga, at pantifútin vil eftir teim gomlu reglunum fáa 3 kr. í tíman, um hann pantar 3 í tíman. Ferðaútreiðslur fær hann aftur goldnar.

Av tí at málið er komið heldur seint inn á ting, og tørvur er á at fáa tað meir upplýst, serstakliga hvat løn pantifútarnir nú verunliga fáa, skal nevndin seta fram niðanfyri nevnda uppskot. Amtið hevur einki ímóti, at málið verður goymt til næstu tingsetu.

Uppskot:

Málið verður goymt til næstu tingsetu, og umhugsað verður almenn bráðfengis hækkan av øðrum gjøldum og viðurgjøldum til menn, ið hava almenn størv og umboð.

2. viðg. 1. dec. samtykt 18—0.

---

27. Viðurgjald fyri leitan eftir førum.

Frml. 17. nov. 1. viðg. 19. nov.

Álit (3. dec.):

Amtið hevur við skrivi av 16. november 1943 sent tinginum eitt uppskot til »Midlertidige Bestemmelser for Færøerne om Betaling for Eftersøgning af færøske Fartøjer«, og er málið viðlagt ummæli frá ymiskum sýslum og fúlanum.

Streymoyar sýsla sigur í skrivi av 18. oktober 1943, at samráðingar hava farið fram við siglingarkønar menn, og vísur sýslan til, at tað eigir at kunna verða talin samsýning ikki bert fyri veruligar útreiðslur (olju o. t.), men eisini fyri løn til manning og samsýning fyri lívarmiss hjá monnum, sum hava noyðst at fara frá øðrum sluvi. Tað verður framhildið, at málið eigir at verða lagt fyri okkara sjóvinnufelog til ummælis. Sýslan heldur einki verða um at siga, at tí líknr reglur setast í gildi; men so má eitt fast mark verða sett fyri, nær samsýning kann krevjast og nær hon kann sparast. Tað eigir altíð at vera heitt á fey avvarandi og á skipaeigaran um gjald av útreiðslum, áðrenn tað almenna letur nakað.

Suðuroyar sýsla hevur givið sítt ummæli tann 21. oktober 1913. Sýslan sigur frá, at tað ónnaðhvørt er politiið ella tey, ið varða av, sum hava fingið leitan í lag, og so vítt kunnugt hevur ikki verið nakur trupulleiki við at fáa fólk til hjálpar, og er tað einans ið heill fáum dømum sett krav fram um endurgjald fyri hjálpina. Víst verður á, at møguleikin fyri at fáa leitan á stovn nú er góður, tí tað eru so nógv herskip, sum hava sítt virki um oyggjarnar. Um tað við lóg verður ásett, at tað almenna vil ella skal geva endurgjald fyri hjálp, kann ein vænta, at krøvini um endurgjald fara at verða ógvuliga stór, og lotfort verður at eftiransa tey einstøku dømini. Hetta verður tó ikki flutt fram fyri at ráða frá, at lógin verður sett í gildi, men mest fyri at vísa á, at ein eigir at rokna við, at krøvini kunnu verða ógvuliga umfatandi, men hartil er at siga, at einhvør útreiðsla má sigast at vera hent, tá ið talan er um at bjarga mannalív. Síðani heldur sýslumaðurin fram, at hann gevur sítt viðmæli til lógina fyri at skapa stórri trygd fyri at bjarga mannalív, tó at hann mælir til, at lógin verður broytt soleiðis, at tað verður givið manningini ein hóskandi sumsýning fyri størv og trupulleikar teirra. Eisini vísur sýslumaðurin á, at tað kunnu verða útreiðslur av at leita eftir fólki á landi, og tilmælir, at hetta fellir inn undir lógareglurna.

Eysturoyar sýslumaður sigur í sínum ummæli tann 25. oktober 1913, at hann er glaður yvir, at hetta er komið fram, tí ofta er trupult at biðja fólk, tá ein ikki kann vissa teimum endurgjald fyri ómakin. Ofta hendur tað, at hjálp er neyðug í góðum veðri, og tá er tað serliga harmligt ikki at kunna vissa manningini lon. Víst verður á, at hetta ikki ber so væl til at taka sum eitt pliktarbeiði, tí tað verða oftast teir somu menninar sum heilt verður á. Sýslumaðurin er í ívi um gr. 3 um, at endurgjald skal verða kravt frá teimum, sum hava verið ov skjót til at biðja um hjálp, eigir at verða tikin við, tí ofta verður farið fram í skundi tá mannalív stendur í vága, og ringt er at døma um, nær ið tað verunliga er neyðugt. Sýslan tilmælir reglurnar.

Fútin sigur í sínum viðmæli tann 2. november 1913, at hann ikki er heill vissur í, at tað er beint at senda út almenna kunngerð um rindan av viðurgjaldi. Hann vísur á, at tveir spurningar eru umráðandi, *annar* um politiið kann vænta goldið tað, sum lovað er fyri at fara út at leitu, og *annar* um at samsýning kann verða latin eftir tilmæli frá polítinum, serliga tá verunliga lívsvandi hevur verið fyri hond, um so leitanin ikki er umbiðin av polítinum. Eftir tílíkum reglum heldur fútin, at útreiðslurnar kunnu vænfast ikki at fara upp um 1000 til 3000 kr. árliga. Ein almenn kunngerð kann seta vónirnar so høgt, at mistykki kemur av at royna at vera sparin aftaná at kunngerðin er kómin fram.

Amtið hevur sent málið til lingið og viðmerkir m. a.:

»Der findes ikke i Lovgivningen positive Bestemmelser om Afholdelse af Udgifterne ved de nævnte Eftersøgninger, hvorfor Amtet anser det for hensigtsmæssigt, at der gennemføres Regler herom.

Ifølge den hidtil fulgte praksis har Amtet anvist Udgifterne til Udbetaling af Amtsfonden, forsaavidt de skønnes rimelige.

Samtidig med Opretholdelsen af denne Praksis er der i Udkastet formuleret nærmere Regler til Værn mod Misbrug ved Etablering af Eftersøgninger, ligesom der er skabt Hjemmel for Refusion af Udgifterne, naar det savnede Farlojs Ejer eller Besætning er i gode økonomiske Kaar, eller Eftersøgningen er foranlediget ved disses uforsvarlige eller letsindige Adfærd.

Udkastets Bestemmelser er et naturligt Supplement til de gældende Regler om Bjærgning i Strandingsloven af 24. Marts 1899, og finder derfor ikke Anvendelse i de af Strandingsloven omfattede Tilfælde, jfr. Udkastets Paragraf 1.

De af Rederen udbetalte Lønninger til Mandskabet paa de eftersøgende Fartøjer godtgøres ham i Henhold til Paragraf 2, Stk. 2. Derimod ydes ingen Erstatning for Indtægtstab m. v.«

Málið er beint í fíggjarnevndina, sum er vorðin samd um at ráða tinginum frá at gera lógarreglur um henda spurning fyri fyrst. Nevndin heldur tað er beint, at spurningurin verður kannaður, og at fastari reglur verða at ganga eftir, men heldur at hetta væl kann gerast uttan at ein lóg kemur, og harvið vandi verður fyri, at fólk kunnu fara at fáa ov stórar vónir um endurgjald. Sum ávíst í amtsins skrivi hevur higartil verið soleiðis, at peningur er latin úr amtsgrunninum, har yvirvaldið hevur hildið tað verið hóskandi, og sami alburður heldur nevndin eigir at vera nýttur í framtíðini.

Um teir av fútanum reistu spurningar skal nevndin viðmerkja: *Tann studningur sum politiið kann játta* manningum fyri at fara av stað, eigir at verða gjørdar reglur fyri, soleiðis at hvør sýslumaður, sum lívilt verður á, veit hvat hann kann lova fyri hjálpina, og tá farið verður fram eftir reglunum, eigir amtsgrunnurin at gjalda eftir ávísing frá sýslumanninum.

Tann studningur, sum kann verða givin privatum, tá hjálpin er veilt uttan at áheitan er farin fram gjøgnum politiið, eiga eisini reglur at verða settar fyri. Her má høvuðssjónarmiðið vera, at tað almenna ikki eigir at lata studning uttan so er, at tað ikki hevur verið høvi til at samráðast við politiið, og at manualiv vanuliga hevur verið í váða.

Nevndin skal tí mæla tinginum til, at tað verður givið landsnevndini upp í hendi at góðtaka reglugerð fyri viðurgjald fyri leitan eftir føroyskum skipum, soleiðis sum ein tílík reglugerð kann orðast fyri at geva politinum tað hjálp, sum tørvar til yrki teirra. Samráðingar eiga fyrst at fara fram við amtið og politiið um orðaljóðið av einari tílíkari reglugerð.

Uppskot:

Landsnevndin fær upp í hendi at samráðast við amtið, fútan, sýslumenninar og sóknarfútan um eina reglugerð um, nær tað almenna eigir at lata samsýning fyri at leita eftir føroyskum skipum.

Studningurin verður latin sum higartil úr amtsgrunninum undir politiútreiðslur.

Landsnevndin fær heimild til tingsins vegna at góðkenna eina tílíka reglugerð, sum politiið kann halda seg til, tá bjargingarmál koma at liggja fyri.

2. viðg. 3. dec. Samtykt 21—0.

XI. STRANDFERDASKIP.

1. Smiril.

A. *Uppskot* (27. sept.)

Frá A. Sørensensen, Kr. Djurhuus og J. P. Davidsen:

I. *Principalt.*

Tingið setur í gildi fyri tíðarskeiðið 2. okt. 1943 til 31. mars 1944 la ferðaætlan fyri »Smiril«, sum hevur verið galdandi fyri tíðarskeiðið 14. nov. 1942 til 27. febr. 1943 við viðmerking sum uppískoyti, at 14. hvønn dag (miðvikudagur) fer hóskandi motorfar til Sunds og Skúvoyar, fyribils »Morgunstjørnan« og soleiðis broyttan, at »Smiril« kann gera 2 túrar til Suðuroyar um vikuna yvir Skálavík báðar ferðir og Húsavík og Dal eina ferð um vikuna (leygardag). Ferðin norðureftir (Klakksvík) verður aðru hvorja viku og ferðin vestureftir aðru hvørja viku.

II. *Subsidiært* saman við J. F. Kjølbro og R. Rasmussen:

Tingið setur í gildi fyri tíðarskeiðið 2. okt. 1943 til 31. mars 1944 ferðaætlan fyri »Smiril«, sum hevur verið galdandi fyri tíðarskeiðið 14. nov. 1942 til 27. febr. 1943, við viðmerking sum uppískoyti, at 14. hvønn dag (mikudagur) fer hóskandi motorfar til Sunds og Skúvoyar, fyribils m/b »Morgunstjørnan«.

2. viðg. 28. sept. Pt. I fall 8—0, pt. II samtykt 21—0.

B. **Álit** (19. dec.):

»Smirilks administrator hevur sent lagtinginum rokuskapin fyri tíðarskeiðið 1. april 1942 til 31. mars 1943 og fylgiskriv av 13. mai 1943 við ymiskum viðmerkingum til rokuskapin. Tað vísir seg, at tær samlaðu útreiðslurnar eru 287.236,05 kr. móti 241.089,09 kr. í seinasta rokuskaparári, also ein meirútreiðsla av 46.146,96 kr. Annars verður bildið fram:

Inntøkurnar:

ad 1. Farmagjald er vaksið við 40.798,86 kr til 107.489,50 kr. móti 66.690,64 kr. í 1941/42.

ad 2. Ferðapeningur, sum í 1941/42 vísti eina niðurgongd uppá um 7.300 kr. er nú aftur vaksin við 15.073,90 kr. til 56.489,50 kr.

Útreiðslurnar:

ad A. Manningarlønin er vaksin við 27.057,87 kr. Lønhækkan er galdandi frá 18. febr. 1942 sambart landsnevndarsamtykt.

ad B. Kostarhald er vaksið nógv, nevniliga 9.722,44 kr. ella 21,737,73 kr. móti 12.015,29 kr. árið frammanundan. Nevndin heldur, at kostarhaldið er ógvuliga stórt, nú tað er komið upp til 1.800 kr. um mánaðan.

ad C. Kolabrúkið hevur verið 115.042,34 kr. (1067,340 tons) móti seinasta ár 66.296,05 kr. Her skal tó viðmerkjast, at í 1941/42 hevur kolabrúkið bert verið fyri um 9 mánaðar. Hækkanin er soleiðis um 27.000 kr., og er orsokin hertil hægri kolaprísir og meiri sigling.

ad D. Smyrjuolja, tvistur o. l. er vaksið við 2.459,28 kr., men her kunnu gerast somu viðmerkingar sum undir C. (heila árið í staðin fyri 9 mánaðar).

ad E. Umsiling. Útreiðslurnar hava verið 46.075,92 kr. móti 30.665,40 kr. seinasta ár. Eftir sáttmála millum kríggstryggina og landsnevndina er fyri tann skaðan, sum »Smirila« fekk við flúgvuálopið í Skálavík 2. des. 1941, goldið 32.000 kr. til endaliga avgerð. Hesin peningur er frádrigin teim samlaðu útreiðslunum, og stendur tí sum rest í roknskapinum 14.975,92 kr. Í endurgjaldinum uppá 32.000 kr. eru umvølingar, sum ikki kunnu verða umbøttar fyrr seinri. Administrator hevði tonkt sær at sett á eina serliga konto 10.000 kr. til hesi arbeiðir, men er hetta altso ikki gjørt.

ad F. Tryggingargjald er 27.278,63 kr. — 2.000,77 kr. lægri enn í fjør. Hetta kemur av, at í roknskapinum fyri 1941/42 varð tikin við kríggstrygging fyri meir enn 12 mánaðar.

ad G. Renta er niðurgingin frá 1.119,69 kr. til 458,34 kr.

ad H. Administrationin er gingin upp við 450 kr. — samsvarandi løgtingssamtykt í 1942.

ad I. Postflutningur er 156,90 kr. minni enn seinasta ár. Tá var hann 4.424,35 kr.

ad J. Eykafar er 6.610,00 kr. móti í fjør 28.752,00 kr.

ad K. Ymist 3.068,96 kr.; harav Manco 1.735 kr., sum er vaksið ógvuliga nógv.

ad L. Telefon, telegrammir, prentan o. l. er niðurgingið við 163,07 kr.

ad M. Havnaútreiðslur 1.280,30 kr. móti 1.703,97 kr. seinasta ár. Tingsins samtykt um at royna at fáa útreiðslurnar fyri 1941/42 afturrindaðar, kundi ikki verða gjøgnumført, tí viðkomandi havnir høvdu rætt til at krevja upp hesi gjøld.

ad N. Avgreiðsla í Havn, leiga o. a. 3.110,00 kr. móti 5,664,67 kr. seinasta ár. Munurin kemur av nýskipanini av avgreiðsluni í Havn, hareftir avgreiðslan fær procentir í staðin fyri fasta løn, og verða hesar procentir við hvørja uppgerð tiknar av farmagjaldinum.

Hurnæst førir administrator fram, at eingin skipan enn er komin í lag viðvíkjandi viðurlag til teir bretsku kanónmannanir.

Í 1944 skal »Smirila« hava 12-ára klassa, um umstøðurnar eru til tess; hetta vil óivað koma at kosta ógvuliga nógv.

Farmagjaldið átti at verið sett meir upp, men hetta er ógjørligt nú aftaná prissteðgingarsamtyktina.

Viðvíkjandi ferðaætlanini fyri veturin hevur nevndin í einum øðrum uppskoti fingið tingsins samtykt til at seta í gildi fyri tíðarskeiðið 2. okt. 1943 til 31. mars 1944 ta ferðaætlan, sum var galdandi fyri tíðarskeiðið 14. nov. 1942 til 27. febr. 1943.

Fyri at tryggja rutina til Sands og Skúvoyar hevur nevndin góðkent hetta tilboðið av 15. sept. 1943 frá firma D. P. Højgaards einkja, Toftir:

»Idet vi henviser til Henvendelse fra Hr. Johs. Joensen vedr. Sejlads med vor M/B »Morgunstjørnan« i »Smirilæs Rute til Skuø og Sandø hver 14de Dag eller hver 3die Uge, tillader vi os herved at fremkomme med nedennævnte Tilbud.

1.

Vi er villige til at leje Baaden med 3 Mands Besætning til Sejlads til ovennævnte Pladser for Kr. 225,00 pr. Døgn, saalænge Baaden er i Deres Tjeneste.

2.

Da denne Sejlads sandsynligvis kun vil komme at dreje sig om faa Ture, er det muligt, at Baaden vil blive optaget andre Steder i Mellemtiden og saaledes eventuelt være i Arbejde paa det Tidspunkt, den kunde ønskes af Dem. Dette Forhold vil vi paatage os at ordne saaledes, at Hr. Johs. Joensen altid vil blive holdt underrettet af os, naar der er andre Ture, der skal udføres omkring samme Tid. Dog regner man med, at dette ikke vil blive til noget Hinder, for at Deres Ture ogsaa kan blive udført, da man altid vil kunne forhandle sig til Rette med eventuelle andre Lejere.«

Nevndin hevur eisini veot sær til mjólkaforsýningina um at fáa teir at røkja hesa rutu, men halda teir seg ikki til, tí teir ikki ráða yvir tílík før, at rutan kann røkjast á forsvarligan hátt.

Sum tað sæst av roknskapinum hevur »Smiril« eitt rakstrarundirskot seinasta ár um 86.000 kr. Tað kann tí væntast, at undirskotið í ár verður nakað tað samu. Nevndin heldur, at henda leið ikki er gangbar og at neyðugt verður, at ein broyting kemur í, tí tað má haldast at verða óforsvarligt støðugt at binda løgtingið til eina so stóra útreiðslu, sum »Smiril« nú er vorðin fyri tingið, bóast nevndin ásannar tann týðning, ein góð samferðsluskipan oyggjanna millum hevur fyri samfelagið.

Nevndin hevur umhugsað ymiskar møguleikar fyri at lætta um hesar tungu útreiðslur hjá tinginum og hevur sum eitt lið í hesum vent sær til Skipafelagið Føroyar, partafelagið »Uvak« og Suðuroya keypmenn við fyrispurning um, hvørvítt teir hvør sær, kundu tonkt sær at vilja yvirtaka raksturin av »Smiril« við studningi frá løgtinginum, soleiðis at teir yvirtaka allar vanligar útreiðslur av rakstrinum, tó undantikið klassificeringsútreiðslur, og yvirtaka allar inntøkur, ið »Smiril« gevur.

Suðuroya keypmenn hava svarað aftur í telegrammi 2. okt. 1943, at teir ikki hava áhuga í at yvirtaka raksturin av »Smirli«.

Skipafelagið hevur í brævi 21. okt. 1943 svarað:

» . . . . . Í brævi dags. 13. í h. m. spyrja tit, um vit eru sinnaðir til at yvirtaka raksturin av »Smirli« við studningi frá løgting-

inum. Brævið hevur ikki verið fyrilagt nevndini, tí eingin nevndarfundur hevur verið hildin síðan, og vit halda, at tingingingar herum beinast eiga at fara fram í millumtinganevndini. Løgtingið má tó rokna við, at studningurin kemur at liggja um 100.000 kr. um árið, við tí núverandi prístali . . . . «

Partafelagið »Uvak« hevur í brævi 1. nov. 1943 svarað:

». . . . Eftir ynski tykkara skulu vit siga frá, at vit kundu hugsað okkum at tikið við rakstrinum av »Smirli« fyri o. u. 5.000 kr. um mánaðan, og øll vilkor nærri ásett í einum sáttmála, sum samrátt kundi verið um, og sum vit, um tað verður ynskt, kunnu gera uppskot til.

Sum eina serliga treyt ynskja vit tó at nevna, at »Smirli«s ferðaætlan fyri vetrarhálvárið má leggjast á tann hátt, at bann bert siglir suðureftir og eina ferð um vikuna vestureftir, og at Mikines verður farið til hvønn túr vestureftir, um tað annars viðrar.«

Sum ein annar møguleiki hevur nevndin umhugsað spurningin um at selja »Smirli«, og hevur nevndin vent sær til Skipafelagið um hetta og soleiðis, at Skipafelagið átekur sær at uppihalda siglingina við hóskandi skipi móti vissum árligum studningi frá løglinginum. Skipafelagið hevur í áðurnevnda brævi svarað:

»Spurningurin varð lagdur fram á nevndarfundi, har samtykt varð at svara, at felagið ikki beint í løtuni heldur seg kunna gera tað, men er sinnað til at tinga við eina millumtinganevnd um málið.«

Nevndin hevur eisini tingast um at halda fram við samráðingum viðvíkjandi søln av »Smirli«, um eitt ella tvey motorfør kunnu bíleggjast í staðin.

Nevndin setir tí uppskot fram til tingið at heimila landsnevndina til at fáa mann ella felag at gera tiltak skjótast gjørligt um søluna.

Ein meirluti í nevndini (Kjølbro, R. Rasmussen og A. Sørensen) vísa til lær samráðingar, sum nevndin hevur fört um at fáa privat felag til at taka við rakstrinum av »Smirli« fyri ásettan pening. Hetta hevur givið til úrslit, at eitt tilboð vísir, at tingið kann fáa tað árliga undirskotið minkað til um 60.000 kr. Tað vil siga, at tingið kann spara um 54.000 kr. árliga fyri utan tað, at tingið ikki hevur ábyrgdina fyri, at undirskotið kann vaksa, hvat eio ikki kann sígga heilt burtur frá.

Tað eina tilboðið er treytað av, at »Smirli« einans siglir suðureftir og ein túr vestureftir í vetrahálvárinum. Kjølbro og R. Rasmussen kundu ynskt, at »Smirli« eisini kundi sigla norðureftir uni veturin, hvar illveður ofta kann gera tað sera óhøgligt fyri ferðafólk, um »Smirli« ikki kemur norðurum, men vil tó gangа við til hesa skipan, tá tað er prógvað, at hetta kann týða so nógv fyri tingið fíggjarliga sæð. Meirilutin setir fram uppskot um, at »Smirli«s ferðaætlan frá 1. januar 1944 verður broytt samsvarandi hesu treyt í tilboðnum.

Meirilutin má halda fram, at tað kann ikki verða beint, at tingið framvegis hevur so stórar útreiðslur fyri »Smirli«, tá tað er prógvað, at út móti 5.000 kr. kunnu sparast um mánaðan. Meirilutin heldur tí, at rakstur in eigur at verða skipaður á bíligasta hátt.

Ein minniluti (K. Djurhuus og J. P. Davidsen) skal fora fram:

Undir viðgerðini av »Smiril« hevur tað stórliga verðið hildið fram, at skipasambandið millum Tórshavn, Sandoy, Skúvoy og Suðuroy er ógvuliga vánaligt, samanmett við tað samband, hini størri plássini hava; hetta má eisini ásannast. Líkaleiðis hevur tað verið nevnt, at nógv av »Smiril«s sigling gevur lítla inntøku samanmett við siglingina suðureftir, hetta er óivað satt, sum tað er sagt. Tá ið tað nú liggur tilboð frammi um at dríva »Smiril« fyri privata rokning, við tí ætlan at lata rutuna til Klakksvík ganga út og við tveimum túrum um vikuna til Suðuroy, so má hetta haldast at vera bæði fyri at koma Suðuroyingum ámøti og eisini fyri at gera driftina meiri rentabla. Við tað at tað kann ætlast, at tað um veturin ikki altíð verður rúm tíð nokk fyri »Smiril« til at røkja vestanrutuna, má tað verða neyðugt av og á at leiga annað hóskandi far til hesa ruta. Til Sand og Skúvoy má tað líkaleiðis teigast hóskandi far til 14. hvønn dags sigling. Mikines má eisini verða tryggjað tilfluttning av vørum minnst einaferð um mánaðan.

Um hetlar verður sett uppskot.

Higartil hevur administrator og ekspedition í Tórshavn verið býtt sundur; hetta má haldast at vera skeivt, og verður tí uppskot sett fram um hetta.

Tað hevur verið tosað við stjóran fyri Skipafelagið Føroyar, og sigur hann frá, at »Rókur« nú skal til at flyta kol frá Kvalba, og kann so statt hetta plássið fáa allan sín vørufluttning frá Havnini við hesum fari. Tað má tó fyri at tryggja hetta til fullnar av landsnevndini upprættast ein sáttmáli við Skipafelagið um »Rók«, og verður uppskot sett fram um hetta. Skuldi tað verðið neyðugt av og á at flutt sjúklingar frá Kvalba til Tórshavn, kann tað treffast ein ordning við »Smiril« um hetta. Tað verður so statt sett fram uppskot til nýggjan ferðaætlan fyri »Smiril«.

Uppskot

fra allari nevndini:

1) Rokuskapurin fyri »Smiril« fyri árið 1. apríl 1942 til 31. mars 1943 verður góðkendur.

Frá meirilutanum (J. F. Kjølbro, R. Rasmussen og A. Sørensen):

2) Givið verður landsnevndini uppí hendi at seta eina ferðaætlan fyri »Smiril« í gildi fyri tíðarskeiðið 1. apríl til 1. oktober 1944 og útvega í sama tíðarskeiði hóskandi far at sigla til Sands og Skúvoyar.
3) Landsnevndini verður givið uppi hendi at fáa mann ella felag til at bjóða út »Smiril« til sølu og útvega tilboð uppá hóskandi motorfar í »Smiril«s stað. Tá hóskandi boð liggja fyri, verður málið aftur at leggja fyri nevndina, sum tá avger málið. Sala má tó ikki fara fram, uttan at innanoyggjaferðsluna millumbils er tryggjað.
4) a. Løgtingið samtykkir, at raksturin av »Smiril« við sáttmála skal latast í hendur á tí felagnum her á landi, sum vil gera tað við minnst útreiðslum fyri tingið, tó so at tingið hægst letur 60.000 kr. um árið til raksturin.
   b. Landsnevndin fær uppí hendur at fora tørvandi samráðingar og fáa sáttmála undirskrivaðan við gildi frá 1. januar 1944.

5) Løgtingið samtykkir, at »Smiriløs vetrarfersla frá 1. Januar 1944 verður broytt soleiðis, at tað verða tveir túrar um vikuna suðureftir og ein túrur vesturefitir. Landsnevndin góðkennir ferðaætlanina.

Frá minnilutanum (K. Djurhuus og J. P. Davidsen):

A. *Ferðaætlan:*

1. Tingið góðkennir tað bjálagda uppskot til ferðaætlan fyri tíðarskeiðið til 1. apríl 1944.
2. Landsnevndin fær heimild til at seta nýggja ferðaætlan í gildi fyri tíðarskeiðið 1. apríl — 10. oktober 1944, og ítvega í sama tíðarskeiði hóskandi fær at sigla til Sands og Skúvoyar.
3. Landsnevndin verður álagt og fær heimild til at fáa sáttmála í lag við Skipafelagið um »Rók« og um neyðugt við annað felag fyri at tryggja ta í álitinum nevndu ferðaætlan.
4. Um tað skuldi víst seg trupulleikar við »Rók«s sigling av Hvalbø, verður landsnevndin heimilað at broyta »Smirilø«s ferðaætlan so, at hetta pláss fær gott samband norðureftir.

B. *Administratión og ekspeditión í Tórshavn.*

1. Tað verður givið landsnevndini í hendi at skipa fyri eini samanlegging av hesum táttum.
2. Álagt verður landsnevndini at royna at fáa útreiðslurnar viðvíkjandi rakstrinum av »Smiril« niðursettar.

Ferðaætlan „Smiril"s for Tiden indtil 1. April 1944.

Hver Mandag Kl. 9:

Vaag—Tverna—Skaalevig—Thorshavn.

Hver Onsdag Kl. 9:

Thorshavn—Skaalevig*)—Husevig—Dal—Tveraa—Vaag.

Hver Torsdag Kl. 9:

Vaag—Tveraa—Skaalevig*)—Thorshavn.

Hver Fredag Kl. 9:

Thorshavn—Midvaag—Vestmanhavn—Thorshavn.

Hver Lørdag Kl. 9:

Thorshavn—Skaalevig—Tveraa—Vaag.

*) *Skaalevig* anløbes for Post og Passagerer.

Kvalbø besejles mindst engang ugentlig af »Rókur« i Rute Thorshavn Kvalbø og retur.

Midvaag—Vestmanhavn. Til denne Rute forbeholdes at sende andet egnet Farløj.

Sand—Skuø anløbes mindst hver 14. Dåg af dertil egnet Fartøj.

Myggenæs anløbes mindst hver 4. Uge af hertil egnet Fartøj.

2. viðg. 20. nov. 3. viðg. 23. nov., pkt. 1 samtykt 23—0, pkt. 2 við 18—0, 3 og 4 við 13—0, 5 við 22—0. Pkt. A 1, 2 og 4 burturdottið og A 3 samtykt 18—0. B fall 12—0.

---

2. Farmasigling.

Frl. 14. sept. 1. viðg. 24. sept.

Álit (2. dec. Dam við fyrivarni):

Í skrivi dagfest 13. sept. 1943 hevur Føroya javnaðarflokkur sent málið um farmasigling inn á ting; í málinum er einki lýst um, hvussu hetta mál kann vera loyst. Í skrivi dagfest 5. oktober 1943 hevur Fólkaflokkurin sett uppskot fram um at fáa samráðingar í lag við Bretar og Amerikumenn um at lata Føroyingar fáa eitt av teimum nýmótans Liberty-motorførum til nýtslu.

Fiskivinnunevndin, sum hevur viðgjort málið, er á einum máli um, at størsti ansur eigur at verða givin hesum. Kundi eitt tílíkt far fingist her til landi, stóðu vit meira óheftir av tilfluttningi á fremmandum skipum, og møguleiki hevði so verið fyri at fingið nakrar timburfarmar til Føroya, og hvonn týdning hetta vildi havt, er eyðsæð.

Nógv sjófólk noyðist at liggja heima, tí teir bava ikki før at sigla við. Kann eitt skip sum tað omanfyri nevnda útvegast, kann bæði stórur vinningur og fitt av arbeiði fáast burtur úr.

Nevndin vil tí halda, at tingið eigir at geva landsnevndini hetta mál up í hendi til at greiða tað sum best.

So slatt verður sett fram hetta

Uppskot:

Tingið mælir landsnevndini til at starvast við hetta mál og royna at fremja tað á besta hátt.

2. viðg. 7. dec. Samtykt 22—0.

XII. KOMMUNAL MÁL.

1. Decisión av kommunuroknskapum.

3. dec. øll restandi rokuskap fyri 1941 góðkend uttan fyri Haldarsvík og Saksunar kommunn og rokskapini fyri 1942 góðkend uttan fyri Klakksvíkar, Fuglafjarðar, Lorvíkar, Nes, Eiðis, Haldórsvíkar og Saksunar, Hvalvíkar, Sandavágs, Miðvágs, Sands, Froðbiar, Hovs, Vágs og Sumbiar.

---

2. Kæra viðv. Froðbiar kommunu.

Álit (19. nov.):

Í skrivi 7. august 1943 hava nakrir skattagjaldarar í Froðbiar kommunu sent inn kæru til tingið viðv. skattaálíkningini fyri 1943. Teir skila til, at fíggjarætlanin ikki var gjørd og framløgd í december í fjør samsvarandi kommunallógarinnar, men fyrstani í februar 1943. Eisini kæra teir seg um, at rokuskapir kommununnar og havnaverksins ikki hava ligið frammi.

Teir halda fram, at álíknað eru kr. 243.400,00, men ikki loyvilig uttan tingssamtykt meira enn kr. 195.000,00.

Kommunala nevndin, sum hevur havt hetta mál til kanningar, má vísa til samtykt landsnevndarinnar viðv. meiraálíkningini.

Tað verður lagt aftur at, at kommununar í hesum tíðum áttu at álíkna mest møguligt, serstakliga tær, sum hava skuld og tær, sum hava álíkið ster stórar kommunalar uppgávur. Í seinastu tingsetu treytaði tingið havnajáttanir sambart 10 ára ætlanina av, at álíkningarprocentin ikki fór undir 8.

Tað má gevast leim kæranda rætt í, at fíggjarsamtykt og rokuskapur eiga at liggja frammi til rætta tíð, men skilast má til, at tær broytta skattafrádráttarreglurnar kunnu hava atvoll tarnið av fíggjarsamtyktini.

Eitt annað er, at rokuskapurin fyri 1942 hevur ligið fyri nevndini. Eftir honum hevur kommunan í árinum fingið tilskot kr. 42.600,00 og í árinum latið til kommunal arbeiði um kr. 123.600,00. Skuldin til elektricitetsverkið var tann 1. jan. 1943 kr. 50.140, men oguarfram gongdin frá 1941/42 er um kr. 50.000,00, haruppií er tó um kr. 5.000,

sum slava frá landtøkuni (smbr. løglingstíðindi 1941 bls. 162, tingmál XII-3/41).

Sambart tingsamtykt 1941 (sambart omanfyri) varð treytað, at kommunan afturrindaði til elektricitetsverkið kr. 5.000 árliga — tá var skuldin til verkið um kr. 48.000,00 og bartil afturrindaði tær um kr. 12.000,00 sum tingið hevur lagt út fyri hann til Kreditforeningen.

Tað sæst ikki av rokuskapinum, at hesar eftirsløður eru goldnar sum treytað, tað verður tí mælt til, at kommunan av teim kontantu ognunum rindar hesar eftirstøður.

Viðvíkjandi fíggjarsamtyktini 1943 er at siga, at eftir nevndarinnar hugsan er misminnur á teim ymsu rokuskapardeildunum. Ásetningurin fyri mefriálíkningini var fyrst og fremst stimbring kommununna, tí átti størri partur at verið ætlaður til rindan av skuld.

At játtaninar til kommunal arbeiði eru stórar er ívaleyst, men nevndin heldur seg ikki vera føran fyri at siga, um hetta tó er ovmikið, men hetta má haldast at bera vitni um, at tíðirnar ikki eru rúmar í kommununi.

Vísandi til tað í álitinum framflutta setur nevndin fram hetta

Uppskot:

Tingið góðkennir samtykt landsnevndarinnar viðvíkjandi skattaálíkningini í Froðbiar kommunu fyri árið 1943.

Eintak av álitinum verður at senda teim kærandi.

20. nov. Samtykt 23—0.

---

3. Samsýning til limir av líkuingarráðnum.

Álit (24. sept.)

Eftir kunngerð nr. 69 av 23. december 1911 um stovnan av einum líkuingarráð o. a. kann verða veitt limunum av ráðnum ein samsýning, sum verður at ásela av løgtinginum.

Í fjør varð samtykt av tinginum at veita til hvørm av limunum fyri árið 1942 kr. 600,00.

Nevndin heldur, at henda samsýning framvegis er hóskandi og setur fram hetta

Uppskot:

Tingið samtykkir, at veitt verður hvørjum av limunum í líkuingarráðnum ein samsýning (Honorar) av 600 kr. árliga inntil víðari.

Peningurin verður latin úr amtsgrunninum.

5. okt. samtykt 17—0.

4. Útfyllingarblað viðv. sjálvuppgávu til skatt.

Álit (30. nov.):

Tórshavnar líkningarnevnd hevur sent tinginum soljóðandi bræv, dagsett 6. september 1943:

»Hin 4. september 1942 legði líkningarnevndin inn á ting uppskot til nýtt útfyllingarblað til skattauppgávu við umsókn um at fáa tað góðkent av løgtinginum. Málið var ávíst sum hoyrandi undir skattanevndini.

Líkningarnevndin sendi so bræv, dags. 28. november 1942, til Skattanevnd Løgtingsins, men so seint sum 6. juli í ár var einki frætt aftur. Við tað at skattanevndin væntandi fór at skifta limir til heystar, sendi líkningarnevndin aftur bræv og skilaði til, at soframt hon ikki frætti aftur seinast 1. august, varð roknað við, at umsóknin varð ikki játtað.

Skattanevnd løgtingsins hevur ennídag yvirhøvur ikki ønt okkum aftur. Tessvegna loyva vit okkum at fyrileggja tinginum málið á øðrum sinni, samstundis sum vit senda eitt eintak av uppskoti til nýtt útfyllingarblað og avskrift av tí, sum fyrifarist er í málinum, og skulu vit beita á hitt háttvirda Løgtingið um nú at fáa eina avgerð í málinum.

Nú fer aftur at líða móti teirri tíð, tá ið útsendingin av útfyllingarbløðum eigur at verða fyrircikað, og tað hevði tí haft stóran týdning, um líkningarnevndin kundi fingið tingsins avgerð at vita, so skjótt sum møguligt.«

Málið varð til viðgerðar í tingsetuni 1942, har nevndin vísti til, at hesin spurningur sambart lógina av 12. mars 1923 gr. 17 hoyrdi undir løgtingsins skattanevnd. Av bræviunum frá Tórshavnar líkningarnevnd sæst, at skattanevndin ikki hevur svarað uppá áheitanina frá líkningarnevndini.

Tann 30. september 1943 skrivaði nevndarformaðurin til løgtingsins skattanevnd m. a.:

»Meirilutin í ymsamálanevndini heldur, at skattanevndin bert hevur við innihaldið í útfyllingarblaðnum at gera, men ikki við spurningin, um útfyllingarblaðið skal verða skrivað á danskum ella á føroyskum máli. Meirilutin loyvir sær at spyrja skattanevndina, um skattanevndin er samsinnt við meirilutan um hesa áskoðan, um so er vil meirilutin sela fram uppskot til løgtingið um, at útfyllingarbløðini verða skrivaði á føroyskum máli. Um skattanevndin ikki er samd við meirilutan, má meirilutin sela fram lógaruppskot um, at útfyllingarbløðini verða skrivaði á føroyskum máli.«

Tann 24. november 1943 fekk nevndin soljóðandi svar:

»Under Henvisning til Udvalgets Skrivelse af 30. September 1943 (XII-4/1943) til Lagtingets Skattenævn angaende Affattelse af Selvangivelsesblanketten paa Færøsk skal man meddele, at Skatteud-

valget paa et den 23. November 1943 afholdt Møde har vedtaget, at Udvalget i Aar vil udsende Selvangivelsesblanketten paa Færøsk.»

Meirilutin (Th. Petersen og R. Rasmussen) heldur fram, at tað einasta beina er, at útfyllingarblaðið eigur at verða á føroyskum máli, ikki einans fyri eitt ár, men fyri alla framtíð. Tá skattanevndin nú hevur samtykt, at tað fyri í ár skal verða útsent á foroyskum máli, má meirilutin rokna við, at hetta ikki verður broytt, soleingi teir sonn limir sitn í nevndini, tað vil siga, til tað av nýggjum verður val til Føroya løgting. Meirilutin setur tí ikki uppskot um, at tingið skal taka serliga avgerð í málinum.

Minnilutin (O. F. Joensen) stillar einki uppskot í málinum.

Uppskot:

Svarað verður Tórshavnar líkningarnevnd, at málið, sum í álitinum ávist, er avgjørt av løgtingsins skattanevnd.

2. dec. samtykt 16—0.

---

5. Saksun sum serstøk kommuna

Álit (26. okt.):

Frá einum meirilutu av teim kommunalu veljarunum í Haldórsvíkar og Saksunar sóknum er innkomin umsókn um, at Saksunar sókn verður serstøk kommuna.

Sóknarstýrið hevur givið málinum viðmæli.

Tað er upplýst í málinum, at Haldórsvíkar og Saksunar sóknir hava síni fíggjarligu viðurskifti hvør sær burtursæð frá álreiðslunum til jarðamóðir. Tað vil siga, at stýrið er í sumlag sóknanna millum. Stýrið hevur 7 limir, harav verða 5 valdir í felag av báðum sóknunum. Síðan velur Saksunar sókn ein Saksuning og Haldórsvíkar ein Víkamann.

Nú skjýtur sóknarstýrið upp, at Haldórsvíkar kommuna fær eitt stýri við 5 limum og Saxunar eitt við 3 limum.

Sóknarstýrið sigur frá, at fólkatalið í Haldórsvíkar sókn, sum eru bygdirnar Tjørnuvík, Haldórsvík og Langasandur, hevur 427 fólk, meðan Saksunar sókn hevur 42 fólk.

Kommunala nevndin, sum hevur havt hetta mál til umhugsunar, er í princippinum móti at taka landið sundur í ov smá kommunal umdømi, men í hesum føri er støðan so, at hesar nevndu sóknir verunligá er 2 serstakar kommunur, berl at tær stjórnast undir einum.

Nevndin heldur, at reglur kommunallógarinnar tykjast fylgdar, og at Saxunar kommuna er før fyri sjálv at røkja sínu kommunalu viðurskifti.

So statt heldur nevndin seg til at mæla tinginum til at taka undir við umsóknini.

Tað framgongur av málinum, at henda nýskipan skal fáa gildi 1. Januar 1944.

Hvør sóknin hevur fíggjarligu viðurskiftini sær, bert er sum ávíst útreiðslurnar til jarðamóður í felag sóknanna millum. Henda útreiðsla verður at býta eftir fólkatalinum.

So statt setir nevndin fram soljóðandi

Uppskot:

1) Løgtingið mælir til, at Haldórsvíkar og Saxunar sóknir verða serstakar kommunur frá 1. januar 1944 at rokna.
2) Sóknarstýrini koma at hava ávikavíst 5 og 3 limir.
3) Útreiðslurnar til jarðamóður verða at býta sum ávíst í álitinum.

23. nov. samtykt 18—0.

---

6. Sundurbýtan av Eiðis kommunu.

Álit (10. okt.):

Frá einum meirluta av teimum kommunalu veljarunum í Eiðis sóknar kommunu er innkomin umsókn um, at kommunan verður at taka sundur, soleiðis at bygdirnar Eiði, Ljósá og Svínáir koma at verða ein kommuna og bygdirnar Norðskáli, Oyrabakki og Oyrar ein kommuna sum Eiðis og Sunda kommuna.

Marknará, sum er hagamarkið millum Svinoyarhaga og Norðskálahaga, verður sóknarmarkið.

Sóknarstýrið hevur givið umsóknunni viðmæli.

Tað er upplýst, at fólkatallið á Eiði, Ljósá og Svínáum er 668 og Norðskála, Oyrabakka og Oyri 487.

Frá 1. januar 1944 verður hvør parturin serstøk kommuna.

Ogn og skuld kommununnar verður at býta eftir fólkatalinum, sonnleiðis verða útreiðslur til jarðamóður at býta millum kommununar eftir fólkatalinum eftir uppgávu sýslumannsins á hvørjum ári.

Útreiðslurnar til læknaembætið verða at býta við $^2/_5$ til Eiðis kommunu og $^1/_5$ til Sunda kommunu.

Tey verandi skjøl kommununnar verða á Eiði, meðan stýrið fyri Sunda kommunu altíð hevur rætt til at skriva av og eftirhyggja tey skjøl, sum viðvíkja bygdum hennara.

Tað verður skotið uppá, at hvørt søknarstýrið fær 5 limir.

Undirskrivaða nevnd, sum hevur haft hetta mál til umhugsunar, má halda, at freylir kommunallógarinnar fyri sundurtøkuni tykjast fylgdar. Hvør søknin má haldast at hava fólkatal nokk til at verða kommuna fyri seg og vera før hvør sær at røkja teirra viðurskifti.

Nevndin mælir so statt til, at tingið tekur undir við umsóknunum.

Vísandi til tað í álitinum framflutta setur nevndin fram soljóðandi

Uppskot:

1. Løgtingið mælir til, at Eiðis søknar kommuna verður sundurtikin til tvinnar serstakar kommunur, nevndar alvikavist Eiðis søknar kommuna og Sunda søknar kommuna.
2. Søknarstýrini koma at hava 5 limir hvørt (sbr. landkommunulógarinnar gr. 2).
3. Ogn og skuld kommununnar verða at býta sum ávist í álitinum.
4. Sundurtøkan fær gildi 1. januar 1944.

23. nov. samtykt 19—0.

---

7. Elektricitetsverkið í Vági.

Álit (3. dec.):

Søknarstýrið fyri Vágs kommunu hevur við skrivi av 4. september 1943 vent sær til tingið um viðurskiftini við ravmagnsverkinum her. Tá hetta verk varð sett á stovn, varð tað vael dýrari enn ætlað, og støðan hevur verið ring at greitt fyri kommununna gjøgnum ley ár, sum farin eru. Skuldin til ríkiskassan, sum var um 583.000 kr. varð í fjør yvirtikin av løgtinginum, og hetta var góðkent av tinginum í tí vanligu setuni 1942. Tað varð í 1942 í lingsins áliti gjølla greitt frá støðuni (sí tingtíðindi, skjal 14) og nevndin skal vísa til tað her framførda.

Í 1942 varð samtykt at geva loyvi til Vágs kommunu at taka lán í Færø Amts Sparekasse upp til 400.000 kr. fyri at fáa alla skuld, sum ikki var hjá tinginum, á eina hond, og síðani var tað samtykt, at 300.000 kr. av lingsins láni skuldi afturgjaldast í 50 ár, og oll skuldin 550.000 kr. skuldi rentast við 3 pct. p. a.

Í 1942 settu P. M. Dam og Kr. Djurhuus uppskot fram um, at einans 300.000 kr. skuldu rentast og avdragast, meðan 250.000 kr. skuldu, meðan kríggið stóð á, standa uvdráttar- og renturfrían so ravmagnsverkið onga tyngd skuldi hava av hesum peningi. Ætlanin var

so aftaná kríggið at taka upp samráðingar við stalin um eftirgevan. Hetta uppskot varð ikki samtykt.

Við skrivi av 21. januar 1943 til landsnevndina sigur sóknarstýrið seg at taka við tí samtykt, tingið hevði gjørt 1942. Um hækkan av takstunnum sigur sóknarstýrið frá, at hetta er gjørt eitt sindur annarleiðis enn av tinginum ynskt, soleiðis at fasta avgiftin er sett til 3 kr. í staðin fyri 4 kr., meðan hin vegin prísurin á ravmagn til hita og kóking er sett til 5 oyrir í staðin fyri 4¼ oyra fyri kwh, og kommununnar gjald fyri Gøtuljós er sett til 7000 kr. í staðin fyri 6000 kr., og sóknarstýrið viðmerkir, at hetta vil geva um tað sama úrslit sum tingsins samtykt. Teir biðja um tingsins játtan av hesum broytingum.

Í skrivi tann 4. september 1943 sigur sóknarstýrið frá, at sparikassin ikki hevur játtað lánið uttan so, at teir fáa tingsins ábyrgd fyri tað; lánið var ætlað til 325.000 kr. Teir søkja nú um at tingið átekur sær hesa ábyrgd.

Síðani vísir sóknarstýrið til, at skipanin, sum tingið samtykti í fjør, ikki vil vera nakar batnaður av ravmagnsstøðarinnar fíggjarstøðu, tí teir verunliga koma at gjalda líka nógv nú, sum tá teir fullt út goldu, hvat teir áttu til ríkiskassan; og hetta er tað, sum lað hevur vist seg ógjørligt at yvirhalda. Teir søkja tí um, at tær 250.000 kr. verða stroknar ella í hvussu er, lagdur rentu- og avdráttarfríar, til tingingar kunnu takast upp við stalin.

Sóknarstýrið skrivar í sínum brævi tann 4. september 1943 m. a. soleiðis:

> »Medmindre der opnaas en virkelig Lettelse af Værkets Gældsforhold, vil det, naar Efterkrigstiden sættter ind, pauny blive ude af Stand til at klare sine Forpligtelser. Værket staar overfor store Fornyelser, der ikke blot vil sluge den allerede opsparede Reservekapital, men antagelig vil kræve et betydeligt højere Beløb, og der kan derfor med Rette hævdes, at dets økonomiske Forhold, alt taget i Betragtning, ikke har bedret sig væsentlig.
>
> . . . . . .
>
> Til Slut ønsker vi at bemærke, at Forstanderskabet oprigtigt ønsker Opnaaelse af en holdbar Ordning af Værkets økonomiske Forhold. Men at det i Betragtning af de uheldige Forløb af alle hidtidige Ordninger ikke ser sig i Stand til nu igen at gaa med til en Nyordning, som ikke vil kunne overholdes, naar normale Tider igen indtræffer.«

Nevndin hevur havt samráðingar við formannin í sóknarstýrinum, tinguannin A. Djurhuus, og má geva sóknarstýrinum rætt í, at tað sum ein nú má royna at náa fram til, er ein skipan sum kann standa sína reynd, sjálvt um ringari tíðir skuldi komið, og sum kann stimbra sóknarstýrið til at taka eitt gott tak fyri at fáa verksins fíggjarligu viðurskiftir í heill gott lag.

Eftir teim upplýsingum, sum lógu fyri tinginum í fjør, var skuldin:

1.	Privatir lángevarar	214.637 kr.	
2.	Færø Amts Sparekasse.....	99.084 -	
3.	Kreditforeningen	108.000 -	
4.	Ríkiskassin ella løgtingið	550.000 -	tall 971.721 kr.

Formaðurin fyri kommununi førdi fram, at henda skuld er ov stór, og at tað sýnist nakað vónleyst at royna at renta og avbetala skuldina sjálvt um hon verður umløgd til langa avbetalan.

Eisini vísti formaðurin í sóknarstýrinum á, at staturin undan krígnum, gav ein árligan studning uppá 16.820 kr. sum svaraði til rentur og avdrátt av um 280.000 kr., og at hann eftir samráðingum, sum høvdu farið fram, var vitandi um, at staturin hevði roknað við at strika 250.000 kr., um kommunan annars kundi greiða restina av skuldini.

Undir samráðingunum varð tað framhildið av sóknarstýrisformanninum, at skuldin undir 1) kundi avrikast uttan nýtt lán, tí 97.000 hevði kommunan vissu fyri, at teir privatu vildu seta upp á longri áramál, og hann roknaði við at kunna fáa, íð hvussu er 50.000 kr. aftrat, skipað á sama hátt. Restina helt hann, at kommunan í hesi tíð, hvar inntøkurnar eru so góðar, kundi síggja vegir til at yvirtaka sjálv.

Um sparikassalánið og kreditforeiningslánið, segði formaðurin, at tey vóru upp til dags við rentur og avdrátti, og hann roknaði við, at kommunan kundi halda hetta í lagi.

Um tað kundi verið gjørligt, at teir kundu fingið vissu fyri, at tær 250.000 kr. í skuld til tingið ikki koma afturumaftur, so ívaðist hann ikki í, at kommunan vildi kunna klára alt, sum lá á verkinum í dag uttan løgtingsábyrgd fyri nýggj lán, og roknaði eisini við, at kommunan kundi stimbrað sín egna og verksins fíggjarstand so væl, at tær umvølingar, sum skuldu fara fram, lá høvi varð til tess aftaná kríggið, kundu verða greiddar.

Nevndin hevur uppá hetta grundarlag viðgjørt málið, og er samd um støðuna.

Um tingið fastheldur, at Vágs kommuna skal standa sum skuldnari fyri tær seinastu 250.000 kr. av verksins skuld, so vil tað óivað verða neyðugt, at tingið álekur sær ábyrgd fyri einum nýggjum láni uppá 325.000 kr., tað vil siga, at tingið lá hevur ábyrgdina fyri falt 875.000 kr. í Vágs tavmagnsverki. Á hin hátt kann tingið, við longu nú at viðgunga, at 250.000 kr. av skuldini ikki hunnu væntast at koma aftur, minka um sína ábyrgd til tær 300.000 kr. sum tað er øll grund til at vænta, kommunan vil kunna klára at renta og avdraga uppá 50 ár soleiðis, sum ásett í fjør.

Nevndin er samd um at mæla tinginum til at strika tær 250.000 kr. og heldur við hesum fultút at vera komin kommununi á møti, tá sóknarstýrið skrivar, at tað er teirra yntski at fáa eina nýskipan, sum vissa er fyri kann halda, eisini tá tær óvanligu líðirnar eru av.

Tær 300.000 kr., sum eru eftir, verða at bóka sum lán úr sociala grunni løgtingsins, meðan tær 250.000 kr. verða at bóka sum goldnar ríkiskassanum vegna lán, og verður tað at taka upp í aðallinganarnar millum Danmark og Føroyar um øll viðurskifti teirra millum aftaná krígið, um at fáa henda pening endurgoldnan.

Fyri hesa nýskipan má nevndin mæla til, at tað frá sóknarstýrinum verður prógvað, at øll skuld er komin í legu, soleiðis at eingi fallin krav knappliga kunna koma inn á kommununa, tað vil siga, teir mugu fáa nýskipan við í minsta lagi 150.000 kr. av teimum privatu lángevarunum; hetta sigur formaðurin í sóknarstýrinum, at hann roknar við, teir kunnu fáa greitt beinan vegin.

Tað eigur samstundis at vera sagt frá, at tingið nú roknar við, at øll skuld hjá verkinum kann verða rentað og afturgoldin uttan nýggja ábyrgdartaku frá tinginum.

Nevndin setur fram soljóðandi uppskot til tingsins samtykt:

Uppskot:

1. 250.000 kr. av teim 550.000 kr., sum løgtingið fyri Vágs kommunala ravmagnsverk hevur goldið statinum fyri verksins lán frá ríkiskassanum, verða strikaðar.
2. Tað er ein treyt fyri strikanina, at kommunan prógvar, at hon hevur fingið nýggja semju um 30-ára afturgjaldan fyri í minsta lagi 150.000 kr. av teim privatu lánunum.
3. Tingið áttalar, at henda játtanin av eini nýskipan er gjørd í tí treysti, at kommunan sjálv uttan studning ella ábyrgdartakan frá tí almenna kann fáa til vega tað, sum krevst av peningi til at renta og avbetala til ásetta tíð alla ta skuld, sum ravmagnsverkið hevur.
4. Tingið samtykkir, at skuldin hjá Vágs ravmagnsverki 300.000 kr., at renta við 3 pct. og avdraga í 50 ár, verður bókað sum lán úr løgtingsins sociala grunni. Tær 250.000 kr., sum Vágs kommuna ikki er bundin til, verða at bóka sum goldið ríkiskassanum vegna lán.

9. nov. samtykt 23—0

---

8. Ravmagnsprísir í Klakksvík.

Álit (19. nov.):

Í tingsetuni 1930 (sí løgtingstíðindi s. 211) varð samtykt, at ravmagnsprísirnir í Klakksvík skulu verða lagdir fyri tingið til samtyktar.

Í tingsetuni 1931 (sí tingtíðindi s. 168) varð av tinginum samtykt at góðkenna eitt uppskot til ravmagnsprísir við nøkrum av tinginum gjørdum broytingum.

Í tingsetuni 1936 (sí tingtíðindi s. 252) lá ein umsókn frammi frá sóknarstýrinum um broyting í ravmagnsprísunum, og hesa broyting samtykti tingið.

2. december 1939 søkir sóknarstýrið um at fáa ravmagnsprísirnar broyttar, og hetta mál varð sent løgtingsverkfrøðingi Harry Fonsdal til ummælis. Løgtingsverkfrøðingurin heldur, at tað eigur at umhugsast at gera eina umleggjan av prísskipanini fyri at fáa besta úrslit fyri støðina og forbrúkaran. Hetta verður ikki gjørt í fyrstu syftu, men aftaná brævaskifti við sóknarstýrið hevur løgtingsins landsnevnd tann 8. januar 1940 góðkent broytingarnar bráðfengis til 1. oktober 1940, soleiðis at málið í sini heild skal leggjast fyri tingið.

Bardagin rakti við Føroyar, og løgtingsverkfrøðingur Fonsdal, sum var komin við uppskotinum um broytan var burtur frá Føroy-

um. Sóknarstýrið skrivar tann 24. oktober 1940 til tingið um at halda fram við teim bráðfengis játtaðu prísum, og hetta varð so góðkent, uttan at málið varð lagt fyri tingið.

Sóknarstýrið mælir nú til at hækka prísin fyri streym til hita frá 1. december í ár fyri 1. tekniskan streym frá 3 oyr til $4^1/_2$ oyr pr. kw.
2. ljósnet „ $6^1/_2$ „ „ 8 „ „ „
yvir 1000 kw. „ 3 „ „ $4^1/_2$ „ „ „

Løgtingið hevur tann 15. november 1943 frá amtinum fingið sendandi eina samtykt frá príseftiransingarráðnum um nevndu broytan. Príseftiransingarráðið heldur fram, at ráðið eiki hevur móti hesi hækkan, tí, siga teir, »det drejer sig om en Art offentlig Afgift beregnet efter Forbrugets Størrelse.«

Fíggjarnevndin hevur viðgjørt málið og má áttala, at nevndin ikki kann vera á einum máli við príseftiransingarráðið um, at henda broyting kann fatast sum ein almenn avgift. Um allir prísir hjá verkinum vórðu broyttir samsvarandi, kundi hetta verið beint, men tá tað einans eru nakrir fáir prísir, sum talan er um at broyta, so má tað liggja omnur grund fyri hesum tiltaki, og so verður tað ikki javnt býtt á alla nýtslu og soleiðis eingin almenn avgift.

Tað liggur ikki fyri tinginum umsókn frá sóknarstýrinum um broytan av prísinum, soleiðis sum tað er teirra skylda eftir tingsamtyktini í 1930. Tað er heldur ikki send nevndini nærri frágreiðing um, hvat henda broyting í peningi vil týða fyri borgaran í kommununi og fyri verkið, so tingið kann ikki vera fört fyri á tí fyriliggjandi grundarlagi at samtykkja broytanina.

Fíggjarnevndarformaðurin hevur haft eina telefonsamrøðu við sóknarstýrisformannin, og segði hesin frá, at sóknarstýrið ikki roknaði við, at henda broyting skuldi geva pengar til verkið, men at teir vónaðu, at tað vildi minka um nýtsluna, serliga av nøkrum strálnovnum, sum voldu trupulleikar fyri verkið.

Príseftiransingarráðið skrivar, at broytanin er ætlað at koma í gildi 1. december 1943. Nevndin má halda, at umsókn um broytan átti at verið løgd fyri tingið í góðari tíð, so at samráðingar kundu farið fram, og at tað, tá ein veit, at flestir trupulleikar hjá verkinum eru á vetrartíð, átti at verið fyrireikað soleiðis at broytingar kundu komið í gildi um 1. oktober, tá vetrartíðin byrjar. Líkaleiðis heldur nevndin, at ein eigur at vera ógvuliga varin við at gera tiltak, sum kunnu skapa trupulleikar fyri tey, sum nýta ravmagn til hita í hesi tíð, hvar tað er so trupult at fáa brenni, at alt, sum gerast kann, má gerast fyri at vísa sparsemi við koli og torvi.

So slatt skal nevndin mæla tinginum til at samtykkja hetta

Uppskot:

1. Tingið kann ikki góðkenna hækkanina av ravmagnsprísunum í Klakksvík, soleiðis sum málið fyriliggur.
2. Tingið skal minna sóknarstýrið á tingsamtyktina í 1930 og biðja teir, um prísirnir ynskjast broyttir, til tingið í góðari tíð at senda allar tørvandi upplýsingar og úfrokningar.
3. Landsnevndin fær heimild til at viðgera málið og góðkenna broytan av takstum, um hon heldur tað vera neyðugt.

23. nov. samtykt 24—0.

9. Sandtøka í Norðagøtu.

Álit (26. nov.):

Við skrivi d. 1 mars 1943 hava nógvir Norðagøtumenn veut sær til tingið viðv. sandtøkuni í Norðagøtu. Teir vísa til tey mótmæli, sum liggja inni hjá landsnevndini og mæla frá, at sandur av Norðagøtusandi verður nýttur til vega brúks og biðja so stall tingið um at laka úr gildi ta standandi expropriatións samtyktina.

Í september 1941 var landsnevndin á staðnum og setti har fram uppskot til semju. Hesa semju ern Norðagøtumenn yvirbøvar samdir um at laka undir við nú. Ivaleyst má nakað gerast fyri at halda aftur, tí sandurin er vanuliga nógv minkandi og hóttandi fyri leikvøll og nærhendis jarðir. Teir flyta fram, at eigararnir hava ájáttað tær tørvandi nøgdirnar til havnabyggingina ókeypis og meina so statt, at sandurin ikki tolir nógva sandtøku í aðrar mátar.

Sóknarstýrið hevur 11. september 1943 givið sítt ummæli. Tað er als ikki samt við Norðagøtumenn og standa uppá expropriatiónina.

Kommunala nevndin, sum hevur havt hetta mál um hendur, má siga, at hesar tvinnu interessurnar, sum standa hvør móti aðrari, eru báðar væl grundaðar og best hevði tað tí verið, um ein semja kundi skipast, møguligt á somu leið, sum landsnevndarinnar semingsuppskot 1941. Løgtingsverkfrøðingurin hevur kannað málið, so tekning og kostnaðarættlan liggja í málinum. Tað kundi eisini hugsast sum fyribils loysing av hesum spurningi, at expropriatiónin varð løgd niður fyri fyrst, so leingi havnagerðin stendur. Nevndin má tó halda, at dentur má leggjast á at fáa endiliga avgerð.

Við tað, at eigararnir sum ávíst omanfyri hava ájáttað tørvandi sandnøgdir til havnagerðina í Norðagøtu, er grund til at kanna málið nærri møguligt á staðnum. Nevndin mælir tí til at lata landsnevndini málið upp í hendi.

Uppskot:

Landsnevndin verður heimilað til at royna at fáa í lag semju parlanna millum og annars taka endaliga avgerð um expropriatiónina.

Eintak av álitinum verður at senda teim kærandi.

2. dec. fall 11—0.

10. Valstaður í Skálabotni.

Allt (20. nov.):

Løglingsmenn úr Eysturoynni hava við skrivi, d. 12. oktober 1943, vent sær til tingið um, at bygdin Skálabotnur verður serstakur valstaður til løglingsval o. fl.

Tað verður skilað til, at valini oftani standa um veturin, og er tað tí mangan torført, serliga hjá eldri fólki at koma til valstaði, sum er á Skála.

Kommunala nevndin mælir tinginum til at taka undir við umsøkjarunum.

Uppskot:

Tingið viðmælir, at valstað fyri fólkatings- og løglingsval verður í bygdini Skálabotni fyri íbúgvarnir í nevndu bygd, og at neyðturvuligar broytingar verða gjørdar í listanum yvir valstøð, sbr. § 17 í lóg 28. apríl 1916 um fólkatingsval og § 3 í løgtingslógini.

26. nov. samtykt 20—0.

---

11. Loyvir til keyp og sølu o. t.

a) 16. sept. loyvi givið Kvívíkar kommunu til keyp av jarðastykki 198 m² kongsjørð prís 128 kr. 70 oyr til skúlagarð.
b) 21. okt. loyvi givið Froðbiar kommunu at selja jarðapart mtr. nr. 367 d á Tvøroyri.
c) 8. nov. loyvi givið Nes kommunu til ábyrgd fyri bilkeypi 8000 kr.
d) 2. dec. loyvi til Kollafjarðar kommunu til sølu av goymsluhúsi 10.000 kr., treytað at tann partur, ið ikki verður nýttur til rinda av restskuld til D. D. P. A., einans má verða nýttur undir góðkenna av landsnevndini til nýtt goymsluhús ella bøtan av havnaviðurskiftum.

---

12. Loyvi til lán.

a) 8. nov. loyvi givið Skopunar kommunu til lán 5000 kr. viðv. nýggjum læknahúsi á Sandi.
b) 19. nov. loyvi givið Sands kommunu til lán 12000 kr. til læknahús og tikin ábyrgd fyri láninum.

XIII. YMIST.

1. Decisión av amtskommunalum roknskapum.

7. des. vórðu roknskapini góðkend fyri Sørvág havu 1941 og øll roknskapini fyri 1942 undanlikið Miðvág havn.

---

2. Landshandilin.

Frágreiðing frá vørunevndini sí skj. 7.

1. viðgerð 16. sept.

Álit (29. nov.):
(A. Samuelsen, Hans Iversen, J. P. Davidsen við fyrivarni)

Í málinum liggja hesi skjøl:

1. Rakstrarroknskapur og fíggjarstandur landshandilsins pr. 31. mars 1943.
2. Frágreiðsla frá amtinum, 31. august 1943, viðvíkjandi landshandlinum í tíðarskeiðinum 1. september 1942 til 31. august 1943.
3. Yvirlit yvir eftirsløður landshandilsins.

4. Hartil eru fyri hond umspurdar priskalkulatiónir.
5. Skriv 14. oktober 1943 frá Føroya limburhandlarum og skriv viðvíkjandi fenaðarfóðri.

Vørunevndin hevur fingið hesi mál til kanningar. *Meirilutin* (J. F. Kjølbro, O. J. Jensen, S. Ellefsen og Johs. Slettenæs) loyvir sær at viðmerkja:

A. Rakstrarrokuskapinum ætlast einki at vera at finnast at, men kostnaðarrokningin til løningar, pakkhúsleigu og rentutap má haldast at vera ovmikið stór. Rentutapið er ivaleyst fyri ein part atvolt av teim stóru eftirstøðunum.

Til fíggjarstandin er at siga, at eftirstøðurnar eru nógv ov stórar. Tað er tí álagt stjórnini at fara undir at heimla tær inn. Tær eftirstøðir, sum eru eldri enn 1. oktober 1943 eiga at verða kravdar inn áðrenn 1. januar 1944. Annars eigur tann regla at verða fylgd, at eftirstøðir, sum eru farnar um 3 mánaðir, skulu heimlast inn á lagaligan hátt.

Tað skal skilast til, at umsilingin er ógvuliga dýr sammett við umfaravirði landshandilsins. Hesin verunleiki má hava munandi ávirkan á prispolitikk handilsins.

Nevndin skal ikki hefta seg við frágreiðslu anlsins, men rælt og rímligt var tað, nú síðan landshandilin áleina røkir handilin við tingsins peningi, at reglugerðin av 25. oktober 1939 varð broytt soleiðis, at tingið sjálvt skipaði hann. Ábyrgdin liggur eina hjá tinginum, og ræði átti at fylgt ábyrgdini.

B. Við sambandsslitið 9. apríl 1940 høvdu Føroyar sum nevnt landshandil og hartil stórsølumenn. Hesir menn fingu skjótt í lag samvinnu við Bretland, men mistu hana umsíðir, tá landsnevndin gjørdi landseinahandil.

Í hesum árinum er lítið av vørum komnar til landi og tað tykist ikki væntast at rúmka mikið í komandi tíðum. Hesar 6 seinastu mánaðarnar er ógvuliga lítið komið til landið. Tað er tí mikið umráðandi at fáa førning, um ikki handilin og mangar aðrar vinnugreinir skulu halda uppat.

Tað verður tí skotið upp, at løgtingið fer undir at gera nakað munagott. Tingingar megu takast upp við brettsku stjórnina um hetta týðandi mál. Dentur átti at verið lagdur á at fingið brettsku stjórnina til at sent 1 ella 2 menn (helst handilskønar) higar at samráðast um okkara handilsviðurskifti. Kann hetta ikki fáast í lag, megu Føroyingar finna 2 menn til at fara niður til Bretlands, um vit fáa vissu fyri, at brettska stjórnin vil lingast við okkum um hesi mál.

Tað verður skotið uppá, at løgtingið í hesi tingsetu velur eitt handilsráð, sum hava skal okkara samvinnu við útheimin í hondum — bæði inn og útfluttningin. — Hetta ráð skuldi havt 7 limir — 4 valdir av tinginum og 3 uttanfyri tingið.

Hetta ráð skuldi sum fyrsta tiltakið sela sær fyri at fáa ein farm av av neyðsynjarvørum úr Amerika.

Meirilutin hevur hugsað um t. d. at fingið eitt skip, sum fermir eini 4.000 tons

Farmurin skal umfata tær vørur, sum Bretland annars flytur úr Amerika:

1. 1.500 tons ella um 500 standards av viði, serliga furu og møguligt nakað av eiki,

2. 1.000 tons av rugkorni, ruguljoli, mais, hveiti og øðrum vørum,
3. 800 tons av jarni, í plátum, rundjarni, flaljarni og øðrum jarnvørum,
4. 700 tons av mongum øðrum vørum, sum tørvur er á, t. d. leður, gummistyvlar og -skógvar og annað skóloy, klædnavørur o. m. a.

Tveir sendimenn, handilskonir og byggikønir, mugu óivað sendast avstað at keypa vørurnar, og teir kundu óivað fingið hjálp frá teim, sum keypa tílíkar vørur fyri Ísland.

Um hetta tiltak fekkst í lag, vildu mangar hendur fingið arbeiði, og Føroyar kundu gjørst førar fyri at gjørt seg út til ófriðurin hasar av.

Væl eru reglur fyriskrivaðar fyri okkara samvinnu í tí sonevnda sterlingringinum, men ivaleyst vilja undantøk kunna gerast, um vit skipa okkum rætt, og kanska vil Bretland útvega okkum tørvandi dollars móti pundum.

Eingin ivi er í, at slíkur farmur kundi verið seldur til handilsmenninar her heima beinan vegin. Eitt tíltkt handilsráð skuldi havi myndugleikan til at ásett prístrnar, og tað kann ætlast, at vøruprísir kundu fingist munandi niður, tí sum vituligt er, verða mestar av besum nevndu vørum umskipaðar í Bretlandi, áðrenn tær koma til Føroya.

Hetta, umframt tað at fáa vørurnar, er ein aðalspurningur, sum má hava heila tingsins fulla áhuga, og betri kundi tingið ikki gjørt í hesi tíð, enn at fingið góðar og eftir viðurskiftunum bíligar neyðsynjarvørur til landið.

Eitt handilsráð, sum her er skotið uppá, skal hava alla landsins samvinnu um hendi, tryggja hana best møguligt — bæði útflutningin, fyrst og fremst ferskfiskakvotuna, og hartil innflutningin.

Her er eisini eitt mikið álrodkandi mál, sum eigur at vera loyst beinanvegin. Tað er brennispurningurin. Tað føroyska koli munar einki sum er, og tað var tí mikið neyðugt, um ein økjan av tilflutninginum kundi fingist í vetur.

Viðurskifti landshandilsins innanlands.

Vørurnar hava lyndi til at ganga upp, men lóg um prísstøðg er í gildi. Tað skuldi ikki verið neyðugt at seta vørurnar upp, sum er, um rætt var fyriskipað.

Tað verður skotið upp, at landshandilin verður umskipaðnur. Vørunevndin tekur upp samráðingar við Føroya handilsmenn, at hesir menn taka fmóti vørunum og selja tær við lítlum vinningi. Í Tórshavn kundi tað lætt skipast so, at heilsøluumenninir yvirtóku handilin.

Landshandilin kemur soleiðis at keypa inn vørurnar í samráð við handilsráðið.

Á henda hátt vil umsilingin av tí innlendska vørubýtinum kunna gerast mikið bíligari, tí handilsmenninir hava sínar goymslur standandi og eisini starvsfólk til reiðar.

Landshandilin kom soleiðis ikki at hava brúk fyri vørugoymslum, men kom bert at hava umsjónina við vørubýtinum og rationeringsskipanini.

Tað verður á tann hátt ikki minkað um landsins umsjón við vørutilflutninginum og vørubýtinum, men er eitt tiltak, sum ætlandi kann halda prísunum lægri ella, í hvussu er, forða fyri eini vænlandi bækkan.

Tað verður skilað til, at farmagjaldið fyri sukur er 139 kr. pr. ton og fyri mjøl 92 kr. pr. ton. Hetta tykist at vera nógv ov høgt farmagjald. Her hevur verðið gjørt tiltak fyri at fáa henda kostnaðin niðursettan, bæði viðvíkjandi farmagjald og trygging.

Et *Mindretal* (J. P. Davidsen, Hans Iversen og A. Samuelsen) kan ikke være enigt med Flertallet om væsentlige Punkter i Flertallets Betænkning Forslag. Mindretallet kan saaledes ikke være med til nu at vælge et Handelsraad. Ejheller kan man tiltræde de Ændringer i Reglerne for Færøernes Vareforsyning, som Flertallet foreslaar.

Flertallets Bemærkninger om Etablering af Handel med Amerika har givet Anledning til, at Udvalget einstemmig har besluttet at søge en Forhandling med den britiske Konsul om Betingelserne for en saadan Handels Etablering. Denne Forhandlig skal efter truffen Aftale foregaa 29. dennes. Mindretallet kan ikke afgive endelig Betænkning før denne Forhandling har fundet Sted.

Uppskot

frá *meirilutanum* (J. F. Kjølbro, O. J. Jensen, S. Ellefsen, J. Slettenæs):

A. Løglingið setur eitt handilsráð frá 1. januar 1944.
Ráðið hevur 7 limir, harav 4 valdir av tinginum og 3 uttanfyri tingið, soleiðis 1 av Føroya arbeiðarafelag, 1 av Føroya keypmannafelag og 1 av Føroya arbeiðsgevarafelag.
Landsnevndin fyriskrivar reglur fyri ráðnum og virki less.

B. Reglugerðin fyri landshandilin av 25. oktober 1939, verður broytt soleiðis:

Til gr. 3: Í staðin fyri »Statskassen« verður sett »Lagtinget«
Til gr. 4: Í staðin fyri »Amtmanden over Færøerne« verður sett »Handilsráðsformaðurin«.
Til gr. 5, gr. 7, 1. petti, gr. 7, 2. petti, fyrsta ferð, gr. 8, gr. 9, gr. 12: Í staðin fyri »Amtmanden« verður sett »Handilsráðsins Formand«.
Til gr. 6, gr. 7, 2. petti aðra ferð: Í staðin fyri »Amtmanden« verður sett »Handilsráðið«.

Hesar broytingar koma í gildi 1. januar 1944.

C. Vørnnevndini verður álagt at taka upp tær í álitinum framfluttu tingingar og seinast 1. januar 1944 geva handilsráðnum frágreiðslu um úrslitini.

Alit (4. dec.)

(Frá Samuelsen, Iversen og Davidsen):

I den af Vareudvalgets Flertal afgivne Udvalgsbetænkning af 27. f. M. findes bl. a. følgende:

»Tað verður skotið uppá, at løgtingið í hesi tingseta velur eitt handilsráð, sum hava skal okkara samvinnu við útheimin í hondum — bæði inn- og útflutningin. — Hetta ráð skal hava 7 limir — 4 valdir av tinginum og 3 uttanfyri tingið.

Hetta ráð skuldi sum fyrsta tiltakið seta sær fyri at fáa ein farm av neyðsynjarvørum úr Amerika.

Meirilutin hevur hugsað um t. d. at fingið eitt skip, sum fermir eini 4.000 tons.

Farmurin skal umfata tær vørur, sum Bretland annars flytur úr Amerika:

1. 1.500 tons ella um 500 standards av viði, serliga furu og møguligt nakað av eiki,
2. 1.000 tons av rugkorni, rugmjøli, mais, hveiti og øðrum vørum,
3. 800 tons av jarni, í plátum, rundjarni, flatjarni og øðrum jarnvørum,
4. 700 tons av mongum øðrum vørðum, sum tørvur er á, t. d. leður, gummistyvlar og -skógvar og annað skótoy, klædnavørur o. m. a.

Tveir sendimenn, handilskonir og byggikønir, mugu óivað sendast avstað at keypa vørurnar, og teir kundu óivað fingið hjálp frá teim, sum keypa líkar vørur fyri Ísland.

Um hetta tiltak fekkst í lag, vildi mangar hendur fingið arbeiðið, og Føroyar kundu gerast førar fyri at gjørt seg út til ófriðurin hasar av.

Væl eru reglur fyriskrivaðar fyri okkara samvinnu í tí sonevnda sterlingringinum, men ivaleyst vilja undantøk kunna gerast, um vit skipa okkum rætt, og kanska vil Bretland útvega okkum tørvandi dollars móti pundum.«

Udvalget har om Spørgsmaalet Vareindkøb i Amerika haft en Forhandling med den britiske Konsul, som efter Anmodning af Udvalget velvillig var kommet tilstede i et Udvalgsmøde. Disse Forhandlinger resulterede i, at Konsulen lovede at forelægge Spørgsmaalet for sin Regering.

Da Regeringens Svar muligvis først vil komme til at foreligge i Løbet af nogle Dage, og da Lagtinget formentlig skal slutte i den allernærmeste Tid, vil Tinget næppe kunne tage Beslutning i Sagen. Mindretallet finder det derfor naturligst, at det overdrages det Vareudvald, som venteelig vil blive nedsat, at træffe Afgørelse i Spørgsmaalet under Hensyn til de Oplysninger, som maatte komme til at foreligge.

Mindretallet lægger den allerstørste Vægt paa, at der saavidt muligt fra Amerika søges fremskaffet de nødvendige Varer, som ikke kan faas fra Storbritannien. Mindretallet skal, som de Varer, man om muligt absolut ønsker fremskaffet, nævne Tømmer, Jern, Læder og Gummifodløj. Om dette Spørgsmaal fremsættes Forslag nedenfor.

Under anden Behandling af den allerede afgivne Flertalsbetænkning angaaende Vareforsyningen blev der fra vor Side fremsat en Udtalelse om, at man, saaledes som de politiske Forhold nu har Udviklet sig i Lagtinget, var villig til at overveje, saafremt Flertallet maatte ønske det, at Færøernes Forsyning med Levnedsmidler overdrages en Kreds af private Importører, saafremt betryggende Garantier kan tilvejebringes, dog saaledes, at Lagtinget paa det offentliges Vegne selvfølgelig skulde kontrollere Priserne m. m. Flertallets Ordfører af-

viste imidlertid med Bestemthed den fremsatte Tanke, idet han som Grund avgav de forhaandenværende særdeles vanskelige Omstændigheder, hvorunder Handelen for Tiden maatte drives og Indkøb og Indførsel af Varer særlig maatte foregaa. — Den saaledes udkastede Tanke maa derfor opgives. Iøvrigt henvises til vore Bemærkninger i Flertalsbetænkningen.

Mindretallet regner med, at Vareudvalget vil blive valgt ogsaa i Aar i Henhold til tidligere truffet Beslutning, og fremsætter derefter følgende

Forslag:

Saasnart der foreligger Oplysninger om, at Færøernes offentlige Vareforsyning kan disponere over et passende Beløb i Dollars, bemyndiges Varеudvalget til at søge købt i Amerika en Ladning Tømmer, Jern, Læder, Fodtøj og andre Varer, som Færøerne har særlig Brug for og som ikke kan faas fra Storbritannien. Den fornødne Tonnage søges fragtet og Varеudvalget bemyndiges til at foretage alt hvad der iøvrigt maatte findes nødvendigt til Formaalets Fremme.

2. viðg. 1. dec. og 3. viðg. 7. dec.

Meirilutauppskotið fall 11—0. Minnilutauppskotið samtykt 16—0.

---

3. Hini av amtmanninum og landsnevndini greiddu mál.

Sí frágreiðing **skj. 6.**

Álit (16. nov.):

Nevndin hevur eftirkannað ávísingarskjolini, ið vísa, hvat amtið hevur ávist av peningi í tíðarskeiðinum frá $^{2}/_{1}$ 1913 til $^{2}/_{11}$ 1913, og hevur nevndin ongar atfinningar at gera.

Eisini hevur nevndin eftirkannað gerðabók landsnevndarinnar og skal her viðmerkja, at landsnevndin tann 21. januar 1913 undir viðgerð av málinum um endurnýggjan av skipatlotanum hevur samtykt at spyrja um møguleikan fyri at fáa sent mann til Svoriki fyri at kanna spurningin um keyp ella byggjan av tiskiforum. Málið er 22. januar 1913 avgreitt til amtið av løgtingsskrivstovuni, men er síðan einki frætt um málið.

Uppskot:

Tingið góðkennir tær ávísingar, amtið hevur avgreitt og tær avgerðir, ið tikour eru av landsnevndini.

2. viðg. 22. nov. og 23. nov. Samtykt 25—0.

---

4. Fyriskipanir móti arbeiðsloysi.

1. viðg. 18. sept.

Álit (2. dec.):

Føroya arbeiðarafelag hevur við skrivi av 1. juli 1943 vent sær til tingið og víst á, at arbeiðsviðurskiftini her á landi ikki eru so góð. Teir vísa til, at bert ein miðmi partur av okkara sjómonnum koma til at vinna sær eina ársfortjenastu, og á landi er tað í teim flestu plássunum lítið ella at siga einki at gera. Síðani vísa teir á, at kvinnurnar ikki hava nakað virki afturímóti í arbeiði, tær í friðartíð høvdu við fiskatilvirkan. Føroya arbeiðarafelag heitir á tingið um at seta skapandi virkir á stovn, so sum spinnarfir, vevarfir, seymistovur og onnur virkir.

Havnar framburðsfelag skrivar tann 13. september til tingið, at bert ein lítil partur av okkara arbeiðsføra fólki er í vinnu, í tað væntar skip og byggitilfar og annað tilfar til arbeiðið á landi. Serliga vísa teir til, at stunduriu á smærri plássum er sera ringur. Felagið mælir til, at alt verður gjørt í hesi tíð fyri at fremja velting og gera uppdyrkingarvegir, og heldur at tann studningur tingið í fjør veitti var alt ov lítil.

Føroya javnaðarflokkur hevur tann 13. september 1943 skrivað til tingið, um at taka til viðgerðar í hesi setu spurningin um økjan av studninginum til uppdyrking bæði fyri at grønka land okkara skjótast gjørligt og fyri at skaffa arbeið til flest møguligar hendur, serliga í hesu tíð, meðan mong fólk eru arbeiðsleys.

Føroya javnaðarflokkur skrívar eisini til tingið um at taka til viðgerðar spurningin um at fáa eina lønskipan, ið setir kvinnur og menn í sama arbeiði eins í løn.

Øll hesu mál eru av tinginum víst til viðgerðar í fíggjarnevndini, og hevur nevndin samráðst um hetta.

Øll nevndin:

Viðvíkjandi arbeiði á sjógvi er tað soleiðis, at undan krígnum vóru gott og væl 3000 menn við fiskiskipum í um 7 mánuðar av ártinum, men ein má minnast til, at hjá teimum nógvu var vinningurin heldur lítil. Nú sigla einans undir 1000 ísenn, men av tí at teir skiftast kann ein rokna við, at út móti 2500 høvdu virki í 1942 og um 2000 í

1943, og ágóðin er nógv størri, enn hann var fyrr. Hartil kemur, at útiróðurin og ágóðin við honum er vorðin størri, og eitt partur av fólkinum hava haft arbeiði í Íslandi.

Viðvíkjandi arbeiði á landi hjá monnum er støðan tann, at tað í nógvum av teimum storru plássum hevur verið nógv arbeiði, eisini orsakað av, at Bretar hava haft størri arbeiðir í gongd.

Um arbeiðslíkindini hjá vaksnum monnum heldur nevndin tí, at støðan kann sigast at vera tann, at tað er heilt tolulígt í flestu av teimum størru bygdum, meðan tað í mangari smábygd, hvar neyvan dagløn er at fáa, hevur verið ógvuliga svárt, og har hevur verið og er trongd til, at tað almenna roynir at gera nakað til bata.

Viðvíkjandi arbeiði á landi hjá konufólkinum má viðmerkjast, at tað er beint, at kvinnurnar ikki hava haft arbeiði við fiskaturking, men fíggjarviðurskiftini mugu vera betri í heiminum, so tær ungu, ógiftu kvinnurnar arbeiða heima, tí tað sýnist framvegis at vera ógvuliga trupult at fáa fest eina arbeiðskonu.

Tingið hevur í tíðini, síðani kríggið brast á, gjørt ógvuliga nógv fyri at skapa arbeiðslíkindir hjá fólki. Tað er játtaður studningur til vega- og havnaarbeiðir, og er hetta nú komið væl yvir eina millión krónur árliga. Tað kann viðmerkjast, at ikki allar kommununar hava gjørt nýtslu av tí peningi, sum teimum hevur verið játtaður. Undir viðgerð av hesum málum hevur tingið roynt at býti teimum bygdum, sum eru eina ringast raktar av teimum óvanligu tíðunum, ein munagóðan part, fyri at bøtt uppá tað arbeiðsloysi, sum tíðin hevur ført við sær.

Tá Føroya arbeiðarafelag mælir til at seta virkir á stovn, so skal nevndin hartil últala, at tað sjálvsagt er beint, men tað er trupult nú, hvar neyvan fáast amboð av nøkrum týdningi, og hvar byggililfar er so ílt at fáa til vega. Nevndin skal vísa til, at tað hevur verið arbeitt gjøgnum landsnevndina í fleiri ár fyri at fáa tól til tvey smá spinnarfir, men tað er ikki eydnast.

Meirilutin (T. Petersen, J. Fr. Kjølbro, J. Paturssón, R. Long, K. Djurhuus og J. Poulsen) heldur víðari fram:

Havnar Frambrúsfelag og Føroya Javnaðarflokkur hava heitt á tingið um at gera meira fyri at fáa grønkað land okkara, og skal nevndin her vísa til, at studningur til veltingararbeiði, sum í fjør varð settur til 75.000 kr., ikki hevði so mangar umsøkjarar, at peningurin kundi útbýtast eftir teimum sonn reglum sum árið frammanundan. Nevndin hevur tó mælt tinginum til at hækka henda studning, harfroknað arbeiði fyri útskiftling, til 125.000 kr., og vónandi verða tað fleiri, sum fara undir at virka fyri at veltingararbeiðið verður vaksandi. Nevndin heldur ikki, tað ber til fyri tingið beinleiðis at fara undir at seta veltingararbeiðir í gongd, tí sjálvt um tað kundi verið beint at kunna latið jørð, sum var dyrkað, út til menn, sum hava hug at seta seg í veg sum jarðabrúkarar, so er tað ein spurningur, sum má verða væl umhugsaður, og sum má roknast at koma at kosta nakað væl av peningi.

Føroya Javnaðarflokkur hevur eisini tikið spurningin upp um, at kvinnur og menn í sama arbeiði skulu fáa eins lon. Sjálvsagt er tað beint, at ein borgari, sum ger sama arbeiði sum ein annar, hevur uppiborið somu løn fyri sítt arbeiði, óansað um tað so er maður ella kvinna. Her á landi hava vit at kalla einki av íðnaði, og er tað tí, sammett við onnur lond, ógvuliga fáar kvinnur, sum kunnu sigast at

hava sama arbeiði sum menn. Tað verður í hvussu so er so fá, at tað neyvan kann verða beint at viðgera reglur um hetta í lógarreglunum. Nevndin heldur tað er beint, at spurningurin verður tikin til viðgerðar, tá lønsáltmálar liggja fyri, og um tað tá vísir seg, at tað verða kvinnur, sum ikki gjøgnum lønsáltmálar, við ella uttan semingsmanni og gerðarrætti, kunnu fáa teirra væl uppiborna rætt fgjøgnum, heldur nevndin tað verða beint, at tingið tekur til viðgerðar, um tað fer at bera til, at gera lógarreglur, sum geva teimum tann rætt, tey ikki við samráðingum hava fingið. Soleingi eingin klaga er komin frá kvinnum ella kvinnufeløgum um, at teimum er gjørdur ein órættur, heldur nevndin ikki, tað ber til hjá tinginum at fara undir at samtykkja lógarreglur. I hvussu er má tað nærri verða upplýst, hvørji virkir tað kann verða talan um, og málið eigur so eisini at verða lagt fyri arbeiðarafeløgini og arbeiðsgevarafeløgini til ummælis, áðrenn tingið tekur avgerð.

Øll nevndin:

Tá ófriðartíðin einaferð er at enda, má tingið verða ansið fyri, at tað kann koma ein tíð, hvar tað er nógv verri statt enn í dag við arbeiðslíkindum hjá fólki á landi og á sjógvi. Tingið hevur eisini longu gjørt nakað munagott við at leggja pening í vinnulánsgrunn og socialan grunn, men nevndin heldur tað vera beint at tingið biður landsnevndina hava hetta í huga og samráðast við allar staðir á landi um, hvat kann gerast fyri at fyribyrgja, at tann komandi tíðin verður ov trupul fyri okkara land. Um tað undir tílíkum samráðingum skuldi komið nakað fram um at gera nakað munandi longu nú, meðan bardagin fer fram, eigur landsnevndin at gera stig til, at tílík uppskot beinanvegin verða løgd fyri tingmenninar, so eitt tílíkt mál kann verða viðgjørt uttan seinkan.

Nevndin mælir við hesum viðmerkingum tinginum til at samtykkja eftirfylgjandi uppskot.

Minnilutin (P. M. Dam):

Viðvíkjandi grønkan av landi okkara, setan á stovn av ymsum ídnaðum og at veita arbeiði til øll, verður víst á javnaðarmannastøðuna í tingmálinum Rætturin til arbeiði nr. XIII-27/1943, og hækkan av uppdyrkingarstudninginum í figgjarætlanini fyri amtsgrunnin.

Tað er beint, at skipað verður so fyri, at fyri sama slag og somu nøgd av arbeiði fáa kvinnur og menn somu løn.

Henda javnsetan av kvinnum og monnum er ein neyðug fyriskipan móti »spekulasjón« í billigari arbeiðsmegi. Ein tílík »spekulasjón« er hin størsti meinbogi og skaði fyri strembanina hjá arbeiðarafjøldini fyri betri lønkorum.

Minnilutin setir so staðfram uppskot um við lóg at skipa fyri, at lønin hjá kvinnum og monnum skál vera eins fyri sama slag og somu mongd av arbeiði.

Uppskot:

I. *Frá nevndini:*

1. Eitt eintak av hesum áliti verður sent til Føroya arbeiðarafelag, eitt til Havnar Framburðsfelag og eitt til Føroya Javnaðarflokk.

2. Tingið mælir til, at landsnevndin fær samráðingar í lag við allar stattir her á landi, um hvat ið kann gerast fyri at skapa betri arbeiðslíkindir í Føroyum nú undir bardagatíðini, og hvat ið kann gerast fyri at fyribyrgja, at arbeiðsloysi kemur í hølinum á tí ófriðartíð, vit nú liva undir.
3. Um uppskol skuldi komið, sum beinanvegin kunnu setast í verk, hevur landsnevndin heimild til at handla tingsins vegna, ella at kalla tingið saman til at viðgera tilík uppskol.

II. *Frá minnilutanum* (P. M. Dam):

Midlertidige Bestemmelser for Færøerne

om lige Løn for Kvinder og Mænd.

§ 1.

Kvinder har under lige Beskæftigelser Ret til samme Løn som Mænd for samme Arbejde.

§ 2.

Medmindre andet udtrykkelig er vedtaget eller vedtaget ved Aftale mellem vedkommende Arbejder- og Arbejdsgiverorganisationer maa der ikke i kollektive Lønoverenskomster eller Løntariffer fastsættes lavere Løn for Kvinder end tilsvarende Løn for Mænd.

§ 3.

Disse Bestemmelser træder i Kraft straks.

Fyribyls skipanir fyri Føroyar

um eins løn fyri kvinnur og menn.

§ 1.

Kvinnur hava í sonu stovnum rætt til eins góða løn og menn fyri sama arbeiðl.

§ 2.

Uttan so, at annað avgjørt er samtykt ella verður samtykt av arbeiðara- og arbeiðsgevarafeløgum, má ikki í kollektivum lønarsáttmálum ella lønarreglum verða ásett lægri løn hjá kvinnum enn tilsvarandi løn hjá monnum.

§ 3.

Hesir ásettningar verða at koma í gildi beinavegin.

2. viðg. 3. dec. Nevndaruppskotið samtykt 23—0. Minnilutauppskotið fall 6—0.

5. Døgurðamatur.

1. viðg. 11. sept.

Álit (8. nov.):

Føroya arbeiðarafelag skrivar í brævi til tingið, at tað er ógvuliga trupult hjá arbeiðarafjøldini og øðrum fólki í Føroyum at útvega sær døgurðamat, við tað at fiskur mangar staðir verður noktaður smáfólkinum til keyps, men ístaðin seldur út av landinum. Teir mæla til við lóg at seta forboð fyri, at fiskur fer út av landinum, fyrreum heimafólkið hevur havt høvi at fáa sær fisk til egið brúk.

Felagið biður eisini tingið ansa eftir, at tá ið stórar grindir koma, og ikki øll grindin verður upptikin, at tann partur, ið eftir liggur, fer ikki til spillis, men verður opptikin fyri landsins rokning og bjóðaður bygdum, har lítil matur er, ella at hon verður seld í smáum.

Hesum seinasta viðvíkjandi er at vísa á grindareglugerðins §§ 27 og 30, sum miða ímóti, at grind ikki skal fara til spillis.

§ 27 ljóðar so:

»Delingen bør foretages med den størst mulige Hurtighed, og derfor skal dermed stedse begyndes paa saa mange Steder, som det kan ske, uden at derved foraarsages Forvirring eller Uorden.«

§ 30 ásetir:

»Enhver er pligtig til at lade den ham tilfaldende Andel afhente inden 6 Timer, efter at Delingen er endt, medmindre han underretter Sysselmanden om, at han er forhindret i at afhente Andelen til den foreskrevne Tid, i hvilket Tilfælde Sysselmanden kan tilstaa en yderligere Udsættelse paa 6 Timer. Afhentes Hvalparterne ikke inden den foreskrevne Tid, bortsælges de til højstbydende.«

Nevndin mælir til, at sýslumenninir verða bidnir, í samráð við grindaformenninar, at frávíkja tí í grindareglugerðini ásetta tíðarfreist, tá ið viðurskiftini eru soleiðis, at fryklast kann fyri, at grind kann fara til spillis.

Løgtingið royndir til fyrsta summar, at fáa sett hvalaveiðu á stovn til at veiða tvøst til døgurðamat, og førir hesum viðvíkjandi samráðing við hvalaveiðufeløg og enska hervaldið.

Viðvíkjandi fiski til døgurðamat áttalar ein meirihuti av nevndini (R. Long, P. Dahl, Johan Poulsen og O. F. Joensen), at ringt verður at seta almont forboð fyri, at fiskur verður fluttur av landinum, fyrr enn øll pláss hava fingið nóg nógv til døgurðamat. Bæði fyri fiskimannin, sum veiðir fiskin, og fyri útflutningarskipini, sum føra okkum tann pening til lands, sum vit øll liva av, hevur tað størsta týðning, at fiskasølan gongur fyri seg, soleiðis at útflutningurin verður mest møguligur. Fyri at fáa góðan prís, ræður um at fáa fiskin fram í feskum standi, og tí má fáast skjótt upp í skipini. Spillast nógvar fiskalastir, verður av tí tap, ikki bert fyri úlgerðarmenninar, men fyri

alt landið, og marknaðurin verður spiltur. Sjálvandi má heimafólkið eisini fáa fisk, men at útvega hann á teim stóru plássum, har tann tilførdi fiskur kann vera ov lítil eftir fólkatalinum, má vera eitt mál, sum kommunan má skipa saman við fiskasølumonnunum á staðnum. Av teim stóru plássum man útróðurin úr Klakksvík og úr Vági vanliga vera so góður, at har man ikki bila at fáa nóg nógvan fisk til døgurðamat. Tað verða av størri plássum helst Havnin og Tvøroyri, har fiskur til matna ofta kann tróta. Tórshavn viðvíkjandi hevur helta mál fyrr verið lagt fyri Landsnevndina, ið vendi sær til býráðið, tí hon helt, at hetta í fyrstu syftu var eitt kommunalt mál, men býráðið helt einki vera nevðugt at gera, og vísti til at stovnað var eitt partafelag við tí endamáli at fáa til vega og selja fólki fisk til døgurðamat. Eftir hevur hetta felag einki goymsluhús fingið gjørt, so her mugu samráðingar fara fram millum býráðið og fiskasølumenninar.

Tvøroyri viðvíkjandi er soleiðis stutt, at har er stórt og gott goymsluhús, Ísvirki, og tað má tí vera kommununi gjørligt at fáa eina skipan í lag við hetta goymsluhúsið, at keypa niðurfyri ivaleyst av fiski til døgurðamat, tá ið ríkiligt er til av fiski. Um fiskasølumenn ella goymsluhúseigarar skuldu verið ólagaligir, kann Landsnevndin fáa heimild at seta skipan hesum viðvíkjandi í gildi.

Meirilutin má vísa á, at tað er stórt tap fyri landið, at tann góði døgurðamatur, sum fiskahøvd er, mangar staðir fer fyri skeytir, og mælir til, at ansað verður eftir, at tann stóra nøgd av høvdum, sum kunna verða førd á land á teim góðu fiskiplássunum, verða brúkt annaðhvørt á staðunum ella seld á øðrum plássum.

Meirilitin má annars vísa á, at sjálvt um pláss eru innansyndis, har trupult kann vera at fáa at kóka uttan at fara heldur langa leið, er á flestum plássum soleiðis, at væl av døgurðamati fast, um bátur verður flotaður, og tað má sigast at verða stórt tap fyri landið, at tann góði siðurin, at royna sjálvur at útvega sær døgurðamat, er mangar staðir hurtarlagdur, ofta á plássum, har lætt er at fáa fisk. At nýta fríløturnar á sumrini til at veiða sær sjálvum fisk og so salta hann, hevur áður veitt góðan vetrarmat, og tað er tap fyri landið, at hetta í summum bygdum er mest sum hurtarlagt.

Minnilutin (J. H. Daubjørg) ásannar tann stóra týdningin av, at tingið roynir at fáa loyst tey mál, sum umrødd eru í arbeiðsmannafelagsins skrivi.

Meðan minnilutin við allari nevndini framsetir uppskot viðvíkjandi grinda- og stórhvalaveiðu, kann minnilutin ikki samtykkja meirlutans støðu í spurninginum viðvíkjandi at veita fólki fisk til døgurðamat.

Tað er í øllum føri skrásett sum ein óbroytilig regla, at landsins íbúgvarar eiga fyrstarættin av landsins framleiðslu at fáa tað til likamið og lívið neyðturvuliga.

Tá ið fiskur, sum í hesum døgum hjá mongum er tann einasti døgurðamatur, ið kann fánst, verður veiddur, er tað órættur, at hann, ið hevur fiskin og ikki tørvar at nýta hann sjálvur til matna, skal hava høvi til at sýta fólki at fáa av honum til keyps.

Minnilutin heldur, at tingið í hesum føri eigur at taka ávísa og avgjørda støðu fyri, at ein og hvør, sum hevur fisk at lata, skal hava skyldu, fyrst at selja til fólk, ið yuskir at keypa til húsnýtslu.

Minnilutin setur so statt fram uppskot um við lóg at skipa fyri, at so skal verða.

Uppskot

frá meirilutanum (R. Long, P. Dahl, Johan Poulsen, O. F. Joensen):

A. Svarað verður umsøkjaranum, at útvegan av fiski til døgurðamat er í fyrsta syftu eitt kommunalt mál, sum má kunna fáast í rættlag við samarbeiði millum kommunustýrið og fiskasølumenn. Um eingin skipan fæst í lag, kunnu kommunustýrini venda sær til Landsnevndina, sum fær heimild til at seta bráfengis skipan hesum viðvíkjandi í verk.

B. Sýslumenninir verða biðnir, í samráð við grindaformenninar, at frávíkja tí í grindareglingerðini ásettu tíðarfreist, tá ið viðurskiftini eru soleiðis, at fryktast kann fyri, at grind kann fara til spillis.

Løgtingið roynir at fáa stórhvalaveiðu setta á stovn til summars til at veiða tvøst til døgurðamat.

Uppskot

frá minnilutalum:

Midlertidige Bestemmelser for Færøerne om Befolkningens Forsyning med Fisk.

I Medfør af Lov Nr. 288 af 2. September 1939 fastsættes herved følgende:

§ 1.

Enhver, der til Færøerne med færøsk Baad eller Fartøj indbringer friskfanget Fisk, bestemt til Salg, har Pligt til mod kontant Betaling at sælge Fisk til Stedets Beboere til Brug i deres Husholdning.

Pligten til Salg til Brug i Husholdninger gælder uanset forudgaaende Aftaler om andet Salg.

Fisken skal sælges til den paa Stedet gældende Dagspris.

§ 2.

Paa de Pladser, hvor Vragerkontrollører er ansat, skal disse føre Tilsyn med Overholdelser af Salgspligten samt afgøre eventuelle Tvivls- og Stridsspørgsmaal om Salgspligtens Omfang.

Hvor ingen Vragerkontrollør er ansat, udøves Tilsynet af Forstanderskabet, der træffer Afgørelse af Tvivls- og Stridsspørgsmaal.

§ 3.

Overtrædelse af nærværende Bestemmelser straffes efter Loven.

§ 4.

Denne Bekendtgørelse træder i Kraft straks.

2. viðg. 10. nov. og 15. nov. Minnilutauppskotið fall 6—0, (Javnaðarflokkurin og Kr. Djurhuus). Meirilutauppskotið A. samtykt 20—0, B. 23—0.

6. Studningur til búnaðarboð.

1. viðg. 11. sept.

Álit (24. sept.):

Samuel J. Müller, Porkeri, søkir løgtingið um hóskandi studning til aktól og tíggjur. Amboðini koma at kosta ca. 400 kr.

Grunnurin hjá »Hanseske Legat« eigur pr. 31. mars 1943 kr. 209,61.

Nevndin skal mæla til, at játtað verður umsøkjaranum ein studning uppá 125 kr. úr hesum grunni, tá váttan liggur fyri, at umsøkjarin kann fáa til vegar tey nevndu amboð.

Uppskot:

Tingið veitir úr »Hanseske Legat« til Samuel J. Müller, Porkeri, 125 kr. sum studning til aktól og tíggjur.

2. viðg. 29. sept. 3. viðg. 5. okt. Samtykt 17—0.

---

7. Uppskrivan av staðanøvnum.

Frl. 8. sept. 1. viðg. 13. sept.

Álit (30. nov.):

Føroya forngripafelag hevur fingið ein eykastudning 1000 kr. stóran árliga til útgrefstur. Í ivey tey seinastu árini er útgrefstur farin fram í Kvívík, og ætlanin er at halda áfram við hesum útgrefstri og kanska uðrastaðni eisini. Felagið hevur fört rokniskapin fyri hetta arbeiði og stílað fyri, meðan sjálvt arbeiði er avrikað av Sverra Dahl, og lutirnir, ið funnir eru, hevur Dahl registrerað til varðveitslu á forngripagoymsluni her í Havn.

Tíggjarnevndin, sum hevur viðgjørt málið, mælir einmælt lingínum til, at fram kann verða hildið við hesum arbeiði. Nevndin hevur havt samráðing við M. A. Jacobsen, borgarameistara, ið er formaður fyri forngripafelagið, og varð undir hesum samráðingum flutt fram, at Føroya forngripafelag eina mest var ætlað sum stýri fyri goymsluni

og ikki sum eitt felag, ið lók sær av tí vísindaliga starvinum til varðveitan og útgrefstur av fornleivdum um alt landið. Hesum var formaðurin einigur í, og hetta fram, at teir eina nest hava havt lut í útgrefstrinum á tann hátt, at teir hava havt umsorgan fyri, at teir fimmu lutirnir kunna verða goymdir, og at roknskapur hevur verið fordur. Undir samráðingunum varð frambildið, at beinast hevði verið at skipa eina landsstjórn til at taka sær av tílíkum arbeiði, soleiðis at eisini kundi verið farið undir at hava bókaførslu yvir øll tey stað, sum kend eru, og sum goyma fornleivdir og so fullfíggjaðar frágreiðingar sum gjørligt um ta søgu, sum knýtt er til hesi pláss. Síðani heldur nevndin, tað eigur at verða umhugsað at avmarka plássini við einum høgdum steini, soleiðis at øll fólk vita av, at har tílíkur steinur stendur, eigur ikki at vera grivið uttan so ein nevnd fær at vita av og kann fyrireika, at alt, sum fram kemur, verður uppskrivað og kemur til sættis.

Nevndin heldur tað eigur at verða vel umhugsað, hvussu tílík nevnd skal veljast, og mælir tí til, at ein bráðfengis nevnd uppá 5 limir verður vald og skal tingið velja tríggjar og forngripafelagið tveir limir í hesa nevnd, og skal henda nevnd geva frágreiðing til næstu tingsetu um, hvussu reglugerð og stýri fyri hesum arbeiði eigur at verða í komandi tíðum.

Páll J. Nolsøe, Tvøroyri, hevur vent sær til tings og sagt frá, at hann hevur hugsað sær at fara undir at skriva upp staðanøvn í Suðuroy og nøvn á havinum kring Suðuroy. Hann søkir um 2000 kr. í studningi til hetta arbeiði, ið hann ætlar vil taka eitt ár. Tá uppskrivingin er liðug, er tað ætlan umsøkjarans at fara undir eina vísindaliga gransknan av tilfarinum. Hann upplýsir, at hann hevur fingist við at savna staðanøvn í Froðbiar sókn. Úttan peningaligan studul heldur umsøkjarin seg ikki kunna fara undir arbeiðið, ið krevur pening til ferðaútreiðslur og hjálparmenn.

Nevndin er samd um, at tað er av stórsta lýdningi at framhalda tað arbeiði, sum gjørt er við at savna staðanøvn, og at tað ræður um at fáa arbeiðið gjørt skjótt, áðrenn staðanøvn verða gloymd, serstakliga kann vera vandi fyri, at nøvn á havinum t. d. mið og ýtir, verða gloymd orsakað av nýggjum veiðuhátturn.

Tað ræður um, at arbeiðið verður gjørt um alt landið, so maður ella menn kunna fara undir vísindaliga grannskan av føroyskum staðanøvnum um alt landið. Hitt almenna eigur at stýðja innsavnan av staðanøvnum, so ansurin fyri málinum veksur, og fleiri fáa hug at taka lut.

Um onkur yntskir, at upplýsingar, hann gevur, ikki verða almennt kunngjørdir í eitt áramál, eigur hetta at verða gjørt, t. d. viðvíkjandi nøvnum á ýtum o. t.

Nevndin skal mæla til, at hesin spurningurin um uppskriving av staðanøvnum verður avgjørdur á tann hátt, at tann bráðfengis setta fornleivdanevndin skal geva sítt ummæli og landsnevndin so játta pening, og eigir studningur ikki at verða játtaður fyrr enn maður, sum søkir studning fyri nevndini hevur prógvað, at hann hevur gjørt nakað av tílíkum arbeiði, og at arbeiðið er væl úr honduum greitt. Studningurin kann ikki roknast soleiðis, at maður beinleiðis fær løn fyri arbeiðið, men sum ein hóskandi samsýning við tað at sjálvt arbeiðið eigir helst at vera gjørt av góðum huga.

Nevndin vísir til tann studning, sum er játtaður í fíggjarætlan amtsgrunnsins undir gr. 4 k: Útgrefstur og uppskriving av staðanøvnum o. tl. kr. 5000,—, og mælir tinginum til, at landsnevndini verður givið

upp í hendi at jálta henda pening eftir ummæli frá tí í hesum áliti umrøddu nevnd.

Tinglimirnir hava havt hóvi til at sæð tað, sum funnið var við útgrefsturin í Kvívík, og hava hoyrt frágreiðing um arbeiðið frá Sverra Dahl, sum hevur verið fyristøðumaður fyri hesum; hetta hildu nevndarlimirnir vera ógvuliga álugavert og vilja siga frá í álitinum, at nevndin eigir at umhugsa spurningin um at samsýna fyristøðumanninum bóskandi fyri starv hansara.

Nevndarlimur P. M. Dam er sameintur við nevndina um tað arbeiði, sum eigir at fara fram, men teknr ikki støðu til, hvussu tann bráðfengis nevndin skal veljast, men vil greiða frá støðu sínari í tingsalinum.

Nevndin selur fram til tingsins samtykt hetta

Uppskot:

A. Øll nevndin uttan P. M. Dam:

Tingið setur eina 5-mannanevnd, harav tingið velur 3 limir og Føroya forngripafelag 2 limir, til *at* taka sær av málinum um útgrefstur í Føroyum, til *at* geva ummæli um studning til uppskrivan av staðanøvnum og til *at* gera uppskot til næstu tingsetu um eina fasta reglugerð og stýrisskipan fyri útgrefstrararbeiðið í komandi tíðum.

B. Øll nevndin:

Landsnevndin fær upp í hendi at veita studning til tey í álitinum nevndu endamál av teimum undir gr. 4 k: »Uppskrivan av staðanøvnum og útgrefstur« úr amtsgrunninum játtaðu 5000 kr.

C. Umsókn P. J. Nolsøes verður send tí undir A settu nevnd til ummælis. Eitt eintak av álitinum verður sent umsøkjaranum.

2. viðg. 2. dec. 3. viðg. 3. dec. Pl. A. samtykt 19—0. B. og C. 25—0.

8. Sjálvstýrisnavnið.

Frl. 8. sept. 1. viðg. 8. sept.

Alit (29. sept.):

8. september 1943 segði tingformaðurin frá, at hann hevði fingið tvey brøv, soljóðandi:

»Til formann Føroya Løglings.

Undirskrivaðir tingmenn gera formannskapinum kunnugt við, at vit eru gingnir saman í tingmannaflokk, Sjálvstýrisflokkin, við stevnuskrá Havnar Framburðsfelags og teirra sjálvstýrismanna, sum hava tikið undir við hesum felag. Vit hava á tingi valfelagsskap við Fólkaflokkin.

Við hávirðing

R. Long. R. Rasmussen.

Til Føroya løglings, her.

Havnar Framburðsfelag hevur í brævi, dagssett 30. august 1943, til Havnar Sjálvstýrisfelag boðað frá, »at okkara valdu menn skulu skipa Sjálvstýrisflokkin á tingi«.

Felag okkara roknar tí við, at Richard Long, sum segðist at vera stillaður upp á fólkaflokkslistan av Havnar Framburðsfelag, og onkur annar ætla at melda seg sum nýggjan flokk á tingi undir navninum Sjálvstýrisflokkurin.

Havnar Sjálvstýrisfelag mótmælir, at tingmenn, sum ikki eru valdir upp á Sjálvstýrisflokksins stevnuskrá til løglingsvalið 24. august í ár, fáu loyvi at taka sær navnið Sjálvstýrisflokkurin, og yuskir tingsins avgerð í hesum máli við atkvøðugreiðslu.

Tórshavn, 6. september 1943.

Fyri Havnar Sjálvstýrisfelag

Louis Zachariasen.«

Tingformaðurin áttalaði, at hann ikki kundi síggja seg at hava nakran rætt til at nokta at taka við boðinum frá R. Long og R. Rasmussen, ella til at taka atkvøðugreiðslu um betta. Tað kom orðadráttur, og málið varð lí vist í hesa nevnd til kanningar. Formaðurin segði so frá, at hann til tingið hevði tikið støðu, vildi rokna teir tveir

tinglimirnar sum umboðandi ein sjálvstýrisflokk á tingi í valfelag við Fólkaflokkin.

Lóggávan sigur ógvuliga lítið um politiskar flokkar. Í løgtingslógini stendur í gr. 1: »Naar nyt almindeligt Valg til Lagtinget skal foretages, meddeler Lagtingets Formand Amtmanden, hvilke Partier der da findes i Lagtinget.« Somu orð nýtir danska vallógin, tá hon í gr. 4 sigur: »Naar nye almindelige Valg til Folketinget skal foretages, meddeler Folketingets Formand til Indenrigsministeren, hvilke Partier, der da findes i Folketinget.« Ein kann ganga út frá, at løgtingslógin hevur sína regln frá dansku vallógini. Annars siga hesar báðar lógir at kalla einki um flokkar og eitt minni um flokksnøvn.

Ein meirihluti (Th. Petersen og R. Rasmussen) má áttala, at hesar lógirnar nevna upplýsing um, hvørjir flokkar »lá« finnast á tingi, soleiðis at ein her hevur prógv fyri, at tað ikki nýtist at verða verandi teir somu flokkar, sum tá tingmenn seinast vórðu valdir. Við øðrum orðum, tingmaður (ella tingflokkur) kann skifta flokksnavn við at kunngera tað fyri formanninum; hetta eru dømir uppá hæði frá danska fólkatinginum og frá løgtinginum.

At nakað navn, sum ikki finnst innan fyri tinggált skal verða soleiðis tryggjað, at tingið ikki kann taka tað til kunngeringar sum navn á einum tingflokki, hava vit ikki funnið nakað lógboð fyri, og »Havnar Sjálvstýrisfelag« hevur hetdur ikki í sínum skrivi vist á nakað lógboð, teir styðja seg til. Meirihlutin kann tí ikki siggja, at tingið kann gera nakað við umsóknina frá Havnar Sjálvstýrisfelag um atkvøðugreiðslu, og setur uppskot um, at eintak av álitinum verður sent umsøkjaranum.

Ein minniluti (O. F. Joensen) flytur fram:

Det er Udvalget og alle i offentlige Forhold interesserede Færinger bekendt, at Selvstyrepartiet er et af de ældste politiske Partier paa Færøerne.

Det er fremdeles alle bekendt, at Selvstyrepartiet i den sidste Lagtingsperiode repræsenteredes i Tinget af Louis Zachariasen, S. P. Zachariasen og Hans Nolsøe, samt at disse 3 Lagtingsmænd gik til Lagtingsvalget i August 1943 paa Selvstyrepartiets Program med Kandidatlister i de fleste Valgkredse paa Færøerne, mærkede Selvstyrepartiets Bogstavbetegnelse D. Intet andet Parti opstillede Kandidatlister i Tilslutning til Selvstyrepartiet med denne Bogstavbetegnelse.

Det har i denne Forbindelse ingen Interesse, at der synes at have været ført Strid indenfor en Forening i Tórshavn, som for nogen Tid siden havde Forbindelse med Selvtyrepartiet.

Ved Lagtingsvalget i August 1943 fik Selvstyrepartiets Liste D et saa stort Antal Stemmer, at Partiet havde Ret til 3 Mandater. Naar Partiet desuagtet ingen Lagtingsmand fik valgt, skyldes dette Latingslovens Bestemmelse om, at et Parti, som intet Kredsmandat faar, heller ikke kan faa Tillægsmandat, sammenholdt med den Omstændighed, at Tillægsmandaternes Antal nu er utilstrækkelige til at yde hverl enkelt af Partierne forholdsmæssig Repræsentation i Lagtinget.

Det maa erkendes, at Bestemmelserne om, at et Parti, som intet Kredsmandat faar, heller ikke kan faa Tillægsmandater, er uheldige, naar Bestemmelserne ogsaa kan anvendes paa de gamle Lagtingspartier.

Mindretalletallet maa under Henvisning til foranstaaende foreslaa, at Lagtinget resolverer, at D'herrer Rasmus Rasmussen og Richard Long er uberettigede til at benytte Partinavnet »Sjálvstýrisflokkurin«,

da dette Navn indehaves af det Parti, som opstillede Kandidater til Lagtingsvalget 24. August 1943 med Bogstavbelegnelsen D.

Uppskot:

frá meirilutanum (Th. Pelersen og R. Rasmussen):

Eitt eintak av álitinum verður sent »Havnar Sjálvstýrisfelag.«

frá minnilutanum (O. F. Joensen):

Lagtinget resolverer, at det politiske Parti paa Færøerne, som med Bogstavbelegnelsen D opstillede Kandidater til Lagtingsvalget 24. August 1943, har Eneretten til at betegne sig med Partinavet »Sjálvstýrisflokkurin.«

2. viðg. 15. okt. og 20. okt. Meirilutauppskotið samtykt 13—0. (Sambandsflokkurin og javnaðarflokkurin. Minnilutauppskotið samtykt 13—0.)

Uppskot frá A. Samuelsen o. fl. 15. nov.

Ved Stævning af 25. Oktober 1943 har Havnar Framburðsfelag v/ Z. Niclasen, Thorshavn, paastaaet Færøernes Lagting tilpligtet at anerkende, at Lagtingsmand R. Long, som blev opstillet og valgt ind i Lagtinget af Havnar Framburðsfelag, har Ret til at bruge Betegnelsen »Sjálvstýrisflokkurin« for det Parti, han repræsenterer og at Lagtinget har været uberettiget til at resolvere, at »det politiske Parti paa Færøerne, som ved Bogstavbetegnelsen D opstillede Kandidater til Lagtingsvalget 24. august 1943, har Eneretten til at betegne sig med Partinavnet »Sjálvstýrisflokkurin«.

Da Sagen er berammet til Foretagelse i Retten i Morgen, den 16. November 1943 Kl. 10, og da Stævningen først er kommuniceret Lagtingets Medlemmer i Dag, tillader underskrevne sig at stille følgende

Forslag til Beslutning.

1) Lagtingsformanden møder i Færøernes Ret, den 16. November 1943, og nedlægger Paastand om Frifindelse og anmoder iøvrigt om Sagens Udsættelse til 2. Tingdag i December 1943.
2) Lagtinget antager en Sagfører til Sagens Udførelse.
3) Sagen tilstilles Lagtingskontoret til Foranstaltning.

Samtykt 16—0.

9. Viðkan av elektricitetsverkinum í Klakksvík.

Frl. 11. sept. 1. viðg. 15. sept.

Álit (12. okt.):

Klakksvíkar kommuna heitir í bræví av 6. september 1943 á tingið um at fáa nummagóðan studning til viðkan av elektricitetsverkinum. Við skrivi av 29. september 1943 hevur søknarstýrið greitt nærri frá málinum og sent tinginum ummæli frá løglingsverkfrøðinginum við kostnaðarætlan og teknigum. Málið kann nú sigast at liggja soleiðis fyri:

Elektricitetsverkið er bókført fyri 651.861 kr. 41 oyru, hvat kann ætlast at vera byggikostnaðurin, av hesum peningi er goldið 170.049 kr. 60 oyru, soleiðis at verkið nú við ymiskum lánum skyldar 494.214 kr. 62 oyru. Rakstrarrokuskapurin fyri 1942 vísir, at verkið hevur haft eitt yvirskot uppá 6605 kr. 17 oyru, aftaná at rentur eru goldnar og 15853 kr. 39 oyru sum avdráttur uppá lán. Samstundis sigur søknarstýrið frá, at sølan í 1942 varð um 1 millión kw, men longu í ár er komin upp um hetta, soleiðis at ein í ár kann rokna at koma upp á 1,3 millión kw. Hetta skuldi givið eitt væl betri rakstrarrokuskap í ár enn í fjør, so at peningastøðan skuldi batna.

Tað standa mangan tropulleikar av, at verkið má steðga vegna vatnrot, anlin av turka ella kulda. Í ár er hetta einans hent 3 ferðir. Tann viðkan, sum nú er talan um, roknar søknarstýrið, vil geva tað úrslit, at um 79 pct. av steðgunum kann verða sloppið undan. Henda viðkan er í 2 portum:

A. Ein *tiltakshyl*, sum ætlanin er at byggja um 200/300 m hægri enn hylurin, sum nú gevur verkinum vatnkraft. Hetta er ætlað at geva um lag 75.000 m³ vatn. Hesin hylur kann byggjast av jarnbeton, men tá hetta er ógjørligt at fáa til vega í hesi tíð, kann ikki gerast nøkur kostnaðurætlan. Verkfrøðingurin heldur hetta vilja verða væl bligari enn at byggja við jørð og beton. Hetta seinasta metur hann til at kosta um *275.000 kr.*

B. *Hækkan av vatnshæddini* í tí gamla hylinum um 2 m, ið ætlast at geva um 35.000 m³ meira vatn. Hetta kann eisini gerast við jarnbeton, sum er útroknað til um *90.000 kr.*, ella við jørð og beton, sum er ætlað at kosta um *88.000 kr.*

Tað eru hesi arbeiðir, sum søknarstýrið er sinnað til at lata gera, tó viðmerkja teir, at talan hevur verið um eitt motorverk, men hetta vildi verða ógvuligа dýrt og kann ikki væntast at kunna láust, áðrenn um 1 ella 2 ár.

Nevndin er samd um at greiða frá, at tað hingartil ikki til byggjan ella viðkan av elektricitetsstøðini er givin beinleiðis studningur frá tí almenna, og at nevndin ikki kann mæla til, at tingið nú tekur øðru støðu. Tað hevur við byggjan av elektricitetsverkum verið givin ein hjálp frá tí almenna við at útvega og toka ábyrgdina fyri tey lán, sum tørvast fyri at sela fyritøkunni í verk, og hetta heldur nevndin er beint at halda fram við.

Av tí, at kríggsumstøðurnar gera, at byggikostnaðurin verður væl størri nú, enn hann vildi verið í friðartíð, og av tí at inntøkur

hjá fólki og harvið tann fíggjarliga megin hjá sóknarstýrinum samstundis er væl betri enn vanligt, má nevndin halda, tað er neyðugt hjá sóknarstýrinum at umhugsa at fáa greitt eitt munagóðan partaf av byggikostnaðinum uttan láu. Hetta má nevndin eisini halda verða neyðugt, fyri at skuldin ikki skal verða ovstór og tung at bera hjá komandi ættarliðum í sóknini.

Um so er, at sóknarstýrið kann útvega ein munagóðan part av byggikostnaðinum, vil nevndin mæla tinginum til at taka undir við hesu víðkan og játta ábyrgd fyri láni og samstundis játta, at sóknarstýrið tekur tey neyðturvnligu láu.

Nevndin setur so statt fram hetta

Uppskot:

1. Landsnevndini verður givið upp í hendi at samráðast við Klakksvíkar sóknarstýri um, hvussu stórt lán er neyðugt, fyri at elektricitetsverkið kann verða víðkað.
2. Landsnevndin verður heimlað *at* geva loyvi til Klakksvíkar sókna kommunu at taka neyðturvuligt lán til víðkan av elektricitetsverkinum og *at* taka ábyrgd fyri lániunum lingsins vegna.

2. viðg. 19. okt. 3. viðg. 22. okt. Samtykt 17–0.

---

10. Kolamálið.

Fri. 11. sept. 1. viðg. 11. sept.

Álit (29. nov.): (Kr. Djurhuus við fyrivarni.)

Í Trongisvági eru gjøgnum tíðirnar gjørdar fleiri royndir við kolagrefstri. Seinast byrjaði p/f. Føroya Kol, sum við koncessión 15. mei 1932 fekk einkarrætt til at bróta og útflyta kol úr Suðuroy. Felagið gjørdi togbreyt úr fjøllunum í Rangabotni og omman á Drellnes, har bryggja var bygd. Kostnaðurin til hesi virkir var um ½ mill. kr., sum var fingin til vegar við partapeningi og lánum.

Virkið gekk ikki væl, og tá sambundið í 1910 varð kvett við tann partin av stjórnini, sum sat í København, leigaði í juli 1910 felagið til arbeiðsmannafelagið Fylkings koladeild rættin til at brúka kolholini og øll felagsins virkir móti at betala 3 kr. pr. ton seld kol. Tað gekk ikki væl hjá Arbeiðsmanna Kolavirki. Eina tíð veitti tingið studning 3 kr. pr. ton. Prísirnir hækkaðu við prístalinum til mei 1912 77 kr. fyri stórkol. Tá varð gjørd ný seinja, hareftir A. K. skuldi royna at fáa framleiðsluna hækkaða til 1000 tons um mánaðin. Løgtingið

skuldi veita 10.000 kr. til byrjan av nýggjum kolaholi og øðrum umbølingum, 10.000 kr. til rakstrarpening, keypa anboð og veita láo til húðir (42.000 kr.) Sum prístalið fór upp, hækkaðu prísirnir fyri stórkol 1. nov. 1942 til 90 kr. pr. ton, 17. dec. til 97 kr. og januar 1943 til 101 kr. Framleiðslan vildi eiuki til at vaksa. Í tingsetuni 1942 varð játtað A. K. rakstrarlán 25.000 kr.

Í april 1943 sendi A. K. umboðsmenn til samráð við tingið. Lønin varð tá hækkað 19 øyr. pr. tíma, men lógin um prissteðg forðaði hækkan av kolaprísinum. Tingið samtykti tá uppskot til nýggja semju, hareftir raksturin verður stjórnaður av einum av landsnevndini valdum ráði (3 limir) frá 1. mei 1943. Haromfraint er ein stjóri og ein arbeiðsformaður. Leigan til Føroya Kol verður 3 kr. pr. selt ton kol, og til umbøtan av høvuðsgongdini og til byggjan av nýggjari gongd varð játtað 40.000. Fylking varð frítikin fyri ábyrgd fyri Føroya Kol viðvíkjandi virðisminkan í tí tíð, kolagrefsturin hevði verið leigaður til Fylking, og tingið tók á seg hesa ábyrgd.

Amtið upplýsti í april í ár, at amtsgrunnurin falt fróknað pening til hús o. a., hevði goldið til Arbeiðsmanna Kolavirki, Trongisvági, 95.000 kr., og síðan er goldin nógvur peningur aftrat, so falt er lagt út um 150.000 kr., uttan at tað tó er eydnast at fáa framleiðsluna at hækka, tvørturfmóti.

23. juli i år skrivar verkfrøðingurin:

» . . . . . .

Kulproduktionen var kun 175 Tons i Juni Maaned og bliver endnu mindre i Juli. Dette skyldes dels Mangel paa Arbejdskraft, idet mange Arbejdere er søgt til det engelske Vejarbejde i Frodebø, og dels Mangelen paa Props. Sidstnævnte ventes afhjulpet i meget nær Fremtid, og det er sandsynligt, at mange Arbejdere paany vil melde sig til Kulminen omkring 1. September, naar Arbejdet i Frodebø nærmer sig sin Fuldendelse.

Den indskrænkede Arbejdsstyrke i Minen beskæftiges med Istandsættelse af Hovedgangen, Vedligeholdelse af Køreveje, Fremdrift og en ubetydelig Kulhugning.

. . . . . .

Istandsættelse af Hovedgangen bør fortsættes. De farligste Strækninger udgør tilsammen 36 m, hvoraf en Del allerede er indfaldet i Sidemure af kløvede Sten. Over disse Mure foreslaas bygget en Betonhvælving, der armeres med Jernnet, som Ingeniørkontoret vil fremskaffe.

. . . . . .

Indtil Props ankommer fortsættes med *Fremdrifter* i saa stor Udstrækning som muligt.

Den vestligste af de *eksisterende Indgange* oprenses, og det undersøges om det er muligt at lage de vest for Gangen staaende smaa Stabber.

. . . . . .

Herefter træffes Beslutning om eventuelt at forlade Gangen under Udbrydning af de Sidemure, der beskytter den, og Optagning af Spor.

Det nye Indslag længere *mod Vest* fremmes mest muligt med den Arbejdskraft, der kan skaffes.

. . . . . «

I august doyði ein maður við vanlukku í einari kolagongd, og verkfrøðingurin fór til Suðuroyar og hevði fund 11. august við rakstrarráðið. 13. august gav verkfrøðingurin frágreiðing, har hann skrivar:

» . . . . . .

Den følgende Dag konfererede jeg med Driftsraadet for A. K., som meddelte mig, at Kørerne ikke længere vilde befare den sydlige Hovedgang, hvor Ulykken var skeet, og at Kulproduktionen var ved at standse. Der blev derefter arrangeret et Møde mellem Landsoævnsmedlemmerne Djurhuus og Dam, Driftsraadet, Formand Wiberg og undertegnede.

Jeg skitserede paa dette Møde en Ordning, hvorefter man skulde opgive den nuværende saakaldte »Hovedmine« i den Forstand, at man ophører med al videre Fremdrift i dette Omraade og indskrænker sig til Udbrydning af de Kul, der er brydefærdige i Omraadet, og eventuelt ogsaa under Tilbagetrækningen tager selve de Piller (Stabber), der beskytter de 3 Hovedgange. Til Gengæld skulde man saa hurtigst muligt gøre det paabegyndte Indslag længst mod Vest produktivt, samt reetablere det vestligste af de tre nuværende Indslag. Mellem sidstnævnte to Indslag vil der hurtigt opnaas Forbindelse, hvilket har Betydning for Ventilationen.

. . . . . «

29. sept. skrivar verkfrøðingurin, at formaðurin Wiberg mælir til at gera 1 ella 2 nýggj kolhol longri vestur ella sunnari enn tey núverandi hol. Verkfrøðingurin skrivar so:

» . . . . . .

Fjeldet.

Formand Wibergs Forslag om nye Indslag maa formentlig ses paa Baggrund af, at han har observeret en Revne i Fjeldet over Kulminen. Denne Revne har aabnet sig til en Bredde af 12 cm. Der er intet oplyst om, hvorvidt Revnedannelsen er fremadskridende.

Der kan næppe være Tvivl om, at det sidste Aars Uro i Brydningsomraadet, stammer fra Dannelsen af den nævnte Revne, og man kan ikke se bort fra den Mulighed, at en alvorlig Forskydning kan finde Sted. Efter det oplyste fordøher Revnen i øst-vestlig Retning lodret over det Omraade i Minen, hvor Brydningen foregaar.

Produktion.

Det oplyses, at der for Tiden arbejder ca. 30 Mand i Minen. Saafremt intet helt forudset indtræffer, regner Formand Wiberg med

en Produktion af indtil 15 tons pr. Dag (formentlig brutto), hvilket vil give 250—270 tons salgbare Kul pr. Maaned.

. . . . . «

Verkfrøðingurin fór til Trongisvágs at granska rivuna í fjallinum og gav 8. oktober frágreiðing og skrivar har millum annað:

». . . . . .

1. *Revnen i Fjeldet.*

Mineindgangene er ført ind i en Skraaning, der stiger op mod et Klippeparti af meget løs Beskaffenhed. Indgangene ligger omkring 300 m over Havets Overflade. Klippepartiets nordlige Begrænsning er Hammer, der ligger 50—60 m højere, og herfra rejser det sig sydover til en Højde af mere end 500 m. Brydningsomraadet i Minen er overlejret med fra 100 til 200 m tykke Lag.

Revnen i Fjeldet forløber omtrent som vist med rødt paa Kortskitsen. Over Klippepartiets Ryg er den i det store og hele retlinet. Mod Sydøst taber den sig i en Gjov og mod Nordvest i et Elvleje.

Revnen er af ny Dato. Dens Kanter staar friske og skarpe, baade hvor den forløber over en nøgen Klippe, og hvor Klippen er dækket af tynde Muld- og Lerlag. Revnens Bredde foroven er 10—12 cm. Formand Wilberg mener ikke, at Bredden er vokset i de sidste 14 Dage.

Det maa antages, at Revnen gaar helt ned til Kullaget. Vi lod en lille Sten falde ned i Revnen, og der forløb godt og vel 10 Sekunder, før den faldt til Ro.

2. *Forholdene i Minen.*

Kullaget i Rangabotn er som bekendt dækket af et 10—15 m tykt, sort Lerlag, der som Tag betraglet maa betegnes som daarligt. I de sidste 2—3 Maaneder er det bemærket, at Trykforholdene i Minen har forværret sig betydeligt, hvilket utvivlsomt staar i Forbindelse med Dannelsen af Revnen i Fjeldet.

De ændrede Trykforhold har gjort det mere farligt at arbejde i Minen og samtidig forøget Brydningsomkostningerne betydeligt, idet Sikring af Kørselsvejene kræver øget Arbejde samtidig med, at større Mængder nedfaldent Materiale maa køres ud af Minen.

. . . . . .

Hovedgangen er paa de første 120 m sikret hovedsagelig ved Tømmerophygning, der endnu holder, men ganske tydelig er under svært Tryk. Længere indefter er der i de sidste Maaneder foretaget Ophygninger af Sten i Væggene og med Tømmer til Tag. Dette Arbejde fortsætter stadig og maa antagelig fortsættes, saa længe Kulbrydningen i Omraadet opretholdes. I Øjeblikket er det stærkt paakrævet at faa udbygget en Strækning paa ca. 20 m. Der tiltrænges ligeledes Sikring af Vejkrydset (Drejebladet), der ligger 240 m fra Hovedgangen.

. . . . . .

3. *Kulbrydningen for Tiden.*

Der arbejder for Tiden ca. 30 Mand i Minen. Af disse er 5 Mand konstant beskæftiget med Udbygning af Hovedgangen, medens de øvrige er beskæftiget med egentlig Kulbrydning og Udkørsel. Fremdrift i Minen foregaar ikke. Produktionen er med denne Arbejdsstyrke ca. 250 tons pr. Maaned.

Kulbrydningen foregaar i det store og hele syd for Hovedgangen. Der forefindes her ca. 4000 tons brydefærdige Kul, men det er umuligt at sige, hvor stor en Del af disse, der kan tages. Formand Wiberg mente for kort Tid siden, at der maaske kan blive Tale om at faa omkring 3000 tons, men nævnede naturligvis dette Tal med alt muligt Forbehold.

. . . . . .

Der er naturligvis et stort Ansvar forbundet med at fortsætte Kulbrydningen under de nuværende Forhold. Minens Drift er for Tiden organiseret saaledes, at dette Ansvar næsten udelukkende falder paa Formand Wibergs Skuldre. Wiberg er en meget besindig Mand med mange Aars Erfaring som Minearbejder. Han har ledet det daglige Arbejde i Rangaboin, siden denne Mine blev aabnet for ca. 10 Aar siden.

. . . . . .

For mit eget Vedkommende ønsker jeg at udtale, at det kun er den herskende Mangel paa Brændsel, de høje Brændselspriser og Muligheden for at bjerge for Tiden uerstattelige Materialer, særlig Skinnemateriel, der gør, at jeg mener, at fortsat Drift trods alt bør overvejes. Hvis de nævnte Forhold ikke var til Stede, vilde jeg anbefale øjeblikkelig Lukning af Minen.

. . . . . .

4. *Kulbrydning i Fremtiden.*

. . . . . .

Saafremt man fortsat skal skaffe Kul fra Rangaboin, vil det blive nødvendigt at gøre to nye Indslag syd for Revnen, saaledes som antydet paa Kortskitsen. Fra det nærmeste af disse Indslag, ca. 200 m fra det sydligste af de eksisterende Indslag, kan der ret hurtigt opnaas Forbindelse med den sydlige Del af det nuværende Brydningsomraade, hvor der vides at være ganske gode Kul.

Terrænforholdene er særdeles velegnede for Indbringelse af Indslag paa de viste Steder, idet Skraaningen under Hammeren er kort og stejl. Man maa imidlertid regne med en Udgift af 10—12000 Kr. pr. Indslag, og man kan ikke vente, at de nye Indslag bliver ydedygtige før om 5—6 Maaneder.

5. *Videre Undersøgelser.*

Jeg skal slutlelig anbefale, at man søger at faa Forholdene i Rangaboin undersøgt af en Minegeolog, saavel med Henblik paa fortsat

Drift i de farlige Omraader, som paa eventuel ny Drift i Omraader syd for Revnen.«

9. oktober sendi løgtingsformaðurin eftir samtykt fíggjarnevndarinnar soljóðandi telegram til formann Wiberg:

»Fíggjarnevndin hevur fingið frágreiðing frá Ejrnæs um viðurskiftini við minuna í Rangabotni stop Eftir hesi frágreiðing er broyting í skipanini neyðug stop Bræv fyrsta farl steðgað eftir hesum.«

11. oktober varð skrivað bræv frá fíggjarnevndini til Wiberg og rakstrarráðið og sent teimum frágreiðing frá verkfrøðinginum. Í brævinum greiðir nevndin frá, at hon hevur biðið um sum skjótast at fáa sakkønan mann úr Brellandi at granska viðurskiftini, so vónandi kann frásøgn frá tilíkum manni fáast um fáar vikur. Nevndin biður teir síggja burtur frá tí endamáli, at fáa kol til vegar, uttan so at tað kann gerast uttan vanda fyri arbeiðisfólkið. Nevndin biður Wiberg bjarga mest møguligt av teim virðum, har eru, t. d. skinnarar, um tað verður úrslitið, at grefsturin verður niðurlagdur, eins og Wiberg verður umbiðin at royna at halda minuna opna, til hin sakkøni maðurin kemur. Fíggjarnevndin kann ikki taka ábyrgd fyri vandanum, men biður Wiberg skipa fyri, um tað skal verða arbeitt, hvar arbeitt skal verða, og hvat arbeiði hann heldur tað vera forsvarligt at gera.

Wiberg verður umbiðin at vísa hvørjum arbeiðara frágreiðingina frá verkfrøðinginum og siga teim frá, hvat nevndin hevur framhildið.

Nevndin hevur fingið rakstrarrokuskap fyri kolaframleiðsluna, ið vísir, at undirskotið fyri september er kr. 10.500,24 og fyri oktober kr. 2764,16. Hetta er væl betri úrslit enn mánaðarnar frammanundan; eisini hevur nevndin fingið at vita, at november sýnist at verða enn betri. Nevndin heldur tí, at tað eigur at verða hildið fram við rakstrinum sum higartil, tó við tí fyrivarni, sum áður er nevnt um vandan fyri arbeiðararnar.

Ein minniluti (P. M. Dam og Kr. Djurhuus) heldur, at tað ikki hevur verið beint, tá arbeiðið við at sefa á fjallið á einum nýggjum staði hevur verið steðgað í beyst. Minnilutin heldur ikki, vandin er størri enn tað, sum kann henda í kolaminum, og at tað, tá ið varliga er farið fram, eigur at verða hildið fram við hesum arbeiði, sum varð mett at kosta um 6.000 kr. aftrat; Minnilutin setur uppskot samsvarandi hesum. Johan Poulsen setur einki uppskot fram.

Nevndarlimur Kr. Djurhuus hevur sagt nevndini frá, at hann hevur verið í brævaskifti við verkfrøðing Marstrander, sum fyrr hevur verið við minuna í Rangabotni, men nú í Alaska. Hann hevur skrivað til henda verkfrøðing um viðurskiftini, soleiðis sum tey eru farin fram í summar, og ger nevndina kunnugt við, at tað er komið soljóðandi svar telegrafisk gjøgnum danska sendimannin í Washington:

»Foranlediget Brev fra Djurhuus ønsker Henning Marstrander for Tiden Alaska meddelt han anser det ødelæggende for Kulgruben nedbryde nogen af Pillerne mellem eller paa Siderne seks paralelle Hovedmineindgange stop er eventuelt villig atter modtage Ansættelse ved Minen.«

Sum støðan er, heldur nevndin ikki, tað er beint at gera tiltak til at fáa henda verkfrøðingin til Føroyar, men heldur, at tað tó hvussu

er eigur at verða steðgað eftir ti sakkøna manni, sum tað er biðið um at fáa, og síðani at lata landsnevndina taka stoðu, tá hansara ummæli er komið.

Øll nevndin er samd um, at kolamálið í sínu heild má verða latið landsnevndini upp í hendi, og at tað, til ommur avgerð liggur fyri má verða farið fram eftir tingsins samlykt í eykatingsetuni í apríl 1943, og tað sum er framført í hesum álitti.

Koladrift í Líðarhaga: Útsendingar fyri sóknarstýrið, driftsráðið fyri kolavirkið og jarðaeigararnar í Trongisvági hava verið til samráð við figgjarnevndina um at taka upp kolagrefstur í Líðarhaga, í fjallinum norðan fyri Trongisvágsdal.

Fyri at fáa henda kolagrevstur í lag er neyðugt, at vegurin gjøgnum dalin í Trongisvági verður framhildin til tilætlaða kolanám. Um helvtin av hesum vegstrekki, ið talan er um at gera, gongur í gjøgnum uppdyrkingarlendi. Eisini kann tað viðmerkjast, at um avgerð seinri verður tikin um at leggja vegin Tvøroyri—Hvalba gjøgnum fjallið við tunnil, so kann heila hetta vegastrekki verða nýtt sum partur av hesum vegi.

Tað er vorðið nevndini kunnugt, at tað er møguligt hjá jarðaeigarunum og arbeiðarunum at fáa neyðturvuligan figgjarligan studnað til henda grevstur, upp til kr. 70.000.— uppá heilt lagaligar treytir. Nevndin heldur eisini, at ein tílíkur grevstur kann hava beint nógv at týða fyri plássið í komandi tíðum.

Við at kanna eftir, hvussu nógvan pening Froðbøar kommuna hevur tøkan til vegagerð, er komið fram, at hann, tá ein undantekur tað, sum er játtað til vegin Øravík—Hovs, skuldi verið um leið nokk til henda veg, til kolanámið. Nevndin heldur tað vera beint at geva Froðbøar sóknar kommunu loyvi til at nýta vegapeningin til bygging av hesum vegi. Nevndin setur fram uppskot samsvarandi, og soleiðis, at um tað skuldi víst seg, at peningurin verður ov stuttur, at so landsnevndin av tingsins eykapeningi til vegir kann játta tað, ið órestar.

Uppskot:

I. *Øll nevndin:*

1. Vísandi til tað í álitinum framførda verður kolamálið í sínu heild givið landsnevndini uppí hendur til at taka avgerð tingsins vegna, og til at játta tann pening, sum tørvur er á, fyri at kolaraksturin kann geva landinum mest gjørligt av koli.
2. Løgtingið játtar, at Froðbøar kommuna nýtir tann til vegagerð í sóknini játtaða pening fyri 1942/44 — játtanin til Øravíkar—Hovsvegin tó undantikin — til framhald av vegnum inn í Trongisvágsdal til tað í álitinum umrødda kolanám.

II. *Minnilutin* (P. M. Dam og Kr. Djurhuus):

Løgtingið samtykkir, at baldast skal fram við tí seinasta vetur byrjaðu innhøgging.

2. viðg. 2. dec. 3. viðg. 7. dec. Uppskot minnilutans aftarfikið. Nevndaruppskotið samtykt 24—0.

11. Prístalsútrokning.

Frl. 13. sept. 1. viðg. 16. sept.

Álit (sí skj. 9):

2. viðg. 6. dec. og 7. dec. 3. viðg. 7. dec. Minnilutauppskotið fall 11—0. Meirilutauppskot A § 1 samtykt 24—0. § 2 fall 12—0. B 1 a samtykt 13—0, 1 b fall 10—0, 2 fall 11—0. 3—4 samtykt 13—0. C samtykt 21—0. D 23—0. E 14—0.

---

12. Vanlukkutrygging av ítróttafólki.

Frl. 13. sept. 1. viðg. 16. sept.

Álit (4. nov.):

Ítróttasamband Føroya hevur við skrivi tann 9. september 1943 vent sær til tingið við áheitan um, at ítróttafólk verða vanlukkutryggjaði, so at vanlukknr, ið henda undir venjing og stevnum, geva eins nógv í endurgjaldi, sum kær, ið henda undir vanligum arbeiði.

Felagið sigur frá, at hetta málið hevur fleiri ferðir verið frammi á aðalfundi í felagnum, og tað hevur verið royni at fáa eina skipan, men uttan úrslit; felagið sigur tó einki um, hvørjar royndir tað hevur gjørt.

Málið er beint í yvirsamálanevndina, sum fyrst hevur fingið til vegar gjøgnum tryggingarfelagið »Trygd« upplýsingar um, hvussu hetta kundi skipast í danskum tryggingarfelag undan krígnum. Fyri fótbolt kundi eitt felag tekna trygging soleiðis, at ársgjaldið varð útroknað eftir hesum stigum:

Hvørjar	1.000,— kr. endurgjald fyri deyða	ársgjald	kr.	0,40	fyri	limin.
»	1.000,— kr. fyri avlamisendurgjald	»	»	0,60	»	»
»	1,— kr. í dagpening	»	»	4,50	»	»

Nevndin skrivaði so til tryggingarsambandið »Føroyar« og spurdi, um tað kundi átaka sær tílíka trygging og so endurtryggja fyri ein part her í Føroyum hjá »Trygd« og Vanlukkutryggingini. Felagið hevur svarað aftur við skrivi tann 1. oktober, at teir gera rannsóknir í Bretlandi um, hvussu hetta land skipar seg við trygging av ítróttafólki, og at teir vilja koma aftur til málið, tá svar er komið úr Bretlandi.

Nevndin beldur ikki, tað kann ventast, at tílíkar upplýsingar koma til vega undir hesu tingsetuni, men rokar við, at tað man fara at bera til hjá tryggingarsambandinum at fáa tílíka trygging í lag. Nevndin skal tí mæla tinginum til at samtykkja at biðja ítróttafelagið samráðast við tryggingarsambandið.

Sjálvsagt vil tað kosta nakað av peningi at skipa tílíka trygging, men nevndin heldur, at hetta lætt kann skipast av teim ymiska felogum, tá teir eina ella tvær ferð um árið halda stevnur, serliga til at skaffa pening til hetta, tí tá má roknast við, at fólk fjølment vil koma til staðar.

Uppskot:

Ítróttasambandinum Føroyar verður sent eintak av hesum áliti, og verða teir bidnir um at taka upp samráðingar við tryggingarsambandið »Føroyar«.

2. viðg. 6. nov. Samtykt 21—0.

---

13. Endurgjald fyri vindskaða.

Frl. 13. sept. 1. viðg. 16. sept.

Álit (24. sept.):

Gunnar Joensen, fiskimaður, í Árnafirði, hevur við umsókn, dagsett tann 5. april 1943, vent sær til landsnevndina um at fáa eina studning vegna tað, at hann í ódnarveðri seinasta velur hevur verið fyri tí óhappi at missa av vindi eini handilshús, 10 byrðar av hoyggj, øll eplir, 16 skinn, 3 sildagørn, 6 linur og nógv annað amboð. Samstundis sigur hann frá, at hansara setshús fóra ógvuliga illa, og at eitt framanmanfar knústist.

Landsnevndin hevur tann 7. juni 1943 viðgjørt málið og samtykt at svara, at hon ikki hevur pening at ráða yvir til at veita tílíkan studul. Handa støða frá landsnevndini er bein, og kann nevndin einmælt ásanna hesa samtykt.

Umsøkjarin hevur nú lagt málið av nýggjum fyri tingið, og leggur hann aftrat, at skaðan kann hann í minnsta lagi seta til 18000 kr., síðan at hann ikki á nakran hátt er fornr fyri at endurnýggja tað stóra tap, og at hann vónar, tingið kann hjálpa, tá tað ikki er ofta at so stórur vindskaði rámar einstakling.

Tað kann eisini viðmerkjast, at umsokjarin sigur frá, at tað fleiri ferðir brustu spreingiknøttar í Árnafirði næst seinasta velur, og at hann hevði verið varur við, at grundin undir pakkhúsinum var klovnað, tó at hann ikki beinleiðis kann siga, at betta er komið av teimum nevndu spreingingum

Flggjarnevndin hevur viðgjørt málið, og skal framhalda, at tann støða, tingið má taka til tílíkar umsóknir, má verða tann, at tá maður kann tryggja seg móti einum vanda, kann hann ikki vænta at fáa hjálp frá tí almenna, um hann ikki hevur ansað eftir at fingið trygging í lag. *Føroya Brunatrygging umfatar eisini skaða av vind og veður*, og hesin vandi, sum Gunnar Joensen nú er raktur av, kundi soleiðis verið tryggjaður. Tað er tó nevndini kunnugt, at fólk flest ikki eru varin við, at tílíkur vandi kann tryggjast, og setur tí uppskot fram um,

at hetta verður gjørt fólki kunnugt, so tey vita, at um skaði kemur, so mugu tey sjálv standa til svars, um eingin trygging er fyrireikað.

Við tað at nevndin gongur út frá, at Gunnar Joensen ikki var varin við tað nevnda trygging, og við tað at nevndin ikki kann síggja heill burtur frá tí møguleika, at spreingiknøttar árið fyri kunnu hava givið húsinum fyrsta mein, setur hon uppskot til tingið um í hesum máli at geva umsøkjaranum ein studning frá tí almenna, sum hóskandi kann setast til 2.000 kr. Peningurin verður at útgjalda úr amtsgrunnínum av peningi, játtaður til skaðabøtur.

Uppskot:

1. Tað verður veittur Gunnar Joensen, Árnafirði, ein studningur uppá 2.000 kr. fyri vindskaða seinasta vetur. Peningurin verður móti hansara kvittan goldin úr amtsgrunninum á konto »skaðabøtur.«
2. Løgtingsskrivstovan verður biðin um at fyrireika, at tað verður kunngjørt — antin frá skrivstovuni ella frá Føroya brunatrygging — at skaði av vind og veður kann tryggjast, soleiðis at ótryggjaður skaði ikki kann væntast at verða styðjaður av Føroya Løgtingi.

2. viðg. 29. sept. 3. viðg. 5. okt. Samtykt 17—0.

---

14. Føroyskt flagg.

Frl. 14. sept. 1. viðg. 16. sept.

Uppskot (24. sept).:

Spurningurin um tað føroyska flaggið góðkennt sum Føroya flagg er í ár borin fram á ting av Fólkaflokkinum. Málið er beint í ymsamálanevndina, sum seinri vil gera uppskot um at lógfesta flaggsins rættindir her á landi.

Ein meirilutí (Thorstein Petersen og R. Rasmussen) skal tó longu nú taka upp spurningin um tingsins nýtslu av føroyskum flaggi á tinghúsinum. Reglurnar, sum nú eru í gildi vórðu samtyktar í 1938 (sí løgtingstíðindi síðu 221), men vit mugu halda, at hetta ikki er beint, nú okkara flagg veitrar á hvørjum skipi, sum siglur vandasjógv; tað flagg, teir sigla undir, eiga vit at heiðra við at geva tí fremsta pláss á okkara ogn. Vil seta tí fram uppskot til nýggja reglugerð soleiðis, at um tað ikki skuldi eydnast at fáa meirilutaa fyri fyrsta uppskoti, at so annað kann koma til atkvøðugreiðslu.

Ein minnilutí (O. F. Joensen) ger ikki nakað uppskot, men vísir á støðu sína í tingsetuni 1938.

Uppskot:

Frá meirilutanum:

Principalt:

Føroya løgting samtykkir hesa reglugerð fyri flagging á tinghúsinum:

1. Á flaggstongina á tinghúsinum skal einans vindast føroyskt flagg.
2. Flaggstongin á vøllinum skal nýtast á henda hátt:

   a) Á vanligum flaggdøgum, sum eru hesir:

   Nýggjársdagur,
   Langafríggjadagur til kl. 15 á hálvari stong,
   1. páskadagur,
   1. hvítusunnudagur,
   1. jóladagur,
   25. apríl, flaggdagurin,
   29. juli, Olavsøkudagur,
   31. december á hálvari stong fyri sjólatnum,
   skal føroyskt flagg vindast á stongina á vøllinum.

   b) Danskar flaggdagar, sum eru hesir:

   11. mars, føðingardagur Friðriks krúnprins,
   5. juni, danski grundlógardagurin,
   15. juni, Valdemarsdagurin,
   26. september, føðingardagur Christians kongs X,
   24. december, føðingardagur Alexandrinu drottningar
   skal danska flaggið vindast á stong á vøllinum.

   c) Um tað av tingsins umboði verður samtykt at flagga til heiðars fyri einumhvørjum utlanlandahendingum, verður stongin at nýta sum gestastong, og flaggið hjá tí fremmanda landinum at vinda á stong á vøllinum.

3. Verður flagg vundið á stong eftir reglunum í gr. 2 á vøllinum, skal føroyska flaggið altíð vindast á stong á tinghúsinum.

Subsidiært:

Stongin á tinghúsinum verður niðurtikin. Tá tingið flaggar, er tað við føroyskum flaggið á stongini á vøllinum.

Álit (26. nov.):

Meirilutin (Thorstein Petersen og Rasmus Rasmussen) skal, vísandi til uppskot til tingsamlykt frá nevndini dagsett 24. september 1943, viðmerkja, at síðan, aftaná at eingin stjórnarbroyting kom í lag, er vorðin soleiðis, at meirilutin ikki í hesi tingsetuni setur nakað uppskot fram um við lógarreglu at áseta rættindini hjá tí føroyska flagginum sum landsins flagg.

Flaggsins rættur á landi eigur at verða loystur, so langt sum tað er gjørligt. Vit taka tí hervið okkara uppskot frá 24. september 1943 aftur, og skulu vísa á teir spurningar, sum vit halda tað er gjørligt nú at loysa, og seta fram nýtt uppskot um hetta.

Frá tingsins ognum eigur Føroya flagg at veittra. Frá teimum stovnum, sum Føroya løgting letur tann peningaliga stuðul til, má tað eisini verða sjálvandi at landsins flagg veittrar. Her skal nevnast telefonstøðir runt landið, ið eru tingsins ogn, bróstsjúkrahúsið í Hoydølum og sjúkrahúsini. Meirilutin heldur eisini tað er sjálvandi at ognir hjá kommununum, so sum skúlar, eiga at flagga við føroyskum flaggi, men til tað verður ásett við lóg, heldur meirilutin at tað má verða sóknarstýrini og býráðið, sum mugu taka avgerð um hetta. Tó vilja vit seta fram uppskot um, at tingið heitir á sóknarstýrini og býráðið um at taka henda spurning til umhugsunar.

Fyri løgtingsbúsið skulu vit seta fram uppskot um, at stongin á húsinum verður niðurtikin, og at tað einans verður flaggað við føroyskum flaggi á stongini á vøllinum.

Í tingsetuni 1942 (sí tingtíðindi 1942, s. 237) varð tað samtykt, at Føroya Løgting sýnir Føroya sjólatnu synum landsins tøkklæti, heiður og djúpastu virðing við ein serligan dag í árinum at draga føroyska flaggið á hálva stong. Samstundis varð givið landsnevndini í hendi, at samráðast við sjóvinnufelagini um valið av hesum tignardegi. Fyri 1942 varð tað samtykt at flaggast skuldi nýársaftansdag. Einki er fræett frá samráðingunum sum tingið álegði landsnevndini at halda, og meirilutin skal tí seta fram uppskot um at tað verður sama dag sum samtykt av tinginum í fjør.

Uppskot:

1. Føroya løgting samtykkir, at flaggstongin á tinghúsinum verður niðurlikin, og at stongin á vøllinum einans verður at nýta, tá tingið flaggar.
2. Løgtingið samtykkir, at Føroya flagg verður nýtt av Føroya løgtingi, av telefonstøðum runt landið, ið eru tingsins ogn, av bróstsjúkrahúsinum í Hoydølum, av sjúkrahúsinum í Tórshavn og Klakksvík og á Tvøroyri, og annars á øllum tingsins ognum á vanligum flaggdøgum.
3. Tingið áttalar, at tað heldur tað vera beint, at aðrar Føroya almenna ognir enn tingsins nýta føroyskt flagg, og heitir á sóknarstýrini, býráðið og aðrar um at taka hendan spurningin til umhugsunar.
4. Tingið samtykkir, at flaggað verður á hálvari stong nýársaftansdag fyri at sýna Føroya sjólætnu synum landsins tøkklæti, heiður og djúpastu virðing.

Broytingaruppskot (30. nov. frá A. Samuelsen o. fl.):

Í uppskotinum frá meirilutanum (Thorstein Petersen og Rasmus Rasmussen) pt. 4 verður orðið »nýársaftansdag« strikað og í staðin verður sett »livønu miðføstusunnudag«.

Broytingaruppskot

frá Ole Jacob Jensen og fl.:

I staðin fyri »nýggjársaftansdag« verður sett »Allahalgunnasunnudag«. Henda samtykt fær gildi frá 1. nov. 1944.

2. viðg. 27. nov. 3. viðg. 1. dec. og 2. dec. Pt. 1, 2 og 3 samtykt 16—0. (Ja atkvóðu: Poul Petersen, P. M. Dam, J. Paturssou, J. F. Kjølbro, Robert Joensen, Rasmus Rasmussen, Richard Long, J. P. Henriksen, J. H. Daubjørg, O. J. Jensen, Johs. Slættenæs, Anth. Sørensen, Pauli Dahl, Samuel Ellefsen, Jacob Fr. Øregaard, Thorstein Petersen. Davidsen burtur). Broytingaruppskot frá A. Samuelsen o. fl. til pt. 4 samtykt 13—0 og pt. 4 so broytt samtykt 20—0.

Mótmæli (2. dec.)

frá Sambandsflokkinum:

Ved den i Dag i Lagtinget foretagne Afstemning er det vedtaget, at Lagtingshusets Flagstang, hvorpaa Dannebrog har vajet paa alle Flagdage i henimod Hundrede Aar, skal nedtages for bestandig, og at den paa Lagtingsplænen opstillede Flagstang kun skal flagge med det nu af adskillige benyttede færøske Flag. Dermed er dansk Flag — det fornemste Symbol paa Færøernes Samhørighed med Danmark — paa den mest stødende Maade fjernet fra Lagtinget, Øernes lokale Folkerepræsentation. —

Sambandspartiets Lagtingsmænd maa i dyb Sorg herover nedlægge en harmfulg Protest mod den vedtagne Beslutning, som ikke har Tilslutning hos Flertallet af Færøernes Befolkning, og vi føler os pinlig berørte og skamfulde over det saaledes passerede.

Vi forventer, at det færøske Folk, som ikke alene indenfor vort Parti, men ogsaa udenfor dette, tæller trofaste danske Statsborgere, vil slutte sig til vor Protest mod Fjernelsen af Dannebrog, som stadig er det eneste lovlige Flag i samtlige danske Rigsdele, altsaa ogsaa paa Færøerne.

---

15. Nýtt løgtingshús.

Frl. 14. sept. 1. viðg. 1. okt.

Álit (2. nov.):

Spurningurin um nýtt løgtingshús er komin til viðgerðar á tingi í ár eftir áheitan frá Fólkaflokkinum (radikalt sjálvstýri) og teimum monnum, sum eru í valfelag við henda flokk.

Seinast, hesin spurningur var til viðgerðar á tingi, var í 1938 (sí tingtíðindi skjal 14 E), og var tá talan um at byggja eitt nýtt tinghús við plássi til rættarhøll, skrivstovur o. a. soleiðis at staturin skuldi lata helvtina av byggikostnaðinum tó ikki útyvir 75.000 kr. Hetta kom vegna burdagan onganlið til endaliga viðgerð.

Í 1937 varð útvegað tekningar og kostnaðarætlan til eitt nýtt løgtingshús, og eisini fyrr hava tílíkar tekningar ligið fyri; men tað má sigast at vera ógvuliga ivingasamt, um hesar tekningar nú kunnu nýtast, í hvussu so er uttan stórar broytingar.

Tað eru her á landi so nógvir almennir stovnar, almennar skrivstovur, at arbeiðið verður av tungført, um tað ikki verður fyrireikað soleiðis, at alt ulment virki, ella ið hvussu so er tað nógva av tí, húsast í sama bygningi. Eisini má nevndin halda, at tað er beint at fáa til vegar eitt prýðiligt hús fyri tingsins almenna starv, nú hetta hevur fingið so nógv størri týduing enn fyri einum mannaminni síðani.

Nevndin er samd um, at tað er ikki gjørligt at fáa sett bygging á stovn í ófriðartíðini vegna trot av tilfari, men má halda, at all eigur at verða lagt soleiðis til rættis, at tað beinanvegin, tíðirnar verða annarleiðis, kann verða farið undir at seta hetta í verk. Tað fyrsta verður tí at áseta, hvørjar skrivstovur, ið skulu hava til húsa í einum nýggjum húsi, og síðani at útvega hóskandi tekningar og fáa gjørt av, hvar húsið skal liggja og tingast um grundina. Hetta arbeiði eigur landsnevndin at fara undir, soleiðis at úrslitið kann leggjast fyri fyrstkomandi tingsetu.

Heilt er á tingið um at seta á stovn ein byggigrunn til hetta endamál, men skal nevndin her vísa á, at hon í einum øðrum máli hevur mælt tinginum til at stovna »løgtingsins tiltaksgrunn«, og heldur, at tað verður ein av uppgávunum hjá hesum grunni at goyma neyðturviligan pening til hetta endamál, uttan at tingið beinleiðis nú sigur, hvussu nógv skal fara til hetta.

Nevndin setur so stati fram hetta

Uppskot:

Landsnevndin fær upp í hendi at fara undir at kanna eftir, hvørjar skrivstovur mugu ætlast at skulla verða til húsa í einum nýggjum løgtingshúsi. Síðani verður givið landsnevndini upp í hendi at útvega hóskandi tekningar við kostnaðarætlan, og at tingast um best hóskandi pláss til nýtt løgtingshús, og leggja hetta fyri fyrst komandi tingsetu.

2. viðg. 4. nov. Samtykt 19—0.

---

16. Alment lýsingarblað.

Fr. 14. sept. 1. viðg. 2. okt.

Alit (3. dec.)

Eftir ábeitan frá Fólkaflokkinum (radikalt sjálvstýri) og teimum monnum, sum eru í valfelag við hendu flokk, hevur tingið í hesari

tingselu tikið til viðgerðar málið um eitt serstakt alment lýsingarblað fyri Føroyar.

Hesin spurningur hevur verið fleiri ferðir fyr til viðgerðar á tingi og skal her verða vist til samtyktina í 1937 (sí tingtíðindi 1937 síðu 222—225). Henda samtykt varð send stjórnini í Danmørk, og sum tað sæst av viðgerðini í 1938 (sí tingtíðindi 1938 síðu 219—221) hava fýra av stjórnarskrivstovunum sagt seg at vilja vera við til at fremja hesa skipan. Tingið samtykti so í 1938 eitt annað uppskot enn í 1937, og málið kom aldrin viðari.

Tá ið ófriðarviðurskiftini rakti við okkara land, vóru reglurnar um kunngering av lógum í danska statstíðindinum, sí lóg nr. 51 av 1. apríl 1896, ikki meira nýtandi her í Føroyum. Málið kom tá til viðgerðar á tingi (sí tingtíðindi, eykaseltan apríl 1940, síðu 11—13) og hendi tá, at eitt uppskot frá einum minniluta (fólkaflokkinum) fall, meðan »Midlertidige Bestemmelser for Færøerne om Kundgørelser Nr. 2. af 9. Maj 1940« vórðu samtyktar.

Ein meirilutí (R. Long, J. Paturssón, P. Petersen og Th. Petersen) má halda, at tað er ikki beint, at eitt politiskt blað skal hava einkarrætt bæði til at vera alment lýsingarblað (sí kunngering av 10. juli 1879) og kunngeringartíðindi (sbr. nevndu kunngering av 9. mai 1940). Tað finnast fólk her á landi, sum fegin vilja hava greiðu á, hvørjar lógir, ið her skula galda utan at tey hava hug til at vera haldarar av, og soleiðis styðja eitt einstakt politiskt blað. Serliga í hesi broytingartíð, har tað politiska orðaskiftið í bløðunum ofta er heldur harðligt, tykist henda skipan meirilutanum ikki at vera bein.

Meirilutin skal tí seta fram uppskot um at skipa fyri einum nýggjum blað, sum undir navninum »alment lýsingartíðindi« lekur við tí starvi, sum higartil hevur verið hjá »Dimmalætting«.

Minniluti (P. M. Dam, Kr. Djurhuus og A. Samuelsen) setur ikki fram uppskot í málinum.

Uppskot:

Midlertidige Bestemmelser for Færøerne

om Udgivelse af en Kundgørelsestidende.

§ 1.

Kundgørelsen af Lovforskrifter, Anordninger, Bekendtgørelser og lignende skal herefter ske i en Kundgørelsestidende, der ved Lagtingets Landsnevnds Foranstaltning udgives under Navnet »Alment lýsingarblað.«

§ 2.

De Retsvirkninger, der efter Lovgivningen hidtil har været knyttet til Offentliggørelse i Statstidende, indtræder indtil videre for Færøernes Vedkommende ved tilsvarende Offentliggørelse i det af Lagtinget udgivne »Alment lýsingarblað«.

§ 3.

»Alment lýsingarblað« autoriseres herved til Optagelse af retslige og andre Bekendtgørelser, som skulde offentliggøres ved Indrykkelse i en Avis paa Færøerne.

§ 4.

Det fastsættes ved en af Landsnevndin udstedt Bekendtgørelse, til hvilke Takster »Almeut lýsingarblað« er pligtigt til at optage Bekendtgørelser, og hvorledes Distributionen skal ordnes ved Abonnement og Frieksemplarer.

§ 5.

Foranstaaende Bestemmelser træder i Kraft fra 1. Februar 1944 at regne, og samtidig ophæves den Bladet »Dimmalætting, Amtstidende for Færøerne« meddelte Autorisation, samt § 1 i Lov Nr. 51 af 1. April 1896 og Midlertidige Bestemmelser Nr. 2 af 9. Maj 1940.

2. viðg. 4. dec. 3. viðg. 7. dec. Fall 12—0.

---

17. Føroysk frímerkir.

Frl. 14. sept. 1. viðg. 2. okt.

Álit (3. dec.):

Hin føroyski Fólkaflokkurin og Sjálvstýrisflokkurin á tingi hava við skrivi av 14. september biðið tingið um at taka til viðgerðar spurningin um føroysk frímerkir.

Hetta mál hevur fleiri ferðir fyrr verið til viðgerðar á tingi og skal verða víst til tingtíðindi 1940, skjal 35, har greitt er frá viðgerðini í farnum árum.

Í 1940 var støðan tann, at ell roknaðu við, at tað máttu fara at verða neyðugt at skaffa til vegar nýggj frímerkir, tí aftaná 9. apríl 1940 kundi ein ikki rokna við at fáa frímerkir úr Danmørk, sum vant var. Ein meirilutí í nevndini setti fram hetta uppskot, sum varð samtykt:

> »Tingið mælir til, at tey frímerkir, sum postskipan her á »landi óivað av kríggsumstøðunum verður noydd til at lata »prenta, verða gjørd við føroyskari mynd á.«

Um veturin 1940/41 komu nøkur yvirstemplaði dansk frímerkir til brúks í Føroyum, men síðani var aftur farið til at nýta dansk frímerkir, sum sigast at vera komin úr Danmørk um Schweiz. Nýggj føroysk frímerkir eru ikki komin eftir hesi samtykt. Tað liggur heldur einki fyri tinginum um, hvussu nú stendur til við frímerkjum í landinum.

Meirilutin í nevndini (R. Long, J. Paturssøn, P. Petersen og Th. Petersen) skal viðmerkja: Vit halda tað verða skeivt alboriið tá nevndu tingsamtykt fyrilá, og tað ikki var farið undir at prenta før-

oysk frímerkir beinan vegin, soleiðis at ein var vissur í, at spurningurin ikki kom fram aftur, meðan bardagin stóð á, men hetla er nú farið aftur um bak.

Um postskipanina her á landi vita vit sum løgtingsmenn einki. Eingin kunngerð er komin til tingið um, hvussu til stendur, heldur ikki um, hvørvítt frímerkjaspurningurin er átroðkandi í løtuni.

At spurningurin skjótt kann koma at fyriliggja, halda vit okkum at kunna lesa úr blaðnum »Frit Danmark« nr. 44 fyri 5. november 1943, har stendur hetta grein:

»Færøske Frimærker?

»Det er iøvrigt paa Lagtinget i Thorshavn fremsat et »Forslag om at trykke særlige færøske Frimærker. Den Beholdning af danske Frimærker, der er paa Øerne, vil være op»brugt i Begyndelsen af 1944.«

Um so er, at hetta er beint, so má meirilutin viðmerkja, at tingsamtyktin frá 1940 má haldast at standa við gildi, soleiðis at vit tá fán føroysk frímerkir. Annars lekur meirilutin ta støðu, at tað beinasta hevði verið, at tingið átók sær ábyrgdina fyri postskipanina her á landi og fór at geva út føroysk frímerkir, eins og at skjøl og oyðibløð í postsambandinum vórðu orðaði á føroyskum máli. Tá tað ikki er nøkur vón um, at hetta kann fáast í lag í hesi tingseta, vil meirilutin ikki sela fram uppskot um hetta, men vil skjóta upp, at landsnevndini verður álagt at tingast við postverkið um, hvussu stall er við frímerkjum, og síðani fáa skipað soleiðis, at trot av frímerkjum verður bøtt um við føroyskum frímerkjum.

Minnilutin (Kr. Djurhuus og A. Samuelsen) setur einki uppskot fram.

Minnilutin (P. M. Dam) vísir á støðuna, sum javnaðarflokkurin hevur tikið í frímerkjaspurninginum, tá hesin spurningurin áður hevur verið á tingi.

Soleingi sum postlagið her á landi er hjá stáli, liggur frímerkjagerðin á stálinum.

Men minnilutin heldur tað filatelistaliga og tjóðskaparliga og fyri stálin innløkuliga vera av stórum lýdningi, um vit fingu serlig føroysk frímerkir.

Minnilutin loyvir sær tí at sela uppskot um at mæla til, at frímerkir og ymisk frígeringarmeðal verða gjørd í føroyskum skapi.

Uppskot:

Frá meirilutanum (R. Long, J. Paturssson, P. Petersen og Th. Petersen):

Landsnevndini verður givið uppí hendi at samráðast við stýrið fyri postskipanina um støðuna við frímerkjum. Vísandi á tingsamtyktina frá 1940, verður landsnevndini heimlað til tingsins vegna at gera tey stig, ið eru neyðug fyri at fáa føroysk frímerkir, og til at góðtaka úlsjónd leitra.

Frá minnilutanum (P. M. Dam):

Tá ið verður neyðugt at prenta postfrímerkir og onnur frígeringarmeðal til nýtslu í Føroyum, mælir tingið til, at hesi verða prentað í føroyskum skapi, og at avgerðin um, hvussu

verðin tey skulu verða, skal takast í samráðing millum landsnevndina og amtið.

2. viðg. 1. dec. og 7. dec. Meirilutauppskot fall 12—0. Minnilutauppskot samtykt 14—0.

---

18. Føroyskt lottarí.

Frl. 14. sept. 1. viðg. 2. okt.

Álit (2. dec.):

Tann 11. september 1943 hevur Havnar Framburðsfelag skrivað til tingið um at taka til viðgerðar málið um føroyskt lottarí. Felagið heldur fram, at hetta kundi givið tinginum eina rættiliga stóra inntøku.

Málið um føroyskt lottarí hevur fyrr verið frammi á tingi, og skal nevndin vísa til viðgerðina í 1928, 1933 og 1936 (sí tingtíðindi 1928, s. 135, skjal nr. 7, 1933 síðu 278 og 1936 skjal nr. 8 síðu 21), og varð tað við allar hesar viðgerðir samtykt lógaruppskot um at sela á stovn eitt føroyskt lottarí; men er málið kortini ikki framt.

Nevndin hevur umhugsað málið og heldur, tað hevði verið beint at lingið í lag ein happadrátt, tí tað er nógv, sum okkum tørvar at fáa gjørt, og tá vildi hesin peningur koma okkum væl við. Tingið hevur í nøkur ár játtað pening til ein finleikagrunn, men her nýlist so nógv av peningi, um allur ungdómur skal fáa ta fullu kroppsvenjing, at nevndin heldur, at peningurin fyri eitt áramál uppá 5 ár átti at verið nýttur til íttróttarsludning, og at tingið síðani avger nýtsluna fyri 5 ár í senn.

Nevndin kann mæla tinginum til at hetta verður samtykt soleiðis, at skipað verður fyri á hendan hátt:

Happadrættur í Føroyum:

10.000 lutasedlar á 20 kr.		200.000 kr.
695 vinningar	100.000 kr.	
Søluútreiðslur, stjóri o. a. 10 pct.	20.000 —	
Lýsingar, postgjald, prenting . . .	5.000 —	
		125.000 —
	Munur	75.000 kr.

Vinningarnir:

1	à 12.000 kr.	12.000 kr.
1	à 10.000 —	10.000 —
3	à 5.000 —	15.000 —
10	à 1.000 —	10.000 —
20	à 500 —	10.000 —
200	à 100 —	20.000 —
460	à 50 —	23.000 —
695	vinningar	100.000 kr.

Fimtandi hvør seðil vinnur.

Seðlarnir verða árliga seldir í november, december, januar og februar, happadráttur verður drigin í Tórshavn summarmáladag á hvørjum ári, vinningarnir kunngjørdir í lí til almennar lýsingar löggilduga blaði. Fyri 1944 verður sølan at fara fram í januar april, og dráttur verður vikudagin fyri Olavsøku. Løgtingsins vinningur verður bráktur tey fyrstu fimm árini til fimleikarhøllir, ítróttarvøllar og annan ítróttarstudning; síðani tekur løgtingið nýggja avgerð um nýtsluna. Løgtingið setur ein stjóra, sum verður løntur við $2^1/_2$ pct. av bruttosøluni; hann stendur undir landsnevndarinnar umsjón.

Tað man óivað fara at verða neyðugt at gera lógarreglur um ein tílíkan happadrátt, men fyri at áseta lógarreglurnar, mugu samráðingar fara fram um, hvussu skal verða fyrireikað við lí peningaligu tryggjan av útgjaldan av vinningum, hvørjar umsjónarreglur eru neyðugar o. a. Nevndin skal lí mæla til, at landsnevndin fær heimild til tingsins vegna at samtykkja tílíkar lógarreglur.

Vísandi til tað, ið framført er, setur nevndin fram hetta

Uppskot:

1. Tingið samtykkir at seta á stovn ein happadrátt í Føroyum, soleiðis at drigið verður eina ferð árliga og seldir verða 10000 seðlar, meðan tað verða 695 vinningar við eini peninganøgd, ið tilsamans er 100.000 kr.
2. Landsnevndin fær upp í hendi at gera nærri reglugerð fyri happadráttin, at seta stjórn og at samtykkja lógarreglur um happadráttin tingsins vegna.

2. viðg. 3. dec. 3. viðg. 7. dec. Fall 12--0.

19. Stempilgjald.

Frl. 14. sept. 1. viðg. 2. okt.

Álit (5. nov.):

Havnar Framburðsfelag heilir á tingið at samtykkja reglur um stempilgjald í Føroyum, tí helta má haldast náttúrligt og krevjandi, tá tílíkt gjald er at kalla í øllum loudum. Felagið mælir til, at lógin um stempilgjald kemur at umfata mest møguligt, t. d. eiga konossoment og kvittunar omau fyri vist mark at koma undir stempilgjaldsskylda. Tá vilja inntøkurnar fara langt upp um tað, sum ætlað varð í 1936.

Spurningurin um stempilgjald varð til viðgerðar á tingi 1936 (sí tingtíð. 1936, s. 381, tingmál: nýggjar inntøkur). Tingið samtykti uppskot til lóg um stempilgjald, ið varð ætlað at geva 25.000 kr. árliga, men sum onganlíð varð sett í gildi. Í 1938 varð uppskotið aftur samtykt á tingi. Í 1940 setti tingið eina 5-manna millumtinganevnd at viðgera spurningin saman við øðrum inntøkumálum sum formúguskatti og grundvirðisøkingarskatti. Nevndin sendi tinginum álit uttan at kunna mæla til, at hesar skattalógir verða settar í gildi nú. Henda millumtinganevndin vísir á, at stempilgjald, har tað er sett á stovn, hevur fört nógvar trupulleikar við sær, av tí at tað er ringt at áseta reglur, sum hóska í øllum førum í tí dagliga lívinum; tað hevur tí aðrastaðni fört til nógvar rættartrætir. Samstundis viðmerkir nevndin, at tann peningur, ein kann væntta sær av stempilgjaldi, sammett við tær inntøkur nú koma frá beinleiðis skatti og tolli, ikki vilja týða nógv peningaliga fyri tingið.

Føroya javnaðarflokkur hevur fyri tingið lagt spurningin um at samtykkja reglur um ein grundvirðisøkingarskatt á sama hátt sum í okkara granna- og frændaloudum. Sum ummælt frammanundan varð eisini hetta mál viðgjørt av millumtinganevndini í 1940/41. Eisini her fráræður millumtinganevndin at samtykkja tílíkan skatt undir teimum viðurskiftum, í dag eru í Føroyum, og vísir eisini á, hvussu lítlan fíggjarligan týdning hetta í løtuni kann ætlast at fáa fyri tingið.

Nevndin hevur hugsað um hesi mál og má framhalda, at tað ikki í eini tingsetu kann verða tíð til at fáa viðgjørt og umarbeitt lógaruppskotið um stempilgjald, ið telir 55 greinir. Líkaleiðis má tað kannast væl eftir, hvørjar reglur tað almenna kann seta í verk um grundvirðisøkingarskatt.

Nevndin er sannd um, at hesi mál eiga at verða framd, so skjótt tað er gjørligt, men kann vísa til, at tað er ógvuliga trupult at taka hesar spurningar upp, so leingi bardagatíðir eru. Tílíkar lógir vilja føra við sær rættartrætur, og sum tinginum kunnugt er tað, og hevur tað síðani 1940 verið, ógvuliga trupult at umskipa okkara rættarmálareglur, soleiðis at tað ikki kann verða beint nú at gera reglur, sum gera hesum stovni tað enn meira trupult, enn tað longu er av teimum óvanligu umstøðunum.

Nevndin heldur, tað er beint, at málið verður gjølla kannað, og at alt verður gjørt til reiðar til, so skjótt tíðir eru til tess, at seta í gildi reglur her í Føroyum eins og í okkara grannaloudum um stempilgjald og skatt á grundvirðisøkjan. Nevndin skal tí mæla til, at tað

verður givið landsnevndini upp í hendur at viðgera og fyrireika henda spurning, so hann við øllnu tørvandi upplýsingum kann verða lagdur fyri tingið.

Uppskot:

Landsnevndini verður givið upp í hendur at viðgera og fyrireika spurningarnar um stempillóg og lóg um grundvirðisøkingarskatt og at leggja fullfíggjaði uppskot fyri tingið, so uppskotini kunnu verða sett í gildi, so skjótt ófriðartíðin er at enda.

2. viðg. 18. nov. Samtykt 14—0.

---

20. Landsbanki.

Frl. 14. sept. 1. viðg. 11. okt.

Álit (27. nov.):

Hin føroyski Fólkaflokkurin (radikalt sjálvstýri) og teir menn, ið eru valdir saman við hesum flokki, hava í brævi av 14. september heitt á tingið um at taka til viðgerðar málið um stovnan av landsbanka í Føroyum. Víst verður í skrivinum til uppskot Fólkaflokksins í eykatingseluni í vár.

Við skrivi av 13. september 1943 heitir Føroya Javnaðarflokkur á tingið um at taka til viðgerðar í hesi tingsetu selan á stovn av einum løgtingsbanka við serrættindum, ið so við og við bera bankanum alt bankaarbeiði í hendi.

Málini eru víst til viðgerðar í løgtingsins fíggjarnevnd, sum hevur viðgjørt tey, men hevur býtt seg sundur í ein meirilutu og tveir minnilutar.

Meirilutin (J. F. Kjølbro, B. Long, J. Paturssen og Th. Petersen) loyvir sær at gera hesar viðmerkingar til málið:

Til 1940 fingu Føroyingar bankaseðlar úr »Danmarks Nationalbank,« men so vórðu umstøðurnar soleiðis, at hetta ikki kundi halda fram. Um heystið sama árið varð tað neyðugt at fáa fleiri seðlar í umfar, enn tað sum var frá danska bankanum, og Fólkaflokkurin setti tá uppskot fram á ting (sí tingtíðindi 1940 skjal 38) um at sela á stovn ein føroyskan seðilbanka, sum kundi taka upp starv danska nationalbankans, bæði við seðlagerð og við at hava eftirlit við heimum landsfíggjarligu viðurskiftunum. Hetta uppskot fall og í staðin samtykti tingið nakrar bráðfengis reglur um seðlagerð, har tingið gav amtinum heimild til vegna danska nationalbankan at lata prenta og sela í umfar seðlar fyri eitt virði av 2 milliónum krónum. Hesar báðar bráðfengis reglur hava verið í gildi síðani, tó soleiðis, at tær eru broyttar nakað, og nú hevur amtið heimild til at sela í umfar upp til 11 milliónir krónur av seðlum. Einki er í hesum árum gjørt fyri at hava eftirlit

við landsins peningaligu viðurskiftum í síni heild, soleiðis at tað arbeiði, sum danski nationalbankin hevði hesum viðvíkjandi liggur á láni.

Tað kann ikki sigast annað enn, at her er eitt virki, sum tað almenna hevur ábyrgd fyri at ansa eftir. Meirilutin kann nevna, at danski staturin nú undir krígnum hevur gjørt reglur fyri, at fólk kunnu seta pening inn hjá statinum og fáa rentu fyri hann; tílík tiltøk gera, at fólk fara at vísa størri sparsemi. Her í Føroyum er einki tílíkt gjørt. Tað hevur gingið toluligt hesi seinastu árini, av tí at bankar havu hildið innlánsrentuna, men í heyst er lýst í bløðunum, at sparikassin hevur sett sína rentu 1 procent niður frá 1. oktober, og hann, ið ansar eftir peningastøðuni hjá hesum stovni, vil síggja, at hetta er fyrsta tiltak, tí tað vigar ikki upp móti tí tapi, sum hesin stovnur hevur havt gjøgnum tey seinastu árini, og væntandi má tí vera at lækkanin av rentuni fer at halda fram til næsta hálvár. Her liggur ein ábyrgd hjá tí almenna, og hetta er ein av teimum nógvu tættum, sum ein landsbanki hevur til uppgávu, at ansa eftir og halda í tí lagi, sum er samfelagnum til bestar.

Ófriðartíðin hevur gjørt, at okkara peningaviðurskifti hava verið leys frá teinum í Danmørk nú í hálvfjórða ár, og tað hevur ført við sær, at tað er komið glopp millum virðið á okkara peningi og tí danska peninginum. Eitt tílíkt glopp kann ikki útjavnast, uttan at væl verður eftiransað, hvussu hetta fer fram, tí annars vil tað verða til stórran ógagn fyri land okkara. Tað er ikki gjørligt her at halda seg til bráðfengis reglur, sum beinan vegin tá samband aftur kemur við danska nationalbankan, fara úr gildi, tí tað verður ein bæði long og trupul skiftistíð, sum má fara fram áðrenn hetta kann leggjast í legu. Tað er tí ov ólrygt hjá okkum Føroyingum ikki at hava ein stovn her á landi, sum ansar eftir hesum, bæði meðan ófriðartíðin er og í tí skiftistíð, sum kemur aftaná at bardagin er endaður. Meirilutin setur tí uppskot fram um at seta á stovn tann seðilbanka, landsbankan, sum fyrr hevur verið uppskot um á tingi.

Uppskot javnaðarmanna um at seta á stovn ein løgtingsbanka kann meirilutin ikki stýðja. Fyrst má nevnast, at hesin banki ikki, soleiðis sum uppskotið fyriliggur, skal hava nakað við seðilgerðina ella varðveitslna av aflurímótivirðinum fyri seðlarnar at gera, og hetta má meirilutin halda vera ein ógvuliga týdningarmikil tátfur í samfelagslívinum. Síðani er einki ásett um, at hesin banki skal taka upp tað eftirlitsstarv, sum danski nationalbankin hevur havt eisini Føroyum viðvíkjandi; men sum síðani 1940 hevur ligið á láni, og hetta eftirlitsarbeiði leggur minnilutin stóran dent á.

At gera ein vanligan banka við tinginum sum ánara, heldur meirilutin ikki vera neyðugt í okkara samfelag í dag. Vit eiga at minnast til, at bankayrki her á landi í løtuni gevur tí almenna heilt fitlar inntøkur. Tað kann nevnast, at bankarnir í Havnini í 1942 guldu kr. 136.078 í løgtingsskatt og í 1943 kr. 121.737, og er hetta einans tað, sum verður latið í beinleiðis løgtingsskatti. Tað eigur at verða farið varliga fram fyri ikki at bróta niður tað, ein hevur, og so einans fáa nakað ógvuliga óvisst í staðin. Eisini eigur tað at vera umbugsað, at tá ið friðartíð aftur verður, fer okkara samfelagi ikki at lørva tríggjar serstakar bankar, einans til at starvast fyri okkara vanligu vinnu.

Meirilutin má eisini halda fram, at ein landsbanki, soleiðis sum vil hava skotið upp, vil geva samfelagnum møguleika til at fáa stóran mun av teimum inntøkum, sum falla av við bandil við fremmanda gjaldoyra; ein tílíkur banki verður einans at kosta heilt lítlan

parf av lí, íð ein vanligur banki kostar til dagliga drift, soleiðis at tað óivað eisini er tann vegur, sum eigur at verða gingin hjá teimum, sum hava til endamáls at fáa mest gjørligt av bankayrkinum á almanna hendur. Øllan útløgur er hetta vegurin til at fáa munnagóðan part av ágóðinum av landsins bankayrki.

Meirilutin setur uppskot um lóg um seðilbanka í Føroyum.

Ein minniluti (Kr. Djurhuus og Johan M. Fr. Poulsen) kunnu ikki, sum viðurskiftini eru, seta fram uppskot í hesum máli.

Vit kunnu ikki styðja uppskotinum frá Fólkaflokkinum um stovnan av Landsbanka (seðilbanka), eitt uppskot, sum, um tað verður samtykt, eftir okkara ætlan vil føra okkara banka- og peningaviðurskifti inn á eina leið, ið — sum frá líður — vil verða til óbótaligan skaða fyri okkum Føroyingar. Heldur ikki kunnu vit styðja javnaðarmannauppskotinum um stovnan av einum vanligum nýggjum banka. Til less er ikki tørvur í løtuni. Harafturímóti kunnu vit verið sinnaðir til at trivið í hin gamla táttin, sum slepptur hevur verið, síðani kríggið brast á, aftaná kríggið at tikið upp tingingar við ríkisstýrið um keyp av statsins aktium í Føroya Banka. Eftir okkara hugsan hevði tað verið útlit fyri einum góðum ársliti her, og vildu vit hildið hetta vera tann besta loysning av hesum máli, men sum stalt er, er hesin vegur ikki farbarur nú, og vil minnilutin tí heldur ikki seta nakað uppskot um hetta í hesi tingsetu.

Minnilutin (P. M. Dam) heldur fram: Í vár løgdu javnaðarmenn inn á ting uppskot um at seta á stovn ein løgtingsbanka við einkarrætti til alla vekslan av fremmandari valuta. Við hesari skipan vil løgtingið við og við fán alt bankavirki á sínar hendur og ognast tann ágóða, ið nú fer til privatar og fyri ein stóran part út av landinum.

Tað má haldast at vera rætt og landsgagnlig leið, at banka- og peningavirkiságóðin, ið kemur av fólksins sliti og sveitta, fellur til hitt almenna og harvið aftur til fólkið. Aftrat hesum fyrimuni er at minna á, at ein løgtingsbanki við einkarvekslingarrætti av allari fremmandari valuta, vil geva okkum atstøður og høvi til at koma at sita við lakinum á og nýtslurættinum til avlopsvalutuna og harvið kjansin til at fáa tann møguliga vinning av kursreigginum, ið hann kemur at hava, ið verður at sita við sterlingpundunum og aðrari fremmandari valuta, ið er til avlops, tá ið kríggið er at enda og møgulig nýggj peningalig skipan skal gerast.

Minnilutin tekur so stutt uppskotið frá í vár um »Oyggjabankan« uppaftur.

Uppskot:

A. Frá meirilutanum (Kjølbro, Long, Paturssoni og Th. Petersen):

Løgtingið samtykkir tað hjálagda uppskot til lóg um seðilbanka í Føroyum.

B. Frá minnilutanum (P. M. Dam):

1. Løgtingið samtykkir tey hjáløgdu uppskot um stovnan av partafelagnum »Oyggjabankin.«
2. Løgtingið samtykkir viðlagda uppskot til Midlertidige Be-

stemmelser for Færøerne om Ændring i Kundgørelse Nr. 48 af 8. December 1940 om Seddelomløb, Valutaforhold og Handel med Udlandet m. v.

2. viðg. 29. nov. 3. viðg. 3. Dec. Meirilutauppskotið fall 12—0, minnilutauppskotið 5—0.

---

21. Løgtingsprentsmiðja.

Frl. 14. sept. 1. viðg. 25. sept.

Álit (Djurhuus og Poulsen við fyrivarni):

Havnar Framburðsfelag hevur tann 11. september 1943 skrivað soljóðandi bræv til løgtingið:

»Tað er óneyðugt at undirstrika, hvønn almiklan týðning fyri skúlan, børnini og fólkið sum heild, tað vildi haft, um tær bøkurnar, ið nýttar verða í undirvísingini, hevdu verið føroyskar, ikki einans tað, at tær vóru skrivaðar á barnanna egna máli, men eisini tað, at tær vóru skrivaðar av føroyingum fyri føroysk børn. Afturat hesum kemur, at skúlabókaneyðin nú er verðin so stór, tí at bøkur ikki longur kunna útvegast, hvørki tær vóru at fáa, at hitt almenna mú taka dik á seg fyri at fáa bøtt um hesa neyðina.

Skal nakað munagott gerast við bókaútgávuna, vil tað vísa seg, at prentsmiðjurnar í landinum yvirhøvur ikki eru førar fyri at avrika meiri arbeiði enn la hlaðprenting og accidensarbeið, sum tær nú eru bundnar við. Tessvegna vilja vit skjóta uppá, at Føroya løgting setir á stovn eina prentsmiðju, sum vil verða før fyri at gera tað prentingararbeiði, ið tingið og tingsins stovnir hava við at gera, t. d. skúlabøkurnar, løgtingstíðindi, lógtíðindi, álit o. a.

Viðari er tað skilligt, at skal Føroya fólk kunna liva og menuast sum tjóð, eiga tað hvørt ár at koma fleiri bøkur út, sum málsliga og til innihalds vera góðkendar og fyri ein part ella full út kostaðar av tinginum. Hesar bøkur kunna so eisini verða prentaðar á løgtingsprentsmiðjuni.

Ísland hevur sína ríkisprentsmiðju, danski ríkisdagurin egna prentsmiðju, og tað sama er í flest øllum londum.

Ein hóskandi prentsmiðja vil í dag koma at kosta um 70.000 kr., og rokna vit við einum byrjannar pappírsupplagi uppá 20.000 kr., vil tað siga, at tingið eigur at játta 90.000 kr. til henda stovnin. Umframt eigur tingið at leggja í grunn 75.000 kr. til útarbeiðing og útgávu av skúlabókum og øðrum bókum.

Tá vil hesin týðningarmikli spurningur vera loystur, og prentsmiðjan vit óivað reiðiliga standa seg við leim inntøkum, hon kann skapa.

Vit vilja biðja tingið um við vælvild at taka hetta málið upp til viðgerðar og eru altíð til reiðar at útvega upplýsingar, sum nevndin, ið kemur at fáast við málið, møguliga kundi ynskt at fingið.«

Málið varð av tinginum heint í fíggjarnevndina, sum hevur umhugsað henda spurning.

Meirilutin (Dam, Long, Kjølbro, Patursson og Thorstein Petersen) má ásanna, at tað er spurningur sum hevur alumiklan týdning fyri okkara samfelag, at fáa prenta mest gjørligt av bókum og her serliga skúlabókum. Meirlutin skal her vísa til tingsins samtykt í 1942 (sí tingtíðindi síðu 14—15) soljóðandi:

»Landsnevndin verður heimilað at veita skúlabókagrunninum neyðturviligt rentufrítt lán og at áseta afturrindingartíðina, og annars at nýta úr amtsgrunninum pening til útgávu av skúlabókum.

Løgtingið gevur sítt besta viðmæli til, at skúlabókagrunnurin fær loyvi at innflyta neyðturvuligt papplr til prentan av skúlabókum.«

Peningaliga sæð hevur tingið soleiðis givið landsnevndini fulla heimild til at útvega tann pening, sum tørvur er til, og skal meirilutin áttala, at henda samtykt, sum ikki er tíðarmerkt, eigur at standa við.

Tað er ógvuliga lítið komið av skafti við bókaútgávu, og er tað óivað soleiðis sum brævskrivararnir siga frá, at tær prentsmiðjur vil hava í landinum, »ikki eru førar fyri at avrika meiri arbeið enn ta blaðprenting og accidensarbeið, sum tær nú eru bundnar av.« Tað er so ein verunleiki, at prentsmiðjur tørvast her á landi.

Um spurningin at seta á stovn eina løgtingsprentsmiðju, sum ætlast at kosta um 90.000 kr., skal meirilutin áttala, at tingsins prentingararbeiði átti at verði skjólari avgreitt enn tað nú verður, men sum tað framgongur av tingsins fíggjarætlan verður tað til prenting o. a ikki nýlt meira enn um 10.000 kr. árliga, og meirilutin má halda tað verða nakað nógv at seta 90.000 kr. í eina prentsmiðju, tá tingið ikki hevur meira pening enn ummælt.

Tað átti eisini at verið gjørligt hjá hugaðum monnum her á landi at fingið sett á stovn, tær prentsmiðjur sum nýtast. Meirilutin skal tó mæla til, at tingið samtykkir at heimila landsnevndina til, um tað verður sett ein nýggj nýmótans prentsmiðja á stovn, at vera við til at fáa hetta í verk, við sum lán ella í partapeningi, at nýta upp til 20.000 kr. fyri at tað kann koma í lag, um landsnevndin heldur skipanina verða hóskandi, og undir tí treyt, at tingsins arbeiði kann verða skjótt avgreitt í eini tílíkari nýggjara prentsmiðju.

Minnilutin (Djurhuus og Poulsen) halda, at tað eru so nógvar aðrar uppgávur, sum eisini liggja fyri, og krevja tingsins studna. Minnilutin kann tí ikki, uttan gjølla kannan av, hvar tingið eigur at styðja, seta uppskot um styðjan undir hesum máli.

Uppskot:

1. Tingsins samtykt í 1942 um, at landsnevndin verður heimilað til at geva lán til skúlabókagrunnin til útgávu av skúlabókum, og at nýta pening úr amtsgrunninum til hetta endamál, verður endurnýggjað fyri árið 1944.

2. Tingið gevur landsnevndini heimild til at styðja stovnan av eini nýggjari prentsmiðju við at geva lán ella tekna partapening upp til 20.000 kr., undir tí treyt, at tann nýggja prentsmiðjan er til reiðar at gera tingsins prentingararbeiði skjótt frá hondum, og at hon eina mest verður nýtt til prentun av skúlabókum, tá tørvur er til tess.

2. viðg. 27. nov. 3. viðg. 2. dec. Pt. 1 samtykt 18—0, pt. 2 fall 12—1.

---

22. Uppskrivan av orðaskiftinum.

Frl. 14. sept. 1. viðg. 16. sept.

Álit:

Hetta mál er borið fram á Ting av Fólkaflokkinum og beint í ymsamálanevndina.

Málið hevur fleiri ferðir fyrr verið til viðgerðar, seinast í tingsetuni 1939, hvar tað var greitt frá, at hetta kundi ætlast at kosta um 10.000,— kr., og tí varð málið goymt fyri fyrst.

Síðan 1940 hevur uppskrivan av orðaskifti havt ein serligan týdning, tí nú er tað einasta almenna viðgerð av lógmálum, og tað sum fram er hildið av tingmonnum, hevur tí stóran týdning fyri at fata lógirnar heint, serliga tá viðmerkingarnar eru so stuttar.

Ein meiriluti í nevndini (Th. Petersen og R. Rasmussen) má halda fram, at tað er neyðugt longu í hesi tingsetu at fáa fyrireikað, at orðaskifti verður uppskrivað í øllum lógarmálum og helst í øðrum týdningarmiklum málum eisini.

Tað beinasta vil vera, at alt orðaskifti verður uppskrivað, og seta vit uppskot um, at hetta verður fyrireikað til næstu tingsetu.

Ein minniluti (O. F. Joensen) setur ikki fram nakað uppskot í málinum.

Uppskot

(frá meirilutanum):

1. Tað verður álagt tingformanninum og skrivstovustjóranum at fyrireika uppskrivan av orðaskiftinum í øllum lógarmálum og týdningarmiklum málum.
2. Útreiðslurnar verða at gjalda úr amtsgrunninum.
3. Landsnevndin fær upp í hendi at fyrireika útgávu av nummuliga orðaskiftinum 1943, og at leggja til rættis soleiðis at alt orðaskiftið kann verða uppskrivað frá næstu ferð tingið kemur saman.

Broytingaruppskot frá Dam o. fl.

Pelti 1 í uppskotinum verður orðað soleiðis:

1. Tingið samtykkir, at alt orðaskiftið á tingi í lógarmálum skal verða uppskrivað. Í øðrum týdningarmiklum málum kann hetta eisini verða gjørt, tá tað verður samtykt av formanninum saman við einum manni úr hvørjum av hinnum flokkunum á tingi.
Skrivstovustjóranum verður álagt at leggja til rættis arbeiðið við uppskrivanini.

Til pelti 3 verður sett sum nýtt pkt.:

Tað prentaða orðaskiftisuppritið verður ókeypis at lata út til tey, sum biðja um tað frá løglingsskrivstovuni.

Broytingaruppskot frá A. Samuelsen o. fl.:

Grein 1 í uppskotinum skal hava hetta orðafar:

Tað verður givið formannsskapinum (formanni, næstformanni og báðum tingskrivarunum) heimild til at fyrireika uppskrivan av orðaskiftinum í øllum lógarmálum og øðrum týdningarmiklum málum, um nóg nógvir til tess kønir skrivarar kunnu fáast.
Formannsskapið ger av, hvussu nógvir skrivarar skulu verða.

2. viðg. 29. sept. 3. viðg. 12. okt. Meirilutans pt. 2–3 samtykt 15–0. Broytingaruppskot frá Dam til pt. 1 samtykt 16—0 og til pt. 3 við 17—0. Broytingaruppskot frá A. Samuelsen fall 8—0.

---

23. Barnaheim í Miðvági.

Frl. 16. sept. 1. viðg. 25. sept.

Álit (4. dec.):

Í skrivi frá amtinum dagsett 14. sept. í ár verður biðið um ummæli frá tinginum viðvíkjandi spurninginum, hvørvitt tað skal setast á stovn eitt barnaheim í Vágum.

Yvirverjuráð Føroya skrivar í brævi til amtið, dagsett 11. sept. í ár, at tað kanska er ivingasamt, um yvirverjuráðið hevur heimild til at taka avgerð í hesum máli. Ráðið hevur eisini eina vissa afliran viðvíkjandi stovnan av barnaheimi í Vágum, men heldur tó fram, at um so verður, má tí vissast *fasta læknaeftiransan*. Í skrivi frá verjuráðnum í Miðvági, dagsett 7. sept., har útskrift av gerðabókini fylgir við, stendur, at 3 av limunum vóru fyri, 2 ímóti.

Ætlanin var, at barnaheimið skuldi byrja sítt virki 15. sept. í ár, men av tí at amtið hevur biðið um at steðga, til tingið hevur givið sítt viðmæli, er heimið so slatt ikki byrjað enn.

Kirkjunevndin hevur umhugsað málið, og heldur hon, at best hevði verið, um nevndin í Vágum og stjórnin fyri barnaheimið í Vestmanna kundu komið ásamt, men allar royndir hava miseydnast. Í brævi til Pastor Rasmussen, formannin fyri barnaheiminum í Vestmanna, dagsett 15. juli í ár, frá Oberst Adamsson verður játtað, at peningurin skal latast til barnaheimið í Vestmanna eftir vissum reglum, soleiðis at 10.000 kr. skulu latast beinan vegin og síðani vissl um mánaðin til raksturin, men til hesa játtan kom einki svar.

Kirkjunevndin hevur sent áheitan til stjórnina í Vestmanna og nevndina fyri barnaheimið í Vágum um at koma á fund saman við kirkjunevndini at samráðast um spurningin. Nevndin í Vágum meinti ikki, tað var nakað at samráðast um fyri teir. Stjórnin fyri barnaheimið í Vestmanna kom so á fund saman við kirkjunevndini 2. november. Viðgjørt varð málið um barnaheimið í Miðvági. Báðir partar samtykta at velja millum hesi bæði uppskotini og taka tað, sum nevndin fyri barnaheimið í Miðvági gongur við til:

I. Eingin byggjan fer fram í hesi tíð, og peningurin verður í staðin lagdur í ein grunn nevndan 30. Group Pioneer Corps of the Faroese Orphanage and Lieut.-Colonel J. F. Adamsons Fond, soleiðis, at bara renturnar verða nýttar til uppihald av børnum á barnaheimi í Føroyum. Fondurin fylgir teimum reglum, ið lógin ásetur.

II. Hetta uppskot, ið sleudur í brævi frá 30. Group Pioneer Corps, dagssett 15. juli, verður fylgt.

5. november 1943 kom svar frá nevndini í Vágum, sum ikki meinar, tað nyttar nakað at vendu sær aftur til Oberst Adamson, áðrenn tað liggur ein bestemt viðtøka frá tinginum fyri ella ímóti barnaheiminum í Vágum.

Ein meirilutí í nevndini (Øregaard, Robert Joensen, P. Dahl og Joh. Poulsen) skjýtur uppá, at svarað verður amtinum, at tingið fyri tíðina ikki kann ráða til at hava meir enn eitt barnaheim í Føroyum.

Øll nevndin skjýtur uppá, at tingið ræður til, at yvirskotið av burturlutingini í august 1943 verður lagt til byggigrunn barnaheimsins.

Ein minnilutí (S. Ellefsen) skjýtur uppá, at svarað verður amtinum, at løgtingið vil ikki sýta Bretum at seta á stovn eitt barnaheim í Vágum, tá teir sjálvir vilja gjalda fyri raksturin av tí.

Nevndin heldur ikki, at løgtingið kann taka nakra avgerð viðvíkjandi peningi, ið er innsavnaður millum Bretar her í Føroyum og aðrastaðni.

Uppskot:

1. *Frá meirilutanum* (Øregaard, R. Joensen, P. Dahl og J. Poulsen): Svarað Verður amtinum, at tingið kann ikki fyri tíðina ráða til at hava meir enn eitt barnaheim í Føroyum.

2. *Frá allari nevndini:*
Tingið ræður til, av yvirskotið av burturlutingini í august 1943 verður lagt til byggigrunn barnaheimsins.

3. *Frá minnilutanum* (S. Ellefsen):
Svarað verður amtinum, at løgtingið vil ikki sýta Bretum at seta á stovn eitt barnaheim í Vágum, tá teir sjálvir vilja gjalda fyri raksturin av tí.

2. viðg. 7. dec. Pt. 1 samtykt 13—0, pt. 2 við 21—0 og pt. 3 fall 12—0.

---

24. Rætturin til arbeiði.

Frl. 14. sept. 1. viðg. 8. okt.

Alit (4. dec.)

Føroya javnaðarflokkur hevur við skrivi tann 13. september 1943 heitt á tingið um at taka til viðgerðar:

1. Eina plánøkonomiska skipan til tryggjan av, at øll arbeiðsfør fólk skulu hava atkomuligt at fáa arbeið annaðhvørt á sjógvi ella landi (almenn arbeiði, sigling, fiskiskap, landbúnað, ídnað, fínansløna arbeiði o. s. fr. í samband við arbeiðsávísingar- og hýringarkantór fyri øll virkir, ið arbeiðarar ikki sjálvir eiga — cooperatión).
2. Serligt viðurgjald til foreldur í mun til barnatalið.

Málið hevur verið víst til fiskarínevndina. Nevndin er ikki vorðin samd um sløðuna, men hevur býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Minniluta (P. M. Dam) hevur gjørt serligar viðmerkingar til hetta mál og sett fram uppskot; hetta verður hjálagt hesum áliti.

Meiriluta (Kr. Djurhuus, Jens Chr. Olsen, Ole J. Jensen og J. Fr. Kjølbro) skal gera hesar viðmerkingar.

Einhvør samfelagsborgari hevur rætt at krevja av samfelagnum, at hann fær arbeiði; tað er borgarans skylda at gera hvat hann kann fyri at skaffa sær arbeiði, og sjálvandi at verða fúsur at taka við tí arbeiði, sum honum stendur í boði, tá lønin er hampulig, soleiðis at hann kann forsyrgja sær og sínum, so tey kunnu liva og liva gott, og svara hvørjum sítt. Tað er samfelagsins skylda at ansa eftir at tað verða livilig kor hjá øllum borgarum í landinum, at tað stendur teimum gott arbeiði í boði, og at teirra lønkor eru góð og samsvarandi tíðini sum borgarin livur í.

Hetta eru reglur sum einhvør nú á døgum má ásanna. Hetta eru reglur sum einhvør av teimum sum eru valdir til at umboða fólksins ynskir og ansa eftir almennum virki, vilja leggja sær serliga í geymu. Hetta hevur einki við kapitalismu ella socialismu at gera, tí menn úr øllum stættum vilja ásanna hetta til fullnar.

Undir ófriðartíðum vilja tað verða nógv sum við fullnu rætti kunnu krevja nógv av tí almenna. Tá ófriðartíðin fjarðar av, vita fólksins kosnu menn, at teir mugu vera fyrivarnir um ikki brotasjógvar skulu koma inn yvir samfelagið, og skapa eitt arbeiðsloysi sum vil seta heila samfelagið nógv longur aftur enn tær meira peningaríku tíðirnar hava fört tað fram.

Undir ófriðartíðini hevur tingið viðgjørt mong mál sum miða móti at hjálpa borgarum har trongd hevur verið. Her kann serliga ummælast tann havna- og vegabygging sum tingið hevur styðjað í teimum farnu árum, og sum tingmenn av fullum huga vilja ganga inn fyri at halda fram við, so langt sum landsins inntøkur gera tað møguligt. Her kann nevnast tann beinleiðis hjálp sum tingið við studningi til sociala hjálp hevur játtað fyri at bøta uppá borgaranna trupulleikar.

Meirilutin skal eisini vísa til, at tingið í hesari tingsetu hevur viðgjørt nógv mál, sum miða móti at skapa betri kor tá aðrar tíðir koma. Tingið hevur haft til viðgerðar endurnýggjan av fiskiflotanum, at skaffa før til landið úr Bretlandi ella úr Svíaríki, at útvega byggitilfar úr Ameriku, at fáa byrjað arbeiði fyri at fossakraftin kann koma til nýtslu o. s. fr. — Tað er so lítið sum tingið kann koma á mál við, soleiðis sum tíðirnar liggja fyri, men tingmenn hava vist at hesi mál hava teirra størsta ans, og eru teir allir fúsir til at virka fyri at nakað úrslit kemur burturúr øllum teimum málum, sum tingið í ár hevur haft til viðgerðar.

Fyriskipanir móti arbeiðsloysi, er eitt av teimum málum, sum tingið hevur viðgjørt, og kann meirilutin vísa til, at tingið undir hesum máli hevur samtykt at áleggja landsnevndini at fara í samráðingar við allar stællir her á landi, um hvat kann gerast fyri at fyribyrgja at trupulleikar koma inn yvir okkara fólk, tá bardagatíðin vónandi skjótt fer at verða komin at enda.

Tað er ikki undir nevndarviðgerðini vist á nakað serstakt, sum tann flokkur, ið hevur beitt á tingið, kundi borið fram, og sum kundi gjøgnumførast beinanvegin. Meirilutin trýr heldur ikki tað verunliga er nakar vegur til at gera meira, enn tingið hígartil hevur gjørt.

Meirilutin setur ikki nakað uppskot fram í hesum máli, men skal vísa til tær ymisku samtyklir í øðrum tingmálum í hesu tingsetu. Um tey av minnilutanum framsettu uppskot, skal meirilutin siga frá sínu støðu:

Uppskot I kann meirilutin ikki styðja. Tað er ikki vist á, at tað verunliga í dag kann setast nakað á stovn, hvartil tann peningur, sum uppskotið ummælir, kann nýtast. Vegurin til at skaffa pening heldur meirilutin eisini vera ógvuliga harðligan.

Uppskot II, skal meirilutin viðmerkja, at tað ikki fyri tinginum er vist nakað á, at tað er trongd til. Eingin hevur kærað yvir ikki at hava fingið neyðturviligt tilfar.

Uppskot III má tað standa hvørjum tingmanni frítt at avgerða, um tann heldur, at tað nyttar nakað, at seta hesa kommissión. Meirilutin skal faltút viðganga, at allir teir í uppskotinum nevndu spurningar eiga at verða gjøllu kannaðir.

Uppskot IV heldur meirilutin heinast átti at fallið saman við la nevnd, sum tingið hevur sett til at fyrireika broytan av búnaðarlóggávuni.

Uppskot V nertur við tað mál sum tingið longu hevur tikið støðu til undir fossamálinum.

Uppskot VI um at seta eitt hýringarkontór á stovn heldur meirilutin ikki, tað er prógvað nakað um, at trongd er til.

Til Uppskot VII er at viðmerkja at landsnevndin hevur heimild til tingsins vegna at gera, hvat gerast kann, fyri at skapa arbeiði fyri allar hendur her í Føroyum, so langt sum tingsins megi røkkur.

Meirilutin kann á ein hátt verða samsintur við tað, sum minnilutin vísur á í sínum uppskotum, at tað einasta sum gerast kann í løtuni er at eftirkanna og fyrireika tað virki, ið seinri skal setast á stovn, men kann ikki verða samsintur í at hetta førir við sær at so nógvar ymiskar nevndir verða settar. Meirilutin vil tí halda seg til tey uppskot, sum tingið í øðrum málum hevur samtykt í tí treysti, at einhvør tingmaður, einhvør av tinginum sett nevnd og einhvør borgari í landinum følir la óbyrgd, sum hvílur á heila okkara samfelag til at virka fyri at Føroyar ganga eini ljósari framtíð í møti.

Meirilutin setur einki uppskot fram í málinum.

Minnilutin (P. M. Dam):

Í javnaðarflokksritinum verður hildið fram:

Í Føroyum í dag er ein hópur av mannum arbeiðsleysur, ein hópur av heimum sita við ov smáum inntøkum, sita í troti og sakni.

Føroyar í dag eru so stutt ikki mentar at geva íbúgvarum sínum tað neyðfurvuliga til matna, klædna, mentan og aðrar samfelagsúrtøkur.

Hví?

Eiga Føroyar innanfyri sínt mark ikki møguleikar fyri at geva íbúgvarum sínum góð og livilig kor, so teir av sonnum kunnu siga, at her er gott at vera, at her vilja teir verða?

Nei — ikki við teirri núverandi privatkapitalistisku skipan sum grundarlag fyri lívinum og samvinnuni íbúgvaranna millum.

Nei — tí henda skipanin hevur torførgjørt og vil framvegis koma at torførgera samvinnuna millum íbúgvarartnar um at vinna og troyta mest møguligt burtur úr øllum landsins kreftum og framleiðslukeldum til gagns ikki bara fyri einstaklingin, men fyri heildina, allar landsins íbúgvarar.

Hetta er, og hetta hevur verið ein royndur lutur, ein lívsins ásannan, ein verunleiki, ið tíðnur fram, ið slingur í cygnni, hvar ein er, hvar ein virkar, og hvar ein plánleggur og hugsar her á landi.

Hetta er ein royndur lutur, hjá okkum Føroyingum, hetta er ein royndur lutur í øllum londum, allur heimurin hevur ásannað hetta. Frægastu menn innanfyri allar stættir, innan fyri allar virkisgreinir í heiminum noyðast nú, um teir eru sannir fmóti sær sjálvum, sannir fmóti sínum landi og fólki at viðganga, at hitt gamla lagið, hitt privatkapitalistiska stýrislagið ikki dugur longur.

Eru vit sannir fmóti okkum sjálvum, fmóti okkara landi og fólki, megu vit viðganga tað sama.

Já — her er livandi á landi, her eru møguligleikar og framleiðslukeldur, ið kunnu troytast, so nóg mikið verður til øll, so at allir Føroyingar kunna siga, at her er gott at vera, at her vilja teir verða, byggja og mennast og viga landinum, fólkinum, Føroyum sína orku og lívsmegi og skaparkraft.

Já — her er livandi á landi, um vit rýma frá teirri gomlu lívsáskoðanini og taka við teimum hugsjónum og grundáskoðanum, sum goymast í socialismuni.

Havið, jørðin og landið í sínu heild við tí, ið tað goymir í sær av livandi eins og bundnari megi, kann geva okkum lað, ið okkum tørvar, okkum øllum, um vit verða samd um, at henda megin er til fyri øll, skal nýtast til øll, skal verða øllum at gagni, í tann mun, sum hvør einstakur treingir.

Hvussu nógv gevur jørðin í dag? Hvussu nógv kundi jørðin givið í dag?

Hvussu nógv gevur havið okkum í dag? Hvussu nógv kundi tað givið okkum?

Hvussu nógv gevur ídnaðurin okkum í dag? Hvussu nógv kundi hann givið okkum?

Hvussu nógv framleiða vit í dag her á landi? Hvussu nógv kundu vit framleitt, um vit høvdu eina plánøkonomiska framleiðslu, sum tók alla okkara arbeiðsmegi, so eingin maður og eingin kvinna, ið eru arbeiðsfør, komu at ganga urbeiðsleys?

Tað er hvørjum manni eyðvitað, at øgiligt liggur av lání í okkara landbúnaði, at tørvur er tí á at lata nógv meiri av okkara arbeiðsmegi koma til arbeiðis, til frama fyri landbúnaðin.

Tað er í okkara javnaðarmannakrav til Føroya løgting, at tað tekur ta avgerð, at jørðin uttan mun til einstaklingsins serinteressur, sum ganga ímóti landsins heildarinteressum, skal koma undir eina plánøkonomiska skipan, sum gevur tí partinum av okkara fólki, sum nátúrliga er skikkaður at fáast við jarðadyrkan, atkomu til jørð. Hartil eigur hesin parturin við landsins hjálp at fáa tann skúlaskap og ley amboð, sum ger hann best føran til at vinna mest møguligt úr okkara jørð, so kjøt, mjólk, grønmeti og annað úrtak, ið jørðin kann geva, ikki verða at tróla í nøkrum heimi í Føroyum.

Tað er hvørjum manni eyðsæð, at havið goymir óførar muguligleikar, sum ikki eru troyttir av Føroyingum. Tað er í okkara javnaðarmanna krav til Føroya løgting, at tað kannar hesar møguligleikar, at tað ger sær greitt, hvussu stórur partur av Føroya fólki nátúrliga er skikkaður til arbeiðis í fiskivinnu, farmasigling og aðrari sjóvinnu. Tað er krav okkara javnaðarmanna, at tingið ger seg til harra yvir landsins avlopsorku og skilagott nýtir hana til at hjálpa fiski- og sjómonnum okkara at troyta hvussins møguligleikar, hjálpir teimum til før og fullfíggjaðan kunnleika, so teir verða at standa millum frægastar og fremstar menn í arbeiði og úrtøku av havinum.

Tað er hvørjum manni eyðsæð, at ídnaðurin her á landi er so lítil, at hann bert er ein viðfáningur, tó at ein ikki kann kasta eyguni nakrastaðni uttan at kenna í sær ásannanina, at har trýtur ídnaður, at har tørvur at setast á stovn skapandi virki til framleiðslu, til byggingar, nýskapanir og nýtslu hjá fólki í tí dagligu lívinum.

Tað er okkara javnaðarmanna krav, at tingið kannar eftir og ger sær greitt, hvat ið tørvur er á at gera í hesum føri í samfelagslívinum. Tað er okkara krav til tingið, at tað uttan mun til einstaklingsins serinteressur og serrætt veilir sær harradømi yvir tí frumevni og grundmegi, sum kann veita okkum ta sterkastu arbeiðsmegina, sum land okkara goymir, fossamegina, ravmagnsorkuna. Tingið eigur ikki meira at práta um at nýta fossamegina, men tað eigur beinan vegin eftir einum landspláni at fara undir at loysa úr bonduna alla ta ravmagnsorku, sum vøtn, fossar og streymur goyma í sær.

Tað er okkara javnaðarmanna krav, at tingið nýtir av avlopsorku okkara til at veita fólki tey neyðturvulign arbeiðstól, so ídnaðurin verður at geva hina mestu úrløkuna, so heldur ikki trot og sakn á

ídnaðarvørur, sum kunnu framleiðast her, verða at kennast í nøkrum heimi her á landi.

Tað er hvørjum manni eyðsæð, at vit í Føroyum eru eftirbátur í skúlaskapi og andiligari, miðvísari rekt. Hetta er landi og fólki okkara ómeluligur meinbogi í øllum framburðsstarvi. Tað er tí javnaðarmanna krav, til Føroya løgting, at það ger sær greitt, hvussu stóran part av Føroya fólki tørvur er á at nýta til skúlaskaps og aðra andiliga venjing og uppaling.

Tað er okkara krav, at tingið kannar eftir og fær skil á, hvat ið tørvar av byggningum og skúlaamboðum til nýtslu hjá skúlalærarum at loysa tær uppgávur at veita hvørjum einasta fólkgvan landsins lágu lærdóm og ta venju, ið tørvar honum fyri at kunna gera sítt starv til lítar og leiðast sum menfað fólk í eini mentatjóð.

Minnilutin ásamar, at sum viðurskiftini vóru undan krígnum og eru vlnnuni á sjógvi og landi viðvíkjandi, er støðan vorðin hættislig, serliga viðvíkjandi fiskivinnuni.

Undan krígnum høvdu Føroyingar um 160 stuppir og skonnartir og 10 trolarar.

Undir heimsorrustuni, ið enn stendur á, er stupp- og skonnartalið fækkað niður móti stórthundraðtalinum.

4 av teimum 10 trolarunum eru burturgingnir og ein seldur.

Einki skip at kalla er komið sum endurbøtur.

Í teim fyrstu árunum av krígnum var totaliga atkomiligt til við og ymist byggitilfar, men her á landi varð ikki av teim einstaku innflutningsmonnum nýttur møguleikin at fáa tilfar eins og av innflutningsmonnum í Íslandi. Har varð øll møgulig áherðsla løgd á at fáa størstu rúgvu av viði og øðrum byggitilfari á goymslu til skipabygging og ónnur framløk eins og til yvirsar endurbøtur, meðan innflutningsmenn her lótu møguleikan fara framvið. Og hitt almenna skeyt eisini frá sær at átaka sær ábyrgdina fyri, at byggitilfar kom til landið í so stórum mani, ið það var at fáa, og sum vit orkaðu at keypa.

Nú eru viðurskiftini vorðin so trong viðvíkjandi byggitilfari, at það er neyvan møguligt at fáa það neyðturvuliga til at halda skip og onnur vinnutól, ið vit hava, viðlíka. Tað er ikki talan um, uttan so er, at vit sjálvir sigla til t. d. Kanada, at fáa tilfar til nýbyggingar og enn minni um at keypa før, ið eru tíðarhóskandi til okkara vinnu.

Við landbúnaðinum stendur ikki betri til. Framleiðslan av t. d. mjólk, ið er menniskjunum týðningarmesta neyðsynjarføði, er í minkan. Kútalið er fækkandi heldur enn økjandi, hóast tann størsti parturin av uppdyrkiligum landi er eftiri at dyrka.

Ídnaðurin er at kalla eingin. Á so er stendur óivað í sambandi við ravmagnstrolið.

Um vit løgdu okkara vatnorku í bond og nýttu hana, vildu vit haft virkismegi til handa fyri alt framtaksfúsi fólksins langt út í framtíðina.

Talað hevur verið leingi um, at ravmagna okkara oyggjar.

Talað hevur verið um at endurnýggja okkara skipaflota.

Talað hevur verið um at nýgera okkara landbúnað, so hvør blettur kann geva það, ið hin øka mannakraftin við nútímans greiðum kann fáa burtur úr jørðini o. s. fr.

Vit litu á, at einstaklingurin skuldi taka sær um reiggj. Nú standa vit við brostnum vónum.

So nógv ov lítið er vorðið burtur úr, so lítið, at vit standa í troti og vinnuloysi.

Minnilutanum kemst fyri, at vit her á landi ikki longur kunnu forsvara, at fara fram í blindum treysti til, at onkur her og annar har skal eiga ta trøllamegi og rúnarkelv, ið orka at loysa uppgávurnar, ið veita okkara fólki arbeiði á sjógvi og landi, so ongar bendur sita tómar í urbeiðsloysisins forlunnilsi.

Her má verða lagt á annan bógv. Landastýrið má átaka sær ábyrgdina fyri, at allar kreftnr her á landi verða leiddar í tað hægst gevandi samarbeiði. Vit hava ikki ráð til at lata so mikið sum eina krónu liggja deyða. Vit hava ikki ráð til at lata ein fingur av mannakraftini liggja ónýttan í framburðsstrembanini.

Allir og øll megu kenna ta tjóðskaparkenslu brenna sær so í barmi, at hugurin er likin av at leggja sína megi, sini evni, skil og vit í fremjanini av einum landsarbeiðs- og framtaksplani við allari landsins peningaligari orku aftan fyri seg.

Minnilutin dugir ikki at síggja annan veg burtur úr ómegdarstøðuni, ið vit nú standa á, enn at tingið avger at taka ábyrgdina fyri, at farið verður inn á eina plánøkonomiska skipan til uýskipan og endurreisan av okkara vinnulívi, so tað verður at geva nóg mikið til allar landsins íbúgvarar.

Tað er sjálvandi ómøguligt hjá feim smáu tjóðunum, ið standa meiri sum áskoðarar enn beinleiðis luttakandi í teirri áleikandi heimsorrustuni, við fullari vissu at kunna leggja plánir viðvíkjandi, hvussu ið lívið og arbeiðið skal falla aftaná kríggið.

Hendir tað, at tey stóru londini detta aftur á tí reindyrkaðu privatkapitalistiska skipanina við strangari skanfan av øllum utanríkishandli og samvinnu og ágrýtnari verju av »sær sjálvum« utan mun til, hvussu henda *inngyrðing* kemur at ávirka lívið hjá øðrum londum, verða smáljóðirnar at leingjast og missa lívsmegi sína. Hetta ræður særliga vinnuliga sæð fyri so einláttaða tjóð sum Føroyar.

Men skorðaðir av teim ríðuliga ringu privatkapitalistisku royndum aftaná heimsbardagan 1914—18 hava mætastu menn, ið nú standa á odda í stríðnum fyri lívs- og tjóðarfrælsi, tikið til orða fyri eini nýggjari samfelagsskipan bæði innlendis í teim einstøku londunum og viðvíkjandi samlívinum og samvinnuni landanna millum. Henda nýggja skipan, verður hildið fram, skal byggja á ta grundáskoðan, at øllum tjóðum eins væl og øllum einstøkum mannum skal verða tryggjað lívsrúmd og arbeiði undir best møguligum líkindum.

Hetta eru góð boð og tíðindi, framúr góð fyri Føroyingar, og kunnu tey geva okkum trúgv uppá og treysti til, at eisini her á okkara oyggjum verður lívandi.

Men hava vit hesa trúgv og hetta treysti, so megu vit eisini skilja, at jú fyrr vit allir sum ein avgera at skipa okkara viðurskifti í tráð og samljóð við grundskurðin í teirri væntaðu nýggju skipanini, less betri koma vit at standa fyri viðvíkjandi skjótast møguligt at kunna fáa fult gagn av teim møguligleikum, hon býður okkum.

Soleiðis sum vit liggja fyri útí í Atlantshavinum við ov fáum arbeiðs- og vinnumøguligleikum á landi viðvíkjandi at kunna liva, er tað ikki at ivast í, at okkara høvuðsarbeið- og vinnulutur verður givin okkum á sjónum.

Her verður talan um trimar tættir:

1) Farmasigling,
2) fiskiskap og
3) lanu í samband við hesar tættir verandi tónnð á landi, skipabygging, ísvirki, harðfrysting, flakavirki, niðursjóðingarvirki (konservesfabrikkir), neta-, log- og snørisvirki og onnur reiðskapsvirki.

Sum ein høvuðstreytin fyri fremjan av hesum virkjum eins og einum hvørjum ídnaði, ið hevur líkindi at trívast og mennast í øðrum føroum her á landi, er, at okkara oyggjar verða ravnagnaðar, so drívmegin verður tøk til nýtslu allastaðni í oyggjum okkara.

Sjálvandi verður tikið við í eini plánokonomiskari skipan fyri oyggjum okkara at fáa okkara landbúnað skipaðan samsvarandi la hugsan, at fyrst og fremst eigur jørðin at geva og læna landsins íbúgvum við at geva teim alla la gróði og øll tey lívevni, ið landsins mannakraft við nútímans amboðum kann framleiða úr hennara gávuríku holdum.

Kunnu fólksins bornu álitismenn koma á la støðu, at tað er átroðkandi neyðugt at fara undir eina nationaløkonomiska umskipan og endurreisan av og nýskipan í okkara sjóvinnu, landbúnað og ídnað, verður hitt fyrsta lukið hjá landastýrinum at gera seg til harra yvir allari peningaligari avlopsorku heima sum úti eins og vøtnum, ám, fossum og øllum til uppbyggingina neyðsynlum tilfari.

Fyrst tá ið hetta er gjørt, kann landið óampað og ólarnað fara undir hesa ovurslóru uppgávu.

Í hvørjum, sum tey her á landi nýbygdu, umbygdu ella í útheiminum keyptu før eru líðug til at verða mannað, í hvørjum, sum uppdyrkingarvegir, garðagerð og nútímans uppdyrkingartól gera tað møguligt hjá fleiri og fleiri arbeiðshugaðum mannum at fáast við jarðaarbeiði, í hvørjum, sum ein vaksandi ídnaður tekur fleiri og fleiri arbeiðarar í sína tænastu, minkar burlur kravið til hitt almenna at veita arbeiðsleysum arbeiði við at seta á stovn almenn arbeiði. Og tann dagur skuldi so komið, tá ið alt okkara fólk kann liva náttúrligt og ampaleyst, liva av ágóðagevandi og landsuppbyggjandi arbeiði uttan at lørva serligar kreppufyriskipanir.

Men so leingi ein tílík plánøkonomisk skipan ikki hevur veitt øllum arbeiði, er tað skylda hjá lí almenna at nýta alla arbeiðsleysa kraft til arbeiði uppá havnir, lendingar, vegir og annað alment arbeiði.

Samsvarandi la í álitinum framhildnu áskoðan og støðu selur minnilutin niðanfyri standandi uppskot.

Uppskot:

I. *Midlertidige Bestemmelser for Færøerne om Laan til Lagtingets Vinnulívsgrunn.*

§ 1.

Bestyrelsen for Lagtingets Vinnulívsgrunn bemyndiges til mod Amtsfondens Hæftelse at optage de fornødne Laan til Tilvejebringelse af Kapital og Lagtingets Vinnulívsgrunn til Udlån, Køb, Nybygning, Ombygning og Modernisering af Skibe til Fiskeri og Fragtfart, Køb af Maskiner og Redskaber af enhver Art, til elektriske Kraftstationer, til Modernisering og Udvikling af Landbruget, til Anlæg af Fabrikker og nye Virksomheder og Udvikling af allerede eksisterende Virksomheder.

§ 2.

De i § 1 omhandlede Laan optages enten som frivillige Laan eller, hvis Bestyrelsen for Lagtingets Vinnulívsgrunn anser det for nødvendigt, som tvungne Laan efter nedenstående Regler.

§ 3.

Enhver paa Færøerne hjemmehørende Person og Selskab er, hvis Bestyrelsen for Lagtingets Vinnulívsgrunn i Henhold til § 2 træffer Bestemmelse herom, pligtig til at indbetale som Laan til Lagtingets Vinnulívsgrunn 100 Kr. for hvert fulde 1000 Kr. af sin Formue over 10.000 Kr. opgjort paa følgende Maade:

1. Formue bestaaende af fast Ejendom, Fabriksanlæg, Maskiner, Skibe og Baade beregnes til det halve af Værdien i Handel og Vandel.
2. Formue bestaaende af kontante Penge beregnes til det femdobbelte af det paalydende.
3. Formuer bestaaende af Værdipapirer og Indskud i Pengeinstitutter beregnes til det dobbelte af Paalydendet eller det dobbelte af Værdien.
4. Andre Formueobjekter, herunder udestaaende Fordringer, beregnes til den fulde Værdi.
5. Der bortses fra Formue bestaaende af eget Beboelseshus, Indbo og personlige Brugsgenstande.

§ 4.

Laanet kan til enhver Tid tilbagebetales af Lagtingets Vinnulívsgrunni.

Laanet er uopsigeligt fra Laangiverens Side indtil den 1. December 1950. Efter dette Tidspunkt kan Laangiveren forlange Laanet med Renter tilbagebetalt med 2 Maaneders Varsel til den 1ste i hver Maaned. Delvis Tilbagebetaling kan ikke forlanges.

Under ganske særlige Omstændigheder kan Bestyrelsen for Lagtingets Vinnulívsgrunn give Tilladelse til Tilbagebetaling før den 1. December 1950.

§ 5.

Laanet forrentes med 2,5 pCt. pro Anno af Laanesummen for hvert fulde Aar, Laanet har henstaaet. Renten beregnes fra den 1ste i den efterfølgende Maaned, efter at Laanet er fuldt indbetalt. Renten tilskrives Laanet og forfalder til Betaling sammen med Laanets Tilbagebetaling.

Laanet bestyres af Bestyrelsen for Vinnulívsgrunn Føroya løgtings, der træffer Bestemmelse om Anvendelse af de laante Midler til de i § 1 nævnte Formaal.

§ 6.

Alle nærmere Bestemmelser vedrørende de i §§ 2—5 omhandlede tvungne Laan, herunder alle fornødne Bestemmelser om Opgørelse af Laangivernes Formue, om Laangivernes samt om Pengeinstitutters og andres Pligt til at meddele Oplysninger og om Indbetaling og Opkrævning af Laanene, fastsættes af Amtmanden efter Indstilling fra Bestyrelsen for Lagtingets Vinnulívsgrunn og Landsnævnet.

Undladelse af at meddele paabudte Oplysninger, Meddelelse af urigtige Oplysninger samt anden Overtrædelse af nærværende Bestemmelse eller af de af Amtet i Medfør af nærværende Paragraf givne Bestemmelser, straffes med Bøder, der tilfalder Amtsfonden, eller med Hæfte.

§ 7.

Nærværende Bestemmelser træder i Kraft straks.

II. *Midlertidige Bestemmelser om Tilføjelse til Lov Nr. 69 af 7. Maj 1881 om Forpligtelse til Jords Afgivelse til offentlige Veje, Havne og Landingssteder samt til offentlige Skoler paa Færøerne.*

Som ny § 7 indsættes:

»I alle Tilfælde, hvor en Kommune, anden offentlig Myndighed eller Koncessionshaver (jfr. f. Eks. Lov Nr. 169 af 18. Maj 1937) har Ret til Ekspropriation af Jordarealer efter Reglerne i Lov Nr. 69 af 7. Maj 1881, skal Kommunen, den offentlige Myndighed eller Koncessionshaveren tillige have Ret til at tage det for vedkommende Anlægs Etablering og Vedligeholdelse fornødne Grus, Jord, Ler, Sand og Sten efter Reglerne i Lovens § 5.

Erstatning for saadant Materiale samt for den Skade, dets Borttagelse paafører Ejeren, fastsættes altid efter Reglerne i Lovens § 4, saaledes som denne er ændret ved Kundgørelse Nr. 45 af 30. Oktober 1941.«

III. Tingið velur eina 5-mannanevnd at kanna, hvussu nógvar motorbátar, smá og stór Ilskifør og farmafør, okkum tørvar til at dríva fiskiskap við Føroyar, Ísland, Grønland, Bjørnaoynna og aðrastaðni og til fluttnings- og farmasigling millum Føroyar og útheimin og um møguligt millum onnur lond eins og t. d. Norðmenn gjørda undan krígunum.

Tað verður álagt nevndini skjótast møguligt — seinast til næstu tingsetu — at koma fram við einum plání um:

a) Hvussu nógv før, vit í Føroyum kunnu fara undir at byggja,
b) Hvar og hvussu vit skulu fáa hini áreslandi skipini bygd og keypt,
c) Hvør ið skal kunna yvirtaka hesi skip til keyps ella útarbeiðing ella á hvønn hátt að annars kann hugsast, at raksturin av skipunum kann fara fram,
d) Hvussu vit kunnu fáa við og annað tilfar til skipabygging,
e) Hvønn ídnað á landi, tað er møguligt at seta á stovn í samband við fiskivinnuni og farmasiglingini.

IV. Tingið setur 5-mannanevnd við búnaðarráðgevarannum (formaður), amtsverkfrøðinginum, amtmanninum sum lógkønur maður ella ein av honum valdum lógfrøðingi, útskiftingarkønum manni, einum av landbúksráðnum og einum av løgtinginum valdum manni og landsnevndarformanninum sum limum.

Hesi nevnd verður álagt:

a) At kanna og plánleggja eina umskipan av okkara landbúnaði, so hann verður at geva mestu úrtøku.
b) Til næstu tingsetu at koma fram við einum landsplání viðvíkjandi, hvussu henda umskipan skal fara fram.

V. Telefonverksverkfrøðingurin, amtsverkfrøðingurin og driftsleiðarin fyri Vágs ravmagnsverki, harra Lystbæk, verða biðnir um til næstu tingsetu at seta fram eina landsætlan viðvíkjandi ravmagnan av øllum Føroyum.

VI. Landsnevndin verður heimilað til tingsins vegna við lóg at seta á stovn eitt hýringarkantór, hagar útgerðarmenn og ein og hvør, ið skal mannað havgangandi før, skulu venda sær at fáa tá neyðturvuligu manning. Áselan av yvirmonnum um borð skal hýringarkantórið ló ikki hava nakað við at gera.

VII. Teirri arbeiðsleysu arbeiðskraft, ið ikki kann koma til at arbeiða hjá privatum, og sum heldur ikki kann fáa arbeiði undir nýtsluni av landsins avlopsorku til fremjan av skipabygging, umskipan og nýskipan av okkara landbrúki, ravmagnan av okkara oyggjum sum hitt lýðningarmesta liðið í uppbyggjan av einum lívssterkum ídnaði her á landi, verður álagt landsnevndini og veitt heimild til tingsins vegna at veita arbeiði við, um tað er neyðugt, at økja um tann longu av tinginum játtaða vega-, havna-, lendinga- og brúgvastuðning.

2. viðg. 6. dec. 3. viðg. 7. dec. Minnitutans II. samtykt 15—0, III. 25—0, 1. full 5—0, IV. 7—0, V. 9—0, VI. 6—0, VII. 7—0.

---

25. Verksmiðja.

Frl. 14. sept. 1. viðg. 25. sept.

Allt (20. nov. Djurhuus og J. Chr. Olsen við fyrivarni):

Føroya Javnaðarflokkur hevur í riti av 13. september 1943 reist spurningin um at fáa smiðju, ið er før at arbeiða við øllum nútímans greiðum.

Nevndin, ið hevur havt málið til viðgerðar, er samd um, at nútímans tól eru av avgerandi týðningi fyri at fara undir stórar uppgávur, ið óivað koma at standa fyri, men sum vit tessverri ikki hava tól at loysa.

Ein av teim stóru uppgávum, ið kann verða talan um, er at byggja jarnfør. Men lit tess krevst ein smiðja við nógv sterkari og meiri nútímans greiðum, enn vit í dag hava í Føroyum.

Nevndin tekur tí undir við tankunum um at fáa smiðjur settar á stovn við teim greiðum, ið kunnu gera okkum føran at smíða okkum tey skip og tey umboð, ið okkum verður at tørva í framtíðini.

Tó, sum statt er, kunna menn valla væenta, at vit í bræði kunna fáa tey umboð, ein tílík smiðja tørvar.

Tað er soleiðis ill í løtuni at gera nakað fyri at fara undir at seta eina tílíka smiðju á stovn. Men nevndin heldur tað kortini vera beint at fara at royna at fáa tey til eina nútímans smiðju neyðturvuligu tól og setur uppskot um at geva landsnevndini í bendi at arbeiða fyri at veita hesi tól til vega, um nevndin heldur, at umstøður eru til tess.

Uppskot:

Givið verður landsnevndini upp í hendi at kanna møguleikarnar fyri at fáa neyðturvulig tól til eina útlfmans samiðju, ið kann átaka sær alt arbeiði, millum annað at byggja jarnskip á skjótasta hátt.

Um hesi amboð eru møgulig at fáa, verður landsnevndin heimilað við láni frá viðmulánsgrunninum at keypa tey, um hon heldur umstøður vera til tess.

2. viðg. 22. nov. Samtykt 18—0.

---

26. Fossamálið.

Frl. 23. sept. 1. viðg. 12. okt.

Álit (22. nov.):

Fuglafjarðar, Gøta og Lorvíkar kommunur hava vent sær til tings og biðið um at fáa ravmagnsstikindini úti á Dølum kannað. Í umsóknini verður umtalað, at Harry Fonsdal, verkfrøðingur, fyri 5 árum síðani var og kannaði viðurskiftini leysliga og kom til tað úrslit, at har kundi verða gjørt eitt verk, sum vildi givið nóg mikið til ljós, hita og teknisk brúk.

Chr. Danielsen, Kvívík, biðir tingið kanna fossamálið og geva Vestmanna, Kvívíkar og Kollafjarðar kommunur hansara umsókn viðmæli.

Nevndin, sum hevur haft hetta mál til viðgerðar, skal vísa til, at løgtingið hevur latið fossamálið kanna av norskum verkfrøðingunum Blauw og Sælersmoen og einari fossanevnd og vísir til hennara frágreiðing, sí løgtingstíðindi 1923, síðu 73. Løgtingsverkfrøðingurin Harry Fonsdal er ravmagnsverkfrøðingur og er hugaður fyri at fáa fossamálið framt. Hann fór til útheimin í 1940 í tíðkum ørindum, men kriggsviðurskiftini gjørdu, at hann slapp ikki heimaftur, men hugsast at vera í Noreg. Tað er einki at ivast í, at hann hevur gjort sig enn meira kønan í tílíkum málum. Vónandi kemur hann skjótt aftur og kann fremja arbeiðið fyri nýtslu av vatnorkuni.

Nevndin heldur, at tað eisini fíggjarliga eigur at verða umhugsað, hvussu landið kann fara undir útbyggjan av fossakraftini. Tað eru gjørdar tvær royndir í tveimum av Føroya størstu kommunum fyri at fáa ravmagnsorkuna til nýtslu, og er hetta komið í lag, men byrðurnar hava verið so stórar, at tað neyvan kann ætlast at verða gjørligt hjá smærri kommunum, at fara undir tílík stór verk, hartil vil teirra fíggjarliga megi verða ov lítil. Tað almenna eigur tí at umhugsa, hvussu skipað kann verða fyri, at tað kann fáast eitt samvirki í lag millum tað almenna í øllum landinum, tær einstøku kommununum, nýstovnaði ídnaðaverk o. a., sum kunna ætlast at vilja og kunna samvirka fyri at fáa mest gjørligt av okkara fossakrafl til nýtslu. Hevur

umhugsunar kunna væl fara fram, tó at ófriðartíðin ger tað ógjørligt at fara undir sjálvt útbyggingararbeiðið. Nevndin mælir til, at ein millumtinganevnd verður biðin um at umhugsa málið, og at samráðast við kønar menn í vinnulívinum fyri at kunna leggja eina ætlan fyri tingið um, hvat leiðin eigur at verða, tá arbeiði kann byrja.

Nevndin heldur at tað er beint at millumtinganevndin royni, um tað er gjørligt at fáa kønan mann at vera við í arbeiðinum fyri at fáa lagt all til rættis fyri útbyggjan av okkara fossamegi. Um nakar tílíkur maður kann fáast, eigur honum at verða álagt at vera Fuglafjarðar, Gøtu og Lorvíkar kommununum til hjálpar við tí arbeiði, teir yniskja gjørt.

Nevndin hevur umhugsað spurningin um at leggja pening niður til frama fyri fossamálið, men tá nevndin er kunnug við, at uppskot liggur frammi til stovnan av einum tiltaksgrunni, og her eisini er tonkt uppá fossamálið, verður tann peningatiga síða av málinum at beina til henda grunn.

Uppskot:

1) Nevnd verður sett, hartil tingið velur 4 limir, Tórshavnar býráð 1, Føroya arbeiðsgevarafelag 1 og Føroya arbeiðarafelag 1 lim, at fyrireika fossamálið, sum nevnt í álitinum.
2) Nevndin verður biðin um at hjálpa Fuglafjarðar, Gøtu og Lorvíkar kommununum til at fáa kannað líkindini fyri at vinna ravmagn úr valnsorkuni á Dølum.

Broytingaruppskot frá O. F. Joensen o. fl.:

Frá J. K. Joensen, Jens Rasmussen, S. Ellefsen, Karl A. F. Joensen og Heine Joensen, í Miðvági, er komin fram umsókn til løgtingið um viðmæli til at geva (koncession) játtan til at útvinna fossakraft frá Lambá, Hýsisá og øðrum áum, ið kunnu veitast til, til ljós og teknisk brúk í trimum verksmiðjum í Miðvági.

Viðmæli frá sóknarstýrinum er hjálagt umsókninni.

Vit undirritaðu mæla til, at viðlikið verður sum petti 3 í uppskotinum um fassamálið:

»Løgtingið viðmælir at geva (koncession) játtan til J. K. Joensen, Jens Rasmussen, S. Ellefsen, Karl A. F. Joensen og Heine Joensen, Miðvági, at útvinna fossakraft til ljós og teknisk brúk frá Lambá, Hýsisá og øðrum áum nærhendis, ið kunnu veitast til.«

2. viðg. 24. nov. 3. viðg. 26. nov. Broytingaruppskotið samtykt 16—0. Nevndaruppskotið 21—0.

27. Kjøtrationering.

Frl. 29. sept. 1. viðg. 8. okt.

Álit (22. nov.):

Í seinastu tingsetu legði Føroya arbeiðarafelag sak inn á ting um at fáa kjøtbýtan í lag, soleiðis at øllum varð tryggjað ein ávísan part av kjøti.

Málið var til viðgerðar á tingi, og varð viðlikið uppskot um at heila á teir, sum selja seyðakjøt at fyrireika søluna soleiðis, at kjøtið kom javnt út millum manna, og at ansa eftir, at einstakir persónar ikki fingu høvi til at leggja ov nógv kjøt inn undir seg. Eisini varð beitt á amtmannin at tinga við bretska konsulin um, at kjøt, sum umvegis verður keypt av bretskum hermonnum fyri egna rokning, skal verða samsýnt Føroyingum í somu nøgd aftur úr Bretlandi út yvir tey 100 tonsini, ið vit hava tilsøgn um. Valutamiðstøðin varð biðin um at skipa innflutning og útsølu av teim 100 tonsunum av kjøti, Føroyingar høvdu fingið lyfti um at fáa úr Bretlandi, soleiðis at kjøtið varð býtt út í hóskandi nøgdum út um alt landið til tess, at tað máti koma øllum fólki til góðar. Tey, sum ávísiliga høvdu verið væl fyri at fáa falur í fvaleysa nógv av tí í Føroyum framleidda kjøtinum, varð hildið, skuldu ikki fáa høvi til at keypa innflutt kjøt meir enn í ógvuliga smáum nøgdum.

Í einum seráliti 1942 mælti nevndin tinginum til at samtykkja at heimila landsnevndini at gera reglur til kunngerðar um kjøtrationering frá Ólavsøku 1943, um nevndin helt tað verða neyðugt. Uppskotið varð samtykt, og tann 27. februar 1943 samtykti landsnevndin at biðja løgtingsskrivstovuna saman við amtsskrivstovuni gera uppskot um tílíkar reglur. Amtið upplýsir, at tað er soleiðis skipað í Bretlandi, at hvørt fólk fær loyvi til hvørja viku at keypa kjøt fyri ásettan pening f. t. 1 sh. Annars hevur bretski státurin eftirlit yvir øllum, sum verður slaktað og setur mark fyri, hvussu nógv búnaðarmenn kunna nýta til egið húsarhald. Amtið viðmerkir, at tann bretska skipanin neyvan kann selast í gildi her í Føroyum, og at tað tykist at vera ógvuliga ivingasamt, um tað yvirhøvur er gjørligt at stovna eina rationering, sum kann væntast at verða bert á leið til at gerast rættvís.

Málið hevur síðani verið lagt fyri búnaðarráðgevaran, sum í skrivi dagsett 26. juni 1943 sigur, at hann má ráða frá, at nakað verður gjørt, vísandi til, at føroysk viðurskifti gera tað ógvuliga ivingasamt at fáa í lag eina rættvísa skipan.

Amtið sendir so málið aftur til landsnevndina við hesum viðmerkingum. Tað fer at vera ógvuliga trupult at gera reglur fyri eini rættvísari býtan av kjøti. At gera reglur fyri heimanýtslu, kann kanska gerast, men tað verður at kennast sum eitt álvarsamt tiltak frá tí almenna móti teimum, sum framleiða kjøtið, og tað verður at kalla ógjørligt at hava eftirlit við tílíkum reglum. Eisini fer tað at verða trupult at ansa eftir, at kjøtið í skurðinum kemur víða um, serliga tí ein heilt lítil partur fer gjøgnum kjøtbúð, og tað verður heldur trupult at senda kjøtið og goyma tað, til tað verður sent. Amtið heldur, at kjøtstøðan yvirhøvur er batnað vegna tey betri líkindini til at fáa kjøt

úr Bretlandi, og at lann støðan, sum nú er, kann sigast at vera so góð, sum ein kann væntu.

Føroya arbeiðarafelag hevur aftur í ár í riti av 26. september 1943 biðið lingið um at fáa í lag eina býlan av kjøtinum.

Nevndin hevur býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meiriluta (Kr. Djurhuus, J. F. Kjølbro, R. Long, J. Patursson, Th. Petersen og J. M. Fr. Poulsen) má vísa til tað, sum er farið fram í málinum í 1942 og samráðingarnar síðani. Tað er veruligt soleiðis, at sum viðurskiftini eru her í Føroyum, er ógvuliga ringt at finna fram til ein heilt rættvísan býtishátt av kjøti. Eitt nú seyðakjøtið, sum altíð liggur okkum Føroyingum fremst í huga, so er tað nógva av framleiðsluni í smábygdum, sum ikki hava so góð samferðsluviðurskifti, at tað er gjørligt at flyta seyðin í livandi lívi út um landið. Tað átti at verið meira gjørt fyri at sleppa seyðinum undan píslu á ferð millum oyggjarnar ofta í heilt ótíðarhóskandi førum. Okkara frændur Íslendingarnir hava sett bannu fyri at binda seyð niður og flyta hann; vit áttu at havt nakað tað sama fyri eyga. Seyðakjøt má ein eisini í hesi tíð eina mest rokna við til viðskera og ikki til dognarðamat; smábygdir, sum hava útiróður, hava ikki stórt annað at lívi á, skal tað ikki verða svangligt hjá monnum, tá teir farn til havs. Eisini má ein minnast til, at tað kjøt, sum kemur her til lands frá útheimunum sjáldan røkkur longri enn til tær størstu bygdirnar, soleiðis at ein mísmunur, sum kundi verið millum, hvat seyðakjøt kemur til hvørt húsið í bý og á bygd verður afturbøttur av øðrum kjøti, sum kemur í handilin.

Meiriluta heldur tað ikki vera gjørligt, at bøta uppá úthýtan av seyðakjøti við lógarreglum og setur tí ikki uppskot fram um hetta. Harafturímóti heldur nevndin tað verða beint at heita á sóknarstýrini, serliga í teimum størru plássunum, og á fyrisloðunnenninar fyri sjúkrahúsini um í góðari tíð at royna at vissa sjúkrahúsunum tann seyð, sum teimum førvar, og tann seyð, sum sóknarstýrini kunna siggja, at fólk úr bygdini ikki av egnu ávum kunna fáa sær hendur á. Nevndin ger uppskot samsvarandi.

Minniluta (P. M. Dam) heldur fram:

Tað má ásannast, at soleiðis, sum kjøtsølan tað seinasta árið hevur ligið, hevur tað verið ílt hjá einum stórum parti av fólkinum at fingið seyð til keyps. Hetta er ógvuliga tvørligt. Tað er jú soleiðis, og hevur verið so ígjøgnum tíðirnar, at tað heim, ið ongan seyð fær at slakta, kemur tað sum ein ógvuliga stóran sakn. Hetta ræður serliga, har ið nógv børn eru í húsi. Tað má tí haldast at vera neyðugt at fáa eina skipan í lag at tryggja hvørjum heimi í Føroyum rættin og møguleikan at fáa t. d. ein seyð uppá fólkið at slakta.

Hetta kann gerast, tí í Føroyum er tann árligi seyðaskurðurin um 40.000 í tali, meðan fólkatalið liggur millum 27.000 og 30.000. Um hvørt menniskja fær møguleikan til at keypa ein seyð, verður so statt eitt avlop uppá einar 10.000—13.000 skurðseyðir.

Tað er rímligt og rætt, serliga fyri teir seyðaeigarar, bøndur og aðrar, sum hava arbeiðsfólk, at fáa rætt til av sínum skurði at halda meir afturí enn ein seyð uppá fólkið í húsinum, eisini er tað neyðugt at skipa fyri, at t. d. sjúkrahúsunum, ellisheiminum og hvíldarheimunum verður tryggjað ein hóskandi nøgd av seyðakjøti. Gístingarhús og matstøð lerva sjálvandi eisini at fáa atgongu til at keypa seyð, men hesi mugu ikki koma í fyrstu syftu, um so er, at nøgdin av seyðakjøti ikki røkkur til frammanundan nevndu fólk og stovnar.

Minniluta heldur, at tað ber til at fáa fylgjandi skipan í lag:

1. Allir bøndur í einbýttum høgum og hagastýrini í felags- og kenningarhøgum skulu til prísseftiransingarráðið siga frá:

   a) Hvussu nógv menn vænta verður skorið í teimum høgum, teir hava við at gera.
   b) Hvussu nógv fólk, ið fáa henda skurð.

2. Hvørt húski, ið vil hava seyð til keyps, má áðrenn eina áselta tíð til prísseftiransingarráðið geva upp, hvussu nógvan seyð, ið yuskist til keyps. Við hesi uppgávu má fylgja váttan frá sóknarstýrinum um fólkalalið í húsinum. Sjúkrahúsini, ellisheimini eins og hvíldarheimið mugu, um tey yuskja seyð til keyps, geva upp til prísseftiransingarráðið, hvat ið tey hava fingið av seyðaslukti og seyðakjøti um árið tey seinastu 5 árini.

   Gistingarhús og matstovur skulu, um tey yuskja seyð at slukta, søkja til prísseftiransingarráðið at fáa upplýst, hvussu nógvur seyður kann fáust og hvar ið hann kann keypast.

3. Skjótast møguligt aftaná umsóknar- og uppgávufreistina til prísseftiransingarráðið skal ráðið lata teir, ið hava seyð at selja, vita, hvussu nógvan seyð, teir skulu lata, og til hvønn. Samstundis skal ráðið lata viðkomandi keypara vita, hvaðani hann kann fáa seyðin, eins og lata hann vita treytirnar fyri keypinum.

4. Avgreiðsluna av seyðinum mugu keparin og seljarin, um tað er gjørligt, koma til sættis um. Annars eigir avgreiðslan at fara fram á vanligan hátt. Tað er rímiligt, at seyðaseljarin selir fyrst til sínar bygdamenn og tey, ið liva honum næst.

5. Kann seyðaseljarin ikki avgreiða seyðin við vanligum rutuferum, ella heimlar keparin, ið býr á staðnum, har ið seyðurin verður tikin, ikki seyðin sama dagin, ið fjallið er gingið, eigir seyðaeigarans søluskylda at vera burturdoltin.

6. Seyðaseljarin skal hava ræti til at krevja av keyparanum, at tyngdin av krovinum verður vigað av einum av tí almenna ávístum kjøtvigara, og eigir keparin at gjalda hesum vigara fyri ómakin eina samsýning, ið t. d. er svarandi til tímans lønina. Tað verður álagt sóknarstýrunum (í Havn býráðnum) at ávísa kjøtvigaran.

7. Seljarin eigir at hava ræti til, um hann heldur tað verða neyðugt, at krevja seyðin goldnan í hondina, áðrenn hann letur hann frá sær. Skuldi tað vísl seg, at seyðurin sambart ta autoriseraðu vigingina av krovinum er goldin við einum hægri ella lægri prísi enn tí áselta tákmarksprísinum, kunnu atvikavist keparin ella seljarin krevja munin afturgoldnan.

8. Tá tað ikki eru stundir hjá tinginum at føra tær neyðugu samráðingarnar við seyðaeigararnar og aðrar um, hvussu býtanin av seyðinum skal falla, er tað neyðugt, at landsnevndin saman við prísseftiransingarráðnum fær upp í hendi at gera reglugerð fyri, hvussu býtanin skal fara fram.

Uppskot:

Frá meiritutnum (Kr. Djurhuus, J. F. Kjølbro, R. Long, J. Paturssen, Th. Petersen og J. M. Fr. Poulsen):

1. Løgtingið heitir á stýrini fyri sjúkrahúsini um í góðari tíð at vissa seyð til sjúklingar.
2. Løgtingið heitir á sóknarstýrini um at unsa eftir, um tað í bygdini eru hús, sum ikki á vanligan báti kunnu væntast at fáa vissað særseyð til heystið, og um so er at royna at útvega hesum fólkum algongd til at keypa nakað av seyði.

Frá minnilutanum (P. M. Dam):

Midlertidige Bestemmelser for Færøerne

om Køb af Faarekød.

I Medfør af Lov Nr. 288 af 2. September 1939 bestemmes herved følgende:

§ 1.

Det paahviler Haugebestyrelserne i Fællershauger og Kenningshauger, samt de enkelte Jordejere i udskiftede Hauger til Priskontrolraadet paa dertil indrettet Blanket at indsende Oplysning om

a) det Antal Slagtelam (inclusiv avdeyðuseyð og geldseyð), hver Jordejer dels har faaet og dels endnu har Ret til, og
b) Antallet af Personer i hver af de paagældende Jordejeres Husstand, indbefattet Tjenestefolk.

Indberetningspligten omfatter ikke Jordejere, der kun har Ret til 3 eller færre Slagtelam.

§ 2.

Husstande, der ikke selv har Slagtelam, og som ikke har købt eller truffet bindende Aftale om Levering af Slagtelam, kan til Priskontrolraadet indsende Ansøgning om Anvisning af Sælger af Slagtelam.

Ansøgningen indgives paa særlig Blanket og skal indeholde Oplysning om Antallet af Personer i Husstanden. Ansøgningen skal være forsynet med Forstanderskabets (Byraadets) Attestation af Rigtigheden af de givne Oplysninger.

Hospitaler, Alderdomshjem, Hvilehjem, Hoteller, Restaurationer o. lign. kan efter Ansøgning faa anvist Sælgere af Slagtelam.

§ 3.

Priskontrolraadet kan paalægge Jordejerne at sælge Slagtelam til Købere, der har ansøgt om Anvisning af Sælger.

Ved Udfærdigelsen af Paalæg skal følgende Regler iagttages:

1. Jordejere, der har mindre end 2 Slagtelam for hvert Medlem af Husstanden kan ikke tilpligtes at sælge Slagtelam.
2. Købere i den Bygd, hvor Sælgeren bor, skal have Fortrinsret til Køb af Slagtelam.
3. Indenbygds Købere skal selv afhente Lammene paa den af Sælgeren angivne Dag. Afhentes Lammene ikke paa den af Sælgeren angivne Dag, bortfalder hans Salgspligt.
   Til udenbygds Købere er Sælgeren pligtig at levere Lammene ombord i Rutebaad eller andet Fartøj til Forsendelse til Køberen.
4. Afregning af Lammene skal ske efter Maksimalprisen.

§ 4.

Sælgeren har Ret til at forlange kontant Forudbetaling af Lammene efter en af ham anslaaet Vægt. Viser det sig ved den efterfølgende Vejning, at der er erlagt for meget i Betaling, skal Sælgeren refundere Køberen det for meget erlagte Beløb; er der erlagt for lidt, skal Efterbetaling ske.

§ 5.

Forstanderskabet (Byraadet) skal udpege een eller flere autoriserede Vejere i hver Kommune. Vejerne skal efter Anmodning udstede officiel Vægtseddel paa Lammenes Slagtevægt.

Sælgerne kan forlange, at Afregning af Lammene sker efter Vægtseddel.

§ 6.

Nærmere Forskrifter om Gennemførelsen af de i nærværende Bekendtgørelse givne Regler udfærdiges af Priskontrolraadet.

§ 7.

Overtrædelse af nærværende Bestemmelse straffes efter Loven.

Disse Bestemmelser træder i Kraft den 1. Januar 1944.

Brúðfengis reglur fyri Føroyar

um keyp av seyðakjøti.

Eftir lóg nr. 288 av 2. september 1939 verða eftirfylgjandi reglur ásettar:

gr. 1.

Hagastýrið í felagshøgum og kenningarhøgum eins og teir einstaku jarðaeigararnir í útskiftum høgum skulu til príseftiransingarráðið á serlig útfyllingarbløð siga frá

a) hvussu nógvan skurðseyð (avdeyðaseyð og geldseyð), hvør jarðaeigari annaðhvørt hevur fingið ella enn hevur rætt til, og
b) hvussu stórt húskið hjá hvørjum hesum jarðaeigara, uppfroknað arbeiðsfólk, er.

Frágreiðsluskyldu hava ikki jarðaeigarar, ið bert hava rætt til 3 ella færri skurðseyðir.

gr. 2.

Háski, ið sjálv ikki eiga skurðseyð, og sum ikki hava keypt ella gjørt bindandi avtalu um at fáa skurðseyð, kunna senda umsókn til príseftiransingarráðið um at fáa seljara av skurðseyði ávístan.

Umsóknin verður latin á serligum útfyllingarblað og skal greiða frá, hvussu nógv húsfólk eru. Sóknarstýrið skal vátta, at upplýsingarnar í umsóknini eru rættar.

Sjúkrahús, ellisheim, hvíldarheim, gistingarhús, matstøð og tílík kunna eftir umsókn fáa seljara av skurðseyði ávístan.

gr. 3.

Príseftiransingarráðið kann áleggja jarðaeigarunum at selja skurðseyð til keyparar, ið hava søkt um at fáa seljara ávístan.

Tá hetta verður lagt á, verður farið eftir hesum reglum:

1. Jarðeigarar, ið hava færri enn 2 skurðseyðir til hvørt húsfólkið, kunna ikki bindast til at selja skurðseyð.
2. Keyparar í teirri bygd, har seljarin býr, eiga fremsta rætt til at keypa skurðseyð.
3. Innanbýggja keyparar skulu sjálvir koma eftir seyðunum á tí degi, seljarin ávísir. Verður ikki komið eftir seyðunum á tí av seljaranum ásetta degi, er hann leysur frá søluni.
   Til uttanbýggja keyparar hevur seljarin skyldu at lata seyðirnar í fast ferðandi bát ella annað far til at verða sendar keyparanum.
4. Roknskapur fyri seyðirnar verður uppgjørdur eftir hámarksprísinum.

gr. 4.

Seljarin hevur rætt til at krevja seyðin goldnan í hondina frammanundan eftir vekt, sum hann hevur mett sjálvur. Roynist tað, tá seyðurin seinni verður vigaður, at ov mikið er goldið, skal seljarin gjalda keyparanum lað aftur, sum hann hevur latið ov mikið; er ov lítið goldið, verður hetta javnað aftaná.

gr. 5.

Sóknarstýrið (býráðið) skal nevna ein ella fleiri góðkendar vegarar í hvørjari sókn. Vigararnir skulu eftir áheitan geva almennan vektseðil um, hvussu nógv seyðurin vigar.

Seljarin kann krevja, at roknskapur fyri seyðin verður gjørdur eftir vektseðli.

gr. 6.

Nærri forskriftir um, hvussu hesar reglur verða settar í verk, verða gjørdar av príseftiransingarráðnum.

gr. 7.

Brot av hesum reglum verður straffað eftir lógini.

Hesar reglur koma í gildi 1. januar 1944.

2. viðg. 24. nov. 3. viðg. 26. nov. Minnilutauppskotið fall 5—0. Nevndaruppskotið samtykt 18—0.

28. Umboðsmaður í Íslandi.

Frl. 29. sept. 1. viðg. 6. okt.

Álit (4. dec. J. Patursson við fyrivarni):

Tann 26. september 1943 skrivar Føroya arbeiðarafelag til tingið um at umhugsa at fáa sett ein føroyskan umboðsmann í Íslandi, og leggja teir aftrat, at hetta kundi verið Føroyingum til stóra hjálp, bæði hvat ið viðvíkur arbeiðarum á landi og sjómonnum okkara. Síðani halda brævaskrivararnir fram, at hetta ikki er fyri at seta nakað niður á ta donsku sendimannastovuna, ið hevur verið Føroyingum væl hugað, men fyri at Føroyingar kunna hava ein Føroying at koma til, tá ið umræður.

Tann 30. september 1943 løgdu nevndarlimirnir Kr. Djurhuus og Joh. M. Fr. Poulsen fram soljóðandi skriv í fíggjarnevndini:

»Í samanburði við málið um at velja mann til at umboða okkum Føroyingar á einari millumlanda »kongress« til viðgerðar av yvirskum fiskivinnumálum skjóta vit undirritaðu, ið umboða Løgtingsins samhandsflokk á tingi í fíggjarnevndini, uppá beinanvegin at velja eina nevnd uppá 5 limir til saman við daniska sendimanninum (Gesandtinum) at tingast við bretska stýrið um innflytingarviðurskifti (kvota) fyri okkara exportvørur og onnur lørvandi vinnumál.«

Nevndin hevur likið hesi bæði mál til viðgerðar undir einum. Allir í nevndini eru samsintir í, at tað er ein spurningur, sum gjølla eigur at verða umhugsaður, hvussu Føroyinganna viðurskifti best kunna umboðast, tá talan er um samhandil og samvirki við onnur lond. Øll nevndin tekur undir við Djurhuns og Poulsen um, at tað eigir at verða skipað so fyri, at útsendingar hiðani kunnu koma á tal við umboðsmenn Bretastjórnarinnar um søluviðurskifti okkara, serliga sum ávíst er um lítkindini fyri, at Føroyingum aftaná bardagatíðina verður loyvt at flyta ein munagóðan part av ferskum fiski til Bretlands, tá hetta hevur alstóran týðning fyri framtíðina.

Um spurningin skal nevndin úttala, at samráðingar mugu fara fram við vinnufeløg her í Føroyum um, hvussu hetta mál kann verða loyst sum best, og skrivað má verða til Bretlands um at fáa lagt til rættis, at tílíkar samráðingar kunnu fáast í lag, og nevndin setur í uppskot fram um, at landsnevndin fær upp í hendi at taka tey neyðturvuligu slig fyri at samráðingar kunnu fáast í lag við tað fyrsta, og at landsnevndin verður heimilað til at nýta tann neyðturvuligu peniog til hetta endamál. Tað kann viðmerkjast, at viðgerðin av hesum máli hevur tarnað í nevndini, serliga av tí at stjórnarskipanarmálið tók so langa tíð, áðrenn tað kom til endaliga viðgerð.

Øll nevndin undantikið P. M. Dam, skal viðmerkja um spurningin at senda mann til Íslands og kanska eisini til Bretlands, at tað er nógv, ið talar fyri hesum. Tað má tó eisini her verða sagt, at neyðugt verður at tingingar fara fram við vinnufeløg her í Føroyum, og at tað verður eftirkannað, hvussu nógvur peniogur skal til fyri at seta

hetta í verk. Meirilutin skjýtur tí upp, at hesin spurningur verður kannaður av landsnevndini í samband við tann fyrr nevnda spurningin. Meirilutin (J. F. Kjølbro, R. Long, J. Patursson og Th. Petersen) heldur fram, at beinast var, um vit Føroyingar kundu havt okkara umboðsmann, soleiðis at hann hevði heimild til sjálvstøðugt at taka upp samráðingar við utanlanlanda stjórnarumboð, men meirilutin vil ikki vísa burtur tankan um, at tað kann verða beint at senda menn av stað, um teir so skuldi verið undir donskum sendimanni í teirra starvi; her eiga upplýsingar at útvegast um, hvussu teirra støða vil verða á donsku sendimannaskrivstovuni.

Minnilutin P. M. Dam heldur fram: Føroya javnaðarflokkur legði í 1939 mál inn á ting um at senda menn til Íslands og til Bretlands sum umboðsmenn fyri tær føroysku vinnu- og handilsinteressurnar.

Javnaðarmenn hava altíð verið greiðir yvir, at tað vil kunna hava alstóran týdning, at vinnulívið hevur sínar føstu umboðsmenn og tænarar í t. d. Íslandi og Bretlandi, ið eru tey lond, vit í hesum tíðum hava samband við.

Minnilutin tekur tí heitt undir við Føroya arbeiðsmannafelag, tá ið tað setur ynski fram um at fáa ein mann úr Føroyum sellan til at vera arbeiðs- og fiskimonnum til hjálpar í Íslandi. Av skrivi Føroya arbeiðsmannafelagsins gongur, at felagið heldur tað vera náttúrligt, at hesin maður (menn) verður at arbeiða saman við tí danska gesantskapinum.

Minnilutin heldur tað ikki vera av minni týdningi, at Føroyingar hava ein viðvíkjandi tí føroyska vinnulívinum og handilsskapinum út og inn kunan mann sitandi t. d. í London fyri saman við tí danska gesantskapinum at ganga føroyskum interessum til handa.

Sambart hesa sína støðu setur minnilutin uppskot um at mæla fiskimannafeløgunum, Føroya arbeiðsmannafelaginum og reiðara- og handilsmannastattinum til at royna at fáa sent ein mann til Íslands og ein til Bretlands fyri har í felag og í samarbeiði við teim donsku umboðsmonnum at vera føroyskum arbeiðs- og fiskimanna eins og vinnulívsins og handilsins interessum til handa.

Løgtingið eigur at veita munagóðan stuðning til hesar vinnulívsins og handilsins umboðsmenn hjá Føroyum í Íslandi og Bretlandi.

Uppskot:

Frá allari nevndini, (og P. M. Dam í aðru syftu).

Málið um at senda umboðsmannnevni til Bretlands til samráðingar um innflytingarviðurskiftini og annað, og spurningurin um at senda menn til Íslands og Bretlands, verða vístir til landsnevndina. Landsnevndin verður biðin um beinanvegin at fáa samráðingar í lag við vinnufeløg her í Føroyum um hesar spurningar; síðani at senda fyrispurning til Bretlands um at fáa samráðingar lagdar til rættis.

Landsnevndin verður heimlað lingsins vegna, at taka avgerð í hesum málum, og at nýta tann pening, sum tørvur er á, fyri at fáa tey framd.

Frá minnilutanum (P. M. Dam):

Løgtingið viðmælir og góðkennir, at úr Føroyum verða sendir ein maður til Íslands og annar til Bretlands at fremja og styðja tær føroysku vinnulívsinteressur í hesum londum.

Løgtingið gongur út frá, at hesir umboðsmenn vinnulívsins verða at arbeiða í næstu samvinnu við tað danska umboðið, og væntar, at danska umboðið vil veita teim føroysku vinnulívsmonnum neyðturvuligan stuðul og hjálp.

Teir føroysku vinnulívsumboðsmenninir skulu verða valdir og útsendir av teim tveimum fiskimannafeløgunum, Føroya arbeiðsmannafelaginum, reiðarafelaginum og keypmannafelaginum í Føroyum, hvørt felagið hevur sína atkvøðu.

Løgtingið skal góðkenna valið av monnunum, og ífall atkvøðutalið verður at standa á jøvnum, skal landsnevndin avgera, hvør av teim, ið talað er um at velja, skal verða útsendur.

Tingið játtar sum tilskot til útsendingarnar upp til 50.000 kr. úr amtsgrunninum til hvønn mannin, soleiðis at treytirnar fyri rindan av tilskotinum skulu verða ásettar av landsnevndini.

2. viðg. 7. dec. 3. viðg. 8. dec. nevndaruppskotið samtykt 22—0. Minnilutauppskotið fall 6—0.

---

29. Umboðsmaður til ráðstevnu í Bretlandi.

Alit (1. okt.):

Tingingar hava farið fram um at fáa atgongd fyri umboðsmanni úr Føroyum at luttaka í ráðstevnu, ið verður millum Ameriku — Bretland og Ísland um fiskaprísarnar í Íslandi. Eitki er enn gjørt av um hetta.

Nú er bræv komið frá amtmanninum, dagsett 24. september, um, at danski sendimaðurin í London sigur frá, at ætlanin er at hava eina internationala fiskivinnustevnu fyrra partin av oktober í ár til viðgerðar av spurninginum um fiskivinnulógreglana og um vernd av fiskakyklinum í Norðatlantinum og norðaru høvum.

Sendimaðurin spyr, um Føroyingar ynskja at senda umboðsmann til nevndu stevnu, og biðir amtmaðurin um tingsins ummeli.

Fíggjarnevndin setur fram hetta

Uppskot:

1. Tingið velur mann at fara til umtalaðu internationalu fiskivinnustevnu.
2. Útreiðslurnar verða goldnar úr amtsgrunninum.

2. viðg. 6. okt. 3. viðg. 9. okt. Pt. 1 samtykt 21—0, pt. 2 við 18—0.

30. Socialhjálp.

Uppskot frá Dam o. fl.:

Meðan tingið situr í 1943 verður givið eini nevnd uppá 3 limir, ein úr hvørjum flokkinum, í hendi at býta út sociala hjálp til treingjandi, ið søkja um hjálp.

12. okt. samtykt 21—0.

---

31. Hjálp til flýggjandi í Svøriki.

Uppskot frá J. Patursson og fl.:

Tað er løgtinginum kunnigt, at ein hópur av fólki er flýddur úr Danmørk til Sviaríkis, harímillum einstakir Føroyingar. Tað er eisini tinginum kunnigt, at hesi flýddu fáa hjálp frá tí svensku stjórnini og aðrastaðni frá.

Fólkaflokkurin á tingi skal loyva sær at skjóta upp, at tingið veitir eina gávu til tey av teimum flýddu, sum treingja til eina eykahjálp fyri at sýna teimum, at Føroyingar eisini hugsa um teirra kor.

Flokkurin skal skjóta upp, at tað úr tí sociala grunninum verður veitt 3000 St. pd. og sent til svensku utanríkisstjórnina at lata til tey úr Danmørk flýddu, sum treingja til hjálp.

Broytingaruppskot frá A. Samuelsen o. fl.:

Á tingi liggur frammi uppskot um at veita úr sociala grunninum 3000 St. pd. til tey úr Danmørk til Svøriki flýddu fólk, sum treingja til hjálp.

Undirritaðu mæla til í staðin fyri at veita 100.000 kr. av avlopinum í amtsgrunninum pr. 31. dec. 42 til sama endamál.

Peningurin verður latin til danska gesandtskapið í Stockholm. Føroya amt fyrireikar málið sum best og skjótast.

Uppskot:

Úr amtsgrunninum verður veitt 100.000 kr. av avlopinum pr. 31. dec. 1942, og verður peningurin at nýta sum studningur til danskar

statsborgarar í Svørfki, sum flýddur eru úr Danmørk, so langt hann røkkur.

2. viðg. 15. nov. 3. viðg. 19. nov. Uppskotið fall 11—0. Broytingaruppskotið samtykt 22—0.

---

32. Politistur í Fuglafirði.

Frl. 17. nov. 1. viðg. 19. nov.

Álit (29. nov.):

Sóknarstýrið fyri Fuglafjarðar kommunu hevur 18. oktober 1943 skrivað til fútan um at fáa politist settan í Fuglafirði eftir somu reglugerð, sum er galdandi fyri politistin í Nes sókn. Sýslumaðurin gevur sítt viðmæli og sigur frá, at hann eftir samráðing við sóknarstýrið hevur fingið upplýst, at lønvilkorini ætlast at skula verða 300 kr. um mánaðin, helvtin at rinda úr amtsgrunninum og helvtin av kommununi og frían búnað (uniform) annaðhvørt ár frá kommununi.

Fútin gevur sítt viðmæli til málið, og amtið hevur seut tað til tingið.

Málið hevur verið til viðgerðar í Fíggjarnevndini og nevndin kann undir teimum núverandi umstøðunum mæla til, at politistur verður settur í Fuglafirði, og at amtsgrunnurin rindar helmingin av útreiðslunum. Nevndin skal tó viðmerkja, at henda samtykt tingsins er at fata eins og tingsins játtanir til at seta politistar í Nes sókn og í Vágum sum ein bráfengis skipan fyri hesa ófriðartíð, soleiðis at málið má verða viðgjørt av nýggjum, skuldi sóknarstýrið yvskt at fingið politist í Fuglafirði, tá hesin bardagi er avtornaður.

Fíggjarnevndin mælir tinginum til at samtykkja hetta

Uppskot:

Ein kommunalur politistur verður settur í Fuglafirði. Amtsgrunnurin rindar helvtina av útreiðslunum.

2. viðg. 2. dec. 3. viðg. 3. dec. Samtykt 25—0.

---

33. Myndahøggarakynstur.

Uppskot frá R. Long o. fl.:

Listarmaðurin Eivind Dalsgaard hevur sent bræv til tingið og biðið um 6000 kr. í studning til uttanlandsferð, at búgva seg í myndahøggarakynstri.

Eivind Dalsgaard hevur sýnt so frálíkar listargávur, at um alt lagar seg væl, má tað væntast, at hann kann koma at skapa listarverk, ið kunna vera tjóðini til miklan heiður.

Vit mæla tí til, at tingið veitir honum 3000 kr. í studning til uttanlandsferð.

Uppskot:

Úr amtsgrunninum verður at veita Eivind Dalsgaard 3000 kr. í studning til uttanlandsferð, at búgva seg í myndahøggarakynstri. Landsnevndin verður heimlað at ávísa peningin til útgjaldan, tá ið ferðin kemur í lag og hon hevur góðtikið ferðarætlanina. Studningurin er treytaður av at hann verður nýttur innan 1. juli 1945 og at Løgtingið fær skrivliga frágreiðing frá ferðini.

2. viðg. 6. dec. 3. viðg. 7. dec. samtykt 17—0.

XIV. VAL AV ÁLITISMONNUM OG NEVNDUM

1 og 2. **Fólkatingsvalnevnd og løgtingsvalnevnd:**

Teir sómu sum í fjør, undantikið Suðurstreymoy, har Johs. O. Joensen gekk út og Peter Egholm, reiðari, Tórshavn, kom ístaðin og Rikard Long gekk út og H. A. Djurhuus, lærari, Tórshavn, varð valdur og Vága sýsla har Niclas Rasmussen gekk út og Danial Danielsen, lærari, Sørvágur varð valdur í hansara stað og Ole Jacobsen gekk út og Heine Joensen, Bø, kom í hansara stað.

3. **Landsnevndin:**
A. Samuelsen, Kr. Djurhuus, P. M. Dam, Thorstein Petersen, Poul Petersen. *Tiltaksmenn:* Tr. Samuelsen, Johan Poulsen, J. P. Davidsen, Richard Long, Pauli Dahl.

4. **Telefonnevndin:**
O. F. Joensen, J. Fr. Øregaard, A. Sørensen. *Tiltaksmenn:* Hans Iversen, J. P. Henriksen, R. Rasmussen.

5. **Bróstsjúkrahúsnevndin:**
Tr. Samuelsen, J. P. Henriksen, R. Long. *Tiltaksmenn:* O. F. Joensen, P. M. Dam, A. Sørensen.

6. **Vørunevndin:**
A. Samuelsen, H. Iversen, J. P. Davidsen, J. P. Henriksen, J. F. Kjølbro, J. Slættenæs, S. Ellefsen. *Tiltaksmenn:* O. F. Joensen, Johan Poulsen, J. Fr. Øregaard, P. M. Dam, O. J. Jensen, A. Sørensen, P. Petersen.

7. **Kirkjustjórnin:**
J. Fr. Øregaard, Johan Poulsen, S. Ellefsen.

8. **Grannskoðarar til Færø Amts Sparekasse:**
Haakon Dam, lærari, Sandi, Joen Joensen, skrivstovumaður, Tórshavn. *Tiltaksmaður:* Ankjær Jensen, aut. revisor, København.

9. **Nevndin fyri Føroya realskúla:**
Jens Pauli í Dali, Tórshavn.

10. **Nevndin fyri s/f Føroyar:**
Johan Poulsen, lærari, Strondum, O. J. Jensen, skipari, Tórshavn.

11. **Umboðsmaður tingsins á aðalfundi s/f Føroyar:**
Louis Zachariasen, telefonstjóri, Tórshavn.

12. **Umboðsmaður tingsins á aðalfundi p/f Sjóvinnubankin:**
S. P. Zachariasen, lærari, Klakksvík.

13. **Skúlabókanevndin:**
P. M. Dam. *Tiltaksmaður:* J. H. Danbjørg.

14. **Stjórn viðv. Vinnulánsgrunnin:**
Poul Petersen. *Tiltaksmaður:* Thorstein Petersen.

15. **Nevndin fyri „Kong Kristian X's og Dronning Alexandrines Legat":**
Georg Lindenskov Samuelsen, blaðstjóri, Tórshavn.

16. **Stýrið fyri jólamerkjalegatið:**
Edw. Mitens, stjóri, Tórshavn.

17. **Búnaðarráðið:**
Kristian Djurhuus, sýslumaður, Tvøroyri. *Tiltaksmaður:* Hans Iversen, keypmaður, Kvívík.

18. **Stýrið fyri Tryggingarsambandið Føroyar:**
Kristian Djurhuus, sýslumaður, Tvøroyri.

19. **Yvirpolitirætturin:**
Trygve Samuelsen, Tórshavn, Vilhelm Tórshelm, s. s. *Tiltaksmenn:* H. A. Djurhuus, timburmaður, Tórshavn, Hans J. Guttesen, Vestmanna.

20. **Vegastýrið:**
Joen Rasmussen, keypmaður, Sørvági, Joen P. Hentze, Trøðum, Sandi, J. P. Davidsen, løgtingsmaður, Sandi. *Tiltaksmenn:* Hans Iversen, løgtingsmaður, Kvívík, J. Paturssen, løgtingsmaður, Kirkjubø, P. M. Dam, løgtingsmaður, Tvøroyri.

21. **Yvirlikningarnevndin:**
Peter Egholm, reiðari, Tórshavn, í staðin fyri Martin Djurhuus, postassistentur, Tórshavn.

22. **Yvirbúnaðarstevnan:**
Poul Müller, bóndi, Tórshavn, í staðin fyri Martin Djurhuus, postassistentur, Tórshavn.

23 **Fiskarinevndin:**
P. M. Dam, lærari, Tvøroyri, í staðin fyri Rasmus Rasmussen, Tórshavn.

24. **Nevnd viðv. nevningagrundlistanum:**
Joen Rasmussen, keypmaður, Sørvági, í staðin fyri Niclas Rasmussen, Sørvági.

25. **4 limir til skútanevnd** (tingmál nr. II—10/43):
A. Samuelsen, løgtingsmaður, Fuglafirði, Martin Joensen, lærari, Sandvík, Pauli Dahl, læknir, Tórshavn, Rikurd Long, lærari, s. s.

26. **Hvalaveiðunevndin:**
J. P. Hendriksen, Tóshavn, Jens Chr. Olsen, Toftir, Pauli Dahl, Tórshavn, Rasmus Rasmussen, Fuglafirði.

27. **4 limir til búnaðarnevnd** (tingmál nr. VII-7/43):
Hans Iversen, Kvívík, J. Fr. Øregaard, Gøta, Elias Húsgarð, Syðrugøta, Páll Patursson, Kirkjubø.

28. **Fossamálanevndin** (tingmál nr. XIII—29/43):
J. Fr. Øregaard, Gøta, Johan Poulsen, Strondum, O. J. Jensen, Tórshavn, Rasmus Rasmussen, Fuglafirði.

29. **Nevnd viðv. staðanøvn** (tingmál nr. XIII—10/43):
P. M. Dam, Tvøroyri, Sverri Dahl, Tórshavn, Andreas Djurhuus, Vági.

30. **5 limir til fiskivinnunevnd** (tingmál nr. XIII—27):
P. M. Dam, Tvøroyri, Kristian Djurhuus, s.s., Jens Chr. Olsen, Toftir, O. J. Jensen, Tórshavn, Rasmus Rasmussen, Fuglafirði.

31. **Búnaðarnevndir:**
I. deild: Joen Justinussen, Svínoy, afturvaldur.
III. deild: Daniel Klein, Gjógv, afturvaldur.
IV. deild: Poul Johs. Joensen, Lorvík, afturvaldur.
V. deild: Jacob Samuelsen, Haldórsvík, afturvaldur.
VI. deild: Jacob A. Vang, Kaldbak, afturvaldur.
VII. deild: Peter Hejnesen, Sandavági, í staðin fyri Isak C. Johansen, Sørvági.
VIII. deild: Axel Dalsgaard, Skálavík, afturvaldur, og Elieser Sørensen, Dali, í staðin fyri Eisenberg Hentze, Sandi.
IX. deild: H. P. Albinus, Famjin, afturvaldur. Sum *tiltaksmaður* fyri Petur Næs, Hvalbø, varð valdur Niels Mørk, Sandvík.
X. deild: Peter Dahl, jun., Vági, í staðin fyri Johannes Larsen, Vági.

Hinir *tiltaksmenninir* fyri allar deildirnar afturvaldir.

Tingið endaði 8. dec., og fundirnir vóru 85.

Skjal A til løgtingsmál X-20: Rættargongureglur.

Hetta mál varð 16. september beint í stjórnarskipanarnevndina, sum sama dag samtykti at biðja Dan. Kr. Djurhuus og Thorstein Petersen sum undirnevni samráðast við báðar juristarnar, sum eftir eru í appelrættinum: Sorinskrivarin og Edw. Mitens, fyri at fáa greiði á hvørjir spurningar her lógu fyri at loysa. Hesar samráðingar fóru fram tann 29. september 1943, og vóru allir samdir um, at her vóru 3 spurningar:

1. *Viðgerð av borgarligum sakarmálum í fyrsta instans.* Eftir reglunum í kunngerð nr. 13 av 17. juni 1940 skuldu altíð luttaka tveir dómsmenn, tó at partarnir kundu falla frá hesum. Eftir hesu regla vóru so at siga altíð 2 dómsmenn, tí partarnir fullu ikki frá teirra rætti til hetta. Við kunngerð nr. 50 av 17. december 1942 varð hetta broytt soleiðis, at eingir dómsmenn skuldu vera í undirrættarmálum, meðan yvirrættarmál framvegis skuldu ganga eftir skipanini 1940. Í *royndi* vísti tað seg tó, at *nú* fullu partarnir frá at hava dómsmenn, og sorenskrivarin gav la upplýsing á fundinum $^{29}/_{9}$, at hetta var gjørt í øllum málum, soleiðis at eingin dómsmaður hevði virkað síðan 1. jan 1943.

   Spurningurin er nú: Skullu vit lógfesta tað, sum nú hevur vist seg í royndum, og heill strúka regluna um dómsmenn í øllum borgarligum málum?

   Hertil varð tað framhildið á fundi, *at* rættargongdarreglurnar í Danmørk, sum høvdu ásett reglur um dómsmenn, ikki nýla tær í borgarligum málum, *at* tað altíð er ivasamt at hava dómsmenn tøkar, tá teir í mánaðir ikki fáa eina sak til at viðgerða, og *at* tað, um so skuldi verið, at eitt hell hetta vera beint, kanska var beinast at nýta teir somu dómsmenn, sum vóru tøkir til straffasakir, tí teir vildu koma inn í rættargongunni í sínt heild.

   Flestir vóru á einum máli um, at tað er skeivt einans at hava dómsmenn til hetta endamál, og sorenskrivarin greiddi frá, at dómsmenn í Danmørk vórðu útvaldir soleiðis, at teir roknaðu við, at teir komu at virka í minsta lagi 4 ferðir árliga hvør.
2. *Í straffamálum* — uttan politisakir og nevningasakir — var fyrst ásett tann regla, at altíð skuldu vera tveir dómsmenn. Í 1942 varð hetta broytt soleiðis, at eingir dómsmenn skuldu vera í sakarmálum uttan álaluskrift, sbr. rættargongulógina, gr. 925. Hetta førdi við sær, at einans eitt lítið tal av dómsmonnum, sum vórðu tiknir frá nevningatistanum, kom til at virka.

   Her vóru flestir á einum máli um, at tað átti at fyriskipast so, at tað ikki vóru meir enn 20 dómsmenn, soleiðis at allir komu til at virka fleiri ferðir. Um tað verður avgjørt at hava 20 dómsmenn, kundi tað staðið fólki frítt at krevja dómsmenn í borgarligum sakarmálum (sí petti 1) av tí, at teir somu dómsmenn tá kundu verið nýttir.

3. *Við appel* var tann fyrsta reglan, at tað skuldi vera sorenskrivarin og 4 dómsmenn, ið dømdu. Hetta varð broytt í 1942 til sorenskrivarin, 2 av umtinum valdir juristar og tveir av tinginum valdir dómsmenn. Trupulleikar komu, og segði tann eini juristurin seg frá starvi sínum. Úrslitið er, at eingin sak hevur verið til viðgerðar nú í meiri enn 4 mánaðar. Her má tí koma ein broyting. Undir samráðingunum varð tað borið upp á mál at lata henda ræt vera samansettan av:

a) Sorenskrivaranum, skrivstovustjóra Mitens og trimum av tinginum valdum monnum.
b) Sorenskrivaranum, skrivstovustjóra Mitens og einum av tinginum valdum manni.
c) Sorenskrivaranum, skrivstovustjóra Mitens og einum sýslumanni, soleiðis, at ein varð valdur til hvørja sak, og hann ikki máti vera úr tí sýslu, sum nakar av pørtunum vóru úr.

4. *Kærumál* (sbr. gr. 4 í kunngerðini av 17. december 1942) kundu verða beind til appelrættin, um úrslitið varð b) ella c) undir 3., men annars má ein gera serreglu fyri hesum.

Tað sum varð mest umrøtt varð

5. *Hvussu dómsmenninir skuldu veljast.* Tað varð frá øllum síðum hildið fram, at løgtingið máti vera uppi í hasum vali.

Her varð skotið uppá at fyrireika tað soleiðis, at *ein nevnd* skuldi gera uppskot til tingið um 60 menn, og at tingið so millum hesar skuldi velja teir 20, sum skuldu vera dómsmenn eftir lutakasti. Líkaleiðis um tingið velur dómsmenn til appelrættin, at har verður uppskot um 18 menn, og tingið so velur 3 og 3 tiltaksmenn millum teir 18. Størsti trupulleikin er at siga, *hvør nevndin* skal gera hetta uppskot. Her varð skotið uppá amtið, sorenskrivaran, Mitens (sum juristur í appelrættinum) og/ella nevndin fyri veljan av nevningalistanum.

Sum tað sæst, eru her nógvir spurningar, sum nevndin (og flokkarnir) mugu taka støðu til og samráðast um, áðrenn lógaruppskot kann skrivast.

Tórshavn, 5. oktober 1943.

Th. Petersen.

Skjal B til løgtingsmál X-20: Rættargongureglur.

Viðmerkingar.

til 1. Í teim sakarmálum, har nú er algonga til at nýta dómsmenn halda vit tað vera beint, at hetta eisini verður loyvt í framtíðini. Tó má skilast til, at dómsmannaskipanin eftir okkara hugsan ikki fer at virka eftir tilætlan, uttan so, at dómsmenninir fáa høvi tit at vinna sær royndir í starvinum, tí meina vit, at má umhugsast, at nýta í hesum málum leir somu, sum valdir verða í straffirættarmálum.

til 3. Her er torført at taka stoða. Vit skulu bert viðmerkja, at samanselanin undir a) hevur tann vansa at juristarnir eru í minnilutu, hvat neyvan er heilt óttaleyst í hægstu rættaravgerðum, tá er tað betri hugsandi hert at hava 3 sum nevnt undir b) — Um at hava ein sýslumann við, soleiðis sum nevnt undir c) er ikki heilt óttaleyst, við tað, at administratiónin mest gjørligt eigir at verða bildin uttanfyri dómsvaldið.

Eftir okkara hugsan eigir her eisini at verða umhugsað tann møguleika at taka sorenskrivarafulltrúa Andreasen til dómara í øllum civilum sakarmálum í fyrsta instans, soleiðis, at sorenskrivarin ongantíð kemur í civilum rættarmálum at døma tvær ferðir.

Spurningurin um ein annan jurist fyri Harra Mitens skrivstovustjóra, tá hann ikki kann luttaka vegna inhabilitet má eisini umhugsast.

Allir eru greiðir yvir, at hesin spurningur er torførur í løtuni, men her var tað hugsandi at tikið 2 sýslumenn í hesum málum.

til 4. Hesin spurningur kann ikki greiðast áðrenn stoða er tikin tit spurning 3.

til 5. Her skal einans viðmerkjast, at eftir okkara hugsan má verða gjørt, hvat gerast kann fyri at dómsmenn ikki eru virkandi politikkarar. Annars kunnu vit væl hugsa okkum dómsmenn valdar av tinginum eftir lista, sum aðrir hava skotið upp, hvussu ein slík tilmælisnevnd eigir at verða samansett kann ivaleyst fáast semja um við samráðingum, um hesin vegur skuldi verið tikin.

Tórshavn, t. 14. oktober 1943.

Th. Petersen (sign). *P. Petersen* (sign).

Skjal C til løgtingsmál X-20: Rættargongureglur.

SAKFØRARAFELAG FØROYA

Thorshavn, 20. oktober 1943.

Til

løgtingsskrivstovuna,

her.

Tingmál nr. X-20/1943: Rættargongureglur.

Vit hava fingið skriv frá løgtingsskrivstovuni dagsett 15. oktober 1943, og hevur málið verið lagt fyri limirnar á einum felagsfundi.

Sannanhildið við frágreiðing av 15. oktober 1943 gr. 1, 2, 3, 4 og 5 hevur felagið samtykt at svara fylgjandi til hvørja einstaka grein:

Til 1. Borgarlig rættarmál í fyrsta instans: Mælt verður til, at dómsmenn verða heilt avtiknir.

Til 2. Straflisøkir í fyrsta instans: Skotið verður á at hava guldandi skipan, tó við tí broyting, at ásaknði kann frávalla dómsmenn, um hann vil.

Til 3. Appel av borgarligum rættarmálum og almennum rættarmálum: Skotið verður á, at appelrætturin verður at umfata sorinskrivaran, Edw. Mitens, stjóra, og C. Christensen, sakførara sum fastir lógkønir limir og 2 dómsmenn, sum ikki eru lógkønir. Sum fastan tilteksmann fyri teir lógkønu limirnar verður skotið uppá G. Dahl-Olsen, sýslumaður, Vestmanna.

Til 4. Kærumál: Ein skipan, ið svarar til ta galdandi, verður at upphalda.

Til 5. Nærri reglur um dómsmenn: Sambl. 16, sum omanfyri er nevnt skulu í mesta lagi tveir menn, sum ikki eru lógfroðingar, luttaka í hvørjum rættarmáli. Mælt verður til, at Løgtingið velur 6—12 fastar dómsmenn, og skulu so tveir við lutakasti lukast til hvørt mál. Hvør partur skal hava heimild, uttan at geva serliga grund herfyri, at koyra ein dómsmann burtur úr (í rúmari tíð frammanundan dómsviðgerðini) og skal so nýggjur maður við lutakasti verða valdur í hansara stað.

Tað bevði verið gott, um felagið fekk høvi at vera við, tá ið uppskot verður sett fram til val av dómsmonnum, av ti at hetta má haldast at vera av allarstørsta týdningi.

Leif Waagstein,
skrivari.

Skjal D til løgtingstingsmál X-20: Rættargongureglur.

FÆRØERNES RETSKREDS

Thorshavn, den 10. November 1943.

I Skrivelse af 28. Oktober 1943 (1943—311[39]) til Landfogeden (Politimesteren) paa Færøerne har Amtet anmodet saavel Landfogeden (Politimesteren) som mig om en Udtalelse over en i Færøernes Lagting behandlet Sag om mulige midlertidige Ændringer i den for Færøerne gældende Retsplejeordning.

For at fremskynde Sagens Behandling har Landfogeden (Politimesteren) den 4. November 1943 underhaanden overtadt mig Sagens Akter.

Foranlediget heraf skal jeg udtale følgende:

Som det allerede fremgaar af min Skrivelse af 1. August 1942 (Amtets J. Nr. 1942—311[22]), mener jeg ikke, jeg, naar Talen er om, hvilke midlertidige Bestemmelser jeg paa Embeds Vegne kan anbefale, kan indtage andet Standpunkt end det, at der baade kan og bør findes en midlertidig Ordning, der dels tillader, at jeg ogsaa under Besættelsen fortsætter med at varetage den mig som Sorenskriver (Dommer) betroede Embedsstillings forskellige Hverv uden unødvendige Indskrænkninger heri, og dels erstatter den Adgang til Anke og Kære, som Retsplejeloven og vistnok ogsaa Grundloven tilsikrer Befolkningen, med en anden Form for Appel, der saa vidt muligt indebærer de samme forfatningsmæssige Garantier med Hensyn til Dommernes Uafhængighed og Lovkyndighed som den i Lovgivningen hidtil fastsatte Ordning.

Naar jeg, nagtet jeg nærer stor Tvivl om, hvorvidt den ved Amtets Kundgørelser Nr. 13 af 17. Juni 1940 og Nr. 50 af 17. December 1942 indførte Ordning af Retsplejen virkelig var tilstrækkeligt begrundet i og derfor hjemlet ved den foreliggende Nødssituation, jfr. herom nedenfor, alligevel har medvirket til at gennemføre denne Ordning, saa er det sket ud fra den Betragtning, at jeg ved at vægre mig ved at medvirke antagelig vilde have været med til at hidføre det, der dog vilde have været endnu mere stridende mod Befolkningens Interesser og mod min højtidelige Forsikring om at ville holde Grundloven samt min Forpligtelse over for Kongen til med Troefasthed og Nidkærhed at opfylde de Pligter, som den mig betroede Stilling paalægger mig, nemlig det Udfald, at der slet ingen fast ansat Dommer havde været i Virksomhed.

Og naar jeg saaledes paa en Maade tvungen af Omstændighederne skal medvirke til Gennemførelsen af midlertidige Ordninger, for hvilke mindre i al Fald er medansvarlige, er det for mig af største Vigtighed, at de paagældende Ordninger, saa længe de politiske Forhold paa Færøerne i den Grad behersker Befolkningens daglige Interesse som nu, er tiltraadt af alle politiske Kredse; først i næste Række staar for mig Hensynet til, om Ordningen i Enkeltheder er saglig set mere eller mindre heldig.

Med Hensyn til de enkelte Punkter i den foreliggende Lagtingssag skal jeg bemærke følgende:

ad 1. Medvirken af »Domsmænd« ved Afgørelsen af alle eller nogle Arter af borgerlige Retssager i første Instans ved Underretten for Færøerne.

Efter mit Skøn er der ikke og har der aldrig været nogen Nødvendighed for at indføre Domsmænd i disse Sager. Den Omstændighed, at man, jfr. nedenfor ad 3, giver Afkald paa Sagkundskab ved den særlige Form for betingelsesfri Genoptagelse, som erstatter Anke og saaledes danner Afslutningen paa Sagens Behandling, kan dog umuligt medføre, at man ogsaa ved Sagens første Paadømmelse er nødt til at fjerne Garantien for en saglig sel rigtig Afgørelse; det havde efter mit Skøn været af stor Betydning for dem, der søger Domstolens Bistand, om de kunde have faaet i hver Sag i al Fald een Dom, der stod med den Autoritet, som kun den Afgørelse kan have, der er truffet af Personer, der opfylder aarhundredgamle Krav til Uddannelse og Uafhængighed og tilmed er udnævnt til deres Stilling paa Forfatningsmæssig Maade i Fredstid. En saadan Dom vilde have dannet et langt bedre Grundlag for en hvilken som helst Erstatning for en Appelinstans uansel dennes Sammensætning.

Jeg er derfor fuldt ud indforstaaet med Tendensen i Kundgørelse Nr. 50 af 17. December 1942 § 1 og med Sagførerforeningens Indstilling af 20. Oktober 1943 til Lagtingel.

ad 2. Medvirken af Domsmænd ved Afgørelsen af visse Arter af Straffesager i første Instans ved Underretten for Færøerne.

Da den for Tiden gældende Ordning er i Overensstemmelse med den, der gjaldt i alle Landets øvrige Retskredse ved Færøernes Besættelse, skal jeg ikke udtale mig imod den, men kun bemærke, at Indførelsen af Domsmandsordningen efter mit Skøn ikke var mere paakrævet end adskillige andre Lovændringer, som der ikke er arbejdet videre med at forberede end sige helt eller blot delvis at gennemføre under Besættelsen; jeg skal eksempelvis fra det Omraade, jeg kender bedst, blot nævne Tinglysningsloven, Lejeloven, Medhjælperloven, Funktionærloven, Næringsloven, Færdselsloven, Hundeloven, Loven om offentlig Forsorg og Skifteloven af 1925 for slet ikke at tale om en Række andre Ændringer i selve Retsplejeloven eller om de meget paakrævede Bestemmelser om Strafafsoning og lignende, som stadig savnes.

I Enkeltheder virker den nugældende Ordning paa flere Punkter uheldigt. Jeg er saaledes blandt meget andet ganske enig med Samraadet af 29. September 1943 i, at Listen bør forkortes stærkt. Endvidere bør blandt andet Domsmændenes Vederlag forhøjes og Listen udarbejdes med større Omhu end hidtil. Herom tillader jeg mig iøvrigt at forestaa et Samraad.

Sagførerforeningens Forslag om Valgfrihed for Tiltale vil, hvis det gennemføres, antagelig blive uden praktisk Betydning; jeg har derimod intet at erindre imod, at Domsmænd afskaffes ogsaa inden for Strafferetsplejen.

ad 3. Erstatning for den midlertidige umuliggjorte Adgang til Anke.

Jeg tillader mig herom endnu en Gang saa indtrængende som muligt at henstille, at der gøres et alvorligt Forsøg paa at finde en Ordning, hvorefter Sorenskriveren (Dommeren) ikke medvirker ved den særlige Genoptagelse, der for Tiden træder i Stedet for Anke. Det er efter mit Skøn højst uheldigt, at samme Dommer medvirker ved to Afgørelser af samme Sag paa samme Grundlag. Hvis der nedlægges andre Paastande, fremsættes nye Anbringender eller fremføres nye Reviser under

Sagens »fornyede Foretagelse«, er der ikke de samme Betænkeligheder, men en Ordning, hvorefter samme Person deltager i flere Afgørelser af samme Sags Formalitet eller Realitet, kan forøvrigt aldrig med Rette betegnes som Anke eller med Rette indføres som en midlertidig Erstatning — et Surrogat — for Anke. At bibringe Folk den Opfattelse, at »fornyet Foretagelse« er noget, der kan sammenlignes med, endsige træde i Stedet for Anke, er efter mit Skøn politisk uforsvarligt. Jeg kan i denne Forbindelse bemærke, at det er mit Indtryk, at de allerfleste Sager faktisk afgøres paa ganske samme Grundlag ved begge Paadømmelser.

Jeg finder en Ordning, hvorefter midlertidigt, men for Besættelsens Varighed antagne, myndige, uberyglede, vederhæftige Mænd eller Kvinder, som har dansk Indfødsret og alle de paa Lagtinget repræsenterede politiske Partiers Tillid uden Sorenskriverens (Dommerens) Medvirken virker som Dommere i en midlertidig Ankedomstol, for langt bedre end nogen af de af andre end mig selv foreslaaede eller gennemførte Ordninger, naar blot Sorenskriveren (Dommeren) til Gengæld faar samme Stilling som før Besættelsen. Han kunde jo, jfr. Retsplejelovens § 955, sidste Stykke, godt tilkaldes for at udtale sig om Sagen, men han bør absolut ikke have Stemmeret. Der bør formentlig være tre eller fem saadanne midlertidige Overdommere, og de bør formentlig udnævnes af Amtet i Forstaaelse med hele Lagtinget. Om de paagældende har juridisk Embedseksamen eller ikke, og om de er født eller bosat paa Færøerne eller ikke, forekommer mig i og for sig mindre væsentligt, naar de blot ikke staar i Tjenesteforhold til Staten og navnlig ikke er eller har været aktive Politikere eller — som det hedder i et Cirkulære af 1. April 1938 — ved deres tidligere Optræden har udvist en saadan personlig Fanatisme i religiøs, politisk eller anden Henseende, at de skønnes uegnede. Ogsaa de fornødne Stedfortrædere (Suppleanter) bør selvfølgelig være fast antagne.

Saa vidt min egen Mening; iøvrigt kan jeg tiltræde de af Samraadet af 29. September 1943 og Sagførerforeningen fremsatte Forslag, selvfølgelig ogsaa i den Form, at Luftværnschef cand. jur. P. Laursen, p. t. Thorshavn, træder i Stedet for Direktør cand. jur. Edw. Mitchs eller for Sagfører C. Christensen, eventuelt som en af disses Stedfortrædere eller med en af disse som sin Stedfortræder (Suppleant).

Om den ved Kundgørelse Nr. 50. af 17. December 1942 indførte Ordning skal jeg paa dette Sted kun tilføje, at jeg for kort Tid siden ganske tilfældigt blev opmærksom paa, at den synes at være ugyldig som ikke tilblevet paa rette Maade, da man ifølge Lagtingstidende for 1942 Side 165—166 ikke ses at have overholdt Bestemmelserne i Lagtingets Forretningsordens §§ 9, 13, 14, 15, 16, 17, 18, 19 og 39.

ad 4. Kæremaal.

Herom kan jeg i det hele henvise til mine Bemærkninger ad 3, kun at det her er endnu mere vildledende at tale om Kære, naar den, hvis Afgørelse eller Adfærd skal prøves, og som altsaa er og betegnes som Part i Sagen, selv skal deltage i Afgørelsen, omend han kun er en blandt flere; hans Stemme vil ikke desto mindre kunne gøre Udslaget. Man kunde for-

menflig godt undvære Kære; det kan i al Fald kun være mig til Ulempe, ikke andre.

ad 5. Valg og Udtagelse af Domsmænd.

Hvad dette Punkt angaar, er jeg enig med det under Samraadet af 29. September 1913 fremførte: Udtagelse til den enkelte Sag efter Retsag bør formentlig ske som efter Kundgørelse Nr. 13 af 17. Juni 1940 § 1 d. v. s. efter Sorenskriverens (Dommerens) frie Skøn, men naturligvis saaledes, at Hvervet saa vidt muligt gaar paa Omgang blandt de valgte. Fremgangsmaaden efter Kundgørelse Nr. 50 af 17. December 1942 § 2, 2. Stykke, med Lodtrækning og Nummerordning er næppe heldig, og Sagførerforeningens Forslag om Udskydelsesret turde repræsentere et overvundent Udviklingstrin inden for Retsplejens Historie. Jeg er villig til at udarbejde eller deltage i Udarbejdelsen af en Liste, hvoraf Lagtinget kan vælge de fornødne Domsmænd.

Om nærværende Sag som Helhed skal jeg sluttelig bemærke, at det efter mit Skøn bør haves i Erindring, at Udgangspunktet for alle Overvejelser angaaende Fastsættelsen af midlertidige Bestemmelser maa være den folkerettige Grundsætning, at de gældende Love skal respekteres ogsaa, naar den lovlige Magt faktisk er gaaet over i Hænderne paa den, der holder det paagældende Landområde besat, medmindre det er absolut umuligt at respektere Lovene.

Det drejer sig derfor ikke om at overveje, hvilken Lovgivningstilstand der vilde være den efter de midlertidige Magthaveres Skøn bedste, men om at overveje, hvilke Lempelser eller Erstatningsregler det er absolut nødvendigt at fastslaa for saa vidt muligt at sikre den offentlige Orden og det offentlige Liv.

(sign.) *Bonnevie.*

Amtmanden over Færøerne.

Skjal E til løgtingsmál X-20: Rættargongureglur.

LANDFOGEDEN PAA FÆRØERNE

Thorshavn, den 11. November 1943.

Hoslagt følger den med Amtels Skrivelse af 28. Oktober 1943 (1943/311[39]) modtagne Sag angaaende visse processuelle Forhold, om Ordningen af Rettergangen.

Efter Amtels Anmodning til Luftværnchef Poul Laursen om Genindtræden i Ankerelten kunde den bestaaende Ordning vel i og for sig paany anvendes. Da hele Spørgsmaalet om Ordningen af Rettergangen imidlertid synes at foreligge til Behandling, tillader jeg mig at fremkomme med følgende Bemærkninger:

Retsordningens Formaal maa formentlig være at skabe en indtil videre brugbar Ordning, der indeholder Garantier for de rigtige Afgørelser, og som nyder en saadan almindelig Tillid, at Afgørelserne respekteres og følges som rigtige.

Ordningen bør efter mit Skøn bygges op om den nuværende Dommers personlige og stillingsmæssige Autoritet som det faste Midtpunkt. Mangler denne paa den ene eller anden Maade, vil det formentlig svække Afgørelserne.

Den ved Besættelsen skabte Situation medfører formentlig herefter to Hovedspørgsmaal:

1. Hvorledes ordnes bedst den fra alle Sider anerkendte Nødvendighed af en Adgang til fornyet Prøvelse af afsagte Domme?
2. I hvilket Omfang bør Befolkningen efter den britiske Besættelse indføre Medvirken i Retsplejen gennem Domsmænd bevares?

Idet jeg angaaende det første Spørgsmaal, Ankeinstansen, tillader mig at henvise til det følgende, tillader jeg mig angaaende det andet Spørgsmaal at udtale:

Domsmænds Medvirken har efter mit Skøn betydet en stor Værdi for Retsplejen og for dens Virkninger i Samfundet, og den er en saa naturlig Følge af vor bestaaende Samfundsordning, at jeg vil anse det for rettest, at den bevares i det fulde Omfang og ikke begrænses til 12—20 fastere Domsmænd. Jeg vil ogsaa anse det for betænkeligt allerede efter saa faa Aars Forløb væsentligt at indskrænke eller ophæve et principielt saa vidtgaaende Skridt som Befolkningens Medvirken, uden at aldeles afgørende Grunde taler herfor. — Saa vidt det kan følges af Radioudsendelserne, medvirker i det øvrige Kongerige fortsat Domsmænd indenfor Strafferetsplejen.

I *civile*, borgerlige Sager har Domsmænds Medvirken som Regel næppe Betydning og vil alene besværliggøre Behandlingen. Langt de fleste af disse Sager er enten mindre betydelige eller af en speciel juridisk

Karakter. Skulde særlige Hensyn gøre sig gældende til Behandlingen, kan dette komme frem i Ankeinstansen, hvorom senere, idet vidtrækkende eller principielle Sager dog kan ventes paaanket.

I Straffesagerne er Forholdene et andet, og her vilde jeg kort skitseret anse det for ønskeligt, om Domsmænd bibeholdes som nu i 1ste Instans, og at der i Ankeinstansen — fælles for Straffesager og civile Sager — medvirker Domsmænd inden for en lille paa særlig Maade udvalgt Kreds og saaledes, at Dommeren helst medvirkede i begge Instanser.

Domsmænds Medvirken medfører uundgaaeligt et stærkt forøget Arbejde for Retten og praktiske Vanskeligheder i Sammenkaldelse af Domsmændene, i den langvarige Behandling, Sagerne kræver, og i Ulejligelse af de indkaldte Domsmænd, Vanskeligheder, der ogsaa delvis gør sig gældende for Politiet.

Men her overfor synes det mig at staa store Værdier. Ordningen tvinger alle i Retsbehandlingen deltagende til en indgaaende og for alle — og dermed ogsaa for den Tiltalte — forstaaelig Gennemgang af Sagen og af de Retshensyn, der gør sig gældende. Den Tiltalte ved, *hvorfor* han er dømt, og den hos en Tiltalt let forstaaelige Følelse af en Doms Urettfærdighed med deraf følgende Agitation mod Retsmyndighederne eller Samfundsordningen undgaaes eller begrænses. Da Domsmænd i særlig Grad synes at lægge Skyld og Ansvar i Tiltaltes (eller Parters) egen Forklaring mere end i de ydre Beviser, saasom Vidneforklaringer, begrænses ogsaa en eventuel Tilbøjelighed hos en Domfældt til senere at reagere overfor Vidner.

I det hele synes domfældte at høje sig for Domsmandsdomme, og i Dommenes Gennemførelse til Afsoning eller Betaling har der aldrig vist sig Vanskeligheder ud fra principiel Modstand mod disse.

Gennem Domsmændenes Deltagelse i Retsmøderne og i den efterfølgende Raadslagning sammen med Dommeren udbredes overalt paa Øerne et direkte Kendskab til Lovgivningen og til dens Virkninger i det enkelte Tilfælde. Dette bidrager til en Forstaaelse af det nødvendige i Lovens Krav og af det uundgaaelige i Straffedømmene til Gennemførelsen af Loven og dermed af den lovgivende Myndighed, alle dog er med til at udøve gennem Valgretten.

Selve Retsplejen tilføres der netop gennem den store Kreds af Domsmænd meget forskelligartede Synspunkter ofte ud fra Personskendskab eller af lokal eller traditionsmæssig Karakter, og Retten erholder et direkte Indtryk af Befolkningens Trang til Beskyttelse paa de forskellige Omraader.

Det kunde maaske have været befrygtet, at Domsmanden, der kun fungerer i den enkelte Sag og ikke har noget egentlig tjensligt Ansvar bag sig, men alene et personligt, moralsk, vilde vige tilbage for Ansvaret for Domfældelse.

Men dette har ikke været Tilfældet. Hovedtrækket i Domsmændenes Deltagelse synes for mig at have været en Tilbøjelighed til at skærpe Straffen for de alvorlige Forhold, som Samfundet ikke vil og kan taale. Og for den Tiltalte betyder en Skærpelse af den uungaaeligt alvorlige Straf i Realiteten mindre, medens der i de enkelte strenge Straffe ligger en meget stor forebyggende Virkning. Paa den anden Side synes Domsmændene i de mindre alvorlige Tilfælde, navnlig hvor den forurettede maaske ikke er helt sagesløs, at foretrække en Afvejelse i Retning af Formildelse og i det hele at se meget paa Motiverne og

Personens øvrige Omdømme, hvad der ikke har virket til Skade for Retsordenen eller Retsfølelsen. — Det man herved betænkes, at enhver Idømmelse af Straf, navnlig Frihedsstraf, paa Facroerne altid vil være et meget alvorligt Forhold, der vil hæfte ved en Person i hans Levetid, maaske i Slægtsled.

Erfaringen har vist en stor Ulyst til at møde som Tiltalt for en Ret af Domsmænd, og heri ligger ogsaa et betydeligt forebyggende Moment.

Selv om jeg ikke vil anse Domsmænds Medvirken som Nødvendighed, vil jeg dog ud fra det anførte anse det for meget ønskelig, og jeg tillader mig derfor for

1ste Instans

at foreslaa den nuværende Ordning med Domsmænd fra Nævningelisten bibeholdt, om muligt af praktiske Grunde med nogen Begrænsning efter Rejsefstand og Alder, og kun med Adgang til Fritagelse for Domsmænd i Tilstandelsessager (Rpl. § 925), men ikke efter Ønske eller med Ret til Udskydelse.

Da Behandlingen i 1ste Instans formentlig bør være saa god som muligt for gennemgaaende at kunne nøjes med een Behandling og undgaa 1ste Instans blot som et Mellemtrin, vilde jeg anse det for meget ønskeligt, om Dommeren tilførte Retten sin Autoritet ved personligt at lede denne eller i hvert Fald i det Omfang, dette praktisk er muligt. Foreligger saadanne Hindringer, kunde den juridiske Dommerfuldmægtig indtræde paa Dommerens Vegne, men ikke som selvstændig Dommer. Dette sidste kunde give et Indtryk af en Adskillelse mellem Instanserne, som dog ikke helt vil kunne foreligge.

Ankeinstansen:

Denne bør staa med den størst mulige Styrke og Tillid som den endelige Formidler af Lovgivningsmagtens Bestemmelser. —

1) Jeg vilde her anse det for overordentligt betydningsfuldt for Rettens Autoritet, om *Dommeren* personligt beklædte Formandssædet i Ankeretten. Der vil maaske blive rejst Indvendinger mod samme Dommer i begge Instanser med et Ønske om Bedømmelse ved forskellige Personer. Forskellen fra de andetsteds gældende Ordninger er dog mere af tilsyneladende Karakter. I Almindelighed gaar de bedst egnede Dommere ind i de højere og højeste Instanser og sikrer, trods de forskellige Personer, i høj Grad ensartede, særlig kvalificerede Synspunkter i Bedømmelsen. Med de faa Jurister her og med Dommeren som den eneste kongelig udnævnte og ansvarlige Dommer ligger en Ordning med Dommerens Medvirken i begge Instanser i Realiteten nærmere Udvælgelsen af de ensartede skolede Jurister i de forskellige Instanser end en Ordning, der overlader den ene af Instanserne til Personer uden en egentlig Dommers Autoritet og Ansvar.

Der bidrages herved ogsaa meget til den Ensartethed i Afgørelserne, der samfundsmæssigt formentlig er af uvurderlig Betydning. For Sagernes rigtige Afgørelse vilde jeg anse det meget betydningsfuldt, om netop Dommerens faktiske og juridiske Bedømmelse kan komme frem i Ankeinstansen ved Dommeren personlig. —

Antallet af Rettens Medlemmer bør formentlig ikke være under 5 (4) og ikke alle faste Medlemmer, for at undgaa Indtryk af for personligt prægede Afgørelser.

2) Som Medlemmer vilde jeg derefter foreslaa *2 Domsmænd*, med den højest mulige personlige Autoritet i Samfundet, og skiftende indenfor en Kreds paa 12—16 Medlemmer. Faste Domsmænds Indstilling og Syn og divergerende Opfattelser blandt Rettens Medlemmer kan blive for kendt. Skiftende Domsmænd vil bedre kunne holde igen overfor udprægede Afgørelser og i det hele afvejde og supplere hinanden, og der tilføres Retten et lille efter mit Skøn ikke helt uvæsentligt skæbnebestemt Moment.

Det vilde formentlig være naturligt, om Lagtinget som lovgivende Myndighed havde Indflydelse paa Valget, og betydningsfuldt for de paagældendes Virke, om de kunde staa med hele Lagtingets Tilslutning eller Garanti bag sig, formentlig helst uden selv at være aktivt virkende Politikere. Mulig kunde Aarslistendvalget for Nævningekredsen sammen med Dommeren udpege 24—32 eller maaske 50 Personer, blandt hvilke Lagtinget, helst eenstemmigt, valgte 12—16 Medlemmer, *eller* Lagtinget kunde, helst eenstemmigt, udpege en Kreds, blandt hvilke de 12—16 Domsmænd blev udtaget af Aarslistendvalg og Dommer.

3) Som Medlem af Ankeretten tillader jeg mig derhos at foreslaa *Sysselmanden*, een Sysselmand ad Gangen, skiftende efter Tur for en kortere Periode eller et bestemt Antal Sager og aldrig som Deltager i Sager fra eget Syssel. — Ingen ved bedre end Sysselmanden, hvor Brøst trænger til Afhjælpning, og ingen har fra sit daglige Arbejde et større Kendskab til Personer og Forhold. For Sysselmanden selv kunde det i den daglige Gerning være af Interesse og Betydning at have fulgt Sager, ofte ganske lignende hans egne, til den endelige Afslutning i Retsforhandling og Dom.

Sysselmanden er jo ogsaa forud netop Dommer i en Række Sager, han staar med et særligt tjenstligt Ansvar, og Sysselmændene har tidligere medvirket som Dommere i sidste Instans paa Færøerne. Sysselmandens medvirken vil sikkert fra alle Sider i Samfundet blive betragtet som baade naturlig og betryggende.

4) Derimod vilde jeg ikke anse det for paakrævet, at der i Ankeinstansen deltager andre *jurister* som saadanne end Dommeren. Alle juridiske Hensyn kan fuldtud varetages af Dommeren, og ingen anden midlertidigt — og dog paa lige Fod med Dommeren — indtrædende Jurist besidder tilnærmelsesvis det samme tjenstlige Ansvar.

Den indre Ordning i Ankeretten kunde herefter være den, at Dommeren i en Ankeret paa 4 Medlemmer — Dommeren, en Sysselmand og 2 Domsmænd — havde to Stemmer og hver af de øvrige Medlemmer een Stemme. Eller Retten kunde, med Dommerens Tiltræden, bestaa af 5 Medlemmer: Dommeren, en Jurist, — og da formentlig den i Ankeretten forblevne som den nærmeste, — en Sysselmand og 2 Domsmænd, alle hver med een Stemme. — Civile Sager kunde da afgøres af 3 Medlemmer, Dommeren, en Jurist, en Sysselmand, saaledes at Retten paa eget Initiativ eller paa Parternes Forslag eller Begæring tilkaldte to Domsmænd.

E. Landsnevndin bemyndiges til at yde Vareforsyningen et Tilskud, svarende til de Udgifter, som Vareforsyningens Ledelse kan dokumentere at have ved at ligge inde med en Nødbeholdning af Mel og Salt.

Á Føroya løgtingi, hin 3. Desember 1943.

Kr. Djurhuus. *A. Djurhuus.* *J. P. Henriksen.*

MINNILUTAÁLIT

I

løgtingsmáli nr. XIII-13|1943:

(Prístalsútrokningin).

Við skrivi av 13. september 1943 hevur amtið sent tinginum eittlongri skriv frá príseftiransingarráðnum av 1. s. m. um útroknan av prístalinum. Lógin, sum var gjørd um prísir og lønir í summar, sigur eisini, at hon skal verða løgd fyri lingið til eftirkannan áðrenn árið 1943 er útliðið:

Minnilutin (Robert Joensen og Th. Petersen) heldur fram:

Í sluttum skal her verða greitt frá nøkrum av tí, sum príseftiransingarráðið (í hesum álitti nevnt ráðið) hevur framborið; men av tí at hetta skriv er so langt, ger minnilutin nakrar viðmerkingar við hvørt einstakt petti í ráðsins úttalilsum.

Ráðið heldur fram, at tað er ikki gjørligt at gera eitt prístal, sum vernnliga verður heilt rættvíst, tí tað grundarlag, ein nýtur, er tað, sum eitt húsarhald brúkar av vørum, og tí fer prístalið, roknað út frá hesum, einans at verða bóskandi fyri fólk, sum hava sama livifól.

Minnilutin má halda, at hetta er ikki beint beint, og skal her serliga vísa á, at eitt prístal er eitt sammetingartal, sum eins væl kann byggja á einheitsprísir fyri vørur, soleiðis at vørunøgdin hjá húsarhaldinum, um hon er beint samanselt, hevur minst at týða.

Ráðið umtalar, hvussu gingist hevur við prístalinum og tess útrokning gjøgnum ta seinastu tíðina, og heldur, at har ein nøgd, sum húsarhaldið hevur roknað við, vernnliga ikki kann fáast, er neyðugt at ætla um, hvussu nógv skal takast við. Teir nevna, at prístalið fyri 1. oktober 1942 — eftir ætli — varð útroknað til 213; men tá tað var umroknað — uttan ætl — so var tað 234. Ráðið heldur, at tað var beint at ætla, og sigur um ta viðgerð, sum hetta mál fekk á tingi: »Det blev under Sagen fremholdt, at Priskontrolraadets Metode ved Pristalsberegningen var forkert, og at man ved de nævnte Tillæmpelser af Pristallet havde »berøvet« Arbejderne og andre, der lønnes efter Pristal, Løn, som de »havde Krav paa«. Man kan sikkert uden Overdrivelse sige, at Pristallet kun blev benyttet som et Argument under en rent lønpolitisk Kampagne.«

Minnilutin heldur, at ráðið við hesum orðum er farið langt utlanfyri sítt virki. Tingið hevur samtykt, at tað, sum fram var farið, var skeivt og átti at verða rættað, og ein almennur stovnur eigur ikki at leggja seg uppí tingsins samtykt á tann hátt, at teir leggja nakað beint annað inn í ta verunligi tingsamtyktina, men hetta ger ráðið, tá teir siga, at hetta hevur verið nýtt sum »Argument under en rent Lønpolitisk Kampagne.« Minnilutin má framhalda, at prístalið skal verða ein aritmetisk útroknan eftir fast ásettum reglum, og har eigir ikki at vera minsta rúm fyri ætli, annars verður prístalið ikki tað, sum tað skal verða, eitt sammetingartal millum prísirnar í 1939 og á tí degi, tað verður útroknað.

Ráðið signur um sítt egna virki: »Priskontrolraadets Opgave er: at føre Tilsyn med Priserne og hindre ubegrundede Stigninger. Derimod er Priskontrolraadet kun interesseret i Lønningernes Størrelse, forsaavidt som ekstraordinære Stigninger i Lønningerne tenderer til at tvinge Varepriserne i Vejret, og saaledes modvirker Raadets Arbejde.«

Minnilutin má halda, at tá tingið við lóg hevur álagt ráðnum at starvast við útroknan av prístalinum, so liggur eisini harí, at ráðið átti at fata eftiransan av lønum sum eina av sínum uppgávum.

Ráðið skrivar, at bretski Paymaster hevur hildið fram, at heila grundarlagið fyri útrokningina av prístalinum er skeivt og óvernligt, men at ráðið heldur grundarlagið vera forsvarligt, tó at tað meinar, at tað av røttum kann talast at teimum broytingum, sum í seinastuni eru gjørdar í hesum.

Minnilutin heldur tað vera skeivt av ráðnum á hendan hátt at tala at tingsins samtyktum, sum eru kunngjørdar við lóg, og má halda, at tað eigir at verða væl umhugsað, hvat ið eigir at verða gjørt fyri at útrokningin av øllum kann verða góðlikin sum heilt rettvís.

Ráðið heldur soleiðis fram í sínum skrivi: »Priskontrolraadet er stadig af den Formening, at det er rigtigst at lage et vist Hensyn til de ændrede Levevilkaar, der skyldes Krigen. *Raadet skal* derfor *anbefale*, at der paany gives det Myndighed til ved Pristalsberegningen at tage Rationering i Betragtning, saaledes at ingen Varer optages med større Kvantum end Budgetfamiliens Rationer. Man skal yderligere *anbefale*, at der gives Raadet Myndighed til i Budgettet at optage et efter Raadets Skøn passende Kvantum af Surrogater eller Erstatningsstoffer for de Varer, der saaledes udgaar af Budgettet. Faste Regler herom kan efter Sagens Natur ikke gives.«

Minnilutin má til hetta framhalda, at tað ikki kann verða talan um at geva einum ráði myndugleika til at ætla, hvat ið skal verða tikið við, og hvat ið ikki skal takast við, tað einasta kann verða at taka undir við hretska Paymaster, tá hann skjýtur upp, at tað skal verða loyvt at taka upp hóskandi nøgd av líknandi vørum, ið kunnu fáast, men at annars má øll nøgdin av tí upprunaligu vøru takast við, um hon so ikki kann útvegast.

Ráðið nevnir, at Paymaster skjýtur upp, at íslendskar vørur skulu ikki ávirka prístalið, tí tað er nakað, sum kemur uttanfyri tann vanliga tilflutningin, og altíð í smánum nøgdum. Hetta heldur ráðið ikki bera til, tí tað hendur, at einki fæst av eini vøru uttan tað, sum er komið úr Íslandi.

Ráðið skrivar síðani: »Yderligere skal man fremdrage et af Paymaster ikki udtrykkeligt omhandlet Tilfælde, der fremkommer under Prístalsberegningen. Der tænkes her paa Varer, der vel nok er rationerede, men som faktisk paa Grund af Indførselsrestriktioner eller Kvotaordninger kun fremkommer i bestemte, begrænsede Mængder.

Det anbefales, at der i disse Tilfælde gives Priskontrolraadet Bemyndigelse til kun at optage Varer i Budgettet med et saadant Kvantum, som Budgetfamilien vilde kunne opnaa med en lige Fordeling af de forhaandenværende Mængder.« So nevnir ráðið sum dømi ost, egg og mjólk, og heldur ráðið síðani fram: »Det *anbefales* derfor, at der gives Priskontrolraadet Bemyndigelse til *efter et fornuftigt Skøn* kun at optage saadanne Varer med det Kvantum, der kan optages at være for Haanden.«

Minnilutin má til hetta uppskot taka somu støðu, sum til tað, ið er framført frammanundan, at tað ikki kann vera beint at hava nakað ætl í útrokningini av prístalinum.

Ráðið sigur seg at vera samsint við Paymaster hjá Bretum, tá hann heldur fram, at miðalprísurin fyri vørur má útroknast soleiðis, at tað eisini verður ansað eftir nøgdini, sum er til av vøruni til teir ymisku prísirnar. Ráðið heldur tó, at hetta ikki ber til at fáa í lag, tí tað er ov trupult at fáa upplýsingar um, hvussu nógv er til av hvørjum slag.

Minnilutin má halda, at ein roynd má gerast fyri at finna fram til reglur, sum kunnu fremjast, fyri at prísirnir verða útroknaðir eisini eftir, hvussu nógv av vøruni er til tær ymisku príshæddir. Ið hvussu so er, kann tað gerast soleiðis, at um ein ógvuliga dýr vøra einans finnst í einari sýslu við lítlum fólkatali, so kann fólkatalið koma inn í útrokningina, so hesin høgi prísur ikki nervar miðalprísin meira enn hann eigir.

Ráðið kemur so við nøkrum viðmerkingum um útrokningina, sum fer fram í tvíningum, soleiðis at ein parturin verður roknaður eftir prísuppgávum, meðan hin parturin, sum til dømis vask, klæðir o. a. verður roknað við at hava stig eftir sama máli sum neyðsynjarvørurnar. Hetta hevur Paymaster bildið verið skeivt; men ráðið vísir á, at tað eftir teirra útrokningum hevur verið beint, og neyvan kann hetta gerast á annan hátt. Ráðið mælir til, at hetta verður óbroytt.

Ráðið nertur so við spurningin, sum er reistur av Paymaster, um heilt at broyta grundarlagið fyri prístalsútrokningina, og heldur ráðið her fram: »Det falder her straks i Øjnene, at der ikke fra de britiske Myndigheder er rejst nogen egentlig Kritik mod Budgettets oprindelige Sammensætning, men kun mod den Maade, hvorpaa de seneste Udregninger er foretaget. Det synes meget vanskeligt paa nuværende Tidspunkt at forandre selve Grundlaget for Pristallet. Grundlaget for Pristallet er jo en Sammenligning med Udgangspunktet i 1939, og dette Grundlag svigter selvfølgelig, dersom et helt nyt Grundlag skabes. En Forudsætning for at arbejde med et nyt Budget skulde ihvertfald synes at være, at man samtidig rekonstruerede et Budget pr. 1/7 1939 efter de gamle Priser, men dette vil være vanskeligt. I saa Tilfælde kan man formentlig ligesaa godt beholde det nu anvendte Budget. Det bemærkes i denne Forbindelse, at det var et af Hovedargumenterne ved Behandlingen af Pristalssagen i Laglingssamlingen 1942, at Priskontrolraadet ikke slavisk havde fulgt det oprindelige Budget, og at Sammenligningen med Førkrigspriserne derfor sviglede.«

Ráðið umtalar so tann møguleika at seta eitt heilt nýtt prístal fyri t. d. 1. oktober 1943, men teir fráráða hetta, og mæla til, at tað verður hildið fram við óbroyttum grundarlag fyri prístalsútrokningina.

Minnilutin heldur ikki, tað kann verða nakað í vegin fyri at broyta nøgdirnar av vørum, sum prístalið verður roknað eftir, ella taka nukrar nýggjar vørur við og lata aðrar ganga út, tí tað er ógvuliga lætt at fáa eftirkannað, hvat prísirnir vóru tann 1. juli 1939.

Sjálvandi má eitt grundarlag roknast út eftir hesum prísum frá 1939, tí annars er ógjørligt at rokna eitt sammetingartal, eitt prístal, út.

So kemur ráðið inn á spurningin, sum Paymaster hevur víst á, at allir prísir á vørum, sum nerta við prístalsútroknningina, eiga at verða eftiransaðir, og hámarksprísir eiga at verða ásettir fyri tær flestu av hesum vørum. Ráðið heldur fram, at tað longu eru ásettir hámarksprísir fyri allar tær týdningarmiklastu vørurnar í húsarhaldsyvirlitinum og leggur aftrat: »De Varer, der ikke er underkastet Maksimalpris, er enten af mindre Betydning — saasom Kartoffelmel, Rismel, Byggryn, Grønsager og Rosiner — eller forhandles af Vareforsyningen, hvorved Raadet har nøje Føling med Prisudviklingen.« Annars siga teir, verður havt eftirlit við øllum vørum. Teir halda ikki grund er til at ásetta hámarksprísir á fleiri vørur enn longu er gjørt.

Ráðið gevur nú eina langa frágreiðing um prísin á ymiskum vørum og kemur til tað úrslit, at atfinningarnar, sum Paymaster hevur gjørt, ikki eru beinar. Ráðið endar frágreiðing sína við hesum orðum: »Priskontrolraadet har behandlet de foranstaaende Priser udførligt, fordi det er af Vigtighed at slaa fast, at der ikke tillades urimelige Avancer paa de vigtigste Fødemidler.«

Síðani tekur ráðið til ummælis, at Paymaster hevur gjørt eina sammeting millum tað bretska prístalið og tað føroyska; men vísir til, at hetta er ikki heilt beint, tí tað koma so nógvar útreiðslur til ta føroysku vørurna við flutning og trygging fyri at flyta vørurnar til Føroya. Síðani nevnir ráðið, at Paymaster hevur hildið fram, at tað eigir at verða væl eftiransað við prísum í Føroyum; men sigur ráðið her, at tær reglur, ið eru galdandi, hava virkað gott, so teir mæla til, at eingin broyting verður gjørd. Ráðið heldur tað eisini verða skeivt at lata umboðsmenn fyri slættirnar verða limir av ráðunum, tí tílíkir umboðsmenn fara altíð at hava serstøðu, sum teir vilja verja, og tí ikki vera nóg ópartískir.

Minnilutin má um hesa frágreiðing í sínu heild siga, at tey einastu uppskot, ið finnast í hesum bræví, eru áheitanir um at geva ráðnum meira ræði til at virka inn á prístalið við at hava loyvi til at ætla um vørunøgdir og vøruprísir, og annars heldur ráðið, at alt eigir at vera, sum tað er. Minnilutin er ikki samdur við ráðið í hesum, og av tí at ráðið ikki er komið fram við nøkrum uppskoti um broytan í teim galdandi reglum, skal minnilutin niðanfyri loyva sær til at mæla tinginum til at fáa málið nærri kannað og gera tær neyðturvuligu broytingar.

Paymaster fyri bretska hervaldið í Føroyum hevur í skrivi av 18. juni 1943 gjørt hesar viðmerkingar og hesi uppskot:

Stabilisatión, priseftiransan og livikostnaðaryvirlit.

Fylgjandi uppskot eru gjørd eftir áheitan.

Livikostnaðaryvirlit.

1. Ein heilt nýggj húsarhaldsættan fyri 2 vaksin og 3 børn eigur at verða sett upp. Fylgjandi reglur eiga at verða hildnar.
   a) Rímilig mongd eignr at verða givin fyri postar, sum vanligt hava verið nýttir, **men** hæði postar og nøgdir mugu verða væl eftirhugd og umhugsaði.

b) Har tær nøgdir, ið eru hildnar neyðugar, ikki kunnu fáast, eiga tær nøgdir, ið kunnu fáast, at verða tiknar, og síðani eigur at verða løgd aftrat eitt hóskandi nøgd av líknandi vøru. Har eingin avgjørt líknandi vøra kann fáast, eigur fullt ønskiliga nøgdina at standa í ætlanini.

c) Einhvør postur, sum ællast at verða settur í húsarhaldsætlanina, eigur at verða væl eftirhugdur, og prísurin eigur at verða fastsettur ella eftiransaður. Prísir áttu at verið sammettir við prísir í U. K.

d) Allir postar í ætlanini eiga at verða tiknir antin eftir føstum prísum ella — og hetta er betur, tá fastir prísir eru hægstuprísir — eftir meðalprísinum í øllum oyggjunum.

Hesin meðalprísur eigur at verða útroknaður svarandi til tær nøgdir, ið verða viðgjørdar, soleiðis:

í »A«	1000 kg	à 25 oyr. pr. kg	—	kr.	250,-
- »B«	10 -	à 50 - - -	—	»	5,-
- »C«	5000 -	à 24 - - -	—	»	1.200,-
ialt	6010 kg		—	kr.	1.455,-

meðalprísur 24,2 oyru pr. kg.

NB.
(Eftir tí gamla misvísandi háttinum hevði miðalprísurin verið *33 oyru).*

e) Roknað eigur ikki at verða við nøkrum vørum, keyptum úr Íslandi, tí tær eru uttan fyri tær hóskandi ratiónirnar sendar úr United Kingdom og eru av lítlari nøgd og ógvuliga høgum prísi.

f) Nøgdirnar mugu ikki »ræltast« ella broytast órættvíst og bert fyri at ávirka hæddina á ætlanini.

g) Verunleiki eigur at vera grundin fyri hvørjari útrokning, og eingin postur í húsarhaldsætlanini eigur at verða hækkaður í prísi, bert tí at prísirnir á øðrum postum eru hækkaðir.

2. Tá ætlanin verður sett upp sum omanfyri víst og grundað á hóskandi fastar og/ella eftiransaðar prísir, útger hæddin á ætlanini tað nýggja normalbudget.

3. Fyri at fáa til vega stabilitet og sleppa undan óneyðuga tíðum broytingum, kundi ein margin av 5% yvir vanliga hædd verið lagt aftrat ætlanini.

4. Lønir eiga at verða fastsettar á tann hátt, at hæddin á ætlanini kemur fram, um arbeitt verður 48 tímar um vikuna í árinum.

5. Triðja ella sætta hvønn mánaða áttu teir fastsettu prísirnir at verða eftirhugdir og, um neyðugt, broyttir.

Prísirnir á ætlanini áttu tá at verðið settir av nýggjum og lønirnar broyttar so, at fullt endurgjald verður givið fyri einahvørja góðtikna hækkan ella lækkan, tó verður mælt til, at broytingar uppá minni enn t. d. 10% hvønn vegin verða ikki tiknar við. Hetta vildi verið tað einasta rættvísa grundarlag fyri tað tillegg uppá 5%, sum skotið varð uppá í pkt. 3, av tí at broytingar vildu verið óneyðugar imitil henda »pútar« uppá 5% er burtur.

Fastsetan og eftiransan av prísum.

1. Tá ið prísir einaferð eru fastseltir, eiga teir ikki at broytast uttan av væl prógvaðum ársøkum, sum ikki kann sleppast undan á annan hátt.
2. Hægstivinningur loyvdur heilsølu- og smásølumonnum bæði viðvíkjandi matvørum og luksusvørum eigur at verða fastsettur. Tá hetta verður gjørt, eigur hensýn at verða tikið til íbúgvaratalið og støddina av handli í teimum respektivu plássunum, og hægstivinningurin kann væl vera ymiskur og vera størst í teimum minnstu umráðunum. (Hetta er grundað á ta áskoðan, at ein størri vinningur er neyðugur fyri at halda eina krambúð ella goymslu við lítlum handli gangandi, enn tað nýtist til at halda eina við størri handli gangandi.)
3. Ólóglig yrki sum duld kommissión ella at fara upp um hægstapris ella -vinning eiga strangt at verða hildin niðri við sekt, við almennari kunngerðan og í ringum tilfellum av endurnýggjan av slíkum brotum við at steingja krambúðina ella við at nokta brotsmanninum longur at selja viðkomandi vøru.

Alment.

4. Nevndin viðvíkjandi prísseftiransan og livikostnaðaryvirlitinum eigur at vera sterk og væl umboðandi samfelagið. Bæði arbeiðarar og arbeiðsgevarar eiga at vera officielt umboðaðir.
5. Livikostnaðaryvirlitið eigur ikki at verða viðfarið (manipulated). Fastsetan av prísum og yvirlitinum eiga at vera hildin uttan fyri partapolitikk sum bert praktiskar og aritmetiskar útrokningar.
6. Um omanfyristandandi uppskot vórðu samtykt, eri eg vísur í, at bæði arbeiðarar og ein og hvør annar høvdu verið betur staddir. Lønirnar vildu verið minni, men fyri peningin, ið vannin varð, kundi verið keypt nógv meiri enn nú.

Minnilutin skal nú greiða frá sínu støðu til teir ymisku spurningar, sum liggja fyri í málinum:

Vøruprísirnir:

Minnilutin skal fyrst koma inn á sjálvan prísin á neyðsynjurvørum. Her sýnist ikki at vera gjørt nóg mikið til at fáa prísin niður, og skal nevndin her serliga vísa á mjølprísirnar, sum hava stóran part av prístalinum. Um ein tekur prísin á hveitimjøli, so vísir tað seg, at hann er hesin, roknaður fyri kilo:

Keypsluprísir í Bretlandi	55.6 oyr.
Flutningur	9.2 »
Trygging	2.7 »
Uppskipan, koyrsil og frakt her	5.0 »
Vørugjald	0.5 »
	73.0 oyr.

Her má minnilutin halda, at nakað eigur at verða gjørt. Fyrst eigur samráðing at fara fram um fraktina, tí meira enn 9 oyr. uppá kilo er ov nógv, serliga tá sluppfraktin — sum má ætlast at vera iva-

leysa høg — er 6.8 oyr. kilo. Síðani er tað tryggingin, sum við samráðingum álti at kunnað farið niður til eitt heilt lítlið gjald. Nevnt verður, at nógv av vøruni er tryggjað í Bretlandi, og tað má minnilutin halda verða skeivt, tí øll trygging eigur at liggja her á landi. Tryggingarfeløgini hava havt ógviliga góðar innløkur, og minnilutanum kunnugt, hevur neyvan skaði verið uppá trygging av vørufluttningi til Føroya. Um feløgini tí settu t. d. 1 % ella ½ % fyri sjó- og krígsskaða á neyðsynjarvørum til Føroya, so var tað ein góður vegur til at bøtt um vøruprísirnar. Eitt tílíkt tiltak hevði givið 2 oyr. minkan í prísunum á hvørjum kilo. Uppskipan, koyrsil og frakt innanoyggja er ógvuliga dýrt, tað kostar um 5 oyr. kilo, tað vil siga um 150.000 kr. árliga; her meinar minnilutin at okkurt eigur at kunna gerast, serliga við tað, at meira verður arbeitt fyri at fáa vøruna beinleiðis til tær ymisku oyggjarnar. Harnæst er tað keypið í Bretlandi. Tað er upplýst frá ráðnum, at lann seinasti mjølprísurin er pd. 26-2-0 pr. ton. Tá ein hugsar um tær útreiðslur, sum vit Føroyingar hava til frakt og trygging fyri at fáa vøruna til landið, so má tað óivað kunna ásannast frá Bretum, at vit áttu at fingið mjølið selt frá mylnuni fyri lægsta prís, t. v. s. uttan nakra umboðsløn á vegnum, men minnilutin má vera av tí áskoðan, at tað millum lann prís, mylnan fær og okkara innkeypsprís, liggur ein ikki heilt týdningarleys umboðsløn, sum er við til at nerva okkara prísir og prístal.

Soleiðis sum tað liggur við mjølinum, er støðan fyri fleiri av teimum mest nýttu vørum í okkara húsarhaldi, t. d. sukur og korn. Tað má kunna fáast í lag at seta prísin niður við nøkrum oyrum á hvørjum kilo, og verður so slatt nógvur peningur at verða spardur og virka við til, at okkara prístal varð hildið nógv lægri enn tað er í dag.

Minnilutin má eisini úttala, at tað er ikki greitt, hví ráðið sigur seg at kenna viðurskiftini hjá landshandlinum betri enn onnur viðurskifti, tí teir hava somu ábyrgd fyri øllum handilsskapi. Um landshandilsprísirnar má minnilutin úttala, at tí ráðið sjálvt sigur frá, at tað hevur játtað handlinum eina vinning uppá 7 oyr. kilo, so er hetta nógv hægri enn lógin gevur teimum rætt til at játta; fyri krígsið var vinningurin í beilsøla niður í ½ oyr. kilo og neyvan nakrantíð yvir 2 oyr. kilo, so tað mesta sum átti at verðið landshandlinum játtað er so slatt 2 oyr. x prístalið, tó at minnilutin má halda, at eisini hetta hevði verið ov nógv.

Vøruprísspurningurin heldur minnilutin vera ein hin mest týðandi látturin, og mælir tí til, at hann verður tikin upp soleiðis, at fyrst verður farið undir tær vørur, sum týða mest í prístalsútrokningini, og síðani allar aðrar vørur, og at tað við samráðingum og eftirkanningum verða gjørd munagóð tiltøk til at fáa prísirnar niður. Við prísinum fer so prístalið niður, og teir menn, ið verða løntir eftir prístalinum, standa seg minst eins væl, ella helst betri á henda hátt.

Grundarlagið fyri prístalsútrokningina.

Minnilutin kann ikki verða samsintur við ráðið um, at spurningurin um prístalsútrokningina kann loysast við at geva ráðnum meira myndugleika, tvørturímóti heldur minnilutin, at hetta er einasta leiðin, sum ikki er farandi eftir.

Fyrst er tað *spurningurin um húsarhaldsvørurnar,* sum skulu verða tiknar við í útrokningina. Her hevur Paymaster Breta hildið fram, at hetin eigir gjølla at eftirkannast. Minnilutin má fyrst siga, at hann trýr ikki, at ein broyting í teimum vørumøgdum, sum verða tiknar við, kann gera nakra broyting í prístalinum; um eitt roknar

prístalið eftir við øðrum nøgdum, t. d. tær ratiónir, sum kunnu fáast, og sjálvandi eisini seltur fyrsta lalið fyri 1939 javnbjóðis niður, so verður ein at koma til tað úrslit, at hetta ikki fer at hava nógv at týða. Eitt annað er, at minnilutin heldur, tað eigur at verða gjølla eftirkannað, um tað, eisini fyri framtíðina, ikki er beint at fara til eina meira gjølla eftirkannan av nøgdunum, fyri at seta ein húsarhaldskostnað, sum tað er vissa fyri, liggur so nær sum tað er gjørligt tí, ið vernuliga verður nýtt. Serliga eigir ein tílík kanning at fara fram, tá tað frá ymiskari síðu hevur verið talað at teimum nøgdum sum nú geva grundarlagið. Minnilutin skal eisini nevna, at tað hevur verið frambildið, at tað neyvan kann vera beint at taka t. d. hvalatvøst við, tá øll vita, at tað hevur ikki verið at fingið í fleiri ár.

Síðani er tað *spurningurin um prísásetan*, sum er ein ógvuliga týðandi táttur í prístalsskipanini. Her má minnilutin ásanna, at tann skipan, sum er í gildi, ikki sýnist at virka so væl. Um nógvar vørur verður eingin upplýsing send frá fleiri av sýslunum, soleiðis at prísurin verður settur eftir einari sýslu ella til tað sama, sum hann var til útrokningina frammanundan. Nú tá ið prísefterausingarráðið hevur ferðandi eftiransingarmann, sum slendur í sambánd við aðrar eftirlitsmenn á teim ymisku plássunum, er tað verd at umhugsa, at prísirnir koma fram gjøgnum hesar menn, fyri at verða meira samsvarandi tí, sum vøran til miðalprís kostar í handlinum. Um hetta mugu tað sjálvandi verða settar fastar reglur.

Útroknan av meðalprísinum er ein annar táttur, og har má minnilutin geva Paymaster viðhald í, at tað ikki ber til at fara fram sum nú, har allar sýslur telja eins, soleiðis at ein lítil nøgd av dýrari vøru í einari lítlari sýslu kemur at dýrka vørurnar og harvið hækka prístalið fyri alt landið, meðan umvent ein bílig vøra í lítlari nøgd kann minka prístalið. Tá spurningurin um áselan av prísunum fer yvir til eftirlitsmenninar, so má ein vegur finnast til at taka við í roknistykkið, hvussu nógv av vøru er til tær ymisku prísháddirnar, soleiðis at úrslitið verður betri. Heilt at siggja burtur frá vøru, sum kemur til landið aðrastaðni frá enn frá Bretlandi, heldur minnilutin ikki vera beint; men tað eigur einans at virka á prístalið samsvarandi nøgdina, sum komin er.

Grundarlagið yvirhøvur sýnist eisini at vera ov leyst. Minnilutin heldur tað verða neyðugt, at ein reglugerð verður gjørd, sum greitt vísir til, hvussu upplýsingar skulu útvegast, og síðani hvussu prístalið skal verða útroknað eftir teimum upplýsingum, sum fram eru komnar. Hvør einasti táttur eigur at verða viðgjørdur so greitt í eini reglugerð, at tað einans er eftir at seta seg at roknað eitt roknistykki heilt aritmetisk, utan at nakað rúm er fyri ætli hjá teimum mannum, sum skulu ænsa eftir útrokningini.

Her skal serliga vísast til, at Paymaster hevur gjørt atfinningar til, at ein partur av húsarhaldskostnaðinum verður roknaður eftir tí, sum hinar vørurnar eru broyttar í prísi. Minnilutin má ásanna, at hetta ikki er samsvarandi tað, sum eitt prístal skuldi verið, eitt reint samanetingartal millum prísir á tveimum ymiskum tíðarskeiðum. Sjálvt um tað fer at vera trupult at finna ein veg til at fáa broytan í hesum prísum til á rættan hátt at ávirka prístalið, so eigir tað at verða væl umhugsað og roynd verða gjørd fyri at fáa ta galdandi skipan broytta samsvarandi verunleikanum, og kanska finna vegin fram við at kunna eftir, hvussu hetta verður gjørt aðrastaðni. Sum nú er, hevur hesin partur higartil ávirkað prístalið á tann hátt, at tað er vorðið lægri enn

tað hevði verið uttan henda partin, men hetta kann við eftirkannan vísa seg at vera óbeint.

Undir øllum samráðingum um broytan av reglunum fyri útroknan av prístalinum og setan av regingerðini fyri framlíðina má nevndin halda, at tað er heilt neyðugt, at bæði arbeiðari og arbeiðsgevari eru umboðaðir.

Lønin, bretar gjalda.

Tað sæst av málinum, at Bretar í februar søgdu frá, at teir kundu ikki ganga við til hækkan av lønunum, og leggja teir aftrat, at tað eru tær nógvu hækkanir, sum vóru komnar í lí seinasta tíðini, sum høvdu gjørt hetta, og at tað einans var fyri inflatiónsvandan, og ikki tí teir vildu spara uppá peningin, at teir máttu fastholda hetta. Tann 10. juni varð gjørdur ein bráðfengis sáttmáli um, at gjaldast skuldi ein vikuløn fyri øll pláss uttan Vágar, har hin gamla lønin skuldi galda.

Bræv er komið frá Vøle, ovasta, tann 15. november 1943, har hann sigur frá, at hann ikki longur kann játta at gjalda vikuløn, men má fara aftur til eina tímaløn uppá kr. 2.27 frá 1. desember. Einki verður nevnt í hesum skrívi um, hvat ið lønin kann ætlast at fara at verða í Vágum. Tann 27. november 1943 sigur bretski ovastin í bræví frá, at hann vil gjalda krónir 2.60 í tímaløn í Havnini og á øðrum plássum, har higartil hevur verið goldin vikuløn, men heldur ikki her nevnir hann nakað um lønina í Vágum.

Nevndin hevur eisini fingið bræv frá arbeiðsmannafeløgum vesturí í Vágum, har tey kæra um, at Bretar einans gjalda teimum 160 og 170 oyr. um tíman, hóast gerðarættur hevur tilkent teimum løn eftir eini grundløn av 72 og 82 oyr., tað vil siga, at teir áttu at fingið kr. 2.32 um tíman í dag.

Minnilutin má her úttala, at tá ein kannar eftir teimum grundum, sum vórðu framhildnar av Bretum í vár um lønviðurskiftini, so er støðan ikki tann sama í dag sum tá. Prístalið, sum var hækkandi í 1941 og 1942, kom á hægsta stig í summar, og er síðani fallið frá 269 til 260, og tað er øllum greitt, at tað í seinastuni er gjørt nakað fyri at koma inflatiónini til lívs, soleiðis at prísir verða betur eftirransaðir nú. Minnilutin heldur tó, at hetta arbeiði bert kann sigast at vera byrjað enn, tí nógv meira er eftir at gera fyri at lækka prísirnar. Við sjálvum arbeiðinum fyri at fáa grundarlagið fyri prístalið broytt hevur gingist heldur trupult; prísseftiransingarráðið hevur, sum umrøtt frammanundan, ikki sett annað uppskot til tingið, enn at tað verður givið tí heimild til at ætla um summar av prísunum og vørunøgdunum; men hetta kann minnilutin ikki halda vera beint, og hetta møtir slættis ikki teimum alfinningum, sum Paymaster hjá Bretum hevur framsalt. Sjálvt arbeiðið við at fáa prísir og prístal í rættlag, má sjálvandi fara fram í prísseftiransingarnevndini, meðan tingarbeiðið einans kann verða at gera viðmerkingar til høvuðsreglurnar, sum tað eigur at vera farið fram eftir.

Tá støðan nú verunliga er tann, at inflatiónin og tann vandi, sum fylgir við hemi, í løtuni sýnist at verða steðgaður, heldur minnilutin, tað vildi verið rættast, um Bretar fórn at gjalda ta løn, sum sáttmálar millum arbeiðarar og arbeiðsgevarar, áseta her á landi. Tann semjon, sum kom í lag í summar var fyribils og varð gjørd út frá tí sjónarmiði, at prístalshækkanin syntist at halda áfram, men hetta er ikki verunleiki í dag. Minnilutin heldur tað vera ógvuliga umráðandi, at tað ikki vegna arbeiði fyri Bretar kemur ósemja millum arbeiðara og arbeiðsgevara her á landi, og taun støða, sum hevur verið fyri hetta

millumbilið síðani í summar, at arbeiðarin fær eina hægri løn frá einum føroyskum arbeiðsgevara enn frá einum bretskum, kann ikki standa við, uttan at táð kann verða orsøk til illstøður, sum kunna føra størri skaða við sær, enn lann skaði, sum kanska kann koma — tó at minnilutin ikki heldur hann kemur — av, at Bretar gjalda eina løn, sum eftir teirra tykki er væl so høg sammeli við prísviðurskiftini her á landi.

Serliga má minnilutin halda fram, at táð má vera skeivt at lønirnar í Vágum eru nakað fyri seg, og so munandi lægri enn á hinum oyggjunum. Her má minnilutin halda, at táð skal verða lagt Bretum eina við at fáa hetta í beina legu, tí minnilutin heldur hetta vera rangvørgt.

Tí nevnd, sum verður at seta til at halda áfram við arbeiðinum fyri eini nýskipan av prístalsútrokningini, heldur minnilutin táð eigur at verða álagt fyrst at fara til samráðingar við Bretar um at fáa greiða støðu á teirra langjaldan og at fáa lann mun, sum er millum løn hjá føroyskum og bretskum arbeiðsgevara burtur, tí henda munin heldur minnilutin verða vandafullan fyri samfelag okkara.

Sammeting við prístalið í Bretlandi.

Undir viðgerðini av hesum máli eru fleiri ferðir gjørdar sammetingar millum prístalið í Bretlandi og hjá okkum. Millum annað er fruinført í skrivi frá prísefliransingarráðnum, at bretska prístalið frá 1939 fyri tær vørur, sum eru í okkara húsarhaldskostnaði er hækkað við 53%, samsvarandi eitt prístal her uppá 153.

Minnilutin má framhalda, at ein eigir at vera ógvuliga varin við eina tílíkari sammeting. Fyrst má framhaldast, at flestu vørur í 1939, tá okkara grundtal varð fastlagt, vórðu keyptar í Danmørk og ikki í Bretlandi, og at munurin á prísunum á nógvum vørum var ikki lítil; síðani má ein minnast til, at kursurin fyri bretsk pund um summarið 1939, serliga seinnapartin av sumri, ridlaði um 20.00, men at virðið varð broytt í 1940 til 22.40, og hetta virkar inn á prístalið við í minsta lagi 15%, so veruliga eigur ein ikki at rokna okkum at verða byrjaðar við 100 í 1939, men við millum 115 og 120. Um ein so tekur uppí rokningstykkið, at fraktirnar, sum eitt bretskt felag lekur fyri at flyta okkum vørur til landið eru hækkaðar 200% á øllum vørunni, eisini á neyðsynjarvørum, og at tryggingargjaldið er um leið fyrfaldað, so verður táð ivasamt, um ikki okkara prístal er á góðari leið, kanska eitt sindur ov høgt, kanska eitt sindur ov lágt. Minnilutin skal her viðmerkja at farmagjaldsstiginí fyri vøruflutning til Føroya av ymiskum orsøkum fyri kríggið lógu væl hægri, enn tey vildu verið, um frí kapping hevði verið í hesum. Táð eru hesi ov høgu farmagjaldsstigini, sum av tí bretska felagnum, ið nú flytur okkum vørur, eru hækkaði 200%, so sjálvt um henda hækkan kann verða hóskandi, har frí kapping hevði ásett prísirnar, so vil táð við nærri eftirkannan óivað vísu seg, at hækkanin fyri vørur til Føroya er ov høg.

Minnilutin heldur táð vera skeivt at viðgera hetta mál út frá tílíkum sammetingum og skal her framføra eitt dømi. Táð verður í skrivinum frá Bretum víst á Ísland, sum hevur gjørt so nógv fyri at steðga prishækkanini, soleiðis at táð hevur gjørt »en væsentlig Nedsættelse af Løninger og Priser.« Í Føroyum er prístalið í summar fallið 9 stig frá 269 til 260, og so vítt minnilutanum kunnugt, var táð hallið, sum íslendska stjórnin fekk útlitt nakað táð sama, kanska nøkur stig meira, men táð íslendska talið liggur ógvuliga nær tí føroyska — eisini í dag aftaná teirra nýggju reglugerðir — og táð er vert at minnast til, at Ísland eins og vit hava trupulleikar av hækkandi

fraktum og hækkandi tryggingargjoldum. So fer ein til sammetingar, má ein koma til tað úrslit, at sammeting við Ísland vísir, at vit í Føroynum ikki eru á ringari leið við okkara skipan.

Príseftiransingarráðið.

Breiski Paymaster sigur í sínum skrivi, at nevndin viðvíkjandi príseftiransan eigur at vera væl umboðandi samfelagið, og bæði arbeiðari og arbeiðsgevari eiga at hava sæti í nevndini.

Tað nú sitandi ráðið sigur í sínum skrivi, at teir ikki kunna mæla til, at stættirnir verða umboðaðir og vísa til, at hetta heldur ikki er ásett í tí íslendsku lógini.

Minnilutin má útlala, at soleiðis sum ráðið nú er skipað, er tað ásett í kunngering nr. 59 av 9. desember 1941, og verður sagt, at ein limur (formaðurin) skal verða valdur av amtinum og tveir av løgtinginum. Síðani ásetur lógarreglan, at fyristøðumaðurin fyri gjaldstovuna skal taka lut í landum, sum ráðið heldur. Eingin limur má eiga lut í nøkrum virki, sum er nummælt í lógarregluni. Tað, sum minnilutin má halda vera serliga skeivt í hesum, er, at ein tílík nevnd ikki kann sigast at umboða samfelagið ella umboða tað væl, sum Paymaster heldur vera neyðugt.

Minnilutin heldur eisini, tað má vera skeivt at halda fram við tí sama príseftiransingarráð, tá løgtingið í skrivinum av 1. september 1943 hevur fingið boð frá hesum monnum um, at teir hava eina heilt aðra áskoðan enn tingið um útrokningina, og haraftrat átala ta støðu, sum tingmenn hava samtykt. Minnilutin heldur tí, tað er neyðugt at velja eina nýggja nevnd eftir nýggjum reglum.

Tá tað av røttum kann sigast, at ein ov stór nevnd ikki fer at arbeiða so smidliga sum ein lítil nevnd, og tá tað er neyðugt at hava eina heldur stóra nevnd, um ein skal fáa samvirki millum nevnd og allar stættir í landinum, skal minnilutin mæla tinginum til í staðin at áseta reglurnar soleiðis:

Ein umboðsnevnd uppá 8 limir verður vald soleiðis:

2 verða valdir av Føroya løgtingi,
1 verður valdur av Føroya arbeiðarafelag,
1 verður valdur av Føroya arbeiðsgevarafelag,
1 verður valdur av Føroya- og Suðuroyar fiskimannafelag,
1 verður valdur av Føroya búnaðarfelag,
1 verður valdur av Føroya keypmannafelag og
1 verður valdur av Havnar arbeiðsmannafelag.

Henda umboðsnevnd kemur saman og velur so ein formann fyri nevndina á tann hátt, at um eitt nevndarlimarevni ikki fær meira enn helvtina av atkvøðum í fyrsta umfari, so verður valt frítt einaferð aftrat, og um tá heldur eingin fær meirilutan, verður bundið val millum teir báðar, sum hava fingið flest atkvøður. Um atkvøðurnar standa á jøvnum seinastu ferðina, verður lutakast um valið.

Tann á henda hátt valdi formaðurin er formaður fyri tí verunliga príseftiransingarráðnum, sum er uppá tríggjar limir, formaðurin og teir tveir av tinginum valdu menninir.

Tað má so verða ásett, at ráðið hevur alt tað dagliga virki, sum skal førast í bók, og síðani kemur umboðsnevndin saman eina ferð um mánaðin fyri at eftirhyggja hesa bók, og fyri at fáa fyrilagt allar spurningar av størri týdningi, sum ráðið hevur skotið út til samráðingar við umboðsnevndina.

Verður skipað á henda hátt, kann ein vera vísur í, at allir

slætlír og øll samfelagssjónarmið eru umboðað, og tað vil tá kunna skipast soleiðis, at umboðsnevndin hevur í hondum at handfara málið viðvíkjandi eini umskipan av prístalsmálinum og eina gjølla eftirkannan av øllum vørupríslum, sum ávirka prístalið. Tað má tá vera umboðsnevndin, sum hevur í hondum at rokna sjálvt prístalið út.

Viðmerkingar til Paymaster Samuels skriv av 18.6.43.

Undir tí arbeiði, sum má fara fram fyri at fáa trygt grundarlag undir prístaliunum, heldur minnilutin, at tey í hesum skrivi nevndu uppskot eiga at verða fylgd, tó við hesum viðmerkingum:

Til e) Tað eigur ikki heilt at verða hildið uttanfyri útrokningina, hvørjar vørur, ið eru komnar úr Íslandi, men tað eigir at verða eftiransað, at tær ikki virka meira enn nøgdin er til.

til g) Tað eigir at verða umhugsað, um tað kann komast uttanum at hava eina deild, sum er útroknað samsvarandi prísbæddini av aðrari deild, men minnilutin heldur ikki tað er beint av tinginum at ásetta tað so avgjørt, sum framført er í hesum skrivi.

til 4) heldur minnilutin kemur at liggja uttanfyri tað beinleiðis arbeiðið hjá nevndini, men eigur hetta at verða umhugsað, tá løgsáttmálar skulu gerast.

til 5) Minnilutin heldur at prístalið eigur at verða útroknað triðja hvønn mánað og prísirnir eftirhugdir samstundis.

Annars hevur nevndin ongar viðmerkingar at gera til hetta skriv, sum í sínt heild sigur frá flestum av teimum ásetingum, sum umboðsnevndin eigur at leggja sær í geyma.

Broyting av straffireglum.

Nevndin hevur frá amtinum fingið sendandi skriv av 10. november 1943, sum vísir til ta broyting, sum tingið gjørdi í fjør um reglurnar fyri, hvussu stór bót skuldi verða áløgd fyri brot av prísefiransingini, ikki hevur virknø, sum ællanin var. Við kunngerð nr. 40 av 1. desember 1942 varð tað ásett, at bótin kundi verða hækkað upp til 10 ferðir av virðinum av tí peningi, brotsmaðurin hevur vunnið, og tað hevur vist seg, at tað hevur verið trongd til at fara upp um hetta mark, av tí at tað ávísta brotið í nøkrum sakarmálum hevur verið so lítið í virði. Minnilutin má ásanna, at her treingist til eina broytan og skal mæla tinginum til at samtykkja tað broytingaruppskot, sum er sent tinginum frá amtinum við viðmæli frá sorinskrivaranum.

Minnilutin (R. Joensen og Th. Petersen) skal vísandi til tað í álitinum framførda mæla tinginum til at samtykkja hetta

Uppskot:

A. Midlertidige Bestemmelser for Færøerne om Ændring i midlertidige Bestemmelser nr. 59 af 9. December 1941 om Priser.

Paragraf 1.

Paragraf 2 i Kundgørelse Nr. 59 af 9. December 1941 affattes saaledes:

»Der nedsættes et Repræsentantskab til at varetage Befolkningens Interesser i alle Prisspørgsmaal. Repræsentantskabet vælges paa følgende Maade:

2 Medlemmer vælges af Færøernes Lagting,
1 Medlem vælges af Føroya arbeiðarafelag,
1 Medlem vælges af Føroya arbeiðsgevarafelag,
1 Medlem vælges af Føroya fiskimannafelag og Suðuroyar fiskimannafelag i Forening,
1 Medlem vælges af Føroya búnaðarfelag,
1 Medlem vælges af Færøernes Købmandsforening, og
1 Medlem vælges af Havnar arbeiðsmannafelag.

Repræsentantskabets 8 Medlemmer træder sammen og vælger et Medlem, der er Formand for Repræsentantskabet. Valget foregaar paa den Maade, at der udfyldes Stemmesedler og ifald nogen har opnaaet 5 Stemmer, er han valgt. Opnaas denne Majoritet ikke i første Omgang, stemmes paa samme Maade en Gang til. Opnaas der heller ikke nu Majoritet, foregaar bundet Valg mellem de to Kandidater, der fik flest Stemmer ved anden Afstemning. Staar Stemmerne lige ved denne Afstemning, foretages der Lodtrækning mellem de to Kandidater.

Priskontrolraadet, jfr. Paragraf 1, bestaar af Formanden og de to af Lagtinget valgte Medlemmer af Repræsentantskabet. Disse maa ikke være interesserede eller knyttet til Erhvervsvirksomhed, der berøres af denne Kundgørelse.

Repræsentantskabet fastsætter Forretningsordenen for sig selv og for Priskontrolraadet, og fastsættes deri Arbejdsfordelingen, idet Repræsentantskabet har den overordnede Myndighed, medens Raadet har den daglige Ledelse af Arbejdet.«

Paragraf 2.

Paragraf 16 i samme Kundgørelse affattes saaledes:

»Det i Henhold til Paragraf 2 valgte Repræsentantskab udarbejder og offentliggør pr. hvert Aars 1. Januar, 1. April, 1. Juli og 1. Oktober et Pristal paa Grundlag af Priserne pr. 15. i den foregaaende Maaned.«

Paragraf 3.

Paragraf 17, Stk. 4, sidste Punktum i samme Kundgørelse affattes saaledes:

»Idømmes Bødestraf, skal denne fastsættes under Hensyntagen til det Beløb, der er eller skønnes at være indvundet ved Overtrædelsen, saaledes at Bøden som Regel fastsættes til 10 Gange det ommeldte Beløb.«

Paragraf 4.

Nærværende Bestemmelser træder i Kraft den 15. December 1943, og samtidig ophæves Tillæg I til midlertidige Bestemmelser for Færøerne Nr. 59 af 9. December 1941 om Priser kundgjort som Nr. 40 af 11. December 1942.

B. Løgtingið áleggur umboðsnevndini at fara undir arbeiðið við at fáa kannað teir nevndu spurningar, vísandi til tað, sum annars er framført í álitinum:

1. At samráðast við bretska hervaldið um skipan fyri arbeiðslønirnar, soleiðis at tær verða tær somu, um arbeiðarin virkar hjá einum føroyskum arbeiðsgevara ella hjá bretska hervaldinum.
2. At skaffa til vegar allar upplýsingar um vøruprísirnar, og síðani føra samráðingar um, hvønn táttin í útreiðslunum fyri at fáa vøruprísirnar niður,

3. At umhugsa um tann húsarhaldskostnaður, sum nú liggur til grund fyri prístalsútrokningina, eigir at broytast og gera uppskot til líkka broyting.
4. At útvega eina reglugerð fyri, hvussu prísir skulu fánst til prístalsútrokningina, hvussu meðaltalið fyri vøruprísin skal útroknast, og eftir hvørjum reglum vørur í húsarhaldinum kunnu umskiftast við líknandi vørum, tá tann áselta vøran ikki kann fáast.
5. Um umboðsnevndin kemur til tað úrslit, at broytan í lógarreglunum er neyðug fyri at fáa tað úrslit, sum nevndin heldur vera tað beinasta, skal nevndin við tað samta heita á landsnevndina hesum viðvíkjandi.
6. Umboðsnevndin skal allaná hvønn mánaðsfund geva frágreiðing til landsnevndina um, tað arbeiði, sum avrikað er, og hvat úrslit er komið burtur úr.

C. Løgtingið gevur landsnevndini heimild til, tá tað er tilmælt frá umboðsnevndini, og tá landsnevndin heldur tað verða neyðugt, at samtykkja løgtingsins vegna lógaruppskot fyri at fremja arbeiðið fyri at úlvega eina prístækkan í Føroyum.

Á Løgtingi, 2. desember 1943.

Rob. Joensen. *Th. Petersen.*

Pf. Landsprentsmiðjan, Tórshavn.

RED: 10 X



Nasjonalbibliote

Nasjonalbiblioteket
National Library of Norway
Rana Division
N-8607 Mo i Rana
Telephone: +47 75 12 11 11 Telefax: +47 75 12 1